Ár 1973, mánadagin 30. juli kl. 13.00 var løgtingið sett.

Formaðurin las skriv frá løgmanni dagfest 16. juli 1973, har løgmaður stevnir løgtingsmonnum til tings.

Formaðurin boðaði frá, at samgongan, sum fráboðað var aflaná seinasta løgtingsval um val av formannsskapi og skrivarum, stendur við.

Formaðurin bað Agnar Nielsen og Signar Hansen um at vera fyribilsskrivarar.

Síðan fór fram val av formannsskapi.

Til formann var valdur J. Fr. Øregaard.

Til næstformann var valdur Knút Wang (eftir lutakast millum hann og Finnboga Isaksen).

Til 1. skrivara var valdur Aguar Nielsen.

Til 2. skrivara var valdur Signar Hansen (eftir lutakast millum hann og Jógvan Sundstein).

Síðan fekk løgmaður orðið og helt løgmannsrøðuna (sí skjal 3).

Formaðurin bað tingmenn eftir gomlum siði reisast og rópa eitt niggjufalt livi fyri drottningini og eitt trýfalt fyri Føroyum.

Hetta var gjørt.

16. november 1973 fór fram atkvøða í tinginum - tingmálini 13/1973 og nr. 17/1973 - - um orðaskiftið í hesum málum skuldu útvarpast ella ikki. Útvarping varð samtykt við 14--0 atkvøðum.

4. apríl 1974 var utfan atkvøðugreiðslu avgjørt at fráfalla tíðarfrestina fyri tey mál sum eftir vóru at viðgera í tingsetuni.

18. mars las formaðurin skriv frá Kj. Mohr, har hann sigur frá, at hann vegna sjúku ikki hevur kunnað møtt á tingi frá 1/3 til 18/3.

6. apríl endaði tingsetan og løgmaður fekk orðið.

Eftir gomlum siði bað formaðurin tingmenn rópa eitt 9-falt hurrá fyri hennara hátign Margrethu, drottning, og eitt 3-falt hurrá fyri Føroyum.

So varð gjørt.

Tingsetan endað, gerðarbókin undirskrivað og upplisin.
Fundirnir vóru 73.
Skrásett tingmál vóru 121, umframt 9 skrásettir fyrispurningar.

Viðv. Løgtingstíðindi: í einstøkum málum er vist til skjøl og er yvirlit yvir tey. Annars er har tað er gjørligt og skjøl og skriv ikki eru tikin við, vist til teirra við journalnummar landsstýrisins.

Tingnevndir

(**Fastar nevndir** valdar 31. juli):

FIGGJARNEVND:

Fastir limir: **J. Fr. Øregaard,** Hilmar Kass, Trygve Samuelsen, Andreas Djurhuus, Knút Wang, Hanus við Høgadalsá og Finnbogi Isaksen (eftir at lutakast var millum hann og Kjartan Mohr).

Tiltaksmenn: Poul J. Olsen, Haldor Hansen, Leon Joensen, Johs. Olsen, Kj. Mohr, Jógvan Durhuus, Erlendur Patursson.

UMSÓKNARNEVND: Hilmar Bech, Leon Joensen og Jógvan Durhuus (eftir at lutakast var millum hann og Sigfried Skaale).

LANDSSTÝRISMÁLANEVND: J. Fr. Øregaard, Jógvan Olsen og Demmus Hentze (eftir at lutakast var millum hann og Erlend Patursson).

AÐRAR NEVNDIR:

SKATTANEVND (vald 14. aug): **Hilmar Bech,** Poul J. Olsen, Agnar Nielsen, Jógvan Sundstein og Finnbogi Isaksen.

LÓGARNEVND (vald 15. august): **Tr. Samuelsen,** Poul J. Olsen, Martin Joensen, Demmus Hentze og Signar Hansen.

FISKIVINNUNEVND (vald 15. august): **Poul J. Olsen,** Tórálvur Olsen, Leon Joensen, Hákun Djurhuus, Ove Mikkelsen.

SKÚLANEVND (vald 16. august): **Hilmar Bech,** Haldor Hansen, Leon Joensen, Sigfried Skaale og Signar Hansen.

MARKNADARNEVND (vard 17. august): J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen, Tr. Samuelsen, **Hilmar Kass,** Hákun Djurhuus, Kjartan Mohr, Erlendur Patursson.
Tiltakslimir: Tórolvur Olsen, Haldor Hansen, Andreas Djurhuus, Agnar Nielsen, Demmus Hentze, Jógvan Sundstein.

KOMMUNALNEVND (vald 13. nov. 1973): **Haldor Hansen,** Tórolvur Olsen, S. Skaale, Andr. Djurhuus, Jógvan Durhuus.

VEGA- OG HAVNANEVND (vald 23. nov): Haldor Hansen, Hilmar Bech, **Jógvan Olsen,** Hilmar Kass, Kjartan Mohr, Signar Hansen og Jógvan Durhuus (hesin seinast nevndi eftir lutakasti millum hann og Knút Wang).

SOSIALNEVND (vald 27. nov.): Hilmar Bech, Poul J. Olsen, **Johs. Olsen,** Jógvan Durhuus, Jógvan Sundstein.

FLOGVALLARNEVND (6-mannanevnd, vald 28. mars 1974):
Jógvan Durhuus, Kjartan Mohr, Hilmar Kass, Demmus Hentze, Leon Joensen, Haldor Hansen.

ORKUNEVND (vald 14. febr. 1974): **Haldor Hansen,** Martin Joensen, Andreas Djurhuus, Jógvan Olsen, Hákun Djurhuus, Ove Mikkelsen, Jógvan Durhuus (í lutakasti við Kj. Mohr).

KIRKJUNEVND (vald 6. mars): Johs. Olsen, **Hilmar Bech,** Poul J. Olsen, Signar Hansen, Kjartan Mohr.

ÚTVARPSNEVND (tingnevnd) (vald 7. mars): **J. P. Thomassen,** Martin Joensen, Demmus Hentze, Hanus við Høgadalsá, Agnar Nielsen.

6-MANNA TINGHÚSNEVND (vald 19. mars): Kj. Mohr, Hilmar Bech, **Tr. Samuelsen,** Hákun Djurhuus, Finnbogi Isaksen, Hilmar Kass.

Nøvnini á nevndarformonnunum eru sett við feitum.

Frágreiðing frá løgmanni 1973

Eftir at Løgtingið var sett mánadagin 30. juli, helt løgmaður røðu.
Røðan er prentað sum skjal 3.

1. Fíggjarløgtingslóg 1974/75

Ar 1973, 1. aug. legði Petur F. Christiansen, landsstýrismaður fram

Uppskot
til
Fíggjarløgtingslóg 1974/75

sí skjal 2.

1. viðgerð 31. januar — 1. februar 1974 og málið beint í fíggjarnevndina, sum 25. mars 1974 legði fram soljóðandi

Álit

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt uppskotið frá landsstýrinum og saman við tí ymisk tilmæli um broytingar frá landsstýrinum, ymsum stovnum o.ø.
Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og eitt minniluta.

Meirilutin førir fram:

Eftir fyriliggjandi uppskoti er javnvágin í mun til landsstýrisuppskotið hækkað við 20 milj. kr. Tær størstu hækkingarnar eru á § 19: Almenn forsorg v.m. við 5.304.000,- kr., § 12: Heilsumál 4.287.000 kr., § 13: Samferðslumál 1 milj. kr. og § 14: Skúlamál 3.660.000 kr.
Í álitinum verða bert tær broytingar umrøddar, sum gjørdar eru undir nevndarviðgerðini, meðan tað annars verður vist til uppskotið hjá landsstýrinum saman við fylgiskjølum og viðmerkingum.

(F.L. J. nr. 400-19)

Inntøkurnar:

Í samráð við gjaldstovuna og líkningarráðið er mett um inntøkurnar.

Álíkuaðar eru fyri skattaárið 1973/74 um 74 milj. kr. til landskassan, tá er fólkapensjónsskatturin ikki taldur við. Enn er lítið á leið komið í líkningini hjá kommununum, og er ti torført at meta um, hvussu nógv verður líknað komandi fíggjarár. Við teimum upplýsingum, ið liggja fyri, er útlit til, at landsskatturin við óbroyttum skattastiga, verður um 20% lægri enn árið fyri ella um 89 milj. kr. Landsstýrið hevur í tingsetuni lagt uppskot fram um at broyta skattastigan. Uppskotið er samtykt, og lækkar landsskatturin av hesi broyting við 6 milj. kr., ella 83 milj. kr.

Innflutningsgjøldini eru 1973/74 mett til 102 milj. kr. og eru í uppskotinum sett til 109 milj. kr.

Nettoinntøkan øll hækkar við 21 milj. kr.

Útreiðslurnar:

Um lønir kann sigast, at tær í uppskotinum eru hækkaðar svarandi til prístalið pr. 1. januar 1974.

§ 10: Løgtingið.

3.1: Løgtingstíðindi og Kunngerðarsavn, prenting v.m.

Vegna hækkandi útreiðslur til pappír og prenting eru settar 15.000 kr. av afturat.

Øll § 10 er hækkað við 84.000 kr.

§ 11: Landsfyrisitingin.

5.2. Líkningarráð, skrivstovufólk.

Søkt verður um at seta 2 skrivstovufólk og ein næming afturat, arbeiðið er vaksið.

Mælt verður bert til at játta eitt skrivstovufólk. Meirútreiðslan er 40.000 kr.

7. Gjaldstovan.

4. Húsaútreiðslur.

Av tí, at arbeiðshølini í Tinganesi hjá skattadeildini eru ov trong, verður deildin flutt í leigað høli yviri við Strond, viddin er 288 m², og er leigan 73.000 kr. árliga eftir prístalinum.

7. Aðrar útreiðslur.

Landskassaroknskapurin verður frá 1. apríl 1974 førdur á EDV-tólum. Tólini verða fyrstu mánaðarnar leigað, og um tey vísa seg at hóska væl,

verða tey keypt. Kostnaðurin er 260.000 kr.

Til innkoyringina og til at gera starvsfólkini kunnug í nýtsluni av tólunum krevst ein eykajáttan uppá 265.000 kr.

Øll § 11 er hækkað við 1.057.000 kr.

§ 12. Heilsumál.

1, 2, 3 og 4: Sjúkrahúsini.

Nevndin hevur fingið uppskotini til figgjarætlan fyri Landssjúkrahúsið, Suðuroyar sjúkrahús og Tuberklastøðina, meðan eitt onki uppskot fyriliggur fyri Klaksvíkar sjúkrahús.

Uppskotið frá Landssjúkrahúsinum er fyri fyrstu ferð í tveimum pørtum, hin fyrri parturin byggir so at siga á figgjarætlanina árið fraumanundan, soleiðis at bert prísvøksturin er innroknaður í tølini, samlaði kostnaðurin er mettur til 25.903.000 kr. Í ti seinra partinum eru tiknar við nýnormeringin og keyp av ymiskum tólum, kostnaðurin her er mettur til 4.157.300 kr. og kann hann býtast soleiðis upp:

Ráðgevara í fysiurgi	79.700 kr.
serlækna í lungasjúkum	92.500 kr.
Bókavørður til sjúklingarnar	16.400 kr.
Føst sjúkrasystravakt á skaðastovuni	357.400 kr.
Serlækna í patalogi og starvsfólk	421.000 kr.
Læknatól v.m. til patalogiska deild	600.000 kr.
Starvsfólk til intensiva viðgerðadeild	1.050.000 kr.
Læknatól v.m. til intensiga deild	386.000 kr.
Gastroenterologiska starvsstovu tól v.m.	200.000 kr.
Socialráðgevari	4.800 kr.
Ymisk tól serliga til røntgendeildina	949.000 kr.

Nevndin hevur samráðst við landsstýrið um eykajáttanirnar.

Tá ið løgtingið samtykti at útbyggja og modernisera landssjúkrahúsið var havt í huga, at sjúkrahúsverkið í Føroyum skuldi verða ført fyri at viðgera sjúklingar her heima í tann mun, vit høvdu figgjarligu møguleikar at manna sjúkrahúsini við lækunum við serkunnleika og øðrum starvsfólki og at útvega neyðuga útgerð.

Landssjúkrahúsið hevur nú staðið liðugt í eini tvey ár. Nýggj støv eru normerað og nýggj tól eru játtað bæði í samband við byggingina og síðani. Útreiðslurnar hava verið vaksandi, og er játtanin til sjúkrahúsraksturin ein av teimum hægstu á figgjarlógini.

Tað eykauppskot, ið nú liggur fyri, er eitt so stórt lop í mun til figgjar-

ætlanina frammanundan, at nevndin ikki sær sær fari at taka við uppskotinum. Heldur kundi nevndin lagsað sær, at sjúkrahúsini gera eina langtíðarætlan t.d. fyri komandi 10 árini um sjúkraviðgerðina, og at ætlanin síðani so liðandi verður framd.

Óivað eru tó ymisk støv, ið eiga at setast í, og ymisk útgerð, ið skal keypast komandi fíggjarár. Tí verður skotið upp at játta 1.850.000 kr. av eykaætlanini. Tað er ein treyt, at landsstýrið góðkennir hvussu játtanin verður nýtt.

Meirútreiðslurnar til sjúkrahús eru eftir hesum:

Landssjúkrahúsið	3.302.250 kr.
Klaksvíkar sjúkrahús (fyribils tøl)	624.090 kr.
Suðuroyar sjúkrahús	87.850 kr.
Tuberklastøðin	12.000 kr.
Tilsamans	4.026.190 kr.

5. Læknar.

Um uppskotini í álitinum um nýggja kommunulæknaskipan verða góðkend, eru meirútreiðslurnar til kommunulæknar av skipanini 200.000 kr.

6. Hvíldarheimið Naina.

Játtanin er hækkað við 15.000 kr.

Øll § 12 er hækkað við 4.287.000 kr.

§ 13: Samferðslumál.

1.2: Bensingjald.

Við tí nógv vaksandi ferðslu av akfarum og sum vegabýtið millum land og kommunur er, eru kommununrnar í tí støðu, at tær við teimum inntøkumøguleikum, tær hava, ikki eru førar at viðlíkahalda og asfaltera teirra part av veganetinum.

At gera kommununrnar betri fyri at bøta um hesi viðurskifti verður mælt til, at 4 milj. kr. burtur av innflutningsgjaldinum av bensini, sum annars alt fer í landskassan, verður sett í grunn.

Hesin grunnur skal hava til endamáls at veita kommunum studning til asfaltering uv vegum við upp til 100 kr. pr. íbúgva eftir seinastu fólkateljing.

Innflutningsgjaldið verður mett til 9 milj. kr. Nettoútreiðsla landskass-

ans til nýggjar vegir og brýr verður 4 milj. kr. hægri enn eftir landsstýrisuppskotinum.

Nevndin er samd um at landsstýrið eigur at fremja vegabyggingina soleiðis, at øll størri vegaarbeiði verða boðin út.

Annars hevur landsstýrið sent nevndini nýtt uppskot um játtan til nýggjar vegir og brýr. Eftir uppskotinum skuldi játtanin hækkast við 7 mió. kr. Nevndin heldur ikki fíggjarligar møguleikar vera at laka meira enn tær 15 mió. kr. beinleiðis yvir figgjarlógina, og mælir til, at játtanin verður nýtt soleiðis:

Elduvíkarvegurin		1,2 milj. kr.	
Toftir - Runavík		0,8 milj. kr.	
Gøta - Gøtugjógv		2,5 milj. kr.	
Eiðisvegurin		2,0 milj. kr.	
Um Hvalvík		2,0 milj. kr.	
í Kollafirði		1,0 milj. kr.	
Um Sandavág		2,0 milj. kr.	
Sand - Skopun		2,5 milj. kr.	
Vág - Hov		3,0 milj. kr.	
Sundsvegurin		1,5 milj. kr.	
Vegur á Kalsoynni		0,8 milj. kr.	
Funning - Funningsfjørð		1,0 milj. kr.	
Sekundærir vegir		0,5 milj. kr.	
Ferjulegur		1,0 milj. kr.	
Ymiskir studningar (kommunalir vegir á høvuðssamferðslul.)		1,5 milj. kr.	
Grótbrot og asfaltverk		1,0 milj. kr.	
Miðstøðuverkstaður		1,0 milj. kr.	
Asfaltering og ábøtur		4,5 milj. kr.	
Viðlíkahald		6,2 milj. kr.	36.000.000 kr.
Bilgjøld	kr. 4.000.000		
Benzingjøld	kr. 5.000.000		
kommunumar partur	kr. 2.000.000		
Beinleiðis játtan	kr. 15.000.000		26.000.000 kr.
Lántøkuheimild sambært § 40			10.000.000 kr.
§ 13.6: Berghols og brúgvagerð			5.000.000 kr.
Til vegir, berghol og brúgvagerð, tilsamans			41.000.000 kr.

Øll § 13 er hækkað við 4 mió. kr.

§ 14: Skúlamál.
2. Studentaskúli.
5. Ognarútreiðslur. Skúlin hevur søkt um at fáa játtan til útskifting av oljufýrunum til gassolju, keyp av offsettóli, búnyttur til forhøllina og til keyp av automat til matarhøllina, tilsamans um 56.000 kr. Heraftrat er kostnaðurin til brenni og ljós hækkaður við 94.000 kr.

6. Kostdeildin
søkir um 30.000 kr. til m.a. útskifting av vindeygum og 30.000 kr. til keyp av eplakókara. Herumframt eru útreiðslurnar til brenni og ljós hækkaðar.

3. Føroya Sjómansskúli.
2. Amboð.
Skúlin hevur sent nýtt yvirlit yvir keyp o.t. av amboðum.
Í uppskotinum frá nevndini er bert tikið við:

Umsiling o.t. av amboðum	50.000 kr.
2 samtalulag (skip til skip og skip til land)	40.000 kr.
Útgerð til eina stovu í alisfrøði	45.000 kr.
Eldsløkkingarskeið	50.000 kr.
tilsamans	185.000 kr.

3. Ognarútreiðslur.
Av nýggja yvirlitinum, har kostnaðurin er mettur til 287.594 kr. og av hesum til inngirðing av skúlaøkinum 110.000 kr. er av hesum seinra bert 60.000 kr. tiknar við.

4. Klaksvíkar Sjómansskúli.
Skúlin kom ov seint við uppskotinum til fíggjarætlan, at hann kom við í uppskoti landsstýrisins. Vanliga nettorakstrarútreiðslurnar eru mettar til 662.000 kr. og heraftrat koma 62.000 kr. til keyp av eini radiostøð í samband við undirvisingina av fjarritarum.
Vist verður annars til, at landsstýrið hevur lagt uppskot fyri løgtingið um, at landið frá komandi skúlaári yvirtekur ognir og rakstur skúlans. Tílík broyting førir ikki eykaútreiðslur við sær.

7.1. Lánigrunnur til ítróttaranlegg.
Landsstýrið mælir til at veita 200.000 kr. til keyp av ætlanum til bygging av ítróttarhøllum í kommununum í staðin fyri, at hvør kommuna sær fer undir hesa útreiðslu.

7.2. Studningur til I.S.F.

Skriv er frá ítróttarsambandinum um, at studningurin verður hækkaður til 500.000 kr.

Skotið verður upp at veita 200.000 kr. í studningi, soleiðis at tær 100.000 kr. verða nýttar at gjalda gamla skuld og hinar 100.000 kr. til ítróttarfeløgunum á staðnum í studningi til venjarar.

8.2. Grunnurin til læraraskúlanæmingar.

Umsókn er frá Føroya Læraraskúla um, at studningurin til næmingar skúlans verður settur upp fyri seg og ikki samsvarandi við teimum, ið ganga á læraraskúla aðrastaðni.

Í uppskotinum eru 10.000 kr. ætlaðar til Føroya Læraraskúla.

8.12. Næmingastudningur til listamenn.

Studningurin er hækkaður við 1.000 kr.

8.14. Meginfelag føroyska studenta.

Felagið kom ov seint · fyri ólavsøku · við umsóknini um játtan, men søkir nú um 31.000 kr.

Øll § 14 er hækkað við 3.660.000 kr.

§ 15: Vísind, bókmentir og list.

2.4: Fólkabókasavn, til rithøvundar.

Studningurin er hækkaður við 7.000 kr.

3.4: Landsskjalasavn.

Í komandi ári flytir landsskjalasavnið inn í høli á starvsstovuni á Debesartrøð, keyp av ymsum búnyttum eru neyðugar í hesum sambandi. Landsstýrið mælir til at játta 310.000 kr. til keyp av hillum.

4.1: Føroya Forminnissavn.

Á ólavsøku søkti forminnissavnið um, at normerað starvið sum ransóknarleiðari til savnsvørðn í etnologi, vist varð til tær uppgávur, savnið hevur eftir lógini. Landsstýrið kundi ikki taka undir í uppskotinum, fyrr enn semja var millum savnið og fróðskaparsetrið um, hvussu arbeiðið hjá avtiknu tjóðlívsnevndini skulu býtast millum hesar stovnar. Tílík semja fyriliggur nú.

Nevndin skjýtur ikki upp, at starvið verður játtað.

6. Fiskiransóknarstovan.

Ransóknarstovan søkir um, at játtaðir verða ein fiskifrøðingur ein fiskifrøðingahjálpari aftrat, vist verður til tær uppgávur stovnurin eigur at røkja og sum hann bert kann røkja, um manningartalið verður hækkað.

Nevndini kunnugt, hevur rikisstýrið, sum eftir avtalu luttekur við helvtini av rukstrinum, ikki játtað at hækkað manningatalið.

Nevndin setur ikki uppskot fram um játtan.

8. Náttúrgripasavn.

6. Aðrar útreiðslur.

Savnið søkir um, at játtaður verður peningur til ein jarðfrøðing at taka sær av teimum rannsóknum, ið eru gjørdar, og sum mugu fara fram at fáa eina betri mynd av botnskapinum og havøkinum uttan um Føroyar. Ymsar mátingar og botnroyndir eru gjørdar innanfyri 100 m dýpdarlinjuna úr Føroyum og herumfrumt eru 1.000 botnroyndir liknar uttanfyri. Tilfarið, sum fingið er, er so stórt, at neyðugt er til kanningar av tilfarinum at seta ein mann aftrat, til kanningarnar eru lidnar. Ivasamt er um Danmarks Geologiske undersøgelser fær játtan og verður tí mælt til, at løgtingið um neyðugt játtar kostnaðin, mettur til 70.000 kr.

Í samband við nevndu kanningar stendur í boði, at eitt av skipum D.G.U.'s á heimferð úr Grønlandi ger ein steðg í Føroyum at gera magnetiskar og seismiskar botnkanningar undir Føroyum, kostnaðurin er mettur til 30.000 kr.

Nevndin tekur undir í hesum umsóknum.

9. Fróðskaparsetur Føroya.

Eftir landsstýrisuppskotinum var spurningurin um framhald av støðisútbúgvingini eftir tí, sum tá lá fyri, óloystur.

Setursráðið hevur nú á fundi við nevndina sagt frá, at tað einmælt hevur samtykt at steðga við at taka upp nýggjar næmingar til støðisútbúgvingina í eitt ár samstundis, sum hugsað verður um og avmarkað verður, hvørjar undirvísingaruppgávur, setrið í framtíðini eigur at taka uppá seg. Setrið biður um eina játtan uppá 170.000 kr. at nýta í samráð við landsstýrið at kanna hvørjar uppgávur setrið í framtíðini eigur at taka uppá seg og leggja til rættis.

Landsstýrið heldur, at støðisútbúgvingin var byrjanin á eini hægri útbúgving í Føroyum, sum kundi verið støði undir eini enn hægri læru. Hin vegin ásannar landsstýrið, tað vera ógjørligt at halda fram, um ikki setursráðið tekur undir.

Settar eru 170.000 kr. av (undir konto 7) til kanningar.

Síðani farið varð undir prógleysu ársskeiðini í føroyskum fyri lærarar og studentar í 1964, fyrst á Málstovui Føroya Fróðskaparfelags og síðani á fróðskaparsetrinum, hevur alla tíðina verið havt í huga, at undirvísingin í føroyskum skuldu útbyggjast so víð og víð tit at umfata framhaldsprógv fyri lærarar og akademiskt prógv í føroyskum at javnmeta við hjágrein frá lærdum háskúla.

Setrið hevur nú sett sær fyri at fremja tílíkt prógv. At fáa til vega neyðugan pening til lærarar hevur setrið søkt til Nordisk Kulturfond um stuðul, men hevur nú fingið at vita, at eftir viðtøkunum er tað ógjørligt at veita stuðul.

Setrið søkir tí um hesa játtan frá 1. august 1974 til 31. mars 1975:

2 semestir

1 málfrøðing	75.000 kr.
1 bókmentamann	75.000 —
gestafyrilesarar	20.000 —
ymsar útreiðslur	5.000 —
tilsamans	175.000 kr.

Aunars eru ymsar bakkingar á líggjaretlaðnini, her verður serliga at viðmerkja at neyðugt verður við umsjónarmanni við øllum stovnum á Debesartrøð, nú starvsstovubygningurin verður tikin í nýtslu.

12.2. Tónleikur og sangur.

Landsstýrið sigur frá, at umframt tær 100.000 kr., ið settar eru av, eiga 100.000 kr. at verða játtaðar til tónleika ella sangvenjara í kommununum.

12.3. Sjónleikur.

Settar eru 10.000 kr. afturat.

12.5. Føroya Listasavn.

Settar eru 15.000 kr. afturat til rikstur av listaskálanum.

12.7. Sømdarpeningur til skald og listamenn.

Sømdarpeningurin hevur staðið óbroyttur í mong ár. Skotið verður upp at hækka sømdarpeningin til ávikavist 3.000 kr. og 2.000 kr.

12.11. Skúlabókaútgáva.

Skotið verður upp at hækka játtanina við 15.000 kr.

12.16. Mentunarsamvinna við Grønland, avsettar eru 25.000 kr. til hetta endamál.

Øll § 15 er hækkað við 1.096.000 kr.

§ 16: Fiskivinna, sigling o.t.

10. Laksa- og sílaaling.

Landsstýrið hevur yvirtikið allan partapeningin í p/f Fiskaaling. Ætlanin er at halda fram í rakstrinum av felagnum ikki bert sum royndarbrúk, men eisini, um tað er gjørligt at fáa tílíkt brúk at bera seg.

Ætlanin er síðani at útbyggja hyljarnar við Streymin og at hefta um teir í Skálabotni. Kostnaðurin er mettur til 500,000 kr.

Nevndin heldur, at royndirnar higartil at fáa eitt sílabrúk at bera seg hava verið vánaligar, meu ber stendur ein royud, har hitt almenna hevur lagt nógvan pening í og eftir teimum upplýsingum, sum fyriliggja eru møguleikar fyri vinnuligum úrsliti, um hildið verður fram, ikki bert vinnuligt úrslit fyri hetta felag, men sum tíðin líður eisini fyri onnur. Møguliga verður tað so, at hetta felag verður stovnurin, har aðrir kunnu byggja uppá royndirnar, felagið hevur gjørt. Ætlanin er, at um áhugi verður fyri sílaframleiðslu, at felagið skal lata yngul út til aðrar.

Landsstýrið hevur í tingsetuni lagt fram uppskot um at regulera stovnaniva av nýggjum hyljabrúkum.

Nevndin setur fram uppskot um at játta felagnum 500.000 kr. til íleggingar.

Føroya Sílaveiðufelag sigur, at tað eru fleiri áir í Føroyum, ið treingja til áhøtur, av tí at grót og eyrur er tikið úr ánunum til vegagerð o.a. Sílastovan í Sandagerði krevur eisini áhøtur og at gerast størri. Eisini eigur at verða hildið fram við arbeiðinum at klekja og at seta síla- og laksayngul. Figgjarorka felagsins er nýtt at gera trappurnar við Leynavatn.

Nevndin setur fram uppskot um at játta 50.000 kr.

11 og 12. Fiskiroyndir og havrannsóknarskip í grunn.

Ætlanin er at Leivur Øssurson skal nýtast til svartkjaftaveiðu, sum menn vænta verður at geva nógv av sær. Tá svartkjaftatíðin endar, er besta tíð til ídnaðarfiskiskap, so ikki skuldi verið neyðugt at selt pening á tiggjarlógina til rakstrarútreiðslur til ein bát sum Leivur Øssurson, sum er nýklassaður og annars í besta standi. Mælt verður til, um ikki leigusáttmáli fæst áðrenn svartkjaftaveiðan endar, so at lata Leivur Øssurson fiska annan ídnaðarfisk aunaðhvørt leigu- ella søluságttmáli fæst.

Um so verður, verða lagdar 750.000 kr. afturat í grunnin til byggingar av havrannsóknarskipi.

Øll § 16 er lækkað við 196.000 kr.

§ 17: Landbúnaður og matrikulering.

2. Útskifting og matrikulstova.

Matrikulstovan søkir um at seta eitt skrivstovufólk og ein næming afturat m.a. at umsita matrikulin.

Nevndin tekur ikki undir í hesum.

3. Royndarstøðin.

Støðin hevur sent uppskot til nýggja fíggjarætlan, eftir hesum eru útreiðslurnar til vakstrarhúsið hægri enn ætlað um 64.000 kr., eisini eru aðrar útreiðslur undirmettar.

5.4. Aðrir studningar, studningur til fleggiug í landbúnaðinum.

Landsstýrið hevur skotið upp eins og árini fyri at veita 200.000 kr. til keyp av jørð á smáplássum at leggja saman í brúk.

Nevndin tekur ikki undir í hesum uppskoti.

5.5 Mjólkastudningur.

Játtanin er hækkað við 100.000 kr.

5.7. Træplanting.

Skotið verður upp at hækka játtanina við 20.000 kr.

Øll § 17 er hækkað við 102.400 kr.

§ 18. Handil, idnaður o.t.

6. Kolagrevstur.

Játtanin er hækkað við 50.000 kr. til 100.000 kr.

10. Stuðul til idnaðarfremjandi endamál.

Skotið verður upp, at játtanin til idnaðarstovuna verður hækkað við 145.000 kr., jbr. viðm. til § 18.10.

Øll § 18 er óbroytt.

§ 19. Almenn forsorg v.m.

Hesar hækkingar og lækkingar eru:

1.	Fólkapensión	2.175.000 kr.
2.	Avlaunispensión	950.000 —
3.	Barnastyrkur o.a.	70.000 —
4.	Einkjupensión	25.000 —
5.	Vanlig forsorg	+ 90.000 —
6.	Viðkað hjálp	40.000 —
7.	Einkjuhjálp	610.000 —
8.	Barnaforsorg	80.000 —
12.	Ellisheim	5.000 —
	tilsamans	3.865.000 kr.

Í tølunum er roknað við teimum broytingum, sum uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 60 í hesi tingsetu førir við sær.

13. Alv.

Felagið søkir um, at játtanin verður hækkað við 200.000 kr. og vísir til, at tað ikki er gjørligt at reka verkstaðin uttan so, at løgtingið veitir henda stuðul, ætlanin er, um stuðul verður givin at sela ein ergoterapeut í samband við arbeiðið á verkstaðnum.

Nevndin tekur undir við áheitanini.

14.1. Fráhaldsfeløg.

Skotið verður upp at játta 30.000 kr. afturat.

14.6. Húsalánsgrunnurin.

Fyri at gera Húsalánsgrunnin føran fyri at hækka útlánini og lækka útlánsrentuna, verður skotið upp at hækka játtaðnna við 1 milj. kr. til 3½ milj. kr. Um neyðugt vil nevndin seta fram uppskot til broyting í lógini fyri grunnin.

14.7. Kommunalur lánigrunnur.

Løgtingið hevur samtykt lóg um árliga í 5 ár at avseta 1 milj. kr. í grunn við tí endamáli at veita kommununum lán til keyp av jørð til byggigrundir. Hetta er 1. jattan.

14.8. Arbeiðsloysisgrunnur arbeiðarafelag.
Umsóknir eru komnar frá arbeiðskvinnufelagum um studning.
Mælt verður til at hækka játtanina við 25.000 kr.

Øll § 19 er hækkað við 6.304.000 kr.

§ 22. Aðrar og óvissar útreiðslur.

1. Útreiðslur av vali.
Av tí at val verður til heystar er játtanin hækkað við 25.000 kr.

§ 22 øll hækkað við 25.000 kr.

§ 23.4. Kirkjugrunnurin.

Samsvarandi frágreiðing landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 63 í hesi tingsetu verður játtanin til Vesturkirkjuna at hækka við 65.000 kr. og studningurin úr landskassanum annars við 85.000 kr., tilsamans við 150.000 kr.

§ 23 øll hækkað við 150.000 kr.

Minnilutin (Hanus við Høgadalsá og Finnbogi Isaksen) ger hesar viðmerkingar:

Fíggjarlógin er ikki nøkur verulig fíggjarlóg fyri Føroyar, við tað at hon bert umfatar eitt part av teimum almennu útreiðslunum í samfelag okkara. Heldan fíggjarlógin viðger bert lítlan partin, sum vit føroyingar sjálvir rinda, meðan vit onki siggja til tær donsku veitingarnar. Vit fáa onki ágreiniligt yvir, hvørjar útreiðslurnar hjá ríkiskassanum eru, og hvørja ávirkan, hesar veitingar hava á samfelagið.

Tað er ein spurningur, um hesar peningaveitingar, sum vit onki ræði hava yvir, gagna ella vinnuligu útbyggingini av samfelagnum, ella um tær bert føra við sær, at keypiorkan og vøruinnflutningurin vaksa, og at innflutningurin økist stórliga. Er hetta støðan, so fara tey fíggjarligu viðurskiftini í landinum at versna uttan ískuld. Mælt verður til, at ein gjølla kanning verður gjørd av hesum viðurskiftum sum skjótast.

Vit eru av teirri áskoðan, at tað mugu fáast greiðari viðurskifti í lag millum Føroyar og Danmark. So leingi tann núverandi ríkisrættarliga støðan stendur við, eigur tann føroyska munsitingin at fáa ræðið á teimum donsku veitingunum til Føroya, so at tær koma ílagunum til góðar, meðan

føroyingar sjálvir átaka sær umsitingar- og rakstrarútreiðslurnar. Mælt verður til, at samráðingar verða tiknar upp við danir um hetta sum skjótast.

Eitt dømi um, hvussu flókt viðurskiftini eru millum Føroya og Danmark, er lønarlagið. Summar eru heildanskar, aðrar hálvdanskar og nakrar føroyskar. Somuleiðis laga summar av hesum lønum seg eftir donskum prístali, meðan aðrar laga seg eftir tí føroyska. Mælt verður til, at hetta mál verður loyst uttan drál.

Í fiskivinnuni er stoðan tann, at tað almenna við studningi til skipabygging, veðhaldum og prísískoyti átekur sær stórar peningaligar skyldur, sum fáast inn við skatti og tolli. Men tað almenna hevur onga ávirkan á gongdina í vinnuni og hevur onga útbyggingarætlan. Her mæla vit til, at eitt fiskimálaráð verður sett at vera vegleiðandi í øllum fiskivinnumálum, har tað almenna kemur inn í myndina, og at tað almenna setur í verk eina miðvisa útbygging av fiskiflotanum, við høvuðsdenti á útróðrarflotanum.

Somuleiðis halda vit, at tað almenna nú hava eitt betri eftirlit enn nú við í óbeinleiðis og beinleiðis stuðli, sum verður veittur vinnuni. Vit halda, at avskrivingarlógirnar eiga at verða liknar av, tí at tað almenna kann ikki fylgja við, hvussu nógv tað stuðlar vinnuni, og at beinleiðis studningur, um neyðugt, verður latin vinnuni í staðin, bæði til stovnan og rakstur.

Hetta eru bert nøkur av teimum málum, sum flokkurin heldur tað vera neyðugt at greiða, áðrenn talan kann vera um eina nøkurlunda føroyska figgjarlóg.

Minnilutin (Knút Wang) vil mæla til at samtykkja fyriliggjandi uppskot til figgjarlógtingslóg fyri 1974/75, tó at hon eftir fólkafloksins og framburðsfloksins metan er yvirbudgetterað, tað vil siga, inntøkurnar verða munandi hægri, enn roknað verður við í uppskotinum.

Rúm verður sostatt eftir okkara tykki til eina hækking av studningunum til Húsalánsgrunnin, og mælir minnilutin til, at veitt verður hesum grunni 2 milj. kr. afturat teimum, ið eru í uppskoti.

Hesin stuðul til Húsalánsgrunnin vil verða ein neyðturvilig hjálp til hansara lánveitingarorku til selhúsabygging, um rentan skal verða sett niður í 6 prosent og avdráttartíðin longd.

Okkara lóggáva viðv. evnaveikum hvílir á «Lov om foranstaltninger vedrørende åndsvage» dagfest 16. mai 1934.

Fólkaflokkurin og framburðsflokkurin mæla til, at henda 40 ára gamla lóg verður avloyst av eini tíðarhóskandi lóggávu á hesum øki, og setur minnilutin Knút Wang fram uppskot til samtyktar hesum sjónarmiði samsvarandi.

Tiverri hevur ikki meiriluti verið á tingi fyri fólkafloksins hugsan um hjálp til tey figgjarligu veiku at fáa sær tak yvir høvdið við rentufríum og tey fyrstu árini avdráttarfrium uppiskoytisláni, men vil minnilutin kortini seta uppiskoytisuppskot til figgjarlógina um undirtøku av hesi hugsan á tann hátt, at ¼ av landskassayvirskotinum tey fyrstu árini verður settur í grunn til hetta endamál, og at hesin grunnur verður stjórnaður av stýrinum fyri Húsalánsgrunnin eftir reglugerð gjørd av Húsalánsgrunninum og samtykt av Føroya løgtingi.

Í øllum norðurlondum er á figgjarlógunum peningaupphædd sett av til u-landahjálp. Sjálvt um vit ikki eru førir fyri at taka til í stórum á hesum øki, eiga vit at lata nakað, sum prógv um okkara samlug við hesum tilnfturskomnu mannasamfeløgum og mæla fólkaflokkurin og framburðsflokkurin til, at 200.000 kr. verða settar á figgjarløgtingslógina til hetta endamál.

Samsvarandi tí hugsan, ið her er sagt frá, verða soljóðandi uppiskoytisuppskot til figgjarløgtingslógina sett fram:

I. § 19-14-6 verður orðað soleiðis:	I. § 19-14-6 alfattes således:
«Húsalánsgrunnur 5.500.000»	«Husalánsgrunnur 5.500.000»

II. **Uppskot**
til
samtyktar viðvikjandi evnaveikum.

Alagt verður landsstýrinum at leggja fyri løgtingið í komandi løgtingssetu uppskot um tíðarhóskandi lóggávu viðvikjandi evnaveikum í staðin fyri galdandi «Lov om foranstaltninger vedrørende åndsvage» frá 16. mai 1934.

III. Uppskot til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um býti av rakstraravlopi landskassans.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 5 frá 25. januar 1973 um býti av rakstraravlopi landskassans verður í § 1 gjørd hesa broyting:

1) orðið «og» gongur út og í staðin verður sett «,» og
2) skoytt verður uppí:
«og ⅓ í grunn til rentufrí uppískoytislán til sethúsabygging».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fordeling af landskassens overskud.

§ 1.

I lagtingslov nr. 5 af 25. januar 1973 om fordeling af landskassens driftsoverskud foretager følgende ændring i § 1:

1) ordet «og» udgår og i stedet sættes «,» og
2) der tilføjes:
«og ⅓ til fond til rentefri tillægslån til bygning af beboelseshuse».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

IV. Sett verður sum nýggj § 22-2-3:

«u-landshjálp .... 200.000».

IV. Der tilføjes som ny § 22-2-3:

«u-landshjælp .... 200.000».

2. viðgerð 27. mars 1974.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:
gr. 10—18 samtyktar 23—0.
broytingaruppskot frá minniluta (K. Wang) til gr. 19 fall 9—0.
gr. 19 samtykt við 23—0.
gr. 20—21 samt. við 23—0.
broytingaruppskot frá minniluta (K. Wang) til gr. 22 fall 9—0.
gr. 22 samt. við 23—0.
gr. 23—26 samt. 23—0.
gr. 30—46 samt. 23—0.
gr. 1—8 samt. 19—0.

Lógaruppskotið til figgjarætlan 1974/75 soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð við 21—0.

Uppskot til samtyktar frá minniluta (K. Wang) fall 9—0.

Lógaruppskot (um rakstraravlop landskassans) frá minniluta (K. Wang) fall 8—0.

3. viðgerð 29. mars.

Frávik í tíðarfrestini at viðgera málið samtykt uttan atkv.gr.

Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt við 23- –0.

---

2. Rættargangslógin

Ár 1973, 1. august, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram:

Í løgtingssetuni 1972, jbr. løgtingsmál nr. 46/1972, legði landsstýrið fram uppskot til samtyktar viðvíkjandi rættargangslógini fyri Føroyar. Løgtingið samtykti at goyma málið til komandi tingsetu.

Landsstýrið loyvir sær við hesum at endurnýggja framløguna.

1. viðgerð 14. august og málið beint í lógarnevndina.

Formaðurin segði frá (6/4) at málið er útsett til næstu tingsetu.

(F.L. J. nr. 501-8-2)

3. Broyting í skattalógini

Ár 1973, 1. august, legði Petur F. Christiansen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinari broytingum verður í § 2 sum liðra 5 sett:

«fleggingarstudningur, ið veittur verður eftir lóg um «egnsudvikling» ella løgtingslóg um menningargrunn fyri iðnað, handverk og tænastufyritøkur verður tikin við í skattskyldugu inntøkuni yvir eitt 20 ára skeið, ið byrjar við tí inntøkuári, skattskyldugi fær studningin. Hin skattskyldugi ger sjálvur av, hvussu stórur partur av studninginum verður tikin við í inntøkuni hvørt árið sær í 20 ára skeiðnum.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer tilføjes i § 2 som litra 5:

«Investeringstilskud, der ydes efter egnsudviklingsloven eller lagtingslov om udviklingsfond for industri, håndværk og servicevirksomheder medregnes ved opgørelsen af den skattepligtige indkomst inden for en 20 års periode, der begynder ved det indkomstår, hvori den skattepligtige erhverver tilskuddet. Den skattepligtige bestemmer selv, hvor stor en del af tilskuddet, der skal medregnes i indkomsten for de enkelte år inden for 20 års perioden.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í samband við at lóg nr. 219 frá 7. juni 1972 «um egnsudvikling» skuldi setast í gildi fyri Føroyar segði Inntulilsmálaráðið frá, at ein fyritreyt fyri at veita studning eftir § 10 í lógini til føroyskt virki var, at hesi ikki verða verri stillað enn donsk virkir, sum í skattskyldugu inntøku síni kunnu býta íleggingarstudningin yvir eitt 20 ára skeið, roknað frá tí inntøkuári,

(F.L. J. nr. 1216-1-1)

tann skattskyldugi fær studningin. Móttakarin ger sjálvur av, hvussu nógv hann tekur sum inntøku hvørt árið sær.

Hetta krevur eina broyting av skattalógini.

Tá møguleiki eisini er fyri at veita fleggingarstudning úr menningargrunninum, er skotið upp, at lógarbroytingin eisini kemur at umfata ílíkan studning úr hesum grunni, tó heldur landsstýrið, at áramálið fyri avskrivingina eins og fyri stuðningslán til skipabygging, eigur at vera upp til 20 ár.

1. viðgerð 13. august og málið beint í skattanevndina, sum 16. august legði fram soljóðandi

Álit

Hetta málið er av landsstýrinum lagt fyri løgtingið og við 1. viðgerð varð tað beint í skattanevndina, sum síðani hevur viðgjørt málið.

Í seinastu tingsetu samtykti løgtingið eftir tilmæli frá landsstýrinum, at lóg nr. 219 frá 7. juni 1972 «om egnsudvikling» varð lýst at galda fyri Føroyar og somuleiðis samtykti tingið eftir uppskoti frá fíggjarnevndini lóg um menningargrunn fyri iðnað, handverk og tænastufyritøkur.

Eftir nýggju reglunum um «egnsudvikling» kunnu iðnaðar- og servisuvirkir í Føroyum fáa upp til 50% í statsláni og í serligum føri partvis studningi til stovnan, flyting, viðkam, rationalisering, framleiðsluumskifling o.t.; tó verður studningurin ongantíð meira enn 25% av útreiðslunum.

Í viðmerkingunum til uppskotið sigur landsstýrið, at handilsmálaráðið hevur boðað frá, at ein fyritreyt fyri at veita studning eftir § 10 í lógini um «egnsudvikling» til føroysk virkir er tann, at hesi skattliga ikki verða verri stillað enn donsk virkir, sum í skattskyldugu inntøku sini kunnu býta studningin, ið verður roknaður sum inntøka yvir eitt 10-ára skeið frá ti, at studningurin er fingin, og so kann móttakarin sjálvur avgera, hvussu nógv av hesum studningi hann tekur sum inntøku hvørt árið, og tí mælir landsstýrið til at broyta skattalógina samsvarandi hesum.

Við tað at møguleiki eisini er fyri at fáa studning úr menningargrunninum skjýtur landsstýrið upp, at broytingin í skattalógini eisini kemur at umfata studning úr hesum grunni, men mælir til, at áramálið fyri avskrivingina av studninginum, sum í donsku likningarlógini er 10 ár, verður sett til 20 ár bæði fyri studning, ið verður veittur eftir lóg um «egnsudvikling» og úr menningargrunninum.

Eftir at hava viðgjørt málið, er nevndin samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið soleiðis sum tað fyriliggur.

SKATTANEVNDIN, 15. august 1973.

Agnar Nielsen Jógvan Sundstein Jógvan Durhuus
(fyri Finnboga Isaksen)

Poul Jacob Olsen Hilmar Beck

2. viðgerð 17. august. Grein 1 og málið at fara til 3. viðgerð samt. 20—0.

3. viðgerð var á seinni fundi sama dag, 17. august. Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðg. nú endaliga samtykt við 21—0.

---

4. Grannskoðan av almennum roknskapum

Ár 1973, mánadagin 13. august, legði Andr. Djurhuus, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir at góðkenna niðanfyri nevndu roknskapir saman við fylgjandi viðmerkingum frá løgtingsgrannskoðarunum:

1) Landskassin 1971/72.
2) Tjaldurs apotek 1971/72.
3) Strandfaraskip landsins 1971/72.
4) M/s Lævur Øssursson 1971/72.

(F.L. J. nr. 142-7)

5) M/s Drangur, vaktarskip, 1971/72.
6) M/s Jens Chr. Svabo, hjálparskip, 1971/72.
7) Húsalánsgrunnurin 1972/73.
8) Útvarp Føroya 1971/72.
9) Løgjavningargrunnur Skipsfiskimanna 1971/72.
10) Telefonverk Føroya Løgtings 1971/72.

Viðmerkingar frá løgtingsgrannskoðarunum:

Vit hava gjøgnumgingið omanfyri nevndu roknskapir við tilhoyrandi frágreiðingum frá roknskaparrevisiónini. Hetta er gjørt og verður nú lagt fyri tingið sambært løgtingslóg nr. 16 frá 26. apríl 1965 við niðanfyristandandi viðmerkingum:

1. Landskassans roknskapur:

Við tað, at tað eru so stór frávik í fíggjarlógini, má tað krevjast, at tað verður gjørd ein eykafíggjarlóg.

Hetta vil verða nærri greitt frá undir tingviðgerðini av málinum.

2. Tjaldurs apotek.

Ongar viðmerkingar.

3. Strandfaraskip landsins.

Samtykt varð at mæla tinginum til at heita á landsstýrið at fyrireika, at sett verður ein 3-mannanevnd av serkønum monnum til at kanna møguleikan fyri eini rationalisering av rakstrinum hjá Strandferðsluni.

4. M/s Læivur Øssursson.

Ongar viðmerkingar.

5. M/s Drangur.

Ongar viðmerkingar.

6. M/s Jens Chr. Svabo.

Ongar viðmerkingar.

7. Húsalánsgrunnurin.

Ongar viðmerkingar.

8. Útvarp Føroya.

Ongar viðmerkingar.

9. Lønjavningargrunnur skipsfiskimanna.
Ongar viðmerkingar.

10. Telefonverk Føroya løgtings.
Ongar viðmerkingar.

1. viðgerð 14. nov. og málið beint í fíggjarnevndina, sum 28. mars 1974 legði fram soljóðandi

Álit

Løgtingsgranskoðararnir hava lagt fyri tingið uppskot um at góðkenna landskassans roknskap fyri 1971/72 og 9 aðrar roknskapir fyri almennar stovnar saman við viðmerkingum, teir gera.

Viðmerkingarnar eru til landskassaroknskapin og til roknskapin fyri strandferðslurna.

Hesar viðmerkingar eru lítiðsigandi. Um landskassaroknskapin stendur: «Við tað, at tað eru stór frávik í fíggjarlógini, má tað krevjast, at tað verður gjørd ein eykafíggjarlóg». Og um strandferðslurna verður sett fram ynski um, at trýmannanevnd fær til uppgávu at kanna raksturin.

Men undir viðgerðini av málinum var ført fram, at tað, sum løgtingsgranskoðararnir kalla «stór frávik» umfatað meirnýtslu á einstøkum konti upp til kr. 11.000.000, og var av tingmanninum Hanus við Høgadalsá biðið um, at málið fekk nevndarviðgerð, og var málið beint í fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur havt fund við Atla Dam løgmann og M. Helmsdal landsverkfrøðing viðvíkjandi meirnýtsluni á konto 13.1. uppá slakar 11 miljónir, og verður viðlagt skriv frá 23. november 1973 frá landsverkfrøðinginum til løgmann, har nærri verður greitt frá, hvussu nevnda meirnýtsla er nýtt.

Fíggjarnevndin, sum viðgjørt hevur málið, kann taka undir við uppskotinum frá løgtingsgranskoðarunum, um at gjørd verður ein eykafíggjarlóg. Hetta vil — um ein slík eykafíggjarlóg verður samtykt - - geva landsstýrinum lógarheimild til meirnýtslu, ið ikki lógarheimild var til, tá peningurin var nýttur, men gevur tinginum onga trygd fyri, at ikki verður nýtt meira, enn samtykt er á fíggjarlógini.

Nevndin heldur tí, at skal eykafíggjarlógin hava nakra meining og verða annað enn ein reinur formalitetur, má landsstýrið søkja sær heimild til meirnýtslu annaðhvørt frá løgtinginum sjálvum ella frá fíggjarnevndini.

Nevndin mælir til, at tingið góðkennir roknskapirnir, men átalar fram-

ferðina við meirnýtslumi og áleggur, at ongin meirnýtsla má fara fram uttan góðkenning figgjarnevndarinnar, og skal meirnýtslan síðani staðfestast í einari eykafiggjarlóg.

FÍGGJARNEVNDIN, 27. mars 1974.

Viðmerkingar til konto § 13.1. á landskassaroknskapinum fyri 1971/72.

Á landskassaroknskapinum fyri 1971/72 er á konto § 13.1. eitt hall stórt 11 mill. kr.

Hetta kemur soleiðis fram:

1. Útreiðslur			31,60 mill. kr.
2. Játtan	12,00 mill kr.		
3. Lán	8,65 mill. kr.	20,65 mill. kr.	
Hall			10,95 mill. kr.

Viðmerkingar:

ad 1. Av hesum 31,60 mill. kr. eru 4,5 mill. kr. farnar til eykaílegging í størri amboð.

Fleiri stórar vegagerðir skuldu setast í gongd á vári 1972, og árini frammanundan høvdu ráðini ikki verið til at endurnýggja og økja um amboðsparkina í tann mun tørvur var, so neyðugt var hetta ár at gera serliga stóra flegging í amboð. Ein partur varð keyptur soleiðis, at bert eini 15-20% vóru goldin í hondina, meðan restin var goldin yvir 2-4 ár. Størri parturin var tó keyptur kontant, tí rentan her av restskuldini vildi verið sera høg.

Annars er at siga, at 13% innfluttningsgjaldið hevur givið landskassanum eina eykainntøku uppá 0,75 mill. kr. frá § 13.1.

ad 2. Grannskoðarin og vit hava ymiska áskoðan á hvat játtanin er á § 13.1.

Fyri 1971/72 settu vit upp tørvin soleiðis:

Nýggir vegir v.m.	12,0 mill. kr.		
+ bilgjøld	2,0 mill. kr.		
+ benzingjøld	4,0 mill. kr.		
+ komunanna part	1,4 mill. kr.	4,0 mill. kr.	

Verð hetta t.d. góðtikið at seta á fíggjarlógina, roknaðu vit við 4,0 mill. kr. sum játtanina fyri 1971/72 út um tað, sum inntøkurnar frá bil-, benzin- og kommunugjøldunum góvu. T.v.s. vórðu hesar inntøkur størri enn mett var, fingu vit meiri enn tær 12,0 mill. kr. at ráða yvir, og vórðu tær minni, fingu vit minni enn 12,0 mill. kr.

Var okkara uppstilling og okkara áskoðan løgd til grund, vildu inntøkurnar verið ..... 13,7 mill. kr.

ad 3. Sambært § 36.2. á umrøddu fíggjarlóg er roknað við, at lántøkan verður til støddar ..... 10,7 mill. kr. (Bert 8,65 mill. kr. vórðu læntar).

Um uppskot okkara til konto § 13.1. á fíggjarlógini fyri 1971/72 varð óbroytt og tolkað sambært okkara áskoðan og annars 10,70 mill. kr. tiknar í láni, vildi yvirlitið sæð solciðis út:

Útreiðslur		31,60 mill. kr.
Herav eykaílegging í amboð		4,50 mill kr.
		27,10 mill. kr.
Inntøkur	9,70 mill. kr.	
Játtan	4,00 mdl. kr.	
Lán	10,70 mill. kr.	
Eykainntøka	0,75 mill. kr.	25,15 mill. kr.
		1,95 mill. kr.

Viðmerkjast kann her, at í uppskotinum frá okkum var roknað, at lógin um landsvegir fór at verða samtykt í tí setuni, so kommunanna partur vildi verið ..... 0,45 mill. kr. størri enn hann veruliga bleiv. Um so hevði verið, varð hallið ..... 1,50 mill. kr. umframt eykaileggingina í amboð ..... 4,50 mill. kr.

t.e. tilsamans ..... 6,00 mill. kr.

At hallið í veruleikanum er vorðið o.u. 11 mill. kr. kemst deils av, at fíggjarnevndin hevur skarvað burtur av tí uppskoti, ið fyrilá, deils av at byggilán, ið kundu takast, ikki eru tikin og deils av, at eykaileggingin í amboð ikki er fíggjað við láni og/ella avbetaling.

Soleiðis kann ein siga; men tað kann eisini sigast á tann hátt, at orsøkin er hon, at ov lítið er játtað. Og hvørjar eru orsøkirnar til tess?

Onnur er, at vit eins og allir, ið hava við bygging at gera, hava lyndi til í hesum inflatiónstíðum at meta útreiðslurnar ov lágar — at leggja ov lítið upp fyri. Hin tann, at tingmenn ikki hava sama áhuga fyri at seta inn á konto § 13.1., sum teir hava fyri, at brúkt verður av hesi.

Skeivleikarnir bera soleiðis á sama borði, og tá kann úrslitið ikki vera so gott, ein kundi ynskt.

2. viðgerð 1. apríl.
Uppskotið til samtyktar nú samt. við 21—0.
Málið sostatt avgreitt.

---

5. Ikki framlagt

---

6. Eykastudningur til ávísar havnavíðkanir

Ár 1973, 13. august, legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um eykastudning til ávísar havnavíðkanir.

§ 1.

Sum uppískoyti til tær játtanir, sum við løgtingslóg nr. 55 frá 1. august 1969 vórðu veittar til víðkan av havnunum í niðanfyri nevndu kommunum, verður úr landskassanum veittur studningur svarandi til 50% av tí upphædd, byggiútreiðslurnar til avvarðandi havnavíðkan verða hægri enn tann í omanfyri nevndu løgtingslóg tilskilaði størsti studningsborni byggipeningur, tó í mesta lagi 50% av niðanfyri tilskilaðu upphæddum. Studningurin verður goldin við eins stórum ársgjøldum í fylgjandi fíggjarár frá og við fíggjarárinum 1973/74 at rokna:

Kommuna	kr.
Klakksvíkar	4.000.000
Fuglafjarðar	1.500.000
Leirvíkar	2.500.000
Gøtu	2.250.000
Runavíkar	2.000.000
Nes	1.000.000
Eiðis	1.000.000
Kollafjarðar	1.000.000
Vestmanna	2.500.000
Miðvágs og Sandavágs	2.500.000
Sørvágs	1.350.000

lagtingslov om ekstra tilskud til visse havneudvidelser.

§ 1.

Som tillæg til de bevillinger, der ved lagtingslov nr. 55 af 1. august 1969 blev ydet til udvidelse af havnene i nedennævnte kommuner, ydes der af landskassens tilskud svarende til 50% af det beløb, anlægsudgifterne for pågældende havneudvidelse overstiger den i ovennævnte lagtingslov anførte maksimale tilskudsberettigede byggesum, dog højst 50% af nedenfor anførte beløb. Tilskudet udbetales i lige store årlige rater gennem 6 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1973/74 at regne:

Kommune	kr.
Klakksvíkar	4.000.000
Fuglafjarðar	1.500.000
Leirvíkar	2.500.000
Gøtu	2.250.000
Runavíkar	2.000.000
Nes	1.000.000
Eiðis	1.000.000
Kollafjarðar	1.000.000
Vestmanna	2.500.000
Miðvágs og Sandavágs	2.500.000
Sørvágs	1.350.000

(Sí lóg nr. 51-74)

Skopunar	4.500.000
Sands	2.300.000
Hvalbiar	850.000
Froðbiar	2.000.000
Porkeris	750.000
Vágs	1.000.000
tilsamans	33.000.000

§ 2.

Ásetingarnar í §§ 3-5 í løgtingslóg nr. 55 frá 1. august 1969 eru eisini galdandi fyri byggingar framdar við studningi sambært hesi løgtingslóg.

§ 3.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

Skopunar	4.500.000
Sands	2.300.000
Hvalbiar	850.000
Froðbiar	2.000.000
Porkeris	750.000
Vágs	1.000.000
i alt	33.000.000

§ 2.

Bestemmelserne i §§ 3-5 i lagtingslov nr. 55 af 1. august 1969 er også gældende for anlæg udført med tilskud i henhold til denne lagtingslov.

§ 3.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 106/1971: Eykajáttanir til 10 ára havnaætlanina 1969/78, varð samtykt «at senda umsóknirnar til landsstýrið, sum verður biðið um at kanna tørvin til eykastudnings fyri øll tey pláss, søkt hava, og til komandi tingsetu at leggja uppskot fyri løgtingið um eykajáttanir».

Sum kunnugt eru umsóknir komnar úr at kalla øllum kommunum, sum studningur varð veittur til undir umrøddu 10 ára ætlan.

Landsstýrið hevur hildið, at ein eykajáttan eigur at vera hildin innan fyri sama tíðarskeið, sum 10 ára ætlanin sjálv t.e. at hon verður ein 6 ára játtan í longsta lagi: 1973/74 — 1978/79; hetta ger tað lættari at fáa eina toluliga rætta meting um, hvør tørvurin á eykastudningum er og at halda samlaðu eykajáttanina á rimiligum stigi.

Tá ið ein í hesum tíðum ger eina figgjarliga útbyggingarætlan fyri havnirnar yvir 10 ár, má ein rokna við at skula skoyta uppí, tí prís- og lønarvøkstur er á hvørjum ári og fiskiviunan í støðugari broyting á øllum økjum; men tær upplæddir, søkt er um, geva tilsamans so stórt tal, at «ivaleyst hava fleiri av kommununum tikið nóg so rivuliga til», sum nevnt verður í álitinum frá figgjarnevndini í áðurnevnda løgtingsmáli.

Landsstýrið hevur tí í samráð við landsverkfrøðingin viðgjørt ynskini frá kommunum og heldur at við teim játtanum, lógaruppskotið inniheldur, kunnu tær einstøku kommununrnar fremja útbygging av rimiligari stødd

í umrødda 10 ára skeiði, og eisini verður samlaða studningsveitingin 2.75 mill. kr. um árið í 6 ár, ið landskassin skal lata, ikki órímilig til støddar.

Viðvíkjandi støðuni hjá teim einstøku havnunum verður víst til hjálagda ummæli frá landsverkfrøðingunum.

Atli P. Dam

/ M. Helmsdal

LANDSVERKFRØÐINGURIN

3800 Tórshavn, 10. apríl 1973.

Viðvíkjandi eykajáttanum í sambandi við 10 ára havnaætlanina 1969/78

Tær havnabyggingar undir 10 ára havnaætlanini 1969/78, sum farnar eru í gerð higartil ella fraudar, eru í hesum 12 kommunum:

Klakksvíkar, Leirvíkar, Gøtu, Runavíkar, Skála, Eiðis, Haldórsvíkar, Kollafjarðar, Vestmanna, Skopunar, Sands og Froðbiar.

Tær kommunur, sum enn ikki eru farnar undir nakra bygging, eru hesar 8:

Fuglafjarðar, Nes, Sjóvar, Miðvágs og Sandavágs, Sørvágs, Hvalbiar, Porkeris og Vágs.

Niðanfyri verður fyri hvørja kommunu sær í stuttum greitt frá støðuni:

Klakksvíkar kommuna;

Undir 10 ára ætlanini eru játtaðar 50% av 6.0 mill. kr. Undir bygging er í løtuni havnargerð á Varpinum, sum er mett at kosta 4.5 mill. kr.

Henda bygging umfatar deils ein o.u. 60 m langan pier við ferjulegu á norðursíðuni og vanligari atløgusíðu hinumegin og deils o.u. 80 m langa atløgusíðu á 3,5 m dýpi á meðalvatni fram við landinum; millum høvuðsvegin og hesar byggingar er so fylt upp øki fyri veg, parkerings- og byggiplássi. Bygt verður áfast við havnarlagið á Stongunum.

Hesar byggingar eru roknaðar til strandferðaskipini og rúmka soleiðis um fyri aðrari nýtslu av Stangarpierinum.

Eftir av játtanini verða soleiðis o.u. 1.5 mill. kr.

Leingi hevur verið í umbúna at økja um flakavirkið á Kósini; men ein fyritreyt er, at bryggjan har verður lougd og byggiøki planerað aftanfyri.

Ætlanin hjá kommununi er tí at fara undir hesa bygging so skjótt sum gjørligt. Kostnaðurin var seinasta vár mettur at verða 4.7 mill. kr., so við prís- og lønarhækkingum o. øðr. verður kostnaðurin ikki undir tær 5.5 mill. kr., sum er grundarlagið fyri uppískoytisjáttanini.

Fuglafjarðar kommuna:

Fuglafjarðar kommunu varð játtað 50% av 2 mill. kr. Fyri hendan pening er ikki bygt enn; hetta kemst deils av, at aðrar byggingar hjá kommununi hava verið fyri og deils av at hesin peningurin, sum frá er liðið, er minkaður so mikið, at hann er verðin ov lítil til, at farið kann verða undir bygging, sum munar nakað.

Sum kunnugt er økt um sildamjølsverksmiðjuna, og nú verður farið undir stórt ísvirki, so tann parturin av bryggjulongdini, fiski- og farmaskip í sambandi við hesa verksmiðju fittan part av árinum støðugt nýta, er vaksin mumandi; neyðugt er tí, at hampuliga long bryggjusíða verður gjørd afturat, so hin parturin av skipaferðsluni — tey skip sum hava samband við fiskavirkini, tey sum skulu umvælast, gerast út, flyta farm til og frá bygdini og onnur — ikki verða heilt við sviðið soðið.

Uppískoytisjáttanin má tí í minsta lagi vera 1.5 mill. kr.

Leirvíkar kommuna:

Byggingin, sum fer fram, er mett at kosta 9.0 mill. kr., tá ið hon er liðug; játtanin var 50% av 6.5 mill. kr.

Ein orsøkin til henda stóra meirkostnað er, at játtanin vísti seg at vera ov lítil samanborið við lægsta boð og onnur, at grótið, sum sprongt varð upp úr havnini, vísti seg at verða so smátt, at neyðugt var at flyta stórar nøgdir av gróti aðrastaðni frá fyri at fáa nóg mikið av steinum til útsíðu á havnarplássinum og til bygging av brimgarðinum frá Kráartanga.

Gøtu kommuna:

Fyri játtanina undir 10 árn ætlanini - 50% av 2.0 mill. kr. - - er eldri pierurin, sum saman við tí nýggjara vinkulpierinum ger havnina í Norðrugøtu, longdur og endin bendur inná, so deils er økt um alloguplássið og deils eru skaptir fleiri møguleikar fyri, at skip kunnu liggja í lívd í vánaveðri.

Kommunan hevur leingi havt í hyggju at byggja brimgarð einar 100 m uttan fyri havnarlagið, sum er, deils sum lívd fyri hesum havnarlagi og deils sum verju fyri havnaróki, ið samstundis verður at fylla upp millum nevndu brímverju og havnarlagið. Eisini er tørvur á dýping í havnarhylinum. Skal frembjast arbeiði, sum kann verða til nakra hjálp, má verða játtað 50% av 2.0 mill. kr. í minsta lagi.

Runavíkar kommuna:

Fyri játtanina, sum var 50% av 6.5 mill. kr., verður bygd leinging av høvuðspierinum, so havnin nú er vard fyri vestan- og høgættum. Kostnaðurin er mettur at vera o.u. 7.5 mill. kr.

Havnin treingir til meiri byggiøki og til atløguplàss við fiskavirkið, og verður tí mælt til at játta í hesum umfari 2.0 mill. kr.

Nes kommuna:

Hevur játtan stóra 50% av 1.4 mill. kr.

Av tí at peningavirðið er so nógv minkað, síðan studningurin varð veittur, er neyðugt at hækka hann við 1 mill. kr., um tað sama skal fáast burturúr.

Skála kommuna:

Skála kommuna hevur bygt fyri sina játtan — 50% av 2 mill. kr. — og fer neyvan undir større havnabygging í hræði. Nú skipasmiðjan hevur fingið útgerðarpier og tvinnir aðrir eru til onnur endamál, skuldi tað heldur ikki verið neyðugt.

Sjóar kommuna:

Sjóar kommuna hevur ikki bygt fyri sina játtan — 50% av 1.0 mill. kr. — og okkum kunnugt er ikki ætlanin fyribils at fara undir bygging við Hulkin, so grundir tykjast ikki at vera fyri eykajáttan.

Eiðis kommuna:

Bygt er fyri játtanina, sum er 50% av 2,0 mill. kr.

Bringarðurin er longdur við 50 m, og havnarplássið er økt og regulerað fyri at gera tað møguligt at økja um flakavirkið.

Kostnaðurin er 2.8 mill. kr., og er orsøkin til størsta partin av meirkostnaðinum, at ikki varð roknað við at gera nakað við havnarplássið, tá ið støddin av studninginum varð ásettur.

Tað er líkt til, at endin á bringarðinum tekur so nógv brim á seg, at rættast er at tryggja hann betur við grótkasti. Mælt verður tí til at játta 50% av 1.0 mill. kr. afturat.

Haldórsvíkar kommuna:

Byggir nú fyri sina játtan — 50% av 1.0 mill. kr. — havnarøki er til at seta flakavirkishús á og stutta atløgubryggju.

At veita eykajáttan nú er helst ógrundað; men vísir tað seg, at ein víðari útbygging er fyri neyðini nakað skjótt, kann studningur til eina tílíka ivaleyst verða veittur av lendingakontoini.

Kollafjarðar kommuna:

Hevur brúkt nakað av sini játtan — 50% av 2,0 mill. kr. - til at gera øki inn av bryggjuni til nýtiligt havnarpláss og hevur í kvittanuun deils við uppfylling at økja um havnarplássið og deils at leingja bryggjuna nakað. Hetta krevur eykajáttan uppá ikki minni enn 1,0 mill. kr.

Vestmanna kommuna:

Til bygging, sum fer fram — betonbryggja fram við Heyganesi i staðin fyri ta gomlu jarnpela- og timburbryggjuna — rakkur játtaði studningurin — 50% av 2,0 mill. kr. — ikki; eini 50% av 300.000 kr. resta í.

Tað, sum serliga troðkar á i Vestmanna, er havnarøki til at byggja og arbeiða á, og er tí skotið upp at játta tilsamans 50% av 2,5 mill. kr., so fyllast kann upp fram við lundi vestur frá Heyganesi og gerast nakað av atløguplássi við.

Miðvágs og Sandavágs havn:

Enn er einki bygt fyri játtanina — 50% av 3.0 mill. kr. - men tað er fyri neyðini, at havnin verður betri vard skjólast gjørligt, so mælt verður til at játta 50% av 2.5 mill. kr.

Sørvágs kommuna:

Hevur ikki bygt fyri sína játtan - - 50% av 3.0 mill. kr. — men mælt verður til at játta aftarat 50% av 1.0 mill. kr., fyri at tann ætlaða byggingin kann verða framd.

Skopunar kommuna:

Játtanin er 50% av 3.5 mill. kr., og bygt er fyri stívar 4.0 mill. kr.

Annars er at siga, at aftaná at rúmkað og dýpt er inni i havnini og innsiglingin flutt nakað út, fyri at størri før enn teir smáu dekkskútarnir, havnin var ætlað til, kunnu nýta hana, er vorðin so nógvur resonansur í havnarhylinum, at okkurt má gerast fyri at bøla um viðurskiftini, og vísa tær royndir, ið gjørdar eru, at líkt er til, at bæði verjugarðurin á Skerinum og brimgarðurin norðuri á Bergi mugu leingjast. Mælt verður tí til, at játtað verður 50% av 4.5 mill. kr.

Sands kommuna:

Bygging er í gerð fyri játtanina — 50% av 3.75 mill. kr. - men kostnaðurin verður góðar 6.0 mill. kr. Ætlanin, sum lá til grund fyri uppruniligu játtanini var leinging av pierinum; men tá til stykkis kom, hevði fiskivinnan verið fyri tílíkari broyting — - útróðrar og flakaskering vundu meir og meir uppá seg — at bygdaráðið helt rættast verða í fyrstu syftu at skapa best møgulig líkindi fyri hesi vinnu, og var tí farið undir at byggja havn,

sum kundi vera tilhald hjá dekksførum upp til eini 80 tons. Roynt var at byggja fyri kostnað svarandi til játtanina; men skjótt var momum greitt, at betta fór at vera ov lítil havn.

Sannandi, at skulu helmasandsmenn hava líkindi at taka lut í útróðrinum í slíkan mun, at lað kann roknast vinnuvegur, er ein tílík havn, sum tann, ið er í gerð, neyðug, verður mælt til at játta 50% av 2,3 mill. kr. afturat.

Hvalbiar kommuna:

Einki er bygt fyri játtanina — 50 % av 1.0 mill. kr. — men verður mælt til at játta afturat 50% av 0.85 mill. kr.

Froðbiar kommuna:

Farið er undir at byggja fyri játtanina, sum er 50% av 4.0 mill. kr. Felag í bygdini fer nú undir at byggja flakavirki á havnarplássinum, gjørt varð undir seinastu havnaætlan, uttan fyri havnarlagið. Her má tí verða gjørdur bryggjuvegur framunanfyri.

Inni í havnarhylinum er ætlanin at dýpa niður á 4,5 m fram við landsíðuni og gera atløguvegg har eisini.

Eitt stórt flakavirki krevur, at fleiri fiskifør verða knýtt at plássinum har, og skulu hesi hava hampulig kor at virka undir, er neyðugt, at rúmligari verður í hylinum og meiri atløgupláss; sum nú er, er bert ytra helvtin av hylinum nóg djúp til vanlig fiskifør.

Kostnaðurin er mettur til 6.0 mill. kr., og verður tí mælt til at játta aftanrat 50% av 2.0 mill. kr.

Porkeris kommuna:

Einki er bygt fyri játtanina — 50% av 1.0 mill. kr. — men mælt verður til at játta 50% av 0.75 mill. kr. aftanrat, so virðið verður lað sama.

Vágs kommuna:

Vágs kommuna bygdi fyri sína játtan undir havnaætlanini 1950/68 í seinasta enda av 10 ára skeiðinum og hevur tí ikki enn hildið seg føra fyri at fara undir at byggja fyri játtanina — 50% av 4.0 mill. kr. samhært ætlanini, ið nú er galdandi.

Ætlanin er at byggja millum gamla havnarlagið og pierin á Tjørn og samstundis at leingja henda pier ein mun; mælt verður tí til at játta aftanrat 50% av 1.0 mill. kr.

M. Helmsdal.

FØROYA LANDSSTÝRI
Tórshavn, 7. mars 1974.

Uppskotið frá 6. august 1973 til løgtingslóg um eykastudning til ávisar havnaviðkanir (løgtingsmál nr. 6/1973) umfatað 17 av teim 20 havnabyggingunum, studningur var latin til sambært løgtingslóg nr. 55 frá 1. august 1969 (tíggjuáraætlanin 1969/78).

Tær tríggjar havnirnar, sum ikki vórðu tiknar við, vóru tær í Haldórsvíkar, Skála og Sjóar kommunum, og var orsøkin — sum tað sæst av viðmerkingunum til uppskotið — at hildið var, at í hesum kommunum fór ikki at verða tørvur til størri fleggingar í havnabygging fyrstu 5 árini.

Men nú hava so hesar kommunur vist á, at teim eisini tørvar størri fleggingar í havnabyggingar í komandi árum.

Skála kommuna:
Byggingin undir 10 ára ætlanini er framd; men tørvur og størri áhugi er fyri deils at leingja norðasta (og elsta) picrin og deils úthygging millum teir báðar nýggjaru picrarnar.

Sjóar kommuna:
Undir 10 ára ætlanini er játtað 50% av 1 mill. kr. til leinging av bryggjuni inni við Hulkin. Nú sigur kommunan, at hon ætlar sær undir arbeiðið í seinasta lagi næsta ár, so rinniligt vildi verið at játta studning svarandi til økingina í byggikostnaðinum síðan 1968.

Haldórsvíkar kommuna:
Fyri sína játtan 50% av 1,0 mill. kr. undir 10 ára ætlanini 1969/78 byggir kommunan havnarøki og atløgubryggju; men 1 mill. kr. rekkur ikki til at fáa so mikið atløguplass, sum hildið verður neyðugt.

Landsstýrið skal tí, vísandi til samráðingar við nevndina, loyva sær at mæla til, at § 1 í uppskotinum verður broytt soleiðis:

Í yvirlitinum yvir kommunur verður aftaná «Nes» sett:

Skála	1.500.000
Sjóar	750.000

og aftaná «Eiðis»

Haldórsvíkar	750.000

Samanteljingin verður broytt frá 33.000.000 til 36.000.000.

Atli P. Dam

/ M. Helmsdal

Løgtingsins fíggjarnevnd,
h e r.

Si eisini skjal 4.

1. viðgerð 22. november 1973 og málið beint í fíggjarnevndina, sum 29. mars 1974 legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið og varð við fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingunum til málið vísir landsstýrið til, at løgtingið samtykti at senda tær umsóknir, sum komnar vóru til tingið um eykastuðning til havnaætlanina frá 1969. Umsóknir vóru komnar frá nærum øllum bygdum, sum stuðningur var játtaður til eftir hesi ætlan.

Landsstýrið mælir til í hesum máli at játta verður í alt kr. 33.000.000,- til ávísar bygdir.

Í skrivi 7. mars í ár til fíggjarnevndina mælir landsstýrið til, at eisini bygdunum: Skála, Sjóar og Haldórsvík verður veittur stuðningur. Ilesar bygdir vórn ikki tiknar við í fyrra uppskoti landsstýrisins.

Undir viðgerðini í fíggjarnevndini er eisini komið skriv frá Klaksvíkar bygdaráð — hetta skriv varð lagt fyri tingið, og er av umsóknarnevndini beint í fíggjarnevndina — har søkt verður um kr. 10.000.000,— til kaibygging á vestaru síðu á Klaksvíkini.

Nevndin hevur viðgjørt allar hesar umsóknir og tilmælir og hevur býtt seg í ein meirluta og ein minniluta.

Sum omanfyri sagt, so samtykti løgtingið eina 10-ára havnaætlan fyri nærum allar tær bygdir, har havnaløg eru. Havnin hevði frammanundan fingið uppískoytisjáttan til leingjan av molanum við 40 metrum.

Uppskot landsstýrisins er sostatt ikki nøkur nýggj havnaætlan, men eitt uppískoyti — deils tí at tilfarsprísir og arbeiðslønir eru so nógv hækkað, og deils tí at arbeiðini, tá játtanin varð givin, ikki vóru kunnað til fulnar.

Summi av hesum arbeiðum eru longu gjørd, og kostnaðurin kendur, onnur eru í gerð, og summi ikki byrjað.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, Tr. Samuelsen, Andreas Djurhuus, Hilmar Kass og Hanus við Høgadalsá) kann tilmæla uppskoti landsstýrisins, og tekur eisini mudir við tilmælinum frá 7. mars og mælir løgtinginum til at samtykkja lógaruppskotið við hesum uppískoyti:

Í § 1 aftaná «Nes» verður sett: Skála 1.500.000, Sjóar 750.000, og aftaná «Eiðis» verður sett: Haldórsvíkar 750.000. Samanteljingin verður broytt frá 33.000.000 til 36.000.000.

Frá minnilutanum (Hákun Djurhuus, ið møtti fyri Knút Wang, og Finnbogi Isaksen). Aftaná «Klaksvík» verður sett: «og til bryggju á vestaru síðu á Klaksvíkini kr. 5.000.000.»

FÍGGJARNEVNDIN, tann 28. mars 1974

J. Fr. Øregaard Tr. Samuelsen Andreas Djurhuus K. Wang
Hilmar Kass Hanus við Høgadalsá Finnbogi Isaksen

2. viðgerð 2. apríl 1974.
Broyting frá minniluta í nevndini fall 7 — 0.
Broytingaruppskot frá meiriluta í nevndini samtykt 21 — 0.
Gr. 1 so broytt samtykt 22—0.
Gr. 2 samt. uttan atkv.gr.
Lógaruppskotið so broytt at fara til 3. viðgerð 22—0.

3. viðgerð 4. apríl.
Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 25—0.

7. Heimild fyri láni til havnavíðkanir, ídnað og handverk

Ár 1973, 13. august, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um lán til skipahygging, ídnað og handverk.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað eftir góðkenning frá fíggjarnevndini landskassans vegna at taka í láni 30 milj. kr.

2. stk. Lánið verður at nýta til bygging og prioritering av fiskiskipum, til ídnaðarfyritøkur og til handverk.

3. stk. Útlánini verða at tryggja við panti í viðkomandi ogn innanfyri 70% av virðinum eftir meting.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om lån til skibsbygning, industri og håndværk.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til efter godkendelse af finansudvalget på landskassens vegne at optage lån 30 mill. kr.

Stk. 2. Lånet anvendes til bygning og prioritering af fiskefartøjer, til industriforetagender og til håndværk.

Stk. 3. Udlånene sikres ved pant i vedkommende ejendom indenfor 70% af værdien i henhold til vurdering.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Orsakað av teimum trupulleikum, ið tykjast at vera í sambond við fíggjan av sáttmálum um bygging av kraftblokkabátum á p/f Skála Skipasmiðju og eisini fíggjan av ídnað í Føroyum, hevur landsstýrið hugsað um, hvussu hesir fíggjartáttir kunnu greiðast.

Landsstýrið ásannar, at neyðugt er við eini aðrari fíggjan enn verandi, og at hesin spurningur má loysast skjótt, serstakliga fyri at tryggja fíggjan av sáttmálum til Skála Skipasmiðju .

Tað er landsstýrisins áskoðan, at neyðugt er við eini gjøllari kanning, har mett verður um tørvin fyri fíggjan til ídnaðin og fiskivinnuna í einum longri tíðarskeiði t.d. 5 - 10 ár framyvir.

(F.L. J. nr. 440-7)

Í hesum sambandi hevur landsstýrið í hyggju at seta nevnd við tí uppgávu at kanna hesi viðurskifti.

Henda kanning skal eisini umfata tilmæli um, hvussu teir lánimoguleikar, ið eru, kunnu skipast saman við øðrum fíggjarmoguleikum.

Landsstýrið vil somuleiðis áleggja nevndini at muhugsa, um ein veruligur 1. prioritetsstovnur, sum fær heimild til bæði at útgeva virðisbrøv og taka lán í útlandinum, ikki er rætta loysnin.

Tá hetta er sagt, má ein hava í huga, at støðan til eina framtíðarfíggjan ikki kann takast fyrr enn málið liggur greiðari fyri, og vit helst tí ikki loysa spurningin um fíggjan av umsóknum, sum longu liggja fyri og helst skulu loysast í bræði, um ikki hesi mál skulu detta niður fyri.

Roynd hava verið gjørdar at útvega einstøkum byggiharrum fíggjan frá útheiminum. Møguligt var at fáa lán við skiftandi rentu, men byggiharrar tykjast ikki sinnaðir at góðtaka slíkar treytir, serliga tí, at gjaldoyra landanna millum er lítið støðufast.

Landsstýrið hevur tí tikið avgerð um at leggja lógaruppskot fram um uppføku av láni í útlandinum upp í 25 - 30 milj. kr.

Fyrimunurin fyri lántakaran við hesum uppskoti mótvegis einstaklingalánum er, at landskassin ber kursvandan, og at lántakarin fær lánið til fasta rentu við føstum avdráttum fyri hvørt árið í lánitíðini. Lánitíðin eigur ikki at vera minni enn 10-15 ár.

Her er serliga greitt frá tørvandi moguleikum til fíggjan av skipabygging, har verandi møguleikar eru skerdir av tí, at realkredittstovnurin av lánitekniskum orsøkum heldur seg ikki kunna veita lán til fleiri nótaskip.

Lógin um «egnsudvikling», sum er sett í gildi í Føroyum, skuldi givið rættiliga rúmligt mark fyri figging til iðnaðin. Samráðingar hava verið um hesar møguleikar, upplýst er, at ein fyritreyðin er, at tað úr Føroyum fyrst verður fingið rættiliga stórt lán — eini 40%.

Undir fyriliggjandi viðurskiftum, har realkredittstovnurin ikki heldur seg kunna veita lán til skipasløg, sum tó eftir royndum standa seg væl, og har «egnsudviklingen» setur sum fyritreyt mannandi fleggingar hiðani, áðrenn teir kunnu taka við, er tað neyðugt at finna útvegir fyri eini lániskipan útyvir tær, ið eru.

At útvega lán tekur tíð, men tvær ávisar umsóknir um lán, stuðningslán v.m. liggja fyri, har talan er um bygging á p/f Skála Skipasmiðju. Støðu skal takast til hesar umsóknir nú. Stundir eru tí ikki at bíða eftir eini generellari lániskipan. Málið verður tí at loysa í tveimum, í fyrsta umfari at finna útvegir fyri tveimum umsóknum, ið liggja fyri og síðani eini skipan, ið loysir málið fram í tíðina.

At loysa málið um skipabygging til ein varandi loysn er funnin verður mælt til, at landsstýrið fær heimild um tað er neyðugt at veita prioritets-

lán og at hesi lán verða rentað við lægst 8,5% p.a. og at gjalda aftur yvir ikki stytri áramál enn 10 ár.

Sum sagt frá er ætlanin at kanna møguleikarnar fyri eini samskipan av teimum lánimøguleikum, ið eru, at finna fram til, at ein stovnur fyrisitur íleggingunum hæði til fiskivinnu, iðnað og handverk. Ein tílík samskipan krevur tó tíð og eru tí ikki stundir at bíða eftir úrslitinum frá hesi kanning at loysa tey mál, sum nú liggja fyri, har støða skal takast í løtuni.

Í millumbilinum, til samskipanarspurningurin er loystur, er ætlanin, at nevndin, landsstýrið hevur selt eftir lógarheimild at kanna spurningin um stovnan av landsbanka, skal kanna tær umsóknir, ið liggja fyri og geva landsstýrinum tilmæli.

1. viðgerð 15. august og málið beint í fíggjarnevndina, sum 17. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum og var við 1. viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Undan ólavsøku hevði fíggjarnevndin fund við landsstýrið og vísti fíggjarnevndin á hesum fundi á, at tørvur var á at fáa til vega eina finansieringsskipan fyri 1. prioritetslánum til fiskiskip, bygd í Føroyum, nú Færøernes Realkreditinstitut ikki longur lænir til øll slag av fiskiskipum eins og neyðugt var at fáa tøkan pening til 1. prioritetslán til iðnað og handverk, um lógin um «egnsudvikling» skuldi verða nýtilig í Føroyum.

Landsstýrið var á hesum fundi biðið um at leggja málið fyri tingið á ólavsøku, har landsstýrinum verður loyvt at taka upp lán at lúka nevndu uppgávu.

Í viðmerkingunum til lógaruppskotið sigur landsstýrið seg hava roynt at verið millumlið millum vinnufelog og lángevarar í útlandinum at útvega lán við skiftandi rentuhædd, men at eingin hevur havt áhuga fyri slíkum lánum, einamest tí at ikki bara rentan er rættiliga ymisk, men kursurin er rættiliga óstabilur í løtuni.

Í uppskotinum verður mælt til, at landsstýrið fær heimild til at upptaka lán stórt 30 milj. kr.

Nevndin heldur, at tørvurin helst man vera nakað storri enn 30 milj. kr. og mælir tí til, at hetta verður broytt soleiðis, at landsstýrið fær heimild at taka lán upp til 50 milj. kr., men skal fíggjarnevndin góðtaka lánitreytirnar og lán til tey einstøku virkini.

Við hesi broyting mælir fíggjarnevndin løgtinginum til at samtykkja uppskotið í hesum líki:

Uppskot
til

løgtingslóg um lán til skipabygging, íðnað og handverk.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán upp til 50 milj. kr. Fíggjarnevndin skal góðkenna lánitreytirnar.

2. stk. Lánið verður eftir góðkenning fíggjarnevndarinnar at nýta til bygging og prioritering av fiskiskipum, til íðnaðarfyritøkur og til handverk.

3. stk. Útlánini verða at tryggja við panti í viðkomandi ogn innanfyri 70% av virðinum eftir meting.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om lån til skibsbygning, industri og håndværk.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån indtil 50 mill. kr. Finansudvalget skal godkende lånebetingelserne.

Stk. 2. Lånet anvendes efter finansudvalgets godkendelse til bygning og prioritering af fiskefartøjer, til industriforetagender og til håndværk.

Stk. 3. Udlånene sikres ved pant i vedkommende ejendom indenfor 70% af værdien i henhold til vurdering.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

---

2. viðgerð 17. august. - - Frávik frá tíðarfrest.

Greinarnar og lógin í uppskotinum frá nevndini at fara til 3. viðgerð samt. 22—0.

3. viðgerð 17. august. Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 21- 0.

---

8. Heimild til landsstýrið at gera skipabyggisáttmálar

Ár 1973, 13. august, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um almennar skipabyggisáttmálar.

§ 1.

At tryggja føroyskum skipasmiðjum byggisáttmálar, sum mugu haldast neyðugir, at føroyskt skipasmið kann halda fram, fær landsstýrið í samráð við fíggjarnevndina heimild at gera byggisáttmálar.

§ 2.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp tey lán, ið eru neyðug eftir § 1.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanveg og verður at leggja aftur fyri løgtingið í tingsetuni 1975.

lagtingslov om offentlige skibsbygningskontrakter.

§ 1.

Med den hensigt at sikre færøske skibsværfter de byggekontrakter, der må antages at være nødvendige, således at færøsk skibsbygningsindustri kan fortsætte, bemyndiges landsstyret til i samråd med finansudvalget at slutte byggekontrakter.

§ 2.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage de lån, der er nødvendige i henhold til § 1.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks og forelægges for lagtinget i 1975-samlingen.

Viðmerkingar:

Í tí frágreiðing, sum var gjørd í sambandi við viðgerðina av nýskipanini fyri skipasmiðjurnar í Vestmanna og á Skála, jbr. løgtingsmál nr. 29/1972, vóru tveir spurningar av alstórum týdningi fyri skipabygging her á landi drignir fram. Hesir vóru:

1. Spurningurin um lønandi og javnt framhaldandi framleiðslu.
2. Fremjan av seriubygging og samskipan av tørvinum fyri fiskiskipum.

(F.L. J. nr. 1604-37)

Ein trupulleiki við seriubygging heima í Føroyum, sum ikki var drigin fram undir viðgerðini av skipasmíðjumálinum tykist at vera, at byggiharrar ikki eru til sinnis at gera sáttmálar uttan so, at teir fáa skipið í seinasta lagi eitt rúmt ár aftaná, at sáttmálin er gjørdur.

Ein skipasmiðja, ið byggir skip, skal helst hava arbeiði til 2 ár fram í tíðina fyri at kunna leggja arbeiðið væl til rættis.

Samanleggja vit hetta krav við ynskir byggiharranna, er hetta ikki lætt.

Landsstýrið heldur tí, at sáttmálastovnurin, um hann skal verða ein verufigur stuðul fyri skipasmiðjurnar, skal hava heimild at gera sáttmálar í seinasta lagi, tá skipasmiðjan bevur arbeiði eftir til eitt ár fram í tíðina. Sáttmálar verða tá gjørdir fyri í minsta lagi eitt ár afturat.

Í hesi frágreiðing var niðurstøðan tann, at tað helst bleiv trupult at loysa hesar spurningar uttan so, at ein sáttmálastovnur var settur á stovn. Hesin sáttmálastovnur skuldi hava heimild til, tá tørvur var á, at gera sáttmálar, selja sáttmálar og liðugtgjørd fiskifør, at gera sáttmálar um leigu av fiskiførum og um neyðugt at hava heimild til at reka hesi fiskifør.

Hildið var, at ein slíkur stovnur ikki kundi góðtakast, um skipasmiðjurnar gjørdust einstaklinga ogn.

Landsstýrið legði skipasmiðjumálið fyri løgtingið.

Ein meiriluti í figgjarnevndini ásannaði, at spurningurin um at fáa skipasmiðjunum nóg mikið av sáttmálum var eitt mál av stórum týdningi fyri føroyskt skipasmíð, men helt meirilutin ikki, at tørvur var fyri einum slíkum stovni nú. Meirilutin mælti tí til at endurskoða málið, tá tørvur var og í seinasta lagi í ólavsøkutingsetuni 1975.

Álitið frá figgjarnevndini er dagfest 14. februar 1973 og avgreiddi løgtingið málið sambært tilmæli frá meirilutanum.

Nú er drúgvt tíðarskeið gingið síðan og eingir endaligir sáttmálar eru fingnir til vega enn, mest orsakað av trupuleikum við figging.

Fyri at tryggja at tann føroyski skipasmiðjuídnaðurin ikki skjótt aftur skal koma í somu stoðu, sum hann, hann hevur verið í seinastu árini, leggur landsstýrið uppskotið fram aftur, tó soleiðis at hað ikki verður talan um at gera trýggjan stovn, men at búskaparráðið, sum m.a. er ráðgevari landsstýrisins í spurningum um endurnýgging fiskiskipaflotans og í fólmðarmálum, fær spurningin til umhugsunar og ummælis um í hvønn mun, landið skal luttaka í bygging av fiskiskipum at tryggja skipasmiðjuídnaðan. Endalig avgerð verður tikin í samráð millum landsstýrið og figgjarnevnd.

1. viðgerð 15. august og málið beint í figgjarnevndina, sum 17. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram av landsstýrinum og var við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Ein meiriluti av nevndini (Trygvi Samuelsen, Andreas Djurhuus, Kjartan Mohr (sum møtti fyri Knút Wang), Hilmar Kass og J. Fr. Øregaard) vísa á, at hetta mál var til viðgerðar í seinastu tingsetu, men fekk tá onga umdirtøku, hvørki í nevnd ella á tingi.

Meirilutin hevur somu støðu og setur sostatt einki uppskot fram í hesum máli.

Ein minniluti (Hanus við Høgadalsá og Erlendur Patursson (ið møtti fyri Finnboga Isaksen) vísir á, at uppskot landsstýrisins er meinlíkt uppskoti tjóðveldisfloksins í seinastu tingsetu og tekur sostatt undir við uppskoti landsstýrisins og mælir tinginum til at samtykkja tað.

2. viðgerð 17. august. Frávik frá fíðarfrest.
Gr. 2 fall 7—0.
Gr. 3 sostatt burturdottin.
Alt málið sostatt burturfallið.

9. Kunngerð um regulering av fiskiveiðuni í Norður-vestara partinum av Atlantshavinum

Ár 1973, 13. august, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið góðkennir viðlagda uppskot til kunngerð um «regulering af fiskeriet i det nordvestlige Atlanterhav.»

Viðmerkingar:

Tær samtyktir, sum gjørdar eru á ICNAF-fundum um regulering av fiskiveiðuni á konventiónsøkinum hava verið lagdar fyri løgtingið at taka støðu til, jbr. løgtingsmál nr. 32/1972, um reguleringarnar av toskaveiðuni undir Canada í 1973. Seinni í hesi løgtingssetu verða samtyktirnar frá ársfundinum í juni mánaða í ár at gilda í 1974 lagdar fyri løgtingið, samtyktirnar eru ikki enn formliga komnar til landsstýrið.

Endamálið við kunngerðini her er eins og við kunngerðini um regulering av fiskiveiðuni á NEAFC-økinum at geva fyrisitingini -- eftir avtalu við fiskimálaráðið er tað landsstýrið — neyðuga heimild at ansa eftir, at samtyktirnar verða fylgdar.

Kunngerðin inniheldur ikki reglur um, hvørjar tær ávísu reguleringarnar eru, men sigur, hvørjar heimildir fyrisitingin hevur í útinningini av samtyktunum.

Umframt at lýsa konventiónsøkið (§ 1) og at siga frá, hvor hevur eftirlitið (§ 3) og hvør straffin er fyri brot (§ 4) verður í § 2 kravt, at skip skulu hava loyvisbræv at fiska á konventiónsøkinum.

Tær ávísu reguleringarnar, tá ið talan er um reiðskap, veiðukvoti v.m., kunnu setast sum treytir í loyvisbrøvini. Tað skuldi á henda hátt verið lættari hjá tí einstaka skipinum at havt yvirlit yvir galdandi reglur, og

Sí skjal 5 Løgtingstíðindi 1973.
Annars FL. J. nr. 1519-2/1973: Skjal 1, skjal 2 (talva 1-2-3-4-5-6-7), skjal 3, Bilag 4 og 5.

eisini eina meira smidlga skpan at føra reguleringarnar ájour, so hvørt broytingar verða samtyktar av kommissiónini.

1. viðgerð 15. august o gmálið beint í figgjarnevndina.
20. november legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram soljóðandi:

Til Føroya Løgting.

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 9/1973: Kunngerð um regulering av fiskiveiðuni á norður-vestara partinum av Atlantshavinum.

Við skrivi dagfest 13. august legði landsstýrið fyri løgtingið uppskot um, at løgtingið góðkendi uppskot til kunngerð um «regulering af fiskeriet i det nordvestlige Atlanterhav». Kunngerðin hevði til endamál at geva fyrisitingini heimild at ansa eftir, at samtyktirnar gjørdar á ICNAF fundi, her var hugsað um samtyktirnar at galda í 1973, vórðu hildnar.

Í sama skrivi varð samstundis boðað frá, at landsstýrið seinri í tingsetuni vildi leggja fyri løgtingið ICNAF-samtyktirnar frá ársfundinum í juni mánaða 1973 at galda í 1974.

Uppskotið fekk 1. viðgerð 15. august 1973 á 7. løgtingsfundi og varð beint í fiskivinnunevndina.

Síðani hevur fiskimálaráðið 12. september 1973 sett reglur um regulering av fiskiveiðuni í norður-vestara partinum av Atlantshavinum, á ICNAF-økinum, kunngerðin er lýst at galda í Danmark, men er hon ikki sett í gildi í Føroyum, henni tørvar góðkenning heimastýrisins. Kunngerðin er løgd við sum skjal 1.

Munurin millum uppskotið og kunngerðina er, at kunngerðin í § 2 skilar til á hvørjum øki loyvisbræv krevst og til veiðu av hvørjum fiskasløgum og at hon í §§ 3 til 7 sigur frá loyvdari meskavídd í netarciðskapi.

Kunngerðin skal galda fyri árið 1973, men av tí, at hon ikki er góðkend av heimastýrinum, hevur landsstýrið ikki havt heimild at seta reguleringarnar í verk.

Viðvíkjandi reguleringunum í 1974 varð á ársfundinum samtykt ein rúgva av kvotaskipanum, 30 í tali, galdandi fyri so at siga alt konventiónsøkið, bert eitt lítið øki millum Newfoundland og Nova Scotia (4Vn) varð undantikið. Fiskasløgini, ið koma undir kvotaskipan eru: toskur, lýsa, kongafiskur, upsi, makrelur, sild, lálla, hvassasprek, eitt amerikanskt

flundruslag (yellowtail flounder), silvur lýsingur og reyður lýsingur og heraftarat kópur.

Reguleringarnar eru tó ikki at skilja soleiðis, at eitt fiskaslagið er kvoterað á øllum økjum, á summum økjum er fritt at fiska hetta slagið og á øðrum eru kvotur settar.

Meginreglan undir býtinum av eini totalkvotu millum lond í 1973 varð, at 80% vóru býtt á søguligt grundarlag, veiðutølini seinastu 10 árini og seinastu 3 árini við somu tyngd, 40% hvør, 10% umframt til strandalandið og 10% at býta, har serligur tørvur var at veita eykakvotu. Londini tóku tó fyrivarni um, at býtið eftir hesi reglu bert var ein máti at loysa málið í einari ávísari støðu og tí ikki nakar fortilburður, hvussu spurningurin átti at verða loystur seinri.

Á ársfundinum í 1973 førdi Canada sum strandaland tað sjónarmið fram, at strandaland í forhond átti at fáa til sín so mikið, sum tað hevði ella roknaði við at fáa orku at veiða á konventiónsøkinum tað givna árið og ikki eftir reglum, hvat tað frammanundan hevði veitt. Onnur lond, fjarfiskarar, kundu t.d. fáa eina kvotu roknaða eftir, hvat tey høvdu fiskað árini frammanundan, helvtina eftir veiðum seinastu 10 árini og hina helvtina eftir veiðum seinastu 3 árini, bæði tølini við somu tyngd.

Sum meginregla varð hetta sjónarmiðið góðkent, tó nakað tillagað eftir teimum konkretu viðurskiftunum á teimum ymsu økjunum. Fyrivarni vórðu eisini her tikin um, at skipanin ikki er fortilburður undir framtíðar skipanum.

Fyri Føroyar er tað so at siga bert regulering av toskaveiðuni, ið hevur týdning. Skuldi tað hent, at farið verður undir nýggja veiðu, er felagskvota í hvørjum føri sett av til tey lond, ið ikki hava veitt fiskaslagið frammanundan á økinum, og her hevur altíð frá føroyskari síðu verið roynt at fingið størst møguligu felagskvotu við tí fyri eyga, at føroyingar einaferð kunnu koma at fiska her.

Talvurnar 1 - 7 á skjali 2 vísa, hvussu totalkvotuin fyri tosk er býtt millum lond á økjum, har føroyingar veiða tosk. Til samanberingar eru sett veiðutølini fyri árini 1972 og 1972 eftir teimum hagtalnum, ið inn eru send.

Kort yvir ICNAF-økið er lagt við sum skjal 3.

Tað er at viðmerkja til donsku kvotuna á øki 1 (Grønland), at hon skal býtast millum Føroyar og Grønland. Ongin avgerð er tikin enn, hvussu býtið skal verða, men helst verður tað ávikavist 12.000 t og 18.000 t. Aftrat hesum kemur veiðan í Grønlandi, ið verður fingin utanfyri konventiónsøkið, t.v.s. innan fyri 3 fjórðingar, hon telur ikki við. Hetta veiðutal verður mett til 12.000 t. samanlagt fyri Føroyar og Grønland. Viðvíkjandi økinum 2y3K3L, sunnast við Labrador og eystanfyri Newfoundland so hava grønlendingar ynskt at fáa lut í hesi kvotu. Heldur ikki her er enn avgerð tikin, hvussu býtið verður.

Sum sagt framman undan er tað bert lítið øki millum Newfoundland og Nova Scotia, har ongin toskaregulering er. Aftrat kemur tó St. Lawrence flógvin, men hesin liggur uttanfyri konventiónsøkið, flógvin er nationalur sjógvur.

Ársfundurin 1973 gjørdi seg ikki lidnan, samtykt varð at halda ein eykafund í oktober um regulering á økinum 5 og hagtalsøkinum 6. Úrslitið er ikki enn komið frá fundinum. Umboð fyri landsstýrið lutlók ikki, síðani føroyskur fiskiskapur ikki fer fram her.

Eisini er talan um ein annan eykafund í januar mánaða 1974, har m.a. spurningurin um regulering av toskaveiðuni á økinum millum Newfoundland og Nova Scotia kemur fyri (4Vn).

Mótmælisfreistin fyri 1973-samtyktirnar er 6 mánaðar frá 17. juli 1973 ella til 17. januar 1974.

Eins og fyri árið 1973 er tað neyðugt fyri 1974 at hava eina kunngerð, ið gevur fyrisitingini heimild at seta lær samtyktu reguleringarnar í verk og at ansa eftir, at tær verða hildnar. Fiskimálaráðið hevur sent landsstýrinum uppskot til tílíka kunngerð, víst verður til skjal 4. Kunngerðin er lík kunngerðini fyri 1973. Tað, ið ger munin, er tær nýggju samtyktirnar. Kunngerðin hevur skund, tí skipini, ið fara til Grønlands og Canada, skulu hava serloyvi at fiska.

Vísandi hertil verður løgtingið umframt at taka støðu til uppskotið frá 13. august 1973 biðið um eisini at taka støðu til:

1. Reguleringstiltøkini samtykt í 1973 at galda í 1974.
2. Uppskotið til kunngerð at galda í 1974.

Figgjarnevndin legði fram 29. november soljóðandi

Álit

Málið varð við 1. viðgerð 15. august 1973 beint í fiskivinnunevndina.

Í framløguskrivinum dagfest 13. august 1973 verður greitt frá uppskotinum til kunngerð um regulering av fiskiskapinum á ICNAF-økinum í 1973, og samstundis verður sagt frá, at landsstýrið seinri í tingsetuni vil leggja fyri løgtingið samtyktirnar gjørdar á ICNAF-ársfundinum í juni mánaða í ár at galda fyri 1974.

Tær nevndu samtyktirnar hevur landsstýrið lagt fyri løgtingið við skrivi frá 20. november 1973 og samstundis broyttu kunngerð fyri skipanina í 1973 og uppskot til kunngerð at galda fyri 1974.

Tað, sum løgtingið nú hevur at taka støðu til, er:

1. kunngerðin fyri 1973,
2. reguleringsskipanin fyri 1974 og
3. kunngerðin fyri 1974.

Nevndin hevur ráðført seg við tveir skiparar, ein fyri trol og ein fyri líni, ið eru vanir at veiða á hesum leiðum, tveir reiðarar og við umboð frá fiskirannrókuarstovuni.

Aftaná hesar samráðingar er nevndin samd um at gera hesar viðmerkingar fyri hvørt øki sær:

Øki: Sbr. viðløgdu talvu 1, har samlaða kvotan fyri Danmark er
1. 30.000 t árliga og verður henda kvota at býta millum grønlendingar og føroyingar.

Við tað at fiskastovnurin á hesum øki má ætlast at verða niðurundirkomin kann nevndin taka undir við hesum býti.

Øki: Sbr. viðløgdu talvu 2, har ongin kvota er, og er orsøkin til
2 G-H hetta tann, at vit lítið hava veitt á hesum øki í fleiri ár vegna ís-viðurskiftir.

Hóast hetta vil nevndin mæla til, at roynt verður undir komandi samráðingum at sleppa uppí part eisini á hesum øki.

Øki: Sbr. viðløgdu talvu 3, har nøgdin er 13.800 t.
2 J Hetta øki vísir eina øking mett við tað, sum føroyingar
3 KL eru vanir at veiða, men nevndin hevur fingið upplýst undir viðgerðini frá kønum monnum, at her kann koma at verða meira veitt, tá «Flógvin» verður stongdur, og tí verður mælt til at hava hetta í huganum undir komandi samráðingum.

Øki: Sbr. viðløgdu talvu 4, har nøgdin er 6.700 t.
3 M Her heldur nevndin, at nøgdin er ov lítil og er orsøkin ætlandi tann, at hagtølini hava verið altóálitandi og tí verður mælt til, at tað verður mælt til at miðja fmóti at fáa hesa nøgd munandi økta.

Øki: Sb. viðløgdu talvu 5, har nøgdin er 1.500 t.
3 NO Á hesum øki hevur nevndin undir viðgerðini fingið upplýst, at føroyingar fyrst í 1960-unum hava havt eina munandi veiðu og skal nevndin tí heita á teir menn, sum vera við til komandi samráðingar at hava hetta í huga.

Øki: Sbr. viðløgdu talvu 6, har nøgdin er ongin, og er orsøkin
3 Ps til hetta tann, at okkara samráðingarmenn hava valt at fara uppí býtið «onnur lond», har nøgdin er 2.000 t, og heldur nevndin seg kunna taka undir við hesum.

Øki: Sbr. viðløgdu talvu 7, har nøgdin er 1.150 t.
4 Vs Hetta er ein nógv roynd leið hjá okkara trolarum og sum
4 W umfatar økið við Cape Breton og heldur nevndin at henda nøgd er alt ov lítil í mun til veiðuna í 1972, ið var 6.308 t, og mælir tí til at roynt verður at fáa hesa nøgd munandi hækkaða.

Viðvíkjandi økjunum 4 Vn og 3 Pn hevur nevndin fingið upplýst, at her eru ongar avmarkingar. Vísandi hertil mælir nevndin lands-

stýrinum at taka hesar viðmerkingar við undir komandi samráðingum og setur fram fylgjandi

Uppskot
til
samtyktar

1. Løgtingið góðkennir kunngerð frá 12. september 1973 um «regulering af fiskeriet i det nordvestlige Atlanterhav».
2. Løgtingið tekur til eftirtektar reguleringstilløkini samtykt á ICNAF-ársfundinum 1973 at galda í 1974.
3. Løgtingið góðkennir uppskot til kunngerð um «regulering af fiskeriet i det nordvestlige Atlanterhav».

FISKIVINNUNEVNDIN, 29. november 1973.

2. viðgerð 6. desember. Atkvøðugreiðslu á seinni fundi.

Uppskotið frá nevndini punkt 1 - 2 - 3 samtykt 19—0.
Uppskotið frá landsstýrinum sostatt burturfallið.

Málið avgreitt.

10. NEAF-samtyktir mai 1973

Ár 1973, 14. august, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið tekur til eftirtektar viðløgdu NEAFC samtyktir frá mai 1973 annexini II til IX og mótmælir samtyktini annex I.

Viðmerkingar:

Á NEAFC-fundinum í London í døgunum 9. til 15. juni 1973 vórðu hesar samtyktir gjørdar:

Annex I. **Laksaveiða.**

Samtykt varð við neyðugum meiriluta, at laksaveiða verður ikki loyvd utlanfyri fiskimark á konventiónsøkinum frá 1. januar 1976. Trý lond, teirra millum Danmark atkvøddu ímóti.

Galdandi reglur eru tær, at veiða eftir laksi er ikki loyvd utlanfyri fiskimark í tíðarskeiðinum 1. juli til 5. mai og yvirhøvur ikki loyvd á hesum økjum:

a eystanfyri 0° millum 63°N og 68°N:
b eystanfyri 22°E.
c á konventiónsøkinum 2 sunnan fyri 62°N millum 2°E og 11°W og
d undir Islandi.

Danmark hevur mótmælt, at 1973-samtyktin verður sett í gildi.

Annex II. **Norðsjóvar-sildin.**

Samtykt varð í fyrsta umfari, at 1973-reguleringin heldur fram óbroytt til 15. juni 1974. Samtykt varð eisini at seta niður eina arbeiðsnevnd at halda fund í døgunum 23. til 25. oktober at fyrireika ein eyka NEAFC-fund í døgunum 11. til 14. december 1973 um møguligar aðrar reguleringar av sildastovninum í Norðsjónum og Keltiska Sjónum.

1973-reguleringin er hendan:

a. loyvt er bert at veiða sild til mat og agn í tíðarskeiðinum 1. februar til 31. mars so mikið sum svarar til tað, ið mest er veitt nevnda tíðarskeið og til nevnda endamál okkurt av árunum 1969 til og við 1972.

(F.L. j. nr. 1504-3-2/1973)

b. loyvt er bert at veiða 1250 tons sild til mat og agn í tíðarskeiðinum 1. apríl til 15. juni.
c. í staðin fyri veiðumøguleikarnar nevndir undir **a** ogh kunnu lond velja at veiða til mat og agn tilsamans 2.500 tons av sild í tíðarskeiðinum 1. februar til 15. juni.

Landsstýrið hevur valt veiðumøguleikarnar nevndir undir **a** ogb.

At lýsa hvi, soleiðis varð valt, verða hesi hagtøl nevnd, um føroysku sildaveiðuna i Norðsjónum:

1. februar — 31. mars	tons
1969	2,047
1970	3,845
1971	5,967
1972	10,923

Annex III. Atlanto-Skandiska sildin.

Samtykt varð at veiða av hesum stovni verður ikki loyvd í 1974 á ICES-hagtalsøkjunum I (eystanfyri 30°E), II (norðanfyri 64°N) og Vb (Føroya økið). Undantak 20% av ársveiðuni í 1969 kann tó gevast til veiðu av ungsild.

Veiða av føroysku fjarðasildini er tó ikki undir forboðnum.

Annex IV. **Makrelur.**

Samtykt varð at veiða til iðnað eftir makreli undir 30 cm til longdar verður ikki loyvd á konventiónsøkinum IIIa (Skagerakk) og IV (Norðsjógvurin), tó er 20% av undirmátsfiski loyvd í veiðuni.

Annex V. **Meskavíddin undir Føroyum.**

Samtykt varð, at meskavíddirnar á konventiónsøkinum I, har Føroyar eru, eisini skulu galda fyri Føroya-økið.

Meskavíddirnar hava annars verið hesar:

	snurriváð	trol	
		sissal-manilla	annað tilfar
Øki I, Føroyar undantiknar	110 cm	120 cm	130 cm
Føroya-økið	105 cm	110 cm	105 cm

Henda samtyktin var einmæld.

Annex VI. **frskur hvítingur.**

Samtykt varð at framlongja undantakið, at skip, ið veiða og landa hvíting frá frska Havinum kunnu nýta 60 cm nesku, undantakið verður framlongt til 31. december 1975.

Annex VII. **Undirmátsfiskur.**

Samtykt varð at framlongja undantakið um undirmátsfisk í samband við veiðu til iðnaðarendamál. Loyvt er tí til 1. januar 1975 at hava 10% av undirmátsfiski í hesi veiðu.

Annax VIII. **Stongd øki á Biscaya-flógvanum fyri trol.**

Samtykt, at trolforboðið fer úr gildi 31. december 1973.

Annex IX. **Hagtøl til the International Counsil for the Exploration of the Sea (ICES).**

Samtykt varð at leita á limaloudlui at geva ICES fiskiveiðuhagtølini frá árinum undan áðrenn 1. februar og eftir ICES standard.

Hagtalsskipanin her í Føroyum er nú løgd soleiðis til rættis, at her skuldi ongin bági verið at lúka hesi krøv.

Eli Nolsøe
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

Sí skjal 6.

2. viðgerð 15. august. Frávik frá tíðarfreslini uttan atkv.gr.. Málið beint í figgjarnevndina, sum 17. august legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fram av landsstýrinum og við 1. viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Tórálvur Mohr Olsen, Leon Joensen og Hákun Djurhuus) er í høvuðsheitunum samdur um uppskot landsstýrisins, tó við hesum viðmerkingum:

Til annex 2: Norðsjóvarsildin.

Nevndin harmast um, at hagtøl, ið umsiting okkara hevur nýtt í samráðingum hava verið so vánalig, at vit seinasta ár høvdu eina sildaveiðumiss uppá um 3.000 tons, í mistum virði 5—6 milj. kr.

Til annex 3: Atlanto-Skandiska sildin.

Viðvikjandi hesum sildastovni í føroyskum heimasjógvi verður víst til løgtingslóg nr. 37 frá 22. juni 1972 um regulering av sildaveiðuni á landleiðini. Eftir hesi lóg er ikki loyvt at veiða fjarðasild til framleiðslu av mjøli og olju.

Meirilutin heitir enn einaferð á landsstýrið um av álvara at virka fyri, at Føroyar fáa sjálvstøðugt umboð allastaðni, har mál av týdningi fyri føroysku fiskivinnuna koma til viðgerðar.

Við hesum viðmerkingum mælir meirilutin til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) setur fram fylgjandi:

Annex I: Laksaveiða:

So leingi sum tað ikki er vísindaliga prógva, at orsøkin til minkan av laksi í teim amerikansku og ensku ánnum er orsakað av ovveiðu á víðum havi ella av dálking og eitring av hesum ánn, er ikki prógv fyri, at hesi friðartiltøk vicka eftir ætlan, at verja laksastovnin.

So statt mælir minnilutin til, at tingið tekur undir við uppskotinum um at mótmæla nýggja ætlaða veiðubanni.

Harumframt mælir minnilutin til:

1. at landsstýrið arbeiðir fyri, at galdandi veiðubann fyri laks á víðum havi í norður-vestara partinum av Atlantshavinum verður likið upp aftur til nýggjar metingar baserað uppá vísindaligar kanningar.
2. At landsstýrið virkar fyri at útvega føroysku laksaskipunum endurgjald fyri mistar veiðumoguleikar, í sama mát sum danski staturin hevur endurgoldið teim bornholmsku laksabátunum.

Annex II: Norðsjóvarsildin:

At sildastovnurin í Norðsjónum má varðveitast og at ávís friðingartiltøk eru neyðug, er ásannað av øllum.

Men galdandi reguleringin rakar so gott sum bert tann føroyska veiðuflotan, meðan aðrar tjóðir hava aðra vinnu at taka til í hesum tíðarskeiði.

Tað verður framvegis loyvt at veiða óavmarkaða nøgd av ung- og smásild eins væl til iðnað og verður tí hildið: At einans at friða stórsildina nakrar mánaðar, tá einans føroyingar royna eftir henni, ikki kann takast fyri fult, sum eitt friðingartillak.

So statt heldur minnilutin, at landsstýrið átti at gjørt ríkisstjórnini greitt: at vit vilja fremja øll tiltøk, sum miða ímóti friðing av ungsild og sum avmarkar sildaveiðu til iðnað, men eru ímóti tiltøkum sum so gott sum einans skerja veiðumoguleikarnar hjá ti føroyska sildaflotanum.

Annex V. Meskavíddin undir Føroyum:

Her mælir minnilutin til, at tingið tekur undir við uppskotinum um, at landsstýrið heitir á avvarðandi útlendskar myndugleikar, hvørs trolarar veiða á føroyska veiðuøkinum at kanna, at meskavíddin og reiðskapur teirra lýkur ásettu treytir, tá skipini taka útgerð og fara frá útlendskari havn at veiða undir Føroyum, tí sum kunnugt hevur tað vist seg, at útlendsk veiðufør undir Føroyum ikki lúka treytirnar.

Annars setur minnilutin fram hetta

Uppskot

Løgtingið viðtekur, at landsstýrið heitir á ríkisstjórnina um skjótast gjørligt at útvega føroyingum sjálvsløðugt umboð í NEAFC og tílíkum altjóða fiskifundum, har okkara áhugamál innan fiskivinnuna verða viðgjørd.

FISKIVINNUNEVNDIN, 16. august 1973.

Tórálvur Mohr Olsen Leon Joensen Hákun Djurhuus
Ove Mikkelsen Poul J. Olsen

2. viðgerð 17. august. Frávik frá tíðarfrestini.
Atkvøðugr. sama dag á seinni fundi.
Uppskotið frá minnilutanum í nevndini fall 12--0.
Uppskotið frá landsstýrinum fall 12—0.
Alt málið sostatt burturfallið.

11. Føroya undirgrund og grundin undir havbotninum kring Føroyar

Ár 1973, 14. august legði Hákun Djurhuus, løgtingsmaður, fyri fólkaflokkin og framburðsflokkin fram soljóðandi:

Í løgtingssetuni 1971/72 legði Fólkaflokkurin fram løgtingsmál nr. 13/1971: Føroya undirgrund.

Ætlanin við hesum uppskoti til samtyktar var at fáa fast lógarstoði undir okkara ognarrætti til Føroya undirgrund, grundin undir havbotninum kring Føroya og til tað av virði hendan undirgrund kann hava í sær.

Uppskotið var orðað soleiðis:

1. Løgtingið áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við danska ríkisstýrið um at leggja undir føroyska lóggávu málið: Rávni í Føroya undirgrund.
2. Løgtingið áleggur landsstýrinum at gera uppskot til lóg at leggja fyri tingið um nýtslu- og ognarrættin til rávni í Føroya undirgrund.

Víst var á í viðmerkingunum til uppskotið at tá sermálsøkini í 1948 vóru løgd undir føroyska lóggávu við løgtingssamtykt varð samstundis samtykt, at samráðingar skuldu fara fram við danska ríkisstýrið um rávni í undirgrundini: radio, luftferðslu og eftirlit við inn- og útflutningi.

Hetta uppskot varð sett fram av allari nevndini og samtykt, við 19 0 atkvøðum. Á tingi var tingmanningin tá 20 tingmenn.

Tað tykist týðiligt, at teir løgtingsmenn og flokkar, ið atkvøddu fyri hesari samtykt, vóru so framskygdir tá, at teir roknaðu við, at tann tíð kundi koma, tá tað var umráðandi fyri okkum føroyingar at fáa fastatøku á hesum málsøkjum.

Ikki tí, at nakar tá tí dugdis vísti um nakað virðismikið rávni í okkara undirgrund, men teir lugsaðu og handlaðu við longum sikti.

Nú liggja oljuborutorn á havleiðum ikki so langt frá okkum, og landsstýrið hevur sett nevnd at kanna viðurskiftli í sambandi við umsóknir um leitingarrætt eftir rávni á leiðum, ið vit kunna okkum.

Men í slíkum álvaramáli er tað ikki nokk at kanna sær nakað. Her eiga vit sum skjótast at fáa skapt tað lógarstoði, ið skal til fyri at vit av sonnum kunnu siga: **hetta er okkara.**

Verður tað siktið fylgt, ið liggur í 1948 – - samtyktini um rávni í undir-

grundini, og sum Fólkaflokksins uppskot var eitt framhald av, átti tað ikki at falla við 13—13 atkvøðuúrsliti, men verið einmælt samtykt.

Her má ein misskiljing hava ørkymlað menn, ti júst í einum slíkum máli eiga vit at kunna finna hvønnannan sum føroyingar tvørtur um flokspolitisk mark. Tað var júst tað í hendi við 1948 — samtyktini, ið hevði eina samda nevnd og 19 av 20 tingmonnum aftanfyri seg.

Tráðurin og siktið við 1948 — samtyktini og 1971 uppskotinum verða hervið uppafturtikin, men 1971 uppskotið soleiðis broytt, at tað verður álagt landsstýrinum saman við marknaðarnevndini at taka samráðingarnar upp við ríkisstýrið og loysa úr lagdi tað lógarverk, ið hesum máli tørvar.

Eisini eigur at verða gjørt vart við, at útmarkið á ti havleið kring Føroyar vit halda okkum eiga undirgrundina undir, verður sett til hálva leið úr Føroyum til næsta land.

Samsvarandi tí, ið er framført frammanfyri verður soljóðandi uppskot til samtyktar sett fram:

Uppskot til samtyktar viðv. Føroya undirgrund og grundini undir havbotninum undir havleiðunum kring Føroyar.

1. Løgtingið áleggur landsstýrinum saman við marknaðarnevndini at taka upp samráðingar við danska ríkisstýrið um at leggja undir føroyska lóggávumálið: Rávni í Føroya undirgrund.
2. Løgtingið áleggur landsstýrinum saman við marknaðarnevndini at gera uppskot til lóg at leggja fyri løgtingið í komandi tingsetu um ognar- og yvirvaldsrætt til rávni í Føroya undirgrund.
3. Útmarkið á ti havleið kring Føroyar, hvørs undirgrund er føroysk ogn, gongur:
   a) so langt sum møguleiki er at gera nýtslu burtur úr náttúruríkidømunum í og undir havbotninum.
   b) Markið millum Føroyar og tey lond, ið liggja yvirav Føroyum, er, um onnur avtala ikki verður gjørd, ein linja, sum gongur mitt millum hæði londini, máld frá ti grundlinju, sum sjómarkið hjá hvørjum landi er sett eftir.

Tórshavn, 10. august 1973

Vegna Fólkaflokkin
Hákun Djurhuus
Demmus Hentze
Sigfried Skaale
Jógvan Sundstein
Knút Wang

Vegna Framburðsflokkin
Kjartan Mohr

1. viðgerð 13. november og málið beint í marknaðarnevndina, sum 1. apríl 1974 legði fram soljóðandi

Álit

Fólkaflokkurin hevur lagt málið fyri tingið, og varð tað við fyrstu viðgerð, sum var 13. november, beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt tað.

Nevndin hevur býtt seg í fýra minnihutar.

Minnihlutin (Hákun Djurhuus, Kjartan Mohr og Hilmar Kass) førir fram: Landsstýrið upplýsir, at fleiri fyrispurningar eru komnir um loyvi at leita eftir olju, og tíðin nærkast, tá avgerð skal takast um hetta.

Aftarat tí, sum verður ført fram í viðmerkingunum til málið, ger minnihlutin vart við tað lívsneyðuga fyri okkum sum tjóð, at spurningurin um ognarviðurskiftini er í lagi, áðrenn loyvi verður nokrum at leita eftir olju á hesum leiðum.

Skuldi tað hent, at olja verður funnin, er tað átroðkandi neyðugt, at tað eru føroyingar, sum stýra hesum máli.

Tað er sjónskt uttanum okkum (Noreg, Skotland og Hetland), at slík arbeiði hava ógvuliga stórt árin á lívsmynstrið, soleiðis at á teimum økjum, har ávirkanin er mest, er lívsgrundarlagið heilt broytt.

Verður olja funnin her, og gongdin ikki verður stýrd av gløggum monnum, sum fyrst meta um, hvat gagnar Føroyum, áðrenn hugsað verður um, hvussu sum mest fæst burturúr figgjarliga, so kunnu vit livørva sum tjóð.

Í fyrstu syftu mælir minnilutin til at samtykkja uppskotið frá fólkaflokkinum.

Í aðru syftu skjýtur minnilutin upp at samtykkja fylgjandi uppskot:

Uppskot
til
samtyktar

Landsstýrið fer undir tær í 1948 av løgtinginum samtyktu samráðingar við ríkisstýrið hesum málsøki viðvíkjandi í samráð við marknaðarnevndina.

Minnilutin (J. Fr. Øregaard og Poul Jacob Olsen) ásannar, at ráevnini í Føroya undirgrund í 1948 komu millum tey mál, samráðast kundi um við ríkisstýrið, skuldi málsøkið leggjast undir føroyska lóggávu. Minnilutin ásannar eisini, at senja hevur verið um, at føroyskur avgerðarrættur í hesum spurningum skuldi tryggjast eins væl og senja hevur verið um,

at ágóðin av møguligum rikidømi í undirgrundini skal koma føroyska samfelagunum til góðar í mesta mun.

Tað hevur síðan 1948 verið viðurkent frá danskari síðu og vanlig mannagongd, at í hesum málum verða ikki avgerðir tiknar, sum ikki samsvara føroyskum ynskjum og áhugamálum, og minnilutin er vitandi um, at heimanvegin áhugin fyri leitingum eftir olju og øðrum ráevnum á føroyskum havbotnsøki kom í, setti landsstýrið seg í samband við ríkisstjórnina fyri í tráð við heimastýrisskipanina at tryggja framhald av galdandi mannagongd. Umsókuir frá oljufeløgum og øðrum hava tí eisini síðan verið beindar til viðgerðar í landsstýrinum og teirri nevnd landsstýrið hesum sett til tess at tryggja skilagóða framferð í øllum hesum málum.

Enn eru okkum kunnugt eingi leitingar- ella vinnuloyvi givin, men líður nú óivað væl til, at avgerðir hesum viðvíkjandi skulu takast.

At umsita á hesum øki, fremja neyðugar kanningar, hava eftirlit við virki fremmanda og egna felaga, tryggja vísundaliga viðgerð av øllum kanningartilfari og tryggja skilagóða framferð, sum ikki fær óhepnar socialar og búskaparligar avleiðingar krevur vælútbygda og væl útbúna almenna umsiting. Tað er ein spurningur, um vit í løtuni eru nóg væl fyrireikaðir til at fara undir hetta verk, men minnilutin hevur fingið upplýst, at á hesum øki er av landsstýrinum tikið upp samband við Getologiska stovnin og statsministeriið.

Feløgini, áhuga hava sýnt fyri øki okkara, vildu óivað verið tilreiðar at gjørt ein part av hesum arbeiði, men vildi óhelst støða okkara tá heimanvegin verið í vanda; spurningurin er tí, um tað ikki gerst neyðugt at hava sum samarbeiðsfelaga í hesum málum óheftan statsstovn ella annan almennan stovn bæði til vísindaliga virksemið og til umsitingina.

Hesi viðurskifti mugu eftir okkara lykki greiðast, áðrenn endalig avgerð verður tikin um yvirtakast skal ella ikki.

Hinvegin ásannar minnilutin, at gongdin í orkumálum og ráevnismálum yvirhøvur seinnu árini og trongd flestu landa til at leggja undir seg størst møguligu rættindi til ráevnini í undirgrundini undir landa- og havbotnsøki, ger tað ivasaml, um vit framyvir skulu grunda okkara viðurskifti á hesum øki á tann mannagongd ella tá serligu legu, tey higartil hava verið ímillum Danmark og Føroyar. Afturat hesum kemur, at virkismøguleikar okkara seinnu árini treingjast vegna vilja annara landa til at víðka egna jurisdiktión yvir víðari havleiðum. Hetta ger, at vit eiga at tryggja okkum mest møguliga.

Minnilutin heldur tí, at samráðingar eiga at halda fram við ríkisstjórnina um at tryggja framtíðar leguna av hesum málum, soleiðis at føroyskur avgerðarrættur er vardur og skrásettur, og føroyskur oguarrættur til mesta ágóðan er viðurkendur. Um hetta skal henda við greiðligum avtalum stjórnina og heimastýrið ímillum ella við at flyta undirgrundsmálini

til sermál ella á annan hátt, eigur støða at verða tikin til, tá samráðingarnar eru loknar.

Minnilutin setur fram fylgjandi

Uppskot
til
samtyktar.

Landsstýrið fer undir samráðingar við ríkisstýrið um at leggja trygdina fyri føroyskum avgerðarrætti í undirgrundsmálum í fasta framtíðarlegu, og um at tryggja at mesti ágóðin av skilagóðari nýtslu av ráevnunum í undirgrundini kemur føroyska samfelagnum til góðar. Somuleiðis eiga samráðingarnar at miða ímóti, at besta trygdin fæst fyri, at serkon hjálp er okkum tøk, soleiðis at vit verða best fyri at umsita og fyriskipa á hesum øki.

Minnilutin (Trygve Samuelsen) ger hesar viðmerkingar:

I løgtingssetuni 1966 varð av landsstýrinum lagt fram fyri tingið fyriskipan nr. 259 frá 7. juni 1963 «vedrørende udøvelse af dansk højesteret over den kontinentale sokkel» viðvíkjandi spurninginum um lýsing av nevndu fyriskipan at galda fyri Føroyar við viðmæli landsstýrisins um at fyriskipanin gjørdist galdandi fyri Føroyar.

§ 1 í fyriskipanini er soljóðandi:

«Dansk højhedsret udøves, for så vidt angår udforskning og udnyttelse af naturforekomster over den del af den kontinentale sokkel, der efter den i Geneve den 29. april 1958 undertegnede konvention om den kontinentale sokkel tilhørende det danske rige.»

Uppskotið frá landsstýrinum um at lýsa fyriskipanina at galda fyri Føroyar varð samtykt av løgtinginum tann 14. mai 1966 (Løgtingstíðindi 1965, síðu 377).

Við hesi samtykt hevur løgtingið tikið støðu til málið um yvirvaldsrættin til landgrunnin. Løgtingssamtyktin frá 1958 um landgrunnin, ið varð gjørd 8 ár frammanundan løgtingssamtyktini frá 1966 og í heilt øðrum sambandi, ger sjálvandi onga broyting í hesum.

Málsøki viðvíkjandi ráevni í undirgrundini og yvirvaldsrættinum yvir landgrunnin eru ikki yvirtikin mál og fylgir harav, at løgtingið ikki hevur lóggávurætt hesum málum viðvíkjandi. Yvirvaldsrættirnir yvir landgrunnin kring Føroyar, Grønland og Danmark hoyrir sambært fyriskipanina frá 7. juni 1963 til danska ríkið, harav Føroyar er ein partur. Lóg nr. 181 frá 8. mai 1950 «Om efterforskning og indvinding af råstoffer i kongeriget Danmarks undergrund», sum er gjørd galdandi fyri Føroyar, fyriseitur, at øll rættindi hesum viðvíkjandi hoyra ríkinum til.

Minnilutin selur einki uppskot fram og tekur onga støðu til málið fyrr enn tað er greitt, hvørjar avleiðingar yvirtøka av yvirvaldsrættinum yvir landgrunnin kring Føroyar førir við sær viðvíkjandi rætti Føroya sum partur av ríkinum til landgrunnin kring Grønland og Danmark.

Minnilutin (Erlendur Patursson) mælir til at samtykkja stykkini 1 og 2 í løgtingsmálinum, meðan hann í stykki 3 vísir til løgtingsmál nr. 85/1973: Yvirvaldsrættur Føroya yvir landgrunninum kring Føroyar og Føroya banka.

MARKNAÐARNEVNDIN, 29. mars 1974.

2. viðgerð (saman við 85/1973) 3. apríl.

Punkt 1 - 2 í uppskotinum frá fólkaflokkinum og Framburðsflokkinum fall 13—0. Punkt 3 a.b. fall 9 – 0.

Um uppskot í 2. syftu frá nevndini var atkvøtt við navnakalli:

Ja: Sigmar Hansen, Hilmar Kass, J. Sundstein, S. Skaale, Demmus Hentze, K. Wang, H. Djurhuus, Kj. Mohr, H. við Høgadalsá, Finnbogi Isaksen, E. Patursson, Jógvan Durhuus, Ove Mikkelsen = 13.

Atkvøddi ikki: Aguar Nielsen, Martin Joensen, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Hilmar Beck, J. P. Thomassen, Tórolvur Olsen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, J. Fr. Øregaard = 12.

Burturstaddur: Andreas Djurhuus.

Uppskot frá minniluta (J. Fr. Øregaard og Poul J. Olsen) fall 7–0.

Øll uppskot fallin og málið sostatt avgreitt.

12. Føroya specialskúli

Ár 1973, 15. august, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

I. Løgtingið góðkennir, at Føroya Specialskúli verður bygdur eftir viðløgdu byggiætlan.

II.

løgtingslóg um lán til bygging av Føroya Specialskúla.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka lán til bygging av Føroya Specialskúla.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om lån til bygning af Færøernes Specialskole.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage et lån til opførelse af Føroya Specialskúla.

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetunum 1969, jbr. løgtingstíðindi bls. 297 og í 1970, jbr. løgtingstíðindi bls. 185 hevur løgtingið viðgjørt spurningin um bygging av specialskúla til serforsorgina og partvís fólkaskúlan. Løgtingið samtykti at skúlin verður bygdur og at landið luttekur við 25% av byggiútreiðslunum og eisini av rakstrinum, tó treytaði løgtingið sær, at endalig byggiætlan verður at leggja fyri løgtingið til góðkenningar, áðrenn byggingin byrjar.

Síðani tá er Føroya Specialskúli settur á stovn sum sjálveigandi stovnur við einum 5-manna stýri.

Stýri skúlans hevur í samráð við «socialstyrelsen» fingið byggiætlan, nøkur eintøk eru løgd við.

Eftir ætlanini verður skúlin bygdur í Tórshavn norðurvestanfyri kærara- og venjingarskúlan á einum øki, ið er um leið 8.000 m² til støddar. Í skúl-

(F.l., J. nr. 2107-2)

anum verður pláss fyri 20—24 børnum í eini barnahavadeild, 30—36 evnaveikum og 95 næmingum við ymsum øðrum brekum. Bruttolalið í hæddar m² verður 2.358.

Byggiætlanin er løgd soleiðis til rættis, at arbeiðið kann bjóðast út sum ein samlað entreprisa. Kostnaðurin er mettur til 5 mill. kr., tá er grundøkið ikki rokuað uppi. Um 1,5 mill. kr. mugu leggjast afturat til búnyttur og um 300.000 til hava.

Ætlanin er at byrja byggiarbeiðið komandi summar, og er byggitíðin mett til 12 mánaðar.

Landsins partur av byggiútreiðslunum verður fingin sum langfreistað lán frá statinum.

Av tí at málið hevur skund loyvir landsstýrið sær at heita á løgtingið um skjóta viðgerð.

1. viðgerð 16. august. Frávik frá tíðarfrestini uttan atkv.gr. Málið beint í skúlanevndina, sum 12. aug. legði fram soljóðandi

Álit

Málið var undir 1. viðgerð beint í skúlanevndina.

Fyrst er at viðmerkja, at nevndin hevur havt ógvuliga stutta tíð at viðgera hetta mál, eitt mál, ið er av avgerandi týdningi fyri undirvísingina av brekaðum børnum.

Undir viðgerðunum frammanundan í løgtinginum er bíðið fram, at uppgáva specialskúlans eigur at verða avmarkað soleiðis, at undirvisingin av brekaðum børnum so langt møguleikarni eru, eigur at vera á fólkaskúlanum.

Specialskúlin ella ein centraliserað undirvísing av brekaðum børnum er tí eitt tiltak, sum bert gongur so langt og varar so leingi, at fólkaskúlin ikki kann taka undirvísingina uppá seg. Specialskúlin má onguntíð verða ein umbering fyri fólkaskúlan ikki at royna eina forsvarliga undirvísing av børnunum í tilknýti til heimini.

Við hesum fyritreytum hevur løgtingið samtykt, at bygdur verður skúli til serforsorgina og partvís fólkaskúlan.

Ráðgevarin í serundirvisingini hevur verið á fundi hjá nevndini og sigur hann, at tørvur er á einum specialskúla. Ætlanin var, at nevndin eisini skuldi hava fund við landsskúlaráðgevaran og fyristøðumannin fyri Statens Specialskole, men vóru háðir burturstaddir, stundir hava ikki verið at biða eftir, at teir komu til Tórshavnar.

Uppskotið hjá landsstýrinum er í tveimum, nevnað er, at løgtingið góðkennir, at Føroya Specialskúli verður bygdur eftir tí byggiætlan, løgtingið

nú hevur fingið og tað næsta, at landsstýrið fær heimild at taka lán til landsins part til bygging av skúlanum.

Viðvíkjandi tí fyrra ger landsstýrið byggiútreiðslurnar soleiðis upp:

Skúlin sjálvur	5.000.000 kr.
Búnyttur	1.500.000 —
Urtagarður	300.000 —
tilsamans	6.800.000 kr.

Tá er ikki taldur við kostnaðurin til keyp av byggilendi, her eigur at verða havt í huga, at tvey hús standa á stykkinum, av hesum kann tó eftir byggiætlanini annað nýtast til skúlatænara.

Til seinra spurningin um upptøku av láni er at siga, at løgtingið hevur samtykt, at landið lutfekur við 25% av byggiútreiðslunum.

Vísandi hertil setur nevndin fram fylgjondi

Uppskot

Løgtingið góðkennir uppskot landsstýrisins í hesum máli.

SKÚLANEVNDIN, 17. august 1973.

Haldor Hansen Sigfried Skaale Leon Joensen

Hilmar Bech Signar Hansen

2. viðgerð 17. august. Frávik frá tíðarfr. uttan atkv.gr.
Landsstýrisuppskotið I samt. 20—0.
Uppskot II, gr. 1 samt. 21—0. gr. 2 u. atkv.gr.
Soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð við 21—0.

3. viðgerð sama dag. Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt við 22—0.

13. Landleiðin

Ár 1973, 15. august, legði Erlendur Patursson fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiðu á landleiðini.

§ 1.

1. § í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiðu á landleiðini, 1. stk. 1. reglubrot, verður orðað soleiðis:

«Landleiðin er, sum víst á korti viðheft hesi lóg sum skjal, sjógvurin innan fyri linju, sum gongur 70 fjórðingar frá grundlinjum drignar gjøgnum hesi 13 støðini.»

§ 2.

Sum nýtt 3. stk. í somu lógargrein verður skoytt uppí:

«Upp í landleiðina roknast somuleiðis Føroya banki innan fyri 400 metra dýptarlinjuna.»

§ 3.

Henda lóg kemur beinan vegin í gildi.

Greinagerð:

Eingin altjóðarættur er til, sum kann forða okkum at seta tað fiskimark kring landið og á Føroya banka, sum her verður skotið upp at seta. Hvørki um vidd fiskimarks ella um vidd sjómarks («territorial» marks) finst nakar altjóðarættur, og veruleikin er tann, at í dag eru minst 12 ymisk mørk í gildi - - øll sett við einvisum tiltøkum.

Nøkur lond sum Argentina, Brasilia, Equador, El Salvador, Panama og Uruguay hava 200 fjórðinga fiskimark.

(F.L. J. nr. 1500-1-3)

Mong onnur lond, t.d. Chile, Korea, Nicaragua og Peru hava 200 fjórðinga fiskimark.

Costa Rica hevur 200 fjórðinga fiskiverndarmark, Ceylon 106 fjórðingar, India og Pakistan 112 fjórðingar, Ghana 100 fjórðingar.

Harumframt hava 8 onnur lond flutt mørk sín út í 1972 og 2 í 1973, uttan at nakar av álvara hevur ákært tey fyri hrot á altjóðarætti (uttan ákæra Bretlands og Vestur-Týsklands móti Islandi) Hesi 10 lond eru:

1. Gabon, sum flutti sjómark sítt út á 30 fjórðingar 5. januar og út á 100 fjórðingar 21. juli 1972.
2. Senegal, sum flutti fiskimark sítt út á 110 fjórðingar 12. apríl 1972.
3. Oman, sum flutti út á 50 fjórðingar 17. juli 1972.
4. Mauritania, sum flutti út á 30 fjórðingar 31. juli 1972.
5. Ghana, sum einisi flutti út á 30 fjórðingar 12. september 1972.
6. Suður-Vietnam, sum flutti út á 50 fjórðingar 16. desember 1972.
7. Pakistan, sum flutti út á 50 fjórðingar 21. mars 1973.
8. Marokko, sum flutti út á 70 fjórðingar 3. mars 1973.
9. Fronsk Guinea, sum við franskari lóg frá 5. juli 1972 flutti út á 80 fjórðingar.
10. Island, sum flutti út á 50 fjórðingar 1. september 1972.
    Guinea hevur 130 fjórðinga sjómark.

Vert er at nevna, at Bretland heldur tað vera rímiligt, at Brellendingar skulu hava einkarrætt til gass og olju út á umleið 130 fjórðingar frá skotsku strondini við Aberdeen og út á um leið 100 fjórðingar í landuyrðing úr Hetlandi.

Mong oyggja- og strandlond, sum t.d. USA, Kanada og Noreg krevja rætt til gass og olju út á 100 fjórðingar, ja í einsløkum tilfellum heilt út á 200 fjórðingar.

Í hesum viðfangi skal somuleiðis verða mint á ta viðgerð og ta avgreiðslu, sum hesi mál fingu á aðalfundi Sameindu tjóða í New York í desember 1972. Har varð við 102 atkvøðum og ongari í móti — meðan 22 lond greiddu ikki atkvøðu (har í millum Danmørk) samtykt yvirlýsing har staðfest verða «rættindi hjá londum tit varandi yvirvaldsrætt yvir náttúrliga ríkidømi teirra frokunað tað ríkidømi, ið funnið verður á landgrunninum ella undir honum innan fyri rættarøkið **og í tí sjógvi, sum har yviri er**».

Hava vit í huga: 1. ta søguligu gongd, sum verið hevur í fiskimarksmálum seinastu 20—25 árini, har sjónarmiðini um rúmari fiskimørk sløðugt hava vunnið fram á, 2. tann veruleika at fjøld av londum longu hava flutt fiskimørk teirra langt út um 12 fjórðingar og 3. hesi beint nú nevndu samtykt Sameindu tjóða, mugu vit sláa fast at vit føroyingar eiga óreingi-

ligan løgfrøðiligan rætt til nógv rúmari fiskimark, enn teir 12 fjórðingar, vit nú hava.

Aftur at hesum reint løgfrøðiliga rætti kemur annar rættur — ikki týdningarminni. Hetta er sjálvur rætturin til at liva í landinum. Føroyingar havn at kalla berl sjógvin og ríkidømi hans at lita á. Svíkir hetta grundarlag ber einfaldliga ikki til at uppihalda samfelagi okkara. Fyrsta og aðaltreytin fyri tilveru tjóðar okkara og fyri livi hennara í landinum er at vernda hetta hennara ríkidømi.

Henda vernd fæst ikki við tí fiskimarki, vit nú hava. Eisini av hesi grund eiga vit óreingiligan rætt til rúmari fiskimark, enn teir 12 fjórðingar, vit nú hava.

Ovveiðin vindur upp á seg um allar leiðir og fiskistovnarnir eru í bráðum vanda. Vit mugu gera okkara til tess at støðga hesi týning og til tess at vernda og varðveita havsins ríkidømi. Og vit mugu gera tað meðan tíð er og ikki bíða til tað verður ov seint. Tí má fiskimark okkara flytast út nú. Og einasta gongda leið er at vit gera hetta sjálvir.

Søgan gevur okkum nevniliga fullgott prógv fyri, at tún sokallaða «samráðingarleið», ið summir mæla til at ganga, ouga tíð hevur givið okkum nakrar veruligar sømdir, heldur hevur hon tvørtur í móti í flestum førum givið okkum tap og í øllum førum hert tarnað okkum í at vinna tann rætt, sum var okkara. Sannleikin um hesar «samráðingar» er so tann, at hetta ongar veruligar samráðingar hava verið, tí okkara lutur í teimum hevur ikki verið annar enn tann, enn at taka við teim treytum, ið aðrir «av náði» hava skamtað okkum.

Fyri um leið 75 árum byrjaði henda «samráðingarleið». Hon endaði við 1901-sáttmálanum um fiskimark kring Føroyar — tí sáttmála, sum legði grundvøllin undir fullkomnari oyðilegging føroyska heimamiðnæðisins. So væl royndist henda «samráðingaleið» tá.

Áður enn tjóðveldisflokkurin árið 1952 legði fram fyrsta uppskot sítt um at fáa henda sáttmála uppsagdan, hevði løgtingið fleiri ferðir gjørt «samráðingu»samtyktir, bæði um útflyting og um friðing á vissum leiðum uttan fyri fiskimark, men var alt hetta púra úrslitaleyst.

Aftur árið 1952 og seinni valdi løgtingið «samráðingaleiðina» og at «ganga spakuliga um hurðarnar». Vit fingu burtur úr hesum krypilsáttmálarnar — fyrst 1955 og síðan 1959.

Einki røktist fyri nøkrum veruligum bata fyrr enn løgtingið árið 1961 vísti frá sær øllum tali um «samráðingar», tók seg um reiggj og gjørdi samtykt um einvísa útflyting. Henda støða løgtingsins gav okkum so teir 12 fjórðingarnar.

(Til tess at fullkomna myndina av hvussu «samráðingaleiðin» hevur roynst okkum kann verða skotið inn, at áður enn henda útflyting átti at koma í gildi - ella longu heysti 1962 varð avgerð tikin um nýggjar

«samráðingar», sum gjørdu tað, at útflytingin, sum annars átti at koma í gildi 1963, varð skotin út eitt heilt ár, t.e. til 1964).

Men síðan tá — síðan 1964 — hava vit í fiskimarksmálinum staðið leysir av øðrum, t.e. fiskimarksmálið hevur síðan tá verið føroyskt innanlandsmál, sum tó danska ríkisstjórn — soleiðis sum ríkisrættarstøða okkara er — í seinasta enda tekur avgerð um fyri okkum.

Fara vit nú aftur at ganga einhvørja «samráðingarleið», er tað beinleiðis brot á tí politikki, sum lagdur varð við avgerð løgtingsins 1961 um einvísan fiskimarksútflytingarpolitikk, og verður hetta í royndini tað sama sum at ganga heilt aftur til vanlukkuárið 1901, har fyrsta stigið á «samráðingarleiðini» varð tikið — Tað stig, ið hevur verið føroyskari fiskiveiðu og føroyska samfelagnum at óbøtiligum skaða. Tjóðveldisflokkurin metir tí slíkan fiskimarkspolitikk vera slórl afturstig, sum bert kann tarna okkum í at vinna tann rætt, ið vit eiga, og sum er okkum bráðneyðugur at vinna, skal ikki grundvøllurin undir tilveru okkara rippast burtur.

Hin vegin leggur tjóðveldisflokkurin áherðslu á, at vit á altjóðafundum, har atkomiligt er, royna øll tiltøk til at vinna sjónarmiðum okkara viðvíkjandi fiskimarksútflytingini sømdir, men rætt er at hava hugfast, at meðan Danmark røkir hesi mál okkara vegna, kunnu vit ikki vænta, at hesi sjónarmið okkara vinna stórvegis fram, samanber at danska ríkisstjórnin hvørki á altjóðafundunum 1958, 1960 ella 1972 stýðjandi politikk, ið samsvaraði samtyktum løgtingsins (um 12 fjórðinga fiskimark og um at føroyski landgrunnurin er føroysk ogn).

Vón okkara er tó, at hesar altjóðasamráðingar í framtíðini fara at geva eitthvørt úrslit, men roknast má við, at tó at slíkar samráðingar byrja longu næsta ár, so fara ivaleyst mong ár at ganga, áður enn tað, ið har møguliga verður samtykt, verður sett í gildi og í verk.

Eisini av hesi grund — hesi óvissu bæði viðvíkjandi tíð og innihaldi — mælir tjóðveldisflokkurin til útflyting nú beinan vegin.

Her er eisini annað at hava í huga. Hugsum okkum, at t.d. 50 fjórðinga fiskimark verður almenn viðurkent fiskimark frá ávísum degi at rokna, t.d. frá 1. januar 1978. Fiskimark okkara verður tá eisini flutt út. Men, vit mugu gera okkum greitt, at tað, sum tá verður innan fyri hjá okkum, kemur at hava langa tíð — mong, mong ár — at koma fyri seg aftur aftan á at kalla ótálmaða og samfulla gróping í 75 ár. Tá verður vokkult hjá fiskivinnu og fiskimonnum okkara at lívbjarga sær — útistongdir á fjarleiðunum og við uppgrópaðum nærleiðum.

Fiskistovnarnir eru sum nevnt í bráðum vanda, men samtíðis siggja vit, at altjóða royndir til at steðga hesi oyðing hava verið mest sum nyttuog úrslitaleysar. Tað einasta, sum hevur givið úrslit og kunnið til gagns í so mát, eru júst fiskimarksútflytingarnir, har í miðlum okkara út á 12 fjórðingar 1964, og sum úrslitið er í dag, verður útflytingarleiðin fram-

vegis einasta leið til tess at bjarga fiskistovnunum úr hesum vanda, ikki bert á okkara egnu leiðum, heldur um øll høv.

Heldur enn at «samráðast» við teir, sum hava slaðið fremstir og sum hava gingið harðast fram í hesum oyðileggingarverki — og sum enn ganga fram við hørðum, samanber hendingarnar við Island og við Føroyar — eiga vit at taka upp samráðingar við teir, sum eru í sonn støðu sum vit, t.e. teir, sum berjast fyri tilveru sini og móti hesum yvirgangi og hesi oyðilegging. Eftir uppskoti tjóðveldisfloksins fóku vit upp slíkar samráðingar við íslendingar aftan á avgerð teirra um flyting íslendska fiskimarksins út á 50 fjórðingar, og fingu vit úrslit fiskiveiði og fiskimonnum okkara til gagns.

Tjóðveldisflokkurin er sannførdur um, at henda leið fer at roynast okkum hollast viðvíkjandi fjarfiskiveiði okkara. Ella hvat batar tað okkum at sleppa at veiða inn móti 12 fjórðingum á fjarleiðunum, tá fiskistovnarnir har støðugt minka og at enda verið mest sum oyddir?

Alt samantikið er tað áskoðan tjóðveldisfloksins, at løgtingið longu hevur drálað nóg leingi, ja alt ov leingi við fiskimarksútflytingini. Henda útflyting kann ikki bíða longur, men má fremjast nú.

Uppskot okkara er 70 fjórðinga fiskimark kring sjálvt landið og har aftur at fiskimark á Føroya banka, sum fylgir 400 metra dýpdarlinjuni. Tey vinnufeløg, sum í vár mettu um víkil fiskimarksins, lógu í metingum sínum millum 24 og 100 fjórðingar. Skilast skal til, at tjóðveldisflokkurin er fúsur til at samráðast um aðra vídd fiskimarksins, enn her verður mælt til, um so er, at meiriluti fæst fyri slíkum.

á Føroya løgtingi 15. august 1973.

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

1. viðgerð (saman við løgtingsmáli nr. 17/1973) 16. november og málið beint í marknaðarnevndina, sum 28. november legði fram soljóðandi

álit

Hetta mál er lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum, og varð lað við 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Í tveimum undanfarnum tingselum hevur tjóðveldisflokkurin lagt á ting løgtingsmál við sama orðalag, mál nr. 11/1971 og nr. 6/1972. Vist verður til frágreiðingar í báðum hesum málum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Trygvi Samuelsen, Poul Jacob Olsen, J. Fr. Øregaard og Hilmar Kass) vísir til álitini í løgtingsmálum nr. 11/71 og 6/1972 um hetta sama mál, har meirilutin millum annað førir fram:

«Tað er neyðugt at leggja allar árar út fyri at vinna og varðveita veiðirættindi á heimasjógvi so væl sum aðrastaðni, men vit eru so fyri, at tann veiðifloti, vit hava, ikki allur kann lívbjarga sær rundan um oyggjar okkara, sjálvt um vit fáa 70 fjórðinga fiskimark og Føroya banka einsamallir at troyta, tí økið er lítið. Meginparturin av landgrunninum er innanfyri 24 fjórðinga fiskimark.

Eina einvísa útflytan sambært fyriliggjandi uppskot kann meirilutin ikki taka undir, men heldur rættari leiðina vera í fyrstu syftu at royna at vinna á mál við samráðingum, har fiskimarksspurningar á altjóða fundum verða viðgjørdir, og heitir á landsstýrið um á slíkum fundum óggvaliga sterkt at framhalda og prógva, hvussu lívsneyðugt tað er fyri okkum at vinna einkarrætt til hetta lítla veiðiøkið um oyggjar okkara. Neyðtrongdin, nú vit verða skerdir aðrastaðni, eigur at verða fasthildin sum eitt avgerandi lið í grundgevan okkara fyri kravi um víðari ræsur á landleiðini og serveiðirættindum á altjóða sjógvi.»

Í fleiri londum, t.d. USA, Canada, New Zealand, Australia og Danmark, hava menn lagt á annan hógv í fiskimarksspurningum. Hesi lond hava fyrr hildið fast um frælsið á havinum og føst fiskimark. Nú hava tey gjort seg til talsmann fyri fiskivinnupolitikki, sum gevur londum, sum liggja til havið og eru nær knýtt fíggjarliga til fiskivinnuna við smáum møguleikum at skifta til aðra vinnu, forrættindi at halda fram við hesi veiðu, meðan lond við fjølbroyttum vinnumøguleikum mugu minka veiðuna, har fiskistovnarnir verða ovfiskaðir, og avmarking er neyðug.

Millum uppskot til hesa loysu verður mælt til vítt fiskimark, upp til 200 fjórðingar, fyri ávís fiskasløg.

Um landið er fært fyri at fiska so mikið, sum stovnurin tolir, so skulu aðrar tjóðir, sum hava fiskað har, minka fiskiskapin á hvørjum ári, so eftir stuttari tíð eru teir, sum búgva upp at hesum grunnum, einsamallir um teir.

Um landið ikki er fært fyri at fiska so mikið, sum stovnurin tolir, so skulu tjóðir, sum hava fiskað har, hava rætt at halda fram í tann mun, sum stovnurin tolir. Víst verður á, at lond, sum bert hava fiskivinnuna at líta á, skulu hava fyrsta rætt at halda fram við fiskiskapi sínum.

Hetta kemur týðiliga til sjónar í tí tilmælinum, danski marknaðarmálaráðharrin Ivar Nørgaard hevur borið fram í EEC, sum mið fyri einum felags EEC fiskimarkspolitikki. Har verða júst hesi somu sjónarmið førd fram.

Loysn, sum her er nevnd, kundi tryggjað okkum møguleikar at vinnið allan sjógvin um oyggjarnar, samstundis sum vit varðveittu fiskirættindi á fjarleiðum uttan at verið bundnir at landi ella londum, men við rættindum, sum hvíldu á altjóða grundarlag.»

Tá lagsað verður um ST-samtyktina í 1972 um rættindi á egnum grunni, so er grund at vænta, at komandi ST-fundir um rættindi á havinum koma til úrslit sum tryggja strandalondunum nógv víðari rættindi, men meðan bíðað verður eftir hesi avgerð, eru fyribils loysnir neyðugar.

Víst verður til løgtingsmál nr. 17/1973, sum landsstýrið hevur lagt fyri tingið og ta støðu, hesin sami meiriluti í marknaðarnevndini hevur til tað málið.

Vísandi til tað, sum her er ført fram, tekur meirilutin ikki undir við uppskotinum frá tjóðveldinum.

Miunilutin (Erlendur Patursson) skilar til:

Viðvíkjandi lingmáli nr. 13/1973: Landleiðin.

Í teirri greinargerð, sum fylgir við hesum uppskoti um 70 fjórðinga fiskimark og um fiskimark á Føroya banka, sum fylgir 400 metra dýpdarlinjuni, er vist á, hæði rætt okkara til slíkt fiskimark og tørv okkara fyri slíkum fiskimarki. Av tí at meirilutin ongar mótgrundir hevur ført fram móti tí, ið har verður sagt, má tað, ið har verður sagt, haldast standa óvikað. Miunilutin mælir tí tinginum til at samtykkja hetta uppskot. Vit hava fullan rætt til at flyta út og vit hava fulla tørv fyri slíkari útflyting.

Heuda áskoðan kemur eisini til sjóndar í teim svørum, ið fiskivinnufeløg landsins góvu upp á fyrispurning formansins í marknaðarnevndini, tá sama uppskot var til viðgerðar í seinastu tingsetu. Einmælt mæltu hesi feløg til fiskimarksútflyting, men vóru ymiskar áskoðanir um vídd fiskimarksins. Metingar felaganna hesum viðvíkjandi vóru hesar:

1. 24 fjórðingar.
2. 50 fjórðingar.
3. So langt hetta gerst, uttan at missa á fjarleiðum.
4. Í minsta lagi 50 fjórðingar og Føroya banka við.
5. Við einum 50 fjórðinga fiskimarki hava vit allar grunnar innan fyri, har vanligur botnreiðskapur kann nýtast. Eitt 70 fjórðinga fiskimark gevur lítið av grunni aftur at, men kolliderar við eitt møguligt 70 fjórðinga fiskimark á North Rona.
6. Við 30 fjórðingum hava vit flest allar fiskileiðir innan fyri.

7. Halda vit, at longu nú verður tikin prinsippstøða um hvørjum fiskimarki, ið vit eiga at stíla eftir her heima fyri at áhugamálini hjá heimafiskiskapinum kunna vera nóg væl vard. At finna fram til ávíst tal av fjórðingum verður tó fyrst og fremst ein uppgáva av politiskt teknioskum karakteri.

8. Einmælt samtykt at fáa fiskimarkið flutt út á 50 fjórðingar.

9. Við atkvøðu var meiriluti fyri at flyta fiskimarkið út á 50 fjórðingar, meðan ein minniluti helt at rættari hevði verið at flyta út á 30 fjórðingar.

10. 100 fjórðingar.

11. Í minsta lagi 50 fjórðinga fiskimark úr beinum basislinjum um Føroyar og allan Føroya banka.

12. Hálva leið til Islands og hálva leið til Hetlands.

13. 50 fjórðingar út frá beinum linjum og allan Føroya banka.

14. Hugsa vit bert um vanligan útróður við línu og snøri norðan fyri, skuldi eitt sjómark uppá 24—30 fjórðingar úr landi verið nóg mikið, men um hugsað verður um aðrar veiðihættir, er hetta meira ivasamt — kanska átti tað at verið víðari.

15. 40 fjórðingar við beinum grundlinjum og Føroya banka.

Niðurstøðan av hesum kanningum marknaðarnevndarformansins er tá tann, at øll hesi feløg, ið svaraðu spurningun formansins, mæla til rúmari fiskimark, enn tað 12 fjórðinga mark, ið vit nú hava. Í teirri greinargerð, ið fylgir við uppskoti tjóðveldisfloksins, verður skilað til, at flokkurin er fúsur til at samráðast um aðra vídd fiskimarksins, enn teir 70 fjórðingarnar, um so er at meiriluti fæst fyri slíkum. Men, av tí at meirilutin onga fiskimarksflyting vil hava, hevur ikki verið grundarlag fyri slíkum samráðingum.

Av teimum upplýsingum, ið eru til skjals í lingmáli nr. 17/1973: Skipan viðvíkjandi fiskiskapi undir Føroyum, har greitt verður frá teim samráðingum, ið landsstýrið hevur havt um hesi mál, sæst, at hesar samráðingar als ikki hava snúð seg um at fremja hetta samfelda krav fiskivinnufelaganna um útflyting fiskimarksins. Hetta átalar minnilutin.

Minnilutin mælir tinginum til at samtykkja uppskot tjóðveldisfloksins óbroytt.

Minnilutin (Hákun Djurhuus og Kjartan Mohr) vísir til minnilutaátit í løgtingsmáli nr. 17/1973: Skipan viðvíkjandi fiskiskapinum undir Føroyum.

Marknaðarnevndin, 28. november 1973.

2. viðgerð 30. november (saman við lingmáli nr. 17/1973).
Atkvøðugreiðsla sama dag á seinni fundi.
Gr. 1 fall við navnakalli við tað at 6 atkvøddu ja og 20 atkvøddu ikki.
Atkvøðan fór soleiðis fram:

Ja: Signar Hansen, Hanus við Høgadalsá, Finnbogi Isaksen, Erlendur Patursson, Jógvan Durhuus, Ove Mikkelsen = 6.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Martin Joensen, Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, Sigfried Skaale, Demmus Heintze, Knút Wang, Hákun Djurhuus, Trygve Samuelsen, Leon Joensen, Andreas Djurhuus, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Hilmar Bech, J. P. Thomassen, Tórolvur Olsen, Poul J. Olsen, Kjartan Mohr, Haldor Hansen, J. Fr. Øregaard = 20.

Uppskotið sostatt burturfallið.

14. Veðhald fyri láni til SEV (12 milj. kr.)

Ár 1973, 16. november, legði Ásbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til SEV.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni 12 milj. kr. til elfelagið SEV.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til SEV.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for et lån på 12 mill. kr. til el-selskabet SEV.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 2 frá 25. januar 1973 fekk landsstýrið heimild at veðhalda fyri láni í Investeringsfonden for Færøerne — fleggingargrunnurin fyri Føroyar upp á 5 milj. kr. til el-felagið StCV til rindan av arbeiði, sum varð gjørt í fíggjarárinum 1972/73, samanber løgtingsmál nr. 22/1972. Sum frágreitt í hesum løgtingsmáli er byggi- og kostnaðarætlanin henda:

Ymisk sekunder arbeiði	9,9 milj. kr.
Primer arbeiði:	
Ymist	2,0 milj. kr.
verkið í Botni (viðkan av avfallsløkið v.m.)	1,8 milj. kr.
verkið á Tvøroyri (2800 HK diesel v.m.)	2,7 milj. kr.
verkið á Sundi (2 × 10.000 HK diesel v.m.)	24,7 milj kr.
	41,1 milj. kr.

(F.L J. nr. 440-3-2/72)
og Ll. nr. 2/1974

Síðani málið seinast varð til viðgerðar í løgtinginum hevur SEV fra fleggingargrunninum fingið tilsøgn um, at restlánið upp á tilsamans 23 milj. kr. til rindan av arbeiði, sum verður gjørt í figgjarárunum 1973/74 — 1975/76, er játtað soleiðis:

1973/74	12 milj. kr.
1974/75	9 milj. kr.
1975/76	2 milj. kr.
	23 milj. kr.

Afturgjaldingarliðin er 20 ár við 1/40 hálvárliga, og rentan er 6% p.a. Lánið er treytað av landskassaveðhaldi.

Landsstýrið leggur við hesum fram uppskot um heimildarlóg at veita landskassaveðhald fyri lánunum upp á 12 milj. kr., sum fleggingargrunnurin hevur játtað SEV í figgjaránum 1973/74, meðan sløða seinni verður tikin til restlánið upp á 11 milj. kr.

El-felagið SEV hevði tann 31. december 1972 lán við landskassaveðhaldi upp á tilsamans kr. 50.474.023,00.

Ásbjørn Joensen
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 20. november og málið beint í figgjarnevndina, sum 30. november legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið og var tað við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður víst til, at S.E.V. úr fleggingargrunninum fyri Føroyar hevur fingið játtað lán uppá tilsamans kr. 23.000.000 til rindan av arbeiðinum, sum gjørd verða í figgjárunum 1973/74 — 1975/76. Hetta lán verður goldið felagnum við 12 miliónum í 1973/74 og er tað til hetta lán, felagið søkir um veðhald fyri.

Figgjarnevndin, sum viðgjørt hevur málið, tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

Undir fyrstu viðgerð kom fram spurningurin, nú oljuprísirnir eru so munandi hækkaðir, um tað ikki vildi verið rætt samstundis sum diesel-

verk verða bygd, farið var undir fyrireikingur til viðari útbyggjan av fossanegini. Í hesum sambandi hevur nevndin havt fund við stjóran fyri S.E.V., Hjalgrim Winther, ið hevur greitt nevndini frá teim ætlanum, felagið hevur fyri framtíðar útbygging, og verður frágreiðing viðløgd málinum.

Í skrivinum til fíggjarnevndina viðvíkjandi veðhaldi fyri láni til S.E.V. verður ført fram fylgjandi:

«At endanum vilja vit heita á fíggjarnevndina um at fáa vegin til Sunds gjørdan so skjótt sum til ber. Byggingin á Sundi er nógv dýrkað vegna vantandi vegasamband, og okkum tørvar hinda vegin, tá Sundsverkið verður sett í gongd um 8 — 9 mánaðar.»

Hesum tekur fíggjarnevndin undir við og vil mæla landsstýrinum til, at tingsamtyktin um gerð av vegi til Sunds verður fram.

FÍGGJARNEVNDIN, 29. november 1973.

Sí skjal nr. 7

2. viðgerð 5. desember.

Gr. 1 samt. 18—0. Gr. 2 u. atkv.gr. Lógaruppskotið so samtykt at fara til 3. viðgerð við 17—0.

3. viðgerð 6. desember. Frávik í tíðarfrestini u. atkv.gr.
Uppskot sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt við 16 0.

15. Broyting í kommunulógini

Ár 1973, 17. august, legði Kjartan Mohr, løgtingsmaður, fyri framburðsflokkin, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í kommunulógini.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 45 frá 29. juni 1972 verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 12, 1. petti, 2. punktum verður orðað soleiðis:
   «Í hesi nevnd sita bygda(r)ráðsformaðurin, ið er føddur formaður, og afturat honum 2 ella 4 aðrir bygda(r)ráðslimir»,

2. § 16, 1. petti verður orðað soleiðis:
   «Nevndirnar skipa seg sjálvar, jbr. tó § 12, 1. petti.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i kommuneloven.

§ 1.

I lagtingslov nr. 45 af 29. juni 1972 om de færøske kommuner foretages følgende ændringer:

1. § 12, stk. 1, 2. punktum formuleres således:
   «Bygderådets formand er formand for udvalget, og udvalget har desuden 2 eller 4 medlemmer, som er valgt blandt bygderådets medlemmer»,
2. § 16, stk. 1 formuleres således:

   «Udvalgene konstituerer sig selv, jfr. dog § 12, stk. 1.»

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Við nýggju kommunulógini kom tann broyting, at býráðsformaðurin, sum hevði verið føldur formaður í kassanevndini ikki varð tað longur, hann er tó framvegis føddur limur.

Fíggjarnevndin man vera millum tær týdningarmestu nevndirnar í kommununni, har øll fíggjarmál koma fyri. Formaðurin í kommununni, sum úteftir hevur ábyrgdina av rakstrinum í kommununni, eigur tí eisini at hava tað starv, at hann sum formaður eisini er sjálvsagdur formaður í fíggjarnevndini.

(Ll. nr. 35/1974)

1. viðgerð 12. nov. og málið beint í kommunalu nevndina, sum 5. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál, sum varð lagt fram av framburðsflokkinum 17. august 1973, varð við fyrstu viðgerð 12. november 1973 beint í kommunalu nevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirilutin (Haldor Hansen, Tórolvur Mohr Olsen, Sigfried Skaale og Andreas Djurhuus) tekur undir við uppskotinum hjá framburðsflokkinum og mælir løglinginum til at samtykkja hetla uppskot.

Meirilutin skjýtur upp, at tann møguleiki, sum er í galdandi lóg til at umval av formansskapi og nevndum kann fara fram í valskeiðinum, verður tikin úr lógini, við tað at vandi kann verða fyri, at umskifti av formansskapi fer fram fleiri ferðir í valskeiðinum, kann hetta skapa ótrygg viðurskifti í kommunalu umsitingini.

Eisini skjýtur meirilutin upp, at lógin verður orðað soleiðis, at serlig samsýning til nevndarformenn bert kann gevast við góðkenning landsstýrisins. Hetta kemst av, at nevndin heldur tað ikki vera rett, at bygda/býráðini einsamøll taka hesa avgerð, meðan samsýningin til bygda/býráðsformannin krevur góðkenning landsstýrisins við tað, at henda samsýning skal áseta í reglugerðini, sum skal góðkennast.

Meirilutin skjýtur tí upp, at í § 1 í fyriliggjandi uppskotinum verður skoytt uppí:

3. § 4, 5. petti og § 14, 3. petti verður strikað.	3. § 4, stk. 5 og § 14, stk. 3 ophæves.
4. í § 11 4. petti verður aftaná orðini: «kann bygda(r)ráðið» sett: «við loyvi landsstýrisins».	4. I § 11, stk., 4 tilføjes efter ordene: «kan bygderådet»: «med landsstyrets tilladelse».

Minnilutin (Jógvan Durhuus) setur einki uppskot fram.

2. viðgerð 22. mars 1974.

Broytingaruppskot frá meiriluta í uevndini til gr. 1 samtykt við 20—0. Gr. 1 so broytt samtykt 20—0. Gr. 2 samt. u. atkv.gr.

Lógaruppskotið samtykt at fara til 3. viðgerð 20—0.

3. viðgerð 26. mars. Lógaruppskotið, sum samtykt við 2. viðgerð, nú endaliga samtykt við 21—0.

---

16. Skattalætti í yvirtíðarløn

Ár 1973, 17. august, legði Kjartan Mohr, løgtingsmaður, fyri framburðsflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið at kanna á hvønn hátt handverkarum og arbeiðsmonnum kann veitast lætti í skattinum av yvirtíðarløn.

Landsstýrið sendir løgtinginum frágreiðing í málinum og møguliga eisini uppskot til broytingar í skattalógini í so góðari tíð, at ein møguligur skattalætti kann fremjast longu í skattaárinum 1974/75.

Viðmerkingar:

Tað vísir seg, at tey virkir, ið hava við handverk at gera, ofta koma útfyri at noyðast at fáa sínar handverkarar og arbeiðsmenn at arbeiða yvirtíð, eftir at tann normala arbeiðstíðin er lokin.

Í hesum virkjum er ofta torført at fáa fólk at arbeiða yvir — ikki tí teir ikki vilja ella hava hug til at ganga virkinum á møti — men sum teir siga, vit koma hert upp í so høga inntøku, at tað mesta fer upp í skatti.

Teir, ið bert hava hendurnar at líta á, hava ongan møguleika at avskriva nakað, tí arbeiðsgevarin uppgevur hvørt oyra, ið teir vinna. Vit halda tí, at skal hugurin vera fyri yvirtíðararbeiði hjá monnum, má nakað gerast fyri at virkini, ið eru landinum til frama, kunnu halda fram við yvirtíðsarbeiði og mæla vit tí til, at landsstýrið tekur sær av at kanna málið sambært uppskotið til samtyktar.

Á Føroya løgtingi, 16. august 1973.

FØROYA FRAMBURÐSFLOKKUR

Kjartan Mohr.

(F.L. J. nr. 430-12-16)

1. viðgerð 12. nov. og málið beint í skattanevndina, sum 29. november legði fram soljóðandi

Álit

Tað er framburðsflokkurin, sum hevur lagt málið á ting, og í uppskotinum til samtyktar, sum skattanevndin hevur havt til viðgerðar, stendur, at løgtingið heitir á landsstýrið um at kanna á hvønn hátt handverkarum og arbeiðsmonnum kann veitast skattalætti av yvirtíðarløn, og at landsstýrið sendir løgtinginum frágreiðing í málinum og møguliga eisini uppskot til broytingar í skattalógini í so góðari tíð, at ein møguligur skattalætti kann koma at galda longu í skattaárinum 1974/75.

Til løgtingið er eisini komið skriv frá Havnar Handverkarafelag — Føroya Preutarafelag — Føroya Handverkarafelag, har heitt verður á løgtingið um at gera broytingar í skattalógini, sum samsvara við uppskot framburðsfloksins.

Henda hugsan um at geva lætta í skatting av yvirtíðarløn er ikki heilt nýggj, og hevur løgtingið fleiri ferðir fingið áheitanir um tað sama, og undir viðgerðini av skattamálum í løgtinginum hevur hesin tanki eisini verið frammi.

Nú skattanevndin hevur viðgjørt málið, hevur hon sett seg í samband við landsstýrismannin, sum umsitur skattamál, Peter F. Christiansen, og sigur ham, at landsstýrið hevur sett nevnd av serkønum í skattamálum, sum í løtuni arbeiðir við skattalógini við tí fyri eyga at gera broytingar, sum ætlanin er at fáa til at virka longu fyri skattaárið 1974/75.

Í uppskotinum nevnir framburðsflokkurin bert tveir stættir í okkara samfelag og vil nevndin tí vísa á, at tað eisini eru aðrir bólkar av okkara arbeiðandi fólki, sum ofta fyri mesta partin arbeiða yvirtíð, so sum fiskimenn um borð á línubátum — trolarum — kraftblokkabátum og øðrum skipum, hvar stórur partur av teirra arbeiðstíð er at rokna sum yvirtíð, og so útróðrarmenninir, sum fara til útróðrar kl. 5—6 seinrapartin á degi og koma ikki aftur fyrrenn á miðdegi dagin eftir, so arbeiðstíð teirra er nærum øll náttararbeiði, ella bóndin, sum annar neytunum, hann byrjar tíðliga á morgni, og arbeiðsdagur hansara endar ofta seint á kvøldi, harnæst koma lærarar, sjúkrasystrar, starvsfólk og onnur, sum ofta forvinna stóran part av árligu inntøkuni við yvirtíðararbeiði.

Nevndin heldur tí, at tað ofta kann vera ringt at skilja millum, hvat er yvirtíðarløn og hvat er vanlig løn, og hevur annars ta áskoðan, at um lætti skal vera givin í skattinum av ávisari løn, so eigur ein slík skipan at vera fyri allar stættir í samfelagnum.

Vísandi til tað, sum her er flutt fram, setur nevndin fram fylgjandi:

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um í sambaud við tað kanningararbeiði av skattalógini, ið nú fer fram, at kanna møguleikarnar fyri at veita lætta í skatti av yvirtíðarforvinningi.

Skattanevndin hevur í sama viðfangi viðgjørt brøv frá Havnar Arbeiðskvinnufelag um serskatting av hjúnum ella at hækka frádráttin við samskatting frá 2.000 kr. til 5.000 kr. Við tað at landsstýrið upplýsir, at lønn serliga skattanevndin hjá landsstýrinum í løtuni arbeiðir við hesum máli, mæla nevndarlimirnir Poul Jacob Olsen, Agnar Nielsen og Hilmar Bech til at beina brøvið til landsstýrið, og seta soleiðis fram:

Uppskot
til
samtyktar

Málið verður sent landsstýrinum.

Nevndarlimirnir Jógvan Sundstein og Finnbogi Isaksen vilja greiða frá støðu sini til henda spurning undir viðgerð í løgtinginum.

SKATTANEVNDIN, 27. november 1973.

Finnbogi Isaksen Jógvan Sundstein Poul Jacob Olsen

Agnar Nielsen Hilmar Bech

2. viðgerð 30. november, atkvøðugreiðslan 6. des.
Uppskotið frá Framburðsflokkinum fall 4—0.
Uppskotið frá samdari nevnd samtykt 23—0.
Uppskot frá minniluta í nevndini fall 9—0.
Uppskot frá meiriluta í nevndini samtykt 17—0.
Málið sostatt avgreitt.

---

17. Skipan viðv. fiskiskapi undir Føroyum

Ár 1973, 13. november, legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið heimilar landsstýrinum at skriva undir sáttmála viðvíkjandi fiskiskapi undir Føroyum við innihaldi samhært hjáløgdu skjøl.

Viðmerkingar:

1. Samráðingar vóru í Keypmannahavn í døgunum 19.—21. september 1973 millum eina føroysk-danska sendinevnd og sendinevndir fyri myndugleikarnar í Bretlandi, Fraklandi, Vesturtýsklandi, Noregi, Pólandi og Belgiu um avmarkingar av fiskiskapinum undir Føroyum.

Tingingarnar førdu til semju millum samráðingarnevndirnar um eina skipan, sum er viðløgd á enskum máli og í umseting til føroyskt. Orðalagið í skipanini er eitt uppskot, sum ikki er undirskrivað. Verður hon góðkend av myndugleiknum í teimum londum, sum eru partar í henni, kemur skipanin í gildi frá 1. januar 1974.

2. Samráðingarnar í Keypmannahavn í september í ár vóru framhald av tingingum, sum eftir landsstýrisins áheitan byrjaðu í Edinburgh 25. og 26. apríl 1973 millum eina føroysk-danska sendinevnd og eina bretska sendinevnd. Hesar báðar sendinevndir tingaðust síðani í London 8. mai 1973.

Í sambandi við, men ikki sum partur av, NEAFC-setuna í London 9.—15. mai 1973 var fundur í London 11. mai 1973 millum føroysk-danska sendinevnd og sendinevudir fyri tey luttakaralond í NEAFC, sum ynsktu at vera til staðar, 13 lond vóru umboðaði.

Samráðingar vóru síðani í Keypmannahavn 16. og 17. juni 1973 millum føroysk-danska sendinevnd og sendinevndir fyri tey lond, sum hava áhuga fyri fiskiskapi undir Føroyum.

Hesar tingingar bildu frum í nevndu døgum í september við sonu luttakarum.

(F.L. J. nr. 1500-1-7)

3. Í høvuðsláttum gongur skipanin út uppá avmarkingar í veiðinøgdini undir Føroyum (t.v.s. ICES-hagtalsøki V b, sum m.a. fevnir yvir Føroya banka og Bill Baily banka) og skerjingar í rættindunum til trolfiskiskap uttan fyri 12 fjórðingar. Skipanin viðvíkur veiðu av botnfiski.

a) Avmarkingarnar í veiðinøgdini bera í sær,

at heildarveiðan av toski og hýsu verður avmarkað til undir einum ikki at fara uppum 52.000 tons árliga,

at heildarveiðan av øðrum botnfiski enn toski og hýsu (serliga longu, bláougu, brosmu, upsa, kongafiski og flatfiski) verður partvís avmarkað. Teir luttakarar, hvørs skip einans royna eftir øðrum fiski enn toski og hýsu, kunnu við troli veiða upp til 10% — við lini og garnum 25% — meira enn ta størstu nøgdina í árunum 1968 til 1972. Luttakarar, hvørs skip ikki vanliga hava fiskað undir Føroyum, mugu hvør sær ikki veiða meira enn 2000 tons av øðrum botnfiski enn toski og hýsu.

Av teimum 52.000 tonsunum av toski og hýsu hava føroysk skip rætt til at veiða 32.000 tons, bretsk skip 18.000 tons og skip frá hinum luttakaralondunum 2000 tons tilsamans. Heildarnøgdin uppá 52.000 tons er áseett eftir tilráðing frá fiskifrøðingum. Kanningar — bæði føroyskar og bretskar — benda á, at virðveitingarlilføk eru mest átroðkaudi fyri toskastovnin og harnæst hýsustovnin. Fiskifrøðingar meta, at árliga veiðan helst ikki eigur at vera omanfyri umleið 32.000 tons av toski og 20.000 tons av hýsu. Av praktiskum grundum, serliga í sambandi við trolfiskiskap, varð tað hildið rímiligt í staðin fyri eina nøgdaravmarking av toski fyri seg og hýsu fyri seg at taka bæði fiskasløgini undir einum, meu við teirri treyt, at luttakararnir skulu gera sítt besta, fyri at veiðan av toski og hýsu ikki fer upp um ávikavist 32.000 tons og 20.000 tons.

Avmarkingin í veiðinøgdini av øðrum botnfiski fevnir samhært skipanina ikki øll luttakaralondini. Summum luttakarum verður loyvt í ávísan mun at økja um veiðuna, meðan fyri aðrar - - nevniliga Føroyar og Bretland — eingin avmarking er galdandi. Hetta kemst m.a. av, at ikki haldgott vísindaligt grundarlag er til taks, sum sýnir, at stovnarnir av hesum fiskasløgum í løtuni eru í vanda fyri ovfisking.

Eftirsum avmarkingin av veiðuni av toski og hýsu so at siga bara viðvíkur Føroyum og Bretlandi, var semja um nevnda avmarking av veiðuni av øðrum botnfiskasløgum fyri hini luttakaralondini, sum

fyrst og fremst reka trolfiskiskap (Noreg tó mest við linu) eftir upsa, longu, brosmu og kongafiski.

b) Skerjingin av rættindunum til trolfiskiskap við ikki at loyva troling á ávísum leiðum uttan fyri 12 fjórðingar í ávísum tíðarskeiðum miðar fyrst og fremst ímóti at verja fiskastovnarnar av toski og hýsu við at friða gýtingargrunnarnar í gýtingartíðini og aðrar leiðir helvtina av árinum í vakstrartíðini móti trolfiskiskapi umfram at geva línuskipunum víðari ræsur at veiða á. Vist verður til grein 3, 1. petti, í uppskotinum til skipanina.

Føroysk trolskip eru undantikin forbøðnum móti troling á økjunum 2, 3 og 4 í laun mun, at teimum er loyvt at veiða 1.250 tons í hvørjum av økjunum 2 og 3 og 500 tons á øki 4, sum fyri tað mesta er gýtingarøki. Á øki 1 er troling ikki loyvd hvørki fyri útlendsk ella føroysk skip í gýtingartíðini.

Spurningurin um fyriskipanir fyri hvussu hesar nøgdir mugu veiðast á hvørjum leiðum innan fyri økini verður at taka uppaftur av landsstýrinum í samráð við fiskiramnsóknarstovuna.

4. Luttakarar, hvørs skip bara royna eftir øðrum botnfiski enn toski og hýsu, skulu ikki reka henda fiskiskap munandi øðrvísi enn í árunum 1968 til 1972, og viðvíkjandi fiskiskapi á leiðunum, har trolfiskiskapur er avmarkaður, skal ikki vera loyvt at nýta størri trolarar enn vanligt hevur verið áðrenn árslok 1973.

5. Skipanin kemur í gildi 1. januar 1974, um hon áðrenn verður góðkend av myndugleikunum í teimum einstøku londunum, og kann hvør luttakari siga seg leysan av henni við 6 mánaða fráboðan.

Sí eisini skjal 8

1. viðgerð (saman við tingmáli nr. 13/1973) 16. november og málið beint í marknaðarnevndina, sum 28. november legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er lagt fyri tingið av landsstýrinum. Við 1. viðgerð, sum fór fram 16. november, varð málið beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt tað.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og tveir minnilutar.

Meirilutin (Trygvi Samuelsen, Poul Jacob Olsen, J. Fr. Øregaard og Hilmar Kass) førir fram:

Tá løgtingið í 1958 samtykti at seta 12 fjórðinga fiskimark við Føroyar, samtykti tað eisini: Landgrunnur Føroya er føroysk ogn.

Í løgtingsmáli nr. 93/69 (24 fjórðinga fiskimark) lýsir ein samd fiskivinnunevnd nærri hvussu hetta skal framjast. Har verður ført fram:

Álit

Uppskotið er ein áheitan á landsstýrið um at skipa fyri 24 fjórðinga fiskimarki kring Føroyar. Frá Føroya Fiskimannafelag er fyrr komin áheitan um 16 fjórðinga fiskimark.

Sum øllum kunnugt var fiskimarksspurningurin til viðgerðar, á alheimsfundum og aftaná ein slíkan fund í Geneve, settu mong lond, sum áður bert høvdu havt 3 mílamark, nú fiskimarkið út á 12 míl, og er hetta tað, sum nú bæði Ísland, Føroyar, Noreg og Ongland og onnur lond her á okkara leiðum hava sett, har einans landsins egnu fiskimenn mugu veiða.

Í tingsetuni 1958 settu hesir tingmenn: J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen, Trygvi Samuelsen, Jens Chr. Olsen og Hákun Djurhuus fram fylgjandi uppskot: «Landgrunnur Føroya er føroysk ogn», og var hetta uppskot samtykt við 23 atkvøðum.

Føroyingar eiga nærum einki annað ríkidømi uttan tað sum havið gevur. Tað skuldi tí verið eitt rímuligt krav, at vit fingu eitt víðari fiskimark, enn lond við so nógvum øðrum vinnumøguleikum. Men skilligt er, at hetta má verða samráðst um, tí vit hava ikki makt at seta aftanfyri ynski og vilja. Sum partur í danska ríkinum, var tað danska uttanríkisráðið, sum førdi samráðingar við Ongland, sum er tað landi, ið hevur størstan áhuga fyri fiskiskapi undir Føroyum, tá 12 míla mark varð sett, og sjálvt um bretar ikki góðtóku 12 míla markið undir samráðingunum, so hava teir í roynd og veru góðtikið tað aftaná at tað varð lýst at galda. Seinni hava teir eisini sett sama mark við teirra strendur. At tað skuldi samráðingar til fyri at friða føroyska landgrunnin, sum meirilutin heldur at miða eigur at verða ímóti, er skilligt, men eigur hetta at vera gjørt, og var tað ætlanin við samtyktini í 1958.

Nevndin setur so statt fram fylgjandi uppskot í staðin fyri uppskot tjóðveldisfloksins:

Uppskot

Landsstýrið verður biðið um at taka upp samráðingar við danska ríkisstýrið um at fáa friðað føroyska landgrunnin móti frenmandari fiskiveiðu og annars allari trolveiðu.

2. viðgerð 29. apríl 1970.
Uppskotið frá tjóðveldisflokkinum fall 7—0.
Uppskotið frá nevndini samtykt 22—.

Landsstýrið hevur ført tær samráðingar, tað er biðið um, fyrst við danska ríkisstýrið og síðan saman við ríkisstýrinum við tær tjóðir, sum fiska við Føroyar. Tað, at landsstýrið hevur havt høvi til at tikið beinleiðis lut í samráðingunum við allar tjóðir, ið hava áhuga í fiskiskapi við Føroyar, er stórur fyrimunur. Okkara áhugamál verða á tann hátt best lýst og vard.

Andstøðan setti fram uppskot á tingi um at steðga hesum samráðingum, og hóast málið fall, vildu teir einki hava við hesar samráðingar at gera.

Við stórum áhuga verður sæð fram til úrslitið frá havrættarfundi sameindu tjóða, men líkt er til, at endalig avgerð neyvan verður í komandi ári, og tíð gongur, áðrenn slík avgerð fær týdning í verki. Tað er tí rætt, at landsstýrið hevur ført hesar samráðingar og gjørt hesa fyribils avtalu, sum, um hon verður góðkend av avvarðandi myndugleikum, skerjir stórliga møguleikarnar hjá útlendingum at fiska við Føroyar.

Spurningur varð reistur í nevndini, um hesin sáttmáli kundi binda í framtíðini, um vit tóku okkum burtur úr og aðrir ikki. Fyri at eingin ivi skal vera um hetta, var rættardeildin hjá uttanríkisráðnum biðin um útlegging, sum millum annað er hetta:

«Det må betragtes som en grundlæggende forudsætning for arrangementets indgåelse og opretholdelse, at Færøerne selv deltager i reguleringen af fiskeriet i det område, der omfattes af forslaget, såfremt man fra færøsk side, efter at arrangementet er trådt i kraft, på et senere tidspunkt skulle beslutte sig til at gå ind for en opsigelse af aftalen i henhold til artikel 6 stk. 3, må forudsætningeren for arrangementets bestående dermed siges at bortfalde. Efter udløbet af 6-måneders-fristen vil man fra færøsk side være frit stillet til at træffe andre foranstaltninger, som måtte være hjemlet ved internationale aftaler, f.eks. konventioner vedtaget på FN's havretskonference. Skulle havretskonferencen ende resultatløs, vil man ligeledes ved en opsigelse kunne frigøre sig med henblik på at træffe andre passende foranstaltninger, som der måtte være hjemmel til.»

Úrslitið er, at allar tjóðir, sum fiska við Føroyar, viðurkenna, at vísindaligt prógv er fyri, at tað er neyðugt við tiltøkum at verja fiskastovnin, ta óvanligu bindingina føroyski búskapurin hevur til fiskiskapin, og at

føroyingar hava framíhjárætt við Føroyar uttan fyri núverandi fiskimark.

Tær avmarkingar í veiðimongd og veiðitíð, sum serstakliga bretar hava bundið seg til, verða av størsta týdningi fyri føroyska fiskiskapin við Føroyar.

Allir partar kunnu taka seg burtur úr hesi avtalu við 6 mánaða fráboðan, og eru londini tá eins leys av henni, sum um eingin avtala nakrantíð hevði verið.

Stig er tikið at seta 1958 samtyktina í verk og vunnið er framá. Langt er á mál enn, men stavnbaldið «Landgrunnur Føroya er Føroysk ogn» verður hildið.

Í ásannan av, at hetta er ein fyribils loysn, til rættindini á opnum havi eru meira avklárað, mælir meirilutin til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Hákun Djurhuus og Kjartan Mohr) førir fram:

Við 1958-løgtingssamtyktini um, at landgrunnur Føroya er føroysk ogn, varð av løgtinginum gjørd ein meginregla, ið allir flokkar standa aftanfyri.

Teir 23 tingmenninir, ið tá atkvøddu fyri, vóru fullgreiðir yvir, at teir við hesi samtykt høvdu lagt støði undir fiskimarksútflyting, sum umstøður og tørvur fóru at krevja.

Tá var talan um 12 fjórðinga fiskimark út frá beinum grundlinjum, og varð hetta fiskimark sett við einvísari útflyting í 1964.

Síðani tá hava vit havt lógræði á hesi landleið, tað vil siga tí sjógvi, ið kom at vera innanfyri fiskimarkið.

Víddin uttanfyri, sum vit í 1958-løgtingssamtyktini høvdu kannað okkum, var enn stór, og tíðir komu við slíkum stórbroytingum í fiskivinnuligum sjónarmiðum, at tørvurin fyri at fáa ræði yvir hesum øki kom týðiligari og týðiligari fram.

Í almennari frásøgn 11. oktober 1972 gjørdu Fólkaflokkurin og Framburðsflokkurin vart við tað vandamikla trýst móti veiðurætti og veiðuøkjavídd okkara á fjarleiðum, ið var við at taka seg upp, og vístu flokkarnir samstundis á, at okkara fiskifrøðingur Jákup Sverri Joensen vildi halda, at toska- og hýsustovnarnir á okkara leiðum vóru ovfiskaðir.

Í sínum minnilutaáliti í løgtingsmáli nr. 6/1973: Landleiðin, gjørdu flokkarnir vart við tað tilfar, løgtingsins fiskivinnunevnd lá við aftaná at hava spurt fiskivinnufelagini um, hvørji ráð vóru at taka eftir teirra sjónarmiðum fyri at verja fiskastovnin og samstundis okkara vinnuligu áhugamál.

Ein meiriluti av teimum spurdu ráddu til at flyta fiskimarkið út.

Vert er at geva tí gætur í umhugsan og støðutakan í hesum fyri okkum

so álvarsliga máli, at fiskivinnupolitikkurin um allan heim tykist at hava ta hugsan og sikti, at fiskastovnurin best verður vardur við útflyting av fiskimarkinum, so strandaríkini fáa meira ábyrgd av og størri rætt til at verja teirra fiskastovnar.

Her í norðureystara partinum av Atlantshavinum hevur Ísland flutt út á 50 fjórðinga fiskimark.

Grønlendska landsráðið hevur gjørt samtykt um tað sama, og sterkar kreftur virka í Noregi við sama sikti.

Munandi betur enn vit eru teir avlagdir við fiskigrunnar undir egnum landi, men ikki bara sporini av ovurveiðu — fiskaloysi á vissum leiðum, hava sett hvøkk í, eisini fiskifrøðingar hava ávarað um vanda fyri fiskastovnin, ein vandi, ið hóttandi økist.

Hava teir so grundir at verja sítt nógva, hava vit størri grundir til at verja okkara lítla.

Okkara fjarleiðir liggja inni á og uppat hjá øðrum, og vit kunnu verða meint raktir, meinari enn nøkur onnur tjóð, av at verða útilýstur av okkara fjarleiðisveiðuøkjum, men sjálvt um vit hava eina slíka hóttan hangandi yvir okkum, vildi tað verið ábyrgdarleyst ikki at rikið ein fiskivinnupolitikk, ið miðjar ímóti at tryggja og verja fiskastovnin.

Um ivamál í hesum álvaraspurningi sita vit við samráðingarborðini í ICNAF og NEAFC, og kunnu gera vart við okkara «serliga tørv», men helst skuldu vit ikki sitið har so ivasamir og ræddir, at vit ikki tora at hava eina linju í okkara fiskivinnupolitikki og gera vart við okkara ringu og serligu umstøður.

Og er tað umráðandi at hava eina linju í okkara fiskivinnupolitikki í ICNAF og NEAFC, so er tað enn meira umráðandi at hava okkara fiskivinnupolitisku linju greiða til at taka, nú altjóða havrættar-fiskivinnufundur hesum máli viðvíkjandi skal vera hildin í næstu framtíð.

Í hesum sambandi er rímuligt og neyðugt at taka støðu til vissar spurningar og harímillum hendan:

Skulu vit verða teirra millum, ið taka undir við fiskifrøðinga áskoðan um, at útflyting av fiskimarkinum er neyðugt verjutiltak fyri at tryggja og verja fiskastovnin.

Tá Fólkaflokkurin og Framburðsflokkurin í løgtingsmáli nr. 6/1972 settu minnilutauppskot fram um 50 fjórðinga fiskimark og Føroya Banka út á 400 metra dýpdarlinju, var hetta tann partur av linjuni í okkara fiskivinnupolitikki, ið skuldi útatti vísa og fastleggja okkara áhuga fyri og vilja at verja fiskastovnin undir okkara landi. At eisini varð hugsað um okkara fiskivinnuligu neyðstøðu, um meira kom at sansa, at viðvíkjandi veiðirætti okkara á fjarleiðum, og vit bara komu at hava okkara egnu leiðir at falla afturá, sigur seg sjálvt. Men skuldi hetta vist seg at verið úrskurðurin aftaná komandi altjóða havrættarfiskivinnufund, vóru og eru

vit greiðir yvir, at okkara tørvur á landleið ikki bara kom at verða eitt 50 fjórðinga fiskimark, men meira.

Vit mettu samráðingar við bretar og aðrar nú heint undan altjóða havrættarfiskivinnufundinum vera óráð og mótmæltu, tí vit hildu okkum lætt kunna koma okkum í eina fiskivinnu-politiska veika dupultstøðu. Við eini løgtingssamtykt um 50 fjórðinga fiskimarki í rygginum, vildu okkara menn, ið luttóku í hesum samráðingunum staðið nógv sterkari.

Úrslitið av samráðingunum fyriliggur nú, tað kom at verða sum væntað, tá fram skuldi verða farið eftir einum teknaðum myndstri, ið sjálvur EF-ráðharrin, danski Ivar Nørgaard, kundi havt staðið fackur til, og ikki føroyingar, heldur ikki tann politiski meiriluti, ið nú ræður, tí hann var við at samtykkja 1958-samtyktina um allan landgrunnin sum føroyska ogn, og so seint sum í apríl í hesum ári sigur hann seg at hava sum fiskivinnuslavnluld at vinna einkarrætt til alt hetta litla veiðiøkið um oyggjar okkara.

Hesar samráðingar skulu hava givið okkum ein bata, og allur bati bøtir verður mangan sagt, men kemur hesin bati at roynast okkum so, at hann kann verða nýttur móti okkum at spenna bein við á okkara leið ímóti einkarrætti til hetta litla veiðuøki um oyggjar okkara, tá er hetta bati í vanhukku máta.

Landleið gevur hann okkum onga afturat.

Tá verju av fiskastovninum, sum ein útflyting skal vera besta borgan fyri, gevur hann okkum ikki, og ræðisrætt gevur hann okkum ongan, og ongan revsingarrætt mótvegis teimum, ið bróta sáttmálan.

Nei, heldur enn at tikið hesar samráðingar í bráðskundi skuldi landsstýrið følt seg fyri hjá íslendsku stjórnini um til dømis at longt um uppsagnartíðina av føroysk/íslendska fiskivinnusáttmálanum.

Men fyri ikki at hesin onkisigandi sáttmáli skal politiskt kunna verða misbrúktur og mistýddur í sambandi við umrøðu av okkara støðu á komandi altjóða fiskivinnufundinum, og samsvarandi tey sjónarmið, ið førd eru fram í álitinum, kann minnilutin Hákun Djurhuus og Kjartan Mohr ikki taka undir við uppskotinum frá landsstýrinum, men setur soljóðandi uppskot:

Uppskot
til
samtyktar viðvíkjandi okkara fiskivinnupolitikki.

1. Løgtingið tekur undir við teirri áskoðan, at útflyting av fiskimarkinum er neyðugt verjutiltak fyri at tryggja og verja fiskastovnin.
2. Fiskimarkið um Føroyar verður at flyta út á 50 fjórðingar frá heinum basislinjum.

Veiðuøkið á Føroya Banka verður rokna sum føroysk landleið, og fiskimarkið her sett eftir 400 metra dýpdarlinjuni.

Minnilutin (Erlendur Patursson) førir fram:

Við tí sáttmála, sum landsstýrið mælir tinginum til at samtykkja, skulu vit ganga undir at lata aðrar skipa fyri: hvussu mikið, ið okkum loyvist at veiða, hvørji fiskasløg, ið okkum loyvist at veiða, hvar vit mugu veiða, nær vit mugu veiða og hvønn reiðskap, ið okkum loyvist at nýta — alt á okkara egna sjógvi. Longu av hesi grund kann minnilutin ikki mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Henda skipan her annars í sær tvinni høvuðsbrek.

Tað fyrra er tað, at her kemur ikki til tals nøkur verulig minking í veiði útlendinga, ja í summum førum verður teimum loyvt at veiða 10—25% meir árliga, enn teir hava veitt besta veiðiárið higar til. Í so máta er tí onki «vunnið» við hesi skipan.

Hitt næsta er tað, at vit hava onki eftirlit við at henda skipan verður hildin. Hon er tí púra virðisleys.

Í sambandi við hetta uppskot fer minnilutin at minna á fyrrnevnt spurnarskriv marknaðarnevndarformannsins til fiskivinnufeløg landsins. Ein spurningur — helst við hesi skipan í huga — ljóðaði soleiðis: «Kundi onnur loysn enn útflyting av fiskimarkinum hugsast fyri at vinna størri veiðirættindi?»

Svørini vóru hesi:

1. Av tí vit einans hava fiskivinnuna sum høvuðsvinnu, mugu vit fáa fiskimarkið víðkað.
2. Onki svar. 50 fjórðinga fiskimark.
3. Onki svar.
4. Nei.
5. Til gagns fyri føroysku fiskivinnuna sum heild má haldast beinast vera at vinna so góðar sømdir sum møguligt við samráðingum við tær tjóðir, vit vanliga fiska hjá, heldur enn við einvísum tiltøkum.
6. Hava onki svar til henda spurning.
7. Møgulcikarnir fyri loysnum við samráðingarborðið og helst á internationalum plani eiga altíð at verða troyttir í mest møguligan mun.
8. Onki svar. 50 fjórðinga fiskimark.
9. Onki svar. 50 fjórðinga fiskimark.
10. Onki svar. 100 fjórðinga fiskimark.
11. Nei — avgjørt ikki. Vit meta slíkar loysnir verri enn onki.
12. Onki svar. Fiskimarksútflyting hálva leið til Íslands og hálva leið til Hetlands.
13. Fyri heimaútróðurin er útflytingin einasta loysn.

14. Tað duga vit ikki at siggja.
15. Nei.

Niðurstøðan av hesum kanningum marknaðarnevndarformannsins er tá tann, at fjøldin av teim afspurdu feløgunum heldur fast um útflutningskravið og mælir frá at ganga ta leið, sum landsstýrið í samráðingum sínum hevur gingið.

Aftan á at uppskotið um hesa skipan, ið her er til viðgerðar var gjørt almanna kunnugt, hevur eitt av hesum feløgum tikið til orða í skrivi, sum sent er løgtingi og landsstýri, har sagt verður, at henda loysn borgar ikki fyri álugamálum útróðrarmannna, og har enn eina ferð verður kravt, at stig verða tikin til nú at víðka fiskimarkið munandi, soleiðis at í minsta lagi allur landgrunnurin og Føroya Banki verður innanfyri.

At enda skal verða skilað til, at vit føroyingar, soleiðis sum viðurskiftli okkara eru, mugu halda okkum hava rætt til rúmari fiskimark enn nøkur onnur tjóð her í Norður-Atlantshavinum, og at vit — aftan á at hava flutt fiskimark okkara út — eiga at fáa henda rætt viðurkendan á komandi havrættarráðstevnu Sameindu tjóða — men møguleikin til at vinna slíkan rætt verður skerdur og forfjónaður við at ganga undir la skipan, ið landsstýrið mælir til at ganga undir.

Eisini av hesi grund mælir minnilutin frá at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Annars heldur minnilutin hetta mál hava slíkan týdning fyri alt Føroya fólk og framtíð tess, at fólkið eigur at fáa orðið fyri seg, áður enn endalig avgerð verður tikin. Minnilutin setir fram hetta

Uppskot

til

samtyktar

Uppskot landsstýrisins í tingmáli nr. 17/1973 um skipan viðvikjandi fiskiskapi undir Føroyum verður lagt fyri almenna fólkaatkvøðu, har meirilutin av greiddum atkvøðum verður avgerðandi.

2. viðgerð 30. november (saman við tingmálið nr. 13/1973).

Atkvøðugreiðsla á øðrum fundi sama dag.

Uppskot frá fólkaflokkinum og framburðsflokkinum punkt I fall við navnakalli við tað at 12 atkvøddu ja og 14 atkvøddu ikki.

Atkvøtt var soleiðis:

Ja: Signar Hansen, Jógvan Sundstein, S. Skaale, Demmus Hentze, K. Wang, H. Djurhuus, Kj. Mohr, H. við Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, J. Durhuus, Ove Mikkelsen. = 12. —

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Martin Joensen, Hilmar Kass, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, Andreas Djurhuus, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Hilmar Bech, J. P. Thomassen, Tórolvur Olsen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, J. Fr. Øregaard = 14.

Uppskotið frá fólkaflokkinum og framburðsflokkinum punkt II fall við navnakalli við tað at 6 atkvøddu ja og 20 atkvøddu ikki.

Atkvøtt var soleiðis:

Ja: J. Sundstein, S. Skaale, D. Hentze, K. Wang, H. Djurhuus, Kj. Mohr = 6.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Signar Hansen, Martin Joensen, H. Kass, Tr. Samuelsen, Andr. Djurhuus, Leon Joensen, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Hilmar Bech, J. P. Thomasen, Tórolvur Olsen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, H. v. Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, Ove Mikkelsen, J. Fr. Øregaard = 20.

Uppskotið frá meirilutanum (landsstýrinum) varð samtykt við navnakalli við tað at 14 atkvøddu ja, 10 nei og 2 atkvøddu ikki.

[redacted]

Atkvøtt var soleiðis:

Ja: Agnar Nielsen, Martin Joensen, H. Kass, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Leon Joensen, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Hilmar Bech, J. P. Thomassen, Tórolvur Olsen, Poul J. Olsen, Haldor Hansen, J. Fr. Øregaard = 14.

Nei: Signar Hansen, S. Skaale, D. Hentze, Hákun Djurhuus, Kj. Mohr, H. við Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, J. Durhuus, Ove Mikkelsen = 10.

Atkvøddu ikki: Jógvan Sundstein, Knút Wang = 2.

Uppskotið frá tjóðveldisflokkinum fall við navnakalli, við tað at 9 atkvøddu ja, 1 nei og 16 atkvøddu ikki.

Atkvøtt varð solciðis:

Ja: S. Hansen, S. Skaale, H. Djurhuus, Kj. Moln, H. við Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, J. Durhuus, Ove Mikkelsen = 9.

Nei: Jógvan Sundstein = 1.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, M. Joensen, H. Kass, D. Hentze, K. Wang, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Leon Joensen, J. Olsen, Johs. Olsen, H. Beck, J. P. Thomassen, T. Olsen, Poul J. Olsen, H. Hansen og J. Fr. Øregaard = 16.

---

18. NEAFC-samtyktirnar mai 1973 (onnur framløga)

Ár 1973, 14. november, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður fram

Uppskot
til
samtyktar

I. Løgtingið tekur til eftirtektar NEAFC-samtyktirnar frá mai 1973 annexini II til IX og mótmælir samtyktini annex I (annexini eru løgd við løgtingsmál nr. 10/1972).

II. Løgtingið heitir á landsstýrið um at kanna møguleikarnar og annars reika fyri, at Føroyar fáa sjálvsføðugt umboð á milliumlanda fundum, har føroysk fiskivinnuáhugamál koma fyri.

Viðmerkingar;

13. august 1973 legði landsstýrið fyri løgtingið uppskot til samtyktar, at løgtingið tók til eftirtektar NEAFC-samtyktirnar í London frá mai 1973,

(F.L. j. nr. 1504-3-2)

tó við undanfak av einari, hon ið setur fotalbann fyri laksaveiðu aftana 1. januar 1976, har skotið varð upp, at løgtingið mótmælti samtyktina. Vist verður til løgtingsmál nr. 10/1973.

Uppskotið fekk ikki neyðugan meiriluta í løgtinginum og fall tí; løgtingið var ikki fullmannað, tá atkvøðugreiðslan fór fram.

Tá ið landsstýrið nú endurnýggjar uppskotið, so er grundgevingin vitanin um, at í samráðingum er ikki útlit at fáa eina linari regulering av sildaveiðuni í Norðsjónum enn hon, ið varð samtykt á London-fundinum at galda til 15. juni 1974. Heraftrat kemur, at av hinum samtyktunum, sum heldur ikki vórðu samtyktar av løgtinginum, eru fleiri, sum í veruleikanum ikki skerja vinnumoguleikar okkara, samtyktirnar um atlanto-skandisku sildina, minstastødd fyri makrel, írski hvítingurin, undirmátsfiskur í ídnaðarveiðu og stongda økið í Biscaya-flógvanum og ein um meskavíddina undir Føroyum, sum bert er okkum til fyrimun.

Skal samráðingarleiðin gangast at fáa Føroyum sømdir á økjum, ið hava týdning fyri fiskivinnuna, ber ikki til at seta seg sjálvan uttanfyri men heldur luttaka so langt, at úrslitini eftir eina heildarmeting eru til fyrimun hjá føroysku fiskivinnuni.

Sum sagt frammanfyri er sildareguleringin fyribils sett bert at galda til 15. juni 1974. Hvat endaliga úrslitið verður fyri alt árið 1974 og tey fylgjandi 3-5 árini ber ikki til at meta um enn, støða verður tikin hertil á eyka NEAFC-fundinum í London í december mánaða 1973. Verður nøkur broyting, verður málið aftur lagt fyri løgtingið.

Av álitinum í løgtingsmáli nr. 10/1973 framgongur, at bæði meirilutin og minnilutin í fiskivinnunevndini eru fyri, at Føroyar fáa sjálvstøðugt umboð, ið bvussu er í NEAFC. Landsstýrið hevur kannað spurningin. Sum NEAFC-konventiónin er orðað, eru ikki møguleikar fyri tílíkum limaskapi. Landsstýrið vil tó halda fram í samtingunum av møguleikunum og arbeiða fyri, at konventiónin verður broytt soleiðis, at Føroyar kunnu fáa sjálvstøðugt umboð.

1. viðgerð 19. november og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 27. november.
Uppskotið samtykt við 19 —0 atkvøðum.
Málið avgreitt.

---

19. Broyting í kommunuvallógini

Ár 1973, 16. november, legði Ásbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

Løgtingslóg um broytingar í kommunalu vallógini.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 44 frá 29. juni 1972 um val til allar føroyskar kommunur verður gjørd hendan broyting:

Í § 20 verður skoytt uppí:

3. pætti. Fer bygdaráðslimur frá í valskeiðinum, og er ongin tiltaksmaður, skal landsstýrið skipa fyri vali av so mongum limum sum resta í, at bygdaráðið er fullmannað uttan so, at meira enn helmingurin av upprunaligu limatalinum samtykkir, at hetta ikki er neyðugt.

4. pætti. Við tílíkt val galda somu reglur sum við vanligt kommunuval. Tó kann landsstýrið um neyðugt víkja frá teimum í lógini tilskilaðu tíðarfrestum.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

Lagtingslov om ændring i den kommunale valglov.

§ 1.

I lagtingslov nr. 44 af den 29. juni 1972 om valg til samtlige færøske kommuner foretages følgende ændring.

I § 20 tilføjes:

Stk. 3. Fratræder et bygderåds medlem i valgperioden, og er der ingen stedfortræder, skal landsstyret foranledige at der afholdes valg af så mange medlemmer, at bygderådet er fuldtalligt medmindre, over halvdelen af det oprindelige medlemstal vedtager at dette ikke er påkrævet.

Stk. 4. Ved sådant valg gælder de samme regler som ved ordinært kommunevalg. Dog kan landsstyret gøre undtagelse fra de i loven foreskrevne tidsfrister.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í núgaldandi kommunalu vallóg er ikki roknað við, at serligur møguleiki er fyri, at talið á bygdaráðslimum fer niður um tað, tað eigur at verða, við tað at valevnislistarnir kunnu hava upp til 4 valevni fleiri enn talið á bygdaráðslimum.

(F.L. j. nr. 818-6-1)

Vanlig val til bygdaráðini verða ikki fyrr enn í november-desember 1974, og núsitandi bygdaráð eru vald eftir gomlu vallógini.

Eftir gomlu lógini máttu valevnislistarnir ikki hava fleiri valevni enn talið á bygdaráðslimunum. Var bert ein valevnslisti hevði hetta tí við sær at eingin tiltaksmaður er.

Tað kann tí henda, at so nógvir fara úr bygdaráðnum av ymsum orsøkum, burturflytan í aðra kommunu, sjúku v.m., at bygdaráðið ikki er viðleikuført.

Landsstýrið heldur tí hesa lógarbroyting verða neyðuga.

Teir tíðarfrestir sum galda fyri vanligt kommunuval m.a., at valevnislistarnir skulu verða gjørdir innan 1. september tað ári, sum valið fer fram, og at boðast skal frá valinum 6 vikur frammanundan, heldur landsstýrið ikki kunna verða yvirhildnar í tílíkum føri og verður tí skotið upp, at landsstýrið fær heimild at víkja frá hesum tíðarfrestum.

1. viðgerð 19. november og málið beint í kommunalu nevndina, sum 28/2-1974 legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál, sum varð lagt fram 16. november av landsstýrinum, varð við fyrstu viðgerð 19. november beint í kommunalu nevndina. Nevndin er samd um at mæla løgtinginum til at samtykkja landsstýrisuppskotið.

Kommunala nevndin, 28. februar 1974.

2. viðgerð 5. mars. Greinirnar og uppskotið samtykt at fara til 3. viðg. við 19—0.

3. viðgerð 11. mars. Lógaruppskotið endaliga samtykt 19—0.

20. Góðskumeting av feskum fiski

Ár 1973, 16. november, legði Asbjørn Jacnsen, landsstýrismaður, fram

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirlit við virking og útflutningi av frystum fiski til matna.

§ 1.

§ 3 í løgtingslóg nr. 24 frá 6 mai 1965 um eftirlit við virking og útflutningi av frystum fiski til matna verður orðað soleiðis:

«Eisini er landsstýrinum heimilað í kunngerð at fyriseta reglur um, at allur feskur fiskur, sum innhandlaður verður, kemur undir góðskumeting av vrakarastovnunum. Hann, ið keypir fiskin í fyrstu hond, hevur skyldu at rinda útreiðslurnar, vrakarastovnurin hevur av góðskumetingini.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om kontrol med tilvirkning og udførsel af frossen fisk til konsum.

§ 1.

§ 3 i lagtingslov nr. 24 af 6. maj 1965 om kontrol med tilvirkning og udførsel af frossen fisk til konsum formuleres således:

«Ligeledes er landsstyret bemyndiget til i bekendtgørelse at foreskrive regler om, at al frisk fisk, der indhandles, undergives kvalitetsvurdering af vragerinstitutionen. Den, der køber fisken i første hånd er forpligtet at betale de udgifter, som vragerinstitutionen har haft af kvalitetsvurderingen.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

L/f Føroya Fiskasøla hevur saman við fiskavirkjum, fiskakeyparum og vrakarastovnunum heitt á landsstýrið um, at vrakarastovnurin longu við landing ger góðskunnet av øllum feskum fiski. Víst verður á, hvønn týdning tað hevur í framleiðsluni og síðani í útflutningimum, at fiskurin á fyrst møguliga framleiðslustigi verður mettur og skildur eftir góðsku.

Eftir galdandi lóggávu heldur landsstýrið seg ikki hava heimild at ganga áheitanini á møti. Tær lógarreglur, ið talan kundi verið um at nýtt, eru

(F.L. j. nr. 1515-4-8 og Ll. 6/1974)

§ 3 í løgtingslóg nr. 15 frá 15. september 1948 um inn- og útflutning, viðgerð og virkan av fiski og fiskaúrdrátti o.ø., § 1 í lóg nr. 24 frá 6. mai 1965 um eftirlit við virking og útflutningi av frystum fiski til matna og § 8 í løgtingslóg nr. 1 frá 31. januar 1969 um minstuløn og annan stuðul til fiskivinnuna. Heimildirnar rokka ikki, serstakliga ikki, um nøkrum verður álagt at gjalda fyri metingarnar.

Tá ið talan er um, at allur fiskur kemur undir meting, er tað ikki gjørligt hjá vrakieftirlitsmonnum einsamallum at inna arbeiðið, lutur teirra verður at standa fyri skipanini, meðan metingin í verki verður gjørd av vrakarum. Ætlanin er í hesum sambandi at halda skeið fyri vrakieftirlitsmonnum.

Skipanin ber tí útreiðslur við sær í lønum til vrakararnar. Tá ið saltfiskur ella klippfiskur verður vrakaður, er tað eigarin av fiskinum, ið ber útreiðslurnar. Her kundi tí verið talan um at latið hann, sum í fyrstu hond keypir fiskin til virkingar, tá ið fiskurin verður innhandlaður, goldið útreiðslurnar.

Ein avleiðing av skipanini er, at lønjavningargrunnurin kann fáa sær váttan um, at landaður feskur fiskur er fyrsta floks vøra, sum er treytin fyri studninginum.

Í framhald av nýggju lógini um løggilding av fiskavirkjum verður arbeitt við lóg, sum skal koma í staðin fyri galdandi løggávu um vraking og um eftirlit við virking av fiski. Lógararbeiðið er tó ikki enn komið so langt, at tað er búgvið at leggja fyri løgtingið sum lógaruppskot.

Fyriliggjandi spurningur eigur at verða loystur nú, í áheitanini verður mælt til longu frá 1. december 1973. Landsstýrið er sinnað, um lógarheimild fæst, at seta skipanina í verk frá nýggjárum.

1. viðgerð 20. nov. og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 29. november legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð lagt fyri tingi av landsstýrinum, og var við fyrstu viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin tekur fult undir við tí hugsan, ið liggur aftan fyri landsstýrisins uppskot.

Undir fyrstu viðgerð varð spurt eftir eini reglugerð viðvíkjandi umsitingini av tí í lógaruppskotinum framførda, men er ongin slík reglugerð enn gjørd.

Sjálvandi kann vera farið undir tað, ið lógin tilsiktar uttan reglugerð, men umráðandi er, at hetta kanningararbeiði umsitingarliga verður gjørt

so einfalt og handugt sum gjørligt, so hetta nýggja tiltak kann koma at roynast sum eitt fættarbeiðandi og vælvirkandi lið í okkara framleiðslu.

Nevndin roknar sostatt við, at tað fyrsta árið verður eitt leiðbeinandi royndarár, og at landsstýrið í komandi tingsetu leggur málið aftur fyri tingið við eini reglugerð.

Út frá hesum sjónarmiðið mælir nevndin til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 30. november.
Greinarnar og málið samtykt at fara til 3. viðgerð við 25—0.

3. viðgerð 5. desember.
Lógaruppskotið endaliga samtykt 20—0.

21. Broyting í Vanlukkutryggingarskipanini, hækkan av ársløni ni v.m.

Ár 1973, 20. november, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður fram soljóðandi:

Uppskot

til

kongiliga fyriskipan um broyting í kongiliga fyriskipan fyri Føroyar nr. 389 frá 15. november 1966 «om forsikring mod følger af ulykkestilfælde.

1. § 25 affattes således:
«§ 25. Dagpengenes størrelse udgør ¾ af den tilskadekommes dagløn, jfr. § 44, stk. 3,dog højst ⅔ af daglønnen beregnet efter det i henhold til § 44, stk. 2, gældende maksimumsbeløb for årsløn. Dagpenge udbetales for 7 dage for hver uge og reguleres i henhold til § 44 A.»

2. I § 36 indsættes efter stk. 3 som nyt stykke:
«Stk. 4. Omsætning af renten til kapital finder sted på grundlag af rentens størrelse på omsætningstidspunktet.»

3. § 41 affattes således:
«§ 41. For så vidt udgifterne ved afdødes begravelse (ligbrænding) afholdes af de efterladte eller andre private personer, tilkommer der disse en hjælp af indtil 800 kr.
Stk. 2. For hvert udsving

(F.L. j. nr. 1411-3-2)

Sí eisini Anordning for Færøerne om forsikring mod følger af Ulykkestilfælde.

over eller under 437 i det færøske pristal pr. 1. januar forhøjes eller nedsættes den i stk. 1, omhandlede hjælp forholdsmæssigt. Reguleringen har gyldighed fra den førstkommende 1. april og for virkning for ulykkestilfælde, der indtræder nævnte dato eller senere.»

4. § 44, stk. 2, affattes således:
«Stk. 2. Årslønnen kan i intet tilfælde sættes højere end den i lagtingslov nr. 1 af 31. december 1969 med senere ændringer pr. 1. januar hvert år fastsatte og regulerede mindsteløn for fiskere eller lavere end halvdelen deraf. De således fastsatte grænser for årsløn gælder for ulykkestilfælde indtruffet i det pågældende kalenderår.»

5. § 44 A affattes således:
«§ 44 A. Samtidig med en ændring af årslønnens maksimums- og minimumsbeløb, jfr. § 44, stk. 2, reguleres løbende dagpengeydelser og renter i anledning af ulykkestilfælde indtruffet før reguleringen med forholdet mellem det maksimumsbeløb for årsløn, der er gældende på reguleringstidspunktet og det maksimumsbeløb for årsløn, der var gældende på tidspunktet for ulykkestilfældets indtræden. For de i § 44 B omhandlede opregulerede dagpengeydelser og renter regnes den 1. januar 1974 som ulykkestilfældets tidspunkt.

Stk. 2. Dagpengeydelser og renter, der fastsættes efter at

ændringer i henhold til stk. 1 er trådt i kraft, i anledning af for ændringens ikrafttræden indtrufne ulykkestilfælde, reguleres, som om ydelserne havde været løbende fra ulykkestilfældets indtræden.»

6. Efter § 44 A indsættes i kapitel IV:

«§ 44 B. Løbende dagpengeydelser og renter i anledning af ulykkestilfælde indtruffet før den 1. januar 1974 forhøjes med virkning fra denne dato til beløb, der fremkommer ved at multiplicere ydelsen med forholdet mellem det pr. 1. januar 1974 gældende maksimumsbeløb for årsløn og det maksimumsbeløb for årsløn, der var gældende på ulykkesstedets tidspunkt. De således beregnede ydelser reguleres efter reglerne i § 41 A, stk. 1.

Stk. 2. Afgår en tilskadekommen, der oppebærer en i henhold til stk. 1, forhøjet rente, ved døden den 1. januar 1974 eller senere, beregnes og reguleres erstatninger i henhold til § 39, som om ulykkestilfældet var indtruffet den 1. januar 1974. Som grundlag for beregningen anvendes en årsløn, der svarer til det rentebeløb, som er fastsat i henhold til stk. 1. I tilfælde, hvor krav i henhold til § 32 og § 39 rejses i medfør af §§ 46 og 47 i anledning af et før 1. januar 1974 indtruffet ulykkestilfælde, finder tilsvarende beregning og

regulering anvendelse, såfremt erstatningen fastsættes i form af rente.»

§ 2.

Stk. 1. Anordningen træder i kraft den 1. januar 1974.

Stk. 2. § 1, nr. 1, 3 og 4, får virkning for ulykkestilfælde indtruffet den 1. januar 1974 eller senere. § 1, nr. 3, anvendes første gang ved den regulering, der er beregnet pr. 1. april 1974 på grundlag af pristallet pr. 1. januar 1974.

Viðmerkingar:

Løgting og landsstýri hava seinru árini fleri ferðir viðgjørt spurningin um vanlukkutryggingarskipanina.

Í landsstýrinum hevur verið hugsað um at fremja eina tvungna vanlukkutrygging fyri øll. Ríkisstýrið er í hesum sambandi biðið um at kanna teir spurningar, ið standast av tílíkari trygging.

Landsstýrið heldur tó, at spurningurin um tvungna vanlukkutrygging eigur at verða umhugsaður nakað enn og samstundis spurningurin um dagpening á øðrum økjum, eitt nú undir sjúku, barnsferð og arbeiðsloysi. Í Danmark er nú framd ein samskipan av dagpeningi, tá ið talan er um vanlukku, barnsferð og sjúku. Í slíkum føri hevur vanlukkutryggingin partvís mist sín týdning.

Landsstýrið heldur tó, at tørvur er á øðrum broytingum í vanlukkutryggingarskipanini, og at tørvurin á hesum broytingum er so stórur, at tær eiga at verða gjørdar nú.

Uppskotið her hevur tvær broytingar við sær.

1 fyrsta lagi heldur landsstýrið, at hæddin á ársløninni, hon varð rættiliga tilvildarliga ásett, er ov lág, hon er grundarlagið undir veitingunum. Skotið verður tí upp at hækka árslønina, soleiðis at hon altið verður hin sama sum minstaløn til fiskimenn.

Síðani heldur landsstýrið, at tað hæði er ein órimilig og órættvís skipan, at dagpeningur frá vanlukkutryggingini, sum ikki sjálvdan verður veittur eini 2–3 ár, ikki verður dýrtíðarviðgjørdur eins og allar aðrar socialar veitingar. Skotið verður tí upp, at dagpeningurin verður í mun til ársløniina, sum hon er, tá ið útgoldið verður.

Umframt hesar broytingar eru í uppskotinum broyttar reglur um hjálp til gravarferð og eisini, hvar veitt verður varandi renta.

Viðvíkjandi minstalønini, sum eftir uppskotinum er grundarlagið undir veitingunum, er at siga, at eftir orðaljóðinum í uppskotinum verða veitingarnar í vanlukkutryggingini ikki bert dýrtíðarviðgjørdar av minstalønini, sum hon nú er, men verða eisini av sær sjálvum at fylgja teimum hækkingum, ið koma. Av verkligum orsøkum verða veitingarnar bert at javna eina ferð um árið, hóast tað, at minstalønin verður javnað hvort fjórðingsár.

Skotið verður upp, at nýskipanin fær gildi frá 1. januar 1974. Hevði skipanin verið galdandi nú, hevði hæddin av dagpeningi og hægstu ársløn verið hendan:

		Sum nú	Eftir uppskotinum
Hægsta ársløn	kr.	18.000,00	kr. 31.198,00
Hægsti dagpeningur	kr.	40,00	kr. 69,00

Uppskotið førir ikki útreiðslur við sær fyri landskassan.

Um uppskotið verður framt, vil tað helst føra við sær, at tryggingargjaldið til Føroya Vanlukkutrygging verður hækkað, um hetta tekur tó stýrið í tryggingini avgerð.

Viðlagt er «anordning for Færøerne om forsikring mod følger af ulykkestilfælde».

1. viðgerð 23. november og málið beint í sosialnevndina, sum 5. desember legði fram soljóðandi

álit

Uppskotið er lagt á ting av landsstýrinum 20. november, og varð við 1. viðgerð beint til viðgerðar í socialu nevndini, sum hevur viðgjørt málið.

Nevndin er samd um, at tørvur er á at hækka tey endurgjøld, sum uppskotið sipar til. Somuleiðis er nevndin av tí áskoðan, at sami skaðatilburður átti at fingið somu veiting og heitir nevndin tí á landsstýrið um at koma við uppskoti við møguligum broytingum. Tað er sonevnda árslønin, sum skotið verður upp at hækka ájavnt minstalønina í hesum uppskoti, soleiðis at endurgjaldskrøv til Vanlukkutryggingina verða javnað eftir tí meðaltali, sum minstalønin fyri fiskimenn er sett til.

Herafturat sipar uppskotið til at broyta vanlukkutryggingarskipanina solciðis at allur dagpeningur, sum verður útgoldin, verður javnaður eins, t.v.s. at dagpeningurin er hin sami hvørt skaðin er hendur undir núgaldandi prístali ella undir einum lægri prístali.

Um uppskotið nýtir frama, verður talan um at tryggingargjaldið kemur

at hækka, eftir ti sum fyri nevndini er upplýst vil ein hækking uppá % í hvussu er verða nóg stór í fyrstu atlogu.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið, soleiðis sum skotið upp av landsstýrinum.

Framlagt frá meiriluta í nevndini soljóðandi álit við broytingaruppskoti:

Út frá ti sjónarmiði, at tryggingarmál sum heild eru føroysk sermál, mælir meirilutin (Jógvan Durhuus, Jógvan Sundstein, Hilmar Bech og Poul Jacob Olsen) til, at eisini vanhukkutryggingarskipanin verður yvirtikin og setur ti fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar.

Løgtingið samtykkir at vanhukkutryggingarskipanin verður yvirtikin sum føroyskt sermál.

Jógvan Sundstein Jógvan Durhuus Hilmar Bech

Poul Jacob Olsen

2. viðgerð 6. februar.
Landsstýrisuppskotið samtykt 23—0.
Uppskot til samtyktar frá meiriluta í nevndini samtykt 17—0.

---

22. Sjóverjan

Ár 1973, 28. november, legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir:

I. At heitt verður á Føroya Landsstýri um skjótast gjørligt at lata teir báðar landsstýristrolararnar «Vágbingur» og «Leivur Øssursson» røkja sjóverjutænastuna kring Føroyar.

II. At landsstýrið útvegar bátunum slíkan politimyndugleika, sum gevur teimum lógligan rætt at taka útlendsk fiskifør, sum veiða ólógliga.

Viðmerkingar:

Sum øllum kunnugt er útlendski trolaraflotin, sum roynir undir Føroyum støðugt vaksandi. Nú nærkast eisini tann tíðin, december til mai, hvar allur tann útlendski veiðuflotin undir Føroyum er storstur, ja, vanliga meir enn dupult so nógvur í tali og stødd enn aðrar tíðir.

Tí er tað átroðkandi, at sjóverjan verður so góð sum gjørligt. Sum nú er, við einans einum vaktarskipi, er vaktarhaldið ofta tilvildarligt, tí, sum skilligt er, so kann einans eitt skip ikki vera allastaðni í senn. Tí er umráðandi at seta fleiri skip inn í sjóverjuna, soleiðis at sjálvt vaktarokið uppá skipið verður munandi minni.

Trolararnir «Leivur Øssursson» og «Vágbingur» eigur landsstýrið, og hava teir, serliga tann fyrri, kostað landskassanum ikki smávegis. og sær tað út til, at tær almennu útreiðslurnar eru støðugt vaksandi, m.a. av dýrum umvælingum, sum sýnast ongan enda at fáa.

«Vágbingur» hevur ligið við kai í meira enn eitt ár burtur sæð frá einum túri í Týsklandi til umvælingar fyri landsins rokning. Væl eru bátarnir ikki teir allar berst hóskandi til sjóverjuendamál, men teir eru tó væl nýtiligir. Støddin millum annað borgar fyri, at vaktarhaldið kann fara fram í mørum øllum veðri. Ferðin er nakað lítil, men kunnu teir tó pressast upp á 14 míl. Maskinan er í góðum standi eins og sjálvur skrokkurin. Elektroniskt útstýr er nýtiligt í fyrstu syftu til endamálið.

Sum nevnt eru bátarnir ein rættiliga stór útreiðsla fyri landskassan, og sjálvt um hendla útreiðsla varð eitt sindur meira, so var hetta líkasta loysnin fyri eini munandi økjan og effektivisering av sjóverjuni. Í hvussu er sum ein fyribils loysn, inntil meiri hóskandi før kunnu byggjast.

1. viðgerð 5. des. og málið beint í lógarnevndina, sum 13. februar legði fram soljóðandi

Álit

Vegna tjóðveldisflokkin hevur Ove Mikkelsen lagt fyri løgtingið uppskot til samtyktar um, at heitt verður á landsstýrið um skjótast gjørligt at lata trolararnar «Vágbingur» og «Leivur Øssursson» røkja sjóverjutænastu kring Føroyar og at útvega bátunum slíkan politimyndugleika, sum gevur teimum lógligan rætt at taka útlendsk fiskifør, sum veiða ólógliga.

Málið varð við 1. viðgerð beint í lógarnevndina.

Nevndin (Demmus Hentze, Martin Joensen, Ove Mikkelsen, ið møtti

fyri Signar Hansen, Tórálvur Olsen, ið møtti fyri Poul J. Olsen, og Trygve Samuelsen) hevur viðgjørt málið.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin fingið upplýst frá landsstýrinum, at «Vágbingur» í januar t. á. er seldur til eitt felag í Vági, og at «Leivur Øssursson» rekur og ætlast framvegis at reka royndarfiskiskap fyri fiskirannsóknarstovuna, og at hann er útgjordur við ti endamáli at halda fram við royndarfiskiskapi undir fyrisiting fiskirannsóknarstovunnar.

Vísandi til tað her framførda setur nevndin einki uppskot fram.

2. viðgerð 15. februar. Uppskotið afturtikið eftir ynski frá Ove Mikkelsen. Alt málið sostatt burturfallið.

---

23. Broyting í lærlingalógini

Ár 1973, 27. november, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um lærlingaviðurskiftir.

§ 1.

Í § 4, stk. 4 í løgtingslóg um lærlingaviðurskiftir, sambr. lógarkunngerð nr. 56 frá 15. august 1961, verður «18 arbeiðsdagar» broytt til «24 dagar», «12 dagar» broytt til «18 dagar», «1½ arbeiðsdag» broytt til «2 dagar» og «út um teir 12» broytt til «út um teir 18».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi 1. apríl 1973.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om lærlingeforhold.

§ 1.

I § 4, stk. 4, i lagtingslov om lærlingeforhold, jfr. lovbekendtgørelse nr. 56 af 15. august 1961, ændres «18 arbejdsdage» til «24 dage», «12 dage» til «18 dage», «1½ arbejdsdag» til «2 dage» og «overstiger 12» til «overstiger 18».

§ 2.

Denne lov træder i kraft 1. april 1973.

(Ll. nr. 12/1974). (FL. J. nr. 2115-3-5).

Viðmerkingar:

Hetta uppskot um broyting í lærlingalógini svarar til ta broyting, sum gjørd er í fritíðarlógini við løgtingslóg nr. 4 frá 25. januar 1973 um lenging av fritíðini til 4 vikur.

Tá uppskotið um broyting í fritíðarlógini varð framsett í tingsetuni 1971, var samstundis sett fram uppskot um tilsvarandi broyting í lærlingalógini (løgtingsmál nr. 76/1971). Uppskotið um broyting í fritíðarlógini varð tó fyrst samtykt aftaná nýggja framløgu í tingsetuni 1972, men var tá av misgáum broytingiu í lærlingalógini ikki tikin við.

1. viðgerð 29. november og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 6. des. Greinarnar og uppskotið at fara til 3. viðgerð samt. 19—0.

3. viðgerð sama dag. Frávik frá tíðarfrestini.

Lógaruppskotið endaliga samtykt 23—0.

---

24. Partapeningur í flakavirki í Haldórsvík

Ár 1973, 27. november, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um partapening í P/f Føroyskt-íslendskt fiskavirki, Haldórsvík.	**lagtingslov om aktier i P/f Føroyskt-islendskt fiskavirki, Haldórsvík.**
§ 1.	§ 1.
Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til	Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i P/f Føroyskt-is-

(F.L. J. nr. 1413-1-68). Ll. nr. 15/1974.

100.000 kr. í partapeningi í p/f Føroyskt-íslendskt fiskavirki, Haldórsvík, og at leggja út peningin úr landskassanum.

§ 2.

Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar.

§ 3.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

íslendskt fiskavirki, Haldórsvík med et beløb på indtil 100.000 kr. og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ 2.

Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret skulle stille, er opfyldt.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

P/f Føroyskt-íslendskt fiskavirki í Haldórsvík hevur biðið um at landskassin setur partapening í hetta felagið. Endamál felagsins er at byggja og reka flakavirki í Haldórsvík. Aktiði partapeningurin er kr. 500.000, harav teknaður er um leið kr. 400.000. Av hesum 400.000 eru umleið 10.000 kr. teknaðar í Íslandi. Biðið verður um at landskassans partapeningur verður 100.000 kr.

Kostnaðurin av flakavirkinum er mettur at fara at verða 3 mill. kr.

Málið er viðgjørt í búskaparráðnum í sambond við umsókn frá felagnum um veðhald fyri láni. Búskaparráðið mælir frá og vísir til at teir ikki halda vera ráðiligt at byggja hetta flakavirki, tá tað liggur so nær við flakavirkið á Eiði og tí ráðið heldur, at ov lítil råvøra verður til hesi bæði virkir.

Landsstýrið vil viðmerkja til hetta, at tað hevur vist seg, at tá flakavirki verða stovnuð, koma eisini fiskifør til bygdina, soleiðis at tað neyvan er orsøk at bera ótta fyri ov lítlari råvøru til hetta virkið. Tilsøgn er fingin frá ávísum tali av bátum og einum størri linubáti, sum ikki í lotuni avreiða til annað flakavirki í økinum. Annars er ætlað eitt vist samarbeiði við íslendskar útgerðarmenn og bátacigarar, so roknað verður við eini minni nøgd av råvøru hagani. Umframt hetta er projektið komið so langt ávegis, grundøkið er løkt, og menn eru tilreiðar at byrja bygging. Landsstýrið heldur tað tí vera rætt at stuðla hesi fyritøku og seta 100.000 kr. í felagið sum partapening, og loyvir sær tí at leggja frammanfyri standandi uppskot fyri løgtingið.

1. viðgerð 29. november og málið beint í liggjarnevndina, sum 5. desember legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið, sum við fyrstu viðgerð var beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður greitt frá at felagið hevur søkt landsstýrið um almennan partapening uppá kr. 100.000. Sagt verður frá, at ætlaði partapeningurin er kr. 500,000, og at kr. 400.000 eru teknaðar. Búskaparráðið mælir frá at veðhald verður givið fyri lán út frá leirri metan, at ikki verður nóg mikið av ráevni hæði til Eiðisvirkið og til nevnda virkið í Vík.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið, og ásamt, at líka í løtuni er ikki meira ráevni enn at hetta kann verða virkað á Eiðisvirkinum, ella í hvussu so er ikki so stórt avlop, at tað er rávørumundirlag fyri øðrum virki. Men nú linufiskiskapurin á fjarleiðum hevur givið minni og minni av sær, eru fleiri av saltfiskaskipunum við at leggja um til feskfiskaveiðu, og heldur hetta áfram, verður meira rávøra til føroysku Flakavirkini.

Eisini mugu vit gera okkum greitt, at um avmarkingin í veiðirættinum á fjarleiðunum verður at halda fram, er eitt tams at taka til, og er tað at útbyggja heimaveiðiflotan, og um so verður, skulu fleiri ella større virkir til at viðgera veiðina.

Nevndin kann útfrá tí ið omanfyri er ført fram taka undir við uppskotinum, og mælir tinginum til at samtykkja tað, tó við leirri broyting at § 2 verður orðað so:

§ 2.	§ 2.
Onki av tí í § 1 nevnda partapeningi verður teknað ella útgoldið fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar og góðkendar av figgjarnevndini.	Ingen del af det i § 1 nævnte aktiebeløb kan teknes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret måtte stille, er opfyldt og godkendt af finansudvalget.

2. viðgerð 6. mars. Frávik frá tíðarfrestini uttan atkvgr. Atkvøðingreiðsla á seinni fundi. Broytingaruppskot frá nevndini til gr. 2 samtykt 21—0. Gr. 1 og 2 so broyttar samtyktar 21—0. Lógaruppskotið so broytt samtykt at fara til 3. viðgerð 21—0.

3. viðgerð 6. desember, lógaruppskotið nú endaliga samtykt við 21—0.

---

25. Partapeningur í flakavirki á Tvøroyri

Ár 1973, 27. november, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um partapening í p/f Tvøroyrar flakavirki, Tvøroyri.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til 300.000 kr. í partapeningi í p/f Tvøroyrar flakavirki, Tvøroyri, og at leggja út peningin úr landskassanum.

§ 2.

Eingin partapeningur verður teknaður ella útgoldin fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi áskilt, eru loknar.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om aktier i p/f Tvøroyrar flakavirki, Tvøroyri.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i p/f Tvøroyrar flakavirki, Tvøroyri, med et beløb på indtil 300.000 kr. og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ 2.

Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales før alle betingelser, landsstyret måtte stille, er opfyldt.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

P/f Suðuroyar Fiskaídnaður, sum seinni hevur broytt navnið til P/f Tvøroyrar Flakavirki hevur heitt á løgtingið um at heimila landsstýrinum at seta partapening í felagið. Felagið hevur til endamáls at byggja og reka flakavirki á Tvøroyri, og var kostnaðurin av hesum flakavirki í ábeitanini til løgtingið mettur at vera 3,5 – – 4 milj. kr.

Málið var viðgjørt í fíggjarnevndini, sum beindi ábeitanina til landsstýrið, sum var biðið um at leggja málið aftur fyri tingið.

Partapeningurin hjá partafelagnum Tvøroyrar Flakavirki er settur at vera 1,5 milj. kr., harav umleið 900.000 kr. eru teknaðar, og kr. 850.000

(F.L. J. nr. 1413-1-69). Ll. nr. 16/1974.

inngoldnar. Kostnaðurin av hesum flakavirki er nú mettur at fara at vera 5—6 milj. kr.

Landsstýrið metir, at stórur torvur er á einum tílíkum arbeiðsskapandi virki í norðaru helvt av Suðuroynni, og heldur tað tí vera rætt, at hetta virkið verður stuðlað við almennum partapeningi.

Hvat rávøru viðvíkir er at siga, at um leið helmingurin av tí, sum bátar á Tvøroyri nú veiða, verður avreiddur ymsa aðra staðni í Føroyum. Hesini verður roknað við, at rávørunøgdin kann økjast munandi, við tað at línubátar eru á plássinum, sum higartil hava veitt saltfisk, og sum eru í ferð við at leggja um heilt ella lutvíst til ísfiskaveiðu. Umframt hetta er felag í stovnan í ferð við at gera sáttmála um ein og møguliga tveir 100' yvirbygdar línubátar.

Landsstýrið loyvir sær við hesum uppskoti at biðja um heimild at sela kr. 300.000 í partapeningi í hetta felag.

1. viðgerð 29. november og málið beint í figgjarnevndina, sum 5. desember legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið og varð við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður víst á, at um helmingurin av tí rávørunøgd, sum veidd verður av bátum av Tvøroyri, verður avreitt á øðrum plássum, at fleiri saltfiskalínubátar ætla at leggja um til feskfiskaveiðu, sum vil verða avreidd har og at nevnda felag hevur ætlanir um at byggja ein ella tveir størri línubátar.

Um henda ætlan verður sett í verk, og umtalaða umlegging frá saltfiskaveiðu til feskfiskaveiðu verður framd, skuldi rávørumundiskap verið til slíkt virki, sum her er talan um. Nevndin kann sostatt mæla løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins, men við teirri broyting, at § 2 fær hetta orðalag:

§ 2.

Eingi av tí í § 1 nevnda partapeningi verður teknað ella útgoldið fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett, eru loknar og góðkendar av figgjarnevndini.

§ 2.

Ingen del af det i § 1 nævnte aktiebeløb kan tegnes eller udbetales før alle betingelser, landsstyret måtte stille, er opfyldt og godkendt af finansudvalget.

2. viðgerð 6. desember. Frávik frá tíðarfrestini uttan atkvgr. Atkvøðugreiðsla á seinni fundi: Broytingaruppskot frá nevndini til gr. 2 samtykt

23 –0, gr. 1 og 2 so broyttar samt. 23 0. Samtykt at fara til 3. viðgerð við 21—0.

3. viðgerð 6. des. Lógaruppskotið endaliga samtykt 22—0.

---

26. Strandfaraskip til Suðuroyarsiglingina

Ár 1973, 28. november, legði J. P. Thomassen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at útvega tíðarhóskandi skip til strandfarasiglingina Suðuroy - Tórshavn.

Viðmerkingar:

Tað er væl øllum fólki greitt, sum ferðast millum Suðuroy og Tórshavn, at núverandi strandfaraskip «Smyril» ikki er tíðarhóskandi til Suðuroyasigling.

Hetta kom eisini fram í løgmansrøðuni á Ólavsøku 1973, har sagt verður: Vøksturin í bilflutningunum ger, at skipini eldast skjótari, og má tí umhugsast at fáa til vega meira tíðarhóskandi skip til nakrar av rutunum, millum annað til Suðuroyasiglingina, sum er hin drúgvasta leiðin, og hon sum krevur mest av ferðafólkinum.

Ikki bert bilflutningur, men eisini ferðamannafluttn. er øktur so munandi seinastu árini, at onga staðni í Føroyum í dag er størri tørvur á nýggjum

(F.L. J. nr. 1800-37).

ferðamannaskipi til at makta honda ferðamannastreym eun millum Suðuroy og Havnina.

Tórshavn, 26. november 1973.

J. P. Thomassen, Hilmar Beck, Ove Mikkelsen,

Andreas Djurhuus

1. viðgerð 30. januar 1974 og málið beint í fíggjarnevndina, sum 1. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av tingmonnunum fyri Suðuroy lagt fyri tingið og var við fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Uppskotið er hetta: «Álagt verður landsstýrinum at útvega tíðarhóskandi skip til strandfarasiglingina Suðuroy - Tórshavn.»

Hvat, ið skal verða lagt í orðið «tíðarhóskandi» í hesum sambandi, er nevndini ikki greitt. Smyril, sum rekin hesa rutu er rættiliga nýtt skip, ið siglir skjótt — tá hugsað verður um, hvussu stutt er oyggjanna millum, og halda skilamenn, at Smyril er sera gott sjóskip.

Smyril hevur loyvi at hava 175 ferðafólk á vetri, og 275 á sumri, hevur 20 koyggjur og pláss til 10 bilar.

I 1973 hevur Smyril gjørt 357 túrar Suðuroy - Havn - Havn - Suðuroy og flutt 39.343 ferðafólk tilsamans.

Hvønn túrin eru flutt (báðar vegir) í meðal 110 ferðafólk. Upptikin koyggjuplass fyri alt árið 5.241.

Bilar fluttir alt árið: 2.360, bilar pr. túr: 6,4.

Men Smyril hevur í 1973 eisini siglt millum Tórshavn og Klaksvík. Og er ferðafólkntalið bæði millum Havu og Klaksvík og millum Havn og Suðuroy 43.775.

Bilflutningurin á báðum hesum rutum fyri alt áðir er 2.100. Fluttir bilar pr. túr 5,6.

Samanliknað við Tróndu, so hevur hann gjørt 1.145 túrar, flutt 94.463 ferðafólk og 15.284 bilar.

Raksturin av Smyrli fyri 3 tey fyrstu fjórðingsárini av fíggjarárinum 1973/74 eru hesi:

Samlaðu útreiðslurnar	1.644.891,38
Samlaðu inntøkurnar	1.584.217,85
Hall:	96.673,53

Í løgmansrøðuni á ólavsoku segði løgmaður frá, at landsstýrið umhugsaði spurningin um at fáa til vega meira tíðarhóskandi før til rutusiglingina, og var her serliga hugsað um siglingina millum Suðuroy og Tórshavn. Strandferðslan liggur undir landsstýrinum, sum í løtuni arbeiðir við hesum máli, so meirilutin í nevndini setur einki uppskot fram í hesum máli. Minnilutin Andreas Djurhuus mælir til at samtykkja uppskotið.

Annars verður vist til tingmál nr. 31/1973: Viðvíkjandi siglingini millum Klaksvík og Eysturoy.

2. viðgerð 3. apríl. Uppskotið til samtyktar fall 11—0. Alt uppskotið sostatt burturfallið.

---

27. Broyting í bókføringslógini

Ár 1973, 29. november, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot til løgtingslóg um broyting í lóg fyri Føroyar um bókføring v.m.

§ 1.

Í lóg fyri Føroyar nr. 260 frá 6. mai 1921 um bókføring v.m. ganga §§ 4 og 6 út.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Forslag til lagtingslov om ændring i lov for Færøerne om bogføring m.v.

§ 1.

I lov for Færøerne nr. 260 af 6. maj 1921 om bogføring ophæves §§ 4 og 6.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eftir § 4 í bókføringslógini skulu kassabøkur, høvuðsbøkur og statusbøkur hjá teimum, sum hava bókhaldsskyldu, autoriserast av landfúgtanum ella sýslumonnunum. Aðrar handilsbøkur kunnu eisini autoriserast, um

(F.L. J. nr. 1130-1). (Ll. nr. 17/1974).

ein krevur hetta. Eftir § 6 í lógini hava væl førdar og autoriseraðar handilsbøkur eina serliga prógdygd.

Tá reglurnar um serliga prógdygd fyri autoriseraðar roknskaparbøkur ikki samsvarar við reglurnar í rættargangslógini um fría prógmeting og autoriseraðar roknskaparbøkur ikki verða nýttar í nútímans bókhaldum, verður skotið upp at avtaka nevndu lógargreinir.

Hetta vil eisini spara um óneyðugt arbeiði hjá avvarðandi myndugleikum og vinnuni.

1. viðgerð 21. januar 1974, málið beint til 2. viðg. uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 30. jan. Greinarnar og lógin samtykt at fara til 3. viðgerð við 22—0.

3. viðgerð 4. februar. Lógaruppskotið endaliga samtykt við 16—0.

---

28. Ymsar ríkislógir (om tilsyn med skibe)

Ár 1973, 29. november, var frá lógarnevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið lóg nr. 273 frá 23. mai 1973 «om ændring af lov om tilsyn med skibe» og mælir til, at lógin verður lýst at galda í Føroyum.

Skipasýnið hevur eisini mælt til, at lógin kemur at umfata føroysk skip.

Broytingin gongur út uppá, at skip uppá 500 tons ella meira skulu á báðum síðum hava bjargingarbátar, sum rúma øllum, ið eru umborð, og skulu harafturat hava bjargingarflakar samsvarandi krøvum lógarinnar.

(F.L. J. nr. 1628-1).

(Sí annars: Lov nr. 273 af 23 mai 1973, Handelsministeriets bekendtgørelse af 29. mai 1963 og Handelsministeriets bekendtgørelse af 12. juli 1973).

Málið er beint í lógarnevndina, ið er samd um at mæla tinginum til at gera hesa

T i n g s a m t y k t.

Lóg nr. 273 frá 23. mai 1973 «om ændring af lov om tilsyn med skibe» verður lýst at galda í Føroyum.

Lógarnevndin, 24. november 1973.

2. viðgerð 29. januar. Viðgerðin útsett og málið beint aftur í lógarnevndina, sum 13. januar legði fram soljóðandi

Uppískoytisálit

Í hesum máli gav lógarnevndin frá sær álit tann 24. november 1973, har mælt varð til at lýsa lóg nr. 273 frá 23. mai 1973 «Om ændring af lov om tilsyn med skibe» at galda í Føroyum.

2. viðgerð fór fram 29. januar 1974, og varð málið beint aftur í nevnd og viðgerðin útsett.

Nevndin (D. Hentze, Martin Joensen, Ove Mikkelsen, ið møtti fyri Signar Hansen, Tórálvur Olsen, ið møtti fyri Poul J. Olsen, og Trygve Samuelsen) hevur viðgjørt málið av nýggjum.

§ 4, pkt. 15, 2. stk. í lógarkunngerð nr. 336 frá 31. august 1965, sum lóg nr. 273 frá 23. mai 1972 broytir, er soljóðandi:

«Skibe på 500 tons eller derover skal på hver side have redningsbåde, der kan optage alle ombordværende, og skal desuden medføre redningsflåder, **der kan optage halvdelen af de ombordværende»**, meðan § 4, pkt 15, 2. stk. í lógini frá 23. mai 1973 er soljóðandi:

«Skibe på 500 tons eller derover skal på hver side have redningsbåde, der kan optage alle ombordværende, og skal desuden medføre redningsflåder **i den udstrækning, det foreskrives.»**

Av hesum framgongur, at tann einasta broyting, ið talan er um, er at orðingin í § 4, pkt. 15, 2. stk. í galdandi lóg «og skal desuden medføre redningsflåder, der kan optage halvdelen af de ombordværende» verður broytt soleiðis, at í staðin verður sett «og skal desuden medføre redningsflåder i den udstrækning, der foreskrives.»

Lógin frá 1965 heimilar dispensatiónsmøguleikar, og Skipasýnið hevur upplýst fyri nevndini, at nevndu reglur um bjargingarútgerð ikki eru galdandi fyri fiskiskip.

Vísandi til tað ber framførda er nevndin samd um at mæla tinginum at gera hesa

tingsamtykt

Lóg nr. 273 frá 23. mai 1973 «Om ændring av lov om tilsyn med skibe» verður lýst at galda í Føroyum.

Framhald av 2. viðgerð 15. februar. Uppskotið frá nevndini samtykt 20—0.
Málið sostatt avgreitt.

---

29. Ymsar ríkislógir (adoption)

Ár 1973, 29 november, var frá lógarnevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Í tingsetuni 1972/73 samtykti tingið at seta í gildi í Føroyum lóg nr. 279 frá 7. juni 1972 um adoptión.
Ríkisumboðsmaðurin hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 623 frá 21. december 1972 um broyting í adoptiónslógini verður lýst at galda í Føroyum.
Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið.
Broytingin stendst av, at «landsnævnet for børne- og ungdomsforsorg» nú er avloyst av «den sociale ankestyrelse».
Málið er beint í lógarnevndina, ið er samd um at mæla tinginum til at gera hesa:

(F.L. J. nr. 604-1).
(Sí annars Forslag til lov om ændring af børne- og ungdomsforsorgen og Lov nr. 623 af 21. dec. 1972).

T i n g s a m t y k t

Lóg nr. 623 frá 21. december 1972 um broyting í adoptiónslógini verður lýst at galda í Føroyum.

LÓGARNEVNDIN, 26. november 1973.

2. viðgerð 29. januar.
Uppskotið frá nevndini samtykt 18—0. Málið sostatt avgreitt.

---

30. Ymsar ríkislógir (om indfødsret)

Ár 1973, 29. november, var frá lógarnevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Ríkisumboðsmaðurin hevur í skrivi frá 9. august 1973 spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 2 frá 13. juni 1973 «om indfødsrets meddelelse», verður lýst at galda í Føroyum.

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið við viðmæli.

Málið er beint í lógarnevndina, ið er samd um at mæla tinginum til at gera hesa

T i n g s a m t y k t.

Lóg nr. 2 frá 13. juni 1973 «om indfødsrets meddelelse» verður lýst at galda í Føroyum.

Lógarnevndin, 25. november 1973.

2. viðgerð 29. januar.
Uppskotið frá nevndini samtykt við 16 -0.
Málið sostatt avgreitt.

(Sí annars lov nr. 2 af 13. juni 1973 (Lovtid. B): Lov om indfødsrets meddelelse).

---

31. Nýtt strandfaraskip til Klakksvíkar-Eysturoy

Ár 1973, 29. november, legdi Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið heitir á landsstýrið um at byggja nýtt og tíðarhóskandi skip at røkja rutusambandið Klaksvík - Eysturoy.

Viðmerkingar:

Fyri nøkrum árum síðani keypti landsstýrið eitt týskt ferðaskip sum eina roynd at røkja flutningin av ferðafólki og bilum millum Klaksvík og Eysturoynna. Royndirnar hava vist, at ferðastreymurin hendavegin er stórur og alsamt vaksandi, bæði av fólki og bilum.

Ternan er ikki tíðarhóskandi til hetta ferðasambond. Tað frættist, at landsstýrið nú ætlar at nýta nógvan pening til at umbyggja skipið og m.a. seta síðuskrúvu á tað.

Hetta er neyvan nøkur góð loysn. Skipið er og verður gamalt og ótíðarbóskandi, sjálvt um onkrar ábøtur verða gjørdar, og tað verður ikki fært fyri at røkja flutningin um fá ár.

Tað má tí mælast landsstýrinum til í staðin beinanvegin at lata eitt nýtt og meira tíðarhóskandi skip byggja.

Á Foroya Løgtingi 30.11 1973.

F. Isaksen Signar Hansen

1. viðgerð 29. januar og málið beint í liggjarnevndina sum 1. apríl legdi fram soljóðandi

Álit

Tað eru tingmennirnir Finnbogi Isaksen og Signar Hansen, sum hava lagt hetta mál fyri tingið.

(F.L. J. nr. 1800-38).

Í uppskotinum verður mælt til at heita á landsstýrið um at byggja nýtt tíðarhóskandi skip til hesa rutu.

Við fyrstu viðgerð varð málið beint í fíggjarnevndina.

Landsstýrið, ið hevur ábyrgdina av hesi rutusigling, hevur upplýst nevndini um at arbeitt verður við hesum máli, men at fyribils verður Ternan gjørd meira nýtilig, hetta arbeiði verður gjørt beint nú á Skála Skipasmiðju.

Fíggjarnevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein miuniluta og hevur kannað tørvin til at fáa størri skip til hesa sigling og kann upplýsa fylgjandi:

Talið á ferðafólkum, sum Ternuni er loyvt at taka er 116.

Talið á bilum (alt eftir støddini) 13—16.

Hægsta belegningsprosent fyri ferðafólk hevur verið í juni 25,6%.

Hægsta belegningsprosent hevur verið í august 27%.

Ternan hevur í 1973 gjørt 1062 túrar og flutt 47.619 ferðafólk. Ella í meðal 45.

Ein túrur er at skilja: Klaksvík-Fuglafjørð-Fuglafjørð-Klaksvík og gevur hetta eitt meðalbelegningsprosent uppá 19,3.

Fyri hilar er belegningsprosentið í 1973 18,8.

Lægsta meðaltal fyri ferðafólk var í oktober við 33 fyri ein dupultfúr. Meðan hægsta meðaltal var í juni við 59 ferðafólkum. Tá her er talan um dupultfúrar, verður belegningsprosentið kortini ikki hægri enn 19,3.

Oljunýtslan pr. túr við fullari ferð er 90 litrar ella 2 litrar pr. ferðafólk.

Samlaðu útreiðslurnar fyri 1973 vóru	kr. 798.615,31
Meðan inntøkurnar vóru	kr. 581.756,60
Undirskotið var soleiðis	kr. 216.858,71

Undirskotið pr. flutt ferðafólk kr. 4,18.
Undirskotið pr. túr kr. 202,00.
Bilar fluttir pr. túr 5,3.

Til samanlíkingar kann verða upplýst, at Tróndur pr. túr hevur flutt 82,5 ferðafólk og 13,3 bilar.

Sum fyrr sagt, so er strandferðslan undir landsstýrinum, sum er í ferð við at gera Ternuna meira nýtiliga til nevndu sigling og sum annars arbeiðir við ætlan um at fáa meiri tíðarhóskandi skip.

Meiriluti (J. Fr. Øregaard, Hilmar Kass, Knút Wang, Tr. Samuelsen og Andreas Djurhuus) setur til onkí uppskot fram í hesum máli, meðan

minnilutin (Finnbogi Isaksen og Hanus við Høgadalsá) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið.

FIGGJARNEVNDIN, tann 29. mars 1974.

J. Fr. Øregaard Hilmar Kass Knút Wang Tr. Samuelsen
Andreas Djurhuus Finnbogi Isaksen Hanus við Høgadalsá

2. viðgerð 3. apríl.
Uppskot til samtyktar fall 8—0.
Alt málið sostatt burturfallið.

---

32. Oljuskamtan og keyp av olju

Ár 1973, 29. november, legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um keyp av olju og bensini.

§ 1.

Heimilað verður landsstýrinum landskassans vegna at taka upp lán til keyp av olju og bensini.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om køb af olie og bensini.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til landskassens vegne at optage nødvendige lån til køb af olie og bensin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

II. uppskot til samtyktar.

Løgtingið beitir á landsstýrið um — um so er at oljuskamtanin kemur at halda fram - - at býta oljuna javnari út til húsarhaldini enn eftir nú-

galdandi skipan. Miðjað eigur at verða ímóti at skarva mest av luksusnýtslum og at býta oljuna út í mun til talið av fólkum í húsarhaldunum.

Viðmerkingar.

Tann oljuskamtan, sum arabaralondini hava sett í verk, rakar Føroyar ógvuliga meint, bæði privat húsarhald, idnað og sjóvinnu okkara.

Allar royndir eiga at verða gjørdar til tess at forða fyri, at skamtanin skaðar samfelag okkara. Stoðan er í løtuni, at tey oljufeløg, sum selja olju og bensin í Føroyum, fáa hetta úr Danmark, og skamtanin har kemur tí at ávirka okkum eisini. Tað er tó so, at olja kann fánst til keyps aðrastaðni í heiminum enn í Miðeystri, og sjálvt um hon verður dýrari at keypa í hesum londum, eigur hetta at verða roynt, tí hóast all verður tað betri í longdini at hava dýra olju á goymslu enn onga ella lítla olju at hava. Landsstýrið er so væl fyri at hava oljufangar til taks á Skálafjørðinum, og sum viðurskiftini eru í dag, má tað haldast at vera beint at nýta hesar langar til keyp av olju aðrastaðnis enn úr Miðeystri.

Út frá hesum verður sett fram uppskot til løgtingslóg um, at landsstýrinum verður heimilað at taka lán til oljukeyp.

Samstundis verður sett fram uppskot til samtyktar, sum miðjar ímóti einari rímuligari útbýting av oljuni, um so er at skamtanin kemur at halda fram. Í dag verða tey húsarhald rakt meinast, sum hava spart mest, meðan tey, ið hava havt stóra ovurnýtslu, sleppa við bert at skarva toppin av hesi ovurnýtslu burtur. Rættari hevði verið at býtt oljuna út l.d. í mun til talið av fólkum í húsarhaldunum, ella í hvussu so er at sett lágmark fyri, hvussu langt niður eitt húsarhald kann skerjast.

Á Føroya Løgtingi

1. viðgerð 5. desember.
Eftir uppskot um nevndarviðgerð og málið sostatt burturdottið.

33. Lóg um arbeiðaravernd

Ár 1973, 5. desember, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

Løgtingslóg um arbeiðaravernd.

Kapitul 1.
Lógarinnar øki.

§ 1.

Undir lógina kemur vinna í tænastu hjá arbeiðsgevara, undantikið:

1) arbeið í privathúsarhaldi hjá arbeiðsgevara,
2) arbeið, sum eittans verður avrikað av limum í húsi hjá arbeiðsgevara, sum hoyra til hansara húski, smbr. tó § 28, 1. stk. 2. pkt.
3) arbeið, sum avrikað verður av sjófólki sum ætlast kemur undir skipstænastu, undantikið inn- og uppskiping,
4) annað arbeið umborð á skipi enn inn- og uppskiping, arbeið á skipasmiðju og arbeið, sum er at meta ájavnt,
5) fiskivinnuna og veiða og
6) luftfartstænasta.

Stk. 2. Landsstýrið kann fyriseta í hvønn mun vinnuligt arbeið, sum arbeiðsgevari letur inn hjá arbeiðara heinna við hús, skal koma undir lógina, smbr. § 2.

§ 2.

Fylgjandi reglur koma tó í nýtslu, hóast tænastuviðurskiftir

(F. L. j. nr. 1305-12-1)

lagtingslov om arbejderbeskyttelse

Kapitel 1.
Lovens område.

§ 1.

Loven omfatter beskæftigelse i en arbejdsgivers tjeneste, bortset fra:

1) arbejde i en arbejdsgivers private husholdning,
2) arbejde, der udelukkende udføres af medlemmer af arbejdsgivers familie, som hører til hans husstand, jfr. dog § 28, stk. 1, 2. pkt.
3) arbejde, der udføres af søfolk, og som må henføres til skibstjeneste, bortset fra lastning og losning,
4) andet arbejde om bord i skibe end lastning og losning, værftsarbejde og arbejde, der må ligestilles hermed,
5) fiskeri og jagt og
6) luftfartstjeneste.

Stk. 2. Landsstyret kan fastsætte i hvilket omfang loven finder anvendelse på erhvervsmæssigt arbejde, som arbejdsgiver lader udføre i arbejders hjem, jfr. § 2.

§ 2.

Følgende bestemmelser finder dog anvendelse, selv om tjeneste-

eru ongi, og haraftrat í førum, sum koma undir § 1, stk. 1, nr. 1-2 og stk. 2: §§ 8-13, reglur um maskinu, verkílat við sjóði ella luftevnum undir trýsti og onnur vandamikil íløt og hjálparevnir.

§ 14, vandi fyri at detta saman, fara av grund, detta niður, skriðsnið av jørð ella gróti v.m.,
§ 15, joniserandi geisling,
§ 17, fyribyrging av serstøkum vandamomentum, og
§ 18, reglur um skyldur hjá leverandøri o.ø.
Stk. 2. Um so er, at nevndu reglur skulu koma í nýtslu eftir stk. 1 gilda eisini reglurnar í §§ 3-7 og haraftrat kap. 5 og 6 í tann mun, tær eftir sínum innihaldi kunnu koma í nýtslu.

Kapitul 2.
Ábyrgd av at lógin verður hildin

§ 3.

Arbeiðsgevarin hevur ábyrgdina av, at tær skyldurnar, sum eftir hesi lógini liggja á honum eru hildnar.

Stk. 2. Arbeiðsgevarin kann tó í størri virkjum — og undir serstakum umstøðum í smærri virkjum við geva virkislejðara ella øðrum álítandi og nóg kønum eftirlitsmanni upp í hendi at røkja hesar skyldur og ábyrgdina av at tær verða hildnar, men fyri at arbeiðsgevarin sjálvur skal sleppa undan ábyrgdini, er tað tó ein treyt, at tað týðiliga er gjørt viðkomandi vart við innan hvørji rúm ella virkisøki og í hvønn mun ábyrgdin av, at skyldurnar hjá arbeiðsgevaranum eftir hesi lógini

forholdene ikke foreligger, samt i de tilfælde, der er omfattet af § 1, stk. 1, nr. 1-2 og stk. 2: §§ 8-13, bestemmelser om maskineri, beholdere med dampe eller luftarter under tryk og andre farlige beholdere og hjælpemidler.
§ 14, fare for sammenstyrtning, omstyrtning, nedstyrtning, skred af jord eller sten m.v.,
§ 15, ioniserende stråling,
§ 17, imødegåelse af særlige faremomenter og
§ 18, bestemmelser om leverandørers m.fl.s. forpligtelser,
Stk. 2. Hvis de nævnte bestemmelser skal anvendes efter stk. 1, gælder tillige §§ 3-7 samt kap. 5 og 6 i det omfang, de efter deres indhold kan anvendes.

Kapitel 2.
Ansvaret for, at loven overholdes

§ 3.

Arbejdsgiveren har ansvar for overholdelsen af de pligter, der påhviler ham efter denne lov.

Stk. 2. Arbejdsgiveren kan dog ved større omstændigheder også ved mindre bedrifter — overføre varetagelsen af disse pligter og ansvaret for deres overholdelse til driftslederen eller andre pålidelige og tilstrækkelig kvalificerede tilsynsførende, men for at arbejdsgiveren herigennem selv skal kunne blive fri for ansvaret, er det dog en betingelse, at det på tydelig måde er tilkendegivet de pågældende, inden for hvilke lokaler eller faglige områder og i hvilket omfang ansvaret for overholdelsen af arbejdsgiverens plig-

ern hildnar, er givin teim upp í hendi, og at arbeiðsgevarin hevur eftir viðurskiftunum rimuligt eftirlit við, at viðkomandi virkisleiðari ella eftirlitsmaður rokja starvið sum tað eigur og skal.

Stk. 3. Hevur virkisleiðari ella eftirlit gjørt beint eftir boðum frá arbeiðsgevara ella øðrum sum situr fyri, er arbeiðsgevarin einsamallur um ábyrgdina.

Stk. 4. Tann, sum hevur til arbeiðis burturav ella yvirhøvur arbeiðsgevara vegna at leiða ella hava eftirlit við arbeiðnum í einum virki ella parti av tílíkum hevur ábyrgdina fyri at lógarreglurnar verða hildnar, um so er at tað skyldast hansara eftirlæti, smbr. § 6, at lógin er ikki hildin.

§ 4.

Har, sum tað er serstakliga fyrisett í lógini ella í forskriftum, givnar eftir henni, kunnu arbeiðarar koma undir ábyrgd, smbr. § 7 og § 21, stk. 3.

Stk. 2. Har tað serstakliga er fyrisett í kap. 3 í lógini ella í forskriftum, sum givnar eru eftir kap. 3, kunnu eisini onnur koma undir ábyrgd, sum útleigarar av rúmum, brúkarar, seljarar, leverandørar, innleggjarar ella umvælarar av tekniskum hjálparevnum.

ter efter denne lov er overført til dem, og at arbejdsgiveren fører det efter forholdene rimelige tilsyn med, at vedkommende driftsleder eller tilsynsførende varetager hvervet på tilbørlig måde.

Stk. 3. Har en driftsleder eller tilsynsførende handlet efter udtrykkelig ordre fra arbejdsgiveren eller en anden foresat, bliver denne alene ansvarlig.

Stk. 4. Den, hvis arbejde udelukkende eller i det væsentlige består i på arbejdsgiverens vegne at lede eller føre tilsyn med arbejdet i en virksomhed eller en del deraf, har ansvar for overholdelsen af lovens bestemmelser, såfremt det skyldes hans forsømmelse, jfr. § 6, at loven ikke er overholdt.

§ 4.

Hvor det særligt er bestemt i loven eller i forskrifter, der udstedes i henhold til loven kan ansvar også gøres gældende over for arbejdere, jfr. § 7 og §21, stk. 3.

Stk. 2. Hvor det særlig er bestemt i lovens kap. 3 eller i forskrifter, der udstedes i henhold til kap. 3, kan ansvar ligeledes gøres gældende over for andre, såsom udlejere af lokaler, brugere, sælgere, leverandører, opstillere eller reparatører af tekniske hjælpemidler.

Kapitul 3.
Tilgerð av tekniskum hjálparevnum og arbeiðsstøðum m.v.

A. Almenner reglur.

§ 5.

Arbeiðsgevari skal undir tilgerð av arbeiðsstað og framleiðsluevnum og haraftrat fyrisíling av virkisgongd ansa eftir, at arbeiðararnir eru nóg væl vardir fyri vanlukku og heilsuvanda. Hann skal í leiðheining og gjølla eftirliti vissa sær, at arbeiði verður gjørt forsvarliga í mun til skaða- og heilsuvandan.

Stk. 2. Arbeiðsgevari skal so gjølla sum yvirhøvur gjørligt ansa eftir, at arbeiðarum er gjørt vart við heilsu- og skaðavanda, sum kunnu standast av arbeiðnum og haraftrat tey tiltøk, sum mugu havast í huga at sleppa undan hesum vanda. Hetta skal serstakliga havast í huga yvirfyri arbeiðarum sum eru nýggir í starvinum, lærlingum og ungum arbeiðarum, sum so mikið sum neyðugt skulu venjast í nýtsluni av nevndu tiltøkum.

§ 6.

Tann, sum hevur til arbeiðis eittans ella yvirhøvur arbeiðsgevara vegna at leiða ella hava eftirlit við arbeiðnum í einum virki ella parti av tílíkum, skal gera sítt til, at reglurnar í hesi lóg og í teim forskriftum, sum givnar eru eftir henni verða hildnar. Hann skal verða fyrivarin viðvíkjandi skaða- og heilsuvanda innan virkisøkið, sum hann hevur leiðsluna av. Fær hann at vita av feili ella lýti, sum

Kapitel 3.
Indretning af tekniske hjælpemidler og arbejdssteder m.v.

A. Fælles bestemmelser.

§ 5.

Arbejdsgiver skal ved indretning af arbejdssted og produktionsmidler samt ved tilrettelægning af arbejdsprocesser sørge for, at arbejderne er tilbørligt værnet mod ulykkestilfælde og sundhedsskadelig påvirkning. Han skal ved instruktion og rimelig tilsyn sikre, at arbejdet udføres på forsvarlig måde under hensyn til ulykkes- og sundhedsrisikoen.

Stk. 2. Arbejdsgiveren skal i videst muligt omfang sørge for, at arbejderne er gjort bekendt med de sygdoms- og ulykkesfarer, der eventuelt er forbundet med deres arbejde, samt med de forholdsregler, der må iagttages for at undgå disse farer. Dette skal særligt iagttages over for nyantagne arbejdere, lærlinge og unge arbejdere, der i fornødent omfang skal indøves i anvendelsen af de nævnte forholdsregler.

§ 6.

Den, hvis arbejde udelukkende eller i det væsentlige består i på arbejdsgiverens vegne at lede eller føre tilsyn med arbejdet i en virksomhed eller en del deraf, skal medvirke til, at bestemmelserne i denne lov og de i medfør heraf udstedte forskrifter overholdes. Han skal være opmærksom på ulykkes- og sundhedsfare inden for det arbejdsområde, som han leder. Bliver han bekendt med fejl

kunnu hava við sær vanda fyri vanlukku ella heilsubrek, skal hann stíla fyri at hjálpt verður uppá tey, og kann tað ikki gerast av hansara ávum uppá standandi fót, skal hann beinanvegin siga arbeiðsgevaranum frá teim feilunum ella lýtunum, sum komið er framá.

§ 7.

Arbeiðararnir skulu gera sítt til, at tiltøk, sum eftir hesi lóg ella eftir forskriftum, sum gjørdar eru eftir henni fyri at verja teir fyri skaðatilburði ella vanlukku, royndast eftir ætlan og skulu teir yvirhøvur ansa sær og hava skil á arbeiðsstaðnum.

Stk. 2. Arbeiðarar skulu ansa eftir, um amboð, reiðskapur, væl og maskinútgerð er í lagi, og hann skal, um so ikki er, og hann sjálvur kann ikki gera nakað við tað, beinanvegin siga honum frá sum situr fyri.

Stk. 3. Kemur arbeiðari fyri skaða undir arbeið, skal hann beinanvegin siga honum frá sum situr fyri, og hann má ikki fara undir aftur arbeið, fyrrenn tað er gjørt sum neyðugt er fyri skaðanum.

B. Fyribyrging av vanlukku- og heilsuskaða.

§ 8.

Maskinur skulu vera álitandi gjørdar og soleiðis útgjørdar, uppsettar og festar, at nýtslan hevur so lítlan vanda við sær sum í royndum gjørligt. Tær skulu um

eller mangler, der kan medføre fare for ulykkestilfælde eller sundhedsskadelig påvirkning, skal han sørge for, at disse afhjælpes, og kan dette ikke ske ved hans indgriben på stedet, skal han straks gøre arbejdsgiveren bekendt med de konstaterede fejl eller mangler.

§ 7.

Arbejderne skal medvirke til, at de foranstaltninger, der efter denne lov eller de i medfør heraf gældende forskrifter er truffet for at sikre dem mod skadelige påvirkninger eller ulykker, virker efter deres bestemmelse, og de skal i det hele iagttage forsigtighed og orden på arbejdsstedet.

Stk. 2. Arbejderne skal have deres opmærksomhed henvendt på, om værktøj, redskaber, apparater og maskinelle indretninger er i orden, og han skal såfremt dette ikke er tilfældet, og han ikke selv kan rette manglen, straks meddele det til sin foresatte.

Stk. 3. Kommer en arbejder til skade under arbejdet, skal han snarest muligt anmelde det til sin foresatte, og han må ikke genoptage arbejdet, forinden der er foretaget det fornødne over for beskadigelsen.

B. Forebyggelse af ulykkestilfælde og sundhedsskader.

§ 8.

Maskineri skal være solidt konstrueret og således indrettet, opstillet og befæstet, at anvendelsen frembyder så ringe fare som praktisk muligt. Det skal om fornødent

neyðugt vera útgjørdar við forsvarligum verndarhjutum, sum við útvegan av maskinum so vítt gjørligt skulu gangga ímillum sum liður í gerð av maskinuni.

Stk. 2. Tá ið tað av tryggleiksgrundum er serstakliga krevt, kann maskin- og arbeiðseftirlitið áleggja, at nummandi tiltøk verða framd, sum byrgja fyri, at maskinur kunnu vera í gongd, uttan at tryggleikshjutirnir, sum tørva eru í lagi.

Stk. 3. Tryggleikshjutir mugu ikki takast burtur, meðan maskinan er í gongd.

Stk. 4. Í rúmi, sum maskinur eru skulu ræsir vera so breiðar og høgar, at ferðslan trygt kann fara fram. Ommur glopp millum maskinur skulu, har tað krevst, vera byrgd so leingi maskinurnar eru í gongd.

Stk. 5. Tá ið maskinur eru í gongd mugu reinar o.l. bert vera lagdar á og drívverk og maskinur bert reinsaðar, smurdar og eftirhugdar, um tað ikki slepst undan hesum og tá bert við serligum fyriliti harundir at viðkomandi arbeiðari er so ílatin, at tað økir ikki vandan av arbeiðnum. Persónar undir 18 ár mugu ikki nýtast til tílíkt arbeiði.

Stk. 6. Tá ið umvælingar o.l. gera tað neyðugt, at arbeið má gerast bráfongis í nánd av vandamikhum maskinverki, skal tað steðgast og

være forsynet med forsvarlige sikringsdele, der ved nyanskaffelse af maskiner så vidt muligt indgå som led i konstruktionen af maskinen.

Stk. 2. Hvor hensynet til sikkerhed gør det særlig påkrævet, kan maskin- og arbejdstilsynet påbyde, at der træffes effektive foranstaltninger, der hindrer, at maskineriet kan være i gang uden at de fornødne sikringsdele fungerer.

Stk. 3. Sikringsdele må ikke være fjernet under maskineriets gang.

Stk. 4. Færdselsgange i rum, hvor maskiner findes, skal være så brede og høje, at færdslen kan finde sted under betryggende forhold. Andre mellemrum mellem maskiner skal, hvor det er påkrævet, være betryggende afspærret, sålænge maskinerne er i gang.

Stk. 5. Under maskineriets gang må pålægning af remme o. lign. rensning, smøring og eftersyn af drivværk og maskiner kun foretages, når det er uomgængeligt nødvendig, og da kun under iagttagelse af særlig forsigtighed, derunder at vedkommende arbejder ikke er iført klæder, der forøger faren ved arbejdet. Personer under 18 år må ikke anvendes til dette arbejde.

Stk. 6. Når reparationer el. lign. nødvendiggør, at der midlertidigt må arbejdes i nærheden af farligt maskineri, skal dette holdes stand-

nóg væl tryggjað, at tað fer ikki aftur í gongd tá tíð arbeiðið tekur.

sat og være tilbørligt sikret med igangsætning, så længe arbejdet står på.

Stk. 7. Tá ið rundsag og aðrar arbeiðsmaskinur, har tað kemst at rørligum lutum, eru settar upp úti, mugu tær ikki nýtast í veðri, sum munandi økir vandan av arbeiðnum. Handskar o.t. mugu ikki nýtast, tá ið teir hava við sær vanda fyri arbeiðaran undir arbeiðnum við maskinuni.

Stk. 7. Når rundsave og andre arbejdsmaskiner med hvilke den betjenende person kan komme i berøring med det arbejdende organ, er opstillet i det fri, må de ikke benyttes under vejrlig, der væsentligt forøger faren ved arbejdet. Handsker og lign. må ikke benyttes, når de rummer fare for arbejdet under betjeningen af maskinen.

Stk. 8. Tá ið arbeið vil hava við sær óljóð ella rysting í tílíkan mun, at tað nervar og ørkymlar arbeiðararnar skaðiliga, skulu tílík tiltøk gerast afturímóti, sum bíligt kann krevjast.

Stk. 8. Hvor arbejdet vil medføre støj eller rystelse af en sådan styrke, at arbejderne påvirkes skadeligt eller udsættes for gene, skal der herimod træffes sådanne foranstaltninger, som med rimelighed kan kræves.

§ 9.

Kraftmaskinur skulu vandaleyst kunna setast á gongd við vanligum fyrivarni.

§ 9.

Kraftmaskiner skal farefrit kunne sættes i gang under iagttagelse af almindelig forsigtighed.

§ 10.

Arbeiðsmaskinur skulu kunna steðgast skjótt og vandaleyst frá sjálvum arbeiðsstaðnum, uttan so maskin- og arbeiðseftirlitið heldur tað ikki tørva.

§ 10.

Arbejdsmaskiner skal kunne standses hurtigt og farefrit fra selve arbejdspladsen, medmindre maskin- og arbejdstilsynet skønner det unødvendigt.

Stk. 2. Arbeiðsmaskinur skulu hava bremsuvæl, tá ið tað hevur týdning sum verndartiltak.

Stk. 2. Arbejdsmaskiner skal, hvor det har sikkerhedsmæssig betydning, være forsynet med bremseanordning.

Stk. 3. Arbeiðsmaskinur við vandamiklum amboðum, sum eru ikki sjálvvirkandi skermd undir tómgongd, mugu bert kunna setast á gongd frá sjálvum arbeiðsstað-

Stk. 3. Arbejdsmaskiner med farlige værktøjsorganer, der ikke automatisk er afskærmede under maskinernes tomgang, må kun kunne sættes i gang fra selve ar-

num ella frá staði, sum gevur fult yvirlit yvir maskinverkið.

§ 11.

Íløt sum innihalda damp ella luftlevnir undir trýsti ella veskur, sum eru hitaðar uppum kókipunktið við atmosferiskum trýsti skulu vera ivaleysa sterk og soleiðis tilgjørd, sett upp og passað, at tað hevur so lítlan vanda við sær sum í royndum gjørligt. Serstakliga skulu tey vera nóg væl tryggjað fyri trýststig.

§ 12.

Íløt við heitum færandi ella á annan hátt vandaeinkum evnum skulu vera soleiðis tilgjørd ella tryggjað, at tey hava so lítlan vanda við sær sum í royndum gjørligt. Flutningur, umstoyting og tøming av slíkum evnum skal fara fram so vandaleyst sum gjørligt, um neyðugt við nýtslu av hóskandi hjálpiamboðum.

§ 13.

Til flutning, tá ið vekt og formur ger tað neyðugt og tað er í royndum gjørligt, skulu serlig hjálpiamboð nýtast — sum lyftir, kranar, tippvognar, trucks, prámar, sliskur og trilluhørur — av haldgóðari og hóskandi tilgerð at verja arbeiðararnar fyri vanlukku og heilsuvanda ella deformerandi skaða.

Stk. 2. Viðvikjandi lyftum, krantum, heingibanum, trucks og líkum flutningsamboðum skal serstakliga havast í huga,

bejdspladsen eller fra et sted, hvor der er fuldt overblik over maskineriet.

§ 11.

Beholdere, der indeholder dampe eller luftarter under tryk eller væsker, der er opvarmet over kogepunktet ved atmosfærens tryk skal have den fornødne styrke og være således indrettet, opstillet og passet, at de frembyder så ringe fare som praktisk muligt. Navnlig skal de være tilbørligt sikret imod farlig trykstigning.

§ 12.

Beholdere med hede ætsende eller på anden måde farlige stoffer skal være således indrettet eller sikret, at de frembyder så ringe fare som praktisk muligt. Transpart, omhældning og aftapning af sådanne stoffer skal ske så farefrit som muligt, om fornødent ved anvendelse af hensigtsmæssige hjælpemidler.

§ 13.

Ved al transport skal der, når godsets vægt eller form gør det påkrævet, og det er praktisk muligt, anvendes særlige hjælpemidler — såsom hejseværker, kraner, tipvogne, trucks, pramme, slidsker og transportbøre - af solid og hensigtsmæssig konstruktion for at værne arbejderne imod ulykker og sundhedsmæssige eller deformerede skader.

Stk. 2. Ved hejseværker, kraner, hængebaner, trucks og lignende transportmidler skal der særlig iagttages.

1) at alt, sum bera skal (útleggjarar, tog, keta v.m.) hevur tørvandi styrki og verður bildið forsvarliga,
2) at tey verða ikki ovbyrjað, og
) at byrðan verður fest og loyst forsvarligu at byrgja fyri, at byrðan undir flutningi kemur fólki í vanda.

§ 14.

Tá ið vandi er fyri at byggiverk, skorsteinar, brýr, tangar o.t. detta saman, fara av grund ella detta niður ella fyri skriðsni av jørð og grøti ella upplaðaðum tilfari o.t. skulu tørvandi tiltøk gerast.

Stk. 2. Undir arbeið í hrunnum, brotum, námum, bergholum, rørleiðingum, ketlum, tongum o.t. og undir arbeið við eitri, brestandi ella á annan hátt vandamiklum evnum, skulu tílík tørvandi tiltøk gerast at fyribyrgja vanlukku, so sum at kvalast, eitring ella spreinging.

§ 15.

Sum vernd fyri vanlukku- og heilsuvanda hjá arbeiðandi sum í starvi sínum eru útsett fyri joniserandi geisling skulu tørvandi tiltøk gerast og dyggiliga.

Stk. 2. Mót ráði frá sakkønum lækna má ongin fara til arbeiðis ella halda fram í arbeið sum vit kunna útseta hann fyri joniserandi geisling.

1) at alle bærende dele (udlæggere, tove, kæder m.v.) har den fornødne styrke og holdes i forsvarlig stand,
2) at overbelastning ikke finder sted, og
3) at byrden befæstes og frigøres på forsvarlig måde for herved at forhindre, at byrderne under transporten udsætter mennesker for fare.

§ 14.

I tilfælde af fare for sammenstyrtning eller omstyrtning af bygninger, skorstene, broer, beholdere o. lign. eller for nedstyrtning eller skred af jord eller sten, opstablede materialer o. lign. skal der træffes fornødne foranstaltninger.

Stk. 2. Under arbejde i brønde, gruber, miner, tunneller, rørledninger, kedler, beholdere o. lign. ligesom under arbejde med giftige, eksplosive eller på anden måde farlige stoffer, skal der være truffet de fornødne foranstaltninger til forebyggelse af ulykker så som kvælning, forgiftning eller eksplosion.

§ 15.

Ved arbejde, der udsætter de beskæftigede for ioniserende stråling, skal der træffes fornødne foranstaltninger til at sikre en effektiv beskyttelse mod ulykkes- og sundhedsfarer.

Stk. 2. Ingen må i strid med en sagkyndig læges råd beskæftiges eller vedblive at være beskæftiget ved arbejde, der vil kunne udsætte ham for ioniserende stråling.

§ 16.

Byggiverk, verklig tilgerð og teknisk yrkisevnir sum koma undir lógina, skulu vera gjørd forsvarliga og haraftrat nýtt og umsitin forsvarliga. Góðtiknir normar og standardar, sum hava týdning fyri trygdina, skulu vera hildnir, tá ið nýgerð er sett í verk og nýtt útvegað. Tá ið viðurskiftini geva grundir til, skal arbeiðsgevari stíla fyri kanningum, royndum ella sýn av serstakliga sakkønnum til tess at vissa seg um forsvarligt verk.

Stk. 2. Byggi- og vinnulig verk skulu hava ræsir, trappur og útdyr, sum tryggja arbeiðaraenar forsvarliga undir eldi ella øðrum vandamiklum viðurskiftum.

Vandamikil brot, griffir o.l. skulu girðast ella leggjast til. Berghol, námsræsir o.l. skulu vera forsvarliga gjørd og umsitin. Gólv skulu vera so hildin, at vandi fyri at ætta er fyribyrgdur, og at flutningur av tilfari ella lidnum vørum skal kunna fara fram uttan vanda. Lýsi skal vera nóg mikið og hóskandi, tá hugsað verður um vanlukkuvandan.

Stk. 3. Tiltøk til vernd fyri vanlukku vera hóskilig og sett sum tey eiga og haraftrat forsvarliga hildin.

§ 16.

Bygningsværker, bedriftsindretninger og tekniske hjælpemidler, der omfattes af loven, skal være udført forsvarligt samt benyttes og vedligeholdes på forsvarlig måde. Anerkendte normer eller standarder, der har sikkerhedsmæssig betydning, skal være opfyldt ved nyanlæg og nyanskaffelser. Hvor forholdene giver anledning dertil, skal arbejdsgivere for at konstatere forsvarligheden lade foretage undersøttelser, prøver eller besigtigelse ved særligt sagkyndige.

Stk. 2. Bygninger og bedriftsanlæg skal være forsynet med færdselsveje, trapper og udgange, der tilbørlig sikrer arbejderne under brand eller andre farefulde forhold.

Farlige gruber, fordybninger o. lign. skal indhegnes eller dækker. Tunneller, minegange o. lign. skal være forsvarligt udført og vedligeholdt. Gulve skal holdes i en sådan stand, at fare for fald er tilbørlig afværget, og at transport af materialer eller færdige produkter kan ske uden fare. Belysningen skal være tilstrækkelig og hensigtsmæssig under hensyn til ulykkesfaren.

Stk. 3. Indretninger til værn mod ulykkesfarer skal være hensigtsmæssige og anbragt på rigtig måde samt være forsvarligt vedligeholdt.

17.

Landsstýrið kann:

1) fyriseta gjøllari forskriftir um tilgerð, uppseting, tilmelding

§ 17.

Landsstyret kan:

1) udfærdige nærmere forskrifter for indretning, opstilling,

og nýtslu og haraftrat roynd-
ir av serstakliga vandamikl-
um tekniskum yrkisevnum
(maskinum, ketlum, langum,
kranum, vælum, lyftum o.s.fr.)
og gerð av serstakliga vanda-
miklum evnum (t.d. fýrverki)
og haraftrat arbeiðsgongd,
sum hevur í sær hættisligan
spreingi-, elds- og heilsuvanda,

2) treyta, at persónar, sum passa
tílík yrkisevnir, skulu hava
fingið nærri tilskilaða læru,
møguliga tikið roynd og har-
aftrat møguliga kommir til til-
skilaðan aldur,
3) seta forboð fyri nýtsluni av tí-
likum yrkisevnum, um so er,
at vandin av teimum ikki er
nóg væl fyribyrgdur í for-
skriftum eftir nr. 1 og 2,
4) treyta, at persónar, sum av-
rika innlegging av elektrisiteti,
fløskugassi o.t. skulu hava
fingið nærri tilskilað læru og
hava tikið roynd,

5) seta forboð fyri nýtshmi av
yvirhøvur serstakliga vanda-
miklum arbeiðslag,
6) treyta, at persónar, sum í gerð
av serstakliga vandamiklum
tekniskum yrkisevnum avrika
arbeið, sum í sini dygd eru av
stórum týdningi, tá ið tað ræð-
ur um tryggleika, men sum ber
ikki til at meta í sýni av lidn-
um verki, skulu hava fingið
nærri tilskilaða læru og mogu-
ligan tikið roynd.

anmeldelse og benyttelse samt
afprøvning af særlig farlige
tekniske hjælpemidler (ma-
skiner, kedler, beholdere, kra-
ner, apparater, elevatorer o.s.
v.) og om fremstilling af sær-
lig farlige produkter (f. eks.
fyrværkerisager) samt arbejds-
processer, der rummer alvor-
lige eksplosions-, brand- eller
sundhedsfarer,
2) påbyde, at personer, der passer
sådanne hjælpemidler, skal have
gennemgået en nærmere an-
givet uddannelse, eventuelt af-
lagt en prøve samt eventuelt
opnå en bestemt alder,
3) forbyde anvendelsen af disse
hjælpemidler, for så vidt fa-
ren fra dem ikke tilstrækkeligt
kan imødegås ved forskrifter
efter nr. 1 og 2,
4) påbyde, at personer, der fore-
tager installation af elektrici-
tet, flaskegas o.lign. skal have
gennemgået en nærmere angi-
vet uddannelse og have aflagt
en prøve,
5) forbyde anvendelsen af gan-
ske særlig farlige arbejdsme-
toder,
6) påbyde, at personer, der ved
fremstilling af særlig farlige
tekniske hjælpemidler udfører
arbejder, hvis kvalitet er af
særlig stor betydning i sikker-
hedsmæssig henseende, men
ikke lader sig bedømme ved en
besigtigelse af det færdige ar-
bejde, skal have gennemgået
en nærmere angivet uddanmel-
se og eventuelt aflagt en prø-
ve.

Stk. 2. Landsstýrið kann innan fyri nærri tilskilað økir heimila maskin- og arbeiðseftirlitinum at fyriseta tær í stk. 1 tilskilaðu forskriftir, treytir v.m.

§ 18.

Hvørki leverandørur, seljari ella útleigari má lata út til brúks ella stilla út til sølu, leigu ella sum reklamu maskinur, maskinlutir ella onnur teknisk yrkisevnir, sum forboð er sett fyri at hava til brúks eftir § 17, stk. 1, nr. 3.

Stk. 2. Tann, sum ger ella selur maskinur, reiðskap ella onnur teknisk yrkisevnir, eins og tann, sum leigar út ella lænir út tílíka tilgerð skal ansa eftir, at tilgerðin, tá ið hon verður latin út til brúks ella at stilla út til sølu, leigu ella sum reklama, hevur tørvandi tryggleikasáttgerð og eisini annars gevur haldgóða trygd móti heilsuvanda og vanlukku og harafturat skulu forskriftir fylgja við, sum tørva til nýtslu og passing.

Stk. 3. Um onkur í egnum virki avrikar innlegging av eini tilgerð sum tilskilað í stk. 2 ella vælir um tílíka, skal hann ansa eftir, at fyriskett tryggleikstiltøk eru sett upp, og at forskriftir sum galda í tílíkum føri eru hildnar.

Stk. 4. Einhvør maskina, sum nýtt verður ella sett út til sølu,

Stk. 2. Landsstyret kan inden for nærmere afgrænsede områder bemyndige maskin- og arbejdstilsynet til at udstede de i stk. 1 omhandlede forskrifter og påbud m.v.

§ 18.

Ingen leverandør, sælger eller udlejer må udlevere til brug eller udstille til salg, leje eller i reklameøjemed maskiner, maskindele, apparater eller andre tekniske hjælpemidler, mod hvis brug der er nedlagt forbud efter § 17, stk. 1, nr. 3.

Stk. 2. Den, der fremstiller eller sælger maskiner, redskaber eller anden teknisk anordning, ligesom den, der udlejer eller udlåner sådan anordning til brug skal påse, at anordningen, når den udleveres for at tages i brug eller udstilles til salg, leje eller i reklameøjemed, er forsynet med nødvendige beskyttelsesanordninger og også iøvrigt frembyder betryggende sikkerhed med sundhedsfare og ulykkestilfælde, og skal endvidere udlevere de forskrifter, der er nødvendige for anordningens anvendelse og pasning.

Stk. 3. Hvis nogen som selvstændig virksomhed udfører installation af en anordning, som omhandles i stk. 2, eller reparerer en sådan anordning, skal han påse, at foreskrevne beskyttelsesanordninger opsættes, og at de for installationen i øvrigt gældende forskrifter iagttages.

Stk. 4. Enhver maskine, der anvendes eller udstilles til salg, leje

leigu ella sum reklama skal hava skelti, sum tilskilar navn og bústað hjá fabrikanti og harafturat, tá ið tað er innflutt maskina, eisini navn og bústað hjá innflytaranum.

Stk. 5. Omanfyri standandi reglur undantaka ikki brúkarin frá ábyrgd, sum annars áliggur honum eftir lógini ella forskriftum, sum givnar eru eftir lógini.

C. Heilsu- og vælfarstiltøk á arbeiðsstaðnum.

§ 19.

Virki, sum hevur fast arbeiðsstað í rúmum, sum bygd eru eftir at lógin er komin í gildi, kemur undir fylgjandi reglur:

1) **Lofthædd.** Arbeiðsrúm skulu vera minst 2,5 m millum loft og gólv. Í arbeiðsrúmum, har sterkur hitavøkstur birtist fuktur, støv, osi, roykur o.t. ella eitrandi ella eksplosiv luftevnir kveikjast skal hæddin vera minst 3 m millum loft og gólv. Landsstýrið kann fyriseta, at tað sama skal galda í virki, har serstøk heilsulig viðurskifti gera seg galdandi.

2) **Luftrúm.** Arbeiðsrúm skulu hava luftrúm uppá 12 m³ fyri hvønn sum hevur arbeið í rúminum. Har effektiv tiltøk eru gjørd til luftendurnýgging, kann luftrúmið sum kravt er minkast, tó ikki undir 8 m³. Tá ið onnur enn tey, sum hava arbeið koma inn í rúmini, t.d. í rúmum, sum uppá seg nógv viðskiftafólk leitar inn, kann

eller i reklameøjemed, skal være forsynet med et skilt, der angiver fabrikantens navn og adresse samt ved importerede maskiner tillige importørens navn og adresse.

Stk. 5. Foranstående bestemmelser fritager ikke brugeren for det ansvar, der iøvrigt påhviler ham efter loven eller forskrifter, der er udstedt i henhold til loven.

C. Sundheds- og velfærdsforanstaltninger på arbejdsstedet.

§ 19

For virksomheder, der foregår på fast arbejdssted i lokaler, der er opført efter lovens ikrafttræden, gælder følgende bestemmelser:

1) **Lofthøjde.** Arbejdsrum skal have en loftshøjde af mindst 2,5 m. I arbejdslokaler, hvor der foregår en stærk udvikling af hede, fugtighed, støv, os, røg, stank o.lign. eller fremkommer giftige eller eksplosive luftarter skal loftshøjden være mindst 3 m. Landsstyret kan bestemme, at det samme skal gælde i virksomheder, hvor særlige sundhedsmæssige hensyn gør sig gældende.

2) **Luftrum.** Arbejdsrum skal indeholde et luftrum af mindst 12 m³ for hver i rummet beskæftiget arbejder. Hvor der er truffet effektive foranstaltninger med hensyn til luftfornyelse, kan det krævede luftrum nedsættes, dog ikke under 8 m³. Hvor andre end de beskæftigede opholder sig i lokalerne, f. eks. i lokaler med be-

maskin- og arbeiðseftirlitið freyta eina uppá seg øking. Tá ið luftrúm skal metast, koma hæddir omanfyri 4 m ikki uppí.

3) **Gólv.** Gólvið í arbeiðsrúminum skal hóska eftir arbeiðinum og skal vera nóg tætt og varmadygt. Tað má ikki liggja lægri enn 1 m undir jarðarmuninum, uttan so serstøk tiltøk eru gjørd, so arbeiðsrúmið eftir meting av eftirlitinum ringast ikki av at liggja tað lægri. Serstøk tiltøk skulu gerast at typpa fyri, at fuktur undan grundini setur upp gjøgnum gólv og vegg. Gólv og veggur skulu falla væl.

4) **Tak, veggir og loft** í arbeiðsrúmum skulu vera nóg tøtt og varmadygg.

5) **Lýsi.** Ljósviðurskiftini skulu vera so skipað, at arbeiðið kann avrikast uttan at nerva sjónina hjá arbeiðarunum illa. Er tað ikki virkinum til avgerandi tarn í rakstrinum, skulu rúm, sum alsamt eru nýtt til arbeiðis, hava dóg mikið dagslýsi. Kunstugt ljós skal vera av hóskandi slag og styrki og so skipað, at tað blindar ikki ov mikið glámlýsi.

6) **Tilhalds- og matrúm.** Arbeiðarnir skulu hava til hendа hóskandi rúm at fáa sær í og

tydelig tilgang af kunder, kan maskin- og arbejdstilsynet påbyde en forholdsmæssig forhøjelse. Ved beregning af luftrummet kommer højder over 4 m ikke i betragtning.

3) **Gulve.** Arbejdsrummets gulv skal være af en efter arbejdets art passende beskaffenhed, og skal yde fornøden tæthed og varmeisolation. Det må ikke ligge lavere end 1 m under terrænet, medmindre der er truffet sådanne foranstaltninger, at en lavere beliggenhed efter tilsynets skøn må anses for ikke at forringe arbejdslokalet. Der skal træffes foranstaltninger til at modvirke fugtighed fra grunden trænger ind gennem gulv og væg. Gulv og væg skal slutte tæt til hinanden.

4) **Tag, vægge og lofter** i arbejdsrum skal yde fornøden tæthed og varmeisolation.

5) **Belysning.** Belysningsforholdene skal være således ordnet, at arbejdet kan udføres, uden at arbejdernes syn påvirkes uheldigt deraf. Hvor det ikke vil betyde en afgørende ulempe for virksomhedens drift, skal der i lokaler, hvor arbejde regelmæssigt foregår, være adgang for tilstrækkeligt dagslys. Kunstig belysning skal være af passende art og styrke og skal være således indrettet, at den ikke blænder arbejderne eller fremkalder uheldige skyggevirkninger.

6) **Opholds- og spiserum.** Der skal anvises arbejdernes passende plads til at indtage de-

líkindir at heita upp mat og drekka, sum teir hava við sær. Er arbeið so háttað, at tað gerst neyðugt ella er náttúrligt, at arbeiðararnir ikki eta í arbeiðsrúminum, skal hóskandi matrúm gearst viðkomandi arbeiðarum, um tað yvirhøvur er rímuligt.

7) **Toiletrúm.** Tað skal vera hóskandi tal av toiletrúmum, forsvarliga tilgjørd og liggja hóskandi fyri.

8) **Sovistøð.** Liggur arbeiðsstaðurin so illa fyri ella so fyri seg, at arbeiðararnir fáa illa útvegað sær innivist fyri náttina, skal arbeiðsgevarin stíla fyri, at sovistøð vera forsvarliga tilgjørd, menn og kvinnur fyri seg.

Stk. 2. Maskin- og arbeiðseftirlitið kann linka reglurnar í stk. 1 hjá virki, sum hevur ikki meira enn 3 arbeiðarar ella færri.

Stk. 3. Arbeiðsrúm, sum bygd eru áðrenn lógin kom í gildi, koma undir reglurnar í stk. 1, nr. 5 og nr. 8, tá ið lógin kemur í gildi. Tá ið rúm skifta eigara, koma undir størri broyting í bygging ella 15 ár eru liðin, eftir at lógin kom í gildi, kann eftirlitið treyta, at hinar reglurnar í stk. 1 verða hildnar í tann mun, tað er rímuligt.

§ 20.

Fyri virki, sum hevur ikki rúm

res måltider og gives dem mulighed for at opvarme medbragt mad og drikke. Hvor arbejdets art gør det påkrævet eller naturligt, at arbejderne ikke spiser i arbejdslokalet, skal der indrettes passende spiserum for vedkommende arbejdere, hvis dette i øvrigt er rimeligt.

7) **Aftrædelsesrum.** Der skal være et tilstrækkeligt antal forsvarligt indrettede og passende beliggende aftrædelsesrum.

8) **Sovesteder.** Er arbejdsstedet så afsides eller isoleret beliggende, at arbejderne ikke uden videre kan skaffe sig ophold for natten, skal arbejdsgiveren sørge for forsvarligt indrettede sovesteder, særskilt for mænd og for kvinder.

Stk. 2. Maskin- og arbejdstilsynet kan lempe bestemmelserne i stk. 1 for virksomheder, der beskæftiger 3 arbejdere eller derunder.

Stk. 3. For arbejdslokaler, der er opført før lovens i krafttræden, skal bestemmelserne i stk. 1, nr. 5 og nr. 8 være opfyldt ved lovens ikrafttræden. Når lokalerne skifter ejer, undergår væsentlig bygningsmæssig ændring eller der er forløbet 15 år efter lovens ikrafttræden, kan tilsynet kræve, at de øvrige bestemmelser i stk. 1 skal opfyldes i det omfang, det er rimeligt.

§ 20.

For virksomhed, der ikke fore-

á føstum arbeiðsstað, fyrisetur landsstýrið í hvønn mun reglurnar í § 19 skulu koma í nýtslu.

§ 21.

Arbeiðararuir skulu vera ílatnir eftir arbeiðnum. Tá ið tungar heilsuligar grundir krevja serstakan arbeiðsbúna, kann eftirlitið krevja tílíkt. Landsstýrið kann fyriseta reglur, hvør skal koma undir útreiðslurnar til kravdan búna.

S t k. 2. Er tað ikki gjørligt á annan hátt at tryggja arbeiðararnar fyri vanlukku ella heilsuvanda, skulu serstøk ráð nýtast, har tað í royndum er gjørligt, eitt ní hóskiligir arbeiðsbúnar, handskar, tryggleiksbeltir, vernd fyri høvur, eygu og andadrátt. Landsstýrið kann fyriseta reglur um gerð, roynd og nýtslu av persónligum verndartiltøkum og hvør skal koma undir útreiðslurnar av teim.

S t k. 3. Arbeiðararnir hava skyldu at nýta tílíkar serstakt kravdar búnar og ásett verndartiltøk.

§ 22.

Í virkjum og í arbeiði, sum er undir hesi lóg, skulu eftir eftirlitsins ætlan vera tørvandi ráð til landa til fyrstuhjálp í vanlukkutilburði, eins og eftirlitið kann freyta tilgerð av serstakari skaðastovu í størri virkjum, um tað verður hildið tørvandi at vera.

går i lokaler på fast arbejdssted, fastsætter landsstyret, i hvilket omfang bestemmelserne i § 19 finder anvendelse.

§ 21.

Arbejdernes beklædning skal være afpasset efter arbejdets art. Hvor væsentlige sundhedsmæssige hensyn gør særligt arbejdstøj påkrævet, kan tilsynet give påbud herom. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om, hvem der skal afholde udgifterne til påbudt arbejdstøj.

S t k. 2. Er det ikke på anden måde muligt at beskytte arbejderne mod ulykkesrisiko eller sundhedsfare, skal der, hvor det er praktisk muligt, anvendes særlige beskyttelsesmidler, såsom hensigtsmæssige arbejdsklæder, handsker, sikkerhedsbælter, hoved-, øjen- og åndedrætsværn. Landsstyret kan fastsætte bestemmelser om konstruktion, afprøvning og benyttelse af personlige beskyttelsesmidler og om, hvem der skal afholde udgifterne hertil.

S t k. 3. Arbejderne er forpligtet til at anvende det påbudte særlige arbejdstøj og de påbudte beskyttelsesmidler.

§ 22.

I virksomheder og ved arbejde der er omfattet af denne lov, skal der findes de efter tilsynets skøn fornødne midler til førstehjælp i ulykkestilfælde, ligesom tilsynet kan påbyde indretning af særlig skadestue i større virksomheder, hvis det findes påkrævet.

§ 23.

Landsstýrið kann fyriseta reglur um læknakanning hjá arbeiðarum at fyribyrgja og halda niðri vinnusjúku og heilsuvanda.

§ 24.

Í virkjum, sum hava minst 10 arbeiðarar, kann landsstýrið fyriseta reglur um internt tryggleikaarbeið, herundir tryggleiksamboð og tryggleiksnevnd.

Kapitul 4.
Arbeiðstíð v. m.
A. Hvíldartíð.

§ 25.

Arbeiðstíðin skal skipast so, at arbeiðararnir hvørt samdøgur skulu hava hvíldartíð uppá minst 11 samfullar tímar.

Stk. 2. Hvíldartíðin kann minkast til í minsta lagi 8 tímar í:

1) arbeið í fiskavirkjum á háseson,
2) arbeið í byggi- og verkligum arbeið í háseson,
3) regluligum holdskifti í virkjum, sum arbeiða í fleirholdsdrift,
4) skiftihold í virkjum, sum arbeiða í fleirholdsdrift, tá ið semja er sínámillum,
5) inn- og uppskiping og førvandi arbeið sum hoyrir til, sum goymslu- og pakkhúsarbeið og haraftrat
6) arbeið í landbúnað.

§ 23.

Landsstyret kan fastsætte regler om lægeundersøgelse af arbejdere til forebyggelse og bekæmpelse af erhvervssygdomme og sundhedsfare.

§ 24.

For virksomheder, hvor der beskæftiges mindst 10 arbejdere, kan landsstyret fastsætte regler om det interne sikkerhedsarbejde, herunder sikkerhedsrepræsentanter og sikkerhedsudvalg.

Kapitel 4.
Arbejdstid m.v.
A. Hviteperiode.

§ 25.

Arbejdstiden skal tilrettelægges således, at der hvert døgn gives arbejderne en hvileperiode af mindst 11 på hinanden følgende timer.

Stk. 2. Hvileperioden kan nedsættes til mindst 8 timer ved:

1) arbejde i fiskeindustrianlæg i højsæsonen,
2) arbejde i bygge- og anlægsvirksomhed i højsæsonen,
3) ordinært holdskifte i virksomheder, der arbejder i flerholdsdrift,
4) skiftehold i virksomheder, der arbejder i flerholdsdrift, når der lokalt er enighed herom,
5) lastning og losning og nødvendige arbejder i tilslutning hertil, såsom lager- og pakhusarbejde, samt
6) arbejde i landbrug.

§ 26.

Eftirlit kann eftir umsókn loyva tørvandi frávik frá § 25, tá ið

1. náttúrhendingar, vanlukkur maskinsamanbrot ella aðrar líkar og ófyrisiddar hendingar darva ella hava darvað ta reglutigu driftina, tó bert fyri nærri tilskilaða tíð og bert til reglulig drift er komin aftur í rættlag,
2. arbeið sum eftir sínum slag kann ikki skjótast út,
3. serstøk arbeiðsøkir ella serstakir arbeiðsformar gera frávik neyðugt.

Stk. 2. Tá ið ófyrisæð ólag ella skaði krevur umvæling uttan steðg ella tá ið arbeiðið eftir sínum slag kann ikki skjótast út, kann frávik gerast frá § 25 uttan loyvi frammanundan. Eftirlitið skal skjótast gjørligt hava boð, tá ið farast skal undir arbeiðið og kann taka avgerð um hvíldartíðina undir ti sum vantar í arbeiðinum.

B. Sunnu- og halgidagsfrí

§ 27

Arbeiðarar mugu regluliga ikki arbeiða sunnu- ella halgidagssamdøgur, uttan so halgidagsarbeiðið er til samfelags frama ella er neyðugt at varðveita virðir. Halgidagssamdøgur skal liggja innanfyri skiftið frá kl. 22 kvøldið fyri til kl. 8 morgunin eftir halguna.

Stk. 2. Sum endurgjald fyri lissan av frítíð av reglutigum sunnudagsarbeið, skulu arbeiðararnir, so vítt tað er gjørligt fáa aðra samfelda frítíð við at sam-

§ 26.

Tilsynet kan efter ansøgning tillade nødvendige afvigelser fra § 25, når

1. naturomstændigheder, ulykker, maskinsammenbrud eller andre lignende uforudsete begivenheder forstyrrer eller har forstyrret den regelmæssige drift, dog kun for en nærmere begrænset tid, og kun indtil regelmæssig drift er genoprettet,
2. arbejdets udførelse efter dets art ikke kan opsættes,
3. særlige arbejdsområder eller særlige arbejdsformer gør afvigelse nødvendig.

Stk. 2. Når en uforudset forstyrrelse eller skade kræver uopholdelig udbedring, eller når arbejdets udførelse efter dets art ikke kan opsættes, kan § 25 fraviges uden forudgående tilladelse. Tilsynet skal snarest muligt underrettes om arbejdets påbegyndelse og kan træffe bestemmelse om hviletiden under resten af arbejdet.

B. Søn- og helligdagsfrihed.

§ 27

Arbejdere må ikke regelmæssigt beskæftiges i et søn- eller helligdagsdøgn, medmindre helligdagsarbejdet tilfredsstiller et samfundsbehov eller er nødvendigt for at bevare værdier. Helligdagsdøgnet skal ligge inden for tidsrummet fra kl. 22 aftenen før helligdagen til kl. 8 efter helligdagen.

Stk. 2. Som en erstatning for den fritid, som arbejdere mister ved regelmæssigt søndagsarbejde,

svarandi tal av arbeiðstímum dettur burtur.

C. Barna- og unglinga arbeið.

§ 28.

Í vinnuligum arbeið, neman undantaksreglunum í stk. 2, mugu børn bert nýtast, tá ið tey hava fylt 14 ár og lógliga útskrivað úr skúlanum. Undir hesa reglnna koma eisini børn í húski arbeiðsgevarans og sum hoyra til ættina, tá ið tey arbeiða á tekniskum virki, við yrkisevnum og tilfari, sum kunnu hava vanda fyri barnið við sær.

Stk. 2. Børn sum hava ikki fylt 14 ár ella ikki lógliga eru útskrivað úr skúlanum mega nýtast til vinnuliga boðtænastu uppí 2 tímar um dagin.

Stk. 3. Landsstýrið fyrisetur hægri lágaldur enn 14 ár til nýtslu av unglingum til arbeiðis, sum eftir sínum slag ella undir umstøðum tað fer fram, er unglingum vandamikið fyri lív, limir, heilsu, framburð ella siðmenning.

§ 29.

Unglingar undir 18 ár skulu hava samfelda hvíldartíð uppá minst 12 tímar í samdøgrið. Hava teir arbeið í iðnaðarvirki, skal hvíldartíðin vera í tíðarskeiðinum millum kl. 22.00 og kl. 05.00.

C. Børn og unge menneskers arbejde.

§ 28.

Til erhvervsmæssigt arbejde, bortset fra undtagelsen i stk. 2, må børn kun anvendes, når de er fyldt 14 år og lovligt udskrevet af skolen. Denne bestemmelse gælder også børn af arbejdsgiverens husstand, som hører til hans familie, når der arbejdes med tekniske anlæg, hjælpemidler og materialer, der kan frembyde fare for barnet.

Stk. 2. Børn der ikke er fyldt 14 år eller ikke lovligt udskrevet af skolen, må anvendes til budtjeneste af erhvervsmæssig karakter indtil 2 timer daglig.

Stk. 3. Landsstyret fastsætter en højere lavalder end 14 år for anvendelse af unge mennesker ved arbejde, som efter sin beskaffenhed eller de omstændigheder, under hvilke det udføres, er farligt for unge menneskers liv og lemmer, helbred og udvikling af moral.

§ 29.

Unge mennesker under 18 år skal have en samlet hvileperiode på mindst 12 timer i døgnet. Er de beskæftiget i industrivirksomhed, skal hvileperioden indbefatte tidsrummet mellem kl. 22,00 og kl. 05,00.

Kapitul 5.
Eftirlit

§ 30.

Maskin- og arbeiðseftirlitið ansar eftir at lógin og forskriftir sum givnar eru eftir hesoi eru hildnar. Landsstýrið fyrisetur gjøllari reglur fyri útinningina av eftirlitinum.

. . . .

§ 31.

Tilík virkir, har arbeiðið ella viðurskiftir sum tað verður útint undir, kann hava við sær ringar skaðatilburðir ella heilsubrek, skulu vera undir regluligum eftirliti. Í øðrum føri skal eftirlitið taka stakroyndir ella tá ið boð kemur ella onnur serstak viðurskiftir geva grund til at halda, at lóggávan er ikki hildin. Ringir skaðatilburðir (herundir akutt eitring) eiga so vítt gjørligt beinanvegin at kannast av eftirlitinum, smbr. § 33.

S t k. 2. Eftirlitið, legitimerað sum sum tað skal, hevur nær tað skal vera loyvi at fara í hvønn krók á arbeiðsstøðum, sum eru undir lógini. Tað hevur rætt til at krevja sær til handa tørvandi upplýsingar frá arbeiðsgevaranum, teim sum eru í hansara stað og arbeiðarunum og haraftrat krevja sær tørvandi atkomulig prógvskjøl.

§ 32.

Um so er at eftirlitið heldur tað verða neyðugt at byrgja fyri hóttandi, stórvegis vanda fyri lív og heilsu hjá arbeiðarunum og øðrum, kann tað treyta, at tørvandi tiltøk

Kapitel 5
Tilsyn

§ 30.

Tilsynet med overholdelsen af loven og forskrifter udstedt i henhold til loven varetages af maskin- og arbejdstilsynet. Landsstyret fastsætter nærmere regler for tilsynets udøvelse.

. . . .

§ 31.

Regelmæssige tilsyn skal finde sted ved sådanne virksomheder, hvor arbejdet eller de forhold, hvorunder det foregår, kan medføre alvorlige ulykkestilfælde eller sygdom. I andre tilfælde skal tilsyn foretages stikprøvevis, samt når der sker anmeldelse eller andre særlige forhold giver grund til at antage at lovgivningen ikke bliver overholdt. Ulykkestilfælde af alvorlig karakter (herunder akutte forgiftningstilfælde) bør så vidt muligt omgående undersøges af tilsynet, jfr. § 33.

S t k. 2. Tilsynet har mod behørig legitimation til enhver tid adgang til enhver del af de under loven hørende arbejdssteder. Det har ret til at få nødvendige oplysninger af arbejdsgiveren, hans stedfortrædere og arbejderne, samt til at forlange nødvendig, tilgængelig dokumentation.

§ 32.

For så vidt tilsynet skønner det nødvendigt for at afværge en overhængende, betydelig fare for arbejdernes eller andres liv eller sundhed, kan det påbyde, at der

verða framd uttan dvøl at ganga ímóti vandanum, møguliga at steðga nýtsluni av viðkomandi tekniska verki ella rukstrinum av viðkomandi parti av virkinum í tann mun, tað er neyðugt at fyribyrgja vanda.

§ 33.

Arbeiðsstøð, sum eru undir lógini, skulu hava eftirlitsbók, uttan so eftirlitið heldur tað ikki tørva og í hana skal eftirlitið føra viðmerkingar um ítt eftirlit, gjørdar atfinningar og harav givnar treytir og haraftrat tíðarfrestin at rætta tað sum vantar.

Stk. 2. Virkið skal uppá serstøk bløð í eftirlitsbókini skriva upp skaðatilburðir, sum eru ikki bert viðfáningur (heruppi í akuttar eitringar), sum hava verið arbeiðarunum í virkinum fyri ella hætfisligir tilburðir, sum kundu havt við sær skaðatilburð. Eisini skal skilast til í henni, hvat tiltøk eru gjørd at byrgja fyri, at tað hendir ikki uppaftur. Størri skaðatilburðir, eitringar og vinnulig ilska skulu eisini beinanvegin fráboðast eftirlitinum.

§ 34.

Arbeiðararnir og teirra álitismenn hava rætt at venda sær til eftirlitið. Álitismennirnir og tryggleiksumboð skulu hava høvi til at kunna sær tær treytir, sum eftirlitið hevur givið skrivliga.

uforløvet træffes nødvendige foranstaltninger til imødegåelse af faren, eventuelt af brugen af pågældende tekniske hjælpemiddel eller driften af vedkommende dele af virksomheden standses i det omfang, hvori det er nødvendigt for at afværge faren.

§ 33.

Ved arbejdssteder, som er omfattet af denne lov, skal der, medmindre tilsynet finder det unødvendigt, findes en tilsynsbog, hvori tilsynet skal indføre bemærkninger om forefagne inspektioner, de herved fundne mangler og de i denne anledning givne påbud samt om den tidsfrist, inden hvilke disse skal være udført.

Stk. 2. På særlige blade i tilsynsbogen skal virksomheden notere de ulykkestilfælde af ikke helt ubetydelig karakter (herunder akutte forgiftningstilfælde), der overgår de i virksomheden beskæftigede personer, eller alvorlige hændelser, der kunne have medført ulykkestilfælde. Ligeledes skal den anføre hvilke foranstaltninger, der er truffet for at forebygge gentagelser. Ulykkestilfælde, forgiftninger og erhvervssidelser af alvorligere karakter, skal tillige straks meddeles tilsynet.

§ 34.

Arbejderne og deres tillidsmænd har ret til at henvende sig til tilsynet. Arbejdernes tillidsmænd og sikkerhedsrepræsentanter skal have adgang til at gøre sig bekendt med de påbud, som tilsynet skriftligt har afgivet.

§ 35.

Einhvør sum ætlar at seta virki á stovn ella leggja um virki, sum kemur undir hesa lógina, hevur rætt til frá eftirlitinum at fáa at vita, um ætlanin er samsvarandi lógina og tær forskriftir, sum givnar eru eftir henni.

§ 36.

Tær treytir, sum eftirlitið setur og aðrar avgerðir sum tað tekur, kunnu skjótast inn til landsstýrið innan 4 vikur eftir at viðkomandi hevur boð um avgerðina.

Stk. 2. Kæra um treytir er tálmandi men tó ikki kæra um treyt eftir § 32.

§ 37.

Politivaldið er eftirlitinum til hanga í eftirlitinum at seta lógina í verk. Gjøllari reglur um samarbeiðið millum politivaldið og eftirlitið verða fyrisettar eftir samráð millum landsstýrið og ríkisvaldið.

§ 35.

Enhver, der vil oprette eller omdanne en virksomhed, der hører under denne lov, er berettiget til hos tilsynet at få oplyst, om planen er i overensstemmelse med loven og de forskrifter, som er udstedt i henhold til denne.

§ 36.

Tilsynets påbud og andre afgørelser kan indbringes for landsstyret inden 4 uger efter, at afgørelsen er meddelt den pågældende.

Stk. 2. Klage over påbud har opsættende virkning. Dette gælder dog ikke påbud efter § 32.

§ 37.

Politiet yder tilsynet bistand i dets tilsyn med gennemførelsen af denne lov. De nærmere regler for samarbejdet mellem politi og tilsyn fastsættes efter forhandling mellem landsstyret og rigsmyndighederne.

Kapitul 6.

Ymiskar reglur

§ 38.

Landsstýrið kann, tá ið serstøk viðurskiftir eru fyri, loyva linkingar í kap. 3-4 í lógini og í teim forskriftum, sum givnar eru eftir henni. Maskin- og arbeiðseftirlitið kann í einstøkum føri, tá ið serstøk viðurskifti liggja fyri, loyva frávik frá kap. 3-4 og harafturat frá forskriftum sum givnar eru eftir lógini í samsvar við, hvat fyrisett er í teim einstøku forskriftunum.

Kapitel 6

Forskellige bestemmelser

§ 38.

Landsstyret kan, når særlige forhold foreligger, tillade lempelser i lovens kap. 3-4 og de forskrifter, der er udstedt i henhold hertil. Maskin- og arbejdstilsynet kan i enkelttilfælde når særlige forhold foreligger, til de afvigelser fra kap. 3-4 samt fra forskrifter udstedt i henhold til loven i overensstemmelse med, hvad der fastsættes herom i de enkelte forskrifter.

§ 39.

Brot av lógini ella teim forskriftunum sum givnar eru eftir henni, treytum ella forboðum kemur undir sekt, um so er at brotið eftir lóggávuni annars hevur ikki við sær hægri straff.

S t k. 2. Mál sum reisast av broti av hesi lógini ella forskriftum sum givnar eru eftir henni og straffin fer ikki uppum sekt, fara fram sum politimál.

§ 40.

Henda lóg kemur í gildi 1. januar 1975 og samstundis fara úr gildi:

Fyriskipan nr. 171 frá 18. juni 1926 «hvorved lov om tilsyn med dampkedler på landjorden af 4. oktober 1919 sættes i kraft på Færøerne» sum broytt við fyriskipan nr. 38 frá 14. februar 1934,

Fyriskipan fyri Føroyar nr. 308 frá 23. juli 1923 «um forebyggelse af ulykkestilfælde ved brug af maskiner».

§ 39.

For overtrædelse af denne lov eller de i henhold hertil udfærdigede forskrifter, påbud eller forbud kan bøde idømmes, for såvidt overtrædelsen efter lovgivningens almindelige regler ikke medfører højere straf.

S t k. 2. Sager i anledning af overtrædelser af denne lov eller af de i medfør af samme udfærdigede forskrifter og i hvilke straffen ikke oversliger bøder behandles som politisager.

§ 40.

Loven træder i kraft den 1. januar 1975 og samtidig ophæves:

Anordning nr. 171 af 18. juni 1926 hvorved lov om tilsyn med dampkedler på landjorden af 4. oktober 1919 sættes i kraft på Færøerne, som ændret ved anordning nr. 38 af 14. februar 1934,

Anordning for Færøerne nr. 308 af 23. juli 1923 om forebyggelse af ulykkestilfælde ved brug af maskiner.

Viðmerkingar:

Galdandi lóggáva fyri Føroyar um arbeiðaravernd er kgl. fyriskipan nr. 171 frá 18. juni 1926 «om tilsyn med dampkedler på landjorden», kgl. fyriskipan nr. 308 frá 23. juli 1923 «om forebyggelse af ulykkestilfælde ved brug af maskiner» og kunngerð nr. 84 frá 13. mai 1899 «om indretning og brug af mekanisk drevne elevatorer og hejseværk».

Reglurnar í hesum fyriskipanum eru ikki tíðarhóskandi longur, og um fyribyrging av vanlukkum av øðrum orsøkum enn teimum í nevndu fyriskipanum nevndu maskinum og tólum eru ongar reglur galdandi. Um vælferðartiltøk á arbeiðsstaðnum, hvíldartíð, sunnu- og halgidagsarbeiði og barna- og unglingaarbeiði eru ongar reglur galdandi.

Fyriliggjandi uppskot til løgtingslóg um arbeiðaravernd fevnir um alt

vinnuligt arbeiði í tænastu hjá arbeiðsgevara við nærri tilskilaðum undanløkum, smbr. kapitul 1.

Høvuðsábyrgdin av, at lógin verður hildin, hevur arbeiðsgevarin, ella annar, sum hansara vegna hevur fingið upp í hendi at røkja hansara skyldur. Í serligum førum kunnu eisini arbeiðarar, seljarar, útleigarar og onnur koma undir ábyrgd, smbr. kapitul 2.

Í kapitul 3 eru ásettar vanligar reglur um fyribyrging av vantukkum á teimum mest vandamiklu økjunum. Við heimild í lógini kann landsstýrið og arbeiðseftirlitið við kunngerðum, umfarsskrivum, vegleiðingum v.m. áseta gjøllari reglur fyri tey einstøku arbeiðsøkini, so hvørt tørvur er á. Í hesum lógarkapitli eru eisini ásettar ymsar reglur til fyribyrging av arbeiðssjúkum og reglur um vælfarstiltøk á arbeiðsplássunum, t.d. støddd og innretting av arbeiðshølum í mun til talið av arbeiðsfólki, ljósviðurskifti, arbeiðsbúnaur v.m.

Í kapitul 4 eru ásettar reglur um hvíldartíðir, sunnu- og halgidagsarbeiði og barna- og unglingaarbeiði. Hesar reglur eru m.a. neyðugar fyri at lóggáva okkara skal lúka treytirnar í ymsum ILO-konventiónum, sum eru lýstar at galda fyri Føroyar.

Eftirlitið við at lógin verður fylgd, kemur maskin- og arbeiðseftirlitið at hava. Nærri reglur verða at seta um hvørji virkir v.m. skulu sýnast regluliga. Annars verður eftirlitið at fara fram við stakroyndum.

Á Maskin- og ketileftirlitinum arbeiða í løtuni 3 menn. Hesir hava umframt arbeiðseftirlitið fylgjandi arbeiðsuppgávur:

Eftirlit við skipum landsins, metingar og ummælir eftir lógini um stuðning til skipaflotan, metingar og sýn av virkjum, sum landskassin veitir veðhald til, eftirlit við kavaraútgerð umframt ráðgeving fyri landsstýrið í ymiskum tekniskum spurningum. Roknast má sostatt við, at meira fólk má setast á eftirlitinum, um arbeiðseftirlitið skal røkjast til fulnar.

Fyri at fáa stundir at gera reglur, vegleiðingar v.m. fyri tey mest týðandi arbeiðsøkini, er skotið upp, at lógin ikki kemur í gildi fyrr enn 1. januar 1975.

1. viðgerð 22. januar 1974 og málið beint í lógarnevndina, sum 25. mars legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um arbeiðaravernd. Málið varð framlagt 6. december 1973 og 1. viðgerð fór fram 22. januar 1974 og varð tá beint til viðgerðar í lógarnevndini.

Lógaruppskotið fyrisetur reglur um fyribyrging av vanlukkum á arbeiðsplássum av maskinum og tólum, um hvíldartíð, um barna- og ung-

lingaarbeiði, um hóskandi innrætting av arbeiðsstølum og reglur um fyribyrging av arbeiðssjúkum og er stutt sagt tilevnað eftir somu princippum sum tilsvarandi lóggáva aðrastaðni.

Annars gevur lógin landsstýrinum og arbeiðseftirlitinum heimild til at áseta gjøllari reglur við kunngerðum og vegleiðingum.

Av tí, at ymist fyrireikingararbeiði er neyðugt at gera, áðrenn lógin skal koma í gildi, er tað av týdningi, at uppskotið verður samtykt í hesi tingsetu.

Í málinum liggur skriv frá ymiskum feløgum, har mælt verður til at seta tílíka lóggávu í gildi í hesi tingsetu.

Lógarnevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins við hesum broytingum:

Í § 5, 3. seinastu reglu verður sett «omfang» í staðin fyri «omfant» í donsku tekstini.

Í § 19, 1) verður aftaná «birtist» sett komma, og í somu § 1) verður í 6-seinastu reglu aftaná «minst» sett «3 m».

Í § 20 verður í 1. reglu sett «fyri» í staðin fyri «fyri».

Í § 24 verður í næstseinastu reglu sett «tryggleiksumboð» í staðin fyri «tryggleiksamboð».

Í § 25 verður í 4. reglu sett «samfeldar» í staðin fyri «samfullar».

Í § 27, stk. 2, verður í 2. reglu sett «frítíð» í staðin fyri «fítíð».

Í § 29, 5. reglu verður sett «fevna um tíðarskeiðið» í staðin fyri «vera í tíðarskeiðinum».

Í § 34 verður í 5. reglu sett «gera seg kunnugan við» í staðin fyri «kunna sær».

Í § 36 verður í 5. reglu millum «hevur» og «boð» sett «lingið».

2. viðgerð 28. mars.

Broytingaruppskotið frá nevndini samtykt 23—0.

Gr. 1 - 10 so broyttar og at fara til 3. viðgerð samt. 22 - 0.

3. viðgerð 1. apríl og lógaruppskotið endaliga samtykt 24—0.

34. Føroysk umboðsstova í Keypmannahavn

Ár 1972, hósdagin 6. des., legði Hilmar Kass, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum at stovusetа føroyska umboðsstovu í Keypmannahavn.

Viðmerkingar:

Sambært § 15 í heimastýrislógini er rikisumboðsmaðurin ovasti umboðsmaður ríkisstjórnarinnar í Føroyum, meðan føroysku stjórnarmyndugleikarnir — løgting og landsstýri — einki tilsvarandi umboð hava í Danmark.

Ólíka meira náttúrligt og meira sjálvsagt vildi tað verið, um tað føroyska umsitingarvaldið kundi rækt beinleiðis og uttan millumstøð síni áhugamál mótvegis donsku umsitingini. Tað hevði givið javnvág millum tann háttin, sum danir rækja teirra áhugamál mótvegis føroysku myndugleikunum, og tann háttin okkara myndugleikar rækja okkara áhugamál mótvegis donsku umsitingini. Tað vildi borgað fyri virðing fyri ti parti av sjálvstýri, sum vit eftir heimastýrislógini hava, umframt dyggiliga at staðfesta okkara sjálvstøðurætt mótvegis donsku myndugleikunum.

Føroysku umboðini í fólkatinginum eru sum aðrir fólkatingsmenn valdir beinleiðis av fólkinum og hava sostatt ikki í sjálvum sær ta uppgávu at umboða landsstýrið mótvegis donsku stjórnini. Harumframt er eingin vissa fyri, at teir í Føroyum valdu fólkatingsmeminir umboða somu politisku sjónarmið, sum eitthvørt sitandi landsstýri. Tann støða er als ikki óhugsandi, at báðir føroysku fólkatingsmeminir umboða politiskar flokkar, sum eru í andstøðu til ein løgtingsmeiriluta aftan fyri landsstýrið. Fólkatingsumboðini og landsstýrið skulu nýveljast í minsta lagi fjórða hvørt ár. Somuleiðis við donsku stjórnini. Undir slíkum umstøðum ber ikki til at tilleggja fólkatingsmonnunum nakran týdning sum umboð fyri stýrið her yvir fyri donsku stjórnini.

Tað er metanin hjá sjálvstýrisflokkinum, at tørvurin fyri einum beinleiðis føroyskum umboði mótvegis donsku stjórnarmyndugleikunum er skjótt vaksandi.

(F.L. J. nr. 320-5).

Ein tílík umboðsstova eigur at vera skipað undir leiðslu av einum embætismanni á so høgum stigi, at hann hevur beinleiðis atgongd til allar leiðandi embætismenn og politiskar ábyrgdarmenn í ríkisumsitingini.

Tá heimastýrislógin ikki nevnir nakað um eina føroyska umboðsstovu í Danmark, verður neyðugt við samráðingum millum landsstýrið og ríkismyndugleikarnar um ta gjøllari skipanina og til tess at tryggja umboðsmannunum ta støðu, uppskotið miðar ímóti.

Umboðsstovan skal vera partur av landsumsitingini, og skal hon sum høvuðsuppgávu hava, at vera bindilið millum landsstýrið og donsku stjórnarmyndugleikarnar í Keypmannahavn.

Umboðsstovan vil í stóran mun bøta um møguleikarnar fyri, at landsstýrið fær skjótari og gjølligari upplýsingar um donsk viðurskifti og tiltøk av týdningi fyri Føroyar. Eisini vil hon bøta um møguleikarnar fyri at fylgja málum upp, sum eru send ríkismyndugleikunum umframt at vera til taks við upplýsingum. Tað er einki loyndarmál, at ofta tekur viðgerðin av føroyskum áhugamálum drúgva tíð.

Sum partur av landsumsitingini vil umboðsstovan ikki vera ávirkað av teimum broytingum, sum fara fram viðvíkjandi landsstýri og fólkatingssessunum. Hon vil tí umboða kontinuitet, sum má haldast at vera av stórum týdningi í viðurskiftunum millum Føroyar og donsku myndugleikarnar.

Oftani er undir núverandi viðurskiftum neyðugt, at landsstýrismenn fara til Danmarkar og aðra staðir til tingingar. Ein umboðsstova kundi vanliga fört slíkar tingingar landsstýrisins vegna og í øllum førum verið landsstýrismonnum til hjálpar undir samráðingum teirra í útlondum.

Mangur man undra seg yvir, at Føroyar, sum hava so nógv samband við Danmark, ikki bert tá talan er um viðurskifti millum føroyskar og danskar myndugleikar, men eisini viðvíkjandi m.a. landilssáttmálum og socialum spurningum, ikki fyri langt síðani hava stovnað eina umboðsstovu í Danmark, hava ongan føroyskan stovn at venda sær til, um okkurt skuldi verið áfatt. Her hava okkara landsmenn ikki sama møguleika, sum aðrir frammandir. T.d. hava øll norðaulond sendistovur í Keypmannahavn.

Umboðsstovan eigur at gerast føroyskur miðdepil í Keypmannahavn. Undir leiðslu umboðsstovunnar eigur at koma ikki bert núverandi handilsstovan, men eisini møguligar socialar institutiónir, hvørs tørvur tvøskar almikið á fyri at fáa loysn.

Vegna Sjálvstýrisflokkin, 5. december 1973

Hilmar Kass

1. viðgerð 21. januar 1971 og málið beint í marknaðarnevndina, sum 5. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av sjálvstýrisflokkinum, og varð tað við fyrstu viðgerð, sum fór fram 21. januar, beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í fýra minnilutar.

Minnilutin (Poul J. Olsen, J. Fr. Øregaard og Trygve Samuelsen) er av teirri áskoðan, at føroyska umboðanin í Danmark er í lagi.

Føroyar eiga rætt til tveir limir í danska fólkatinginum, og hava allir teir politisku flokkarnir í Føroyum stillað upp valevni til danska fólkatingið, og soleiðis góðtikið hesa skipan.

Samsvarandi heimastýrislógina hava Føroyar eisini rætt til at fáa mann settan í danska uttanríkisministeriið sum serkønan í føroyskum málum, og hava Føroyar havt mann har nú í mong ár.

Eisini er nú sett á stovn føroysk handilsumboðsstova í Keypmannahavn, har føroyingur, settur av Føroya Landsstýri, tekur sær av handilsligu áhugamálum føroyinganna. Minnilutin heldur, at í Keypmannahavn eru føroyingar væl umboðnðir, og setur sostatt einki uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Erlendur Patursson) setur einki uppskot í málinum og greiðir frá støðu síni í tingsalinum.

Minnilutin (Kjartan Mohr) setur einki uppskot í hesum máli.

Minnilutin (Hákun Djurhuus og Hilmar Kass) tekur undir við tí, sum verður ført fram í viðmerkingunum, men mælir til at orðingin í samtyktini verður hendan:

Uppskot til samtyktar:

Álagt verður landsstýrinum at taka upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar um stovnsetan av føroyskari umboðsstovu í Keypmannahavn og leggja málið aftur fyri tingið.

2. viðgerð 25. mars.

Broytingaruppskot frá minniluta í nevndini fall 5—0.

Alt málið sostatt burturfallið.

35. Broyting í lóg um fuglaveiðu

Ár 1973, 6. desember, legði Agnar Nielsen, løgtingsmaður, (samst. fyri Jógvan Durhuus, Knút Wang og Halldor Hansen) fram

Uppskot
til
l

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verður í § 16 sett:

«3. stk. Loyvt er ikki at veiða fugl við snæru á sjónum».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. med senere ændringer tilføjes i § 16:

«Stk. 3. Det er forbudt på søen at fange fugle med snare».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

II

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í gr. 17, 2. stk., nr. a) gangi orðini: «lomviga, álku» út.
2) Í gr. 17, 2. stk., verður sett sum nr. d): «1. august — 15. mai: Lomviga og álku».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. foretages følgende ændringer:

1) I § 17, stk. 2, nr. a) udgår ordene «lomvie, alke».
2) I § 17, stk. 2 tilføjes som nyt nr. d): «1. august — 15. mai: Lomvie og alke».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

(F.L.J. nr. 610-9-2 - sí eisini L.l. nr. 44/1974).

Viðmerkingar:

Orsøkin til hetta uppskot er tann støðugt minkan av lomviga og álku hesi seinastu árini, og halda vit, at frammanfyri standandi uppskot, hareftir snara á sjónum verður forboðin, eins og hert verður loyvt at skjóta lomviga og álku í tíðarskeiðinum 1. august til 15. mai, møguliga vildi hjálpt.

1. viðgerð 4. februar 1974 og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 21. mars legði fram soljóðandi

Álit

Úr Vestmanna fekk tingið adresso við 174 undirskriftum, har heitt verður á tingið um at friða lomviga og álku frá 15. mai til 1. august og forbjóða allari snarnveiðu á sjónum, av tí at lomvigin var so nógv minkaður á teirra leiðum tey seinastu árini.

Málið varð gjørt til tingmál og framlagt av Agnar Nielsen, Jógvan Durhuus, Knút Wang og Haldor Hansen, sum settu fram uppskot í tveimum pørtum um friðing av lomviga og álku frá 15. mai til 1. august og um forboð móti snarnveiðu.

Málið varð við 1. viðgerð 11. februar 1974 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini havt fund við menn úr fuglaplássum, sum vanir eru at røkja bjørgini, og við mann frá fiskirannsóknarstovuni, ið hevur havt við lomvigakanningar at gera.

Tað framgongur av frágreiðingunum frá hesum monnum, at teir halda, at størsta orsøkin til minkingina av lomviganum er, at tann vanliga ætið, sum lomvigin livir av, ikki er til longur. Hetta samsvarar við tær kanningar, sum vísa, at tað er tann ungi fughurin, sum hevur verið í størstu minking. Ritan, sum livir av sama æti sum lomvigin, er eisini nógv minkað tey seinastu árini, og t.d. hava menn sæð ritupisurnar liggjandi deyðar á reiðrum, av tí at tær ikki hava fingið nóg nógva føði. Kanningar sum fiskirannsóknarstovan hevur gjørt av magainnihaldinum hjá lomviganum vísa, at seinastu árini hevur ongin síld verið at funnið, men hava teir staðin funnið svartkjaftayngul. Hesin heldur til longri frá landi og á djúpari vatni og ger tað torførari at veita føði til pisurnar á rókunum.

Tosað hevur verið um, at havhesturin kann vera ein av orsøkunum til, at lomvigin minkar, men er her til at siga, at nevndin hevur fingið upplýst, at havhesturin verpur t.d. á vallaðum rókum og høllutum høkkum, og lomvigin á rókum, har sandur ella eyrur finst. Kønir menn halda, at tað hevði verið ein roynd at reinsa røkur fyri sand og møguliga eisini kálka tær. Hetta er roynt aðra staðni, t.d. í Ruslandi, við góðum úrsliti. Nevndin heldur, at um menn hava hug at royna hetta, átti tað almenna at stuðlað hesum.

Nevnt hevur eisini verið, at rottan kann vera ein av orsøkunum til fuglaminkingina. Eftir galdandi reglum standa kommununrnar fyri oyðing av rottu, men heldur nevndin, at hetta kann verða ov stór útreiðsla hjá smærri kommunum við fuglabjørgum at halda bjørgini frí fyri rottu, og eigur lí at verða umhugsað at veita tílíkum kommunum stuðul til tílíkt arbeiði.

Viðvíkjandi skjótingini eru menn greiðir yvir, at hon er orsøk til ein vissan part av samlaðu deyðsorsøkini, og um vend kemur aftur í føðina, skal nógv til, fyri at veiðan við byrsu ella snaru skal gera avgerandi mun. Harafturímóti eigur øll skjóting ov nær fuglabjørgum at verða steðgað, tí henda órógvar búfuglin. Forboðið er í dag at skjóta nærri fuglabjørgum enn 2 fjórðingar, men er tað kunnugt, at hetta forboðið verður illa yvirhildið.

Nú nevndin hevur friðingarlógina til viðgerðar, er hon samd um at mæla til, at skarvurin verður friðaður alt árið, so hann ikki kemur fyri sonu lagnu sum hiplingurin, sum nú er horvin um okkara leiðir.

Meirilutin í nevndini (Poul J. Olsen, Tórálvur Olsen, Hákun Djurhuus og Ove Mikkelsen) mælir til, at markið fyri skjóting úr fuglabjørgum, sum nú er 2 fjórðingar, verður longt til 3 fjórðingar, og bótin fyri skjóting innanfyri hetta mark verður í minsta lagi kr. 4.000,- fyri skjóting við lomvigabjørg.

Meirilutin tekur ikki undir við uppskotinum um at forbjóða snaruveiðu, tá hendu veiða bert verður mett til umleið 20.000 fuglar og er minkandi. Heldur ikki er snaran til skaða fyri húfuglin.

Eisini hevur í nevndini verið tosað um tær nýmótans «magasinbyrsur» við fleiri skotum, ið eru vanligar nú, og er nevndini kunnugt, at hesar byrsur ikki eru loyvdar í øðrum londum, og mælt verður til, at byrsur við meira enn tveimum skotum, ikki verða loyvdar.

Vísandi til tað í álitinum framførda setur meirilutin fylgjandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v. m. sum broytt við løgtingslóg nr. 33 frá 7. juni 1972 verða gjørdar hesar broytingar:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.m.

§ 1.

I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. som ændret ved lagtingslov nr. 33 af 7. juni 1972 foretages følgende ændringer:

1) Í § 14, stk. 1, verða orðini «2 fjórðingar» broytt til «3 fjórðingar».
2) Í § 16 verður sett sum nýtt stk. 3:
«Tað er ikki loyvt at veiða við byrsu, sum hevur meira enn 2 skot.»
3) Í § 17, stk. 2a gongur orðið «skarv» út.
4) Í § 22, stk. 1, verður skoytt uppí «Fyri skjóting undir friðaðum lomvigahjørgum verður sektin minst 4.000 kr., byrsa og fongur koma undir konfiskatión.»

§ 2.
Henda lóg kemur í gildi beinan vegin og verður at endurskoða í seinasta lagi í tingsetuni 1976.

1) I § 14, stk. 1, ændres ordene «2 sømil» til «3 sømil».

2) I § 16 tilføjes som stk. 3:

«Det er forbudt under jagt at benytte gevær med mere end 2 skud.»

3) I § 17, stk. 2a udgår ordet «skarv».

4) I § 22, stk. 1, tilføjes: «For skydning under fredlyste lomviehjerge er bøden mindst 4.000 kr., gevær og fangst bliver konfiskeret.

§ 2.
Denne lov træder i kraft straks og bliver at optage til revision senest i lagtingssamlingen 1976.

Minnilutin (Leon Joensen) tekur í høvuðsheitinum undir við teimum sjónarmiðum, ið førd eru fram av meirilutanum í hesum máli, men heldur, at tey friðingartiltøk, ið nevnd eru, ikki røkka tað mál, ið uppskotið miðjar ímóti, tá talan er um, at fuglastovnurin er í vanda (lomvigin og álkan).

Eisini meinar minnilutin, tá um lóggeving ræður, so eigur at farast so fram, at lógirnar verða lættast gjørligt at handleva, soleiðis at prógvførslan móti møguligum lógbróturum verður løtt at ávísa hjá lagreglunni ella øðrum myndugleikum.

Minnilutin setur fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um fuglaveiðu v.m.

§ 1.
Í løgtingslóg nr. 27 frá 9. september 1954 um fuglaveiðu v.m. við seinnu broytingum verða gjørdar hesar broytingar í § 17:

lagtingslov om ændring i lagtingslov om fuglefangst m.v.

§ 1.
I lagtingslov nr. 27 af 9. september 1954 om fuglefangst m.v. foretages følgende ændringer i § 17:

1) í 2. stk. nr. a) ganga orðini «lomviga, álku» út.
2) í 2. stk. verður sett sum nr. d): «1. august — 15. mai: Lomviga og álku».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin og verður at endurskoða í seinasta lagi í tingsetuni 1976.

1) I stk. 2, nr. a) udgår ordene «lomvige, alke».
2) I stk. 2 tilføjes som nyt nr. d): «1. august — 15. maj: Lomvie og alke».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks og bliver at optage til revision senest i lagtingssamlingen 1976.

2. viðgerð 26. mars.

Framlagt varð frá nevndini soljóðandi

Broytingaruppskot
til
uppskot frá fiskivinnunevndini.

Broytingin í § 1, nr. 4, í nevndarálitínum verður í staðin henda:

4) í § 22, stk. 1, verður skoytt uppí: «Fyri skjóting undir friðaðum lomvigabjørgum verður sektin minst 4.000 kr. fyri bátsmannningina, og haraftrat kemur byrsa og fongur undir konfiskatión.»

4) I § 22, stk. 1, tilføjes: «For skydning under fredlyste lomviebjerge er bøden mindst 4.000 kr. til bådsmandskabet og fangst kommer under konfiskation.»

Upprunaliga lógaruppskotið: 1 fall 9—0 og 11 12—0 og sostatt burturfallin.

Broytingaruppskot til gr. 1 í nevndaruppskotinum samtykt 22 0. Gr. 1 so broytt og lógin at fara til 3. viðgerð samt. 25—0.

3. viðgerð 29. mars. Lógaruppskotið frá nevndini, sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 20—0.

36. Stuðul til húsarhaldsskúlar

Ár 1973, 6. desember, legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot til løgtingslóg um stuðul til húsarhaldsskúlar.

§ 1.

Úr landskassanum verður veittur stuðul til húsarhaldsskúlar, sum geva ungum kvinnum kunnleika til húsarhald og matgerð við serligum denti á nýtslu av føroyskum matvørum. Við góðkenning landsstýrisins kann stuðul eisini veitast til skeið í matgerð fyri menn.

Skúlin skal hava í minsta lagi tvey heildagsskeið árliga, ikki stytri enn 3 mánaðar hvørt.

Stovnsetingin av einum húsarhaldsskúla skal góðkennast av landsstýrinum. Góðkenningin kann vera knýtt at einum einstaklingi ella einum felagi.

Greiniligar treytir fyri studningsveiting verða settar av landsstýrinum.

§ 2.

Tann í 1. § nevndi stuðul verður veittur soleiðis:

1) Til keyp av húsum ella bygging av húsum til húsarhaldsskúla verður, eftir góðkenning landsstýrisins, latið 50 % av kostnaðinum.

2) Til umbyggingar, góðkendar av landsstýrinum, og keyp av undir-

lagtingslov om understøttelse til husholdningsskoler.

§ 1.

Af landskassen ydes der understøttelse til husholdningsskoler, der giver unge kvinder kendskab til husholdning og madlavning, specielt i brugen af færøske madvarer. Med landsstyrets godkendelse kan der også ydes understøttelse til kursus i madlavning for mænd.

Skolen skal have i det mindste to heldagskursus årlig, ikke kortere end tre måneder hvert.

Oprettelsen af en husholdningsskole skal godkendes af landsstyret. Godkendelsen kan knyttes til en enkelt person eller en forening.

Nærmere betingelser for ydelse af understøttelse fastsættes af landsstyret.

§ 2.

Den i § 1 nævnte understøttelse udbetales således:

1) Til køb af hus eller opførelse af hus til husholdningsskole ydes der, efter landsstyrets godkendelse 50% af udgifterne.

2) Til ombygning, godkendt af landsstyret, og til køb af undervis-

vísingaramboðum verða latin 50% av kostnaðinum.

3) Landskassin rindar fyristøðukvinnuni løn.

4) Landskassin rindar 75 % av øllum øðrum rakstrarútreiðslum, heruppií lærara- og lærarinduløni, ljós og hita o.s.fr., tó ikki av matvørum til undirvísingina.

§ 3.

Lønir hjá lærarum og lærarindum ásetur leiðsla skúlans, og skulu tær góðkennast av landsstýrinum.

Landsstýrið ásetur krøvini fyri tímatalinum hjá lærarum og lærarindum.

§ 4.

Til kvøldskeið í matgerð letur landskassin stuðul, ið svarar til útreiðslur av ljósi og hita.

§ 5.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

ningsmateriel ydes der 50% af udgifterne.

3) Landsstyret betaler løn til forstanderinden.

4) Landskassen betaler 75% af alle andre driftsudgifter, herunder lærer- og lærerindelønninger, lys og varme etc., dog ikke af madvarer til undervisningen.

§ 3.

Lærernes og lærerindernes lønninger fastsættes af skolens ledelse, og de skal godkendes af landsstyret.

Landsstyret fastsætter lærernes og lærerindernes timetal.

§ 4.

Til aftenkursus i madlavning ydes der af landskassen et tilskud, svarende til udgifterne af lys og varme.

§ 5.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Víða hvar í landinum hava kvinnur havt stóran áhuga fyri at fáa í lag góða og regluliga undirvísing í matgerð og húsarhaldi fyri ungar kvinnur. Arbeiðið hevur verið torført, av tí at tað er kostnaðarmikið at fata undir slíka undirvísing, og lítil og ongin studningur hevur fingist frá tí almenna. Kortini hevur verið roynt — meir og minni regluliga — at hava kvøldskeið um vetrarnar í matgerð.

Tørvurin á veruliga góðari og fjølbroyttari undirvísing á hesum øki førir við sær, at ungar kvinnur í hópatali leita uttanlands á hvørjum ári, einahelst til Danmarkar. Royndirnar vísa, at ein partur - - kanska ein stórur partur - - av hesum ungdómi kemur ikki heimaftur at búsetast. Sostatt er her talan um fólkaútflutning av tí einføldu orsøk, at tey ungu ikki kunnu fáa eina undirvísing, sum lættliga kann skipast her heima.

Eftir hesum uppskoti skal landskassin veita studning til keyp, bygging ella umbygging av hølum, ið kunnu nýtast til húsarhaldsskútar. Hesin stuðul er 50 % av kostnaðinum. Haraftrat skal landskassin rinda fyristøðukvinnuni løn og 75 % av kostnaðinum av øllum øðrum rakstrarútreiðslum, herundir lærara- og lærarindulønum.

Roknað verður so við, at tann einstaklingur ella tað felag, ið stendur fyri skúlanum, kann útvega tann ferstandi stovns- og rakstrarpeningin.

Hvussu stórar landskassans útreiðslur av hesum verða kann vera torført at meta um. Tað veldst jú um, antin tað verða ein, tveir ella fleiri skúlar í landinum. Stovnsetingin og rakstrarætlanir skulu frammanundan góðkennast av landsstýrinum, sum soleiðis hevur møguleika at hava eftirlit við, at eitt nóg gott grundarlag er fyri stovnan av einum húsarhaldsskúla.

1. viðgerð 22. januar 1974 og málið beint í figgjarnevndina, sum 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av tjóðveldisflokkinum lagt fyri løgtingið og var við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum verður ført fram, at stórur tørvur er á regluligari undirvising í matgerð og húsarhaldi, men at møguleikarnir at fingið hesa kunnleika heima í Føroyum hava verið sera vánaligir, og at hetta hevur ført við sær, at ungar kvinnur tí hava leitað til onnur lond fyri at læra matgerð og húsarhald.

Í § 1 verður mælt til at veita studning til raksturin av húsarhaldsskúlum og í § 2 verður mælt til at lata 50 % í studningi til keyp ella byggiug av húsum til nevnda endamál.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, Hilmar Kass, A. Djurhuus, Trygve Samuelsen og Knút Wang) vísir til tingmál nr. 61/1973, sum sami meiriluti mælir til at samtykkja. Verður hesa samtykt gjørd, eru allir teir møguleikar til staðar, sum skotnir verða upp í hesi lóg (tingmál nr. 36/1973).

Frá landsstýrinum hevur nevndin fingið upplýst, at fólk við serligum kunnleika til húshaldsskúlar og tílíkt eru sett at gera ætlan fyri skeið í matgerð og húsarhaldi.

Á nærum øllum teim størru bygdunum og fleiri smærri bygdum við eru bygdir nýggir skúlar, har allir hentleikar viðvíkjandi matgerð eru við. Hesir skúlar (skúlakøkur og onnur hølir) verða mest nýtt í skúlatíðini frá kl. 8 á morgni til kl. 3—4 seinrapartin. Nevndu skúlar eru sera væl egnaðir til skeið í matgerð og húsarhaldi, og skuldi verið góðir møguleikar fyri at lagt kvøldskeið í húsarhaldi og matgerð til hesar skúlar.

Meirilutin heldur, at nú flest allar kvinnur arbeiða annaðhvørt heima

við at passa mann, børn og heim, ella havi útiarbeiði, liggur tað munandi betri fyri, um tilætlaðu skeið kunnu verða hildin í bygdini, enn um farast skal á skúla í Havn ella einum av teim størru bygdunum á mánaðarlangan skúla og sostatt verða burtur frá húsi og heimi.

Nevndin hevur fingið upplýst, at landsstýrið roknar við, at nevndu skeið kunnu byrja longu komandi heyst, og heldur at hetta er betra loysnin og setur sostatt einki uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Finnbogi Isaksen og Hanus við Høgadalsá) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 25. mars. (sí eisini tingnúl nr. 61/1973).

Atkvøtt var um lógaruppskotið nr. 36/1973 við navnakalli, hareftir uppskotið fall við tað at bert 12 atkvøddu ja.

J a : Signar Hansen, Hilmar Kass, Jógvan Sundstein, S. Skaale, D. Hentze, Hákun Djurhuus, Kj. Mohr, H. v. Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, J. Durhuus, Ove Mikkelsen = 12

A t k v ø d d u i k k i : Agnar Nielsen, M. Joensen, Tr. Samuelsen, A. Djurhuus, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Hilmar Beck, J. P. Thomassen, T. Olsen, P. J. Olsen, Haldor Hansen, J. Fr. Øregaard = 12.

B u r t u r s t a d d i r : K. Wang, Leon Joensen.

37. Bíligari tilfar til sethúsabygging

Á 1973, 6. desember, legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um felags innkeyp av byggitilfari.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað at taka upp lán til stovnseting av miðstøð, sum fær einkarrætt til innflutnings av byggitilfari, so sum timbri, cementi, jarni, glasi o.l.

§ 2.

Landsstýrið setur í kunngerð nærri reglur fyri, hvørjar vørur, miðstøðin hevur einkarrætt til at innflyta. Landsstýrið ásetur eisini í kunngerð á hvørjum plássum miðstøðin skal hava deildir.

§ 3.

Til at umsita miðstøðina velur landsstýrið 5-mannanevnd.

§ 4.

Miðstøðin verður rikin eftir vanligum handilsligum princippum. Við árslok verður vinningurin, tá rakstrarútreiðslurnar eru dignar frá, latin keyparum, sum í árinum hava keypt tilfar frá miðstøðini til sethúsabygging. Vinningsbýtið verður goldið í mun til, hvat hvør einstakur sethúsabyggjari hevur keypt fyri í árinum.

(F. L. j. nr. 1015-21)

lagtingslov om fælles indkøb af byggemateriale.

§ 1.

Landsstyret hemyndiges til at optage lån til oprettelse af en indkøbscentral, som har eneret til import af byggemateriale, som f. eks. tømmer, cement, jern, glas etc.

§ 2.

Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler for, hvilke varer, centralen har eneret til at importere. Landsstyret fastsætter også i bekendtgørelse på hvilke steder centralen skal have afdelinger.

§ 3.

Til at administrere centralen udnævner landsstyret et 5-mands udvalg.

§ 4.

Centralen drives efter almindelige kommercielle principper. Ved årsskifte skal overskuddet efter fradrag af driftsomkostninger tildeles de købere, som i årets løb har købt materialer fra centralen til bygning af beboelseshuse. Dividenden tildeles i forhold til, hvor meget hver enkelt beboelseshusbygger har købt for gennem året.

§ 5.

Við sethús verður í hesi lóg meint vanlig einstaklingahús og raðhús, heruppií ognaribúðir. Í teimum báðum seinru førunum verður vinningsbýtið goldið eigaranum beinleiðis. Ein treyt fyri, at vinningsbýtið kann latast, er, at húsini hvørki heilt ella partvist verða bygd til útleiging. Ongin útleiging má fara fram, tá vinningsbýtið verður latið. Einstaklingur ella hjún kunnu ikki fáa vinningsbýti, um tey eiga bús framman undan.

§ 6.

Landsstýrið setur í kunngerð gjøllari reglur fyri býtinum av vinninginum, m.a. reglur um, hvørjar váttanir krevjast til tess at verða góðkendur sum sethúsabyggjari.

§ 7.

Hendan lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 5.

Som beboelsesbus anses i denne lov almindelige enfamiliehuse og rækkehuse, herunder ejerlejligheder. I de to sidste tilfælde skal dividenden tildeles ejerne direkte. En betingelse for, at dividende kan tildeles, er, at husene hverken helt eller delvis er beregnet til udlejning. Der må ikke finde udlejning sted på det tidspunkt, da dividenden uddeles. En enkeltperson eller ægtepar kan ikke få tildelt dividende, hvis vedkommende er husejer i forvejen.

§ 6.

Landsstyret fastsætter i bekendtgørelse nærmere regler for uddelingen af dividenden, bl.a. regler for, hvilke attester forlanges for at blive godkendt som beboelseshusbygger.

§ 7.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Sethúsabyggingin hevur verið nógv dýrkandi seinastu áriui, og munurin millum, hvat eini hús kosta, og hvat fæst í láni, er stórliga vaksin, einamest á teimum størru plássunum. Eftir meting tjóðveldisflokksins er prísurin á sethúsum lækkaður stórliga í mun til lækkingarnar í fólksins inntøku. Flokkurin heldur tí, at bøttir lánimøguleikar ikki einsamallir kunnu loysa henda spurning. Harafturímóti verður neyðugt at seta í verk tiltøk, sum

1) vaksa um inntøkur fólksins, og
2) lækka prísin á sethúsum ella í minsta lagi tarna víðari dýrking.

Hetta uppskot frá tjóðveldisflokkinum miðar ímóti at útvega fólki, sum fer undir at byggja sær hús biligari tilfar til sjálvi húsini. Skotið verður upp at stovna eina miðstøð, ið skal hava einkarrætt til innkeyp av byggitilfari, so sum timbri, cementi og jarni, ið verður nýtt til sjálva byggingina.

Innflutningurin av hesum tilfari er í løtuni í fáum hondum, og yvirskotið kemur ikki alt fyritøkum her á landi til góðar. Í uppskotinum verður ikki mælt til annað tilfar, sum óbeinleiðis hoyrir við til sethúsabygging, so sum elektrisk ølgerð og hita- og sanitetstilfar, skal keypast av miðstøðini. Hetta ger seg galdandi tann vansa, at vit í dag hava hópin av smáum fyritøkum, ið flyta inn hesar vørur, og sum helst ikki hava møguleika at halda fram við virki sínum, um innflutningurin brádliga verður tikin frá teimum.

Sambært uppskotið skal innkeypsmiðstøðin verða rikin eftir vanligum handilsprinsippum. Yvirskotið skal við árslok — tá rikstrarúfreiðslur eru dignar frá — gjaldast sum vinningsbýti til teirra, sum í árinum hava keypt tilfar frá miðstøðini til sethúsabygging.

1. viðgerð 29. januar 1974 og málið beint í fíggjarnevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av tjóðveldisflokkinum lagt fyri tingið og var við fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Uppskotið er eitt lógaruppskot, har mælt verður til at geva landsstýrinum heimild til lántøku til stovnseting av miðstøð, ið fær einarætt til innflutnings av byggitilfari.

Meirilutin (Trygve Samuelsen, Knút Wang, Hilmar Kass, Andreas Djurhuus og J. Fr. Øregaard) vísir á, at brúkarar av byggitilfari, so sum húsasmiðir, snikkarar og skipasmiðjurnar eru við at samskipa seg í felag, ið fær til uppgávu at flyta inn byggitilfar, og heldur at ein slík samskipan hetri verður før fyri at innflyta byggitilfar til lægstu prísir enn omanfyri nevndi monopolhandil, og setur sostatt einki uppskot fram í hesum máli.

Minnihlutin (Finnbogi Isaksen og Hanus við Høgadalsá) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið í tí líki, tað var sett fram.

2. viðgerð 2. apríl.

Gr.1 - 6 fullu 9—0. Alt uppskotið sostatt burturfallið.

———— ————

38. Veðhald fyri lánum til sildamjøl, sildaolju v.m. á goymslu

Ár 1974, 21. januar, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald av lánum til sildamjøl og sildaolju v.m. á goymslu.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna í fíggjarárinum 1974/75 at veita veðhald fyri lánum til sildamjøl, fiskamjøl, sildaolju og matsild á goymslu. Veðhaldið verður givið fyri lánum ikki upp um 70 % av lánivirðinum.

§ 2.

Henda lóg kemur beinan vegin í gildi.

lagtingslov om garanti for lån til sildemel og sildeolie m.v. på lager.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1974/75 at garantere for lån til sildemel, fiskemel, sildeolie og konsumsild på lager. Garantien ydes for lån, der ikke må overstige 70 % af låneværdien.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Fyriliggjandi uppskot er ein endurnýgging av løgtingslóg nr. 62 frá 21. desember 1972. Landsstýrið metir, at henda heimild framvegis er neyðug.

1. viðgerð 25. januar og málið beint í fíggjarnevndina, sum 6. februar legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fyri løgtingið, sum við fyrstu viðgerð var beint í fíggjarnevndina.

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum stendur fylgjandi: «Fyrliggjandi uppskot er ein endurnýggjan av løgtingslóg nr. 62 frá 21. dec. 1972. Landsstýrið metir, at henda heimild framvegis er neyðug.»

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið og tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja tað.

(F.L. J. nr. 1408-6-1 — Ll. 19/1974).

Men viðvíkjandi viðmerkingunum um, at nevnda lóg framvegis er neyðug vildi fíggjarnevndin, at landsstýrið hevði havt kunnað henda spurning nærri. Fíggjarnevndin hevur fyrr gjørt vart við, at henda ábyrgd ikki skuldi verið neyðug longur.

Tá lógin av fyrsta sinni var sett í gildi, vóru umstøðurnar heilt aðrar. Bæði hesin fiskiskapur og viðgerðin av sildini var tá nakað, ið lítið var roynt áður, heldur ikki var sildin, mjølið ella lýsið selt frammanundan, og tí høvdu lángevararnir onga trygd fyri, hvat virði nevnda vøra hevði, ið pantur var givin í. Nú er støðan ein heilt onnur. Í flestu førum er vøran seld frammanundan, vrakaravátlan givin um, at vøran er til, og at hon lýkur allar treytir sambært sølusáttmála. Tað skuldi tí verið heilt náttúrligt fyri vanligar bankar, ið lána til driftsfinansiering, at lána upp til 70% av søluvirðinum við at fingið pant í vøruni, uttan at tað altaná at hava pant í vøruni, eisini at krevja landskassaábyrgd.

Fíggjarnevndin vil tí heita á landsstýrið um at taka upp samráðingar við avvarðandi bankar um at frávalla kravið um landskassaábyrgd í slíkum føri, har lánini mugu ætlast at koma inn undir vanligt bankayrki.

FÍGGJARNEVNDIN, 4. februar 1974.

2. viðgerð 11. februar.
Greinirnar og lógin at fara til 3. viðg. samt. 23—0.

3. viðgerð 14. februar. Lógin, sum samtykt við 2. viðg. nú endaliga samtykt 19—0.

39. Veðhald fyri lánum til keyp av agni

Ár 1974, 21. januar, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um ábyrgd fyri láni til keyp av agni.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilt landskassans vegna í fíggjarárinum 1974/75 og í 1975/76 at taka ábyrgd av lánum til keyp av agni uppá kr. 750.000,00 fyri hvørt fíggjarár.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

lagtingslov om garanti for lån til køb af agn.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansårene 1974/75 og 1975/76 at garantere for lån til køb af agn op til kr. 750.000,00 for hvert finansår.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Henda heimildin hjá landsstýrinum hevur verið givin í fleiri ár, seinast í løgtingslóg nr. 63 frá 21. december 1972 fyri fíggjarárini 1972/73 — 1973/74 við kr. 750.000,00 fyri hvørt fíggjarárið.

Tá tað í løtuni er torført at meta um tørvin fyri agnlánum, loyvir landsstýrið sær at skjóta upp, at heimildin verður endurnýggjað fyri 2 ár.

1. viðgerð 25. januar og málið beint í fíggjarnevndina, sum 6. februar legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið og var við fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

(F.L.J. nr. 1408-5-2. — LJ. 18/1974).

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur undir við uppskotinum og mælir løgtingimum til at samtykkja tað.

FIGGJARNEVNDIN, 4. februar 1973.

2. viðgerð 11. februar.
Greinarnar og lógin at fara til 3. viðg. samt. 23—0.

3. viðgerð 14. februar. Lógin, sum samtykt við 2. viðg. nú endaliga samtykt 19—0.

---

40. Broyting í skattalógini

Ár 1974, 21. januar, legði Petur F. Christiansen, landsstýrismaður fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1) Í § 7 verður sett sum nýtt stk. 2:
«Leigarar av íbúðum kunnu draga frá 10% av leiguni, tó hægst 1.000 kr. árliga».
2) § 9, nr. 7, verður orðað soleiðis:
«hjá mynstraðum fiskimonn-

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om landsskat og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1) I § 7 tilføjes som nyt stk. 2:
«Lejere af lejligheder kan fradrages 10% af lejen, dog højst 1.000 kr. årlig».
2) § 9, nr. 7, affattes således:
«hos mønstrede fiskere med

(F. L. j. nr. 430-12-26) sí eisini Ll. nr. 7/74.

um við føroyskum fiskiførum, sum fáa innføku sum løn og/ella pant í veiðu, herundir minstuløn og prísviðbót og hjá sjómonnum við føroyskum farmaskipum, ið sigla uttanlands ella millum Føroyar og útlond og ikki eru undir danskari sjómansskatting, har skattleggjandi innføka teirra uttan henda frádrátt er minni enn 20.000 kr., 200 kr. har hon er 20.000 kr. men minni enn 30.000 kr., 175 kr. og har hon er 30.000 kr., ella meira 125 kr. fyri hvønn siglingarmánaða í inntøkuárinum.

Undir somu treytum verður sami frádráttur loyvdur útróðrarmonnum til lands í Grønlandi innanfyri tíðarskeið, prógvført sum eftir reglunum í reglugerð fyri lønjavningargrunnin.

3) Í § 17, 2. stk. verður «2.000 kr.» broytt til «4.000 kr.».

4) § 27, 1. stk. verður orðað soleiðis:
«1. stk. Tey í § 14 nevndu ónvmarkaðu skattskyldugu, ið ikki eru uppihaldarar, og tey í § 15 nevndu avmarkaðu skattskyldugu lata skatt til landskassan eftir hesum sliga:
Er sligainntøkan minni enn 8.000 kr. verður ongin skattur at gjalda.

færøske fiskefartøjer, som har deres indkomst som løn og/eller andel i fangst, herunder mindsteløn og pristilskud og hos sømænd med færøske fragtskibe, som sejler udenlands eller mellem Færøerne og udland og som ikke er undergivet dansk sømandsbeskatning, når den skattepligtige indtægt uden det her omhandlede fradrag er under kr. 20.000,—, kr. 200,—, hvor den er kr. 20.000,—„ men mindre end kr. 30.000, „ kr. 175, og hvor den er kr. 30.000,— eller mere kr. 125,— for hver måned vedkommende er påmønstret i indkomståret.

Under samme betingelser indrømmes fradrag for bådfiskere i Grønland for et tidsrum dokumenteret som foreskrevet i regulativ for lønjavningargrunnin.

3) I § 17, stk. 2, ændres «2.000 kr.» til «4.000 kr.»,

4) § 27, 1. stk. affattes således:

«Stk. 1. De i § 14 omhandlede ubegrænset skattepligtige, som ikke er forsørgere samt de i § 15 omhandlede begrænset skattepligtige svarer skat til landskassen efter følgende satser:
Er skatteindtægten under 8.000 kr. svares ingen skat.

Er inntøkan er indtægten kr.	men minni enn men mindre end kr.	verður goldið erlægges kr.	av af kr.	og av hinum og af resten .....
8.000	10.000	0	8.000	10%
10.000	15.000	200	10.000	20%
15.000	20.000	1.200	15.000	27%
20 000	30.000	2.550	20.000	35%
30.000	40.000	6.050	30.000	41%
40.000	50.000	10.150	40.000	57%
50.000	75.000	15.850	50.000	63%
75.000	100.000	31 600	75.000	68%
100.000	200.000	48.600	100.000	70%
200.000	400.000	118.600	200.000	72%
400.000	500.000	262.600	400.000	74%
meira enn mere end	500 000	336.600	500.000	76%

Tey í § 14 nevndu óavmarkaðu skattskyldugu, ið ern uppihaldarar, lata skatt til landskassan eftir hesum stiga:

Er stigainntøkan minni enn 10.000 kr., verður ongin skattur at gjalda.

De i § 14 omhandlede ubegrænset skattepligtige personer, der er forsørgere, svarer skat til landskassen efter følgende satser:

Er skalaindtægten under 10.000 kr. svares ingen skat.

Er inntøkan er indtægten kr.	men minni enn men mindre end kr.	verður goldið erlægges kr.	av af kr.	og av hinum og af resten .....
10.000	15.000	0	10.000	10%
15.000	20.000	500	15.000	25%
20.000	30.000	1.750	20.000	40%
30.000	40.000	5.750	30.000	44%
40 000	50.000	10.150	40.000	57%
50.000	75.000	15.850	50.000	63%
75.000	100.000	31.600	75.000	68%
100.000	200.000	48.600	100.000	70%
200.000	400.000	118.600	200.000	72%
400.000	500.000	262.600	400.000	74%
meira enn over	500.000	336.600	500.000	76%

5) 1 § 26, 1. stk., 1. punktum verður «300 kr.» broytt til «350 kr.».	5) I § 26, stk. 1, 1. punktum ændres «300 kr.»» til «350 kr.».
§ 2.	§ 2.
Henda lóg fær gildi frá og við skattaárinum 1974/75.	Denne lov træder i kraft fra og med skatteåret 1974/75.

Viðmerkingar:

Til 1.

Í seinastu tingsetu var spurningurin frammi um at veita leigarum skattligan frádrátt av leigaútreiðslunum, so hesir í størri mun enn nú verða javnsettir við húsaeigarar, ið kunnu draga frá fyri umsiting av hústum. Landsstýrið hevur arbeitt við málinum og hevur samtykt at mæla til ein frádrátt uppá 10% av leiguni, tó hægst kr. 1.000,00 árliga. Treytin fyri at fáa frádrátt má vera, at leigarin uppgevur leigaútreiðsluna og hvønn hon er goldin til.

Frádrátturin er bert galdandi fyri íbúð og ikki fyri einstøk rúm. Fyri at leigað høli skal koma undir heitið íbúð, má krevjast at leigað er meira enn eitt rúm við køki fyri seg sjálvan.

Húsaleigufrádrátturin verður mettur at kosta landskassanum um 300.000 kr. árliga.

Til 2.

Føroya Fiskimannafelag hevur havt umsókn um at lækka inntøkumarkini fyri fiskimannafrádráttin, soleiðis at markið kr. 15.000,00 verður broytt til 20.000 kr. og 20.000 kr. verður broytt til 30.000 kr.

Landsstýrið tekur undir við umsóknini og setur fram uppskot samsvarandi.

Samstundis hevur landsstýrið heitt á lívkningarráðið at hækka frádráttin fyri kost hjá útróðrarmonnum frá 5 kr. til 7 kr. um dagin.

Til 3.

Spurningurin um skatting av hjúnum hvørt sær hevur seinastu árini verið umrøddur. Landsstýrið hevur havt hetta til kanningar saman við øllum málinum um at koma fram til eitt skattingarlag av hjúnum, sum kenst rættvíst bæði í teimum førum, har maður og kona eru í vinnu úti og teimum, har annar parturin burturav arbeiðir í heiminum.

Eina javnstilling á hesum øki annaðhvørt við sundurbýti av inntøkunum í báðum førum ella einum samskattingarlag, sum er øðrvísi, hava mong lond arbeitt við, men enn er ongum eydnast at loysa málið til fulnar.

Sum fyribils loysu skjýtur landsstýrið upp, at hámarkið fyri frádrátt fyri konu í útiarbeiði verður hækkað frá kr. 2.000 til kr. 4.000.

Broytingin gevur landskassanum umleið 1.500.000 kr. minni í skatti.

Til 4.

Sum prís- og lønarviðurskiftini hjá fólki hava broytt seg, verður hildið neyðugt at broyta stigan til landsskatt soleiðis, at lætt verður um skattin av lág- og miðalinntøkunum, meðan afturfyri er hækkað um skattin á háinntøkunum.

Sum dømi um broytingar eftir uppskotinum kann nevnast, at landsskatturin av einari skattskyldugari inntøku uppá kr. 15.000,00 lækkar við 54% og landsskatturin av einari inntøku uppá kr. 20.000,00 við 27% og 26.000 kr. við 10%.

Aðrenn tingið fór heim í heyst, var uppskot frammi um at hækka skattin av yvirtíðararbeiði, tí torført var at fáa fólk at arbeiða yvir av tí, at hildið var, at skatturin tók ov nógv av seinast vunnu krónunum.

Landsstýrið hevur arbeitt við málinum og heldur, at um skattastigin verður broyttur soleiðis, at strekkið í stiganum, har skattahækkingin er nærum proportional og ikki progressiv, er spurningurin um markskattin av yvirtíðarløn eins væl og markskatturin av flestu vanligu inntøkum loystur.

At inntøkurnar omanfyri 40.000 kr. í skattskyldugari inntøku (sum svarar til eina bruttoinntøku uppá ca. 60.000 kr.) koma undir progressivum stiga er í tráð við hugsanina um, at skattur eisini skal latast eftir førimuni. Í hesum sambandi er eisini at hava í huga at javnvágskatturin gevur skattafrádrátt í sama mun, sum inntøkan hækkar og verður tí ein eykainntøka ikki stórt meira skattað enn seinni endin av vanligu inntøkum.

Annars arbeiðir ein serkøn nevnd við at fáa gjørt eina serliga lóg um skatting av partafeløgum, sum betur enn undir galdandi skipan gevur feløgum høvi til at menna seg og at hava eitt javnt lag í fleggingum og at finna eina rimiliga skattahædd fyri inntøkur, ið latnar verða úr felagnum til partaeigararnar. Eisini vil ein slík lóg javnstilla leyvtisku feløgini í skattingini uttan mun til hvør heimstaðarkommunan er.

Í flestu londum er serstøk partafelagsskattalóg, sum avmarkar dupultskattingina av partafelagsinntøkum, men sum eisini miðar ímóti at avmarka peningahæddir, sum tíknar verða úr felagnum til vanliga nýtslu.

Landsstýrið væntar seinni at kunna geva tinginum gjølliga frágreiðing um hetta og onnur skattamál.

Broytingin í skattastigunum verður mett at geva landskassanum eina minni innløku uppá 3,5 milj. kr., mett eftir líkningini 1973/74.

Til 5.

Landsstýrið heldur tað vera neyðugt at ajourføra barnafrádráttin í landsskatti og skjýtur upp at hækka frádráttin fyri hvørt barnið frá 300 kr. til 350 kr.

Hækkingin av barnafrádráttinum verður mett at kosta landskassanum 625.000 kr., mett eftir líkningini 1973/74.

Samanlagt eru hesar broytingar mettar at kosta landskassanum tilsamans umleið 6 milj. kr.

Hækkingarnar í skattskyldugu inntøkunum, sum nógv ætlast at hava verið seinasta ár, skuldu tó givið landskassanum nakað meir enn hetta innaftur, soleiðis at leggjast kann uppfyri økta kostnaðin av landshúsarhaldinum í komandi tíð.

1. viðgerð 23. januar og málið beint í skattanevndina (sí eisini nr. 45/1973), sum 25. januar legði frum soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið og eftir 1. viðgerð varð tað beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og ger hesar viðmerkingar:

Landsstýrið sigur í viðmerkingunum til uppskotið, at tann serliga skattanevndin, sum landsstýrið hevur sett, hevur arbeitt við spurninginum um serskatting av hjúnum, men er nevndin ikki liðug við hetta arbeiði, og mælir landsstýrið tí til sum fyribils loysn at hækka frádráttin fyri konu í útiarbeiði frá 2.000 kr. til 4.000 kr.

Hesum tekur skattanevndin eftir umstøðunum undir við, men setur samstundis fram uppskot til samtyktar at áleggja landsstýrinum at koma við uppskoti um at fáa samskattingina avtikna.

Til pkt. 4: Nevndin ásannar, at tær broytingar, sum landsstýrið skjýtir upp í skattastigunum geva ein vissan lætta fyri skattskyldugu inntøkurnar upp til 40.000 kr. Nevndin kundi hugsa sær henda lætta eitt sindur størri, men heldur tað ikki eftir umstøðunum vera ráðiligt at gera broytingar nú.

Til pkt. 5: Landsstýrið mælir til at hækka barnafrádráttin í landsskattinum frá 300 kr. til 350 kr., men her skjýtir nevndin upp, at hesin frádráttur verður settur til 400 kr.

Í løgtingsmáli nr. 20/1971 um broyting í skattalógini varð broytiug gjørd í § 7, hareftir útreiðslur til umsiting av sethúsum vóru settar til fastan frádrátt uppá 1.000 kr. árliga utan prógvførslu, men nevndin heldur, at prísviðurskiftini viðvíkjandi viðlíkahaldsútreiðslum hava broytt seg so nógv, at neyðugt er at hækka henda frádrátt til 1.600 kr. árliga.

Nevndin hevur undir viðgerðini havt til umrøðu bræv frá Havnar arbeiðsmannafelag og øðrum arbeiðarafeløgum viðvíkjandi frádrátti fyri oljuklæðir hjá arbeiðsmonnum eins og fiskimønnum fáa.

Nevndini kunnugt eru vissir frádráttir fyri skitið arbeiði á landi eins og løntakarafrádráttirnir í sínari tíð vórð ætlaðir til tílíkar útreiðslur, ið ikki kundu prógvast beinleiðis.

Í sambandi við áheitanina um skattafrítt lágmark skal verða vist til, at skattskyldugar inntøkur hjá uppihaldarum upp til 11.000 kr. bera ongan landsskatt.

Havnar húsaeigarafelag hevur eisini vent sær til tingið við ynski um at fáa frádráttin fyri húsaútreiðslur hækkaðan frá 1.000 kr. til 3.000 kr.

Nevndin vísir her til, at hon hevur skotið upp, at nevndi frádráttur verður broyttur frá 1.000 kr. til 1.600 kr.

Nevndin er annars samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við smærri broytingum.

Nevndarlimirnir Jógvan Sundstein og Finnbogi Isaksen vilja undir fyriliggjandi umstøðum mæla til at samtykkja uppskot landsstýrisins við teimum broytingum, sum nevndin skjýtir upp, men vil tó gera fylgjandi viðmerkingar:

Fyrst av øllum vilja vit átala, at landsstýrið, tá ið tað leggur fram uppskot í skattalógini, sum ætlanin er skal galda fyri komandi líkning, kemur so seint við uppskotinum, at tað neyvan eru stundir til at viðgera málið nóg gjølla. Sjálvt um tað má haldast, at skattatrýstið í Føroyum sæð sum heild er lættari enn í flestu ella kanska øllum grannalondum okkara, mugu vit tó viðganga, at á meðalinntøkum (bruttoinntøkur frá 30.000 til 50.000 kr.)er trýstið minst líka so hart og kanska harðari enn í øðrum londum. Hetta trýst hevur keust harðari og harðari seinastu árini við nominellum lønarhækkingum, men samstundis eisini hækkandi livikostnað, men kortini við einum nærum óbroyttum skattastiga.

Tíðin má tí nú vera komin til at taka alla okkara skattaskipan upp til heilt gjølliga viðgerð samstundis sum toll-lógin eigur at verða endurskoðað og møguleikarnir fyri eini samskipan av hesum báðum størru inntøkukeldum landskassans mugu kannast.

Landskassin hevur seinni árini havt rættiliga stór rakstraravlop, og hetta eigur eisini í ein vissan mun at vera soleiðis í tíðum við góðum vinnumøguleikum og stórum økonomiskum aktiviteti, men ansast má samstundis eftir, at alt ov nógv meira ikki verður uppkravt í skatti og tolli,

enn ætlað var á fíggjarlógini, tí hetta vil gera, at almenna nýtslan verður størri enn ætlað, hert tí at peningurin er tøkur.

Sum grundarlag fyri tí fíggjarári vit nú eru í, 1973/74, var ein samlað skattskyldug inntøka uppá 382 mill. kr. Hendan inntøkan svaraði ein landsskatt uppá 82 mill. kr. ella 21,4% av inntøkuni. Um vit meta, at skattskylduga inntøkan samanlagt fyri landið í 1973 hevur verið 20% hægri vil hetta geva 457 mill. kr. Vegna progressiónina í skattastiganum vil hetta helst geva ein samlaðan landsskatt uppá 22,5% ella ca. 103 mill. kr. Samlaði inntøkumissur landskassans av teim broytingum í skattalógini, sum nú er til viðgerðar verður ca. 8 mill. kr. Tað vil siga, at inntøkan av landsskatti aftaná barnafrádrátt fyri 1974/75 kann metast at bliva um leið 95 mill. kr.

Tollinntøkur landskassans higartil í hesum fíggjarári (pr. 23. januar 1974) hava verið ca. 85 mill. kr. Fyri alt fíggjarárið 1973/74 kunnu hesar inntøkur metast til 107 mill. kr. Um roknað verður við 10 % hækking av hesum inntøkum komandi ár koma tær í 1974/75 at verða ca. 118 mill. kr.

Sostatt kann roknast við, at inntøkurnar hjá landskassanum í 1974/75 verða hesar:

Landsskattur (incl. pensiónsskatt)	95.000.000,—
Tollur	118.000.000,—
	213.000.000,—

Í tí fíggjarlógaruppskoti fyri 1974/75, sum framlagt varð á ólavsøku vóru hesar inntøkur uppførdar við:

Landsskattur (incl. pensiónsskatt)	90.000.000,—
Tollur	94.000.000,—
	184.000.000,—

Við tí broytta skattastiganum og óbroyttum tollsatsum og annars óbroyttum fyritreytum kann inntøka landskassans koma at verða 29 mill. kr. meira enn mett í fíggjarlógaruppskotinum. Vit hava altíð mett, at almenna nýtslan ikki átti at verið økt lutfalsliga meira enn inntøkuvøksturin í samfelagnum. Um útreiðslurnar á komandi fíggjarlóg verða økt lutfalsliga meira enn inntøkurnar, vil hetta í mun til núgaldandi fíggjarlóg verður helst eitt rættiliga stórt

avlop, og tí vilja vit taka tað fyrivarni møguliga í sambond við komandi fíggjarlógarviðgerð at koma við broytingaruppskoti til skattastigan.

Nevndin er samd um at skjóta upp, at frádrátturin fyri umsiting av húsum verður hækkaður úr 1.000 kr. upp í 1.600 kr. Í hesum viðfangi verður tó gjørt vart við, at vit koma at venda aftur til bústaðarpolitikkin sum heild.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við hesum broytingum:

Uppskot
til
broytingar.

Til pkt. 5:

«í § 26, 1. stk. 1. pkt. verður «300 kr.» broytt til «400 kr.»

§ 7, 1. pkt. í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt við seinni broytingum verður «1.000 kr.» broytt til «1.600 kr.». § 27, 1. stk. verða fyrstu 4 reglurnar aftaná fyrstu talvu orðaðar soleiðis:

«Tey í § 14 nevndu óavmarkaðu skattskyldugu, ið eru uppihaldarar og tey, sum eru fólka- ella avlamispensionistar, lata skatt til landskassan eftir hesum stiga:»

«i § 26, stk. 1, pkt. 1 ændres «kr. 300» til «kr. 400».

I § 7, pkt. 1 i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat med senere ændringer ændres «kr. 1.000» til. «kr. 1.600». § 27, stk. 1, affattes de første 4 linier efter første skala således:

«De i § 14 omhandlede ubegrænset skattepligtige personer, der er forsørgere samt folke- og invalidepensionister, svarer skat til landskassen efter følgende satser:»

Uppskot
til
samtyktar

Landsstýrinum verður álagt í hesi tingsetuni at leggja uppskot fyri tingið um broytingar í skattalógini um avtøku av samskatting av hjúnum soleiðis, at hendu broyting í høvuðsheitinum er grundað á, at inntøka teirra verður býtt í helvt.

Frá Sigfried Skaale framlagt 24/1 soljóðandi:

Broytingaruppskot til løgtingsmál nr. 40/1973.

§ 34, 2. stk. nr. 1, verður orðað soleiðis:
«at skattainntøkan hjá hvørjum einstøkum skattgjaldara skal verða hækkað (inntøkur í stórra lagi, lætt hús, serstakliga stórar vinning í farnum árum, serstakliga góð rakstrarlíkindi) ella verður lækkað (inntøkur í minna lagi, nógv børn, elli, sjúka, stór tap ella óluppí farnum árum) við upp til 70%, men her skal tó verða ansað eftir, at tað, sum skattainntøkan er hækkað ella lækkað við í teimum einstøku førum — eftir áður nevndu umstøðum — kemur at svara til ta hækking ella lækking, ið skattgjaldarar fáa, sum hava lítsvarandi inntøkur.»

§ 34, 2. stk. nr. 2, verður orðað soleiðis:

«at inntøkur, ið eru ikki størri enn 8.000 kr. er loyvt í kommunala líkningarvaldinum at lækka eftir ætli.»

Afturtikið 25/1.

2. viðgerð 25. jan. Frávik frá tíðarfrestini.
Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:
Broytingaruppskot frá nevndini til pkt. 5 gr. 26, 1. stk. 1. pkt. samt 23-0.
Broytingaruppskot frá nevndini til gr. 7, pkt. 1 samt, 23- -0.
Pkt. 4 við uppískoyti frá nevndini til gr. 14 samt. 22- -0.
Pkt. 1 samt. 23—0.
Pkt. 2 samtykt 23—0.
Pkt. 3 samtykt. 21—0.
Pkt. 4 samtykt 22—0.
Pkt. 5 so broytt samtykt 22- -0.
gr. 2 samtykt uttan atkv.gr.
Uppskot til samtyktar samt. 21—0.
Lógin so samt. at fara til 3. viðgerð við 22—0.

3. viðgerð 25. januar. Lógin sum hon var samt. við 2. viðgerð nú endaliga samtykt við 20- -0.

41. Landleiðin

Ár 1974, 21. januar, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot

til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiðu á landleiðini.

§ 1.

1. § í løgtingslóg nr. 12 frá 10. mars 1964 um fiskiveiði á landleiðini, 1. stk., 1. reglubrot verður orðað soleiðis:

«Landleiðin er, sum víst á korti viðheft hesi lóg sum skjal, sjógvurin innan fyri linju, sum gongur 70 fjórðingar frá grundlinjum dignar gjøgnum hesi 13 støðini.»

§ 2.

Sum nýtt 3. stk. í somu lógargrein verður skoytt uppí:

«Upp í landleiðina roknast somuleiðis Føroya banki innan fyri 400 metra dýpdarlinjuna.»

§ 3.

Henda lóg kemur beinan vegin í gildi.

Greinargerð:

Tjóðveldisflokkurin leggur her við fram sama uppskot um útflyting føroyska fiskimarksins, sum ikki fekk frama fyrr í hesi tingsetu.

Sum grund fyri, at flokkurin nú leggur sama uppskot fram, verður víst á greinargerðina í uppskoti flokksins til samtyktar viðvíkjandi uppsøgn av millumlandasáttmálanum um skipan av fiskiveiðini við Føroyar. Av tí, sum síðan tá er framkomið, er tað greitt, at vandi er fyri at veiðirættindi okkara á fjarleiðunum verða so mikið skerd, at bráðneyðugt verður

(F.L. J. nr. 1500-1-3).

meir enn nakra tíð áður at verja okkara egna sjógv móti útlendskari fiskiveiði nógv meir enn nú verður gjørt.

Í aðrar máttar verður vist á greinargerð flokksins í tingmáli nr. 13/1973: Landleiðin, fyrr í tingsetuni.

Á Føroya løgtingi, 21. januar 1974.

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

1. viðgerð 23. januar og málið beint í marknaðarnevndina, sum 4. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum, og varð tað við 1. viðgerð beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt tað.

Tað er aðru ferð, at tjóðveldisflokkurin leggur hetta sama málið óhroytt fyri tingið í hesi tingsetuni, samanber løgtingsmál nr. 13: Landleiðin, sum varð avgreitt fyri jól. Málið fall, tað fekk bert 6 atkvøður.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirihluta og tveir minnilutar.

Meirihlutin (J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen, Trygvi Samuelsen og Hilmar Kass) er av tí áskoðan, at einki nýtt er komið fram í málinum, síðan tað varð viðgjørt í vetur, sum gevur grund til broytta støðu og vísir til tað,ið tá varð ført fram.

Minnilutin (Hákun Djurhuus og Kjartan Mohr) vísir til tað, teir fórdu fram í hesum máli, tá tað var fyrru ferð á tingborði í hesi tingsetuni.

Minnilutin (Erlendur Patursson) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 7. mars. Lógaruppskotið gr. 1 fall 6—0.
Alt málið sostatt burturfallið.

42. Uppsøgn fiskiveiðusáttmálans

Ár 1974, 21. januar, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at millumlandasáttmálin um skipan av fiskiveiðini við Føroyar verður uppsagdur beinan vegin.

Greinargerð:

Tá ið meiriluti tingsins í heyst samtykti millumlandasáttmálan um fiskiveiðina við Føroyar samtíðis sum tað feldi uppskotið um útflyting fiskimarksins við Føroyar, var tað óivað - - og allra helst fyrst og fremst við tí í huga, at ikki fór at verða trongt um veiðirættindi okkara á fjarleiðunum.

Nú er hin vegin alt útlit til, at sildaveiði føroyinga í Norðsjónum kemur at verða almikið skerd og møguliga heilt bannað. Hetta kemur at fáa álvarligar avleiðingar fyri føroyska fiskiveiði. Vit rokna við sum givið, at landsstýrið av sínum eintingum nú beinan vegin mótmælir teim framkomnu ætlanum um slíka skerjing ella slíkt bann. Men — soleiðis sum viðurskifti okkara eru -- er ivasamt, hvat slíkt mótmæli nyttar. Tað er hin vegin áskoðan tjóðveldisflokksins, at tað, sum nú er í gerð viðvíkjandi sildaveiðini í Norðsjónum, hevur brotið fyritreytirnar fyri góðtøku sáttmálans um fiskiveiðina við Føroyar so mikið, at hesin sáttmáli eigur at verða fingin úr gildi so skjótt sum tilber, og soleiðis at vit samtíðis flyta fiskimark okkara út. Viðvíkjandi fiskimarksútflytingini verður vist á uppskot tjóðveldisflokksins: Landleiðin, sum er lagt fram í øðrum fingmáli.

1. viðgerð 23. januar og málið beint í marknaðarnevndina, sum 6. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum, og varð við 1. viðgerð, sum fór fram 23. januar, beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjort tað.

(F.L. J. nr. 15(0-1-7).

Undir nevndarviðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirilutu og tveir minnilutar.

Í løgtingsmáli nr. 17/1973: Skipan viðvíkjandi fiskiskapi undir Føroyum, varð fiskisáttmálin sum løgtingsmál á tingi. Ein meiriluti (J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen, Trygvi Samuelsen og Hilmar Kass) mælti til at samtykkja, at hann varð undirskrivaður. Sami meiriluti er av tí áskoðan, at eingi er hent síðan tá, sum talar fyri at siga sáttmálan upp. Við hesum sáttmála vunnu vit sømdir, sum eru av størsta týdningi fyri fiskiskap okkara undir Føroyum. Annars verður vist til tað, sum er ført fram í løgtingsmálunum nr. 41/73: Landleiðin og nr. 17/73.

Minnilutin (Hákun Djurhuus og Kjartan Mohr) vísir til tað, teir førdu fram í løgtingsmáli nr. 17/73.

Minnilutin (Erlendur Patursson) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 7. mars.

Lógaruppskotið fall 6—0 og sostatt burturfallið.

---

43. E.E.C.-málið

Ár 1974, 21. januar, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

1. Álagt verður landsstýrinum at boða avvarðandi myndugleikum frá, at Føroyar verða uttan fyri EEC-samgongurna.
2. Landsstýrið saman við 4 av løgtinginum valdum tingmonnum tekur upp samráðingar við EEC-samgonguna um handilsviðurskifti Føroya við hesa samgongu.

Greinargerð:

Tjóðveldisflokkurin leggur hervið fram sama uppskot í EEC-málinum,

sum hann legði fram í seinasta tingsetu, men sum tá ikki fekk frama.

Síðan tá eru umstøðurnar í EEC-málinum so mikið broyttar, at flokkurin heldur líkindi vera til, at meirilutin tingsins nú kemur at samtykkja tað sama uppskot, sum meirilutin tá vildi ikki góðtaka.

Viðvíkjandi EEC-málinum annars verður vist á tær greinargerðir, sum tjóðveldisflokkurin í fyrrinn tingsetum hevur borið fram.

Á Føroya løgtingi, 21. januar 1974

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

1. viðgerð 24. januar og málið beint í marknaðarnevndina, sum 25. januar legði frum álit, samanber løgtingsmál nr. 44/1973.

2. viðgerð 25. januar. Frávik frá tíðarfrestini.

Punkt 2 í uppskotinum fall 6—0.

(Punkt 1 burturfallin).

Sí annars løgtingsmál nr. 44/1973.

---

44. Felagsmarknaðarmálið

Ár 1974, 22. januar, legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

1. Landsstýrið boðar ríkisstjórnini frá, at heimastýrið ikki kann mæla til føroyska luttøku í EF.

2. Landsstýrið tekur upp samráðingar við ríkismyndugleikarnar og EF um viðskifti Føroya við EF.

(F.L. J. nr. 1198-2/74).

Viðmerkingar:

1. Eftir uppskoti frá landsstýrinum framlagt 13. mars 1973 samtykti løgtingið tann 9. apríl, «at føroysk luttøka í EF undir verandi treytum, serliga hvat fiskirættindunum viðvíkur, ikki er ráðilig». Samstundis varð álagt landsstýrinum at gera sítt til, «at EF's reglur um fiskirættindi verða broyttar, so tær betur samsvara tørvinum hjá økjum og londum, har fiskivinnan er av avgerandi týdningi og aðrir vinnumøguleikar avmarkaðir». Eisini varð álagt landsstýrinum at kanna møguleikarnar fyri serskipan við EF fyri føroyskan útflutning.

2. Av tí at Føroyar eru uttan fyri EF, var frægast furbari vegurin hjá landsstýrinum at gera sítt til at ávirka fiskirættindareglurnar hjá EF, at danska stjórnin átók sær at leggja fram uppskot um tiltøk í so máta í EF-ráðnum.

Í samráð við landsstýrið legði danska stjórnin 20. mars 1973 fyri EF-ráðið hjálagda memorandum. Landsstýrið luttók í orðingini av hesum skjali, sum miðar ímóti, at reglurnar hjá EF viðvíkjandi fiskirættindunum verða soleiðis, at lond og landspartar í Norðuratlantshavinum, ið eru bundin til fiskivinnu, skulu fáa størri sømdir og rættindi enn lond, har fiskivinna er av avmarkaðum búskaparligum týdningi.

Sipað var til lond og landspartar, sum nøkur eru partar av EF (Grønland, Hetland og Orkneyoyggjarnar), meðan onnur ikki eru tað (Føroyar, Ísland og Norðurnoreg).

3. Grundsjónarmiðið í memorandumtiltakinum er, at nevndu lond og landspartar í Norðuratlantshavinum eru avgerandi bundin til fiskiskap og viðgerð av fiskavørum sum støði undir búskapi teirra, samstundis sum aðrir vinnumøguleikar eru rættiliga avmarkaðir. Hesi sonn lond og landspartar hava tradition í at reka fiskiskap á dúgligan hátt bæði við heimastrendur og á fjarleiðum. Tí er tað bæði rímiligt og eitt fyri allar partar skilagott arbeiðsbýti, at fiskivinnuloudini og fiskivinnulandspartarnir verða tryggjað møguleikar fyri fiskiskapi framyvir, meðan tey framtíðnu EF-ídnaðarloudini, har fiskivinnan er av lítlum búskaparligum týdningi, og aðrir vinnuvegir eru meira sjálvsagdir enn fiskivinna, eiga at minka fiskiskap teirra, serliga á fjarleiðum.

4. Í memorandumminum er ikki nágreiniliga skotið upp, hvussu ein heildarloysn fyri nevndu lond og landspartar skal vera. Haraftrímóti eru nevnd ávís høvuðssjónarmið, sum skipanin eigur at byggja á. Hesi sjónarmið eru í stuttum:

at fiskavirkir í londunum og landsportunum undir skipanini skulu hava framíhjárætt til fiskarí á leiðum uttan fyri 12 fjórðinga fiskimarkið,

at sínamillum veiðirættindi fyri fiskavirkir í londunum og landspørtunum skulu fyriskipast í sáttmálum. Fyri Føroyar, sum í stóran mun eru handhar til fjarfiskiskap á umroddu leiðum, er spurningurin um sínamillum veiðirættindi av alstórum týdningi.

at seravtalur skulu gerast við umroddu lond, ið ikki eru uppi í EF fyri at tryggja rímuligar sølu- og forsýningstreytir. Hetta sipar til, at londini uttan fyri EF skulu fáa lagaligar tolltreytir í EF, og tað vil samstundis bøta um møguleikarnar hjá EF at fáa fisk og fiskavørur, sum trot oftа er á.

at samarbeiðið um at varðveita og endurreisa fiskastovnin í Norðuratlantshavinum verður økt.

Hesi sjónarmiðini í memorandumunum taka ikki dagar ímillum, um viðkomandi land ella landspartur er partur av EF ella ikki. Tey eru samanhangandi í eini heildarloysn, soleiðis at til dømis spurningurin um lagaligar tolltreytir er samanvovin við spurningarnar um sínamillum veiðirættindini. Út frá føroyskum sjónarmiðum er hetta ein týdningarmikil partur av heildarloysnini.

Umframt áður nevndu høvuðssjónarmið eru tvinni, sum sipa til lond og landspartar, ið eru uppi í EF. Hesi sjónarmið eru,

at EF skal geva stuðul til úthygging av fiskivinnuni í viðkomandi londum og landspørtum, og

at EF skal lata stuðul til neyðugar broytingar, ið stundast av, at ávis øki í EF verða rakt av, at traditionelt fiskarí skal minkast.

EF kann ikki uttan serligar samtyktir við tí í hyggju lata stuðul til nevndu endamál í londum og landspørtum, sum ikki eru uppi í EF. Ein avmarkan av fiskiskapinum hjá summum EF-limalondum vildi tó verið óbeinleiðis stuðul til uttanfyristandandi fiskivinnuøki.

Sum nevnt hevði landsstýrið av grundum, sum lagdar vóru fram seinasta vár, sagt, at luttøka í EF ikki var ráðiligt, og tí var tað fyri landsstýrið umráðandi, at fanst heildarloysn, ið miðað varð ímóti, ikki á nakran hátt skuldi vika tað støðið, sum spurningurin um framtíðar viðurskiftі Føroya mótvegis EF skuldi metast út frá. Landsstýrisins sjónarmið var við øðrum

orðum at fáa til vega eina heildarloysn, sum vildi verða Føroyum at gagni uttan mun til, um Føroyar gjørdust luttakari í EF ella ikki.

5. Eftir at memorandummið varð lagt fyri EF-ráðið, varð tað givið EF-kommissiónini við áheitan um at kanna tey donsku sjónarmiðini.

Í viðlagda skjali frá 18. september 1973 letur EF-kommissiónin frágreiðing til EF-ráðið um nevnda spurning. Høvuðseydkennið við frágreiðingini er, at hon ber í sær sjónarmið um, hvussu teir í memorandumminum reistu spurningar kunnu greiðast lutvís samboert galdandi EF-reglur og heimildir, lutvís samboert galdandi millumlandaskipanir.

Harnæst er vert at leggja til merkis, at frágreiðingin øvugt av memorandummmimum fyrst og fremst talar um Grønland og Føroyar út frá einum sjónarmiði, sum snýr seg um luttøku í EF, meðan tann størri og fyri Føroyar munandi meira átroðkandi spurningurin um eina norðuratlantiska heildarloysn bert í lítlan mun fær umroðu.

Sostatt kann sigast, at EF-kommissiónin tvíbýtur memorandummið við fyrst og fremst at tala um, hvat ið gerast kann á felagsskapsgrundarlagi, t.v.s. av serskipanum á felagsskapsgrundarlagi (EF-grundarlagi) fyri tey lond og landspartar, ið eru uppi í EF. Harafturímóti bendir lítið í frágreiðingini á, hvat ið gerast kann fyri tey uttan fyri EF verandi lond og landspartar sum lið í eini heildarloysn fyri Norðuratlantshavið. Í sjálvum sær nýtist hetta ikki at vera avvising av teimum sjónarmiðum, sum staoda í memorandumminum. Heldur er hetta tekin uppá, at EF ikki samboert verandi reglur bevur møguleika fyri at gera annað, enn hvat er innan fyri karmin av EF-felagsskapinum. Hetta sæst eisini av, at EF-kommissiónin mælir til, at tey donsku ynskini í memorandummminum fáa eitt positivt svar frá EF-ráðnum treytað av, at nýttar verða hóskandi felagsskapsloysnir.

6. Hóast EF-kommissiónin ikki skýtur upp ávís tiltøk fyri at varðveita fiskastovnin og samstundis verja fiskivinnuna í teimum londum og landspørtum, ið nevndir eru í memorandumminum, nevnir hon, at fiskaríið fyrst og fremst má fyriskipast á hóskandi hátt.

Sum eitt av tiltøkunum, ið er vert at umlugsa, er í frágreiðingini nevnt:

«Begrænsning af fiskeriet i de eventuelt udvidede farvande, som hører under medlemsstaternes højhedsområde eller juridisdiktion. En sådan begrænsning kunne især give sig udtryk i, at der for bestemte arter blev fastlagt en samlet årlig fangstkvote, som derefter skulle fordeles mellem medlemsstaternes fiskere, og i regler, som især skulle vedrøre fangstmetoder og adgang — eventuelt sæsonbetinget — til bestemte fiskeriområ-

der. Kvoterne skulle fordeles på en rimelig måde blandt alle fiskere i Fællesskabet under særlig hensyntagen til det traditionelt udøvede fiskeri.»

Tiltøk av hesum slagnum burtursæð tá sipað verður til, at avmarkingarnar skulu galda fyri ávís fiskasløg, vóru kend longu á summi 1972 frá tingingunum millum Bretland og Island um fiskirættindini hjá bretskum trolarum innan fyri íslendska 50-fjórðinga fiskimarkið. Somuleiðis vóru slík tiltøk nevnd í fráboðan til almenningin eftir tingingarnar í Edinburgh 26. apríl 1973 um avmarkan av útlendsku veiðuni undir Føroyum. At gera skipanir fyri ávís fiskaslog hevur verið skotið upp av summum londum i ST-nevndini, sum fyrireikaði havrættarstevnuna.

7. Frágreiðingin frá EF-kommissiónini endar við einari áleitan til EF-ráðið um at umhugsa frágreiðingina, soleiðis at kommissiónin harútfrá kann sova fram uppskot um, hvussu gangast kann dousku ynskjunum á møti.

EF-kommissiónin hevur í frágreiðingini í veruleikanum viðgingið, at galdandi EF-reglur viðvíkjandi fyrst og fremst fiskirættindunum eru ikki nóg góðar fyri tey lond og teir landspartar, har fiskivinnan er avgerandi í búskapinum.

8. Undir viðgerðini í EF-ráðnum av frágreiðingini frá kommissiónini vísti tað seg, at limalondini uttan Danmark vóru ímóti, at EF skuldi gera nýskipanir fyri fiskirættindini. Høvuðsorsøkin til mótstøðu teirra varð sagd at vera, at tey ikki uppundir ST-havrættarstevnuna vildu ganga við til nýskipanir fyri fiskirættindini í EF, sum á nakran hátt kundu koma at binda tey til sjónarmið av týdningi fyri støðu teirra undir ST-havrættarstevnuni (fáa prejudiserandi avleiðingar).

Tá ið limalondini uttan Danmark ikki vildu samtykkja nýggjar fiskirættindarreglur ella ganga inn fyri eini heildarloysn fyri fiskivinnubundnu londini og landspartarnar í Norðuratlantshavinum, sum skotið upp av Danmark, var heldur ikki grundarlag undir at biðja EF-kommissiónina gera og leggja fyri EF-ráðið uppskot til loysn av teimum málum, ið nevnd eru í memorandumminum.

EF-ráðið hevur sostatt ikki avvist danska ynskið um eina norðuratlantiska heildarloysn, men heldur ikki orsøk verið til at fara longri við ávísum tiltøkum í løtuni.

Frá danskari síðu hevur verið roynt at fáa hini limalondini til nú at binda seg til, tá ST-havrættarstevnan er yvirstaðin, at gera eina nýskipan av EF's fiskirættindareglum, samanber seinasta pætti í ti at síðu 10 endurgivna danska uppskotinum til samtyktar á EF-ráðsfundi 14. og 15. januar 1974.

9. Í tingmáli nr. 63/1972 var greitt frá teimum fríhandilsskipanum, ið fleiri lond høvdu gjørt við EF.

Samráðingarnar millum Noreg og EF fordu til eina fríhandilsskipan, sum er rættiliga lík fríhandilsskipanini millum Svoriki og EF, og sum kom í gildi frá 1. juli 1973. Í skipanini millum Noreg og EF hevur tað serligan áhuga fyri Føroyar, at norskur útflutningur av frystum fløkum og av reyðum til EF fær munandi tollsømdir. Fyri fryst fløk verður EF-tollurin minkaður stigvíst frá 15% til 3%; lækkingin fer fram soleiðis, at pr. 1. januar í hvørjum av árunum 1974-77 minkar tollurin 3% og verður frá 1. juli 1977 3%. Danmark og Bretland skulu krevja toll av somu vøru frá Noregi við 1½% frá 1. januar 1975 og 3% frá 1. juli 1977. Fyri reyðar (frystar við skel) minkar EF-tollurin stigvíst frá 20% til 7½%, við at hvørt stigið er 2½% til somu tíðir sum fyri fryst flok. Eisini hevur Noreg fingið tollsømdir fyri krabbar í dósum og fyri paneraði sildaflok (fersk og fryst) frá 15% niður til 3%. Aftrat eru tollsømdir fyri einstakar aðrar fiskavørur. Sáttmálin millum Noreg og EF hevur munandi minni tollsømdir fyri fiskavørur enn sáttmálin millum Ísland og EF.

Í fríhandilsskipanini millum Ísland og EF eru sambært protokoll nr. 6 tollsømdirnar fyri íslendskar fiskavørur bundnar til, at «nóg góð loysn er fingin fyri linalondini av teimum figgjarligu trupulleikunu, ið standast av teimum tilføkum, Ísland hevur gjørt viðvíkjandi fiskirættindunum».

Sum kunnugt fekst í lag ein slík loysn fyrst við Belgiu og síðani við Bretland. Samráðingar millum íslendskar og vesturtýskar myndugleikar hava ikki enn rokkið eina loysn fyri týskan fiskiskap á íslendskum landleiðini. Av hesi orsøk hevur EF-ráðið gjørt av, at tollsømdirnar í protokoll nr. 6 fyribils ikki koma í gildi. EF-ráðið samtykti samstundis at viðgera spurningin um tollfrælsi fyri íslendskar fiskavørur av nýggjum, um tað eftir 15. november 1973 var líkt til eina neyðsemju millum partarnar í fiskimarkstrætuni.

Fríhandilsskipanin millum Finland og EF kom í gildi frá 1. januar 1974.

10. Tá ið landsstýrið undir tingingunum við EF um treytirnar fyri møguligari føroyskari luttøku í EF fekk í lag eina frest uppá 3 ár fyri Føroyar til at taka støðu til limaskapsspurningin, var orsøkin, at talan var um eitt mál av allarstørsta ýdningi fyri Føroyar, og at tað tí var neyðugt at hava frægast gjørliga støði at taka avgerð í hesum máli.

Tað stóð rættiliga tíðiliga greitt, at hóast Danmark gjørdist limur og Føroyar ikki, so var av hesi orsøk ikki neyðugt at broyta heimastýrisskipan okkara. At danir fóku undir við hesum sjónarmiði kom fram undir samráðingunum, landsstýrið og marknaðarnevndin høvdu við Baunsgaard-stjórnina 29. januar 1971.

Mangir aðrir spurningar, sum gjørdu tað ivasamt at taka støðu longu

í 1971/72, vóru tó ikki nóg gjølla lýstir, og útviklingurin síðan, ársskiftið 1971/72 á økjum av stórum týdningi fyri støðutakan til EF-spurningin prógvar, at umhugsingarfriðin var gagnlig. Til dømis kann nevnast, at Noreg ikki gjørdist limur av EF, at Ísland flutti fiskimarkið út, umframt at sølumøguleikarnir fyri fisk og fiskavørur eru batnaðir munandi. Bæði Noreg og Ísland hava frihandilssáttmála við EF, sum gevur munandi tollsømdir fyri fisk og fiskavørur.

11. Longu stívar 2 mánaðar eftir, at Bretland, Írland og Danmark gjørdust limir av EF, legði, sum áður nevnt, landsstýrið uppskot fyri tingið um, at føroysk luttøka í EF undir verandi treytum ikki var ráðilig. Tingið tók undir við hesum uppskoti.

Landsstýrið hevur síðani, so sum álagt tí av tinginum, roynt at fáa til vega eitt gjølligari og betri grundarlag fyri endaligari støðutakan til spurningin um viðurskifti Føroya mótvegis EF.

12. Tá ið landsstýrið nú leggur fyri tingið uppskot um, at Føroyar ikki gerast partur av EF og um heimild til samráðingar, er orsøkin,

at tað í tíðini til 15. august 1975 valla fæst eitt betri grundarlag fyri støðutakan enn nú. Endaliga úrslitið av roynslini til at fáa EF at ganga við til nýggjar fiskirættindarreglur kemur ikki, fyrr enn EF hevur tikið støðu til úrslitið av SŤ-havrættarstevnuni. Slík støðutakan kann neyvan væntast, áðrenn umhugsingartíðin er úti.

at føroyski útflutningurin til EF av sonn sløgum av fiskavørum, sum Noreg hevur fingið tollsømdir fyri sambært fríhandilsskipanina við EF, verður í kappingini verri fyri enn sonn norska vøru. Sama vil galda í mun til íslendskar fiskavørur, tá EF-tolllætti fyri hesar kemur í gildi.

Farna árið, síðan umhugsingartíðin byrjaði, hevur ikki borið við sær verri støðu viðvíkjandi tolli fyri føroyskan útflutning av fiski og fiskavørum enn tær treytir, útflutningurin til EF frá øðrum londum uttan fyri EF (Ísland og Noreg) hevur havt.

13. Hvussu innihaldið í teirri skipan, sum samráðast skal um, verður, er torført at meta um. Í sínum roynslum at fáa til vega frægasta grundarlagið fyri at taka støðu til EF-málið hevur landsstýrið lagt dent á, at Føroyar eisini høvdu best møguliga støðið at ganga út frá í samráðingunum um aðra skipan mótvegis EF enn hana í danska luttøkusáttmálanum.

Landsstýrið boðaði seinasta vár ríkismyndugleikunum frá samtykt

tingsins 9. apríl og hevur síðani á fundum summarið og heystið 1973 við táverandi stjórn Anker Jørgensens sagt frá ætlanum sínum í EF-málinum, nevniliga ikki at gerast luttakari í, men at fáa í lag eina ikki-tiðaravmarkaða skipan fyrst og fremst fyri samhandilin við EF.

Á sonevnda EF-«toppfundinum» í Keypmannahavn í november 1973 varð frá danskari síðu borið uppá mál, at endalig avkláring av viðskifti (relatiónum) Føroya og EF's ikki kundi fara fram fyrr enn aftaná, at EF hevði tikið avgerð um broytingar í fiskiætlandarreglunum út frá úrslitinum av SF-havrættarstevnuni, og at ein skipan skjótast átti at verða gjørd, soleiðis at útflutningurin úr Føroyum til EF fekk somu tolltreytir sum danskur útflutningur.

Men tað, sum «toppfundurin» samtykti, var at heita á EF-ráðið um at finna eina loysn, sum gjørdi tað møguligt hjá Føroyum at útseta støðutakan til luttøku í EF til aftaná SF-havrættarstevnuna.

14. Á fundinum í EF-ráðnum 17. og 18. december 1973 komu viðurskiftini millum Føroyar og EF aftur til viðgerðar, men uttan at loysn fekkst. Fleiri av limalondunum vóru ímóti at gera nakað í løtuni, sum kundi bera í sær broytingar í uppløkutreytunum.

Danmark reisti tó aftur spurningin á EF- ráðsfundi 14. og 15. januar 1974 og setti har fram soljóðandi uppskot til samtyktar:

«1. Rådet tager til efterretning, at Færøernes landsstyre på det foreliggende grundlag må forventes i henhold til protokol 2, art. 3 i tiltrædelsestraktaten at ville meddele den danske regering, at det ikke vil kunne gå ind for færøsk tilslutning til EF.

2. Da EF for nærværende ikke ser sig i stand til at tilvejebringe et for det færøske hjemmestyre tilfredsstillende grundlag, er Rådet villig til at træffe et frihandelsarrangement, der giver de færøske eksportvarer tilsvarende vilkår som dansk eksport i hele EF-området, og er iøvrigt indstillet på inden for et sådant arrangements rammer at bidrage til den økonomiske udvikling i denne region inden for det danske rige.

3. I erkendelse af sit medansvar for udviklingen både i Grønland og på Færøerne som dele af det danske rige erklærer Rådet sig rede til — så snart havretskonferencen er afsluttet — at revidere fiskerilovningen i lyset af havretskonferencens resultater med henblik på yderligere at fremme den økonomiske udvikling i de to regioner af det danske rige.

Medlemslandenes regeringer er indstillet på under den forestående hav-

retskonference i fællesskab at arbejde for, at de fiskeriafhængige regioners specielle interesser tilgodeses.»

Fyrsta petti í uppskotinum er fráboðan av, at landsstýrið kann væntast at geva donsku stjórnini boð um, at Føroyar ikki gerast luttakari í EF. Tað er samsvarandi hesum, at landsstýrið nú leggur uppskot fyri tingið.

Samhært framgangsháttin, ið er fyrisettur í grein 3 í protokoll nr. 2 um Føroyar í upptøkusáttmálanum skal danska stjórnin síðan boða EF-ráðnum frá hesi avgerð. EF-ráðið skal tá eftir uppskoti frá EF-kommissiónini taka støðu til eina skipan fyri viðurskiftini millum Føroyar og EF.

Um innihaldið í hesi skipan verða samráðingar við EF-kommissiónina.

Grein 2 í uppskotinum, sum frá danskari síðu er lagt fyri EF-ráðið, ber í sær ynski um, at skipanin skal geva føroyskum útflutningi til EF somu freytir, sum danskar vørur hava, t.v.s., at EF-tollurin fellur burtur 1. juli 1977, og at EF-tollurin skal lækkast straks, tá skipanin kemur í gildi, til somu legu, sum tollurin fyri danskar vørur er komin í. Eisini verður skotið upp, at EF undir skipanini skal siga seg sinnað til at stuðla búskaparligu framgongdini í Føroyum.

Samhært grein 3 skal EF-ráðið binda seg til at endurskoða fiskariskipanina í EF, tá úrslitið av SF-havrættarstevnuni fyriliggur. Annars skulu EF-limalondini vera sinnaði til í felag undir havrættarstevnuni at virka fyri áhugamálunum hjá økjum, sum eru serliga nógv bundin at fiskivinnuni.

Limalondini tóku ikki endaliga støðu til danska uppskotið, men fleiri hildu tó fast við ikki at kunna ganga vð til nú at binda seg til nakað viðvíkjandi havrættarstevnuni og bildu somuleiðis, at tann ynskta tollskipanin fyri føroyskar útflutningsvørur møguliga kundi orsaka trupulleikar við onnur uttan fyri EF verandi lond. Harafturímóti tóku tey grein 1 til eftirtektar.

Hesin EF-ráðsfundurin kom sostatt ikki til nakað úrslit, og verður málið viðgjørt aftur á fundi í ráðnum 30. januar í ár.

15. Landsstýrið er av teirri áskoðan, at løgtingið av áður umroddu grundum nú eigur at gera av, at tað ikki, soleiðis sum viðurskiftini eru, er grundarlag fyri at bíða longur við støðutakan til viðskifti Føroya við EF.

Landsstýrið setur tí fram uppskot um at boða ríkismyndugleikunum frá, at Føroyar ikki gerast luttakari í EF, men at hildið verður fram við samráðingum um handilsviðurskifti við EF.

Atli P. Dam
løgmaður

/ E. Kallsberg

1. viðgerð 24. januar og málið beint í marknaðarnevndina, sum 25. januar legði fram soljóðandi

Álit

Løgtingsmál nr. 43/1973 er lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum og nr. 44/1973 av landsstýrinum.

Við fyrstu viðgerð, sum fór fram 24. januar, vóru hesi mál beind í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt tey.

Av tí at uppskotini eru um sama mál og sera lík, er nevndin samd um at gera felagsálit í báðum málunum.

Í løgtingsmáli nr. 6/1970 góðkendi ein meiriluti í løgtinginum, at ríkisstýrið samsat við umboð fyri landsstýrið fór undir samráðingar við felagsmarknaðin um, undir hvørjum treytum Føroyar kunnu luttaka ella samarbeiða við felagsskapin, og tá úrslit fyrilá frá samráðingunum at leggja málið aftur fyri løgtingið.

Síðan hetta uppskot varð samtykt, hava verið samráðingar um hetta mál, og landsstýrið hevur fleiri ferðir lagt fyri tingið gjøtligar frágreiðingar, samanber løgtingsmál nr. 37/1971, nr. 63/1972 og nú nr. 44/1973.

Úrslitið, landsstýrið er komið til er, at tað ikki kann mæla til luttøku í felagsskapinum, men mælir til samráðingar við ríkismyndugleikarnar og EF um viðskifti Føroya við EF.

Ójavnin millum uppskot tjóðveldisflokksins og landsstýrisins er um umboðanina í tí nevnd, sum skal samráðast. Í tjóðveldisuppskotinum verður skotið upp at 4 løgtingsmenn luttaka í samráðingunum saman við umboð úr landsstýrinum, meðan landsstýrisuppskotið mælir til, at landsstýrið førir samráðingarnar.

Ein samd nevnd mælir til at samtykkja 1. punktið í uppskotinum frá landsstýrinum og sum nýtt 3. punkt at seta: Úrslitið av samráðingunum verður lagt fyri løgtingið.

Viðvíkjandi 2. punkti í uppskoti landsstýrisins hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Kass, J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen, Trygve Samuelsen, Hákun Djurhuus og Kjartan Mohr) er av tí áskoðan, at tað ikki eigur at vera ein treyt, at løgtingsmenn skulu taka lut í samráðingunum, men at landsstýrið leggur samráðingarupplegg fyri marknaðarnevndina og frágreiðing fyri hvørt samráðingarumfar, og at lað er rímiligt, at marknaðarnevndin verður við í samráðingunum í tann mun, hildið verður gagnligt.

Meirilutin mælir tí til eisini at samtykkja uppskot landsstýrisins punkt 2.

Minnilutin (Erlendur Patursson) viðmerkir: Av tí at uppskot lands-

stýrisins punkt 1 í innihaldi er hitt sama sum uppskot tjóðveldisflokksins, mælir minnilutin tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Hin vegin mælir minnilutin til at samtykkja punkt 2 í uppskoti tjóðveldisflokksins.

3) Úrslitið av samráðingunum verður lagt fyri løgtingið.

MARKNAÐARNEVNDIN, 25. januar 1974.

Hilmar Kass.	Trygve Samuelsen.	J. Fr. Øregaard.
Poul J. Olsen.	Kjartan Mohr.	Erlendur Patursson.
	Hákun Djurhuus.	

Sbr. Skjal 9 og málið F. L. J. nr. 1198 - 2/1974.

2. viðgerð 25. januar (frávik frá tíðarfrestini).

Uppskotið frá landsstýrinum punkt 1 - 2 og nýtt punkt 3 frá nevndini samtykt við navnakalli við 23 ja-atkvøðum.

Atkvøðan fór soleiðis fram:

Ja: A. Nielsen, S. Hansen, M. Joensen, H. Kass, J. Sundstein, S. Skaale, K. Wang, H Djurhuus, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, Johs. Olsen, H. Beck, J. P. Thomassen, T. Olsen, P. J. Olsen, Kj. Mohr, H. Hansen, H. við Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, J. Durhuus, O. Mikkelsen, J. Fr. Øregaard = 23.

Burtursaddir: D. Hentze, A. Djurhuus, Jógvan Olsen = 3.

Málið soslatt avgreitt.

45. Avtøka av samskatting og aðrar broytingar í skattalógini

Ár 1974, 22. januar, legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot

til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar:

1) Grein 7 fær hetta orðaljóð:
«Útreiðslur til trygging og umsiting av setbúsum kunnu dragast frá».
2) § 17, 1. stk. fær hetta orðaljóð:
«Hjá hjúnum verður tann samlaða inntøkan býtt við tvey, áðrenn hon verður skattað, og skattauppkrav verður sent hvørjum hjúnarfelaga sær».

2. stk. fellur burtur.

3. stk. verður 2. stk. og fær hetta orðaljóð:

«Kona, sum livir alsamt skild frá manni sínum, verður sett í skatt av egnari inntøku, har í millum uppihaldspeningi frá manninum til hana sjálva ella til børn, sum eru hjá henni, og sum maður er skyldugur at uppihalda».

3) Í § 19 a verður sett sum nýtt 6. stk.:

lagtingslov om ændringer i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskatt og kommuneskat.

§ 1.

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat foretages disse ændringer:

1) § 7 får denne ordlyd:
«Udgifter til forsikring og vedligeholdelse af beboelseshuse kan fradrages».
2) § 17, stk. 1 får denne ordlyd:
«Ægtefællers samlede indtægter deles med to, før den beskattes, og skatteopkrævning sendes til hver ægtefælle for for sig».

Stk. 2 faldet væk.

Stk. 3 ændres til stk. 2 og får denne ordlyd:

«Hustru, der lever til stadighed adskilt fra sin mand, ansættes til skat af sin egen indkomst, herunder underholdsbidrag fra manden til hende selv eller til de hos hende værende børn, overfor hvilke manden har underholdningspligt».

3) I § 19 a sættes som nyt stk. 6:

«Tó kunnu lesandi føroyingar hava eina árliga skattafría inntøku, ið svarar til 3/12 av livikostnaðinum eftir prístalinum pr. 1. januar inntøkuárið».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin, og broytingarnar eru galdandi fyri skattlegging av inntokum frá 1973.

«Dog kan studerende færinger have en årlig skattefri indkomst, der svarer til 3/12 af levevomkostningerne efter pristallet pr. 1. januar indkomståret».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks, og ændringerne er gældende for beskatning af indkomster fra 1973.

Viðmerkingar:

Hetta uppskot umfatar tríggjar broytingar í skattalógini, og viðvirkja tær avtøku av samskattingini av hjúnum, loyvi til frádrátt fyri umsiting av sethúsum, og møguliga hjá lesandi føroyingum at hava eina ávísa skattafría inntøku árliga.

Samskattingin hevur verið nógv umrøddur spurningur bæði her á landi og í grannalondum okkara. Aðrastaðni eru menn gingnir burtur frá ella ganga nú burtur frá at skatta hjún saman. Í heyst hevði løgtingið málið til viðgerðar, men uttan at nakað konkret uppskot kom fram.

Í hesum lógaruppskoti verður mælt til, at samskattingin verður tikin av á tann hátt, at tann samlaða inntøkan hjá hjúnum verður býtt við tvey. Sjónarmiðini aftan fyri hetta uppskot eru, at tann inntoka, sum eini hjún hava, vinna tey við felags arbeiði, antin hæði hava lønandi vinnu ella bert annað teirra. Í flestum førum er tað so, at konan røkir hús og heim, men maðurin hevur lønandi inntøku á sjógvi ella landi. Eftir núgaldandi skattalóg verður arbeiðið hjá konumi als ikki roknað fyri nakað, hóast hon í mongum førum hevur eitt so týðandi starv sum at ala børnini upp eitt starv, ið ikki kann metast beinleiðis í peningi.

Tá felags arbeiði gevur inntøkum, er tað eisini rímuligt, at tann samlaða inntøkan verður býtt millum hjúnini. Hetta kann í skattalógini gerast við at býta inntøkuna í tvey, og síðani skatta hana.

Mælt verður eisini til, at skattarokningin verður send hvorjum hjúnafelaga sær. Hetta verður mest gjørt fyri at vísa kvinnuni fa virðing, at hon fær møguleika at gjalda sín egna skatt og verður roknaður sum fullgóður skattaborgaði sum maðurin.

Í mong ár var loyvt at draga kostnaðin fyri umsiting av húsum frá. Henda regla varð tikin av í desember 1972, og í staðin fingu hýsaeigarar eina samsýning, ið var frádráttur upp á 1.000 kr. árliga. Frádráttarin fyri umsiting av húsum hevur verið millum teir fáu, sum lágintøkufólkið hevur havt møguleika at nýta. Tey seinastu árini eru møguleikarnir fyri skattafrádrátti og avskrivingum hjá einsfaklingum og felagum víðkaðir

munandi, tó so at frádráttarmøguleikarnir hjá lágmantøkunum eru skerdir. Hetta varð gjort á tann hátt, at avskriving er ikki loyvd niður um livikostnaðin eftir prístalinum, og vil tað siga, at bert tær hægru inntøkurnar kunnu fáa gagn av avskivingunum. - Tað má tí haldast vera rætt, at reglan um frádrátt av umsiting av húsum kemur aftur í gildi, so at lágmantøkurnar vinna mist rættindi aftur.

Fyri tveimum árum síðani varð skattalógin broytt, so at fólk, sum eru heima í styttri tíð, ella útlendingar, sum gera stuttan steðg her, skulu gjalda skatt. Henda broyting rakti m.a. lesandi føroyingar uttanlands, sum nú heldur fáa sær summararbeiði í Danmark, har teir sleppa undan skatti av einari ávísari peningahædd.

Tað almenna letur lesandi føroyingum studning, men samstundis verða tær krónurnar, ið kunnu tjenast í frítíðini, hart skattaðar. Hetta má tykjast órímuligt. Her verður tí skotið upp, at lesandi føroyingar - antin teir lesa her heima ella aðrastaðni - - kunnu hava eina árliga skattafría inntøku, ið svarar til tríggjar tólvtapartar av livikostnaðinum undir prístalinum. Eftir prístalinum 1. januar 1974 hevði hetta givið eina skattafría árliga inntøku uppá 5.913 kr.

1. viðgerð 23. januar og málið beint í skattanevndina (sí 40/1973), sum 25. januar legði fram soljóðandi

Álit.

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt málið fyri tingið.

Við 1. viðgerð í løgtinginum varð tað beint í skattanevndina, sum síðan hevur viðgjørt málið.

Viðv. pkt. 1 og 2 vísir nevndin til broytingaruppskot og uppskot til samtyktar í løgtingsmáli nr. 40/1973 um broytingar í skattalógini.

Viðv. pkt. 3 er at siga, at lesandi føroyingar uttanlands, ið eru heima stytri enn 3 mánaðar, longu frammanundan fáa vissar frádráttir.

Sostatt setur nevndin onki uppskot fram í hesum máli.

Onnur viðgerð 25. januar. (Frávik frá tíðarfrestini)

Uppskotið burturfallið - - sbr. tingmál nr. 40/1973.

---

46. Oljuskamtanin

Ár 1974, 22. januar, legði Kjartan Mohr, løgtingsmaður, fyri framburðsflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at taka bannið um sunnudagskoyring av, og í staðin um neyðugt seta bensin- og oljuskamtan í verk.

Viðmerkingar:

Eftir at oljukreppan so brádliga kom inn á okkum, noyddist landsstýrið at seta tiltøk í verk fyri at minka um bensin- og oljunýtsluna her heima á landi.

Hetta tiltak var óivað tiltrongt, men ikki eru øll á einum máli um, at hetta var tann rætta leiðin, til dømis at taka sunnudagskoyring av fyri privat akfør. Tað hevur verið hildið mann og mann ímillum, at betur var at skamta bensin- og oljuforbrúkið, og setur Fframburðsflokkurin sostatt hetta uppskot til samtyktar á Føroya løgtingi.

1. viðgerð 25. januar og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.
2. viðgerð 30. januar.
Málið afturtikið av uppskotstillaramum.

47. Nýtsla av føroyskum koli

Ár 1974, 24. januar (sambart tinglistan) legði Ove Mikkelsen, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

1. Løgtingið samtykkir at setast skal ein skjótturbeiðandi løgtingsnevnd til kanman av hesum máli, m.a. av niðanfyri nevndu punktum.

   a. Keypsprísmunin millum ætlaða motor-elverk á Sundi og eitt dampturbinu-elverk av somu stødd, men til nýtslu av koli sum høvuðsbrennievni.
   Ætlaðu drifts- og viðlikahaldsútreiðslum fyri hesi bæði nevndu sløg av elverkum, hvør sær, og leveringstíð av hóskandi dampturbinum. Støddina av evt. peningatapi, um keypssáttmálin av motorum til Sundsverkið skal annullerast.

   b. Eina leysliga kostnaðarætlan fyri stovnsetan av nútímans koladrift í Suðuroynni.

   c. Skaffa til vegar upplýsingar um kostnað til útskifting av núverandi olju drivnu motor-elverki við koladrivnum dampturbinuverkum.

2. Løgtingið heitir á landsstýrið um at bíða við heimtøku av motorum til el-verkið á Sundi og motorverk aðrastaðni, um hetta er gjørligt, eins og væl at bíða við víðari fimdamentering og tílíkum arbeiði til motorar, inntil nevndin hevur lagt málið fyri tingið.

3. Tá nevndin hevur lagt málið við neyðugum upplýsingum fyri tingið, verður málið av tinginum viðgjørt sum vanligt løgtingsmál, og støða tá tikin til, hvørvítt olja ella kol skal verða høvuðsorkan í framtíðar el-framleiðslu, sum nýtir brennievni til orku.

Viðmerkingar:

Nú oljukreppan so meint hevur rakt allan heimin, er øll lond farin undir at kanna orkuspurningin sum heild, og hvørjar møguleikar, tey hava til at nýta egna orku, um slík finst. Hetta eigu vit føroyingar eisini at gera, og tað ongatíð ov skjótt.

Sjálvt um oljan aftur skuldi komið at flotið nakað meira enn beint nú,

so hevur hetta víst okkum, hvussu viðbrekið álilið á einans olju er.

Innan fyri hesar seinastu 4 mánaðarnar er oljuprisurin hækkaður við 100%, og serfrøðingar mela, at likamikið hvat eru lendir og ikki, so fær oljan onguntíð aftur nakrun munandi prislækkan.

Tað vil siga, at hugsanin um olju sum bíligt brennievni ikki longur er til. Hesin veruleiki hevur so stutt broytt allar metingar og kanningar um framleiðslupris á flestu økjum, t.d. til ravmagnsframleiðslu. Oljan er ikki so kappingarfør í prísi sum áður. Taka vit elframleiðslina her á landi, er at spyrja, hvørjar orkumøguleikar eiga vit til hetta endamál frá náttúrunnar hond? Slíkt orkutilfar í Føroyum er nú ikki so sært sum mangur vil halda. T. d. eiga vit natúrliga orkukraft í vindinum, sum oftast er nógvur eftir okkara lykki. Ein annur næsum óavmarkað orka liggur í streyminum, sum hvørtu tíma við veldigari megi rennur ótalmdur gjøgnum hvørt sund. So er tað vatnorkan, sum uttan iva kundi verið munandi útbygd, og fyri tað fjórða, so eiga vit kol, gott kol, í heilt stórum nøgdum.

Elverk, sum nýta omanfyri nevndu orkur eru í drift kring heimin, og í øllum londum verða nú slík el-verk útbygd og hópur av nýggjum bygd afturat. T.d. er U.S.A. og Canada farin undir at útskifta øll leirra oljudrivnu elverk við koldrift.

Av omanfyri nevndu 4 náttúrligu orkumøguleikum, sum vit føroyingar eiga, er uttan iva kolið, tann biligasta og skjótasta orkan at taka í nýtslu til el-framleiðslu.

Til eitt el-verk av lí orkustødd kapacitet sum tað, ið nú skal byggjast uppi á Sundi, skuldi brennievni kol verið kappingarført við oljuna í prísi. Kolið eiga vit í Suðuroynni.

Hetta føroyska kolið er væl hóskandi, tí nú á døgum verður kol, sum verður nýtt til dampturbinur malið og íblandað eitt sindur av lungari olju, og síðani sproytað inn í brennikømmurini. Brennivirðið í føroyskum koli er nett til at verða tað sama sum á miðal enskum koli.

Kolagrevstur nú á døgum, hevur sum alt annað, verið fyri stórari broyting, effektiviserað og rationaliserað drift við nútímans umboðum. M.a. verður nógv nýtt háteýst vatnstrálur, sum heinleiðis skera kolalindina leysa.

Um ein investering í nútímans koladrift í Suðuroynni, eins og nýtslan av koladrivnum dampturbinum til el-framleiðslu uppá langsikt kann metast at verða kappingarført við olju og motorar, eigur løgtingið at umhugsa, hvør vítt, tað ikki er beinast longu nú at stoðga við el-útbyggingini við oljudrivnum motorum, og í staðin leggja um til kolfýrdar dampturbinur.

Slík økonomisk metan má eisini telja við, tann stóri kapitalur í útlendskum valuta, sum vit kunnu spara við nýtslu av ognum koli. Peningurin verður verandi í landinum, og vil harumframmt verða arbeiðsskap-

andi, stakliga á einum av tí mest arbeiðsmanglandi øki í Føroyum, hvar lítil og ongin fjalnaður er til.

Um so er, at vit kunnu nýta kol, so vil okkara el-framleiðsla ikki verða so viðbrekin yvir fyri alheims olju- og øðrum kreppum. Oljan verður tá ikki einasta álitið.

Tann hervið spardu oljan kann í staðin nýtast til at tryggja okkara fiski- og øðrum skipum ueyðugt brennievni. Eisini bleiv meira til vanlig húsarhald, um SEV gekk uttan olju.

Eitt er givið, at vit føroyingar eru og verða meint ruktir av tílíkum kreppum, ja, einans av margfaldaðum oljuprísi. Tí ber ikki til at sita hendur í favn og einans vóna tað besta. Her eiga allir møguleikar at verða kannaðir, sum kunnu gera okkum fyri tað fyrsta minni bundnar av olju í vinnu og í neyðsynjar dagliga lívinum, eins og væl á hvørjum økjum olja nunandi kann spørast við at nýta annað brennievni.

Tí verður heitt á løgtingið um at lata eina skjótt arbeiðandi nevnd — løgtingsnevnd — kanna møguleikarnar fyri nýtslu av føroyskum koli til el-framleiðslu í staðin fyri olju.

1. viðgerð 12. februar og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð við atkvøðugreiðslu 15—0.

2. viðgerð 14. februar og málið tá beint í orkunevndina.

---

48. Stovnseting av fiskimannaskúla

Ár 1973, 30. januar, legði Kj. Mohr, løgtingsmaður, fyri framburðsflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna møguleikan fyri at fáa sett ein fiskimannaskúla á stovn, ið kann læra ungar menn til at hagreiða fiskin og fiskiamboð umborð á skipum.

Viðmerkingar:

Nú okkara fiskivinna og fiskiskip eru so nógv broytt frá tí gamla fiskihátti við snørinum, hvar tað ikki var neyðugt við so stórum kunnleika at fiska sum nú. Nú krevst meira lærdómur, og skal helst ein partur av hesum lærdómi fáust á skúla, áðrenn farið verður á skipsfelak.

Sum nú er, er tað skiparin, ið oftа er millum teir eldru av manningini, ið lærir hesar ungu menn, og kann tað tarna fyri hinum av manningini, so at arbeiðið gongur meira striltið. Tað hevði hætt væl um, at ungir menn fingu lærdóm á einum slíkum skeiði uppi á landi, møguliga í samband við Føroya háskúla ella sjómannsskúla.

1. viðgerð 6. februar og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 12. februar.
Uppskotið til samtyktar samtykt 19—0.
Málið sostatt avgreitt.

(F.L. J. nr. 2137-1)

49. Nýtsla av streymorkuni norðuri við Streym

Ár 1974, 30. januar, legði Kj. Mohr, løgtingsmaður, fyri framburðsflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum at kanna møguleikan til at nýta streymorkuna norðuri við Streymin til kraftnýtslu við turbinkraft, bæði á Streymoyar- og Eysturoyarlandinum.

Viðmerkingar:

Tað hevur mangan verið havt til umrøðu at nýta streymorkuna norðuri við Streymin til ravmagn. Men síðani S.E.V. fór undir at nýta vatnorku, datt hesin lankin burtur.

Nú, ið oljuspurningurin er so aktuellur í heimsins, mugu vit troyta allar møguleikar, og er hetta okkara áheitan til landsstýrið at arbeiða við málinum um møguleikan.

Landsstýrið verður biðið um at seta seg í samband við tekniskar stovnar um at fremja hetta tiltak.

1. viðgerð 4. februar og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 12. februar.
Uppskotið samtykt 17—0.
Málið sostatt avgreitt.

(F.L. J. nr. 1222-1)

50. Kommunalur lánigrunnur

Ár 1974, 6. februar, legði Ásbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot

til

løgtingslóg um veitan av láni til kommunum til keyp av jørð.

§ 1.

Hvørt av fíggjarárunum 1974/75 til 1979/80 verða á fíggjarlógini játtaðar kr. 1.000.000 at leggja í grum við tí endamáli at veita kommununum lagalig lán til keyp av jørð til byggilendi og til byggibúnan.

Stk. 2. Landsstýrið ásetur í samráð við fíggjarnevnd løgtingsins nærri reglur um undir hvørjum treytum, lítlik lán kunnu verða veitt, herundir eisini lánirentu og uvdráttartíð.

§ 2.

Rokkur peningur grunsins ikki til tær lánveitingar, sum verða hildnar neyðugar, er landsstýrinum heimilt við góðkenning fíggjarnevndarinnar at taka lán upp til 4 milj. kr.

Stk. 2. Lán, sum landsstýrið tekur við heimild í 1. stk., skal vera afturgoldið í seinasta lagi í fíggjarárinum 1979/80.

§ 3.

Henda lóg fær gildi 1. apríl 1974.

(Ll. 38/74. — F.L. J. nr. 840-1)

lagtingslov om ydelse af lån til kommuner til opkøb af jord.

§ 1.

I hvert af finansårene 1974/75 til 1979/80 optages på finansloven kr. 1.000.000 til en fond med det formål at yde lån på lempelige vilkår til kommuner til opkøb af jord til byggegrunde og til byggemodning.

Stk. 2. Efter aftale med lagtingets finansudvalg fastsætter landsstyret de nærmere regler om, under hvilke betingelser lån af denne art kan ydes herunder også lånerente og afdragsperiode.

§ 2.

Såfremt fondens midler ikke er tilstrækkelige til de låneydelser, som findes nødvendige, har landsstyret hjemmel til med finansudvalgets godkendelse at optage lån op til 4 mill. kr.

Stk. 2. Lån, som landsstyret optager med hjemmel i stk. 1, skal være tilbagebetalt senest i finansåret 1979/80.

§ 3.

Denne lov træder i kraft den 1. april 1974.

Viðmerkingar.

Landsstýrið metir, at tað at útvega borgarum byggilendi fyri rímiligar prisir er ein uppgáva, sum samfelagið eigur at átaka sær, í fyrsta lagi kommunurnar.

Ein vegur at ganga er, at kommununrnar, tá høvi er til tess, keypa hóskandi lendi, sum tær síðani gera byggibúgvið og stykkja út og selja til byggigrundir. Landsstýrið heldur, at ein kommuna skal kunna keypa jørð til byggigrundir, sjálvt um eftirspurningurin eftir byggigrundum, tá keypið fer fram, ikki er so stórur. Á hendla hátt vil kommunan kunna tryggja, at nóg nógv lendi er til endamálið og fordða fyri, at grundprísirnir rúka upp, tá eftirspurningurin verður stórur.

Føroysku kommununrnar hava ikki so stóra fíggjarliga orku, at tær hava tøkan pening til størri jarðarkeyp, og flestu kommununrnar aftra seg við at taka lán til vanliga marknaðarrentu til slík keyp, um útlit er fyri, at rúm tíð kann ganga, áðrenn tað ber til at selja aftur. Nakrar kommunur hava kortini kunna keypt almenna jørð til bíligan pris og við lagaligari fíggjan, men har øll jørðin er ognarjørð, eru prísirnir væl hægri, og kann kommunan tá ikki fáa lagaligari lán, enn peningastovnarnir veita.

Ætlan landsstýrisins er, um løgtingið samtykkir hetta uppskot, at veita kommununum lán til 5 % í rentu við eini avdráttartíð uppá t.d. 10 ár. Tó skal tað, sum kommunan fær aftur við sølu av grundstykkjum heilt ella lutvist, verða nýtt til afturrindan av lánunum. Verður sølunágóðin ikki allur nýttur til afturrindan av lánunum, skal hin parturin leggjast í ein grum hjá kommununni, sum bert má ráðast yvir við loyvi landsstýrisins og bert til keyp av jørð. Ætlanin er eisini, at tað skal verða ein treyt fyri at lán verður veitt, at landsstýrið metir, at tann jørð, sum kommunan vil keypa, er nýtilig til endamálið.

Tá skotið verður upp, at landsstýrið skal kunna taka lán, um peningurin hjá grunninum ikki er nóg stórur, er hugsað um tíðina, til grunnurin er komin uppá 5 milj. kr. Tá lániheimildin er avmarkað til 4 milj. kr. er hugsað um, at lánið vil kunna verða rindað aftur við tí, sum verður játtað á fíggjarlógini tey fýra fíggjarárini, sum koma aftanfyri 1974/75. Sjálvt um landskassin tekur lán til vanliga marknaðarrentu og skal lena út til eina lægri rentu verður ikki roknað við, at tað verður neyðugt at fáa játtan til rindan av rentumunninum, við tað at ein partur av útláninum ikki er fingin til vega við lántøku.

Sostatt loyvir landsstýrið sær at leggja hetta uppskot fyri tingið.

1. viðgerð 8. februar og málið beint í fíggjarnevndina, sum 28. februar legði fram soljóðandi

Álit

Í viðmerkingunum til uppskotið ferir landsstýrið fram, at tað fyrst og fremst eru kommununar, ið hava ábyrgd av at skaffa íbúgvarunum byggilendi fyri rimuligan prís, men at kommununnar figgjarorka ikki altíð røkkur at lúka hesum máli. Mælt verður tí til at játta kr. 1.000.000 hvørt figgjarár 1974/75 — 1979/80, at leggja í grunn við tí endamáli at veita kommununum lagalig lán til keyp av jørð til byggilendi og byggibúnan.

Figgjarnevndin, ið hevur viðgjørt málið tekur undir við uppskotinum, men vil nú beinan vegin gera vart við, at tann í uppskotinum nevnda peningahædd neyvan røkkur tørvinum, tá talan er um bæði keyp av byggilendi og kostnaðin av at gera byggilendi byggibúgvið. Tó heldur nevndin, at verður tørvurin størri enn av landsstýrinum mettur, so ber til at koma aftanumaftur og vaksa um lánihæddina.

Eftir § 1 verður mælt til at játta pening í figgjarárunum 1974/75 til 1979/80, tilsamans 6 figgjarár, meðan tað í viðmerkingunum til lógina er talan um 5 figgjarár, og hevur nevndin fingið at vita, at ætlan landsstýrisins er at veitingin skal fara fram yvir 5 figgjarár.

Nevndin mælir til at samtykkja uppskotið við teirri broyting, at í § 1 og 2 verður 1979/80 broytt til 1978/79 bæði í føroyska og danska tekstinum.

2. viðgerð 4. mars.

Broyting frá nevndini samtykt 20—0.
gr. 1-2 so broyttar samt. 20—0.
gr. 2 saml. u. atkvgr. —
Lógin samtykt so broytt at fara til 3. viðgerð við 20—0.

3. viðgerð 11. mars.
Lógin sum samt. við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 25—0.

51. Broyting í fólkatingsvallógini

Ár 1974, 6. februar 1974, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at fremja viðlagda uppskot frá innanríkisráðnum til broytingar í fólkatingsvallógini fyri Føroyar við hesum broytingum:

1) Undir broyting 2) í uppskotinum verður «21 ár» broytt til «20 ár».
2) Í § 22, stk. 3 í lógini ganga út orðini:
«Lagtingspartierne og kandidater udenfor partierne kan derhos inden for samme frist anmelde at ville støtte hinanden (valgforbund)»,
3) Í § 35, stk. 1, í lógini ganga út orðini:
«eller — hvor valgforbund er anmeldt — for disse»,
«(valgforbund)» og
«Det antal mandater, der er tilfaldet et i henhold til § 22 indgået valgforbund, fordeles på de lister, hvoraf forbundet består, med benyttelse af den lige foran beskrevne fremgangsmåde».

Viðmerkingar:

Síðandi galdandi lóg nr. 92 frá 28. mars 1956 um fólkatingsval í Føroyum kom í gildi er lógin um fólkatingsval í Danmark broytt fleiri ferðir. Tá lógirnar principielt eiga at vera eins, har ikki serlig lokal viðurskifti gera seg galdandi, hevur innanríksráðið gjørt hjálagda uppskot til broytingar í føroysku fólkatingsvallógini, so hon kemur at liggja so nær dønsku fólkatingsvallógini sum gjørligt.

Síðani uppskotið varð gjørt, er valrættaraldurin lækkaður niður í 20 ár.

Tá ongar reglur um listasamband eru í fólkatingsvallógini fyri Danmark ella í løgtingsvallógini, skjýtur landsstýrið upp at avtaka reglurnar um listasamband í hesi lóg. Tá løgtingsvallógin seinast var til viðgerðar, var samtykt ikki at heimila listasamband til løgtingsval, smbr. løgtingsmál nr. 12/1965 (Løgtingstíðindi 1965, bls. 98).

Sí skjal 10.

1. viðgerð 1. februar og málið beint í lógarnevndina, sum 5. apríl legði fram soljóðandi

(F.L. J. nr. 701-8-2)

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til samtyktar viðvíkjandi broyting í fólkatingsvallógini.

Broytingarnar í uppskotinum viðvíkja millum annað freistini fyri innflýggjan av kandidatlistum, ið verður 10 dagar í staðin fyri 5 vikur, møguleikar at rætta skeivleikar í kandidatlistum, aftaná at teir eru innflýggjaðir til valstýrið, minstatal av stillarum verður 25, freistirnar fyri brævatkvøður eru longdar, ríkisumboðsmaðurin fær heimild til at áseta annan valdag enn tann, ið verður áseltur fyri hin partin av ríkinum.

Haraftrat verður í uppskotinum frá landsstýrinum skotið upp, at valrættaraldurin verður 20 ár í staðin fyri 21 ár, og at reglurnar í fólkatingsvallógini fyri Føroyar um listasambond verða tiknar av. Ongar tílíkar reglur eru í løgtingsvallógini og heldur ikki í fólkatingsvallógini fyri Danmark.

Málið varð við 1. viðgerð, ið fór fram 11. februar 1974, beint í lógarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Martin Joensen, Poul J. Olsen og Trygve Samuelsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Signar Hansen og Demmus Hentze) setur onki uppskot fram.

2. viðgerð 6. apríl.

punkt 1 í landsstýrisuppskotinum fall 13 — 0.
punkt 2 fall 10 — 0.
Alt lógaruppskotið sostatt burturfallið.

52. Ikki framlagt

---

53. Útvegan av føroyskum skúlabókum

Ár 1974, 8. februar, legði Sigmar Hansen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
broytingar.

1. Løgtingið áleggur landsstýrinum at útvega læribøkur á móðurmálinum til allar skúlar í Føroyum.
2. Landsstýrið verður at áleggja Føroya skúlabókagrunni at hava umsorgan fyri, at bøkur til allar lærigreinir fólkaskúlans og framhaldsskúlans altíð eru tøkar.
3. Føroya Skúlabókagrunnur fær heimild til eftir gjølligari ásettum reglum og móti hóskandi samsýning at biðja fólk skriva skúlabøkur og fáa tær útgivnar. Peningaveitan til hetta arbeiðið verður at tryggja skúlabókagrunninum unnaðhvørt við láni ella játtan á fíggjarlógini.
4. Løgtingið áleggur landsstýrinum at gera miðvísa ætlan fyri skúlabókaútgávuna, soleiðis at allar læribøkur hjá fólkaskúlanum og framhaldsdeildum hansara eru á føroyskum ikki seinri enn 1980.

Viðmerkingar:

Hóast ídnar royndir av áhugamonnum, og hóast løgting og landsstýrið við Føroya Skúlabókagrunni hava stuðlað til at útvega skúlabøkur á móðurmálinum, so er tó framvegis heilt illa statt á hesum fyri okkara mentan so týdningarmikla øki. Støðan er framvegis hon, at bert fáar lærigreinir í

(F.L. J. nr. 2100-27)

barnaskálanum hava bøkur á móðurmálinum, meðan framhaldsdeildirnar at kalla als ikki hava føroyskar læribøkur, og sama er at siga um yrkisskúlarnar og hægri skúlarnar.

Tað er samroynd, sum er almont viðurkend um allan heim, at undirvísingartilfar á móðurmálinum gevur bitt nógv tað besta úrslitið, og fyri málsligu menning okkara er tað av avgerandi týdningi, at børnini og tað uppvaksandi ættarliðið fáa bøkur á sínum móðurmáli.

Meðan tað hesi seinastu árini hava verið bygdir nógvir stásiligir skúlar kring landið, hevur ikki verið hugsað eins nógv um tað innihald, ið hesin karmur um skúlans virki skal hava.

Skal verulig vend koma í skúlabókagávunni viðvíkjandi, so verður neyðugt at fara øðrvísi til verka enn higar til hevur verið gjørt. Tað ber ikki longur til at líta á fyritakssemi einstaklinga.

Ætlingin við hesum uppskoti er at áleggja landsstýrinum skyldu til at útvega skúlunum føroyskar læribøkur. Hetta kann eingans frembjast, um heimild verður fingin til at biðja fólk móti hóskandi samsýning at skriva bøkurnar ella leggja tær til rættis. Alt annað er roynt uttan nógd góð úrslit.

Verður gingið ta leið, ið her er skotin upp, kunnu vit eftir fáum árum fáa til vega bøkur til allar lærigreinirnar í skúlum okkara. Peningaliga kann slík bókaútgáva sum frá líður hvíla í sær sjálvum, um hetta verður hildið neyðugt. Sum er gjalda skúlanæmingar og kommunur nógvar hundrað túsund krónur árliga fyri danskar skúlabøkur og danskt undirvísingartilfar.

Ásannast skal, at tað kann vera vandi í tí, at tað almenna útpeikar fólk at skriva skúlabøkur, men hetta verður vónandi hvørt neyðugt í fyrsta umfari, og tað eigur ei heldur at vera so, at skúlabókagrunnur landsins skal hava einkarrætt til útgávu av skúlabókum. Eisini eigur serlig reglugerð at vera gjørd viðvíkjandi teirri marknagongd, ið nýtt skal verða. Til er eitt skúlabókafelag, sum varð stovnað fyri nøkrum árum síðan, og sum setti sær fyri at útvega handrit til føroyskar skúlabøkur. Tað hevði ikki verið órímiligt, um fólk vórðu fingin at skriva skúlabókurnar eftir tilmæli frá hesum felag.

Ætlast kann, at tað fyri tað mesta verða kennarar, sum fara at skriva skúlabøkurnar, og mugu samsýningarnar vera soleiðis, at teir heill ella partvíst kunnu fáa frí frá kennarastarvinum, meðan teir skriva skúlabøkur ella leggja skúlabókaútgávur til rættis.

Føroya skúlabókagrunnur upplýsir, at fleiri handrit liggja niður fyri, men at prentingarviðurskiftini í landinum eru so vánalig, at hetta tarmar útgávunum nógv. Her verður tí helst eisini neyðugt við serligum tiltøkum, tí prentingin eigur ikki at forða fyri, at vit fáa skúlabøkur á móðurmálinum.

Hóast tað í fyrsta umfari eigur at verða miðað ímóti at útvega bøkur

til barnaskúlan og framhaldsdeildir fólkaskúlans, so eigur tó eisini at verða hugsað um yrkisskúlarnar og hægru skúlarnar.

1. viðgerð 13. februar og málið beint í skúlanevndina, sum fann 4. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt hetta mál fyri løgtingið, tað var lagt fram 8. februar og við 1. viðgerð beint í skúlanevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Hilmar Bech, Hákun Djurhuus, Haldor Hansen og Leon Joensen) tekur undir í, at flest møguligu skúlabøkur eiga at vera á móðurmálinum. Hetta endamál hevur løgtingið longu sett sær, vist verður til løgtingslóg nr. 36 frá 13. mai 1959 um útgávu av skúlabókum.

Eftir lógini er tað landsstýrið saman við Løgtingsins Skúlabókanevnd, sum skipar fyri og hevur ábyrgdina av útgávu av skúlabókum í fyrstu syftu fyri barnaskúlan og síðan fyri hinar hægru skúlarnar. Hevur grunnurin ikki føkan pening, er landsstýrinum heimilað at taka neyðug lán til útgávu av bókum.

Nevndin hevur havt fund við skúlabókanevndina og formannin í Føroya Lærarafelag. Teir halda, at útgávuarbeiðið gongur heilt væl. Tað, sum tó hevur tarnað, tað liggja handrit til bøkur, sum ikki eru send til prentingar, er, at torført hevur verið at fingið prentsmiðjurnar at taka øll liðug arbeiði uppá seg. Ein lætti er tó nú, síðani 7 nýggjar prentimaskinur eru komnar til Føroyar. Eisini hevði tað verið ein lætti um skúlabókanevndin hevði kunnað sett eitt fólk at lesa og kanna handrit.

Meirilutin dugir ikki at síggja, at uppskotið, um tað verður samtykt, førir nakað við sær, sum ikki er frammanundan.

Til spurningin at sela eitt fólk afturat at lesa og kanna handrit, so heldur meirilutin, at heimild er til hetta í galdandi lóg og kann taka undir í, at so verður gjørt, um peningur er tokur. Í hesum tekur minnilutin eisini undir.

Vísandi hertil setur meirilutin onki uppskot fram.

Minnilutin (Signar Hansen) mælir til at samtykkja uppskot tjóðveldisflokksins.

2. viðgerð 5. apríl.

Uppskotið fall 6—0 og sostatt burturfallið.

54. Útbyggjan av vatnorkuni í Føroyum til el-megi

Ár 1974, 11 februar, legði Haldor Hansen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Álagt verður landsstýrinum í bræði at taka upp samráðingar við SEV viðvíkjandi útbyggjan av vatn-orkuni í Føroyum til el-megi.

Tá allar kanningar viðvíkjandi byggiætlanini í Vágum longu eru loknar, verður mælt til at áður tiknar avgerðir um el-útbygging við Fjallavatn verða framdar.

Viðmerkingar:

Orsakað av oljukreppuni verður kostnaðurin fyri motorverksframleiðslu av el so ovurhonds stórur, at vatnorkan má útbyggjast skjótast har møguleiki er fyri ti, og vil hetta í hesum føri siga at útbyggjanin við Fjallavatn má fremjast skjótast, hvat kann gerast tá tað tekniska fyrireikingararbeiði er lokið.

Fyri ídnaðin, serliga flakavirkini, er lað umráðandi at hesin spurningur verður greiddur.

Um ikki SEV sjálvt kann greiða figgjanina av nevndu ílegging, má landskassin útvega torvandi figgjan best møguligt.

Lánimarknaðurin í Danmark á hesum øki er soleiðis fyri í dag, at eitt 20 ára lán má rentast við upp til 16 % p.a. Lán frá útlondum verður styttri, og verður rentan har umleið 9 til 10 %.

Hjálagt brøv frá Vága kommunum, dagfest 23. mars 1972 og 11. januar 1973.

Á Føroya løgtingi, tann 8. februar 1974.

Haldur A. Hansen Leon Joensen

(F.L. J. nr. 1205-19)

Kommunurnar í Vágum

Til stýrið fyri S.E.V.

Frá okkara stýrislini og umboðsmonnum, hava vit fingið at vita at byggiætlanin fyri S.E.V. fyri kommandi útbygging er broytt soleiðis at byggjast skulu diesel-verk ístaðin fyri tað eiumelt samtyktu útbyggjan av Fjallavatni í Vágum.

Hettar skulu kommununrnar í Vágum harðliga mótmæla, og krevja at bygt verður í Vágum nú. Tað verður ført fram at diesel-verk eru munandi bíligari at byggja, umleið 13 mill. kr., meðan útbygging av Fjallavatni er sett til umleið 23 mill. kr. í byggiætlanini dagsett 27/3-1971 varð Fjallavatn mett at kosta umleið 14,2 mill. kr., so her er talan um ein prísvokstur uppá umleið 10 mill. kr. í eitt ár.

So seint sum í januar í ár vóru umboð fyri kommununrnar í Vágum á stuttum fundi saman við stjóranum, ið m.a. upplýsti at byggjast skuldi við Fjallavatn, og at turbinan nú skuldi setast upp «Norðuri á Mumma», og soleiðis kundi sleppast undan tí dýra tunnil til Sørvágs.

Viðvíkjandi rakstri av diesel-verkum í mun til vatnverk er einki upplýst í ætlanini. Tað er øllum monnum greitt at raksturin av diesel-verkum er fleiri ferðir so dýrur, bæði í árligum forbrúki, viðlikuhaldi, og ikki minst tá talan er um livitíðina hjá dieselverkunum. Til at reka diesel-verk skulu nýtast nógv fleiri fólk, og oljuprísirnir fara bert ein veg, og tað er uppeftir.

Í sambond við diesel-verk er einki upplýst um kostnað av longnanleggum, havnadagi og keypi av londi.

Váganenn, sum longu í 1945 arbeiddu fyri at fáa útbygt vatnorkuna í Vágum, komu aftaná drúgvar samráðingar ásamt við Eysturoynna og Norður-Streymoynna um eina ætlan um útbyggjan av vatnorkuni í øllum økinum. Samtykt varð gjørd um at 1. byggistig skuldi verða Vestmannaøkið, og sum ein sjálvsøgd broyt skuldi vatnorkan í Vágum verða 2. byggistig.

Tað er ígjøgnum árini altíð framført at tann stórsta vatnorkan er í Vágum. Hettar varð eisini framhildið av formanninum í stýrinum undir vígslurøðuni fyri S.E.V. í Vestmanna. Nú er tíðin komin til at byggja fyri framtíðina, og sjálvandi eisini til fruma fyri Vágoynna, og alt S.E.V.-økið sum heild. Vit liggja ringast fyri í økinum, sambært upplýsingarnar um tey streymslit, ið hava verið gjøgnum árini.

Niðurstøðan er so tann, at vit nú krevja hesa skilagóðu útbyggjan framda í Vágoynni, og vilja hava greitt svar beinanvegin.

Um stýrið fyri S.E.V. ikki gongur okkara ynski á møti, krevja vit at S.E.V. letur einkarrættin til vøtnini frá sær.

Allir umboðsmenninir í oynni hava fingið avrit av hesum skrivið.

23. mars 1972

Miðvágs kommuna
John Poulsen

Sørvágs kommuna
A. Jacobsen

Sandavágs kommuna
Jens E. Nielsen

Biggjar kommuna
Edvard Jacobsen

Kommununar í Vágum

Vágarnar, 11. januar 1974

Føroya Løgting
3800 Tórshavn

Á felagsfundi hjá kommununum í Vágum tann 3/1-1974 varð einmælt samtykt at heita á háttvirda Føroya Løgting at skipa fyri eini útbygging av vatnorkuni í Føroyum til el-megi. Nú er oljuskamtanin komin at raka okkum so meint, at lívsæðrin — tað er fiskiskipaflotin okkara — ikki fær ta olju honum tørvar, og tað sum fæst, er til ein so høgan pris sum nokk eingin hevði droymt um áðrenn oljukreppan kom, og meta vit hesar prísir at vera sera óhóskandi til framleiðslu av el-megi. Tí halda vit at eingin vegur er utlanum at útbyggja vatnorkuna, fyri at spara um hesa dýrt olju — og sum ikki fæst nógmikið av.

At kommununrnar koma til løgtingið við málinum er tí vit meta um, at SEV helst kemur, ella hevur koyrt seg fast við sini útbygging av risa motorverki. Tó at SEV veit at oljan er skamtað og at prísirnir eru farnir í luftina, er ikki — tað vit vita um — nøkur broyting gjørd um avmarking í teirri motorútbygging.

Útbyggingarætlanirnar hjá SEV hava verið ógvuliga ymiskar og skiftandi gjøgnum farin ár. Tað sum kann vísast á ídag at vera álítandi og biligt í rakstri er útbygging av vatnorkuni. Tí er tað harmuligt at SEV ferð eftir ferð hevur slept ætlanini um útbygging av m.a. Fjallavatni (sum var treytin fyri at Vágarnar komu uppí SEV í byrjanini). Tá kommununar í Vágum seinast frættu um kúvendingina hjá SEV frá útbygging av Fjallavatni til motorverk á Sundi, mótmæltu kommununar við skrivi dagf. 23.3.72 til SEV og á umboðsfundi 14.7.72 saman við øðrum hesi broyting,

men tíverri verð ein lítil meirihluti fyri motorverkinum. Nú standa vit tí yvirfyri hesi kreppustøðu at bygt verður nevnda motorverk, við lítlari ella ongari olju til óhoyrdar prísir, meðan vatnorkan fer ólamd í luvið.

Tá Føroya Løgting er noytt í hvørjum einstøkum føri at veðhalda fyri lánum til SEV til útbyggingar, átti tingið saman við kommununum at havt sakkøna hjálp at kanna allar útbyggingaræflanir hjá SEV áðrenn tær endaliga vóru samtyktar.

Sum málið nú liggur fyri viðvíkjandi tí sum frammanfyri er nevnt, halda vit at rættast er at fara beinleiðis til tingið, og vóna at tíkið verður væl undir við málinum.

Biggjar kommuna	Sørvágs kommuna	Miðvágs kommuna
Edw. Jacobsen	A. Jacobsen	John Poulsen

Sandavágs kommuna
Jens E. Nielsen

1. viðgerð 13. februar og málið beint í serstaka 7-mannanevnd, seinni kallað orkunevndin, sum 3. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Tingmenninir Leon Joensen og Haldor Hansen hava lagt fyri løgtingið uppskot til samtyktar um útbyggjan av vatnorkuni til el-megi.

Uppskotið varð lagt fram 11. februar og varð við 1. viðgerð 13. februar heint í 7-manna millumtinganevnd (orkunevnd) við hesum limum: Ove Mikkelsen, Jógvan Durhuus, Martin Joensen, Haldor Hansen, Jógvan Olsen, Andreas Djurhuus og Hákun Djurhuus.

Nevndin hevur viðgjørt málið og mælir til at samtykkja uppskotið frá Leon Joensen og Haldor Hansen.

2. viðgerð 4. apríl.

Uppskotið samtykt 22—0.
Málið sostatt avgreitt.

55. Broyting í ferðslulógini

Ár 1973, 4. mars, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í ferðslulógini.

§ 1.

Í ferðslulógini, sambr. lógarkunngerð nr. 10 frá 18. mars 1966, sum broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 27. mai 1968, løgtingslóg nr. 36 frá 2. juni 1970 og lóglingslóg nr. 21 frá 26. mai 1971 verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 2 VIII gongur orðið «tjúkkum» út.
2. Í § 18 verður aftaná stk. 6 sett:
«Stk. 7. Er førararættarin frádømdur eftir § 59, er lað ein treyt fyri at fáa førararættin aftur, aftaná at tíðin eftir dóminum er úti, at nýggj førararoynd verður staðin. Førararoyndin kann verða tikin áðrenn tíðin eftir dóminum er úti. Tann praktiska royndin kann tó í fyrsta lagi verða tikin 1 mánaða áðrenn tíðin eftir dóminum er úti. Hevur hin dømdi staðið førararoynd aftaná ta hending, sum førdi til átalu, skal nýggj roynd ikki verða tikin, um so er at royndin er staðin ikki meira enn eitt ár áðrenn tíðin eftir dóminum er úti og ikki meira enn eitt ár áðrenn søkt er um at fáa førarabræv aftur.»
3. Í § 30, stk. 3, verður «30 km»

(F.L. J. nr. 514-23-2) -- LL 32/74.

lagtingslov om ændring i færdselsloven.

§ 1.

I færdselsloven, jfr. lagtingslovsbekendtgørelse nr. 10 af 18. marts 1966, som ændret med lagtingslov nr. 31 af 27. maj 1968, lagtingslov nr. 36 2. juni 1970 og lagtingslov nr. 21 af 26. maj 1971 foretages følgende ændringer:

1. I § 2 VIII udgår ordet «tæt».
2. I § 18 indsættes efter stk. 6:
«Stk. 7. Har førerretten været frakendt i medfør af § 59, er det en betingelse for generhvervelse af førerbevis efter frakendelsestidens udløb, at ny førerprøve bestås. Førerprøven kan aflægges før frakendelsestidens udløb. Den praktiske førerprøve kan dog tidligst aflægges 1 måned før frakendelsestidens udløb. Har domfældte bestået en førerprøve efter det forhold, der gav anledning til tiltalen, skal ny prøve dog ikke aflægges, såfremt prøven er bestået inden for det sidste år før frakendelsestidens udløb og inden for det sidste år før ansøgningen og generhvervelse af førerbevis.»
3. I § 30, stk. 3, ændres «30 km»

og «50 km» broytt til ávikavist «40 km» og «80 km».
Sum nýtt stykki 4 verður sett: «Hóast reglurnar í stk. 3 má ferðin ongatíð fara uppum fyri

a) motorvogn, hvørs loyvda totalvekt er yvir 3.500 kg. ..... 60 km/t.
b) motorvogn við ikoblaðum góðkendum viðfestum vogni ella leguvogni ..... 40 km/t.
c) motorvogn við ikoblaðum viðfestum vogni 30 km/t.
d) motorvogn og motorambboð, meðan drigið verður ella við ikoblaðum hulvogni ..... 20 km/t.»

Sum nýtt stykki 5 verður sett: Reglurnar í stk. 3 og 4 eru ikki galdandi fyri neyðsendarakfar, um so er at skjótari koyring er átroðkandi neyðug. Koyringin skal tó ejsini í tilíkum fori fara fram við hóskandi varsemi og fyriliti.»

Stk. 4 og 5 verða stk. 6 og 7.

3. Í § 30, stk. 3, verður «30 km» og «50 km» broytt til ávikavist «50 km» og «80 km».
4. Í § 35, stk. 2, verður skoytt uppí sum nýtt pkt.:
«Tá ið koyrt verður í toku, grovum nyfalli ella í tílíkum ringum sýni, skulu nærljós (stutt ljós) nýtast. Um dagin kunnu tó í staðin nýtast fjarljós (langt ljós)».
5. Í § 55 verður aftaná stk. 1 sett sum nýtt stykki:

og «50 km» til henholdsvis «40 km» og «80 km».
Som nyt stk. 4 indsættes: « Umset bestemmelserne i stk. 3 må kørehastigheden aldrig overstige for

a) motorvogn, hvis tilladte totalvægt overstiger 3.500 kg. ..... 60 km/t.
b) motorvogn med tilkoblet godkendt påhængsvogn eller sættevogn 40 km/t.
c) motorvogn med tilkoblet påhængsredskab 30 km/t.
d) motorvogn og motorredskab under slæbning eller med tilkoblet blokvogn ..... 20 km/t.

Som nyt stk. 5 indsættes: «Bestemmelserne i stk. 3 og 4 gælder ikke for udrykningskøretøj, når hurtigere kørsel er påtrængende nødvendig. Kørslen skal dog også i så fald ske med tilbørlig agtpågivenhed og hensynsfuldhed.»

Stk. 4 og 5 bliver herefter stk. 6 og 7.

3. I § 30, stk. 3, ændres «30 km» og «50 km» til henholdsvis «50 km» og «80 km».
4. Til § 35, stk. 2, tilføjes som nyt pkt.:
«Ved kørsel i tåge, under kraftig nedbør eller ligende dårlige lysforhold skal nærlys (kort lys) anvendes. Om dagen kan dog i stedet anvendes fjernlys (langt lys)».
5. I § 55 indsættes efter stk. 1 som nyt stykke:

«Stk. 2. Tryggingarfelagið heftir beinleiðis fí sum kom fyri skaðan fyri endurgjald eftir § 54.»

6. Í § 55, stk. 5, ið verður stk. 6, verður «stk. 4» broytt til «stk. 5».

7. Aftaná § 55 verður sett:
«§ 55 a. Verður søk reist móti tryggingarfelagnum av einum, sum komin er fyri skaða, skal felagið boða øllum, sum ábyrgd hava eftir § 54, stk. 5, til hvønn rættarfund við freist eftir § 175 í rættargangslógini, sum galdandi er fyri vitnir í borgarligum søkum. Tilsøgnin skal siga frá reglunum í stk. 2.
Stk. 2. Tann, sum fær tilsøgn eftir stk. 1 kann gerast partur í søkini móti at siga frá til rættarbókina. Ger hann tað ikki, er avgerðin í endurgjaldsspurninginum við dómi ella semju bindandi fyri hann».

8. Í § 56, stk. 1. verður «stk. 7» broytt til stk. 8».

9. § 56, stk. 2, fer úr gildi og í staðin verður sett:
«Stk. 2. Tryggingarfelagið, sum tikið hevur við ábyrgdartrygging fyri motorakfarið, sum ákærdi nýtti, verður hvat endurgjaldsspurninginum viðvikir roknað sum partur í søkini og skal hava tilsøgn til hvønn rættarfund við freist eftir § 175 í rættargangslógini sum galdandi er fyri vitnir í straffisøkum.
Stk. 3. Komi eftir § 54, stk. 5, aðrir enn ákærdi undir endurgjaldsábyrgd, skulu eisini hesir hava tilsøgn um hvønn rættarfund við tí í stk. 2

«Stk. 2. Forsikringsselskabet hæfter umiddelbart over for skadelidte for erstatning efter § 54».

6. I § 55, stk. 5, der bliver stk. 6, ændres «stk. 4» til «stk. 5».

7. Efter § 55 indsættes:
«§ 55 a. Anlægger skadelidte sag mod forsikringsselskabet, skal selskabet tilsige enhver, der er ansvarlig efter § 54, stk. 5, til ethvert retsmøde med det varsel, som efter retsplejelovens § 175 gælder for vidner i borgerlige sager. Tilsigelsen skal indeholde oplysning om reglerne i stk. 2.
Stk. 2. Enhver, der tilsiges efter stk. 1, kan ved at fremsætte begæring herom til retsbogen indtræde som part i sagen. Indtræder han ikke, er afgørelsen af erstatningsspørgsmålet ved dom eller forlig bindende for ham.»

8. I § 56, stk. 1, ændres «stk. 7»» til «stk. 8».

9. § 56, stk. 2, ophæves, og i stedet indsættes:
«Stk. 2. Det forsikringsselskab, i hvilket der er tegnet ansvarsforsikring for det køretøj, som tiltalte benyttede, anses for erstatningsspørgsmålets vedkommende som part i sagen og skal tilsiges til ethvert retsmøde med det varsel, som efter retsplejelovens § 175 gælder for vidner i straffesager.
Stk. 3. Påhviler der efter § 54, stk. 5, andre end tiltalte erstatningsansvar, skal tillige disse tilsiges til ethvert retsmøde med det i stk. 2 nævnte

nevndu freist. Reglurnar í § 55a, stk. 2, verða nýttar samsvarandi».

10. § 56, stk. 4, ið verður stk. 5, verður orðað soleiðis:
«Stk. 5. Hevur endurgjaldsspurningurin lingið avgerð undir straffisak, sum verður skotin til hægri rætt, skal einhvør, ið hevur verið partur í endurgjaldsspurninginum í sakini, eisini roknast sum partur í henni, um so er at endurgjaldsspurningurin verður skotin inn fyri hægri rætt.»

11. Í § 56, stk. 9, ið verður stk. 10, verður «§ 55, stk. 4» broytt til: «§ 55, stk. 5».

12. § 58, stk. 3, fer úr gildi og í staðin verður sett:
«Stk. 3. Hevur bæði førarin og motorakfarið, sum brotið er ímt við, heimstað uttanlands, kann akfarið haldast aftur av løgregluni, til skyldugar bøtur, sakarmálskostnaður, endurgjaldsupphæddir ella gjøld fyri lógskyldugu ábyrgdartrygging eru goldin, ella trygd er veitt fyri gjaldingina. Er peningurin ikki goldin innan 2 mánaðar aftaná, at sakin er endaliga avgjørd, kann fulnaður søkjast í akfarinum.

Stk. 4. Viðvíkjandi fremjan av eftirhaldi eftir stk. 3 verða reglurnar í rættargangslógini §§ 745 og 746 um hald á góðs, sum eigur at konfiskerast, nýttar tilsvarandi. Haldast kann bert aftur, um so er at hetta verður hildið neyðugt fyri at tryggja gjalding av nevndu upphæddum. Hevði førarin ongan rætt at hava ak-

varsel. Bestemmelserne i § 55a, stk. 2 finder tilsvarende anvendelse».

10. § 56, stk. 4, der bliver stk. 5, affattes således:
«Stk. 5. Ankes en straffesag, under hvilken erstatningsspørgsmålet er blevet påkendt, anses enhver, der for erstatningsspørgsmålets vedkommende har været part i den indankede sag, tillige som part under anken, for så vidt erstatningsspørgsmålet tages under påanke.»

11. I § 56, stk. 9, der bliver stk. 10, ændres «§ 55, stk. 4» til: § 55, stk. 5».

12. § 58, stk. 3, ophæves, og i stedet indsættes:
«Stk. 3. Er såvel føreren som det motordrevne køretøj, med hvilket overtrædelsen er begået, hjemmehørende i udlandet, kan køretøjet tilbageholdes af politiet, indtil forskyldte bøder, sagsomkostninger, erstatningsbeløb eller præmier for lovpligtig ansvarsforsikring er betalt, eller der er stillet sikkerhed for betalingen. Er beløbet ikke betalt inden 2 måneder efter sagens endelige afgørelse kan der søges fyldestgørelse i køretøjet.
Stk. 4. Med hensyn til iværksættelse af tilbageholdelsen efter stk. 3 finder reglerne i retsplejelovens §§ 745 og 746 om beslaglæggelse af ting, der findes at burde konfiskeres, tilsvarende anvendelse. Tilbageholdelsen kan kun ske, for så vidt den findes påkrævet for at sikre betaling af de nævnte beløb. Var føreren uberettiget

farið, kann tað ikki haldast aftur.

S t k. 5. Reglan í stk. 3 verður ikki nýtt viðvíkjandi førarum, sum eru heimaboyrandi í Finlandi, Islandi, Noregi ella Svøríki.»

13. Í § 59, stk. 4, 1. punktum, verða orðini «rættin, sum í seinasta instans tó avgerð at frátaka rættin» broytt til: «dómsfólnrnar».

14. Í § 59 gongur stk. 5, 2. pkt. og stk. 6, 2. pkt. út og aftaná stk. 6 verður sett:

«S t k. 7. Er fororarættarin frádømdur eftir stk. 2, stoðgast fylgjurnar ikki av at skjóta dómin inn fyri hægri rætt, uttan so at hetta verður ásett av tí hægra rættinum. Sonn reglur eru galdandi, har frádømingin er gjord eftir stk. 1, uttan so at fororarættarin er tikin frá tí dømda undir sakarmálinum eftir stk. 6. Avgerðin verður tikin við kærumáli.

S t k. 8. Verður frífinnandi dómur uppsagdur viðvíkjandi spurninginum um frátøku, har fororarættarin hevur verið frálikin eftir Stk. 6, kann ákæruvaldið, um so er at dómurin verður skotin inn fyri hægri rætt og viðurskiftini serstakliga tala fyri at uppihalda frátøkuna, leggja spurningin hesum viðvíkjandi fyri tann rætt, sum málið verður skotið inn til. Hægri rætturin kann eftir tilsvarandi reglum taka avgerð um frátøku av førararættinum í málum, har tað í tí fyriliggjandi dómi er framd frátøka,

i besiddelse af køretøjet, kan tilbageholdelse ikke ske.

S t k. 5. Reglen i stk. 3 finder ikke anvendelse med hensyn til førere, der er hjemmehørende i Finland, Island, Norge eller Sverrige.»

13. I § 59, stk. 4, 1. punktum, ændres ordene «den ret, der i sidste instans har truffet bestemmelse om rettens frakendelse» til: «domstolene».

14. I § 59 ophæves stk. 5, 2. pkt. og stk. 6, 2. pkt., og efter stk. 6 indsættes:

«S t k. 7. Anke af en dom, hvorved der er sket frakendelse af førerretten efter stk. 2, har ikke opsættende virkning for dommens bestemmelser om frakendelse, medmindre dette bestemmes af den ret, hvortil anke er sket. Det samme gælder anke af en dom, hvorved der er sket frakendelse efter stk. 1, såfremt førerretten har været frataget domfældte under sagen efter stk. 6. Afgørelsen træffes ved kendelse.

S t k. 8. Afsiges der i en sag, hvori førerretten er frataget tiltalte efter stk. 6, frifindende dom med hensyn til spørgsmålet om frakendelse, kan anklagemyndigheden, såfremt dommen ankes og forholdene i særlig grad taler for at opretholde fratagelsen, indbringe spørgsmålet herom for den ret, hvortil anke er sket. Ankeinstansen kan efter tilsvarende regler træffe bestemmelse om fratagelse af førerretten i sager, hvor der ved den foreliggende dom er sket frakendelse, men anke har opsættende

men fylgjumar stoðgast ikki av at skjóta hann inn til hægri rætt, smbr. stk. 7. Avgerðin verður tikin við kærumáli.»
Stk. 7 og 8 verða stk. 9 og 10.

15. Aftaná § 59 verður sett:
«§ 59 a. Verður persónur frifunnin, sum eftir reglunum í § 59 er frádømdur ella hevur mist føraraætlin, ella verður sak ikki førd til dóms, har persónur hevur mist hendan rætt, kann rætturin døma viðkomandi endurgjald fyri tap, sum hevur staðist av frádømingini ella frátøkuni
Stk. 2. Endurgjald eftir stk. 1 kann ikki dømast til, um so er at grundaður ilgrunur er um at viðkomandi er skyldugur í tí misbroti, sum fordi til frádømingina ella frátøkuna, ella frifinning ella ákærufrávall bert er grundað í tí, at hann verður hildin ikki at vita hvat hann ger. Reglurnar í § 1018 e-m í rættargangslógini verða nýttar tilsvarandi.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.
Stk. 2. § 1, nr. 2, verður nýtt, tá ið førarabrøv skal fáast aftur aftaná frádøming sambært endaligan dóm, sum er feldur aftaná at lógin er komin í gildi.

Stk. 3. Tær í § 1, nr. 2-7, nevndu broytingar eru galdandi fyri skaðar, sum hendir eru aftaná at lógin kemur í gildi. Ábyrgdartryggingar fyri motorakfør herundir «prutl», ið teknaðar eru, áðrenn lógin kemur í gildi, verða broyttar samsvarandi reglunum í lógini. Eldri

virkning, jfr. stk. 7. Afgørelsen træffes ved kendelse.»
Stk. 7 og 8 bliver herefter stk. 9 og 10.

15. Efter § 59 indsættes:
«§ 59a. Frifindes en person, der efter reglerne i § 59 har været frakendt eller frataget førerretten, eller føres sag, hvori en person har været frataget denne ret, ikke igennem til dom, kan retten tilkende den pågældende erstatning for tab, som er en følge af frakendelsen eller fratagelsen.
Stk. 2. Erstatning efter stk. 1 kan ikke tilkendes, såfremt der er begrundet formodning om, at den pågældende er skyldig i den forseelse, der gav anledning til frakendelsen eller frifindelsen eller påtaleundladelsen alene er begrundet i, at han findes utilregnelig. Reglerne i retsplejelovens § 1018 e-m finder tilsvarende anvendelse.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.
Stk. 2. § 1, nr. 2, finder anvendelse ved generhvervelse af førerbevis efter frakendelse i behold til endelig dom, som er afsagt efter lovens ikrafttræden.

Stk. 3. De i § 1, nr. 2-7, nævnte ændringer har virkning for skader, der er forvoldt efter lovens ikrafttræden. Ansvarsforsikringer for motordrevne køretøjer, herunder knallerter, der er tegnet inden lovens ikrafttræden, ændres i overensstemmelse med lovens regler.

tryggingarskjøl nýtast ikki at fáa árit um hetta.

S t k. 4. § 1, nr. 14 og 15 er galdandi fyri frádøming og frátøku av førararætti, ið fer fram aftaná at lógin er komin í gildi.

De ældre policer behøver ikke at forsynes med påtegning herom.

S t k. 4. § 1, nr. 14 og 15, har virkning for frakendelse og fratagelse af førerret, der sker efter lovens ikrafttræden.

Viðmerkingar:

Hetta uppskot til broytingar í ferðsludógini viðvíkur reglunum um ljósføring, nýggja førararoynd aftaná frádøming av førarabrævi, hækking av mestu ferð, ábyrgdartrygging, uppaltartøku av málum um frádøming av førarabrævi, og endurgjald til persónar, sum hava mist førarabrævið undir sakarmálsviðgerðini og síðan verða frikendir.

Annars verður vist til uppskotið og viðmerkingarnar til tær einstøku greinirnar.

Til 2

Eftir galdandi reglum avger løgreglan eftir umstøðunum í hvørjum einstøktum føri, um persónur, ið er dømdur at missa førarabrævið, skal upp til nýggja førararoynd, tá ið tíðin eftir dóminum er úti.

Eftir broytingaruppskotinum verður treytin fyri at fáa førarabrævaftur, aftaná at tíðin eftir dóminum er úti, at ein hevur staðið nýggja førararoynd. Løgreglan sleppur sostatt undan í hvørjum einstøkum føri at mela um, um nýggj roynd eigur at verða tikin. Við leirri vaksandi ferðslu má tað eisini haldast at vera ynskiligt, at persónur, sum í longri tíð ikki hevur ført motorakfar, prógvar, at hann framvegis er førur fyri at gera hetta á tryggan hátt. Henda regla vil eisini gera støðuna hjá tí dømda meira greiða.

Til 3.

Hægstumarkið fyri ferð við motorakfari er nú 30 km um tíman í Tórshavn og bygdunum og 50 km um tíman millum bygdir.

Tá veganetið er nóg úthygt seinnu árini við breiðum og tíðarhóskandi vegum, meðan aðrir vegir eru beindir og asfalteraðir, heldur landsstýrið tað vera forsvarligt, at mesta ferð verður sett uppá upp. Annars er at viðmerkja, at eftir § 30, stk. 1 og 2 skal ferðin altíð lagast eftir viðurskiftunum.

Til 5-12.

Tær undir hesum punktum gjørdu broytingar hava til endamáls at lúka treytirnar í europeiskum millumlandasáttmála frá 20. apríl 1959

um tvungna ábyrgdartrygging av motorakførum. Eftir broytingini kann hann, ið hevur verið fyri skaða, reisa endurgjaldskrav beinleiðis móti tryggingarfelagnum. Hetta er ikki samsvarandi galdandi reglum um ábyrgdartrygging eftir § 95 í lógini um tryggingaravtalur, ið forútsetur, at hann, sum hevur verið fyri skaða, ikki kann leggja sak móti felagnum, fyrr enn hann hevur fingið dóm yvir tryggjaða ella gjørt avtalu við hann um endurgjaldið.

Tryggingarsambandið hevur onki at viðmerkja til hesar broytingar.

Til 13.

Spurningurin um at fáa førarabræv til motorakfar aftur áðrenn tíðin eftir dóminum er úti, má leggjast fyri rættin, sum í seinasta instans tók avgerð um frádøming av førararættinum.

Eftir broytingini kann spurningurin um at fáa førarabrævið aftur í øllum førum fyrst leggjast fyri undirrættin.

Til 14.

Eftir galdandi reglum stoðgast fylgjurnar av frádøming av førum brævið ikki av at skjóta dóminum fyri hægra rætt ella av kæru, og heldur ikki hevur hægri rætturin heimild at stoðga fylgjunum. Henda regla verður hildin at vera ov ósmiðlig í mongum førum, t.d. har avgerðin er ivasom ella tí at avgerðin við hægra rættin ofta tekur so langa tíð, at frádømingartíðin er útgingin. Eftir uppskotinum kann hægri rætturin taka avgerð um at stoðga fylgjunum.

Til 15.

Eftir ferðslulógini er ongin heimild at veita endurgjald til persónar sum verða frífunnir, men sum hava havt tap av tí, at teir undir sakarmálsviðgerðini ikki hava havt nakað førarabræv.

Eftir broytingini er møguleiki fyri í tílíkum førum at veita endurgjald fyri figgjarligt tap.

1. viðgerð 6. mars og málið beint í lógarnevndina, sum tann 19. mars legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um broyting í ferðslulógini.

Uppskotið varð framlagt 4. mars 1974 og 1. viðgerð fór fram 6. mars, og varð málið tá beint í lógarnevndina.

Broytingarnar viðvíkja reglunum um fjósføring, hekking av generellu maximalferðini, nýggj førarareynd aftaná fráloyning av førarabrævi og lógarheimild um eyðurgjald vegna mist førarabrøv, tá endalig sakarmálsviðgerð ber við sær fríkenning.

Nevndin hevur viðgjørt málið. Eitt meiriluti (Demmus Hentze, Poul Jacob Olsen og Trygve Samuelsen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins við tí broyting í § 1, 3 í uppskotinum, at orðini «í § 30, stk. 3, verður «30» og «50 km» broytt til ávikavist «40 km» og «80 km» og í donsku tekstini «I § 30, stk. 3, ændres «30 km» og «50 km» til henholdsvis «40 km» og «80 km» ganga út, og í staðin verður sett «í § 30, stk. 3, verður «50 km» broytt til «70 km» og í donsku tekstini «I § 30, stk. 3, ændres «50 km» til 70 km».

Minnilutin (Signar Hansen og Marfin Joensen) mælir tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Uppskot

frá meirihlutanum (Demmus Hentze, Poul J. Olsen og Trygve Samuelsen).

Í § 1, 3) ganga orðini: «í § 30, stk. 3, verður «30 km» og «50 km» broytt til ávikavist «40 km» og «80 km» og í donsku tekstini: «I § 30, stk. 3, ændres «30 km» og «50 km» til henholdsvis «40 km» og «80 km», og í staðin verður sett: «í § 30, stk. 3, verður «50 km» broytt til «70 km», og í donsku tekstini «I § 30, stk. 3, ændres «50 km» til «70 km».

2. viðgerð 22. mars, atkvøtt var 26. mars.
Broytingaruppskot frá meirihlutanum í nevndini samt. 15 — 0.
gr. 1 so broytt samtykt 17—0.
gr. 2 samtykt 17—0.
Lógaruppskotið so broytt at fara til 3. viðg. samt. 17 — 0.

3. viðgerð 29. mars.
Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð u úendaligt samtykt 19 — 0

56. Ymsar ríkislógir

(Færøernes Realkreditinstitut)

Ár 1974, 13. februar, var frá lógarnevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Við skrivi frá 25. januar 1974 hevur landsstýrið lagt fyri løgtingið lóg nr. 605 frá 28. november 1973 «Om statsgaranti for obligationslån optaget af Færøernes Realkreditinstitut» og mælir landsstýrið til, at lógin verður lýst at galda í Føroyum.

Eftir hesi lóg fær viðkomandi ráðharri heimild til ríkiskassans vegna at veðhalda fyri renting og afturgjalding av obligatiónsláni upp í 75 milj. kr., sum Færøernes Realkreditinstitut tekur í tíðarskeiðinum frá 1. apríl 1974 til 31. mars 1979 til fíggjan av útlánum til fiskifør beinahoyrandi í Føroyum.

Málið varð við framløguna beint í lógarnevndina.

Nevndin (Demmus Hentze, Martin Joensen, Ove Mikkelsen, ið møtti fyri Signar Hansen, Tórálvur Olsen, ið møtti fyri Poul Jacob Olsen og Trygve Samuelsen) hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at gera hesa

t i n g s a m t y k t

Lóg nr. 605 frá 28. november 1973 «Om statsgaranti for Obligationslån optaget af Færøernes Realkreditinstitut» verður lýst at galda í Føroyum.

(Víst verður annars til ríkislóg nr. 605 av 28. november 1973)

2. viðgerð 15. februar.
Uppskotið samtykt 22 0.
Málið avgreitt.

(F. L. j. nr. 1403-6)

57. Ymsar ríkislógir (betinget dømte)

Ár 1973, 13. februar var frá lógarnevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Við skrivi frá 25. januar 1974 hevur landsstýrið lagt fyri løgtingið lóg nr. 114 frá 28. februar 1973 «Om statens overtagelse af tilsynet med betinget dømte m.v.» og mælir landsstýrið til, at lógin verður lýst at galda í Føroyum. Sama ger landfútin, ið hevur havt málið til ummælis.

Eftir hesi lóg yvirtekur løgmálaraðið frá 1. apríl 1973 starvið, ið Dansk Forsorgsselskab hevur havt viðvíkjandi «betinget dømte og prøveløsladte», harundir millum annað at kanna persónligu viðurskiftir hjá viðkomandi persóni, tá talan verður um betingaðan dóm, tiltalufrávall ella ungdómsfongsul.

Málið varð við framløguna beint í lógarnevndina.

Nevndin (Demmus Hentze, Martin Joensen, Ove Mikkelsen, ið møtti fyri Signar Hansen, Tórálvur Olsen, ið møtti fyri Poul J. Olsen og Trygve Samuelsen) hevur viðgjørt málið.

Meirilutin (Martin Joensen, Tórálvur Olsen og Trygve Samuelsen) mælir tinginum at gera hesa

tiltingsamfykt.

Lóg nr. 114 frá 28. februar 1973 «Om statens overtagelse af tilsynet med betinget dømte m.v.» verður lýst at galda í Føroyum.

Minnilutin (D. Hentze og Ove Mikkelsen) setur einki uppskot fram.

2. viðgerð 15. februar.
Atkvøtt var um uppskotið 22. mars.
Uppskotið fall 12—0.
Málið avgreitt.

(F.L.J. nr. 501-11)

58. Kunngerð viðvíkjandi fiskiskapi undir Føroyum

Ár 1974, 15. februar, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at fiskimálaráðið setur í gildi hesa kunngerð um veiðu undir Føroyum:

Bekendtgørelse om regulering af fiskeriet i farvande ved Færøerne.

I henhold til lov nr. 210 af 19. maj 1971 om internationale reguleringsforanstaltninger vedrørende fiskeri, §§ 1 og 3, fastsættes følgende:

§ 1.

Denne bekendtgørelse finder i overensstemmelse med bestemmelserne i den mellem Danmark, Belgien, Frankrig, Norge, Polen, Storbritannien og Vesttyskland den 18. december 1973 undertegnede overenskomst om fiskeriet i farvande ved Færøerne anvendelse på fiskeri i de farvande, som ligger inden for en linie trukket ret øst fra 15° vestlig længde langs den 63. nordlige breddegrad til 4° vestlig længde, derfra ret syn til 60° 30′ nordlig bredde, derfra ret vest til 5° vestlig længde, derfra ret syn til 60° nordlig bredde, derfra ret vest til 15° vestlig længde, derfra ret nord til 63° nordlig bredde.

§ 2.

Fiskeri efter torsk og kuller i det i § 1 omhandlede område reguleres på følgende måde.

Stk. 2. For personer hjemmehørende eller selskaber m.v. med hjemsted på Færøerne må den årlige fangst ikke overstige 32.000 tons, hel urenset fisk.

Stk. 3. De nærmere regler, som måtte være nødvendige for overholdelsen af bestemmelsen i stk. 2, fastsættes af Færøernes landsstyre.

(F.L. J. nr. 1500-1-7)

Stk. 4. For personer hjemmehørende eller selskaber m.v. med hjemsted i riget uden for Færøerne må fiskeri efter de i stk. 1, nævnte fiskearter kun finde sted efter autorisation af fiskeriministeren.

Stk. 5. I forbindelse med den i stk. 4, nævnte autorisation kan fastsættes særlige bestemmelser for fiskeriets udøvelse, herunder:

a) total fangstmængde gældende for det enkelte område og/eller fartøjer.
b) indberetningspligt vedrørende fangst.

§ 3.

Fiskeri med trawl må ikke finde sted i de neden for angivne områder inden for de angivne perioder:

område 1.:
8 sømil fra fiskerigrænsen mellem 0° retvisende fra Eiðiskollur og 90° retvisende fra retvisende fra Bispur:
15. februar til 15. maj.

område 2.:
18 sømil fra fiskerigrænsen mellem 90° retvisende fra Bispur og 90° retvisende fra Akraberg:
1. juni til 30. november.

område 3.:
a) 12 sømil fra fiskerigrænsen mellem 150° retvisende fra Akraberg og 190° retvisende fra Akraberg.
b) 6 sømil fra fiskerigrænsen mellem 90° retvisende fra Akraberg og 240° retvisende fra Ørnanípan:
1. april til 30. juni og 1. oktober til 31. december.

område 4.:
12 sømil fra fiskerigrænsen mellem 240° retvisende fra Trollhøvdi og 320° retvisende fra Barðið:
1. december til 31. marts og 1. maj til 31. maj.

område 5.:
Området inden for 200 m dybdekurven i de farvande, som ligger inden for en linie trukket ret øst fra 10° vestlig længde langs den 60. nordlige breddegrad til 8° vestlig længde, derfra ret nord til 60° 30′ nordlig bredde, derfra ret øst til 7° 30′ vestlig længde, derfra ret nord indtil et punkt 61° 15′ nordlig bredde, 7° 30′ vestlig længde, derfra i nordvestlig retning indtil et

punkt 61° 30' nordlig bredde, 8° 00' vestlig længde, derfra ret vest indtil 10° vestlig længde, derfra ret syd til 60° nordlig bredde.
1. marts til 31. marts.

Stk. 2. De i stk 1, omhandlede områder er angivet på vedføjede danske kort, nr. 80.

§ 4.

Uanset bestemmelsen i § 3 kan Færøernes landsstyre tillade mindre færøske skibe at fiske med trawl inden for områderne 2, 3 og 4 i de perioder, hvor trawlfiskeri i øvrigt ikke må finde sted. Den samlede årlige fangst af torsk og kuller ifølge sådanne tilladelser må højest være:

i område 2: 1250 tons,
i område 3: 1250 tons,
i område 4: 500 tons.

Stk. 2. De i stk. 1, angivne fangstmængder skal medregnes i den for personer hjemmehørende eller selskaber m.v. med hjemsted på Færøerne tilladte fangst af torsk og kuller, jfr. § 2, stk. 2.

Stk. 3. De nærmere regler for udøvelse af trawlfiskeri i henhold til stk. 1, fastsættes af Færøernes landsstyre.

§ 5.

Tilsynet med overholdelse af bestemmelserne i denne bekendtgørelse og de i henhold hertil givne forskrifter påhviler politiet, fiskerikontrollen, fiskeriinspektionen eller for Færøernes vedkommende sådanne personer, der af det færøske landsstyre bemyndiges dertil.


§ 6.

Overtrædelse af § 3 og det i henhold til § 2, stk. 3 og 5 og § 4, stk. 3, fastsatte regler straffes med bøde.

Stk. 2. Halvdelen af bøderne tilfalder statskassen, medens den anden halvdel indbetales til «Hjálpargrunnurin fyri óarbeiðsførar fiskimenn». For så vidt angår personer eller selskaber, der er hjemmehørende i Danmark indbetales sidstnævnte halvdel dog til fiskeriministeriet til videre fordeling mellem Dansk Fiskeriforenings hjælpefond og Danmarks Havfiskeriforenings hjælpefond med henholdsvis 2/3 og 1/3.

§ 7.

Denne bekendtgørelse træder i kraft straks.


100 m
500 "
1000 "
1
2
3
4
5
6
7
8
9
10
11
12
13
14
15
16
17
18
19
20
21
22
23
24
25
26
27
28
29
30
31
32
33
34
35
36
37
38
39
40
41
42
43
44
45
46
47
48
49
50
51
52
53
54
55
56
57
58
59
60
61
62
63
64
65
66
67
68
69
70
71
72
73
74
75
76
77
78
79
80
81
82
83
84
85
86
87
88
89
90
91
92
93
94
95
96
97
98
99
100
101
102
103
104
105
106
107
108
109
110
111
112
113
114
115
116
117
118
119
120
121
122
123
124
125
126
127
128
129
130
131
132
133
134
135
136
137
138
139
140
141
142
143
144
145
146
147
148
149
150
151
152
153
154
155
156
157
158
159
160
161
162
163
164
165
166
167
168
169
170
171
172
173
174
175
176
177
178
179
180
181
182
183
184
185
186
187
188
189
190
191
192
193
194
195
196
197
198
199
200
201
202
203
204
205
206
207
208
209
210
211
212
213
214
215
216
217
218
219
220
221
222
223
224
225
226
227
228
229
230
231
232
233
234
235
236
237
238
239
240
241
242
243
244
245
246
247
248
249
250
251
252
253
254
255
256
257
258
259
260
261
262
263
264
265
266
267
268
269
270
271
272
273
274
275
276
277
278
279
280
281
282
283
284
285
286
287
288
289
290
291
292
293
294
295
296
297
298
299
300
301
302
303
304
305
306
307
308
309
310
311
312
313
314
315
316
317
318
319
320
321
322
323
324
325
326
327
328
329
330
331
332
333
334
335
336
337
338
339
340
341
342
343
344
345
346
347
348
349
350
351
352
353
354
355
356
357
358
359
360
361
362
363
364
365
366
367
368
369
370
371
372
373
374
375
376
377
378
379
380
381
382
383
384
385
386
387
388
389
390
391
392
393
394
395
396
397
398
399
400
401
402
403
404
405
406
407
408
409
410
411
412
413
414
415
416
417
418
419
420
421
422
423
424
425
426
427
428
429
430
431
432
433
434
435
436
437
438
439
440
441
442
443
444
445
446
447
448
449
450
451
452
453
454
455
456
457
458
459
460
461
462
463
464
465
466
467
468
469
470
471
472
473
474
475
476
477
478
479
480
481
482
483
484
485
486
487
488
489
490
491
492
493
494
495
496
497
498
499
500
501
502
503
504
505
506
507
508
509
510
511
512
513
514
515
516
517
518
519
520
521
522
523
524
525
526
527
528
529
530
531
532
533
534
535
536
537
538
539
540
541
542
543
544
545
546
547
548
549
550
551
552
553
554
555
556
557
558
559
560
561
562
563
564
565
566
567
568
569
570
571
572
573
574
575
576
577
578
579
580
581
582
583
584
585
586
587
588
589
590
591
592
593
594
595
596
597
598
599
600
601
602
603
604
605
606
607
608
609
610
611
612
613
614
615
616
617
618
619
620
621
622
623
624
625
626
627
628
629
630
631
632
633
634
635
636
637
638
639
640
641
642
643
644
645
646
647
648
649
650
651
652
653
654
655
656
657
658
659
660
661
662
663
664
665
666
667
668
669
670
671
672
673
674
675
676
677
678
679
680
681
682
683
684
685
686
687
688
689
690
691
692
693
694
695
696
697
698
699
700
701
702
703
704
705
706
707
708
709
710
711
712
713
714
715
716
717
718
719
720
721
722
723
724
725
726
727
728
729
730
731
732
733
734
735
736
737
738
739
740
741
742
743
744
745
746
747
748
749
750
751
752
753
754
755
756
757
758
759
760
761
762
763
764
765
766
767
768
769
770
771
772
773
774
775
776
777
778
779
780
781
782
783
784
785
786
787
788
789
790
791
792
793
794
795
796
797
798
799
800
801
802
803
804
805
806
807
808
809
810
811
812
813
814
815
816
817
818
819
820
821
822
823
824
825
826
827
828
829
830
831
832
833
834
835
836
837
838
839
840
841
842
843
844
845
846
847
848
849
850
851
852
853
854
855
856
857
858
859
860
861
862
863
864
865
866
867
868
869
870
871
872
873
874
875
876
877
878
879
880
881
882
883
884
885
886
887
888
889
890
891
892
893
894
895
896
897
898
899
900
901
902
903
904
905
906
907
908
909
910
911
912
913
914
915
916
917
918
919
920
921
922
923
924
925
926
927
928
929
930
931
932
933
934
935
936
937
938
939
940
941
942
943
944
945
946
947
948
949
950
951
952
953
954
955
956
957
958
959
960
961
962
963
964
965
966
967
968
969
970
971
972
973
974
975
976
977
978
979
980
981
982
983
984
985
986
987
988
989
990
991
992
993
994
995
996
997
998
999
1000

Viðmerkingar:

Sáttmálin um avmarkan av veiðumi undir Føroyum avmarkar í ein vissan mun veiðuna hjá føroyskum skipum, og er tí neyðugt, at ein kunngerð um hetta verður sett í gildi.

Sambært lóg nr. 210 frá 19. mai 1971 «om internationale reguleringsforanstaltninger vedrørende fiskeri» hevur fiskimálaráðið heimild til at lýsa tílíkar kunngerðir.

Sambært sáttmálan kunnu føroyingar veiða upp til 32.000 t. av toski og hýsu, meðan aðrir í ríkinum saman við hinum sáttmálalondunum umframt Bretland kunnu veiða í alt 2.000 t. av hesum fiskasløgum. Eisini inniheldur sáttmálin avmarkan av hvat aðrir ríkisborgarar veiða av øðrum botnfiskasløgum.

Av hesi orsøk inniheldur kunngerðin reglur hæði fyri føroyingar og aðrar ríkisborgarar. Soleiðis fyriskipar § 2, 2. og 3. stk. mestu nøgdina, føroyingar kunnu veiða av toski og hýsu og heimilar landsstýrinum at gera tær nærri reglurnar, sum eru neyðugar fyri at halda hesa fyriskipan, meðan 3. og 4. stk. sigur, at aðrir ríkisborgarar ikki mugu veiða hesi fiskasløg uttan autorisatión frá fiskimálaráðnum.

Loyvi at veiða við troli, har troling annars er bannað, kann bert verða givið føroyskum skipum.

1. viðgerð 26. februar og málið beint í marknaðarnevndina, sum 5. mars legði fram soljóðandi

álit

Hetta løgtingsmál er lagt fyri tingið av landsstýrinum.

Við fyrstu viðgerð, sum fór fram 26. februar, varð tað beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Í vetur samtykti løgtingið løgtingsmál nr. 17/1973: Skipan viðvíkjandi fiskiskapi undir Føroyum, Samtyktin avmarkar fiskiskapin undir Føroyum.

Henda kunngerð, sum landsstýrið hevur lagt fram, er ein neyðug fylgja av løgtingsmáli nr. 17, tí skipanin avmarkar eisini fiskiveiðu føroyinga.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilula og tveir minnilutar.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, Poul J. Olsen, Trygve Samuelsen og Hilmar Kass) mælir til at samtykkja uppskotið óbroytt.

Minnilutin (Hákun Djurhuus og Kjartan Mohr) setur eingi uppskot í hesum máli.

Minnilutin (Erlendur Patursson) vísir til tað, ið er fært fram í tingmáli nr. 42/1973: Uppsøgn fiskiveiðisáttmálans, og setur eina uppskot.

2. viðgerð 7. maes.
gr. 1 – 6 samt. 14—0.
gr. 7 samt. 14—0.
Málið sostatt avgreitt.

---

59. Bygging av landsbókasavni

Ár 1974, 28. februar, legði Ásbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

I. Landsstýrinum verður heimilað at byggja landsbókasavn á matr. nr. 1025 a í Tórshavn.

Um fyriliggjandi kostnaðarætlan ikki heldur samanborin við innkomin tilboð aflaná útbjóðing, verður landsstýrið at søkja sær góðkenning hjá tinggjarnevndini, áðrenn byggingin verður byrjað.

II. **Uppskot**
til

løgtingslóg um lán til bygging av landsbókasavni.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilt landskassans vegna at taka upp neyðug lán til bygging av landsbókasavni á matr. nr. 1025 a í Tórshavn.

lagtingslov om lån til bygning af landsbibliotek.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage nødvendige lån til bygning af landsbibliotek på matr. nr. 1025 a i Tórshavn.

(F.L.J. nr. 323-2) — Ll. 49/74.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 34 frá 9. mai 1964 fekk landsstýrið heimild til at keypa matr. nr. 1025 a, sbr. løgtingsmál nr. 38/1963, har í viðmerkingunum m.a. er tilskilað: «Tað hevur leingi staðið teimum skiftandi landsstýrunum greitt, at tey ynsku søvnini, ið halda til á Debessartrøð, hýsast undir ógvuligu trongum umstøðum, fyri ikki at siga óforsvarligum, ikki minst tá ið hugsað verður um brandvandan», og seinni: «tað, sum nærmast liggur fyri, er at byggja bókasavnshús.»

Í løgtingsmáli nr. 64/1964 samtykti løgtingið 31. mars 1965, at «Landsstýrinum verður heimilað at lata detailprojektera landsbókasavn og landsskjalasavn á matr. nr. 1025 a í Tórshavn og soleiðis, at hetta mál verður lagt fyri aftur tingið, tá detailprojekteringin er liðug», men uppskot landsstýrisins í løgtingsmáli nr. 31/1965 um at «Landsstýrinum verður heimilað at byggja landsbóka- og landsskjalasavn á matr. nr. 1025 a í Tórshavn», fall við atkvøðuni 13. mai 1966.

Nevndu uppskot fevndu um bygging av landsbókasavni og heruppií fólkabókasavni við barnabókasavni umframt landsskjalasavni. Kostnaðarætlanin í løgtingsmáli nr. 31/1965 visti, at byggingin kravdi eina ílegging uppá 4.900.000 kr., heruppií búnyttur o.l. við 625.000 kr.

Síðani er hent tað, at Tórshavnar kommuna frá 1. apríl 1969 hevur tikið við rakstrinum av fólkabókasavninum við barnabókasavni, sum 1. apríl 1968 varð flutt út úr bókasavnshúsinum á Debessartrøð til leigað hølir í Niels Finsensgøtu 7, og at landsbókasavnið hevur fingið tryggjað sær innivist í hølum í húsunum, sum bygd verða til evnafrøðiligu- og bakteriufrøðiligu starvsstovuna á matr. nr. 1026 b.

Í skrivi dagfest 28. september 1973 mælir Føroya Landsbókasavn til, at farið verður undir at detailprojektera og byggja nýtt landsbókasavn á Müllerstrøð, matr. nr. 1025 a, skjótast gjørligt við hjálagda skitsuppskoti hjá Lamhauge & Waagstein, skjal B I og II upp á tilsamans 1.500 m² í 2 hæddum sum grundarlagi, soleiðis at alt arbeiðið, eisini atkomuvegur og uttanumøki, verður boðið út undir einum eftir nevndu skitsu, og at biðið verður um alternativt tilboð uppá bygging við elementum.

Í skrivi dagfest 22. juni 1973 frá Lamhauge & Waagstein, skjal C, verður kostnaðurin, tá bygt verður úr betongi við timburklædningi, eftir verandi prislegu mettur til 4 milj. kr., harav 0,5 milj. kr. til útgrevstur, jørðregulering og asfaltering av økinum og umbygging og asfaltering av

afkomuvegunum. Hataftrat kemur sbr. skriv dagfest 28. september 1973 frá Føroya Landsbókasavni 250.000 kr. til keyp av ti mest neyðturviligu innbúgvinum.

Í hesum sambandi verður gjørt vart við, at Lambhauge & Waagstein í skrivi dagfest 24. september 1973, skjal D, sigur frá, at við tí prísvøkstri, sum er í løtuni, má roknast við, at bygging sum henda dýrkar við o.u. 300.000 kr. árliga.

Samlært fylgiskjøl til liggjarløgtingslóg 1974/75 bls. 83 viðvíkjandi konto § 15-12-14 var í landsbóka- og landsskjalasavnsgrunninum 11. juli 1973 1.703.828,11 kr., og skotið varð upp, at játtanin verður hækkað úr 350.000 kr. í 500.000 kr.

Tað er áskoðan landsstýrisins, at byggingin í fyrsta lagi eigur at verða liggjað av tí peningi, sum grunnurin eigur, og síðan annaðhvørt við játtanum á liggjarlógini og/ella láni, sum liggjarumstøðurnar eru, og tí verður skotið upp, at landsstýrinum verður heimilað at taka upp neyðug lán til byggingina.

Vísandi til tann prísvøkstur, sum tilskilað er framman fyri, verður skotið upp, at landsstýrið verður at søkja sær góðkenning hjá liggjarnevndini, áðrenn byggingin verður byrjað, um licitatiónin fer at vísa, at kostnaðarætlanin ikki heldur.

Landsstýrið hevur ikki tikið støðu til, nær byggingin skal verða byrjað.

Tað tilfar, sum er hjálagt hesum uppskoti, er, aftrat tí sum nevnt er framman fyri, skjal A «Tørvsætlan» hjá Føroya Landsbókasavni dagfest 10. november 1972 við viðmerkingum og skjal E viðmæli frá Fróðskaparsetri Føroya dagfest 27. juli 1973.

Sambært lagtingslóg um landsstýrið heldur tað vera átroðkandi neyðugt at útvega Landsbókasavninum nýggj og størri høli, metir landsstýrið, at Forminnissavninum er stórur tørvur á høluni til goymslu og framsýning av hlutum savnsins. Síðani málið um bygging av landsbókasavnshúsum fyrstu ferð varð viðgjørt á tingi, hevur ætlanin verið, at ley núverandi Landsbóka- og Landsskjalasavnshúsini skulu innrættast til Føroya Forminnissavn, tá ið nýggj Landsbókasavnshús verða bygd, og sostatt fer henda bygging at fáa stóran týdning ikki bert hjá Føroya Landsbókasavni, men eisini hjá Føroya Forminnissavni.

(Sí skjal 11)

1. viðgerð 11. mars og málið beint í liggjarnevndina, sum 18. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið, sum við fyrstu viðgerð beindi tað í liggjarnevndina.

Í viðmerkingunum vísir landsstýrið á, at uppskotið um bygging av bókasavni í tingsetuni 1965 ikki var samtykt av tinginum. Síðani tá er tað hent, at Tórshavnar kommuna hevur tikið við rakstrinum bæði av fólkabókasavninum og barnabókasavninum, og at landsskjalasavnið hevur fingið tryggjað sær hølir í húsinum, sum bygd verða til evnafrøðisliga og bakteriologiska starvsslovu.

Við tað at landsskjalasavnið, fólkabókasavnið og barnabókasavnið hava fingið innivist aðrar staðir, verður ikki neyðugt við so stórum húsarealið, sum av fyrstantíð ætlað. Gólvviddin í verandi bókasavni er 180 + 50 m², meðan nýggja ætlanin skal hava eina gólvvidd uppá 1.500 m². Kostnaðurin er mettur til umleið kr. 4.000.000, men er tað rættiliga óvist um hesa kostnaðarætlan heldur.

Landsstýrið mælir tí til, at áðrenn endalig avgerð verður tikin um bygging, so skal málið, um kostnaðarætlanin ikki heldur, verða lagt fyri fíggjarnevndina.

Fíggjarnevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. Meirihlutin (J. Fr. Øregaard, Hilmar Kass, Andreas Djurhuus, Trygve Samuelsen og Háku Djurhuus) ásamar, at tørvur er á at fáa meiri húspláss á Føroya bókasavni og tekur undir við uppskotinum og mælir tinginum til at samtykkja tað. Minnilutin (Hanus við Høgadalsá og Finnbogi Isakson) setur einki uppskot fram í hesum máli.

2. viðgerð 22. mars.
Uppskot til samtyktar samtykt 22—0.
Lógaruppskot gr. 1 samtykt 22—0, gr. 2 u.a.
Lógaruppskotið so samtykt at fara til 3. viðg. 22—0.

3. viðgerð 26. mars.
Lógaruppskotið endaliga samtykt 23—0.

60. Broyting í lógunum um fólkapensjón, avlamispensjón v.m.

Ár 1974, 28. februar legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja hjálagdu lógaruppskot fyri fólkatingið:

I. Uppskot til lóg um broyting í lóg fyri Føroyar «om folkepension».
II. Uppskot til lóg um broyting í lóg fyri Føroyar «om invalidepension m.v.»

Viðmerkingar:

Í Danmark er frá 1. apríl 1973 framd tann broyting fyri avlamispensjón, fólkapensjón og einkjupensjón, at inntøkur aftanat pensjónini elva til minni lækking av pensjónsviðbótini enn higartil.

Eftir landsstýrisins hugsan eigur eisini ein tílík broyting at verða framd í Føroyum fyri at teir pensjónstakarar, sum hava inntøku aftanat pensjónini, skulu verða betri fyri.

Eftir uppskotinum verður pensjónsviðbótin bert niðursett við 30% av tí inntøku, sum liggur omanfyri markið (ta frádráttarfríu peningahæddina), sum ikki broytist, meðan hetta prosentið nú er 60.

Uppskotið hevur eisini ávirkan fyri einkjur, samanber uppskot til samtyktar í álitinum hjá sosialu nevndini í løgtingsmáli nr. 10/1972, samtykt av løgtinginum 1. december 1972, har løgtingið biður landsstýrið samráðast við ríkismyndugleikarnar um at linka um treytirnar fyri niðurskurði í einkjuhjálp ella einkjupensjón, tá onnur inntøka er.

Útreiðslurnar í sambond við fremjan av uppskotinum kunnu metast til umleið 1,0 milj. kr. árliga. Herav skal staturin gjalda helvtina, umleið 0,5 milj. kr., meðan restin verður goldin av heimastýrinum, soleiðis at 1/6, umleið 0,1 milj. kr. verður goldin av kommununum og 5/6, umleið 0,4 milj. kr., verða goldnar av landskassanum.

F. L., j. nr. 1010—5

1. viðgerð 5. mars og málið beint í sosialu nevndina, sum tann 15. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið varð við 1. viðgerð beint í sociala nevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Uppskotið fremur eina linking í reglunum um frádrátt í pensjónsískoytinum, sum bæði hevur ávirkan á einkjuhjálp, einkjupensjón, fólkapensjón og avlamispensjón. Eftir núgaldandi reglum deltur hetta ískoyti heilt burtur, tá inntøka aftrat pensjónini kemur uppí kr. 5.300, fyri einstakan persón. Eftir uppskotinum kann inntøkan koma uppí kr. 8.800,— fyri stakan persón áðrenn ískoytið fellur heilt burtur.

Nevndin er samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið soleiðis sum tað er sett fram av landsstýrinum.

2. viðgerð 22. mars.
Uppskotið samtykt 22—0.
Málið sostatt avgreitt.

---

61. Húsarhaldsskúlar v.m.

Ár 1974, 28. februar, legði Ásbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Við heimild í § 15 í lógarkunngerð nr. 12 frá 5. januar 1971 «om statsstøtte til visse private skoler» verða tær reglur í hesi lógarkunngerð, sum viðvíkja landbrúksskúlum, húsarhaldsskúlum og eftirskúlum settar í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 13/1970: Ymsar ríkislógir hevur løgtingið 7. august 1970 samtykt soljóðandi uppskot:

F. L. j. nr. 213/1-3.

«Við heimild í § 24, stk. 2 í lóg nr. 259 frá 4. juni 1970 «om folkeskoler, landbrugsskoler, husholdningsskoler og efterskoler» verða reglurnar í hesi lóg um landbrúksskúlar, húsarhaldsskúlar og eftirskúlar settar í gildi í Føroyum við kongaligari fyriskipan.»

Ríkisumboðsmaðurin hevur við skrivi dagfest 3. august 1973 sent landsstýrinum skriv frá kenslumálaráðnum dagfest 24. mai 1972 saman við tveimum uppskotum til kongaliga fyriskipan, eitt viðvíkjandi nevndu lóg nr. 259 frá 4. juni 1970 og eitt viðvíkjandi nevndu lógarkunngerð nr. 12 frá 15. januar 1971.

Í skrivinum frá kenslumálaráðnum dagfest 24. mai 1972 er millum annað tilskilað:

«Man er imidlertid kommet til den overbevisning, at det vil være rigligst at sætte skolestøtteloven i kraft for Færøerne for så vidt angår de samme skoler, som omfattes af højskolelovens ikraftsættelse, nemlig landbrugsskoler, husholdningsskoler og efterskoler. Som begrundelse herfor skal man især fremhæve: at tilskudssatserne står i en særlig lov, skolestøtteloven, og ikke med reglerne om undervisning og tilskudsbetingelser i lovene om de forskellige skoleformer, skyldes alene praktiske hensyn; for hver skoleform indgår skolestøttelovens tilskuds- og statslåneregler som en del af et sammenhængende regelsæt om den pågældende skoleform. Det forekommer derfor mindre konsekvent at sætte undervisningsregler og tilskudsbetingelser fra højskoleloven i kraft for landbrugsskolerne, husholdningsskolerne og efterskolernes vedkommende uden samtidig at sætte de til tilskudsbetingelserne nært knyttede regler om tilskudssatser m.v. i kraft på Færøerne for de samme skoleformers vedkommende.»

Landsstýrið mælir løgtinginum til at samtykkja framman fyri standandi uppskot.

1. viðgerð 5. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum tann 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri løgtingið og varð við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Figgjarnevndin hevur viðgjørt málið, og hevur **meirilutin** (J. Fr. Øregaard, Trygve Samuelsen, Hilmar Kass, Knút Wang og A. Djurhuus) ongar viðmerkingar til nevnda uppskot og kann sostatt mæla løgtinginum til at samtykkja uppskotið í tí líki, tað var framlagt.

Ein **minniluti** í nevndini (Finnbogi Isaksen og Hanus við Høgadalsá)

vísir til tingmál nr. 36 og teirra støðu í hesum máli, sum teir yvirskja, støða verður tikin til fyrst, við lað at úrslitið av afkvøðuni í nevnda tingmáli er avgerandi fyri teirra støðu, sum teir vilja greiða nærri frá undir aðru viðgerð í tinginum.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, Hilmar Kass, Knút Wang, Trygve Samuelsen og Andreas Djurhuus) setur fram fylgjandi

Uppskot

Uppskot landsstýrisins verður at samtykkja.

2. viðgerð 25. mars (sí eisini løgtingsmál nr. 36/1973).
Uppskot frá meiriluta í nevndini fall við 13—0.
Málið sostatt burturfallið.

---

62. Studentaskúlin

Ár 1973, 28. februar, legði Hanus við Høgadalsá, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Føroya løgting áleggur landsstýrinum:

1. at bera umsorgan fyri, at øll prógtøka á Føroya studentaskúla nú og í framtíðini fer fram á móðurmálinum,
2. at gera føroyska skipan fyri studentaskúlan, soleiðis, at skúlin verður undir føroyskum eftirliti og soleiðis, at næmingar hendani taka føroyskt studentsprógv við tilsvarandi krøvum, sum sett eru fyri studentsprógv í hinum Norðurlondum.

(F. L. j. nr. 2103-19)

Greinargerð:

Føroya studentaskúli er skúli, sum er bygdur fyri og verður rikin fyri rokning landskassans. Kortini er tað so, at øll skipan fyri henda skúla er donsk. Um skúlan eru hesar donsku fyriskipanir og kunngerðir í gildi:

1. Anordning om studentereksamen for elever, der dimmiteres af Lagtingets studenterkursus, Thorshavn frá 8. juni 1953.
2. Bekendtgørelse om undervisningen i gymnasiet - frá 6. september 1961.
3. Bekendtgørelse om fordringerne ved eksamensopgivelserne til studentereksamen —- frá 6. september 1961.
4. Bekendtgørelse om karakterskala frá 4. februar 1963.
5. Cirkulære om anvendelsen af den i bekendtgørelse af 4. februar 1963 omhandlede karakterskala -- frá 6. februar 1963.
6. Bekendtgørelse om den pædagogiske uddannelse af lærere ved gymnasieskolen — frá 25. mars 1963.
7. Bekendtgørelse om eksamensordningen og karaktergivningen m.v. ved studentereksamen og i gymnasiet - frá 20. apríl 1964.
8. Bekendtgørelse om studentereksamen ved statsanerkendte kursus og for privatister - - frá 22. apríl 1964.
9. Bekendtgørelse om dispensation i særlige tilfælde fra karakterkrav ved realeksamen og studentereksamen frá 15. mai 1964.
10. Bekendtgørelse om den lille latinprøve frá 10. juli 1964.
11. Anordning for Færøerne om gymnasieskoler - - frá 14. december 1964.

Sum tað skilst av hesum er Føroya studentaskúli í veruleikanum danskt gymnasium við heimstaði í Føroyum. Uppskot tjóðveldisflokksins er at skipaður verður veruligur føroyskur studentaskúli, soleiðis at skúlin verður undir føroyskari skipan og undir føroyskum eftirliti, og soleiðis, at næmingar haðani taka føroyskt studentsprógv við tilsvarandi krøvnu, sum sett eru fyri studentsprógv á hinum Norðurlondum.

Har afturat verður mælt til at áleggja landsstýrinum at bera umsorgan fyri, at øll prógvtøka á studentaskúlamm nú og í framtíðini fer fram á móðurmálinum.

1. viðgerð 4. mars og málið beint í skúlanevndina, sum tann 1. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið: Studentaskúlin er av Tjóðveldisflokkinum lagt á ting, og varð við 1. viðgerð beint í skúlanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur verið uppi á studentaskúlamm

til samráðingar við rektarin og annað umboð fyri skúlan, har bæði lærarar og næmingar vóru umboðaðir.

Samlaða nevndin tekur undir við 1. punkti í uppskotinum, men heldur, at setl eigur at verða «á føroyskum» í staðin fyri «á móðurmálinum».

Viðvíkjandi 2. punkti hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta Haldor Hansen, Leon Joensen og Hilmar Beck, ið onki uppskot setur fram og ein minniluta Signar Hansen og Hákun Djurhuus, ið mælir til at samtykkja punkt 2.

Í staðin fyri orðaljóðið í punkt 1 verður at seta:

Uppskot
til
samtyktar

1. at bera umsorgan fyri, at øll prógtøkan á Føroya studentaskúla nú og í framtíðini fer fram á føroyskum.

SKÚLANEVNDIN, 3. apríl 1974.

Haldor Hansen Leon Joensen Hilmar Beck

Signar Hansen Hákun Djurhuus

2. viðgerð 5. apríl.
Uppskot frá nevndini til pkt. 1 samtykt við 24—0.
Punkt 1 í upprunauppskotinum sostatt burturfallið
Uppskot frá minniluta í nevndini um at samtykkja pkt. 2 fall 11—0.
Málið sostatt avgreitt.

---

63. Fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin

Ár 1973, 5. mars, legði Ásbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
fíggjarætlan fyri kirkjugrunnin 1974/75

	Roknskapur 1972/73	Játtan 1973/74	Uppskot 1974/75
INNTØKUR:			
1. Endurgjald fyri tiggjund	7.800,00	7.800,00	8.000,00
2. Stuðningur úr landskassanum	414.000,00	490.000,00	555.000,00
3. Ogn pr. 1/4 - 1972	191.706,45		
4. Ogn pr. 31/3 - 1973		219.050,00	
5. Ætlað ogn pr. 31/3 - 1974		219.050,00	
	613.506,45	716.850,00	731.850,00
ÚTREIÐSLUR:			
A. Umvælingar av kirkjum	203.167,56	275.000,00	300.000,00
B. Kirkjugarðar	15.250,00	50.000,00	50.000,00
C. Prestafluttingur	18.035,25	30.000,00	30.000,00
D. Nýggjar kirkjur	134.000,00	135.000,00	135.000,00
E. Trygging v.m.	11.368,33	8.000,00	12.000,00
F. Ymiskt	4.256,04	50.000,00	50.000,00
Munur	227.429,27	168.850,00	154.850,00
	613.506,45	716.850,00	731.850,00

Viðmerkingar:
ad. A. Umvæilngar av kirkjum:

1969/70	177.427,00
1970/71	177.213,00
1971/72	174.091,71
1972/73	203.167,56
1973/74 (til 1/2-74)	254.806,84

(F.L. J. nr. 434-1-1)

Kirkjustjórnin hevur pr. 1. februar 1974 góðkent størri umvælingararbeiðir til eina samlaða peningaupphædd uppá umleið 27.000 kr., og er her talan um hesar kirkjur: Gomlu kirkjuna í Tórshavn og kirkjurnar í Oyndarfirði Eiði og Gjógv. Tað er kirkjustjórnini kunnugt, at tekjurnar á kirkjunum í Hesti, Lorvík og Vági skulu endurnýggjast. Hesi mál eru ikki endaliga góðkend av kirkjustjórnini, men ætlandi verða útreiðslurnar umleið 200.000 kr. Um áramótið 1973/74 vórðu tekjurnar á kirkjunum í Tjørnuvík, Nólsoy og Hesti skaddar. Eisini verður tørvur á smærri umvælingararbeiðum av fleiri kirkjum.

ad. B. Kirkjugarðar:

Av hesi kontoini verður studningur til innhegning av kirkjugørðum. Til betonggarðar verða veittar 75 kr. fyri hvønn metur og til grótgarðar 225 kr. fyri hvønn metur. Studningsgjøldini eru áseft í ávikavist 1965 og 1968. Mælt verður til at studningurin vreður hækkaður til ávikavist 150 og 450 kr. fyri hvønn metur.

ad. C. Prestaflutningur:

Henda konto ber fasta studningin til prestarnar til flutning innanfyri prestagjaldið. Kirkjugrunnurin og statskassin lata hvør sína helvt. Útyvir hetta ber kontoin útreiðslurnar til kirkjusýn v.m., og hesar útreiðslur verða allar goldnar av kirkjugrunninum. Uppskotið hevur ta fyritreyt, at øll 17 prestaembætini eru sett. Her er ikki roknað við hækkan av fasta studninginum til prestarnar, men tað kann ætlandi væntast, at vegna hækkaðu útreiðslurnar til flutning verður ein hækking av árliga studninginum neyðug.

ad. D. Nýggjar kirkjur:

Av kontoini verður studningur latin Vesturkirkjuni við tilsamans 1 milj. kr. í fíggjarárunum 1970/71 til 1980/81, tó soleiðis at reststudningurin 800.000,- kr. frá og við fíggjarárunum 1972/73 verður játtaður yvir 6 ár, ella við umleið 134.000,- kr. árliga í fíggjarárunum 1972/73 til 1977/78.

Samsvarandi umsókn frá Tórshavnar meinigheitsráð dagfest 3. januar 1974 hevur kirkjustjórnin í skrivi dagfest 1. februar 1974 skotið upp, at studningurin til Vesturkirkjuna verður hækkaður við 1 milj. kr. til tilsamans 2 milj. kr., soleiðis at studningurin verður játtaður við 200.000,- kr. árliga í fíggjarárunum 1974/5 til 1980/81, og reststudningurin, 132.000,- kr. verður goldin í fíggjarárinum 1971/82.

Um løgtingið samtykkir, at játtanin til Vesturkirkjuna verður hækkað úr 1 upp í 2 milj. kr. samsvarandi tilmæli frá kirkjustjórnini, verður pkt. D. Nýggjar kirkjur, Uppskot 1974/75, 135.000,- kr. at hækka til 200.000,-

kr. og pkt. 2. Stuðningur úr landskassanum, Uppskot 1974/75, somuleiðis at hækka úr 555.000,- kr. upp í 620.000,- kr.

ad. E. Trygging v.m.:
Henda konto ber brunatrygging av kirkjunum.

ad. F. Ymiskt:
Av hesari konto verður veittur stuðningur til tekniskar installatiónir, orgul v.m.

Av kontoini hevur Klaksvíkar kirkjuráð fingið stuðning til orgul til Kristianskirkjuna við 50.000,- kr. í 1972/73 og 50.000,- kr. í 1973/74 ella tilsamans 100.000,- kr. Í skrivi dagfest 14. februar 1974 hevur nevndin til framvegam av orgli til Kristianskirkjuna sagt landsstýrinum frá, at orglið, sum samlært tilboðið kostar 460.000,- kr., við tekningum, stuðningi, uppseting og øðrum útreiðslum, neyvan kemur at kosta minni enn 560.000,- kr., hvarav umleið 200.000,- kr. eru innkomnar fyri størsta partin frá kirkjuliðnum, og 100.000,- kr., sum tilskilað frammanfyri eru veittar í stuðningi úr kirkjugrunninum. Nevndin til framvegan av orgli til Kristianskirkjuna søkir sostatt um, at írestandi peningurin, 250.000,- til 300.000,- kr. somuleiðis verður veittur sum stuðningur úr kirkjugrunninum, soleiðis at nevndin, tá orglið stendur liðugt til heystar, kann handa kirkjuliðnum tað skuldafritt.

Um løgtingið játtar stuðning til orglið í Kristianskirkjuni við 250.000,- til 300.000,- kr. í 1974/75 verður pkt. F. Ymiskt, Uppskot 1974/75, og pkt. 2. Stuðningur úr landskassanum, Uppskot 1974/75, at hækka samsvarandi hesum.

1. viðgerð 7. mars og málið beint í kirkjunevndina, sum tann 19. mars legði fram fylgjandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt málið fyri løgtingið, og við 1. viðgerð varð tað beint í kirkjunevndina.

Í viðmerkingunum undir ad. B. Kirkjugarðar, verður sagt, at stuðningurin til kirkjugarðar úr belongi hevur verið 75 kr. pr. metur og til garðar av gróti 225 kr. pr. metur; nú verður skotið upp, at stuðningurin verður ávikavist 150 kr. og 450 kr. fyri hvønn metur, og hesum tekur nevndin undir við.

Undir ad. D. Nýggjar kirkjur, verður sagt, at kirkjustjórnin eftir umsókn frá Tórshavnar meinigheitsráð hevur mælt til, at stuðningurin til Vesturkirkjuna verður hækkaður úr 1 milj. kr. til 2 milj. kr., og hesum

tilmæli tekur kirkjunevndin undir við og skjýtur til upp, at studningurin verður játtaður við 200.000 kr. árliga í fíggjarárinum 1974/75 til 1980/81 og reststudninguirn, 132.000 kr. verður goldin í fíggjarárinum 1981/82. Samsvarandi hesum skjýtur nevndin tí upp, at pkt. D. Nýggjar kirkjur, uppskot 1974/75, 135.000 kr. verður hækkað til 200.000 kr. í viðmerkingunum til ad. F. sigur landsstýrið, at nevndin til útvegan av nýggjum orgli til Kristianskirkjuna í Klaksvík søkir um at fáa studningin til orgulbyggingina hækkaðan við 250.000 kr. til 300.000 kr. í ár fyri at kunna gjalda tað sum restar í til nýggja orglið.

Kirkjunevndin mælir til at gingið verður hesi umsókn á møti, soleiðis at 60.000 kr. verða játtaðar árliga í studningi í fíggjarárunum 1974/75 til 1976/77 til partvísa rindan av tí, sum enn restar í til at fullføra orgulbyggingina. Kirkjustjórin upplýsir annars, at tað helst koma at verða givnar aðrar smærri játtanir til onnur endamál av hesi konto og tí skjýtur nevndin upp at pkt. F. Ymisk Uppskot 1974/75 50.000 kr. verður 85.000 kr.

Samsvarandi omanfyri tilmæltu hækkingum skjýtur kirkjunevndin upp, at landskassastudningurin 555.000 kr. verður 655.000 kr.

Nevndin hevur eisini viðgjort brøv frá Sørvágs bygdaráð, sum søkir um studning til viðkan av kirkjugarðinum, og við tað, at slíkar umsóknir verða viðgjørdar í kirkjustjórnini, so hevur nevndin heint málið til kirkjustjórnina.

Knút Wang møtti á fundi fyri Kjartan Mohr. Nevndin er annars samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskotið við tilskilaðu broytingum.

2. viðgerð 22. mars.

Framlagt var Skjal til álitið við nýggjum uppskoti.

	Roknskapur 1972/73	Játtan 1973/74	Uppskot 1974/75
INNTØKUR:			
1. Endurgjald fyri tiggjund	7.800,00	7.800,00	8.000,00
2. Studningur úr landskassanum	414.006,00	490.000,00	655.000,00
3. Ogn pr. 1/4-1972	191.706,45		
4. Ogn pr. 31/3-1973		219.050,00	
5. Ætlað ogn pr. 31/3-1974			168.850,00
	613.506,45	719.850,00	831.850,00

ÚTREIÐSLUR:			
A. Umvælingar av kirkjum	203.167,56	275.000,00	300.000,00
B. Kirkjugarðar	15.250,00	50.000,00	50.000,00
C. Prestaflutningur	18.035,25	30.000,00	30.000,00
D. Nýggjar kirkjur	134.000,00	135.000,00	200.000,00
E. Trygging v.m.	11.368,33	8.000,00	12.000,00
F. Ymiskt	4.256,04	50.000,00	85.000,00
Munur	227.429,27	168.850,00	154.850,00
	613.506,45	716.850,00	831.850,00

Uppskotið samtykt 21—0.
Málið sostatt avgreitt.

64. Happadráttarloyvi til Útvarp Føroya

Ár 1974, 4. mars, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya.

§ 1.

Í § 3 í løgtingslóg nr. 71 frá 20. november 1969 um happadráttarloyvi til Útvarp Føroya, sum broytt við løgtingslóg nr. 27 frá 12. mai 1970, nr. 13 frá 26. mai 1971, nr. 19

(F.L. J. nr. 512-90). Ll. 47/74.

lagtingslov om ændring af lagtingslov om lotteritilladelse til Útvarp Føroya.

§ 1.

I § 3 i lagtingslov nr. 71 af 20. november 1969 om lotteritilladelse til Útvarp Føroya som ændret ved lagtingslov nr. 27 af 12. maj 1970, nr. 13 af 26. maj 1971, nr. 19 af 9.

frá 9. mai 1972 og nr. 40 frá 1. mai 1973 verða orðini «30. apríl 1974» broytt til «30. apríl 1976».

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 30. apríl 1974.

maj 1972 og nr. 40 af 1. maj 1973 ændres ordene «30. april 1974» til «30. april 1976».

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 30. april 1974.

Viðmerkingar:

Útvarp Føroya hevur søkt um, at lógin um happadráttarloyvi, ið gongur út 30. apríl 1974 verður endurnýggjað fyri 2 ár fram.

Við 155 dráttum innkomu tilsamans 6.237.247 kr., sum hava givið 3.879.744 kr. í útvarpsins part. Til vinningarnar eru útgoldnar 2.357.502 kr., harav 287.154 kr. eru farnar í gjaldi til landskassan. Umsitingarútreiðslurnar hava verið 235.380 kr.

Útvarpið hevur fingið tilsagn frá Tórshavnar býráð um eitt øki ovarliga í Gundadali til bygging av nýggjum útvarpshúsum. Rokunað verður við, at farið verður undir byggingina av útvarpshúsinum sum skjótast, tá byggiloyvi er í lagi.

Tá útvarpinum enn tørvar pening til nevndu bygging, skal landsstýrið mæla til, at lógin verður framlongd tvey ár.

1. viðgerð 6. mars og málið beint í serliga útvarpsnevnd, sum tann 3. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Hetta er lagt fram av landsstýrinum og beint í eina serliga 5-mannanevnd og letur hon fr ásær hetta álit:

Tað var í 1969, at landsstýrið bað løgtingið veita sær heimild til at geva Útvarp Føroya loyvi til happadrátt. Hesa heimild hevur landsstýrið síðani fingið fyri eitt ár á gangin.

Í viðmerkingum sínum sigur landsstýrið, at við 155 dráttum eru innkomnar sum útvarpsins partur kr. 3.879.744 og at umsitingarútreiðslurnar hava verið kr. 235.380. Roknskapir útvarpsins í ti tíðarskeiði, happadráttsurin hevur verið, hava ikki verið nevndini til skjals, men frá landsstýrinum hevur nevndin fingið eitt yvirlit, sum sýnir yvirskotið av V 4 spælinum frá 1969/70 til 1973/74 og ognir útvarpsins:

Yvirskot av V4 spælinum 1969/70	375.000,—	
+ hall av vanliga rakstrinum	95.000, —	280.000,—
Yvirskot av V4 spælinum 1970/71	992.000,—	
+ hall av vanliga rakstrinum	291.000,	701.000,—
Yvirskot av V4 spælinum 1971/72	866.000,—	
+ hall av vanliga rakstrinum	220.000,—	646.000,
Yvirskot av V4 spælinum 1972/73	1.099.000,—	
+ hall av vanliga vakstrinum	64.000,—	1.035.000,
Vinningur av V4 spælinum 1973/74 til drátt nr. 155		548.000,—
		3.210.000,—
Innistandandi í føroyskum bankum og sparikassum uppá uppsøgn	2.170.000,—	
í lánsbrøvum	490.000,—	2.660.000,—
Keypt tekniska útgerð fyri		530.000,—
Húsini á Bryggjubakka		430.000,—
		3.620.000,—

Tað, ið onnurfyri er nevnt «hall á vanliga rakstrinum» sum tilsamans er kr. 670.000, skilir nevndin er farið til at rinda tað undirskot, sum útvarpið annars vildi havt, um V4 spælið ikki var hildið gangandi. Annars sær nevndin ikki tað sum sína uppgávu at gera nakra nágreiniliga viðmerking til inntøkur og útreiðslur útvarpsins, tá hetta liggur hjá landsstýrinum saman við fíggjarnevndini sambært løgtingslóg frá 28. mars 1956.

Nevndin fer tó at draga fram, at tá heimildarlógin á fyrsta sinni var samtykt, var í hana sett, at «Løgtingið setur 5-mannanevnd at grannskoða lóg og reglur um Útvarp Føroya». Tá fíggjarnevndin árið eftir viðgjørdi endurnýggjanina av happadráttarloyvinum var í álitinum heitt á hesa 5-mannanevnd at gera arbeiðið liðugt. Tá ið heldur einki var hoyrt frá henni í 1971 gjørdi fíggjarnevndin hesar viðmerkingar til at loyva framleingjan av lógini:

«Í seinasta tingsetu søkti útvarpið um loyvi at halda áfram við hesum sendingum enn eitt ár. Landsstýrið legði málið fyri tingið, sum samtykti at framleingja lógina, men minti á, at ein av treytunum fyri hesum sendingum var, at nevnd var sett at endurskoða lógir tess, men at henda nevnd enn ikki hevði givið álit í málinum.

Nú er eitt ár farið síðani, og uppskot er um enn einaferð at framleingja lógina, men enn er heldur einki frætt frá teirri nevnd, sum sett var uttan tað, at nevndin heldur, at síðan tað hevur verið løgtingsval, síðan nevndin var sett, at so er hon burturdottin, og at tað sostatt ikki meira situr nøkur nevnd.»

Sum tað av tí, sum frammanfyri er frágreitt, greitt sæst, er løgtingið av tí avgjørdu áskoðan, at lógir og reglur útvarpsins mega takast upp til eina gjølliga viðgerð, so útvarpið kemur í eina legu, ið kann geva fólki virði, ið eru fjølbroytt mentumarlig og upplýsandi.

Nevndin heitir á tingið um at fáa nýggja nevnd setta samhært samtyktina frá 14. oktober 1969, og tá tingið má hava áhuga at vita á hvørjum ári, hvussu tað givna happadráttarloyvi reynist og annars at fylgja við, hvat hendir í útvarps- og sjónvarpsmálinum sum heild, setur nevndin til § 1 í landsstýrisins uppskoti hetta.

Broytingaruppskot

Orðini «30. apríl 1976» verða broytt til «30. apríl 1975».	«30. apríl 1976» til «30. apríl 1975».

Á tingi, 1. apríl 1974.

Johs. P. Thomasen — Martin Joensen — Agnar Nielsen

Demmus Hentze — Hanus við Høgadalsá

2. viðgerð 4. apríl.

Broytingaruppskot frá nevndini samt. 19—0.
Gr. 1 so broytt samtykt 24—0.
Gr. 2 samt. u. atkvgr.
Lógin so broytt samtykt at fara til 3. viðgerð við 24—0.

3. viðgerð 5. apríl.
Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð, endaliga samtykt 23—0.

65. Veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirki

Ár 1974, 5. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald av lánum til smærri ídnaðarvirkir.

§ 1.

Landsstýrinum er heimilað landskassans vegna í fíggjarárinum 1974/75 at veðhalda fyri lánum upp til 1 milj. kr. til smærri ídnaðarvirkir.

§ 2.

Hesi lán verða at nýta til stovnan av nýggjum virkjum, víðkan og nútímansgerð av gomlum o.t.

Stk. 2. Lánini mugu ikki fara upp um 70% av tí virði, sum nýggju íløgurnar hava eftir meting og skulu verða tryggjað við panti innanfyri 70% av tí virði, pantsettu lutirnir hava.

§ 3.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til mindre industrivirksomheder.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne i finansåret 1974/75 at garantere for lån indtil 1 mill. kr. til mindre industrivirksomheder.

§ 2.

Disse lån skal anvendes til nyetablering af virksomheder, udvidelse og modernisering af ældre o.l.

Stk. 2. Lånene må ikke overstige 70% af nyinvesteringernes værdi i henhold til vurdering og skal sikres ved pant indenfor 70% af de pantsatte genstandes værdi.

§ 3.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Lógin um veðhald fyri lánum til smærri ídnaðarvirki hevur, síðani hon av fyrstan tíð kom í gildi havt stóran týdning fyri stovnanina av ídnaðarfyritøkum í Føroyum.

Tá lógin varð endurnýggjað í løgtingssetuni 1970, var ídnaðargrunnurin stovnaður, men var í viðmerkingunum til lógaruppskotið (løgtingsmál

(F.L.J. nr. 1427-1). Ll. 55/74.

nr. 49/1970) sagt, at landsstýrið helt tað vera klókast at hava hesa lógarheimild fyrsta árið, idnaðargrunnurin virkaði. Síðani er lógin hvørt ár vorðin endurnýggjað.

Nú er eisini menningargrunnur idnaðarins stovnaður, men landsstýrið heldur framvegis, lað er rætt at hava hesa heimild.

At tørvur framvegis er á tílíkari líggjan sæst av, at í fíggjarárinum 1973/74 eru innkomnar umsóknir um veðhald fyri 1,1 milj. kr., harav landsstýrið hevur játtað veðhald fyri umleið 500.000 kr.

Landsstýrið loyvir sær sostatt at leggja hetta uppskot fyri tingið.

1. viðgerð 11. mars og málið beint í fíggjarnevndina, sum tann 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið. Í viðmerkingunum vísir landsstýrið til, at bæði idnaðargrunnurin og Menningargrunnurin fyri ein part loysa tær uppgávur, ið endamálið var við hesi lóg, tá hon av fyrsta sinni kom í gildi, men at tað framvegis tykist vera tørvur á at endurnýggja lógina enn eina ferð, við tað at tað í verandi fíggjarári eru komnar umsóknir til landsstýrið uppá 1,1 milj. kr. Undir fyrstu viðgerð kom fram spurningurin um hvussu umsitingin av nevndu lóg var skipað, og vóru nevnd dømi, har umsóknir vóru avgreiddar við negativum úrsliti, uttan at landsstýrið hevði kunnleika til um tær avgerðir, ið tiknar vóru. Av teirri frágreiðing, ið av avvarðandi landsstýrismanni varð givin tinginum, tykist ikki verða nøkur føst skipan viðv. viðgerðini av slíkum umsóknum.

Fíggjarnevndin, hagar málið var beint við fyrstu viðgerð, hevur viðgjørt tað og kennir seg ikki vissan um, at fann viðgerðarháttur, ið er við at verða nýttur, gevur fulla trygd fyri objektivum avgerðum. Sambært landsstýrisins gerðabøkur, sum skulu leggjast fyri tingið til góðtøku, hevur tað verið vanlig praksis, at slíkar avgerðir hava verið tiknar á landsstýrisfundi, og hava avgerðirnar verið førdar í gerðabók landsstýrisins. Nevndin má krevja, at hesin pruksis verður fylgdur, eisini tí tað í «Stýrisskipan Føroya í sermálum» stendur, at «øll týðandi mál skulu viðgerast av landsstýrinum, og avgerðirnar førast í gerðabók.».

Annars tekur nevndin undir við uppskoti landsstýrisins og setur fram fylgjandi

Uppskot

I. Uppskot landsstýrisins verður at samtykkja.

II. Álagt verður landsstýrinum at broyta viðgerðarháttin viðvíkjandi um-

sóknum um landskassaveðhald fyri lánum, soleiðis at umsóknir hvørki kunnu játtast ella noktast, uttan at tær eru viðgjørdar av landsstýrinum, og avgerðin ført í landsstýrisins gerðabók.

2. viðgerð 25. mars.
Greinarnar og lógaruppskotið at fara til 3. viðgerð samt. 22—0.
Uppskotið til samtyktar frá nevndini samtykt 23—0.

3. viðgerð 29. mars.
Lógaruppskotið sum avgreitt við 2. viðgerð endaliga samt. 26—0.
Uppskotið til samtyktar endaliga samtykt 26— 0.

---

69. Kommunulæknaskipanin o.ø.m. í Føroyum

Ár 1974, 14. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

I. Løgtingið samtykkir fyri sín part og mælir til,
   1. at talið av kommunulæknum verður 23,
   2. at landið veitir helvtina í studningi av útreiðslum kommununnar til bygging av læknamiðstøðum ella viðtaluhølum,

II. Løgtingið samtykkir og fyri sín part mælir til
   1. at fremja eina skipan heimasjúkra-, smáburna- og skúlaheilsusystrum viðv., sum skilað til í álitinum.
   2. at útvegir verða gjørdir, so útbúgvingin av hesum sjúkrasystrum verður á Sjúkrasystruskúla Føroya.

(F.L. J. nr. 913-7-15).

III. Løgtingið samtykkir fyri sín part og mælir til, at skipanin um deildarjarðamøður verður sett úr gildi.

Í staðin verður sett ein skipan, har sjúkrahúsini taka uppá seg skylduna at veita jarðamóðurhjálp.

Viðmerkingar:

Í juli mánaða 1972 samtykti landsstýrið at seta nevnd at kanna og at seta fram uppskot til eina nýggja kommunulæknaskipan.

Ein orsøkin til, at landsstýrið setti nevndina, var, at kommunur og onnur høvdu klagað um galdandi læknaskipan, serliga var talan um tey sinnerru læknadømini, har torfort hevur verið at fáa lækna.

Nevndin hevur 12. november 1973 lagt frá sær álit og tilmæli viðvíkjandi kommunulæknaskipanini, jarðamøðrum og sjúkraroktina í sambond við heim og skúla.

Landsstýrið tekur undir við tilmælum nevndarinnar.

Um uppskotini til samtyktar verða góðkend av løgtinginum, verður neyðugt at gera ymsar broytingar í galdandi lóggávu. Landsstýrið setur tó ikki í hesum umfari uppskot um tílíkar broytingar, men mælir løgtinginum til at samtykkja høvuðsreglurnar í nevndartilmælinum. Verða uppskotini samtykt, vil landsstýrið leggja fyri løgtingið uppskot um lógarbroytingar.

Fyri landskassan verða meirútreiðslurnar roknað eftir lønarlagnum pr. 1. apríl 1973 komandi 3 tiggjarár, hesur eftir meting nevndarinnar jbr. talvu 19 í álitinum:

1974/75	.....	360.677 kr.
1975/76	.....	510.957 kr.
1976/77	.....	686.467 kr.

Av tí, at øll skipanin ikki kann fremjast pr. 1. apríl 1974, verða útreiðslurnar í 1974/75 tó lægri enn 360.677 kr., helst bert um 200.000 kr. Tað, sum fyrst er hugsað um at fremja, er broytingin í læknaskipanini, smbr. álitið bls. 39 til 42 og viðvíkjandi heimasjúkra- og heilsusystrum, smbr. bls. 62 til 64. Ivingasunt er kortini um ljósmóðurskipanin kann fremjast áðrenn 1. apríl 1975.

Viðlagt er skriv dagfest 1. februar 1974 frá Føroya Læknafelag við viðmerkingum til álitið.

Sí eisini Skjal 12.

(5/12-73 var harumframt framlagt álit frá serligari nevnd, sum viðgjørt hevur kommunulæknaskipanina). Skjal 12 B.

1. viðgerð 22. mars.
Avgjørt at bíða við málinum til næstu tingsetu.

---

67. Yvirtøka av Klaksvíkar sjómansskúla

Ár 1974, 7. mars, legði Ásbjørn Jacobsen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

Løgtingslóg um yvirtøku av Klaksvíkar Sjómansskúla.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilt landskassans vegna at yvirtaka Sjómansskúlan í Klaksvík og frá byrjanini av næsta skúlaári at reka hann fyri landskassans rokning.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Lagtingslov om overtagelse af Klaksvik Sømandsskole.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at overtage sømandsskolen i Klaksvik og fra næste skoleårs begyndelse at drive den for landskassens regning.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Nevndin fyri Klaksvíkar Sjómansskúla hevur søkt um, at skúlin verður rikin av tí almenna eins og vanlig nammagongd er viðvíkjandi øðrum

(F.L. J. nr. 2110-14). Ll. nr. 40/1974.

skúlum. Um hetta uppskot verður góðkikið, gongur nevndin inn fyri, at ognir skúlans verða almenn ogn.

Skúlin varð stovnaður fyri 26 árum síðani og verður rikin sum sjálveigandi stovnur. Fyrstu árini varð skúlin rikin við gávum frá privatum persónum og stovnum og við studningi frá Klaksvíkar kommunu. Seinastu árini hevur landskassin tó borið allan kostnaðin av rakstri skúlans, við undantak av 20.000 kr., sum kommunan veitir skúlanum í studningi. Rakstrarstudningurin fyri komandi fíggjarár verður mettur til 662.000 kr.

Á skúlanum verður undirvist til skiparaprógv og til telegrafistprógv. Skúlin er eisini farin undir kokkaskeið og háskúlaskeið. Meðan háskúlaskeiðini hava havt lítla tilgongd hevur kokkaskeiðið havt nóg stóra tilgongd og vist seg at vera væl tilrættalagt og tiltrongt. Seinasta tiltakið skúlin er farin undir er skeið í viðgerð av fiski.

Uppgávur skúlans eru nú so fjølbroyttar og tann almenni studningurin til raksturin so stórur, at tað má haldast at vera rímuligt, at skúlin verður rikin av tí almenna. Hetta hevði tryggjað skúlanum betri arbeiðslíkindi og skal tað eyðhast skúlanum at tryggja sær kvalifiseraðar arbeiðskreftir, er tað neyðugt at tørvandi tænastumannaførv verða normerað.

1. viðgerð 14. mars og málið beint í fíggjarnevndina, sum tann 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið og varð við fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Tað er nevndin fyri Klaksvíkar sjómannsskúla, sum søkt hevur um, at skúlin kemur undir almennan rakstur. Í viðmerkingunum verður sagt frá, at um so er, at løgtingið átekur sær raksturin av skúlanum, vil nevndin yvirlata tí almenna ognir skúlans.

Á Klaksvíkar sjómannsskúla gingu seinasta skúlaskeið í skiparalæru 14, av teimum tóku 13 skiparaprógv. 8 gingu á telegrafistskeið, og tóku 7 av hesum telegrafistprógv. Á kokkaskeið hava verið 40 næmingar, síðan hetta skeið byrjaði 17. januar 1972.

Nevndin, sum viðgjørt hevur málið, tekur undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

FIGGJARNEVNDIN, 20. mars 1974.

25. mars framlagt broytingaruppskot frá Knút Wang:

Uppískoytisálit:

Mitunilutin Knút Wang, ið vegna sjúku ikki luttók í nevndarviðgerðini av hesum máli í figgjarnevndini, tekur undir við nevndini um yvirføku nú av Klaksvíkar Sjómannsskúla, men er av teirri áskoðan, at øll lærutbúgving í sambandi við navigatiónslæruna á Føroya Sjómannsskúla eigur at verða flutt til Klaksvíkar, so vit fáa ein skúla á hesum lærnøki og skipa so fyri, at hesin skúli kemur at liggja í Klaksvík.

Samsvarandi hesum sjónarmiði verður sett fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Øll navigatiónsundirvising í Føroyum eigur at verða samskipað á einum skúla, ið kemur at liggja í Klaksvík, og verður álagt landsstýrinum at virka fyri hesum og skipa fyri, at hetta verður gjørt skjótast gjørligt.

Á løgtingi, 22. mars 1974.

Knút Wang.

2. viðgerð 26. mars.

Gr. 1 í lógaruppskotinum samtykt 24—0.
Gr. 2 u. atkv.gr.
Lógaruppskotið at fara til 3. viðgerð samtykt 25—0.

Uppskot til samtyktar frá K. Wang fall 7—0.

3. viðgerð 29. mars. Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðg. nú endaliga samtykt 22—0.

68. Útbyggjan av flogvøllinum í Vágum

Ár 1974, 7. mars, legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Landsstýrið fer undir samráðingar við ríkismyndugleikarnar um, at nýggj innflúgvingartól verða uppsett í Vágum sum skjótast, og um at flogvøllurin verður longdur til umleið 1400 m.

Viðmerkingar:

Nevndin, sum í apríl 1972 varð sett at kanna spurningin um, hvar best er at leggja ein flogvøll í Føroyum, gav álit sítt 21. december 1973. Álitið er hjálagt sum skjal. Undirskjølini, sum álitið byggir á, eru ikki prentað enn og fylgja tí ikki við.

Viðvíkjandi metingum nevndarinnar um hvar ein nýggjur flogvøllur eigur at liggja, verður vist til álitið.

Nevndin varð eisini biðin um at kanna, hvørjir møguleikar eru fyri at bøta um viðurskiftini í Vágum, og í kap. 3 í álitinum verður greitt frá hesum. Við at seta upp innflúgvingartól ber tað til, eftir teimum kanningum, sum higartil eru gjørdar, at bøta munandi um viðurskiftini, so at seinkingar í komu og fráferð hjá flogførumum verða minkaðar við 50%. Harímóti hevur ein leingjan av vøllinum lítlan og ongan týdning fyri henda spurning.

Týdningurin av eini leingjan av flogvøllinum er tann, at tað fer at vera gjørligt at nýta størri flogfør og harvið flogfør, sum ganga skjótari.

Sambært yvirlit yvir kostnaðin av arbeiðinum við at gera sjálvan flogvøllin, sum er á síðu 48 og síðu 49, vil ein leingjan av vøllinum í Vágum til 1400 m kosta umleið 9,4 mill. kr.

Avgerð um, hvar nýggjur flogvøllur skal liggja, er ikki tikin, og tá tað undir øllum umstøðum fara at ganga nøkur ár, áðrenn ein nýggjur vøllur

(F.L.J. nr. 1820-7-4).

kann verða likin í nýtslu, heldur landsstýrið, at viðurskiftini í Vágum eiga at verða bøtt sum skjótast.

Landsstýrið vil beinanvegin samráðast við ríkismyndugleikarnar um sum skjótast at fáa sett upp tey neyðugu innflúgvingstólini.

Samlært yvirlitið yvir, hvussu talið á ferðafólki fer at vaksa, sum givið er í kap. 4 í álitinum, metir landsstýrið, at tað er beint, sjálvt um ein annar flogvøllur verður bygdur, at reika fyri, at størri flogfør kunnu nýtast í Vágum og vil samráðast við ríkismyndugleikarnar um hendа spurning.

Um so er at landsstýrið skal luttaka í útreiðslunum til leingjan av vøllinum, verður uppskot til lógarheimild til hetta lagt fyri tingið á ólavsøku 1974.

Sí skjal 13.

1. viðgerð 22. mars og málið við samtykt á seinni fundi beint í flogvallarnevndina, sum fann 3. apríl tegði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til samtyktar um útbygging av flogvøllinum í Vágum og um nýggj innflúgvingarlól.

Málið varð lagt fram 7. mars og varð við 1. viðgerð beint í eina serliga flogvallarnevnd, sum fekk hesar limir:

Jógvan Durhuus, Leon Joensen, Kjartan Mohr, Hilmar Kass, Demmus Hentze og Haldor Hansen.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin: Haldor Hansen, Leon Joensen, Hilmar Kass, Demmus Hentze og Kjartan Mohr mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin: Jógvan Durhuus tekur við fyrra partinum í uppskoti landsstýrisins, at samráðingar verða tiknar upp við ríkismyndugleikarnar um uppsetan av nýggjum innflúgvingartólum í Vágum sum skjótast, men heldur at flogvøllurin eigur at verða longdur til 1600 m og ikki sum í uppskotinum 1400 metrar.

Minnilutin setur til fram hetta broytingaruppskot:
«1400 m» verður broytt til «1600 m».

FLOGVALLANEVNDIN, 3. apríl 1974.

2. viðgerð 4. apríl.

Uppskot frá minniluta i nevndini fall 9—0.
Uppskot til samtyktar frá landsstýrinum samt. 25.- 0.
Málið sostatt avgreitt.

---

69. Troling á landleiðini

Ár 1974, 14. mars, legði formaðurin fram frá fiskivinnunevndini soljóðandi

Álit

Til tingið er bræv komið frá flakavirkjum og monnum, sum royna við trolreiðskapi um at undantaksloyvið, sum givið varð í fjør um troling á landleiðini verður broytt til eisini at galda fyri mai mánaða. Grundgevingin fyri hesari umsókn er tann, at allur vanligur bátafiskiskapur við línu á okkara leiðum heldur uppat seinast í apríl mánaða, og tað er tí ógvuliga tvørligt bæði fyri bátar og virkir, at allur mai mánaður skal fara í virkisloysi.

Hetta mál varð av tinginum beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Poul Jacob Olsen, Tórolvur M. Olsen, Leon Joensen og Ove Mikkelsen) visir á, at tá uppskotið um trolloyvið var sett fram í fjør, sum skuldi ganga fyri tvey ár, varð hetta fyri at fáa eina hylling á, um hesin trolfiskiskapur kundi fáa skaðiligar avleiðingar fyri fiskastovnin ella annan fiskiskap.

Meirilutin heldur tí, at tá tað nú bert er eitt ár síðan, at lógin varð sett í gildi, er ov stutt tíð fráliðin til at kunna gera eina meting av viðurskiftunum, um hvørja ávirkan trolingin hevur havt.

(F.L. J. nr. 1501-2-3).

Minnilutin (Hákun Djurhuus) vísir annars til sína støðu í tingmáli nr. 53/1972.

Nevndin er samd um einki uppskot at seta fram í hesum máli.

FISKIVINNUNEVNDIN, 11. mars 1974

Poul J. Olsen Tórolvur Mohr Olsen Hákun Djurhuus

Leon Joensen Ove Mikkelsen

2. viðgerð 13. mars.

Formaðurin boðaði frá, at einki uppskot var í málinum og var tað sostatt avgreitt.

---

70. Bygging, innrætting, nýskipan og víðkan av virkjum til kleking av rognum og til fiskaaling

Ár 1974, 14. mars, legði Eli Nolsoe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um bygging, innrætting, nýskipan og víðkan av virkjum til kleking av rognum og til fiskaaling.

§ 1.

Uttan loyvi frá landsstýrinum er bannað at byggja, innrætta, ný-

lagtingslov om bygning, indretning, etablering og udvidelse af anlæg til udklækning af rogn og til opdræt af fisk.

§ 1.

Uden tilladelse fra landsstyret er det forbudt at bygge, indrette,

(F.L. J. nr. 1509-3-7). Ll. 57/74.

skipa ella víðka virkir til kleking av rognum ella aling av fiski.

2. stk. Landsstýrið kann tó gera undantøk fyri virki við ávísum endamáli ella smærri virki, ið verða stovnaði uttan handilsligt endamál.

3. stk. Landsstýrið kann áseta, at loyvi ikki verða givin til virki omanfyri ávisa stødd.

§ 2.

Umboð landsstýrisins skal hava frítt at koma á staðið ella virkið, sum lógin fevnir, og skal kunna gera tær kanningar, sum eru neyðugar til fremjan av lógarinnar endamáli.

§ 3.

Brot móti hesi lóg verða revsað við bót.

§ 4.

Henda lóg fær gildi beinanvegin.

etablere eller udvide anlæg til udklækning af rogn eller til opdræt af fisk.

Stk. 2. Landsstyret kan dog gøre undtagelse for anlæg med bestemte formål eller mindre anlæg, der oprettes uden kommerciel hensigt.

Stk. 3. Landsstyret kan bestemme at tilladelse ikke gives til anlæg over en bestemt størrelse.

§ 2.

Landsstyrets repræsentant skal have adgang til steder og anlæg, der omfattes af denne lov, og skal kunne foretage de undersøgelser, som er nødvendige til opfyldelse af lovens formål.

§ 3.

Overtrædelse af denne lov straffes med bøde.

§ 4.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tað er hugsandi, at áhugin fyri fiskaaling verður vaksandi og nýggjar alistøðir verða settar á stovn í kommandi árum. Umráðandi er, at slíkar alistøðir koma undir almennt eftirlit. Serstakliga má dentur leggjast á, at støðirnar í allar málar verða lagdar á best háskandi plássum. Ansast má eftir, um fleiri støðir koma, at tær ikki á nakran háttt verða til hága fyri hvørja aðra.

Landsstýrið mælir til, at hannað verður at seta á stovn fiskaalistøð bæði í feskum vatni og í sjógvi uttan loyvi frá landsstýrinum.

1. viðgerð 15. mars og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 26. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið og var við fyrstu viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin er av teirri áskoðan, at menn, ið hava lug og kunnleika til sílaæling við vinnuligum endamáli eiga ikki at verða forðaðir í at útinna slíkt vinnuligt yrki.

Nevndn er samd við landsstýrið um at hetta eigur at vera undir almennum eftirliti.

Nevndin mælir til at grein 1. 2. s t k. verður orðað soleiðis:

2. s t k. Loyvi verður ikki givið tá

1. virkið kann verða atvold í smittusjúku
2. virkið ber við sær vanda fyri dálking.

Annars verður loyvi givið uttan so, at landsstýrið kann prógva at tað orsakað av framleiðsluviðurskiftunum ikki er grundarlag fyri eini viðkan av framleiðsluni.

Við hesi broyting tekur uevndin undir við uppskotinum og mælir landsstýrinum til at samtykkja tað.

FISKIVINNUNEVNDIN, 25. mars 1974.

2. viðgerð 29. mars.
Broytingaruppskot frá nevndini til gr. 1 samt. 24—0.
Gr. 1 í uppruna uppskotinum sostatt burturdottin.
Gr. 2-3-4 samt. 24—0.
Lógaruppskotið so broytt at fara til 3. viðgerð samt. 24—0.

3. viðgerð 2 apríl.
Lógaruppskotið sum samt. við 2. viðg. nú endaliga samtykt við 23—0.

71. Samráðingar við Ísland

Ár 1974, 14. mars, legði Jógvan Durhuus, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Við tilvísan til einmælar samtyktir íslendska altingsins og Føroya løgtings um økta samvinnu íslendinga og føroyinga millum og teim broyttu umstøðum í huga áleggur Føroya løgting landsstýrinum saman við 4 av løgtinginum valdum tingmonnum at taka upp samráðingar við íslendsku ríkisstjórnina um fiskirættindi føroyinga innanfyri 50 fjórðinga fiskimarkið.

Viðmerkingar:

Av tí at íslendska støðan mótvegs øðrum í Íslandi álmgaðum fiskivinnutjóðum er munandi broytt, halda vit tað vera beint at taka upp nýggjar samráðingar við íslendsku ríkisstjórnina um fiskirættindi føroyinga innanfyri 50 fjórðinga fiskimarkið. í viðmerkingunum til løgtingsmál nr. 34/1972: Fiskirættindi føroyinga undir Íslandi, verður millum annað sagt um veiðirættindi trolaranna, hvar avtala varð gjørd tann 19. september 1972: «Úrslitið varð, at føroysku trolararnir, burtursæð frá trimum flakatrolarum kundu veiða millum 12 og 50 fjórðingar eftir somu reglum, sum galda fyri íslendskar trolarar. Skipanin er ikki tíðaravmarkað, men skal galda inntil annað verður fráboðað frá íslendsku ríkisstjórnini.

Hetta kemst av, at samráðingarnar millum Ísland og serliga Bretland og Týskland ikki høvdu ført til eina loysn fyri veiðirættindi hjá bretskum og týskum trolarum undir Íslandi. Samb. skjal 2 frá 19. september 1972 hava bert ávísir 9 trolarar loyvi at trola innanfyri 50 fjórðinga fiskimarkið og eru teir:

1. Brandur Sigmundarsson
2. Magnus Heinason
3. Skálaberg
4. Sjúrðarberg
5. Kap Farvel
6. Ólavur Halgi

7. Leivur Øssursson
8. Vágbingur
9. Jógvan Elias Thomsen.

Av tí at tað eru fleiri smærri trolarar komnir til landið í seinastuni, og hesum er fyribils sýtt veiðiraettindi innanfyri íslendska 50 fjórðinga fiskimarkið, so meta vit, at tað er rætt at taka avtaluna frá 19. september 1972 í skjali 2 upp til nýggja viðgerð.

Hvat avtaluni frá 16. august 1972 í skjali 1 viðvikir skulu ikki gerast nógvar viðmerkingar her, men kundi tað ikki verið óhugsandi at raettindi til avmarkaðn lodnuveiði kunni fingist uppí hesa avtalu.

1. viðgerð 18. mars og málið beint í marknaðarnevndina, sum tann 3. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum, og varð tað við fyrstu viðgerð, sum fór fram 18. mars, beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt tað.

Nevndin hevur býtt seg í ein meirilutа og ein minniluta.

Í løgtingsmáli nr. 64/1971: Samráðingar við íslendingar, samtykti løgtingið at biðja landsstýrið saman við umboðum úr løgtinginum taka upp samráðingar við íslendingar um fiskimarksmálið, tá tað varð hildið at vera tann rætta løtan.

Samráðingar fóru fram í august og september 1972, og samráðingarúrslitið var lagt fyri tingið sum løgtingsmál nr. 34/1972.

Undir samráðingunum við fslendingar var tað greitt, at umstøðurnar at gera varandi sáttmálar ikki vóru tær bestu, tí íslendingar stóðu í hørðum strlði við flestu tjóðir, ið vóru vanar at fiska har.

Skipanin, ið fingin varð, ber í sær, at føroysk línu- og snelluskip kunnu fáa veiðuloyvi á íslendskum sjógvi, lá søkt verður um tað fyri hvørt skipið sær. Loyvið hevur altíð verið givið, tá søkt hevur verið um tað.

Viðvikjandi veiðirættindum hjá føroyskum trolarum var úrslitið, at teir, burtursæð frá trimum flakatrolarum, kunda veiða millum 12 og 50 fjórðingar eftir somu reglum, sum galda fyri íslendskar trolarar. Undir samráðingunum vóru allir føroysku trolararnir, ið tá vóru, nevndir við navni, men samstundis varð sagt frá, at fleiri smærri trolarar fóru at koma aftur at í næstu framtíð. Teir trolarar, sum av fyrstan tíð fingu veiðiloyvi, hava ikki havt nakrar trupulleikar av hesi skipan, men torført hevur gingið at fáa trolloyvi til nýggjar bátar.

Tá fyrsti trolarin av tí smærra slagnum «Mýlingur» skuldi til fiskiskap, varð søkt um loyvi, og tað fekk báturin.

Tað síðsta árið eru fleiri smáir trolarar komnir afturat. Hóast søkt hevur verið um veiðiloyvi fyri hesar bátar, hevur gingið ógvuliga striltið.

Fyri um eini viku síðan fingu tó teir fimm smærru trolararnir, sum hava søkt um tað, loyvi at fiska innanfyri fiskimarkið til 1. juli 1974, treytað av at fimm trolarar, sum hava loyvi frammanundan, nistu tað hetta sama tíðarskeið.

Rættur til fiskiskap við at læna trolloyvi frá øðrum er ein ring loysn, sum eisini er sera torfør at umsita.

Søkt hevur verið um loyvi til at fiska loðnu, men einki loyvi er játtað.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, P. J. Olsen, Hákun Djurhuus, Kjartan Mohr, Hilmar Kass og Andrias Djurhuus, sum møtti fyri Trygva Samuelsen) er samdur við uppskotsstillararnar, at roynt eigur at vera at fáa samráðingar við íslendingar aftur um betri veiðisømdir, og at løgtingsmenn eins og vani er í slíkum samráðingum taka lut, men vísir til samtyktina og viðmerkingarnar frá meirilutanum í løgtingsmáli nr. 64/1971.

Landsstýrið upplýsir, at tað tann 8. mars í ár hevur biðið um samráðingar í hesum mánaði, men hevur ikki fingið svar enn.

Samsvarandi tí, sum her er ført fram, setur meirilutin einki uppskot í hesum máli.

Minnilutin (Erlendur Patursson) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 4. apríl.

Uppskotið afturtikið og málið sostatt avgreitt.

---

72. Nýtt løgtingshús

Ar 1974, 14. mars, var frá tinghúsnevnd (sbr. 26/1970) lagt fram soljóðandi

Álit

Í 1969 skrivaðu Tórshavnar býráð og landsstýrið út eina idékapping um eina varðveitingar- og endurnýggingarætlan fyri gomlu Havnina.

Eftir kappingartreytunum skuldi havast í huga, at eitt møguligt nýtt løgtingshús átti at fáa plass í Tinganesi, og at møguleikar vórðu fyri útbygging av miðstøðuumsitingini í Tinganesi.

Við vinnandi uppskotinum í nevndu kapping sum grundarlag, hevur Tórshavnar býráð gjørt uppskot til eina serstaka byggisamtykt fyri gomlu Havnina. Fyri at kunna arbeiða víðari við hesum býarplanleggingararbeiði er tað neyðugt hjá kommununi at vita, um ætlanin er at byggja tinghús og umsitingarhús úti í Tinganesi.

Við skrivi frá 28. januar 1971 legði landsstýrið málið um bygging av tinghúsi fyri tingið, tá avgerðin um hvar tinghúsið skal liggja, má vera hjá løgtinginum sjálvum.

Í mars 1971 samtykti løgtingið (løgtingsmál nr. 26/1970) at seta niður 6-mannanevnd við einum limi úr hvørjum flokki at viðgera málið um nýtt løgtingshús og geva løgtinginum frágreiðing og tilmæli.

Nevndin hevur havt fundir við býarplansnevnd býráðsins, Gunnar Hoydal, arkitekt, og landsumsitingina um málið. Aftaná at nevndin hevði kannað hølistørvin í einum møguligum nýggjum løgtingshúsi og landsskrivstovan hevði kannað hølistørvin hjá landsstýri og miðstaðumsitingini, eru skitsuteikningar gjørdar, sum vísa, hvussu tinghús og umsitingarhús kunnu plaserast í Tinganesi.

Eftir uppskotinum verður tinghúsið lagt í Fútabakka, norðan fyri Leigubúðina og Munkastovuna, so at opnað økið ímillum (kirkjugarðurin) kann nýtast sum forpláss í samband við útifundir og tílíkt. Hesin bygningur lýkur í høvuðsheitum tey høliskrøv, sum flokkarnir hava sett, tó so at nøkur hjálparrúm mugu takast av skránni, t.d. blaðmannarúm o.t.

Høvuðsvansarnir við at byggja í Tinganesi vera av ferðsluligum slag, tí tað verður sera torført at greiða ferðsluviðurskiftini og ógjørligt at útvega nóg nógv øki til parkeringspláss. Eisini má havast í huga, at tinghúsið kemur at liggja ógvuliga ónnibyrgt á hesum stað og seinni møguleikar fyri viðkan eru smáir.

(F.L. J. nr. 2400-15-1).

Hin vegin er tað eisini nógv, sum talar fyri at byggja tinghúsið á hesum søguliga stað, ti tað fæst ikki nakað miljøvirði, um hygt verður á opnum lendi i útjaðaranum av býnum. Eisini hevði tað havt sín týdning fyri varðveitslu- og endurnýggingarætlanina fyri gomlu Havnnia, um tinghúsið varð lagt í Tinganesi.

Viðvíkjandi høligtørvinum hjá umsitingini er at siga, at tann gjørda skráin yvir høligtørv vísir, at miðstøðuumsitingin kann fáa nóg mikið av plássi í Tinganesi tey fyrstu árini, um Sjóbúðin verður endurreist til nýtslu sum skrivstovuhøli.

Annars er at siga, at løgting og umsiting ikki nýtist at liggja á sama stað.

Kostnaðurin av at byggja tinghúsið í Tinganesi eftir frammanfyri nevnda uppskoti kann metast til 7 milj. kr. Kostnaðurin av at byggja ein bygning við tilsvarandi funktiónum á fríum øki, verður mettur at liggja nakað (men ikki nógv) lægri. Heraftrat koma fyrimunirnir við at kunna fara meira óbundin til verka, bæði viðvikjandi støddl og byggisniði. Trupulleikar skuldu ikki komið at staðist av ferðslu og parkering. Prísurin fyri eitt størri grundøki á opnum lendi, kann ikki metast at koma at liggja nógv hægri, tí í Tinganesi verður neyðugt at keypa hús til niðurríving fyri at útvega grundøki.

Eftir byggiætlanini fyri Tórshavn er øki tit almenna bygging avlagt omanfyri telegrafstøðina, og má ti roknast við, at tinghúsið má byggjast har, um so verður, at avgjørt verður ikki at byggja í Tinganesi.

Áheitan er nú aftur komin frá býráðnum um at fáa at vita, hvar ætlanin er at byggja tinghúsið. Býráðið mælir til, at bygt verður í Tinganesi.

Vegur verður gjørdur frá Hálsi og oman í R. C. Effersøesgøtu og skuldi hetta gjørt tað lættari at tikið støðu til, um økið við telegrafstøðina, har eisini hevur verið talan um at byggja, er hóskandi.

Í grunninum til bygging av nýggjum løgtingshúsi standa í løtuni 4.157.617,79 kr.

Ásannast má, at núverandi løgtingshús er ov trongt og í aðrar mátar óhóskandi. Støða eigur ti nú at verða tikin til, hvar byggjast skal, og stig tikin til at fara undir byggingina sum skjótast.

Nevndin, ið fekk til uppgávu at kanna málið um bygging av nýggjum tinghúsi, tekur ikki støðu til, hvar nýtt tinghús eigur at verða bygt, men mælir til, at løgtingið tekur málið til eina 1. viðgerð, har tingmenn av nýggjum fáa høvi til at siga sína hugsan.

í hesum liki verður málið lagt aftur fyri tingið, men mælir nevndin tó til, at málið verður avgreitt í hesi tingsetu.

Á løgtingi, 12. mars 1974.

J. Fr. Øregaard Kjartan Mohr Hilmar Kass

Hákun Djurhuus Finnbogi Isaksen

Trygvi Samuelsen

1. viðgerð 15. mars. Frávik frá tíðarfrestini.

Málið beint í serstaka 6-mannanevnd við einum limi úr hvørjum flokki (tinghúsnevndin), sum tann 3. apríl legði fram soljóðandi nýtt

Álit

Í mars 1971 samtykti løgtingið at seta niður 6-mannanevnd við einum limi úr hvørjum flokki á løgtingi til at viðgera málið um nýtt løgtingshús, sum leingi hevur verið upp á tal og geva løgtingimum frágreiðing og tilmæli.

Hesa frágreiðing hevur nevndin givið í áliti sínum í løgtingsmáli nr. 72/1973: Nýtt løgtingshús, har vist verður til tvey støð, sum talan kann vera um at byggja nýtt løgtingshús á, annað staðið er í Fútabakka í Tinganesi og hitt staðið er eystan fyri R. C. Effersøesgøtu, har hýráðið eftir byggiætlan fyri Tórshavn hevur lagt av eitt stórt øki umleið 60.000 m², nevnt C 1 til almenna bygging, og har nýtt løgtingshús kann verða bygt. Ein partur av C 1 er ogn býráðsins, meðan restin kann ognartakast sambært býarskipanarlógina.

Í áliti sínum til løgtingið setur hendа 6-mannanevnd onki uppskot fram um á hvørjum av hesum báðum støðum tinghús eigur at verða bygt, men mælir til, at løgtingið tekur málið til eina 1. viðgerð, har tingmenn kunnu siga hugsan sína, og samstundis verður mælt til, at málið verður avgreitt í hesi tingsetuni.

Sum tilmælt fekk málið 1. viðgerð á tingi 15. mars 1974, har nakrir tingmenn høvdu orðið og søgdu sína hugsan um hendа spurning og varð úrslitið tað, at málið varð beint í eina aðra 6-mannanevnd við einum limi úr hvørjum flokki (Kjartan Mohr, Hákun Djurhuus, Trygvi Samuelsen, Hilmar Kass, Finnbogi Isaksen og Hilmar Bech), sum skuldi viðgera málið víðari og so leggja uppskot fyri tingið, um hvar nýtt tinghús eigur at verða bygt.

Býráðið hevur mælt til at bygt verður í Fútabakka.

Nevndin hevur so viðgjørt málið og nevndarlimirnir (Trygvi Samuelsen, Finnbogi Isaksen og Hilmar Bech) føra fram:

Eftir at hava kannað og umhugsað hesi bæði støðini, halda vit, at møguleikar eru fyri at byggja í Fútabakka í Tinganesi, so sum fyrra nevndin eisini vísir til, men eitt nýtt løgtingshús kemur at liggja ógvuliga innibyrgt á hesum staði, og møguleikar fyri at víðka um seinri eru smáir, samstundis sum øll tey rúm, tingmenn kundu hugsað sær í einum nýggjum løgtingshúsi valla kunnu fáast, sum nevndin eisini vísir á.

Ynskiligt var, at umsitingin kundi ligið so nær løgtinginum sum gjørligt, men tað letur seg vegna plásstrot ikki gera, um bygt verður í Fútabakka; hinafturímóti eru møguleikar fyri, at landsstýrið og miðstøðumsitingin kunnu fáa pláss í Tinganesi framvegis. Tað verða eisini stórir trupulleikar fyri ferðsluna, og parkeringsmøguleikar verða smáir í Tinganesi.

Viðvíkjandi tí søguliga kann verða nevnt, at føroyingar hildu ting á Tinganesi í gomlum døgum, tá økið var óbygt og spurningurin er tí, sum onkur tingmaður vísti á undir 1. viðgerð, um ikki Tinganes verður best varðveitt sum søguligt stað við at lata so nógv av hesum lendi liggja óbygt sum gjørligt.

Frá íslendskari søgu vita vit, at gamli tingstaður teirra var á Tingvøllum, har altingið kom saman, og hetta søguliga staðið lótu teir liggja óbygt, meðan teir reistu altingshúsið í høvuðsstaðnum Reykjavík.

Tórshavn er høvuðsstaður okkara og flestu føroyingar eru samdir um, at her eigur løgtingið at hava sæti, men at eitt nýtt løgtingshús skal byggjast í Fútabakka í Tinganesi eru valla øll á einum máli um.

Í álitinum sigur nevndin, at kostnaðurin við at byggja í Tinganesi eftir tí uppskoti, sum fyriliggur, kemur at verða umleið 7 milj. kr., meðan kostnaðurin við at byggja á einum frían øki, kemur at verða nakað minni, um bygt verður í somu stødd.

Viðvíkjandi bygging eystan fyri R. C. Effersøesgøtu er tað at siga, at har er eitt frítt øki, og at eitt nýtt løgtingshús har kemur at liggja á ásýnilignum staði, samstundis sum har er lætt at koma til og frá, og góðir parkeringsmøguleikar kunnu skapast.

Við bygging á hesum staði kann farast meira óbundið til verka, bæði tá tað snýr seg um støddina og byggisniðið, so har kann fáast eitt løgtingshús, sum lýkur øll tey krøv, ið sett verða til tað bæði nú og í framtíðini bæði viðvíkjandi byggisniði og innrætting.

Á hesum øki C 1, sum býráðið hevur lagt av til almenna bygging, verður eisini møguligt at leggja meginpartin av umsitingini, sum verður hildið at hava stóra nýdning.

Nevndarlimirnir (Trygve Samuelsen, Finnbogi Isaksen og Hilmar Bech)

vilja sostatt mæla til, at nýtt løgtingshús verður bygt eystan fyri R. C. Effersøesgøtu á øki C 1, sum sæst á viðlagda korti.

Samstundis verður hildið, at formansskapurin hjá løgtinginum saman við landsstýrinum eigur at taka sær av at skipa fyri teimum neyðugu fyrireikingunum til byggingina og setur sostatt fram

Uppskot
til
samtyktar

I. Løgtingið samtykkir, at farið verður undir at byggja nýtt løgtingshús eystan fyri R. C. Effersøesgøtu á býarøkinum C. 1, innan byggisamtykt nr. 3, og at tingsins formansskapur saman við landsstýrinum fær upp i hendi at fyritaka tær neyðugu fyrireikingarnar.

Tá hesar fyrireikingar eru loknar, teikningar og byggikotsnaður v.m. fingin til vega, verður málið lagt aftur fyri løgtingið til endaliga støðutakan.

II. Løgtingið heitir á landsstýrið um samstundis at tryggja sær hóskandi pláss til fyrisitingarhús á C. 1. økinum.

Nevndarlimirnir Hákun Djurhuus, Kjartan Mohr og Hilmar Kass føra fram:

Gjøgnum øldir í okkara tjóðarlívi hava orðini Tinganes og tingið verið millum okkara mest heilagu orð. Tey vóru so avgerandi livsmegin í søguliga hjartatáttin á teirri línu, ið hevur verið okkara álitisfesta í ringnum og góðum tíðum, so vit onguntíð til dagin í dag hava mist okkum sjálvar burtur.

Í Føroyingasøguni í bólkinum um Svínoyar-Bjarna stendur:

Tingstaður Føroyinganna var í Streymoynni, og har er havnin, teir rópa Tórshavn.

Tingstaðurin gav nesinum navn — Tinganes, og har hava okkara forfedrar sett sær síni enn sjónligu spor við tildønuis húmerkjum høgd í klettin.

Á hesum tingi á Tinganesi eru stórhendingar farnar fram og stóravgerðir tiknar.

Tingið var alting, har hvør frítur maður kundi møta og taka lut í avgerðunum, og varð tað helst stovnað í 9'undu ella 10'undu øld, og er okkara ting sostatt tað elsta í okkara heimsparti Europa.

Um ár 1400 finna vit orðið løgtingið í brúk, kanska er tað eldri, men hevur tingið síðani verið nevnt við hesum navni.

Hendingarrøðirnar eru kámar í okkara søgu í nógvar øldir, men tann

avgerandi táttur, ið løgtingið eigur í okkara politisku søgu, er týðiligur. Bara hetta at kunna hava livbjargað sær undir so vána umstøðum, sum mangan vóru, sigur sítt.

Navnið var har, og nesið lá har, tað gav støði undir einum áræði og livsvilja, ið ikki lat seg kúga.

Men Tinganes kom á frenmandar hendur, tað føldist sárt, men eggjaði til at fáa hendur á tað aftur. At hesin okkara mest søguligi staður skuldi vera ogn hjá frenmandum, var ein avbjóðing, ið menn ikki ætlaðu at smoykja sær undan.

Orðini, ið mangir helst hugsaðu, men ein skuldi siga: Tinganes skulu vit hava hendur á aftur, og tingið skal aftur á Tinganes, liva, sjálvt um hann, ið segði tey, og mangir av teimum, ið hugsaðu sum hann, eru farnir.

Tinganes fingu vit aftur í 1947, tá Tryggingarsambandið Føroyar við Kristian Djurhuus sum formanni og Jens av Reyni sum stjóra keyptu tað frá bretskum handilsfelagi.

Stavnhaldið við hesum keypi var at fáa tingið út aftur á Tinganes, men grundirnar vóru nógvar fyri, at her mátti verða drigið favn fyri favn.

Men drigið varð ávegis.

Vit fingu okkara fyrsta landsstýri í 1948 við Andrass Samuelsen sum løgmaður. Í 1949 flutti hetta landsstýrið út á Tinganes í Bakkapakkhúsið (Skibstedshús), ið eftir avtalu við Tryggingarsambandið Føroyar var innrættað til landsumsitingarhøli.

Í 1957 sat Kristian Djurhuus sum løgmaður, tá keypti løgtingið tinganesognina frá Tryggingarsambandinum fyri 620.000 kr. Í stýrinum fyri tryggingarsambandið sat tá millum aðrar Petur Mohr Dam sáli, ið varð løgmaður 1959-63.

Politikkurin hjá landsstýrinum styðjaður av løgtinginum var at keypa oguir úti í Tinganesi, soleiðis at ikki bert fyrisitingin, men eisini sjálvt løgtingið kundi vera á hesum søguliga staði, so nær knýtt at løgtingssøguni.

Í 1958 vóru keypt tvey hús afturat fyri 85.500 kr.

Í 1963 verða aftur tvey hús keypt fyri 97.240 kr.

Seinasta keypið fór fram í 1974, tá Skansagarður var keyptur fyri 310.000 kr.

Tilsamans hevur løgtingið keypt úti í Tinganesi eftir tilmæli frá skiftandi landsstýrum og skiftandi figgjarnevndum fyri 1.112.740 kr., sum í dagsins pengum er munandi meira.

Fyri bendan pening hevur løgtingið ognað sær 4.628 m² úti í Tinganesi við tí í hyggju, at løgtingið skuldi út aftur í Tinganes.

Afturat hesum hevur landsstýrið hrúkt miljónbeløb, játtað av løgtinginum til at seta bygningar harútti í hóskandi og brúkiligan stand.

Afturat hesum, ið løgtingið hevur ognað sær, eigur Tórshavnar býráð meginpartin av teimum húsum, ið liggja uppat tí, ið løgtingið eigur, og

hevur býráðið einmælt rátt til at nýggja løgtingshúsið verður bygt í Tinganesi.

Í sini lingsan og støðutakan í hesum máli hevur Tórshavnar býráð altíð ligið á sama bógvi sum tey skiftandi landsstýrir og løgting.

Í 1960'unum bjóðaðu landsstýrið og býráðið til internorrøna kapping um varðveitslu- og útbyggingarætlan av Tinganesi og gomlu Havnini, men tað lá fast, at henda kapping skuldi hava tað fyri eyga, at løgtingið skuldi út aftur í Tinganes.

Bæði internorrøna kappingin, har føroyskur arkitektur saman við øðrum fekk 1. virðislønina, og seinni projekt hava vist, at rúm er fyri bæði løgtingi og miðfyrisiting (Centraladministratión) úti í Tinganesi.

Hetta er úrslitið, teir sakkønu eru komnir til, men hevur minnilutin spurt skrivsotvustjóran í landsstýrinum Jóhan Djurhuus, ið hevur verið og er hægstur fyri landsstýrisins og løgtingsins fyrisiting síðani 1949, um veruleiki er undir hesi metan, og heldur hann, at tann loysn, sum arkitektarnir hava vist á í tí seinna uppskotinum geva bæði løgtinginum og miðfyrisitingini lønandi rúm umstøður, sjálvt um projektið ikki enn fyriliggur í sínum endaliga formi.

Minnilutin heldur eftir tí, ið her er ført fram:

At søgan um Tinganes og løgtingið,
løgtingsins keyp av Tinganesogunum
og tað úrsilt, sum teir sakkønu eru komnir til
avgjørt er fullgott støði undir, at nýggja løgtingshúsið verður sett úti í Tinganesi, og skal í hesum sambandinum endurtaka hetta ørindi úr løgmansins gestabók í 1965

Í hesum flesjalandi
var eingin annar fles
Í hesum nesjalandi
var einki annað nes
enn nesið millum vágirnar
sum nesið skilir at
ið vígdist Tóra Guði
— har løgtingið sat.
Og skal aftur sita.

Minnilutin (Hákun Djurhuus, Kjartan Mohr og Hilmar Kass) mælir tí til, at nýggja løgtingshúsið verður sett úti í Tinganesi, og mótmælir hugsanini um, at Føroya løgting verður sett aðrastaðni enn á tí staðnum — Tinganes — sum føroyingar kenna sum felagsogn sína. At seta á Trappatrøðna ella annað pláss í staðin fyri Tinganes kann bert gerast við meðalla at bróta eina tradition, fast grógvin í fólkinum.

Ein slík gerð vil avtofta Føroya mest miljøvirðismikla ogn, og skaðin verður óbótaligur.

Minnilutin setur tí fram fylgjandi

Uppskot
til
samtyktar

I. Løgtingið samtykkir, at nýtt løgtingshús verður sett í Tinganesi.

II. Løgtingsins formansskapur saman við landsstýrinum verða biðin um at arbeiða víðari við málinum og leggja tað aftur fyri tingið, tá endaligt uppskot og kostnaðarætlan liggja fyri.

TINGHÚSNEVNDIN, 3. apríl 1974.

Hilmar Bech Trygvi Samuelsen Finnbogi Isaksen

Hákun Djurhuus Kjartan Mohr Hilmar Kass.

2. viðgerð 5. apríl.

Uppskot frá nevndarlimunum H. Djurhuus, H. Kass og Kj. Mohr fall við tað at 12 atkvøddu ja og 14 atkvøddu ikki.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:

Ja atkvøddu: Hilmar Kass, J. Sundstein, S. Skaale, D. Hentze, K. Wang, H. Djurhuus, A. Djurhuus, Jógvan Olsen, J. P. Thomassen, T. Olsen, Kj. Mohr, Ove Mikkelsen = 12.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, S. Hansen, M. Joensen, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, Johs. Olsen, H. Bech, P. J. Olsen, H. Hansen, H. við Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, J. Djurhuus, J. Fr. Øregaard = 14.

Uppskot frá nevndarlimunum Hilmar Bech, Tr. Samuelsen, F. Isaksen punkt 1 samtykt við navnakalli við tað at 15 atkvøddu ja, 1 nei og 10 atkvøddu ikki.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Signar Hansen, M. Joensen, Tr. Samuelsen, J. Olsen, Johs. Olsen, H. Bech, T. Olsen, P. J. Olsen, H. Hansen, H. við Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, J. Djurhuus, J. Fr. Øregaard = 15.

Nei atkvøddi: Kjartan Mohr = 1.

Atkvøddu ikki: H. Kass, J. Sundstein, S. Sknale, D. Hentze, K. Wang, H. Djurhuus, L. Joensen, A. Djurhuus, J. P. Thomassen, O. Mikkelsen = 10.

Puntkt 2 samtykt 14 — 0.

Málið sostatt avgreitt.

Myndir av uppskotinum til nýtt løgtingshús í Tinganesi koma í **Skjal 17.**

---

73. Rentu- og avdráttarfrí lán til sethúsabygging

Ár 1974, 14. mars, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fram

Uppskot til

løgtingslóg um rentu- og avdráttarfrí lán til sethúsabygging.

§ 1.

Til tess at veita rentu- og avdráttarfrí lán til sethúsabygging úr nýggjum verða lagdar í grunn 10 milj. kr. Hesin peningur kann ikki sigast upp.

§ 2.

Stovnaður verður grunnur við tí endamáli at veita sethúsabygging úr nýggjum rentu- og avdráttarfrí stovnslán.

(F.L. J. nr. 1426-10).

§ 3.

Lán úr grunninum verða veitt móti veðrætti í sethúsum við grundøki, sum liggur innanfyri 90 % av metingarvirði tess veðsetta.

§ 4.

Landsstýrið fyriskotur í reglugerð, góðkendari av figgjarnevnd Føroya løgtings, gjøllari reglur um virki grunnsins og fyrisseti hansara.

§ 5.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin og byrjar grunnurin starv sítt tann dag, ið ásettur verður í kunngerð.

Viðmerkingar:

Eftir floksins metan er rætturin til bústað maunarættur, sum so mangir aðrir, rætturin hjá ti einstaka at eiga høvi at útvega sær egnan bústað. — Flokkurin hevur í sínum stevnumiðum sligið fast, at sethúsabyggingarspurningurin verður í megindráttum loystur á tann hátt, at fólk fáa atgongd til ókeypis ella móti lágari leigu grundstykki til at byggja sethús á, at tey fáa lán móti 5 % í árligari rentu og við 50 ára avdráttfartíð og harafturat rentu- og avdráttarfrí studningslán. Tað eru hesi seinastnevndu lán, hetla uppskot miðar ímóti at útvega fólki.

Sum frambókan hevur verið tey seinastu 10 árini, vøksturin í prislagnum, byggilendisprisinum og tilfarsprísinum hava ongmanni ongan møguleika átt at spara til sethúsabygging, harafturat hevur skúli og annar lærdómur tikið so nógv av tíð, at einki hevur fingist uppspart, tá ið náttúrligt er hjá teimum at fara at hugsa sær um hús.

Í dag kosta sethús við byggilendi vanliga kvart og upp í hálva milj. Tað hevur onga meining at hugsa sær til at tey kunna útvega meira enn 10 % av hesum byggikostnaða. — Men tað eru høgar peningaupphæddir, ið skulu til. Seta vit t.d. at bygd verða 250 sethús árliga, sknlu 25 milj. kr. nýtast til hetta endamál.

1. viðgerð 18. mars og málið beint í tíggjarnevndina, sum tann 5. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Tað er Erlendur Patursson, sum hevur lagt málið fyri tingið, og varð tað við fyrstu viðgerð beint í tíggjarnevndina.

Sambært § 1 og 2 verður mælt til at stovna grunn við einum eginpeningi uppá 10 milj. kr. Hesin peningur verður veittur húsabyggjarum sum rentu- og avdráttarfrí lán. Í viðmerkingunum verður roknað við, at árliga verða bygd 250 hús, so sum lánini skulu verða rentu- og avdráttarfrí með alla, og grunnurin ikki fær aðrar pengar enn nevndu 10 milj. kr., verður hann tømdur eftir tveimum árum, um so lánihæddin verður kr. 20.000 pr. hús, ella eftir einum ári, um lánihæddin verður kr. 40.000.

Ein meiriluti (J. Fr. Øregaard, Hilmar Kass, Trygve Samuelsen, Andreas Djurhuus og Knút Wang) heldur seg ikki kunna mæla tinginum til at stemma fyri hesum uppskoti, sum sami meiriluti heldur verða ov illa umhugsað.

Ein minniluti (Hanus við Høgadalsá og Fimbogi Isaksen) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 6. apríl.

Gr. I fall 6—0.
Alt uppskotið sostatt burturfallið.

74. Sjóverjan

Ár 1974, 14. mars, legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir:

1. Føroya landsstýri útvegar teim føroysku skipunum, sum av landsstýrinum verða sett til at hava eftirlit við fiskiveiðu undir Føroyum, fullan lóggildugan myndugleika til at taka skip, sum bróta galdandi fiskimark og millumlanda samtyktir, og føra slíkar lógbrótarar fyri dómstól.

2. Føroya landsstýri verður sum skjótast gjørligt at útvega landinum hóskandi før til at røkja okkara sjóverju.

3. Føroya landsstýri útvegar somuleiðis minni flogfar og helikoptara til endamálið.

Viðmerkingar:

Allir kunnu væl verða samdir um, at sjóverjan - eftirlitið við fiskimarkið — sum hon nú er, átti at verið meira virkin, meira munadygg.

Tjóðveldisflokkurin er av tí áskoðan, at skal bati fáast á hesum øki, er besta — ja einasta - - loysn tann, at vit føroyingar sjálvir røkja sjóverjuna.

Skulu vit hava víðari fiskimark uttan at bøta um sjóverjuna, er alt til fánýtis.

Tí mælir flokkurin til, at landsstýrið útvegar sær hóskandi skip við føroyskari manning til verju av fiskimarkinum. Hesi skip nugu sjálvandi hava fullan lógrættar myndugleika til at taka møguligar lógbrótarar.

Skipini kunnu verða ymisk til støddar og hava ymiska siglingarferð. Tó eigur í minsta lagi eitt av teimum at vera so pass til støddar, at tað kann vera úti á vaktarhaldi í vána veðri, av tí at fleiri av teimum útlendsku trolarunum eru so stórir, at teir næstan aldri vanda veður til troling.

(F.L. J. nr. 1523-12-1).

Sjónarkið er so langt eitt strekki, at ansast eftir tí kann ikki einans við skipum. Tí verður neyðugt eisini at hava eilt minni flogfar og ein helikoptara til eftiransing, vaktarhald og fráboðan. Hesi flogfør eiga at vera so, at tey kunnu lenda bæði á landi og á sjógvi. Soleiðis, at tey eisini kunnu nýtast í hjálpartænastu og til sjúkraflutning.

Til ávísar árstíðir er útlendski veiðiflotin, sum roynir undir Føroyum stórur og telur fleiri av teim størstu og skjótast siglandi trolarum í vesturheiminum.

At útlendingar reka stóra ólógliga veiði undir Føroyum, er øllum føroyskum útróðrarmonnum kunnugt. Henda ólógliga útlendska veiðan kann einans minkast við einari meira munadyggari sjóverju. At slík sjóverja kemur at kosta pening er greitt, men tað er nógva ferðir dýrari fyri landið ikki at hava eina góða verju og eitt eftiransið vaktarhald. Tí einans, um bert ein partur av tí nøgd, sum á henda hátt verður ólógliga veitt av útlendingum kom á land í Føroyum, var ein munadygg sjóverja fleiri ferðir afturgoldin einans í veiðivirði.

Lata vit hinvegin bara standa til, kann henda ólógliga veiða gera so stóran skaða á bæði fiskastovn og okkara vinnulív sum heild, at skaðin verður óbótaligur.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í lógarnevndina, sum tann 26. mars legði fram soljóðandi

Álit

Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, hevur vegna tjóðveldisflokkin lagt fyri løgtingið uppskot til samtyktar um sjóverjuna.

Málið varð framlagt 14. mars 1974 og fyrsta viðgerð fór fram 19. mars og varð málið beint í lógarnevndina.

Síðani hevur uppskotsstillarin vent sær til nevndina og biðið um, at málið verður lagt fram aftur á ting við tilmæli um, at málið verður beint til viðgerðar í fiskivinnunevndini.

Lógarnevndin er samd við uppskotsstillaran um, at hetta mál viðvíkir málsøki, ið av røttum eigur at verða viðgjørt í fiskivinnunevndini, og mælir tinginum til at gera hesa

t i n g s a m t y k t.

Málið verður beint í fiskivinnunevndina.

LÓGARNEVNDIN, 22. mars 1974.

2. viðgerð 28. mars.

Uppskotið frá lógarnevndini um at heina málið í fiskivinnunevndina samtykt 20—0.

3. apríl var frá fiskivinnunevndini framlagt soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri løgtingið av Tjóðveldisflokkinum og varð við fyrstu viðgerð beint í lógarnevndina, sum síðan hevur mælt til, at málið fekk viðgerð í fisikvinnunevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er í høvuðsheitinum samd við uppskotsstillaran um, at sjóverjan í øllum sínum liðum ikki verður so væl røkt, sum hon átti at verið, fyri at halda fiskifør, sum reka ólógliga veiðu burtur.

Nevndin heldur, at orsøkin er tann, at tað stóra vaktarskipið fyri ein part hevur aðrar uppgávur at røkja umframt sjóverjuna.

Uppskot Tjóðveldisflokksins er í trimum pørtum.

Viðvíkjandi 1. parti er at siga: at eftir teimum upplýsingum, sum nevndin hevur fingið frá landsstýrinum, so er spurningurin um politimyndugleika komin so langt, at fam dag føroyingar hava hóskandi skip, og menn við neyðugum kunnleika, skuldi hesin spurningur verið greiddur.

Viðvíkjandi 2. parti er nevndini kunnugt, at landsstýrið hevur boðið út til byggingar vaktar- og bjargingarskip og hevur fingið fleiri tilboð, og her vil nevndin tí heita á landsstýrið um at skunda undir at fáa skipið bygt sum skjótast.

Viðvíkjandi 3. parti verður víst á, at tað stóra verjuskipið hevur helikoptara umborð, og tað er upplýst fyri nevndini, at danskt flogfar til tíðir flýgur yvir føroyskum sjóøki í sambandi við sjóverjuna.

Í staðin fyri uppskot Tjóðveldisfloksins setur nevndin fram hetta

Uppskot
til
samtyktar

1. Álagt verður landsstýrinum at skunda undir, at vaktar- og bjargingarskipið verður bygt sum skjótast.
2. Heitt verður á landsstýrið um at taka upp samráðingar við avvarðandi

myndugleikar um at skipa so fyri, at tey donsku vaktarskipini verða nýtt til sjóverju- og bjargingarfænastu burturav.

Nýggj onnur viðgerð 4. apríl.
Broytingaruppskotið frá nevndini samtykt 24—0.
Málið sostatt avgreitt.

---

75. Almenn sjúkratrygging

Ár 1974, 14. mars, legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir:

1. at almenn sjúkratrygging verður sett á stovn, og at landið í hesum sambandi yvirtekur allar føroyskar sjúkrakassar.

2. í staðin fyri sjúkrakassagjald verður álíknað øllum skattskyldugum borgarum eitt ávist sjúkratryggingargjald, sum verður inngoldið saman við vanligum skatti.

3. í fyrstu syftu yvirtekur landið allar skyldur sjúkrakassans, í aðru syftu verður skipað so fyri, at allir landsins borgarar hava ókeypis rætt til alla heilsurøkt, herundir alla læknahjálp, innan- sum uttanlanda, sjúkrahúsvist, allan heilivág, sjúkrahjálp og hjálparlutir og tílíkt.

(F.L. J. nr. 917-15-1).

4. at sjúkratryggingin rindar øllum arbeiðsførum borgarum ávísan dagpening undir sjúku.

Viðmerkingar:

Tjóðveldisflokkurin er av tí áskoðan, at rætt til heilsurøkt og sjúkrahjálp eiga øll sum í landinum búgva og tað ókeypis, og at samfelagið eigur at veita øllum arbeiðsførum borgarum peningaligan stuðul, tá heilsubrek orsakar óarbeiðsføri.

Flokkurin er eisini av tí áskoðan, at tá talan er um sløddina av hjálparveiting til sjúklingar eigur ikki at vera tikið dagar imillum skattskylduga inntøku frá forna ári, ella hvørvítt sjúklingurin fær peningaliga løn fyri sítt arbeiði ella starvast óløntur, sum t.d. vanlig kvinna í heiminum.

Flokkurin metir allar landsins borgarar í teirra ymiska arbeiði og yrki at hava líka stórt samfelagsvirði og øll, sum vegna sjúku treingja til hjálp at hava sama rætt til hesa hjálp, og at tað er samfelagsins skylda at veita hesa hjálp ókeypis.

Flokkurin leggur so statt hetta mál um almenna sjúkratrygging fram fyri tingið.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í sosialu nevndina, sum tann 2. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í eina meiriluta og eina minniluta.

Meirilutin (Johs. Olsen, Hilmar Bech, P. J. Olsen og Jógvan Sundstein) førir fram, at hetta er eitt stórt mál, sum krevur gjølla viðgerð, drúgvar og skilagóðar fyrireikingar og kanningar um, hvussu ein slík skipan kann setast í verk, og hvussu hon fer at roynast í mun til galdandi sjúkrakassaskipan, sum fyri fáum árum bleiv broytt við tað at allir teir smærru sjúkrakassarnir vórðu samanlagdir í størri eindir.

Annars er tað at siga, at løgtingið fyri fáum døgum hevði til viðgerðar uppskot frá landsstýrinum um nýggja kommunulæknaskipan, men hildið varð, at málið var so stórt og tilfarið so rúgvumikið at gjøgnumganga, at tingið helt seg ikki vera fært fyri at kunna argreiða málið á hesum sinni. og tí varð samtykt at útseta málið til næstu tingsetu.

Meirilutin heldur, at hetta málið, sum her fyriliggur er eins stórt og tað fyrra og heldur seg tí ikki, nú so fáir dagar eru eftir, til tingið fer heim,

vera føran fyri at viðgera hetta málið nóg gjølla í hesi tingsetu, og setur ti onki uppskot fram.

Minnilutin (Jógvan Durhuus) mælir til at samtykkja uppskotið frá tjóðveldisflokkinum.

2. viðgerð 4. apríl.
Uppskot til samtyktar fall 6—0.
Alt málið sostatt burturdottið.

---

76. Forboð móti innflutningi og sølu av øli og miniralvatni í einbrúksíløtum

Á 1974, 14. mars, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um forboð móti innflutningi og sølu av øli og mineralvatni í einbrúksíløtum.

§ 1.
Loyvt er ikki at flyta inn ella selja øl og mineralvatn í einbrúksíløtum.

§ 2.
Brot á hesi lóg verða sektað við bót, og hald verður lagt á ólógligu innflutt einbrúksíløt, ið innihalda øl ella mineralvatn.

lagtingslov om forbud mod indførsel og salg af øl og mineralvand i engangsbeholdere.

§ 1.
Det er ikke tilladt at importere eller sælge øl og mineralvand i engangsbeholdere.

§ 2.
Overtrædelse af denne lov straffes med bøde og, de ulovligt importerede engangsbeholdere, der indeholder øl eller mineralvand konfiskeres.

(F.L. J. nr. 1102-19). LL. 45/74.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 32 frá 1. juni 1972 um forboð móti innflutningi og øðrum evnum í «stubby fløskum».

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks samtidig ophæves lagtingslov nr. 32 frá 1. juni 1972 om forbud mod indførsel og salg af øl, mineralvand og andre stoffer i «stubby-flasker».

Viðmerkingar:

Í viðmerkingunum í løgtingslóg nr. 85/1971: **Forboð móti innflutningi** og sølu av øli, mineralvatni og øðrum evnum í «stubby fløskum», var tilskilað at burturkastingin av «stubby fløskum» dálkar í náttúrunni í slíkt mát, at neyðugt er at forboðsregla fyri innflutningi av evnum í «stubby fløskum» verður sett í gildi.

Tá nevnda lóg í sini orðing ikki umfatar t.d. dunkar av melat ella øðrum evni, er tørvur fyri at innflutningur og søla av øli og mineralvatni í einbrúksfløskum verður bannað.

1. viðgerð 19. mars og málið beint til 2. viðgerð uttan nevndarviðgerð.

2. viðgerð 22 mars og málið fá beint í lógarnevndina, sum fanu 25. mars legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um forboð móti innflutningi og sølu av øli og mineralvatni í einbrúksíløtum.

Málið varð framlagt 13. mars og 1. viðgerð fór fram 19. mars og varð málið 22. mars beint til viðgerð í lógarnevndini.

Hetta lógaruppskot kemur í staðin fyri løgtingslóg nr. 32 frá 1. juni 1972 um forboð móti innflutningi og sølu av øli, mineralvatni og øðrum evni í «stubby-fløskum» og umfatar til dømis dunkur av metal ella øðrum evni og er so statt meiri umfatandi enn lógin um «stubby-fløskur».

Grundgevingin fyri forboðsreglum í lógaruppskotinum er at forða fyri dálking í náttúruni vegna burturkasting av tílíkum einbrúksíløtum.

Lógarnevndin hevur viðgjørt málið.

Ein meirluti (Signar Hansen, Martin Joensen, Poul J. Olsen og Trygve Samuelsen) mælir tinginum at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Ein minniluti (Demmus Hentze) setur onki uppskot fram.

Nýggj 2. viðgerð 28. mars.
Gr. 1-2-3 og málið at fara til 3. viðgerð samt. 16—0.

3. viðgerð 1. apríl.
Lógaruppskotið sum samt. við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 16—0.

---

77. Sjómansskúlalóggávan

Ár 1974, 14. mars, legði Asbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir uppskot til løgtingslóg um sjómansútbúgving í hjálagda áliti frá nevnd til kannan av sjómanslæruni.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 23 frá 12. mai 1970 fekk landsstýrið heimild at seta 5-manna nevnd til kannan av lóggávuni viðvíkjandi sjómansskúlalæruni í Føroyum, serstakliga teimum nautisku prógvtøkunum.

Henda nevnd hevur nú sent landsstýrinum álit við uppskoti til nýggja løgtingslóg um sjómansútbúgving, ið skal avloysa løgtingslóg nr. 8 frá 19. mars 1954 við seinni broytingum um sjómansskúla og sjómanslæru.

Eftir uppskotinum skulu sjómansskúlarnir fyrireika til hesi prógv: 1. Skiparaprógv á 2. stigi, 2. skiparaprógv á 1. stigi, 3. stýrimannaprógv, 4. skipsføraraprógv, 5. radioekspedientprógv, 6. skipskokkaprógv.

Haraftrat skulu sjómansskúlarnir taka sær av útbúgving av dekksmanning og eftirútbúgving av sjófólki.

Viðvíkjandi nautisku upplæringini er størsta broytingin eftir uppskoti nevndarinnar tann, at núverandi heimaskiparaprógv og skipararoynd verður avloyst av tveimum skipararoyndum, einari minni roynd, ið tekur 5½ mánað (skiparaprógv á 2. stigi) og einum framhaldsskeiði, sum eisini

er ætlað at vara umleið 5½ mánað, og sum endar við skiparaprógvi á 1. stigi. Roknað verður við at hetta vil økja um tilgongdina av skiparaskúlanæminguan, so tað so við og við kann sleppast undan teimum mongu undantaksloyvunum, sum nú vera givin.

Um útbúgvingina av skiparum, stýrimonnum og skipsførarum hevur nevndin ásett gjøllari reglur í uppskotinum til kunngerðir um upptøkutreylir, pensum og prógvtøkuhald. Viðvíkjandi lærukrøvunum til útbúgving hjá stýrimonnum og skipsførarum hevur áður verið vist til galdandi ríkislóg við tilhoyrandi kunngerðum.

Í uppskoti nevndarinnar til broytingar í manningarlógini hevur nevndin skotið upp, hvørji rættindir tey einstøku prógvini skulu hava. Vist verður í hesum sambandi til uppskot landsstýrisins um broytingar í manningarlógini.

Eftir §§ 11 og 12 í lógaruppskotinum fær landsstýrið heimild at áseta nærri reglur um kokkaroyndir, útbúgving av dekksmanning og eftirútbúgving av sjófólki. Nærri reglur um hesi viðurskiftir eiga at verða gjørdar í samráð við vinnulívið og yrkisfeløgini.

Útbúgving av skipskokkum er byrjað á Klaksvíkar Sjómansskúla og hava nakrir flokkar lokið prógv. Skúlin hevur eisini havt tvey skeið fyri ungar menn, ið ætla sær sjóvegin, men hava hesi skeið ikki fingið góða undirtøku og eigur tí at verða hugsað um at broyta innihaldið í hesum skeiðunum. Klaksvíkar Sjómansskúli er eisini farin undir fiskiíduaðarskúla, sum bæði er ætlaður til útbúgving av sjófólki og fólki, ið arbeiðir á landi í fiskiíduaðinum.

Uppskot nevndarinnar um broytingar í manningarlógini verður framlagt sum serstakt tingmál, har eisini aðrar broytingar, ið viðvíkja maskinmanningini, eru tiknar við.

Landsstýrið tekur undir við uppskoti nevndarinnar til nýggja løgtingslóg um sjómansútbúgving og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Sí annars SKJAL 14.

1. viðgerð 21. mars og málið beint í lógarnevndina.

Formaðurin segði frá (6/4) at málið er útsett til næstu tingsetu.

78. Broyting í lóg um innflutningsgjald

Ár 1974, 14. mars, legði Petur F. Christiansen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innfluttningsgjald.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 9 frá 27. apríl 1961 við seinri broytingum um serligt innfluttningsgjald verður í § 2, 2. stk. punkt 10) broytt til soljóðandi:

10) Maskinur til handverk og EDV virki, um virðið ikki er undir 10.000,- kr.

Sum nýggj punkt 11 og 12 verða innsett soljóðandi:

11) Maskina ella maskinur til idnað tá avvarðandi maskiniløga ikki er undir 10.000,- kr.

12) Maskinur til landbúnaðin, tó ikki um virðið er undir 5.000,- kr.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om en særlig indførselsafgift.

§ 1.

I lagtingslov nr. 9 af 27. april 1961 med senere ændringer om en særlig indførselsafgift ændres i § 2, stk. 2, punkt 10) til sålydende:

10) Maskiner til håndværk og EDB virksomheder, såfremt værdien ikke er under 10.000,- kr.

Som nye punkter 11 og 12 indføjes sålydende:

11) Maskine eller maskiner til industri, når værdien af den pågældende investering ikke er under 10.000,- kr.

12) Maskiner til landbruget, dog ikke om værdien er under 5.000,- kr.

Viðmerkingar:

Orðingin «**maskinur til idnað**» í løgtingslóg nr. 11 frá 26. mai 1971 um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald gevur heimild til frítøku fyri innflutningsgjald tá fakturavirði fyri avvarðandi maskinu er yvir kr. 10.000,-. Fakturavirði undir kr. 10.000,- verða sostatt tollaði við

(L.L. 30/74 — F.L.J. nr. 421-1-8).

13 %. Til idnaðarframleiðslu av ávísum vørum er ymiskt hvussu framleiðsluskipanin er háttað. Talið á maskinum og ileggingarkostnaður fyri sonn er ymiskur. Tí vil galdandi skipan virka óraettvist í førum har idnaðaritegging til framleiðslu av ávísari vøru ella vørum tekniskt krevur maskinur ið hava fakturavirði hvør sær undir kr. 10.000,-, men sum eru eins neyðugar fyri framleiðslurúrslitið eins og tær ið hava fakturavirði yvir kr. 10.000,-, somuleiðis sum hugsast kann at allar maskinurnar hvør sær hava fakturavirði undir kr. 10.000,-. Tá reglan skal verða ein stuðul til idnaðin í Føroyum, er neyðugt at útvega heimild til at ilegging í maskinu ella maskinur til idnað fær tann ætlaða tollalætta tá talan er um at idnaðarvirki leggur pening í maskinu ella maskinur til framleiðslu av idnaðarvøru og hendta framleiðsla tekniskt er soleiðis háttað at samskipan av fleiri maskinum er neyðugt fyri úrslitið.

1. viðgerð 15. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum tann 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið og var við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum vísir landsstýrið á, at so sum ordingin er í lógini kann fritakan fyri 13 % gjaldið einans verða loyvd, um so er, at talan er um eina maskinu, har kostnaðurin er yvir kr. 10.000,- og ikki um fleiri maskinur til sama endamál koma upp á sonn peningahædd. Hetta mælir landsstýrið til at broyta við í § 1 at sela: «tá avvarðandi maskiniløga ikki er undir kr. 10.000.»

Undir fyrstu viðgerð var fort fram, at hæði har talan var um ymiskar maskinur til skip og maskinur til landbúnaðin hevði lógin bolst somu vansar, men segði Petur F. Christiansen landsstýrismaður seg ikki vera vitandi um, at landbúnaðurin ella skipaeigarar hevdu ynskt nakra broyting.

Figgjarnevndin, sum viðgjørt hevur málið, ásannar, at um ordingin av lógini fordar fyri, at tað, sum ætlanin var, tá henda lóg var samtykt, at fritaka idnaðin fyri tollgjald fyri maskinur, er orsøk til at geva tær neyðugu broytingar, og kann sostatt taka undir við uppskotinum og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins óbroytt.

25. mars framlagt (frá Demmus Hentze, S. Skaale, H. Djurhuus, Knút Wang, J. Sundstein) uppiskoytisálit soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um serligt innflutningsgjald.

§ 1.

Undir teir í § 2 nevndu vørubólkar, sum ikki bera serligt innflutningsgjald koma eisini «handilstøð».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov om en særlig indførselsafgift.

§ 1.

Under dem i § 2 nævnte varegrupper, som er afgiftsfritaget, kommer også «kunstgødning».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tá ið uppskotið til lógina um serligt innflutningsgjald á fyrsta sinni var framlagt í 1961 var millum teir vørubólkar, ið innflutningsgjald ikki skuldi rindast av, eisini handilstøð, men táverandi tiggjarnevnd lat henda vørubólk koma undir avgjald og hevur hann verið tað síðani. I 1963 koin øll útgerð til skip og fiskivinnuna sum heild undan at bera innflutningsgjald, og síðani eru maskinur av ávísari upphædd til iðnað, handverk og landbúnað komnar aftrat.

Tá meir og meir, ið nýtt verður til framleiðslu, er sloppið undan avgjaldinum, má tað haldast vera sjálvsagt, at handilstøð ikki skulu bera eitt avgjald uppá 13 %, serliga tá hesin vørubólkur er hækkaður nógv í prísi tá seinastu tíðina.

2. viðgerð 26. mars.
Landsstýrisuppskotið samtykt 26—0.
Uppiskoytisuppskotið frá D. Hentze o.fl. gr. 1 samt. 21—0 gr. 2 samt. uttan atkvøðugreiðslu.
Lógaruppskotið so broytt samtykt at fara til 3. viðgerð 23—0.

3. viðgerð 29. mars.
Upprunaliga lógaruppskotið sum samt. við 2. viðg. nú samt. 25—0.
Uppiskoytisuppskotið sum samt. við 2. viðg. nú samt. 25—0.

79. Sjómansskattur

Ár 1974, 14. mars, legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður landsstýrinum, at gera lógarreglur viðvíkjandi sjómansskatti fyri sjófólk, sum eru mynstrað við føroyskum skipum og leggja uppskot fyri tingið.

Viðmerkingar:

Okkara sjófólk kann býtast í tveir bólkar:

1. teir, ið sigla við farmaskipum og
2. teir, ið sigla við fiskiskipum.

1. Okkara sjófólk, sum sigla við teim føroysku farmaskipunum, hava ongar av teim fyrimununum, sum aðrar tjóðir bjóða teirra sjófólki. Sjómansskatturin, sum er galdandi í norðurlondum, er ein slíkur fyrimunur.

   Nógvir av teim minnu útlendsku farmabátunum, sum sigla meir og minni fast uppá Føroyar, eru mannaðir við føroyingum. Lønirnar á hesum bátum eru umleið tað sama sum á tilsvarandi føroyskum bátum, við hvørt minni, men sjómansskatturin á teim útlendsku bátunum ger tað, at menn siggja munandi større fyrimunir við at sigla við hesum útlendsku bátum og undir sjómansskatti.

   Úrslitið er ofta tað, at tað er trupult at fáa manning til tey føroysku skipini.

2. Hin bólkurin, fiskimenn, hava altíð eina ógvuliga ójavna ársinntøku ár um ár. Skatturin av einari stórinntøku vunnin árið frammanundan, kann ofta verða tungur at gjalda árið eftir av einari munandi minni ársinntøku.

   Tí er tað í dag ikki óvanligt, at menn fara uttanlands at sigla í nakrar mánaðar fyri at sleppa undan skattinum. Var ein sjómansskattur - - kelduskattur — í gildi, hevði hetta verið óneyðugt.

(F.L. J. nr. 430-6-13).

Sjálvandi kostar hetta nakað í umsiting, men tað kostar samfelagnum ikki so lítið, at menn við góðum inntøkum sleppa frá at gjalda skatt, um teir bert fara uttanlands nakrar mánaðar, umfram at teirra forbrúk verður lagt uttanlands. Hesi smildarráð kosta samfelagnum væl av peningi, og sær tað út, sum hetta vindur uppá seg.

Høvdu okkara fiskimenn ein sjómansskatt, komu hesar inntøkur, sum nú sleppa undan skatti, at verið samfelagnum til góðar. Um okkara sjófólk, fiskimenn og teir í farmasigling við slíkum sjómansskatti komu at fáa ein lítlan fyrimun, so var einki forgjørt í hesum. Sjógvurin er okkara høvuðsvinna, og hevur ein vinna ongan atdrátt, so stirðnar hon.

Sum heild hevur okkara sjófólk sum slættur verið teir, sum hava notið minst av samfelagsligum fyrimunum og vælvild.

Ein sjómansskattur hevði her verið slættinum til stóran bata.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í Skattanevndina, sum tann 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt málið fyri løgtingið og við 1. viðgerð varð tað beint í skattanevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og ein **meiriluti** (Hilmar Beck, Poul Jacob Olsen og Agnar Nielsen) hevur fingið upplýst, at ein serlig nevnd arbeiðir við skattamálunn fyri landsstýrið og mælir ti til, at hetta málið verður sent landsstýrinum til nærri kanningar, og setur soleiðis fram uppskot til samtyktar í staðin fyri uppskot tjóðveldisfloksins.

Uppskot
til
samtyktar

Málið verður sent landsstýrinum til nærri kanningar.

Minnilutin (Finnbogi Isaksen og Jógvan Sundstein) mælir til at samtykkja uppskotið frá tjóðveldisflokkinum.

2. viðgerð 26. mars.
Uppskotið til samtyktar fall 10 - 0.
Uppskot frá meiriluta í nevndini samtykt 18- -0.
Málið sostatt avgreitt.

80. Yvirtøka av sosialu umsitingini

Ár 1974, 15. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

1. Landsstýrið yvirtekur fyrisitingina av sosialu málunum frá 1. apríl 1975.
2. Landsstýrið tekur upp samráðingar við ríkisstýrið um býtið av fyrisitingarútreiðslunum.

Viðmerkingar:

Eftir § 2 í heimastýrislógini sbr. lista A, pkt. 5, hoyra málsøkini «almenn forsorg» og «serforsorg» til tey øki, sum prinsipielt verða at rokna sum føroysk sermál.

Um hesi øki sigur § 2 viðari: «Føroyska heimastýrið (løgting og landsstýri) kann gera av, at øll hesi mál og málsøki ella nøkur av teimum verða beinan vegin at flyta til heimastýrið við teirri fylgju, at heimastýrið tekur uppá seg tær útreiðslur, ið fylgja við teimum. Við sonnu fylgju kann heimastýrið seinni gera av, at mál og málsøki, sum ikki beinan vegin verða yvirtikin, skulu verða flutt til heimastýrið. ....»

Sosiala málsøkið er ongantíð flutt til heimastýrið og er sostatt framvegis felagsmál, og er tað ikki ætlanin í hesum umfari at yvirtaka økið.

Í § 9 í heimastýrislógini er hendla heimild til yvirtøku av umsitingini av felagsmálum:

«Eftir samráðing verður sonja gjørd um, í hvørjum føri og í hvørjari vídd tað er møguligt innanfyri øki, sum eru felagsmál, at geva heimastýrinum í hendi at áseta nærri reglur fyri teimum serligu føroysku viðurskiftunum og taka við umsitaraini av avvarðandi økjum.»

Innleiðandi samráðingar hava verið við ríkisstýrið um yvirtøku av fyrisitingini av sosialu málunum og í hesum sambandi um býti av fyrisitingarútreiðslunum. Ríkisumboðið situr fyri umsitingini. Her hevur verið umhugsað at býta soleiðis, at útreiðslutalið tann 1. apríl 1975 verður býtt í helvt millum ríkisstýrið og heimastýrið, og at partur ríkisstýrisins av fyrisitingarútreiðslunum tann 1. apríl 1975 síðani verður óbroyttur meðan heimastýrið altrat sínum parti av fyrisitingarútreiðslunum tann 1. apríl 1975 átekur sær komandi meirútreiðslur av fyrisitingini.

(F.L. J. nr. 1010-9).

Ríkisstýrið er í prinsippinum samt um, at yvirtøkan av sosialu umsitingini verður framd sum frammanfyri tilskilað.

Víst verður í hesum sambandi til tær samráðingar, sum fóru fram, tá ið Anker Jørgensen, forsetisráðharri, var og vitjaði í Føroyum í 1973.

Fyrisitingarútreiðslurnar tilsamans verða mettar til kr. 900.950,00 í fíggjarárinum 1975/76.

Landsstýrið heldur tað vera rímuligt og náttúrligt at henda umsiting, sum hevur viðskifti við so nógvar føroyingar, verður løgd undir landsumsitingina, sum í flestu førum kortini er við í myndini og avgerðunum.

Um yvirtøkan av sosialu fyrisitingini verður framd, umbugsar landsstýrið at skipa fyri, at ein partur av fyrisitingini kemur at vera úti um landið, soleiðis at fólk ikki, sum nú er, noyðast at fara til Havnar ella til nøkur fá størri pláss fyri at fáa vegleiðing, um teimum tørvar ráð og stuðul.

1. viðgerð 18. mars, uttan um dagsskránna, og málið beint í sosialu nevndina, sum tann 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri løgtingið og varð við fyrstu viðgerð beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta. **Meirilutin** (Jógvan Durhuus, Jógvan Sundstein, Poul Jacob Olsen og Hilmar Beck) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Minnilutin (Johs. M. Olsen) førir fram, at síðani hetta mál var fyri í tinginum (løgtingsmál nr. 17/1970 (vetrarting) er einki nýtt komið fram í málinum. Tá førdi ein meiriluti (Johannes Olsen, Poul J. Olsen og Hilmar Beck) fram, at umsitingin higartil hevur verið rakt til fulnar av hesum máli, ið er felagsmál, og er tað tí ikki beint, at nøkur broyting verður gjørd umsitingini viðvíkjandi.

Minnilutin setur einki uppskot fram.

2. viðgerð 26. mars.

Uppskotið frá landsstýrinum samtykt við navnakalli við tað at 18 atkvøddu ja, 2 nei og 6 atkvøddu ikki.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:

Ja **atkvøddu:** S. Hansen, M. Joensen, H. Kass, J. Sundstein, S. Skaale, Demmus Hentze, K. Wang, H. Djurhuus, H. Beck, J. P. Thomassen, Poul J. Olsen, Kj. Mohr, H. Hansen, H. við Høgadalsá, F. Isaksen, E. Patursson, J. Durhuus, Ove Mikkelsen = 18.

Nei **atkvøddu:** Tr. Samuelsen, A. Djurhuus = 2.

Atkvøddu ikki: Agnar Nielsen, Leon Joensen, Jógvan Olsen, T. Olsen, J. Fr. Øregaard = 6.

Málið sostatt avgreitt.
(Tingmál nr. 90/1973 sostatt burturdottið).

---

81. Skamtan av øli

Á r 1974, 14. mars, legði Agnar Nielsen, løgtingsmaður, fram

Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skamtan av øli.

§ 1.

I. Í løgtingslóg nr. 10 frá 28. mars 1949 um skamtan av rúsdrekka við seinni broyting verður § 1, stk. 1, orðað soleiðis: «Ongum er loyvt at innflyta meira enn 9 litrar av spiritus og 33,75 litrar av øli, sum hevur yvir 4 vektprocent av alkoholi í sær, um fjórðingsárið.

II. Í § 2, stk. 1, verður skoytt uppí: «og øli».

ændring i lagtingslov om spiritusrationering.

§ 1.

I. I lagtingslov nr. 10 af 28. marts 1949 om spiritusrationering med senere ændring affattes § 1, stk. 1, således: «Ingen person har ret til at indforskrive mere end 9 liter spiritus og 33,75 liter øl indeholdende over 4 vægtprocent alkohol, i kvartalet.

II. I § 2, stk. 1, tilføjes «og øl».

§ 2.

Hendan lóg kemur í gildi 1. juli 1974.

§ 2.

Denne lov træder i kraft den 1. juli 1974.

Viðmerkingar:

Innflutningurin av rúsdrekka er nógv vaksin síðstu árini, tað er serliga innflutningurin av teimum sterkaru ølsløgunum, sum hevur tikið seg fram, meðan innflutningurin av spiritus og víni so at siga einki er økt**ur**. Hesin nógv vaksandi innflutningur av sterkum øli, sum tykist vera til stóran skaða fyri samfelagið er ongatíð viðgjørdur í rúsdrekkaskipan okkara. Galdandi lóggáva er eingin forboðslóg, hon skerjir ikki persónliga frælsið til keyp av rúsdrekka út yvir tað, sum er hildið at vera rímiligt og sum ein verja fyri samfelagið sum heild. Tað kann tí hugsast at vera hóskandi at koma við einum uppiskoyti til galdandi lóg, hvar tað sterka ølið eisini kemur inn undir eina skamtan fyri at avhjálpa tí yvirforbrúki, sum fer fram á hesum øki.

Á Føroya løgtingi, 13. mars 1974.

Agnar Nielsen, Signar Hansen, Hákun Djurhuus,

J. Fr. Øregaard.

1. viðgerð 18. mars og málið beint í lógarnevndina, sum tann 26. mars legði fram soljóðandi

Álit

Løgtingsmenninir Signar Hansen, Hákun Djurhuus, Agnar Nielsen og J. Fr. Øregaard hava lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skamtan av øli.

Málið varð framlagt 14. mars 1974 og 1. viðgerð fór fram 18. mars, hvar málið varð beint til viðgerð í lógarnevndini.

Uppskotsstillararnir føra millum annað fram í viðmerkingunum til lógaruppskotið, at tað serliga er innflutningurin av teimum sterkaru ølsløgunum, sum er vaksin nógv tey seinastu árini og hevur hesin nógv vaksandi innflutningur verið til stóran skaða fyri samfelagið.

Tað verður tí hildið neyðugt, at tað sterka ølið, t.v.s. øl, sum hevur yvir 4 vektprocent alkohol í sær, verður skamtað.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur undir viðgerðini býtt seg sundur í ein meiriluta og 2 minnilutar.

Meirilutin (Signar Hansen, Poul J. Olsen og Trygve Samuelsen) mælir tinginum til at samtykkja uppskotið frá nevndu uppskotsstillarum.

Minnilutin (Martin Joensen) førir fram, at tað kann ikki vera beint at gera nakrar broytingar í rúsdrekkalógunum so stutta tíð aftaná at broytingaruppskot til hesar hava verið úti til eina fólkaatkvøðu, sum týðiliga og klárt vildi uppihalda verandi skipan.

Hann heldur tað tí vera ódemokratiskt so skjótt aftaná fólkaatkvøðuna at koma fram við einum lógaruppskoti, sum gongur beinleiðis ímóti fólkaviljanum.

Eisini vísir hann til, at í tí lógaruppskotinum, sum fall við fólkaatkvøðuna var forboð fyri innflutningi av teimum sterkastu ølsløgunum, meðan í staðin skuldi verða loyvt at framleiða øl í Føroyum, sum í styrki svaraði til tað sokallaða «gullølið».

Men tá tað nú sær út til, at menn leggja annan týdning í fólkaatkvøðuna og millum annað í viðmerkingunum í hesum máli vísa til, at teir vilja skamta tað sterka ølið, tí tað tykist at vera til stóran skaða fyri samfelagið, vil hann út frá hesum teirra sjónarmiði mæla til heilt at banna innflutningi av teimum sterkastu ølsløgunum

Broytingaruppskot

Í løgtingslóg nr. 10 frá 28. mars 1949 um skamtan av rúsdrekka við seinni broyting verður í § 1 aftaná 1. punktum sett:

«Tó er ongum loyvt at innflyta ella framleiða øl, sum í sær hevur meira enn 4,6 vektprocent av alkoholi».

«Dog har ingen person ret til at indforskrive eller at fremstille øl, der indeholder over 4,6 vægtprocent alkohol».

Minnilutin (Denmus Hentze) setur onki uppskot fram.

2. viðgerð 28. mars.

Uppskot frá minnilutanum í nevndini (Martin Joensen) fall 8—0.

Lógaruppskotið fall við navnakalli við tað at bert 10 atkvøddu ja, 12 atkvøddu ikki og 2 vóru burturstaddir.

Atkvøðugreiðslan fór soleiðis fram:

Ja atkvøddu: Agnar Nielsen, Signar Hansen, Hákun Djurhuus, Tr. Samuelsen, Leon Joensen, Jógvan Olsen, Johs. Olsen, Hilmar Bech, Poul J. Olsen, J. Fr. Øregaard = 10.

Atkvøddu ikki: Martin Joensen, Hilmar Kass, Sigfr. Skaale, Demmus Hentze, Knút Wang, Andreas Djurhuus, J. P. Thomassen, T. Olsen, Kj. Mohr, H. Hansen, H. við Høgadalsá, E. Patursson, J. Durhuus, Ove Mikkelsen = 14.

Burturstaddir: J. Durhuus, F. Isaksen = 2.

Málið sostatt burturfallið.

---

82. Føroyar og EEC

Ar 1974, 14. mars, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið samtykkir, at tiknar verða upp samráðingar við donsku ríkisstjórnina um, hvussu fylgjandi málsøki heilt verða løgd undir føroyskt **lóggávu- og umsitingarvald:**

1. Uttanríkismál, har í millum fiskimarksmál og havbotnurin.
2. **Búskaparmál,** har í millum undirgrundin, allir lánigrunnar, gjaldoyris-, peninga- og bankamál.

(F.L. J. nr. 1198-2/74).

3. Sosial mál.
4. Skúlamál.

Løgtingið velur 4-manna nevnd til at føra hesar samráðingar.
Úrslitið av samráðingunum verður lagt fyri løgtingið.

Greinargerð:

Øll hesi málsøki eru sum er annað hvørt rein donsk ríkismál ella sokallað felagsmál. Aftaná, at Danmark er vorðin limur í EEC-samgonguni, er avgerðarrætturin í summum av hesum málum longu fyri ein part lagdur undir myndugleikar EEC's, meðan miðað verður móti EEC-avgerðarvaldi í øðrum.

Hesin veruleiki samrímist ikki við einmælta samtykt løgtingsins fyrr í hesi tingsetu, sum var tann heilt at halda Føroyar uttan fyri EEC-samgonguna og bert at miða móti handilssáttmála við henda felagsskap.

Skal henda samtykt hava fulla meining, verða vit at fáa í okkara hendur hesi nevndu málsøki, t.e. tey málsøki, sum við limaskapi Danmarkar annað hvørt longu fyri ein part eru løgd undir vald EEC's ella koma at verða løgd har undir.

Á Føroya løgtingi, hin 12. mars 1974.

1. viðgerð 18. mars og málið beint í marknaðarnevndina, sum tann 3. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum. Við fyrstu viðgerð, sum fór fram 18. mars, varð málið beint í marknaðarnevndina.

Marknaðarnevndin hevur viðgjørt málið og býtt seg í fýra minnilutar.

Minnilutin (J. Fr. Øregaard, P. J. Olsen og Andrias Djurhuus, sum møtti fyri Trygva Samuelsen) setur onki uppskot í hesum máli.

Minnilutin (Hákun Djurhuus og Hilmra Kass) vísir á fylgjandi einmælta samtykt á Føroya løgtingi í hesi tingsetu í løgtingsmáli nr. 44/1973: Felagsmarknaðarmálið, har sagt verður undir pkt. 1:

Landsstýrið boðar ríkisstjórnini frá, at heimastýrið ikki kann mæla til føroyska luttøku í EF.

Støðan er sostatt hon, at vit ikki eru limir í EF, og at heimastýrið ikki kann mæla til føroyska luttøku í EF. Vit hava við øðrum orðum onki við

E.E.C. at gera, tá fær samráðingar um ein handilssáttmála eru undantiknar, ið førdar verða í løtuni.

Samhæri heimastýrislógina kann ongin donsk lóggáva tryslast inn á okkum móti okkara vilja hvørki í skúlunum, sosialmálum ella búskaparmálum, og viðv. uttanríkismálum fyriliggur meiralulasamtykt á Føroya løgtingi um broyting í § 8, stk. 3 og 4 í stýrislógini, ið sigur:

«I anliggender, der udelukkende vedrører Færøerne, fører de færøske myndigheder forhandlinger og slutter aftale med udlandet.

Hvor det drejer sig om anliggender, der iøvrigt vedrører Færøerne, har de færøske myndigheder ret til at lade sig repræsentere, når rigets myndigheder fører forhandlinger og slutter aftaler med udlandet.»

Samsvarandi hesum sjónarmiðum setur minnilutin onki uppskot fram í hesum máli.

Minnilutin (Erlendur Patursson) mælir til at samtykkja uppskotið.

4. apríl var framlagt broytingaruppskot frá E. Patursson soljóðandi

Skoytt verður upp í uppskot tjóðveldisflokksins:

«Samstundis áleggur løgtingið landsstýrinum at starvast fyri at vinna Føroyum 200 fjórðinga fiskimark á havrættarráðstevnu Sameindu tjóða».

Á Føroya løgtingi, 4. apríl 1974.

Erlendur Patursson.

2. viðgerð 6. apríl.

Broytingaruppskot frá E. Patursson fall 6—0.
Uppskotið pkt. 1-2-3-4 fall 6—0.
Alt uppskotið sostatt burturfallið.

83. Skattafrádráttur fiskimanna

Ár 1974, 14. mars, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt.

§ 1.

9. § í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verður 7) orðað soleiðis:

7) hjá mynstraðum fiskimonnum, sum fáa inntøku sum løn og/ella part í veiði, her undir minstuløn og prisviðbót 800 kr. hvønn siglingarmánaða.

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur beinanvegin í gildi.

Greinargerð:

Við nýggju skattalógini frá 2. juli 1963 varð fyrstu ferð loyvdur serstakur skattalætti fyri mynstraðar fiskimenn.

Henda skipan var fiskimonnum tá til almiklan bata, men sum árini eru liðin, hevur tað víst seg, at hesin bati røkkur alt ov skamt. Tjóðveldisflokkurin hevur áður reist málið um at fáa hin skattafría frádrátt fiskimanna hækkaðan, men hevur tað málið ikki fingið fruma.

Tjóðveldisflokkurin reisir nú aftur hetla mál og nú við tí uppskoti, at hin skattafrí frádráttur fiskimanna verður settur til 800 kr. hvønn siglingarmánað.

(F.L. J. nr. 430-12-27).

1. viðgerð 19. mars og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 21. mars legði fram soljóðandi

Álit

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt málið fyri løgtingið, og við 1. viðgerð varð tað beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin heldur, at hetta er eitt mál sum hoyrir heima í skattanevndini, og mælir sostatt til at málið verður viðgjørt í hesi nevnd.

Uppskot
til
samtyktar.

Málið verður beint til skattanevndina.

2. viðgerð 25. mars.

Uppskotið um at beina málið í skattanevndina samtykt 18--0.
1. apríl legði skattanevndin fram soljóðandi

Álit

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt málið fyri løgtingið, og við 1. viðgerð varð tað beint í fiskivinnunevndina, sum hevur skotið upp at beina tað í skattanevndina, ið síðani hevur viðgjørt málið.

Meirilutin í nevndini (Hilmar Beck, P. J. Olsen, Agnar Nielsen og Jógvan Sundstein) førir fram:

Í skattalógini er tann regla galdandi, at fiskimenn, mynstraðir við føroyskum fiskiskipum og sjómenn, ið sigla við føroyskum farmaskipum uttanlands ella millum Føroyar og útland, hava rætt til at draga 125 - 200 kr. frá inntøkuni fyri hvønn siglingarmánaða, alt eftir sum inntøkan er.

Hetta uppskotið ber í sær, at frádrátturin verður settur til 800 kr. fyri hvønn mánaða, tó ikki fyri teir sum sigla við farmaskipum, og við tað, at sami flokkur fyri fánm døgum síðani legði uppskot fyri tingið um at gera eins skattingarreglur til at galda omanfyri nevndu stættir, heldur meirilutin at hetta málið er lítið umhugsað, og skal annars skoyla uppí, at frádrátturin, sum fiski- og farmasiglingsmenn fáa, bleiv fyri tveimum mánaðum síðani hækkaður eftir ynski frá Føroya Fiskimannafelag og setti Tjóðveldisflokkurin onki uppskot fram um nakra broyting.

Sostatt setir meirilutin onki uppskot fram.

Jógvan Sundslein vísir annars til fyrr framløgd uppskot frá fólkaflokkinum um øktan frádrátt fyri langfarafiskimenn.

Minnihutin (Finnbogi Isaksen) mælir til at samtykkja uppskotið frá tjóðveldisflokkinum.

3. apríl var nýggj 2. viðgerð.
Gr. 1 í uppskotinum fall 6—0.
Alt málið sostatt burturfallið.

---

84. Fiskimálaráð

Ár 1974, 14. mars, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um fiskimálaráð.

§ 1.

Sett verður á stovn fiskimálaráð við ti starvsøki at gera uppskot og tilmæli um ábøtur í fiskiveiði, í fiskavirðing og fiskaídnaði, í fiskasølu og í yrkislærdómi í hesum vinnulívsgreinum, og til yvirhøvur at vera landsins myndugleikum og øðrum avvarðandi til leiðbeiningar og ráðleggingar viðvikjandi fiskivinnumálum landsins í heild og í einstakum lutum.

Uppskot og tilmæli fiskimálaráðsins verða gjørd almanna-

(F.L. J. nr. 1511-9).

kunnug so hvørt sum ráðið annars heldur vera tørvur á.

Um starv sítt gevur ráðið landsstýrið og løgtingi árliga frágreiðing.

§ 2.

Viðvíkjandi fiskiveiði skal áherðsla verða løgd á, at í landinum er altíð nóg stórur, nútíðarhóskandi og væl útgjørdur veiðifloti, bæði fyri fjar- og nærleiðir, og at rakstur flotans verður slíkur, at sum mest fæst burtur úr til før og manning.

§ 3.

Viðvíkjandi fiskavirking og fiskaídnaði skal áherðsla verða løgd á at fáa bygt upp og skipað fyri slíkum fiskavirkjum í landinum, ið fáa sum mest og fjølbroyttast virði burtur úr fiskinum, og at sum best verður skipað fyri rakstri teirra.

§ 4.

Viðvíkjandi fiskasølu skal áherðsla verða løgd á at vinna fiski og fiskavørum betri prísir og betri og tryggari marknaðir.

§ 5.

Viðvíkjandi yrkislærdómi skal áherðsla verða løgd á at bøla um lærdóm alra teirra, sum starvast í fiskivinnu, annað hvørt hetta er á sjógvi ella landi.

§ 6.

Ráðið hevur heimild til at krevja sær til handa — frá almennum og privatum — allar upplýsingar, sum tað heldur tørva til at útinna starv sítt, har undir roknskapartilfar,

og at boðsenda monnum til samráðingar.

Tagnarskylda er viðvíkjandi nøvnum á monnum, virkjum og feløgum.

§ 7.

Í fiskimálaráðnum sita 12 limir, ið landsstýrið skipar eftir tilnevning frá hesum feløgum og stovnum, soleiðis at

Reiðarafelagið	tilnevnir	1	lim
Fiskimannafelagið	„	1	„
Skiparafelaigð	„	1	„
Maskinistfelagið	„	1	„
Motorpassarafelagið	„	1	„
Fiskavirkiseigarar	„	1	„
Fiskasølan	„	1	„
Útflutningssamtøkan	„	1	„
Sildasølan	„	1	„
Útróðrarfeløgini	„	1	„
Sjómansskúli Føroya	„	1	„
Sjómanssk. í Klaksvík	„	1	„

§ 8.

Ráðið skipar seg sjálvt við formanni og skrivara. Ráðið hevur fund so ofta sum formaður ella 2 ráðslimir halda vera tørvur á, men tó ikki sjáldnari enn 2 ferðir árliga.

§ 9.

Ráðnum er heimilt at taka sær tørvandi starvsfólk og serfrøðingahjálp.

§ 10.

Ráðið velur úr sínum hópi 3-manna starvsstjórn til at røkja og skipa fyri dagliga starvið ráðsins.

§ 11.

Allar útreiðslur, ið standast av

starvi ráðsins, verða goldnar úr landskassanum.

§ 12.

Ráðið byrjar starv sítt ikki seinni enn 1. august 1974.

§ 13.

Landsstýrið setur reglugerð við nærri fyrimælum um starv ráðsins.

§ 14.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Greinargerð:

Tjóðveldisflokkurin hevur áður lagt hetta mál fram, men hevur tað ikki fingið frama. Tað má haldast, at tørvurin fyri at skipa tað fiskimálaráð, sum her verður skotið upp at skipa, hevur onga tíð verið so stórur sum nú.

Í aðrar máta verður vist til greinargerð tjóðveldisflokksins í sama máli í tingsetuni 1970 (Løgtingstíðindi 1970, tingmál nr. 24, bls. 170-75).

1. viðgerð 18. mars og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 21. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta málið varð lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum og varð við 1. viðgerð beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið.

Meirilutin (Poul J. Olsen, Tórolvur M. Olsen, Hákun Djurhuus og Leon Joensen) vísir til álit í løgtingsmáli nr. 24/1970 (vetrarting): Fiskimálaráð, og selur onki uppskot fram.

Minnilutin (Ove Mikkelsen) mælir til at samtykkja uppskot Tjóðveldisfloksins.

2. viðgerð 26. mars.

gr. 1 í uppskotinum fall 6—0.

Alt uppskotið sostatt burturfallið.

85. Yvirvaldsrættur Føroya yvir landgrunninum kring Føroyar og Føroya banka

Ár 1974, 14. mars, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot til

løgtingslóg um yvirvaldsrætt Føroya yvir landgrunninum kring Føroyar og Føroya banka.

§ 1.

Føroyar eiga fullan og óskerdan yvirvaldsrætt yvir landgrunni Føroya og yvir Føroya banka í øllum tí, sum viðvikir rannsóknum á ríkidømi og framleiðslu og nýtslu tess har. Øll slík ríkidømi eru ogn Føroya, og skulu føroyskar lógir einsamallar gilda teimum viðvíkjandi.

§ 2.

Fyrimælini í § 1 rokka øll tey jarðevni, fast, flótandi og loftkend, sum finnast á føroyska landgrunninum og á Føroya banka og annars øll onnur ríkidømi har, hæði livrunnin og ólívrunnin.

§ 3.

Føroyski landgrunnurin samhært hesi lóg roknast at rokka so langt til havs, sum gjørligt verður at nýta hesi ríkidømi. Á tilsvarandi hátt verður øki Føroya banki at rokna.

(F.L. J. nr. 1201-6).

§ 4.

Landsstýrið setir í reglugerð nærri reglur sambært hesi lóg um nevndu ríkidømi og nýtslu teirra, um avmarkingar á økjum landgrunsins og Føroya banka og annars um onnur viðurskifti sum tørva.

§ 5.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Greinagerð:

Tjóðveldisflokkurin hevur áður lagt hetta mál fyri tingið, bæði í tingsetuni 1970 og í tingsetuni 1971, men hvørgu ferð fekk tað frama.

Síðani er tað hent, at upp aftur størri líkindi sýnast benda á, at olja finnst undir havbotninum kring landið, og er tað tí upp aftur meir átroðkandi, at vit Føroyingar vissa okkum yvirvaldsrættin til hetta ríkidømi.

Í aðrar mátar verður vist til greinagerð tjóðveldisflokksins í sama máli í tingsetuni 1970 (Løgtingstíðindi 1970, bls. 163-69) og í tingsetuni 1971 (løgtingsmál nr. 51).

1. viðgerð 18. mars og málið beint í marknaðarnevndina, sum hin 1. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fyri tingið av tjóðveldisflokkinum og var tað við fyrstu viðgerð, sum fór fram 18. mars, beint í marknaðarnevndina, sum hevur viðgjørt tað.

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt hetta sama mál fyri tingið í undanfarnum tingsetum, men málið er fallið.

Í hesi tingsetuni hevur fólkaflokkurin lagt mál fyri tingið um sama evni, løgtingsmál nr. 11/1973: Føroya undirgrund og grundin undir havbotninum kring Føroya. Málið er viðgjørt í marknaðarnevndini.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meirihluta og ein minnihluta.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, Poul Jacob Olsen, Flákum Djurhuus, Kjartan Mohr, Hilmar Kass og Andreas Djurhuus, sum møtti fyri Trygva Samuelsen) vísir til sína støðu í løgtingsmáli nr. 11/1973 og setur eingi uppskot í hesum máli.

Minnilutin (Erlendur Patursson) mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 3. apríl (sí annars nr. **11**/1973).
Atkvøðugreiðslan 5. apríl. Gr. 1 í uppskotinum fall 5—0.
Alt málið so statt burturfallið.

---

86. Broyting í tolllógini

Ár 1974, 15. mars, legði Petur F. Christiansen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjøld v.m., verða gjørdar hesar broytingar:

1. ad 3. Drykkjuvørur.

Øl: verður orðað soleiðis:

3.11 Øl, sum verður innflutt úr Danmark og sum í lóg nr. 111 frá 1. apríl 1922 § 2, sbr. lóg nr. 221 frá 1. mai 1923 § 1 er nevnt:

Skattaklassi I	.....	1 lítur kr. 2,50
— A	.....	1 lítur kr. 4,25
— B	.....	1 lítur kr. 6,00

3.12 Annað øl

frá 2,25 - 3,7 vektprosent alkohol	.....	1 lítur kr. 2,50
frá 3,7 - 4,6 vektprocent alkohol	.....	1 lítur kr. 4,25
yvir 4,6 vektprocent alkohol	.....	1 lítur kr. 6,00

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

(Ll. 29/1974. — F.L. Jr. nr. 403-6-26).

Forslag
til
lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgift m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer om indførselsafgifter m.v., foretages følgende ændringer:

1. ad 3. Drikkevarer.

Øl: affattes sledes:

3.11	Øl, der indføres fra Danmark og som i lov nr. 111 af 1. april 1922 § 2, jfr. lov nr. 221 af 1. maj 1923 § 1 er benævnet:		
	Skatteklasse 1	1 liter	kr. 2,50
	— A	1 liter	kr. 4,25
	— B	1 liter	kr. 6,00
3.12	Andel øl		
	fra 2,25 - 3,7 vægtprocent alkohol	1 liter	kr. 2,50
	fra 3,7 - 4,6 vægtprocent alkohol	1 liter	kr. 4,25
	over 4,6 vægtprocent alkohol	1 liter	kr. 6,00

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Hin 21. mars 1972 legði landsstýrið fyri tingið løgtingsmál nr. 84/1971: Broyting í tolllógini. Ein partur av hesum máli var uppskot um at broyta tollin á øli soleiðis at tollurin á veikum øli varð lækkaður og tollurin á sterkum øli hækkaður.

Fíggjarnevndin, sum hevði málið til viðgerðar førdi fram, at hon hevði hugsað sær at sett fram uppskot um loyvi at bryggja sterkt øl í Føroyum og at sett forboð fyri innflutningi og framleiðslu av sterkari øli enn skattaklassa A, men at hon lat málið liggja, av tí at uppskot til nýggja rúsdrekkalóg fór at verða lagt fyri tingið. Ein nevndarlimur helt, at tá nýggj rúsdrekkalóggáva skal gerast, átti spurningurin um broyting í øltollinum at steðga.

Vísandi til viðmerkingarnar mælti nevndin til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum við ymiskum broytingum.

Við 2. viðgerð í tinginum fall uppskotið um broyting í øltollinum við tað, at bert 12 tingmenn atkvøddu fyri.

Síðani er hent tað, at tað sum fíggjarnevndin førdi fram um loyvi at bryggja sterkt øl í Føroyum og forboð fyri innflutningi og framleiðslu

av sterkari øli enn skattaklassa A, sum partur í eini nýggjari rúsdrekkalóg, varð samtykt av tinginum, men fell við fólkaatkvøðuna hin 8. november 1973.

Landsstýrið er framvegis av teirri hugsan, at tað er ikki hóskandi at innflutningsgjaldið er hitt sama fyri øl við so ymiskum alkoholinnihaldi sum frá 3,2 til 6,4 vektprocent, og tí verður skotið upp, at innflutningsgjaldið á tí veikasta av tí sterka ølinum verður lækkað við 50 oyru pr. litur, meðan gjaldið fyri klassa A verður sett til 4,25 pr. litur, ein hækking uppá 1,25 kr., og gjaldið fyri klassa B verður sett til 6 kr. pr. litur, ein hækking uppá 3 kr.

Ølnýtslan í Føroyum

1000 l	Veikt øl			Sterkt øl				Tils.
	føroy.	innfl.	tils.	kl. 1	kl. A	kl. B	Tils.	
1971	720	140	860	57	234	615	906	1.766
1972	771	104	875	83	275	768	1126	2.001
1973	956	38	994	69	307	662	1039	2.032

	1971	1972	1973
Veikt øl	48,7 %	43,7 %	48,9 %
Kl. 1	3,2 %	4,2 %	3,4 %
Kl. A.	13,3 %	13,7 %	15,1 %
Kl. B.	34,8 %	38,4 %	32,6 %
	100,0 %	100,0 %	100,0 %

1. viðgerð 20. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum 28. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri løgtingið og var við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í briggjar minnilutar.

Minnilutin (J. Fr. Øregaard, Trygve Samuelsen og Andreas Djurhuus) mælir til at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

Minnilutin (Hanus við Høgadalsá og Finnhogi Isaksen) vil greiða frá sínari støðu í tinginum.

Minnilutin (Knút Wang og Hilmar Kass) førir fram:

Í viðmerkingunum frá landsstýrinum verður skrivað, at tað er ikki hóskandi, at innflutningsgjaldið er hitt sama fyri øl við so ymiskum alkoholinnihaldi sum frá 3,2 til 6,4 vektprocent, meðan eitki verður nevnt um, at hetta er ein neyðug inntøkulóg til landskassan.

Tað er tí løgið, at tær broytingar, ið mælt verður til í innflutningsgjaldinum, eru ein lítil lækking í innflutningsgjaldið á tí øli, sum liggur millum 2,25 og 3,7 vektprocent alkohol, meðan innflutningsgjaldið á sterkari øli verður hækkað nógv, á sterkasta ølinum tvífaldað.

Tá landsstýrið als eitki førir fram, um at tað er neyðugt við nýggjum inntøkulógum fyri at fáa endarnar at røkka saman, kann minnilutin ikki vera við at leggja meira tollbyrðar á fólk.

Minnilutin er samdur við landsstýrið í tí, at tað er ikki rætt, at øl við so ymiskum alkoholinnihaldi hevur sama innflutningsgjald og mælir til í staðin fyri uppskot landsstýrisins at samtykkja fylgjandi uppskot:

Uppskot
til
løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um innflutningsgjøld v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 11. februar 1950 við seinni broytingum um innflutningsgjøld v.m., verða gjørdar hesar broytingar:

1. **ad 3. Drykkjuvørur.**

Øl: verður orðað soleiðis:

3.11 Øl, sum verður innflutt úr Danmark og sum í lóg nr. 111 frá 1. apríl 11922 § 2, sbr, lóg nr. 221 frá 1. mai 1923 § 1 er nevnt:

Skattaklassi I	.....	1 litur kr. 2,00
— A	.....	1 litur kr. 3,00
— B	.....	1 litur kr. 4,00

3.12 Annað øl

frá 2,25 - 3,7 vektprocent alkohol	.....	1 litur kr. 2,00
frá 3,7 - 4,6 vektprocent alkohol	.....	1 litur kr. 3,00
yvir 4,6 vektprocent alkohol	.....	1 litur kr. 4,00

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

Forslag
til
lagtingslov om ændring i lagtingslov om indførselsafgiftr m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af 11. februar 1950 med senere ændringer om indførselsafgifter m.v., foreslages følgende ændringer:

1. **ad 3. Drikkevarer.**
Øl: affattes således:
3.11 Øl, der indføres fra Danmark og som i lov nr. 111 af 1. april 1922 § 2, jfr. lov nr. 221 af 1. maj 1923 § 1 er benævnet:

Skatteklasse I	.....	1 liter kr. 2,00
— A	.....	1 liter kr. 3,00
— B	.....	1 liter kr. 4,00

3.12 Andet øl

frá 2,25 - 3,7 vægtprocent alkohol	.....	1 liter kr. 2,00
fra 3,7 - 4,6 vægtprocent alkohol	.....	1 liter kr. 3,00
over 4,6 vægtprocent alkohol	.....	1 liter kr. 4,00

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 1. apríl.
Atkvøðugreiðsla 2. apríl.
Uppskot frá minniluta í nevndini fall 9—0.
Lógaruppskotið frá landsstýrinum samtykt 19—0.
Og at fara til 3. viðgerð samt. 19—0.

3. viðgerð 4. apríl.
Uppskotið sum tað var samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 18—0.

87. Minstaløn og skattafríir frádráttir útróðrarmanna

Ár 1974, 14. mars, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Álagt verður stýrinum fyri lønjavningargrunninum at gera uppskot um minstuløn og skattafríar frádráttir útróðrarmanna.

Uppskotið verður lagt fyri tingið skjótast gjørligt.

Greinargerð:

Tað hevur leingi verið áhugamál útróðrarmanna at fáa somu somdir sum mynstraðir fiskimenn, bæði viðvíkjandi minstuløn og viðvíkjandi skattafrádrátti. Tað má haldast vera órímiligt framvegis at uppihalda tí mismuni, sum verður gjørdur í teim sømdum, sum mynstraðir fiskimenn fáa, og teim, sum ómynstraðir útróðrarmenn noyðast at ganga undir.

Til tess at fáa hendla mismun burtur verður mælt til, at stýrinum fyri lønjavningargrunninum verður álagt at gera uppskot um minstuløn og skattafrádrátt útróðrarmanna. Uppskotið eigur at verða lagt fyri tingið skjótast gjørligt.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 20. mars legði fram soljóðandi

Álit

Tjóðveldisflokkurin hevur lagt málið fyri løgtingið, og við 1. viðgerð varð tað beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er vitandi um, at landsstýrið hevur sett nevnd til at viðgera prísstuðnings- og minstulønarskipanina hjá fiskimonnum og eina nevnd at viðgera skattamál.

Tá nú hetta málið snýr seg um minstuløn og skattaviðmerkir hjá útróðrarmonnum, mælir nevndin til, at málið verður beint til landsstýrið sum so letur hesum báðum nevndum hesar spurningar til viðgerðar, og í staðin fyri uppskot Tjóðveldisflokksins er nevndin samd um at sela fram hetta

Uppskot
til
samtyktar

Málið verður sent landsstýrinum.

2. viðgerð 25. mars.
Uppskotið frá nevndini samtykt 21—0.
Upprunauppskotið burturfallið og málið avgreitt.

---

88. Minstaløn verkamanna

Ár 1974, 14. mars, legði Erlendur Patursson, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um minstutímaløn verkamanna.

§ 1.

Minstatímaløn verkamanna og verkakvinna má onga tíð koma niður um 20,84 kr. og handverksmanna og handverkskvinna onga tíð niður um 23,33 kr. — prístalsviðgjørdar.

§ 2.

Henda lóg fær gildi frá 1. mai 1974.

(F.L. J. nr. 1300-9-9).

Greinargerð:

I teim miklu hækkingum, ið fram fóru í almennum lønum — lønum embætismanna, starvsmanna, landsstýrismanna og løgtingsmanna — varð einki hugsað um lønarbala fyri vinnustættirnar uppi á landi, verkamenn, verkakvinna, handverksmenn og handverkskvinnur. Hesar vinnustættir hava verið og eru alsamt fyri stórum órætti í inntøkuhýti samfelagsins, og er mismunurin í lønarlagnum her á landi vorðin alsamt større og større. Samstundis sum aðrar stættir kunna sigast hava hampilig livikor, summar ovurgóð, verða vinnu- og lønarstættirnar hildnar niðri á lægsta stigi.

Í tí «vælferðarsamfelagi» vit sigast liva í, kann hesin mikli misrættur ikki halda fram, men má fáa ein enda.

Sum ein lið í starvinum fyri at fáa henda mismun og henda órætt burtur verður hetta uppskot lagt fram. Uppskotið beinir samtíðis fyri tí órimiligu og órættvisu, at kvinnur sum er fáa lægri løn enn mannfólk.

Núgildandi tímalønir í Tórshavn eru hesar: verkamenn 15,84 kr., handverksmenn 18.33 kr., verkakvinnur 13,96 kr. Uppskotið er, at miðstatímaløn verkamanna og verkakvinna verður 20,84 kr. og handverksmanna og handverkskvinna 23,33 kr. — báðar prístalsviðgjørdar.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í sosialu nevndina, sum 28. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið er lagt fram á ting av tjóðveldisflokkinum 14. mars 1974, kom til viðgerðar 19. mars 1974 og var beint í sosialu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Jógvan Sundstein, Hilmar Beck, Poul J. Olsen og Jolus. M. Olsen) førir fram, út frá tí sjónarmiði, at tá arbeiðsgevara- og løntakarafeløg sínamillum áseta lønarsáttmálar, og vit í løtuni eru miðskeiðis í einum sáltmálaskeiði, og at ongar kreppustøður eru, heldur meirilutin onga orsøk vera til at gjøgnumføra eina slíka lóg.

Minniluti (Jógvan Durlaus) mælir til at samtykkja uppskotið frá tjóðveldisflokkinum.

2. viðgerð 1. apríl.

Gr. 1 fall 6—0.

Alt uppskotið sostatt burturfallið.

89. Kaldbaksvegurin.

Fyrispurningur frá E. Patursson til løgmanns

Fyrispurningurin fráboðaður 14. mars, samtykt at svarast skuldi 15. mars við 20—0.

Fyrispurningurin svaraður og umrøddur 25. mars.

Fyrispurningur
til
løgmans

Í seinastu tingsetu samtykti løgtingið lógaruppskot um vegaprojektering og vegagerð, har sagt verður:

§ 1.

Landsstýrinum verður álagt at lata projektera og gera hesar vegir:

Hvítanes - Sund - Kaldbakshotnur - Kaldbak.

Miðað eigur at verða í móti, at hesar vegagerðir verða lidnar ikki seinni enn 1. august 1975.

§ 2.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka neyðug lán til hesar vegagerðir.

§ 3.

Henda lóg kemur beinan vegin í gildi.

Hetta lógaruppskot fekk gildi við løgtingslóg nr. 34 frá 26. juni 1973.

Av tí at nú fer ár at vera liðið, síðani løgtingið samtykti hetta uppskot og miðast skal tí móti at hava hesar vegagerðir lidnar ikki seinni enn 1. august 1975, verður løgmaður biðin um at upplýsa, hvussu langt málið er komið nú.

Samtíðis verður løgmaður biðin upplýsa, hvørjar ætlanir landsstýrið hevur um at útvega bygdunum Syðradali og Norðadali vegasamband.

Á Føroya løgtingi, 12. mars 1974.

Erlendur Patursson.

Svar uppá fyrispurning frá Erlendi Paturssyni, løgtingsmanni.

Hvat Sunds-Kuldbaksvegnum viðvíkur verður víst til svar uppá spurning Kjartan Mohrs.

Arbeitt hevur verið tey tvey seinastu árini ávegis móti Syðradali av Velbastað. Hetta arbeiði heldur óivað fram íár. Til Norðadals er bøtt um gøtuna, og er í løtuni koyrandi við serligum akførum. Breiðkanir og ábøtur fara framvegis at henda, so henda gøta um fá ár meira hevur veruligt skapi av vegi fyri vanlig akfør.

Tórshavn, tann 25. mars 1974

Atli P. Dam.

---

90. Yvirtøka av umsiting av sosialmálum

Ár 1974, 14. mars, legði Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Føroya løgting áleggur landsstýrinum at taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um at lata Føroya landsstýri taka yvir umsitingina av sosialmálum.

Viðmerkingar:

Shrt. § 9 í Lov om Færøernes hjemmestyre (lov nr. 137 af 23. marts 1948) skal eftir samráðingum avtala gerast um, hvørji øki, ið hoyra heima undir «fællesanliggender» í heimastýrislógini, skulu latast yvir til tað føroyska heimastýri at umsita.

Citerað: «Efter forhandling træffes der aftale om, i hvilke tilfælde og i hvilket omfang det er muligt inden for områder, der henhører under fællesanliggender at overlade det færøske hjemmestyre at give de nærmeste

bestemmelser for de særlige færøske forhold og overtage administrationen af det pågældende område.»

1. viðgerð 18. mars og málið beint í sosialu nevndina, sum tann 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið er av tjóðveldisflokkinum lagt fyri løgtingið og varð við fyrstu viðgerð beint í sosialu nevndina.

Nevndin setur einki uppskot fram í nr. 90/1973, men vísir til sløðu sína í løgtingsmáli nr. 80/1973.

Sí eisini løgtingsmál nr. 80/1973.

2. viðgerð 26. mars. Av tí at uppskot í 80/1973 varð samtykt, fall burtur uppskotið í nr. 90/1973.

---

91. Broyting í manningarlógini

Ár 1974, 15. mars, legði Asbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot

til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um manning av skipum.

§ 1.

1 løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1966 um manning av skipum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, A, verður orðað soleiðis:

lagtingslov om ændringer i lagtingslov ov skibes bemanding.

§ 1.

I lagtingslov nr. 51 af 25. juli 1966 om skibes bemanding foretages følgende ændringer:

1) § 4, A, affattes således:

Fiskifør — Fiskefartøjer

Tons Tons	*Heimasigling* Kystfart	*Atlantshavið n.f. 35° n.br.* Atlanterhavet n.f. 35° n.br.		*Óskerd sigling* Uindskrænket fart
		Eystan fyri 30° v.l. Øst for 30° v.l.	Vestan fyri 30° v.l. Vest for 30° v.l.	
20—50	skipari við dugnaskapsprógvi fyltur 20 ár. Skipper med dueligheds-bevis, fyldt 20 år.	Skipari á 2. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 2. stigi. Skipper af 2. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.		
50 og yvir, men ikki yvir 150	Skipari á 2. stigi. Skipper af 2. grad.		Skipari á 1. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 2. stigi.	Skipari á 1. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 1. stigi.
50 og derover, men ikke over 150			Skipper af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.	Skipper af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 1. grad.
150 og yvir, men ikki yvir 500	Skipari á 2. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 2. stigi.			
150 og derover, men ikke over 500	Skipper af 2. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.			
Yvir 500 Over 500	Skipari á 1. stigi. 2 bestimenn við skiparaprógvi á 2. stigi. Skipper af 2. grad, 2 bedstemænd med skippereksamen af 2. grad.			Skipari á 1. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 1. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 2. stigi. Skipper af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.

2) § 4, B, verður orðað soleiðis:

2) § 4, B, affattes således:

Farmaskip
Fragtskibe

Tons	*Heimasigling*	*Norðhavssigling*	*Óskerd sigling*
Tons	Kystfart	Nordhavssejlads	Uindskrænket fart
20 og yvir, men ikki yvir 150	Skipari á 2. stigi. Bestimaður við dugnaskapsprógvi.	Skipari á 1. stigi. Bestimaður við skipararoynd á 1. stigi.	Skipsførari á 2. stigi. Stýrimaður á 2. stigi. Bestimaður við skipararoynd á 1. stigi.
20 og derover, men ikke over 150	Skipper af 2. grad. Bedstemand med dueligbedsbevis.	Skipper af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 1. grad.	Skibsfører af 2. grad. Styrmand af 2. grad. Bedstemand med skippereksamen af 1. grad.
Yvir 150 men ikki yvir 500	Skipari á 2. stigi. Bestimaður við skipararoynd á 2. stigi.		
Over 150 men ikke over 500	Skipper af 2. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.		
Yvir 500 men ikki yvir 1400	Skipsførari á 2. stigi. Stýrimaður á 2. stigi. Skipari á 1. stigi.	Skipsførari á 2. stigi. 2 stýrimenn á 2. stigi. Skibsfører af 2. grad.	Skipsførari á 1. stigi. Stýrimaður á 1. stigi. Stýrimaður á 2. stigi.
Over 500 men ikke over 1400	Skibsfører af 2. grad. Styrmand af 2. grad. Skipper af 1. grad.	2 styrmænd af 2. grad.	Skibsfører af 1. grad. Styrmand af 1. grad. Styrmand af 2. grad.
Yvir 1400	Skipsførari á 1. stigi.	Stýrimaður á 1. stigi.	2 stýrimenn á 2. stigi.
Over 1400	Skibsfører af 1. grad.	Styrmand af 1. grad.	2 styrmænd af 2. grad.

3) § 4, C, verður orðað soleiðis:
«Á ferðamannaskipum verður navigatiónsmanningin ásett av landsstýrinum aftaná ummæli frá skipasýninum og viðkomandi yrkisfelag».

3) § 4, C, affattes således:
«For passagerskibe fastsættes navigationsbemandingen af landsstyret efter at udtalelse er indhentet fra skibstilsynet og vedkommende fagforening».

4) § 5, A, verður orðað soleiðis:

4) § 5, A, affattes således:

A Fiskiskip
Fiskeskibe

HK HK	Norðhavssigling Nordhavssejlads	Óskerd sigling Uindskrænket fart
220 og yvir men undir 600	Skipsmaskinistur ella motorpassari	2 skipsmaskinistar ella motorpassarar.
220 og over men under 600	Skibsmaskinist eller motorpasser	2 skibsmaskinister eller motorpassere.
600 og yvir men ikki yvir 1000	Skipsmaskinmeistari á 3. stigi. Skipsmaskinistur ella motorpassari.	
600 og over men ikke over 1000	Skibsmaskinmester af 3. grad. Skibsmaskinist eller motorpasser.	
1000 og yvir men ikki yvir 2000	2 skipsmaskinmeistarar á 3. stigi.	
1000 og over men ikke over 2000	2 skibsmaskinmestre af 3. grad.	
Yvir 2000	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi. Skipsmaskinmeistari á 2. stigi. Skipsmaskinmeistari á 3. stigi.	
Over 2000	Skbsmaskinmester af 1. grad. Skibsmaskinmester af 2. grad. Skibsmaskinmester af 3. grad.	

5) § 5, B, verður orðað sem hér segir:

5) § 5, B, affattes således:

B Farmaskip
Fragtskib

HK	Norðhavssigling Nordhavssejlads	Óskerd sigling Uindskrænket fart
220 og yvir men undir 600	Skipsmaskinistur ella motorpassari.	2 skipsmaskinistar ella motorpassarar
220 og over men under 600	Skibsmaskinist eller motorpasser.	2 skibsmaskinister eller motorpasser
600 og yvir men ikki yvir 1000	Skipsmaskinmeistari á 3. stigi. Skipsmaskinistur ella motorpassari.	Skipsmaskinmeistari á 3. stigi Skipsmaskinistur ella motorpassari.
600 og over men ikke over 1000	Skibsmaskinmester af 3. grad. Skibsmaskinist eller motorpasser.	Skibsmaskinmester af 3. grad. Skibsmaskinist eller motorpasser
1000 og yvir men ikki yvir 2000	2 skipsmaskinmeistarar á 3. stigi.	2 skipsmaskinmeistarar á 3. stigi. Skipsmaskinistur ella motorpassari.
1000 og over men ikke over 2000	2 skibsmaskinmestre af 3. grad.	2 skibsmaskinmestre af 3. grad. Skibsmaskinist eller motorpasser.
Yvir 2000	Skipsmaskinmeistari á 1. stigi. Skipsmaskinmeistari á 2. stigi. Skipsmaskinmeistari á 3. stigi.	Skipsmaskinstjóri. Skipsmaskinmeistari á 1. stigi. Skipsmaskinmeistari á 2. stigi Skipsmaskinmeistari á 3. stigi.
Over 2000	Skibsmaskinmester af 1. grad. Skibsmaskinmester af 2. grad. Skibsmaskinmester af 3. grad.	Skibsmaskinchef. Skibsmaskinmester af 1. grad. Skibsmaskinmester af 2. grad. Skibsmaskinmester af 3. grad.

6) § 5, C, verður orðað soleiðis:
«Á ferðamannaskipum verður maskinmannningin ásett av landsstýrinum aftaná umrøði frá skipasýninum og viðkomandi yrkisfelag.»

7) § 11 verður orðað soleiðis:
«At fáa vinnubrøv sum skipari á 2. stigi krevst:
a. at maður aftaná at hava fylt 15 ár hevur gjørt dekstænastu á forum í 24 mánaðir av hesum í minsta lagi 12 mánaðir á skipum yvir 20 tons;
b. at hann hevur staðið skipararoynd á 2. stigi;
c. at hann hevur heimarætt;
d. at hann hevur fylt 20 ár;
e. at hann hevur staðið sýnsroynd fyriskipað av landsstýrinum.»

8) § 12 verður orðað soleiðis:
«At fáa vinnubrøv sum skipari á 1. stigi krevst:
a. at maður eftir at hava fyll 15 ár hevur gjort dekstænastu í 24 mánaðir, av hesum 12 mánaðir á skipum yvir 20 tons uttanfyri heimasigling;
b. at hann hevur staðið skipararoynd á 1. stigi;
c. at hann hevur heimarætt;
d. at hann hevur fylt 20 ár;
e. at hann hevur staðið sýnsroynd fyriskipað av landsstýrinum.»

9) §§ 13 og 14 ganga úr.

10) Í § 15 verður «47 mánaðir» broytt til «36 mánaðir».

6) § 5, C, affattes således:
«For passagerskibe fastsættes maskinbemandingen af landsstyret, efter at udtalelse er indhentet fra skibstilsynet og vedkommende fagforening.»

7) § 11 affattes således:
«Til erhvervelse af bevis som skipper af 2. grad kræves:
a. at vedkommende efter det fyldte 15. år har gjort dækstjeneste i fartøjer i 24 måneder hvoraf mindst 12 måneder i skibe over 20 tons;
b. at han har bestået skippereksamen af 2. grad;
c. at han har indfødsret;
d. at han er fyldt 20 år;
e. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.»

8) § 12 affattes således:
«Til erhvervelse af bevis som skipper af 1. grad kræves:
a. at vedkommende efter det fyldte 15. år har gjort dækstjeneste i 24 måneder heraf 12 måneder i skibe over 20 tons udenfor kystfart;
b. at han har bestået skippereksamen af 1. grad;
c. at han har indfødsret;
d. at han er fyldt 20 år;
e. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.»

9) §§ 13 og 14 udgår.

10) I § 15 ændres «47 måneder» til «36 måneder».

11) Sum nýggj § 21a verður sett:
«At fáa vinnubræv sum motorpassari krevst:
a. at maður hevur staðið motorpassararoynd,
b. at hann hevur gjørt tænastu í minsta lagi 12 mánaðar á skipum yvir 20 tons.»

11) Som ny § 21a indsættes:
«Til erhvervelse af bevis som motorpasser kræves:
a) at vedkommende har bestået motorpassereksamen,
b) at han har gjort tjeneste i mindst 12 måneder i skibe over 20 tons.

12) § 22 verður orðað soleiðis:
«At fáa fáa vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 3. stigi krevst:
a. at maður hevur staðið føroyska maskinroynd ella maskinistroynd eftir lóg frá 1972;
b. at hann hevur gjørt maskintænastu á damp- ella motorskipum í 12 mánaðir.
c. at hann hevur fylt 21 ár.

12) § 22 affattes således:
«Til erhvervelse af bevis som skibsmaskinmester af 3 grad kræves:
a. at vedkommende har bestået færøsk maskineksamen eller maskinisteksamen efter lov af 1972;
b. at han har gjort maskintjeneste i damp- eller motorskibe i 12 måneder.
c. at han er fyldt 21 år.

2. stk. Maskinistar við prógvi eftir lóg frá 1968 kunnu, um teir lúka treytirnar undir b og c og hava staðið eitt góðkent skeið í køliteknikk fáa vinnubræv sum skipsmaskinmeistari á 3. stigi.»

Stk. 2. Maskinister med bevis efter lov af 1968 kan, såfremt de opfylder betingelserne under b og c og har bestået et godkendt kursus i køleteknik, erhverve bevis som skibsmaskinmester af 3. grad.»

§ 2.

Sjóvinnubrøv, fingin áðrenn henda lóg fær gildi, heimlað innihavaranum sama rætt sum higartil.

§ 2.

De forinden ikrafttrædelsen af nærværende lov erhvervede sømæringsbeviser hjemler deres indehavere samme ret som hidtil.

2. stk. Sjóvinnubrøv sum skipari, fingin eftir løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1966 um manning av skipum verða hildin at svara til vinnubrøv sum skipari á 1. stigi eftir hesi lóg.

Stk. 2. De i henhold til lagtingslov nr. 51 af 25. juli 1966 om skibes bemanding erhvervede sømæringsbeviser som skipper anses at svare til de i nærværende lov omhandlede næringsbevis som skipper af 1. grad.

3. stk. Royndir sum skipari eftir lógini frá 1954 við seinni broytingum um sjómannsskúla og sjómannslæru verða javnmettar við royndir sum skipararoynd á 1. stigi.

§ 3.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1975.

Stk. 3. Eksaminer som skipper efter loven fra 1954 med senere ændringer om sømandsskole og sømandslære ligestilles med skippereksamen af 1. grad.

§ 3.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1975.

Viðmerkingar:

Í løgtingsmáli nr. 77/ 1973: Sjómannsskúlalóggávan, er skotið upp, at avtaka heimaskiparaprógvføkinna og í staðin innføra størri prógvtøku, ið kallast skiparaprógv á 2. stigi. Eftir uppskotinum gevur henda prógvtøka rætt til at føra skip undir 150 tons í Norðuratlantshavi eystan fyri 30° vesturlongd. Sum bestimaður gevur prógvið víðari ræsur.

Til minni fiskifør millum 20 og 50 tons, har galdandi lóg krevur at skiparin hevur heimaskiparabræv, verður skotið upp ístaðin bert at krevja dugnaskapsbræv í sigling.

Á ferðamannaskipum verður skotið upp, at navigatiónsmanningin verður ásett fyri hvørt einstakt skip sær, alt eftir hvørjari stødd skipið hevur og hvørja sigling tað skal røkja.

Fyri at sleppa á skiparaskúla skal næmingur hava 24 mánaða siglingstíð og aftaná lokna prógvtøku, skal hann sigla 12 mánaðir aftrat sum bestimaður, fyri at fáa vinnubræv sum skipari. Eftir uppskotinum fær hann skiparabræv beinanvegin aftaná prógvtøkuna, um hann hevur aldur (20 ár).

Viðvíkjandi broytingunum í §§ 5 og 22 viðvíkjandi maskinmonnum er at siga, at maskinistprógvtøkan, sum eftir lógini 1968 tók 6 mánaðir, við lóg frá 1972 er broytt til at taka 12 mánaðir og er tilsvarandi vaksið um innihaldið í lærunni, so hon nokkurnda svarar til føroysku maskinistroyndina, sum samstundis er avtikin. Eftir § 22, stk. 2, kunnu maskinistar við útbúgving eftir 1968-lógini við at taka hut í góðkendum skeiði í koliteknikki, hydraulikki v.m. fáa somu rættindi sum maskinistar við útbúgving eftir 1972-lógini.

Viðvíkjandi støddunum á teimum motorum, ið tey ymisku prógvini geva rætt til at passa, er bert gjørd famu broyting, at maskinistar (eftir 1968-lógini) og motorpassarar fáa loyvi at passa motorar á fiskiskipum upp til 600 hestar í staðin fyri sum nú 500 hestar.

Krøvið til ymiska maskinmanning alt eftir hestakreftunum á hjálpimotorum er strikið, tá tað ikki hevur verið gjørligt hjá myndugleikunum at handheva hesa treyt, tá tað ikki verður skrásett í almenna skipayvirlitinum hvørjar hjálpimaskinur skip hava.

Tá tað hevur vist seg sera torført at fáa maskinfólk við prógvi til fiski-

skipaflotan er farið undir fyrireikingar at seta á stovn skeið fyri motorpassarar, har tað ikki verður nøkur treyt, at ein frammanundan hevur smiðjulæru. Ætlanin er, at hesir motorpassarar skulu fáa rætt til at passa motorar upp til 600 hestar.

1. viðgerð 20. mars og málið beint í lógarnevndina.

Formaðurin segði frá (6/4) at málið er útsett til næstu tingsetu.

---

92. Veðhald fyri láni til eggvirki

Ár 1974, 15. mars, legði J. Fr. Øregaard, løgtingsmaður, fyri Eysturoyar tingmenn, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til Føroya Eggvirki.

§ 1.

Landsstýrið verður heimilt landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til 70 % av 2 milj. kr. til Føroya Eggvirki, Rituvík.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til Føroya Eggvirki.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil 70 % af 2 mill. kr. til Føroya Eggvirki, Rituvík.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Eggvirkið byrjaði virki sítt seinnapartin av 1972, og framleiðslan er í løtuni umleið 7.200 egg um dagin. Hetta er umtrent tað sum møguligt er at framleiða undir verandi umstøðum. Men virkið hevur hús í gerð, ið

(L. 34/1974 — F.L. J. nr. 1212-14-2-2).

er 85 metrar langt og 21 metrar breitt í tveimum hæddum. Hetta hús ætlast at verða tiðugt fyrrapartin í august, og vil tá verða pláss til umleið 40.000 høsn.

Í gamla húsinum var einans pláss til eggframleiðslu, meðan tá nýggja húsið er tikið í brúk eisini verður pláss til kleking, slaktari við feystirúmi, sum skuldi bøtt munandi um rakstrarúrslitið.

Rakstrarroknskapurin fyri 1973 er viðlagdur. Samlæra roknskapin hevur virkið havt inntøku uppá kr. 949.878,85, meðan útreiðslurnar hava verið kr. 889.865,81, til avskriving kr. 60.013,04.

Pr. 1. januar 1974 er gamli bygningurin v.m. uppgjørdur til kr. 870.317,59 meðan nýbygningurin er uppgjørdur til kr. 483.499,63.

Eggvirkið hevur søkt um lán hjá «Egnsudviklingsfonden», men henda umsókn varð ikki játtað. Eisini hevur virkið søkt um lán í Føroya Jarðarráð, sum heldur ikki veitti nakað láu.

Undirskrivaðu tingmenn halda at tað er av stórsta týdningi, at vit sjálvir framleiða mest møguligt av teimum vørum, sum nýttar verða í Føroyum, og vísir omanfyri nevnda virki seg vera eitt gott og neyðugt tiltak, ið vert er at styðja.

Á Føroya løgtingi, tann 14. mars 1974.

J. Fr. Øregaard Jógvan Sundstein Signar Hansen

Jógvan Olsen Johannes Olsen

1. viðgerð 20. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum 5. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Tað eru tingmenninir fyri Eysturoy, sum lagt hava hetta mál fyri tingið, og varð tað við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum vísa uppskotsstillararnir til viðlagda roknskap fyri 1973, har framleiðslan hevur verið ..... kr. 949.878,85
meðan útreiðslurnar hava verið ..... kr. 889.865,81

nettoúrslit áðrenn avskriving ..... kr. 60.013,04

Fyrsta byggistig kom í gongd við framleiðslu um heystið 1972, og er framleiðslan í løtuni umleið 7.200 egg um dagin. Eftirspurningurin eftir føroyskum eggum er stórur, og núverandi framleiðslan er nummdi minni enn brúkstørvurin. Tær føroysku heilsøturnar, sum handla við matvørum,

mæla til at økja um framleiðsluna, av tí at fólk flest helst yuskja føroysk egg, sama úttalilsi liggja við frá føroysku brúksfeløgunum.

Nevndin ásannar týdningin av, at vit sjálvir framleiða mest møguligt av teim vørum, ið nýttar verða her heima, og at høsnahald er eitt natúrligt lið í hesi framleiðslu.

At meta um rentabilitetin innan landbúnaðin kann vera torført, við lað at allur innflutningur er friur, og føroysk framleiðsla tí má kunna kappast bæði í prísi og góðsku við útlendskar vørur. Innflutningurin av matvørum kemur fyri stórsta partin frá felagsmarknaðarlondunum, har matvøruprísirnir eru rættuligt nógv lækkaðir í seinastuni, og meta menn, at henda hækkan verður at vara við.

Eigararnir av Eggvirkinum hava stovnað partafelag við einum partapeningi uppá kr. 600.000,00. Samlaðu íløgurnar til 1. og 2. byggistig verða:

1. byggistig sambært viðlagda roknskap pr. 1. januar 1973	kr.	980.000,-
2. byggistig sambært kostnaðarætlan	kr.	1.050.000,-
pris- og lønarhækkan (síðan 10. oktober 1973)	kr.	270.000,-
	kr.	2.300.000,-

Figgjan:

partapeningur	kr.	600.000,-
landskassaveðhald (70 % av 2.000.000,-)	kr.	1.400.000,-
	kr.	2.300.000,-

frestandi kr. 300,000 og rakstrarpeningur kr. 250.000 verður figgjaður av eigarunum.

Viðlagt málinum er stovningarsamfykt av partafelag, ið verður eigari av nevnda virki.

Nevndin hevur viðgjørt málið, og hevur hýtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, Tr. Samuelsen, Andreas Djurhuus og Hilmar Kass) tekur undir við uppskotinum, men skilar til, at áðrenn umsókta ábyrgd verður givin, má landsstýrið vissa seg um, at partafelagið er stovnað, og at nevndi partapeningur uppá kr. 600.000,00 er inngoldin.

Í staðin fyri upprunaliga uppskotið, lagt fram av fingmonnum fyri Eysturoy, verður sett fram fylgjandi

Uppskot
til

løgtingslóg um veðhald fyri láni til p/f Føroya Eggvirki, Rituvík.

§ 1.

Landsstýrið verður heimilað landskassans vegna at veðhalda fyri láni upp til 70 % av 2 milj. kr., tó hægst 70 % av metingarvirðinum til p/f Føroya Eggvirki, Rituvík.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om garanti for lån til p/f Føroya Eggvirki, Rituvík.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at garantere for lån indtil 70 % af 2 milj. kr., dog højst 70 % af vurderingssummen til p/f Føroya Eggvirki, Rituvík.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Minnilutin (Hanus við Høgadalsá, Finnbogi Isaksen og Hákun Djurhuus, ið møtti fyri Knút Wang) setur onki uppskot fram.

2. viðgerð 6. apríl.

Uppskot frá meiriluta í nevndini gr. 1 samt. 20—0.

gr. samt. u. atkvgr.

Lógaruppskotið frá meirilutanum samtykt at fara til 3. viðgerð 20—0.

3. viðgerð 6. apríl.

Lógaruppskotið, sum tað var samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 19—0.

93. Veðhald fyri lani til p/f Kirruvík, Lopra

Ár 1974, 15. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í lóg um veðhald fyri láni til p/f Kyrravik, Lopra.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 23 frá 1. mai 1973 verður í § 1 «kr. 2.920.000» broytt til «kr. 3.470.000».

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lov om garanti for lån til p/f Kyrravík, Lopra.

§ 1.

I lagtingslov nr. 23 af den 1. maj 1973 ændres i § 1 «kr. 2.920.000» til «kr. 3.470.000».

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 23 frá 1. mai 1973 fekk landsstýrið heimild til at veðhalda fyri láni til p/f Kyrravik í Lopra til keyp og uppsetan av eini sildamjølsverksmiðju. Veðhaldsupphæddin varð eftir uppskoti frá figgjarnevndini avmarkað til 70 % av kr. 2.920.000 (sí løgtingsmál nr. 55/1972).

Í skrivi frá 10. mars 1974 søkir felagið um, at veðhaldið verður hækkað við 70 % av kr. 550.000, sum verksmiðjan er vorðin dýrari enn roknað varð við.

Landsstýrið heldur, at tað er neyðugt at hesin stuðul verður veittur, fyri at virkið kann verða liðugt og koma í gongd.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum hin 28. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri løgtingið og var við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Í skrivi til landsstýrið hevur felagið søkt um ábyrgd fyri uppiskoytis-

láni uppá kr. 550.000 orsakað av, at virkið er vorðið dýrari enn tað upplýst var løgtinginum, tá fyrr nevnda veðhald var givið. Eitki verður upplýst um, hvør orsøkin er til hesa dýrkan, heldur ikki er nakað upplýst um hvørvitt eginpeningurin er hækkaður tilsvarandi, og í lógaruppskotinum verður heldur einki fyrivarni tikið. Fíggjarnevndin er vitandi um, at ánarnir av nevnda virki hava selt skip sítt, men er einki upplýst um hvørvitt hesin peningur ella partur av hesum peningi er settur í p/f Kyrruvík.

Fíggjarnevndin vil mæla tinginum til at samtykkja, at ábyrgdin fyri láni til p/f Kyrruvík verður hækkað við 70 % av kr. 550.000, um so er at hetta samsvarar við metingina, og eginpeningurin er hækkaður samsvarandi, tí virkið er vorðið dýrari. Áðrenn ábyrgdin verður hækkað, verða nevndu upplýsingar lagdar fyri fíggjarnevndina. Við hesum viðmerkingum tekur nevndin undir við málinum og setur fram fylgjandi

Uppskot.

Uppskot landsstýrisins verður at samtykkja.

2. viðgerð 1. apríl.
Lógaruppskotið og tað at fara til 3. viðgerð samt. 22—0.

3. viðgerð 3. apríl.
Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 24—0.

94. Lov for Færøerne om offentlig sygeforsikring

Ár 1974, 15. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið mælir ríkisstýrinum til at leggja hjálagda lógaruppskot fyri fólkatingið:

Uppskot til lóg um broyting í lóg fyri Føroyar «om den offentlige sygeforsikring.»

Viðmerkingar:

Uppskotið fevnir um broytingar av galdandi sjúkrakassalóg á 4 økjum:

1) Fyrisitingarligar broytingar.
2) Broytingar viðvíkjandi tilflytarum.
3) Broyting viðvíkjandi seming og gerðadómi.
4) Broytingar viðvíkjandi heilivági.

1) Í Danmark eru sjúkrakassarnir tiknir av, og tað virki sum «direktoratet for sygekassevæsenet» hevði, hevur nú «sikringsstyrelsen».

Broytingarnar nr. 1, 2, 3, 6, 7, 8, 9, 10 og 12 miði ímóti at fáa lógina fyri Føroyar at samsvara við teimum soleiðis broyttu umstøðunum.

2) Persónar, sum høvdu fastan bústað í Danmark, og sum annaðhvørt fingu sær fastan bústað í Føroyum ella fyribils vórðu her, høvdu hingartil vegna galdandi innanlýsis reglur sjúkrakassanna millum (hesir millum danskar og føroyskar sjúkrakassar) beinleiðis rætt til veitingur í Føroyum uttan bíðitíð.

Aftaná at donsku sjúkrakassarnir eru tiknir av, kunnu hesar reglur ikki longur nýtast, og broyting nr. 4 miðar tí ímóti at seta liknandi reglur í sjálva lógina.

3) Ósemjur millum sjúkrakassar og læknar, lannlæknar v.fl. um sátt-

(F.L. J. nr. 917-7).

málaspurningar kunnu eftir galdandi lóg skjótast inn fyri eina gerðarnevnd í Danmark millum lækmar v.fl. og sjúkrakassar.

Aftaná at sjúkrakassarnir í Danmark eru liknir av, kann henda fyriskipan heldur ikki nýtast. Landsstýrið hevur ta hugsan, at slíkar ósemjur eiga at verða viðgjørdar av einari føroyskari nevnd.

Broytingarnar nr. 5 og 11 miða ímóti hesum.

4) Í Danmark eru heudar fleiri broytingar viðvíkjandi studningi til heilivág. Fyri tað fyrsta eru prinsippini fyri studningsveitanini broytt. Heiliváguv verður nú býttur í tveir partar, I og II, soleiðis at I serliga umfatar tann heilivág í hvørjum bólki, sum er biligast, meðan II fevnir um annan heilivág, sum kemur undir studningsveitan. Áður var heiliváguvin býttur í tveir partar á ein heilt annan hátt, við tað at I umfataði heilivág, sum kundi kallast lívsneyðugur, ella sum kundi metast javnt við hann, og II umfataði heilivág, sum annars hevði serligan týdning.

Í øðrum lagi er í Danmark útreiðsluparturin hjá sjúklingum (sjúkrakassalimunum) hækkaður frá 25 % til 50 % viðvíkjandi II, meðan hann framvegis er 25 % fyri I.

Ætlanin við hesum broytingum var m.a. at minka um medisinnýtsluna, við tað at allir sakkønir vóru samdir um, at nýtslan í Danmark var órímuliga stór. Hetta mál skuldi náast fyri ein part við, at ynskini hjá sjúklingunum um medisin, sum ikki var heilt neyðugt, skuldi ávirkast av, at teir sjálvir skuldu gjalda ein størri part og fyri ein part við, at læknarnir vórðu elvdir til at fyriskipa tey bíligaru merkini í I heldur enn tey dýraru í II (hvar sjúklingarnir haraftrat fáa minni studning).

Tá tað ikki vil vera møguligt at á-journføra býtið av medisini í teir tveir partarnar, sum hava verið higartil, er tað nú neyðugt at taka hesar spurningarnar upp til viðgerðar, hvat Føroyum viðvikir. Síðani nýggja skipanin kom í gildi í Danmark tann 1. apríl 1973, hevur man í Føroyum til nú klárað seg við nøkulunda at samanlikna við teir eldru listarnar, men henda skipan kann ikki halda fram.

Landslæknin hevur uppá fyrispurning upplýst, at tann samlaða medisinnýtslan í Føroyum lutfalsliga er nakað minni enn í Danmark, men at tað tó í ein vissan mun er talan um ovurnýtslu. Henda er tó ikki so stór sum í Danmark.

Landsstýrið ásannar tí, at tørvur er á at minka um nýtsluna av medisini í Føroyum, og at hetta má gerast á líknandi hátt sum í Danmark. Hinvegin er hesin tørvurin ikki so stórur sum í Danmark.

Landsstýrið heldur tí, at útreiðsluparturin hjá sjúklingunum viðvíkjandi medisini í II eigur at verða hækkaður, men ikki so nógv sum í Danmark.

Landsstýrið mælir tí til, at útreiðsluparturin hjá sjúklingunum sjálvum

til medisin í II verður hækkaður frá 25 % til 35 %, við at studningurin frá sjúkrakassunum verður settur niður frá 75 % í 65 %.

Eftir fyrru býtingini millum I og II hoyrdi bara ein minni partur av medisininum undir I og nógv tann størsti parturin undir II. Eftir tí nýggju skipanini hoyrir yvir helvtina av medisininum undir I. Fyri at halda javnvágina verður tað tí neyðugt at broyta endurgjaldið frá statinum, sum landsstýrið mælir til at seta til 35 % av útreiðslumm hjá sjúkrakassunum bæði fyri I og II. Hetta svarar til miðaltalið fyri statsendurgjaldinum av medisinútreiðslunum hjá sjúkrakassnnum tey seinastu árini.

Hvørja ávirkan tann nýggja skipanin fer at hava er ringt at meta um. Tað kann tó haldast, at útreiðslurnar hjá sjúklingunum við óbroyttum býti av nýtsluni vil hækka við ca. 15 %, meðan útreiðslurnar hjá statinum og sjúkrakassnnum vilja lækka samsvarandi. Tað má tó viðmerkjast, at sjálvt um tann ætlaða broytingin í nýtsluni hevi verður lítil, vil áðurnevnda hækkanin fyri sjúklingar detta burtur. Fyribils roynditrnar av nýskipanini í Danmark tala fyri at so vil verða.

Broytingarnar nr. 5a og 7a fremja hesi uppskot.

Sí eisini Skjal 15.

1. viðgerð 20. mars og málið beint í sosialu nevndina, sum 3. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til samtyktar har løgtingið verður biðið um at mæla ríkisstýrinum til at leggja fyri fólkatingið uppskot til lóg um broyting í lóg fyri Føroyar «om den offentlige sygeforsikring».

Málið var framlagt 15. mars 1973 og var við 1. viðgerð 20. mars beint í sosialu nevndina.

I viðmerkingunum frá landsstýrinum verður sagt, at uppskotið fevnir um broytingar av galdandi sjúkrakassalóg á 4 økjum.

1) Fyrisitingarligar broytingar, 2) Broytingar viðvíkjandi tilfluttarum, 3) Broytingar viðvíkjandi seming og gerðaskómi og 4) Broytingar viðvíkjandi heilivági.

Ynski um hesar broytingar standast av, at í Danmark eru sjúkrakassarnir avtiknir og miðu tær sostatt ímóti at fáa lógina fyri Føroyar at samsvara við teimum soleiðis broytlu umstøðunum.

Nevndin hevur viðgjørt málið saman við umboðum frá sjúkrakassum

(Harry Johansen) og landsstýrinum (I. Christiansen) og er samd um at mæla tinginum til at samtykkja pkt. 1, 2 og 3 óbroytt.

Undir málsviðgerðini er nevndin komin til, at broytingarnar undir punkt 4 eru so týðandi umleggingar av heilivágsstudningimm, at nevndin ikki nóg gjølla heldur seg kunna viðgera hesa spurning eftir stuttari tíð.

Tá talan her er um at broyta uppbýtingina av studningsprinsippunum (sum í summum førum førir við sær størri útreiðslu til sjúklingin, í øðrum føri upptøku av heilivág, sum fyrr ikki hevur fingið studning), mælir nevndin til, at medisinspurningurin verður viðgjørdur í eini seinri tingsetu.

Í staðin fyri uppskot landsstýrisins mælir nevndin sostatt tinginum til at samtykkja soljóðandi uppskot:

Løgtingið mælir rikisstýrinum til at leggja hjálagda lógaruppskot um broyting í lóg fyri Føroyar «om den offentlige sygeforsikring» fyri fólkatingið, tó soleiðis at pkt. 5a og 7a í § 1 ganga út.

2. viðgerð 4. apríl.

Broytingaruppskotið frá nevndini samtykt við 23 0.

Málið sostatt avgreitt.

---

95. Lán til Telefonverk Føroya Løgting

Ár 1974, 15. mars, legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til

Løgtingslóg um lán til Telefonverk Føroya Løgtings.

§ 1.
Telefonverk Føroya Løgtings verður heimilað at læna upp til 25

(Lt. 56/74).

lagtingslov om lån til Telefonverk Føroya Løgtings.

§ 1.
Telefonverk Føroya Løgtings bemyndiges til at optage lån indtil

milj. kr. til viðari fremjingar av teknisku útbyggingini.

§ 2.

Landsstýrið fær heimild at veðhalda landskassans vegna fyri tí í § 1 nevnda láni.

§ 3.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

25 mill. kr. til fortsat udførelse af den tekniske udbygning.

§ 2.

Landsstyret bemyndiges til at garantere på landskassens vegne for det i § 1 nævnte lån.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 25, dagfest 9. mai 1972, um lán til Telefonverk Føroya Løgtings varð heimilað landsstýrinum at veðhalda fyri 22 milj. kr. í láni til fremjan av automatiseringararbeiðinum fyri tíðarskeiðið 1972-1975.

Arbeiðssetningurin fyri hetta tíðarskeiðið er yvirhøvur fylgdur hvat viðvíkir útbyggingini av millumbygdasambandinum og automatstøðum; men fyri kaðalarbeiði innanoyggja er gjørt nógv meira enn ætlað. Orsøkin er lutvis at eftirspurningurin eftir telefon er vaksandi, og at gamla kaðalnetið í samband við magnetstøðirnar yvirhøvur er ónýtiligt, tá ið lagt verður um til automattelefon. Herafturat eru lønar- og prishækkingar síðani byrjanina av 1972, ið tilsamans eru umleið 8. milj. kr. í 1974 fáa hesar bygdir automattelefon:

Gøta
Lorvik
Fuglafjørður
Hellur
Oyndarfjørður
Elduvík
Kollafjørður
Kvivík
Leynar og Skælingur.

Um ársskiftið 1974/75 ella fyrst í 1975 kemur Vestmanna aftur at. Hesar støðir eru so eftir:

Vágar
Streymnes
Eiði við Vík, Gjógv og Funningi.
Sandoy
Nólsoy.

Tilfarið til hesar automatstøðir kemur síðst í 1974, og verður øll landsautomatiseringin væntandi liðug um tvey ár.

Væntað peninganýtsla í fíggjarárinum 1974/75 til íløgur og til at gjalda gamla skuld verður:

Vørukreditorar og onnur skuld	11.000.000,- -
Vørunýtsla, teknisk útgerð, automattilfar og kaðalar incl. toll og farmagjald	7.000.000,- -
Løn til íløguarbeiði	6.000.000,- -
Tilfør til bygningar	1.500.000,- -
Tilsamans	25.500.000,

Heimildin tann 9. mai 1972 uppá 22 milj. kr. varð ætlað til veruligar íløgur. Har var tíverri ikki tikið upphædd fyri, at telefonverkið pr. 31/3 1972 hevði vørukreditorar og aðra skuld fyri tilsamans 9 milj. kr.

— — — —

Aðalspurningurin er um telefonverkið orkar stóru lánibyrðuna, ið tekniska úthyggingin førir við sær. Inntøkan í fíðarskeiðinum 1/4 1973 — 31/12 1973 var 9.000.000,—. Mett inntøka í fíggjarárinum 1973/74 verður sostatt 12.000.000,—.

	1971/72	1972/73	1973/74 (Mett)
Inntøka í 1000 kr.	8825	9775	12000
Vøkstur í %		11	22

Henda inntøkuhækking er uttan prisbroytingar; men eitt úrslit av tekniska úthyggingini, í árinum 1973 komu 1000 nýggir felagar aftrat, og mett verður at henda øking verður at vaksa í 1974 til umleið 1200 felagar. Uttan prisbroytingar verður inntøkan í 1974/75 væntandi 15 milj. kr. Samlaða lánibyrðan verður umleið 65 milj. kr. við tí lániheimild, ið søkt verður um. Eitt úrslit av automatiseringini verður, at samsýningin til magnetostøðirnar verður at minka. Í 1972/73 var samsýningin 1.026 milj. kr. Í 1974/75 er hon mett til 0,55 milj. kr. Eitt annað úrslit av automatiseringini verður, at løn til telefonkvinnur eisini verður at minka. Sum heild verður mett, at telefonverkið við teimi hækkandi inntøkunum fyri fyrst verður ført fyri at gjalda rakstur og kapitalútreiðslur um so er, at skipast kann fyri ríkiligum lánum.

Íløgan fyri hvønn felaga er umleið 7.000 kr. Íløgan hjá donsku telefon-

feløgunum er 5.200 kr. fyri hvønn felaga. fløgurnar í Føroyum eru 1800 kr. hægri. Hetta er ikki órímiligt, tí fløgurnar her eru gjørdar seinastu 3- –4 árini og tær donsku yvirhøvur í tíðarskeiðinum 1950- –1970. So sjálvt um fløgurnar tilsamans eru eitt stórt tal, so eru tær innanfyri tað mark, ið okkara grannalond hava nýtt til teirra automatisering. Telefonfelagarnir í Føroyum eru spjaddir á nógvum og smáum plássum. Tað ger arbeiðið fyri hvønn felaga meira umfatandi og harvið dýrari.

1. viðgerð 20. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum 5. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri tingið uppskot um, at landsstýrið fær heimild til at veðhalda fyri láni til telefonverkið upp til kr. 25.000.000, .

Í viðmerkingunum verður upplýst, at telefonverkið fekk loyvi, við landskassaveðhaldi, í tingsetuni 1971/72 at taka upp lán uppá kr. 22.000.000,--. Hetta lán skuldi nýtast til fløgur í tíðarskeiðinum 1972/75, men tá hesin peningur ikki rekk til tær ætlaðu íleggingar, var orsøkin deils prishækkan og vøruskuld uppá kr. 9 milj., ið ikki vóru tiknar við í teim kalkulatiónum, sum lagdar vóru til grund fyri nevndu lántøku.

Eisini verður víst á, at inntøkur telefonverksins hækkaðu í 1972/73 við kr. 950.000,—, og í 1973/74 verður hækkingin mett til kr. 2.225.000,— .

Um so er at lagaligt lán fæst, roknar telefonverkið við, at inntøkurnar 1974/75 verða umleið kr. 15.000.000,--, og er hetta eitt mett hækkan frá árinum fyri uppá kr. 3 milj. Eisini verður upplýst, at lánibyrðan tá verður 65 milj. kr.

Sambert uppstilling frá telefonverkinum yvir mettar inntøkur við óbroyttum takstum og útreiðslum fyri árini 1973/74, 1974/5 og 1975/76 roknar telefonverkið við, at samlaðu inntøkur fyri hesi árini verða ávikavist kr. 12.200.000,--, 15.000.000, - og 19.000.000,. Fyri somu árini verða rakstrarútreiðslur ávikavist 7.000.000,--, 7.600.000,-- og 9.000.000, kr. Upphæddin til rentur og avdráttir (bruttoyvirskotið) verður sostatt ávikavist 5.200.000, , 7.400.000,- - og 10..000.000,- – kr. Telefonverkið metir, at tað sjálvt verður fært fyri at rinda allar sínar útreiðslur eins og rentur og avdráttir. Figgjarnevndin hevur sín iva um hesa metan, millum annað tí at rentuhæddin og afturgjaldstreytirnar av nevnda láni eru rættuliga avgerðandi, og mælir til, at landsstýrið í komandi løglingssetu leggur fram eina nágreiniliga metan av viðurskiftum telefonverksins. Við hesum viðmerkingum mælir nevndin løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 6. apríl.
Gr. 1 2 samt. 21 0. Gr. 2 samt. uttan atkvøðugreiðslu.
Lógaruppskotið samt. at fara til 3. viðgerð við 20—0.

3. viðgerð 6. apríl.
Lógaruppskotið su msamtykt við 2. viðgerð nú samtykt 23—0.

---

96. Broyting í býarskipanarlógini

Ár 1974, 15. mars, legði Ásbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í lóg um býarskipanir og byggisamtyktir.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í 4. § verður skoytt uppí aftanfyri 3. part:

4. partur. Landsstýrið kann við gildi fyri allar kommunur í eini serligari byggireglugerð áseta almennar fyriskipanir viðvíkjandi teimum í 5. §, 3. parti nr. 1, 2, 3, 4, og 5 umroddu viðurskiftum og almennar fyriskipanir um hvussu vegir skulu liggja, leið og breidd teirra, um

(F.L. J. nr. 802-4-12. — LJ. 48/74).

lagtingslov om ændring i lov om byplaner og byggevedtægter.

§ 1.

I lagtingslov nr. 13 af den 21. maj 1954 om byplaner og byggevedtægter foretages følgende ændringer:

1. I § 4 tilføjes efter stk. 3:

Stk. 4. Landsstyret kan med gyldighed for alle kommuner i en særlig byggevedtægt fastsætte generelle bestemmelser vedrørende de i § 5 stk. 3 nr. 1, 2, 3, 4 og 5 omhandlede forhold og generelle bestemmelser om vejes beliggenhed, retning og bredde og om største bygningshøjde,

størslu hæddir á bygningum, minstu stødd á grundstykkjum, hægsta byggistig og um hvussu langt skal verða ímillum bygningar.

5. partur. Vikið kann verða frá fyriskipanunum í teirri í 4. parti nevndu reglugerð um annað verður fyriskipað í eini av bygdaráðnum samtyktari og av landsstýrinum góðkendari byggisamtykt.

2. Í 26. §, 1. parti verður skoytt uppí:

Eisini hevur landsstýrið heimild at gera av hvussu umfatandi frammanfyri nevndu lógir og fyriskipanir skulu verða í gildi, tá ein byggireglugerð sum umrødd er í 4. §, 4. parti verður sett í gildi.

byggegrundes mindste størrelse, største bebyggelsesgrader og om bygningsafstand.

Stk. 5. Bestemmelserne i den i stk. 4 omhandlede byggevedtægt kan fraviges hvis der bestemmes andet i en af kommunalbestyrelsen vedtaget og af landsstyret godkendt byggevedtægt.

2. I § 26, stk. 1 tilføjes:

Endvidere bemyndiges landsstyret til at træffe bestemmelse om i hvilket omfang de forannævnte lovbestemmelser og anordninger skal bevare deres gyldighed når en byggevedtægt som omtalt i § 4 stk. 4 træder i kraft.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í húsabyggingini her á landi hevur tað ábendna higartil bert sett nøkur fá — í dag lítið sigandi — lógarkrøv, sum stava frá seinastu øld og sum serliga hava til endamáls at minka um vandan fyri eldsbruna.

Lóg um býarskipanir og byggisamtyktir varð lýst í 1951, men hevur ikki havt stórvegis ávirkan higartil. Hon hevði sum fyritreyt, at bygdaráðini høvdu hampuliga stóran áhuga fyri hesum málum, og at kommununar fingu sær tekniska umsiting at hava hesi mál um hendi, men hvørgin av hesum fyritreytum var til staðar tá, og er støðan ikki stórvegis broytt síðani hurtursæð frá, at Tórshavnar kommuna hevur samtykt eina byggisamtykt og útbygt sína tekniska umsiting samsvarandi.

Støðan í løtuni er hon, at sjálvt um bæði landsstýrið og teir kommunalu byggimyndugleikarnir ásanna, at stórur tørvur er á at betri skil verður í byggi- og planleggingarviðurskiftunum í flestum kommununum fer uttan

iva at ganga long tíð áðrenn nakað munandi kemur á skaftí. um ikki landið tekur sær av málinum, tað er, áseluv reglur og hevur umsiting at hjálpa kommununum við hesum arbeiði.

Í 3. parti í 4. § í býarskipanarlógini hevur landsstýrið heimild at áleggja eini kommunu at útvega byggisamtyktir fyri kommununa ella part av henni, og hevur landsstýrið eisini heimild at seta tær í byggisamtyktini umrøddu ætlanir í verk so umfatandi sum neyðugt er fyri kostnað kommunurnar. Sum frammanfyri sagt hava tær flestu kommunurnar lítla og onga tekniska umsiting og vil tað tí hjálpa lítið, at landsstýrið áleggur kommununum at gera hesi arbeiðir.

Ein vegurin at ganga fyri at fáa meira skil á byggiviðurskiftunum og fáa ásett meira tíðarhóskandi reglur enn tær sum eru galdandi eftir teirri gomlu lóggávuni er, at landsstýrið við kunngerð setur reglur, sum skulu galda fyri allar kommunur og sum síðani kunnu verða útbygdar ella broyttar við byggisamtykt sambært býarskipanarlógina.

Eina líkа heimild at gera almennar reglur, sum skulu galda fyri allar kommunur, hevur landsstýrið ikki í 4. § í býarskipanarlógini soleiðis sum hon nú er orðað, við tað at her er hugsað um viðgerð av hvørjari einstakari kommunu sær ella fleiri grannakommununum undir einum.

Verður býarskipanarlógin broytt soleiðis sum ætlanin er við hesum uppskoti, er møguligt at fáa skil á byggiviðurskiftunum og er ætlan landsstýrisins umframt at gera eina almenna byggireglugerð eisini at hjálpa kommununum við, at gera byggisamtyktir sum innihalda gjøllari reglur og reglur um á hvønn hátt tey ymsu økini innanfyri kommunurnar skulu nýtast. Á henda hátt ber eisini til at samskipa ætlanirnar um nýtslu av økjum í teimum ymsu kommununum.

Tað er ikki heilt greitt hvussu stórar útreiðslur hetta arbeiði hevur við sær, men undir øllum umstøðum verður neyðugt at seta fólk til hetta serliga arbeiði.

1. viðgerð 20. mars og málið beint í kommunalu nevndina, sum 3. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um broyting í býarskipanarlógini.

Uppskotið var lagt fram 18. mars og varð við 1. viðgerð 20. mars beint í kommunalu nevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 4. apríl.
Lógaruppskotið og málið at fara til 3. viðgerð samt. 24—0.

3. viðgerð 5. apríl.
Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú samt. 24—0.

---

97. Broyting í rúsdrekkalógini

Ár 1974, 15. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í rúsdrekkalóggávuni.

§ 1.

Sum nýtt stk. 3 í § 7 í lóg fyri Føroyar nr. 115 frá 4. apríl 1928 «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m.» við seinni broytingum verður sett:

«Tær fyriskipanir, ið nevndar eru í kap. 68, 69, 71 og 72 í rættargangslógini frá 11. apríl 1916 við seinni broytingum verða at galda í rættargangsmálum hesi lóg viðvíkjandi.»

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

(F.L. J. nr. 607-11-9. - - LL. 46/74).

lagtingslov om ændring i ædrueligheds lovgivningen.

§ 1.

Som nyt stk. 3 i § 7 i lov for Færøerne nr. 115 af 4. april 1928 om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.m. med senere ændringer sættes:

«Bestemmelserne i kap. 68, 69, 71 og 72 i retsplejeloven af 11. april 1916 med senere ændringer kommer til anvendelse i retssager denne lov vedrørende.»

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Rúsdrekkalóggávan varð broytt við løgtingslóg nr. 28 frá 8. mai 1958. Hetta var broyting í § 7 í lóg fyri Føroyar nr. 115 frá 4. apríl 1928 og snúði seg um álegging av bót, krav um konfiskatión og um at reglurnar í kap. 68, 69, 71 og 72 í rættargangslógini koma at galda í rættargangsmálum rúsdrekkalógini viðvíkjandi.

Við løgtingslóg nr. 40 frá 16. juni 1966 varð orðaljóðið í § 3, 4. stk. í lóg fyri Føroyar nr. 115 frá 4. apríl 1928 broytt; hetta vóru reglur um at tann, ið ætlar at loysa rúsdrekka út skal vísa skrivliga váttan um ikki at skylda gjaldkommun skatt til kommunu ella landskassa.

Við lógini frá 1966 var tað ætlanin, at § 7 varð tikin við óbroytt, men av misgáu var 3. stk. ikki tikið við, tá ið 1958 lógin var tikin av.

1. viðgerð 20. mars og málið heint í lógarnevndina, sum 28. mars legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til løgtingslóg um broyting í rúsdrekkalóggávuni.

Málið varð framlagt 18. mars og 1. viðgerð fór fram 20. mars, har málið varð beint til viðgerðar í lógarnevndini.

Uppskotið snýr seg um at gera broyting í lóg fyri Føroyar nr. 115 frá 4. apríl 1928 «om forbud mod at drive erhverv med berusende drikke m.a.», soleiðis, at sum nýtt stk. 3 í § 7 í nevndu lóg verður sett, at lær fyriskipanir, ið nevndar eru í kap. 68, 69, 71 og 72 í rættargangslógini frá 11. apríl 1916 við seinni broytingum verða at galda í rættarmálunum hesi lóg viðvíkjandi.

Nevndu kapitlar viðvíkja «beslaglæggelse», «ransagning», «anholdelse» og «fængsling».

Broytingin var millum annað gjøgnumført við løgtingslóg nr. 28 frá 8. mai 1958, men tá henda lóg varð tikin av og løgtingslóg nr. 40 frá 16. juni 1966 kom í staðin, var 3. stk. í § 7 av misgáu gliðið út.

Lógarnevndin hevur viðgjørt málið, og er øll nevndin samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 28. mars.
Gr. 1 samtykt 20—0. Gr. 2 uttan atkv.gr.
Soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð við 21—0.

3. viðgerð 1. apríl.
Lógaruppskotið sum samt. við 2. viðgerð var nú endaliga samtykt 17—0.

98. Broyting í straffilógini

Ár 1974, 15. mars, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Við heimild í § 10 í lóg nr. 320 frá 13. juni 1973 um broyting í straffilógini verða §§ 1-2 og §§ 5-10 í hesi lóg at seta í gildi í Føroynum við kgl. fyriskipan.

Viðmerkingar:

Høvuðsbroytingarnar eftir lógini eru, at partvís óvvunarkaðar revsingar, sum t.d. ungdómsfongsul, arbeiðshús, trygdarfongsul og serfongsul verða avtiknar.

Ungir lógbrótarar koma í staðin undir barna- ella ungdómsforsorg, soleiðis at fongsulsrevsing verður nýtt minst møguligt.

§§ 3 og 4 verða ikki liknar við, tá § 3 viðvikir broyting í rettargangslógini, sum fyri Føroyar verða framdar við serligari lóg, og § 4 ásetur, nær lógin kemur í gildi.

Landsfútin, ið hevur havt málið til ummælis, mælir til at seta nevndu greinir í lógini í gildi fyri Føroyar.

Vðlagt fylgir eitt eintak av lógini.

1. viðgerð 20. mars og málið beint í lógarnevndina, sum 28. mars legði fram soljóðandi

Álit

Landsstýrið hevur lagt fyri løgtingið uppskot til samtyktar um við heimild í § 10 í lóg nr. 320 frá 13. juli 1973 at seta í gildi í Føroyum við kgl. fyriskipan §§ 1 - 2 og §§ 5 - 10 í nevndu lóg um broyting í straffilógini.

Málið varð framlagt 18. mars 1974 og 1. viðgerð fór fram 20. mars, har málið varð beint til viðgerðar í lógarnevndini.

Høvuðsbroytingarnar ganga út upp á at avtaka ungdómsfongsul, arbeiðshús, trygdarfongsul og serfongsul fyri ungar lógbrótarar og sjúkar lógbrótarar, sum hesir í staðin koma undir barna- og ungdóms forsorg og

(F.L. J. nr. 501-2-1. - Vist verður til Lov nr. 320 af 13. juni 1973).

sjúkrahúsviðgerð, soleiðis at fongsulsrevsing í hesum førum verður nýtt minst møguligt.

Lógarnevndin hevur viðgjørt málið og er øll nevndin samd um at mæla tinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 28. mars.
Uppskot til samtyktar samt. 16—0.
Málið soslatt avgreitt.

---

99. Partapeningur í flakavirki í Skopun

Ár 1974, 15. mars, legði Jákup Lindenskov, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um partapening í partafelag undir stovnan, ið skal byggja og reka flakavirki í Skopun.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at seta upp til kr. 150.000,- í partafelag undir stovnan, ið skal byggja og reka flakavirki í Skopun, og at leggja út peningin úr landskassanum.

§ 2.

Ongin partapeningur verður teknaður ella útgoldin fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett eru loknar.

(Ll. 54/74).

lagtingslov om aktier i aktieselskab under stiftelse, der skal anlægge og drive filetfabrik i Skopun.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at tegne aktier i aktieselskab under stiftelse, der skal anlægge og drive filetfabrik i Skopun, med et beløb på indtil kr. 150.000,- og at disponere over beløbet af landskassens midler.

§ 2

Ingen del af aktiebeløbet kan tegnes eller udbetales, før alle betingelser, landsstyret skulle stille, er opfyldt.

§ 3.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

§ 3.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Partafelag undir stovnan í Skopun hevur biðið um at landskassin setur partapening í hetta felagið. Endamál felagsins er at byggja og reka flakavirki í Skopun. Partapeningurin er ásettur til kr. 765.000,-. Stovnararnir eru: Lf. Skopunnar Útróðrarfelag, Skopunnar Arbeiðsmannafelag, Gunnleigur Hentze, Skopun. Stovnararnir hava teknað tilsamans kr. 550.000,-. Um landskassin setur kr. 150.000,- í partapeningi í ætlaða partafelagið, ætlar felagið at bjóða Skopunnar kommunu at tekna tær restandi 65.000,-. Viðvíkjandi spurninginum um rávoru er at viðmerkja at fleiri útróðrarbátar eru í Skopun, at Skopunnar Útróðrarfelag setur í kr. 450.000,- í partapeningi og at tað vísir seg at tá flakavirki verða sett á stovn ella útbygd, at fleiri fiskifør koma til bygdina. Landsstýrið heldur tað vera rætt at stuðla ætlaða tiltakið og seta upp til kr. 150.000,- í felagið sum partapening. Sambært løgtingslóg nr. 15 frá 7. mars 1974 og løgtingslóg nr. 16 frá 7. mars 1974 hevur landsstýrið fingið heimild landskassans vegna at seta ávikavist kr. 100.000,- og kr. 300.000,- í flakavirki í Haldórsvík og á Tvøroyri.

Víst verður annars til løgtingslóg nr. 29 frá 15. juni 1967 um lutapening í lf. Skopunnar Útróðrarfelag, løgtingstíðindi 1966 bls. 197, har heimilað var landsstýrinum landskassans vegna at seta kr. 50.000,- í lutapeningi í nevnda útróðrarfelag.

1. viðgerð 20. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum 28. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri løgtingið og var við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum sigur landsstýrið frá, at áheitan er komin frá felag í Skopun, sum er undir stovnan, um at landskassin setur partapening í ætlaða felag. Endamál felagsins er at byggja og reka flakavirki í Skopun.

Eisini verður víst á, at landsstýrið sambært løgtingslóg nr. 29 frá 15. juni 1976 hevur heimild til at seta kr. 50.000 í lutapeningi í Skopunnar útróðrarfelag, men verður einki upplýst um hendu heimild nakrantíð er nýtt. Landsstýrið vísir annars á, at har flakavirki verða sett á stovn ella

útbygd koma fleiri fiskifør til bygdina. Tiggjarnevndin, ið hevur viðgjørt málið, ásannar, at treytin fyri útróðri, nevnliga við smærri fiskiførum er at frystivirkið er, og at fiskurin verður keyptur á staðnum, men nevndin er eisini vitandi um bygdir, har útróðrabátatalið er munandi minkað aftaná, at bygdin fekk flakavirkið, so helta er ikki nøkur náttúrlóg, at har flakavirki verða bygd ella viðkað, at so veksur útróðrabátatalið einans av hesi orsøk. Spurningurin um hvørvíst útróður er lønandi vinna ella ikki, er ætlandi eisini ein viðvirkandi orsøk til, um útróðrarflotin í eini bygd veksur ella minkar, og eru mong dømi um, at flakavirkir eru komin í tiggjartrupulleikar av teirri orsøk, at útbyggjanin á landi er farin skjótari fram enn útróðrarflotin hevur verið økttur, og harvið ikki hevur verið róvøra nokk til, at raksturin á flakavirkinum hevur borið seg.

Men tiggjarnevndin er samd við landsstýrið í, at teknaðir verður partapeningur í nevnda felag upp til kr. 150.000, tó hægst 20% av nýtelnaða partapeninginum, og mælir løgtinginum til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

2. viðgerð 1. apríl.
Lógaruppskotið og tað at fara til 3. viðgerð samtykt 24- 0.

3. viðgerð 3. apríl.
Lógaruppskotið sum samt. við 2. viðgerð nú samt. 24- -0.

100 Broytingar í skattalógini

(fólkapensjonistar o.a.).

Ár 1974, 15. mars, legði Petur F. Christiansen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í skattalógini (fólkapensjónistar o.a.)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963 um landsskatt og kommunuskatt verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 19, 5. stk. verður broytt til soljóðandi:

«Til álikningina eftir 3. og 4. stk. verður veittur vanligur frádráttur, men í staðin fyri frádrátt fyri goldnar skattir, verður veittur skattafrádráttur eftir reglunum í § 9, nr. 8 b, jbr. kunngerð nr. 1 frá 9. januar 1970 um roknaðan skattafrádrátt.»

2. § 22 a verður broytt til soljóðandi:

«Líkningarráðið hevur heimild til eftir umsókn at veita skattalætta til persónar, sum vegna aldur ella sjúku fara úr starvi ella vinnu og av hesi orsøk fara munandi niður í inntøkn.

2. stk. Í slíkum førum líknar líkningarráðið um aftur soleiðis:

Frá 1. ársfjórðingi aftanà at avvarðandi hevur lagt frá sær, verður hann settur í skatt av ætlaðari inntøku svarandi til ta inntøku, hann ætlandi fær at fáa í

lagtingslov om ændring i skatteloven (folkepensionister)

§ 1

I lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963 om landsskat og kommuneskat gøres disse ændringer:

1. § 19, 5. stk. ændres til sålydende:

«Ved påligningen efter stk. 3 og 4 ydes der almindelige fradrag, men i stedet for fradrag for betalte skatter, ydes der skattefradrag efter reglerne i § 9, nr. 8 b, jfr. bekendtgørelse nr. 1 af 9. januar 1970 om beregnet skattefradrag.»

2. § 22 a ændres til sålydende:

«Ligningsrådet bemyndiges til efter ansøgning at indrømme lempelse af skatten for personer, som på grund af alder eller sygdom opgiver erhverv eller arbejde og derved får væsentlig indtægtsnedgang.

2. stk. I her omhandlede tilfælde foretager ligningsrådet omligning således:

Fra 1. kvartal efter at vedkommende har opgivet erhverv eller arbejde, sker beskatning af forventet indkomst svarende til den indkomst vedkommende vil få i

(L 31/1974 F. L. J. nr. 430-12-18)

skattaárinum, samsvarandi reglunum í § 19, 3. -- 6 stk.»
3. Í § 34 verður í stk. 2., nr. 2. «6000 kr.» broytt til «10.000 kr.»

skatteårel, i overensstemmelse med reglerne i § 19, 3 - 6 stk.»
3. I § 34 ændres i stk. 2., nr. 2. «6000 kr.» til «10.000 kr.»

Viðmerkingar:

Við løgtingslóg nr. 19 frá 1. mai 1973 varð fyrisett regla um skatting av persónum, sum vegna aldur ella sjúku fóru úr starvi ella vinnu og tí fóru munandi niður í inntøku. Orðalagið í lógini hevur ikki verið so heppið tí væl fáa tey munandi lætta tá tey fara niður í inntøku, men árið eftir fáa tey aftur meira skatt. Hetta var ikki ætlanin við lógini og er tí skotið upp broyting av orðalagnum fyri at hetta kann svara betur saman við ætlanina.

Ætlanin við at umsókn skuldi sendast er bert at hava vist yvirlit yvir tær broytingar ,sum gjørdar verða og tá ætlanin veruliga er at øll, sum lúka treytirnar skulu hava hesa sømd, eins og reglan er um líkning av einkjum og einkjumonum, er ongin orsøk til at landsstýrið skal viðgera hvørt mál sær, og er tí skotið upp, at likningarráðið, sum í øllum førum avríkar umsitingina, hevur hesa heimild.

Mælt er til at broyta skipanina um skattafrádráttin bæði hjá hesum og hjá tilfyttarum til at reglan um javnvágsskatt verður nýtt altíð har roknaður skattur skal verða frádrigin, tí tvørligt er at arbeiða við tvítumm ymiskum útrokningum til skattafrádrátt. Eisini rakar javnvágskatturin beinari enn tann gamla frádráttarreglan.

Tórshavnar likningarnevnd hevur heitt á landsstýrið um broyting í § 34 soleiðis, at kommunala likningarvaldið kann sjálvt gera av hvussu inntøkur undir 10.000 kr. verða viðgjørdar eftir skattatalvu, í staðin fyri sum nú har markið var 6.000 kr. Hetta svarar eisini betur saman við tær broytingar, sum løgtingið gjørdi í januar í ár í tafvunum til landsskattin.

Landsstýrið heldur hesa broyting vera rímuliga og setir tí fram uppskot um broytingarnar.

Peter F. Christiansen
landsstýrismaður

/ J. Djurhuus

1. viðgerð 20. mars og málið beint í skattanevndina, sum 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Í seinastu løgtingssetu samtykti løgtingið uppskot frá landsstýrinum um broyting í skattalógini, sum miðaði ímóti at fólkapensionistar og onnur,

sum fóru yvir frá at hava inntøku av vanligum arbeiði til bert at hava fólkapensjón, avlanningspensjón o.tl., kundu verða sett í skatt eftir tí inntøku, teir ætlandi fóru at hava.

Landsstýrið sigur í viðmerkingunum til hetta uppskotið, at orðaljóðið í lógini hevur ikki verið heppið, tí væl fáa tey munandi lælta, tá tey fara niður í inntøku, men árið eftir fáa tey aftur meira skatt, og var hetta ikki ætlanin við lógini.

Øll nevndin ásamar, at soleiðis sum lógin frá 1. mai 1973 er orðað, kann persónur, sum lúkar treytirnar fyri at koma undir hana, verða umliknaðir frá 1. ársfjórðingi aftaná, at hann hevur lagt frá sær og uppí 4 ársfjórðingar aftaná av tí inntøku, hann ætlandi fer at fáa.

Hevur persónur lagt frá sær t.d. 1. august 1973, verður hann líknaður frá 1. oktober 1973 eftir tí inntøku, hann ætlandi fer at hava og somuleiðis undir høvuðslíkningini 1. apríl árið eftir, men tá teir 4 ársfjórðingarnir eru farnir 1. august 1974, so skal hann veruliga verða umlíknaður aftur frá 1. oktober 1974 eftir allari inntøkuni 1973, t.v.s. eisini av tí størru inntøkuni, hann hevði frá 1. januar til 1. august 1973, uttan at inntøka hansara í árinum, hann rindar skattin, er tilsvarandi uppfarin.

Ætlanin við lógini var, at hann aftaná at hava lagt frá sær bert skuldi verða líknaður av tí lækkaðu inntøkuni (fólkapensjón, pensjón, hiðjaningi o.fl.).

Nevndin ásannar eisini, at óhóskandi er, at fleiri reglur eru um útrokning av roknaðum skattafrádrátti og tekur tí undir við landsstýrisuppskotinum um í øllum førum at nýta javnvágsskattafrádráttarreglurnar.

Eisini heldur nevndin, at rímuligast er, at hetta skipan verður umsitin av líkningarráðnum, sum annars umsitir skattamál.

Landsstýrið sigur eisini, at áheitan er komin um at fáa avmarkingina í § 34, 2. stk. nr. 2 um heimildina hjá kommunalu líkningarvaldunum at lækka inntøkur til kommunuskatt broytta frá 6.000 kr. til 10.000 kr., ið eisini betur samsvarar seinastu broytingini í landsskattalógini, har inntøkur hjá uppihaldarum upp til 10.000 kr. eru skattafriar.

Í uppskoti landsstýrisins er gloymt at seta nær lógin fær gildi.

Nevndin er samd um at mæla til at góðtaka uppskot landsstýrisins við niðanfyri standandi

Broytingaruppskoti til uppskot landsstýrisins.

§ 2.	§ 2.
Hetta lóg fær gildi beinan vegin.	Denne lov træder straks i kraft.

SKATTANEVNDIN, 21. mars 1974.

2. viðgerð 26. mars.
Gr. 1. samtykt 26- -0.
Broytingaruppskot frá nevndini samtykt uttan atkvøðugreiðslu.
Lógin so broytt at fara til 3. viðgerð samt. 26- -0.

3. viðgerð 29. mars.
Lóógaruppskotið sum tað var samtykt við 2. viðgerð nú endaliga samtykt 26—0.

---

101. Broytingar í avskrivingarlógini

Ár 1974, 15. mars, legði Petur F. Christiansen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um skattligar avskrivingar v.m.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 52 frá 29. december 1971 um skattaligar avskrivingar v.m. verður settur sum nýggj § 16 a:

«Persónur, hvørs skattskylda í Føroyum heldur uppat ella sum kemur undir aðra skattaskipan og sum hevur sum hevur haft skattligan vinning við sølu av ognum, sum eru avskrivingarhæarar eftir hesari lóg ella sáttmála sambært § 16, stk. 1, verður uttan rætt til fyriskipanirnar í hesari ella øðrum

(L. 39/1974. F.L.J. nr. 430-10-3).

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om skattemæssige afskrivninger m.v.

§ 1.

I lagtingslov nr. 52 af 29. december 1971 om skattemæssige afskrivninger m.v. indføjes som ny § 16 a:

«Personer hvis skattepligt på Færøerne ophører eller som underkastes en anden skatteordning og som har opnået skattemæssig fortjeneste ved salg af aktiver der kan afskrives i medfør af denne lov eller kontrakt i henhold til § 16, stk. 1, skal uden hensyn til bestemmelser i denne eller andre love er-

lógum at svara avgjald við 40 % av tí skattleggjandi vinninginum, ið ikki frammanundan er tikin við í skattleggjandi inntøkuni.

Er vinningurin við sølu av ogn longu tikin við í skattauppgerð, tá skattgjaldarin flytir av landi, og unkað av skattinum er goldið um líkningina, verður avgjaldið roknað um aftur soleiðis:

Avgjaldið roknað sær av vinninginum verður lækkað við eins parti, ið goldin er av skattinum fyri avvarðandi ár.

2. stk. Beinan vegin søla er farin fram, skal seljarin lata líkningarráðnum uppgerð yvir søluvinningin, gjørdur upp eftir reglunum í hesari lóg.

Líkningarráðið eftirkannar uppgerðina og ásetir avgjaldið, ið skal verða goldið Føroya Gjaldstovu innan 2 vikur aftaná, at seljarin hevur fingi ðboð um avgjaldið frá líkningarráðnum.

Av vinningi minni enn 25.000 kr. verður onki avgjald latið.

3. stk. Um seljarin innan 31. december árið eftir sølu nýtir søluvinningin í sini heild til útvegan av ognum, nevndum í 1., 2. og 3. kapituli í hesi lóg, í sambandi við vinnuvirki her á landi, kann hann fáa avgjaldið afturgoldið eftir umsókn.

Umsóknin verður send líkningarráðnum, sum hevur heimild til at afturrinda avgjaldið.

4. stk. Landsstýrið fyriskipar nærri reglur fyri umsitingini av hesi reglu.

lægge en afgift på 40 % af den skattepligtige fortjeneste der ikke i forvejen er medregnet i den indtægt der skal beskattes.

Såfremt fortjenesten ved salg af aktiv allerede er medregnet i skatteopgørelsen, da den skattepligtige forlader landet, og en del af skatten er erlagt ved påligningen, skal der foretages en ny beregning af afgiften således:

Afgiften beregnet særskilt af fortjenesten reduceres med den forholdsmæssige del af skatten betalt for del pågældende år.

2. stk. Såsnart salg har fundet sted, skal sælgeren indlevere opgørelse over fortjenesten til ligningsrådet, opgjort i henhold til denne lovs regler.

Ligningsrådet kontrollerer opgørelsen og afsætter den afgift der skal erlægges til Føroya Gjaldstovu senest 2 uger efter, at sælgeren har modtaget underretning om afgiften fra ligningsrådet.

Af fortjeneste under kr. 25.000,- erlægges ingen afgift.

3. stk. Såfremt sælgeren inden 31. december året efter salget anvender fortjenesten i sin helhed til anskaffelse af aktiver der er nævnt i kapitlerne 1, 2 og 3 i denne lov, i forbindelse med erhverv, her i landet, kan han efter ansøgning få afgiften refunderet.

Ansøgning sendes ligningsrådet, der er bemyndiget til at refundere afgiften.

4 stk. Landsstyret foreskriver nærmere regler angående forvaltningen af denne regel.

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Niðurskriving av virðinum á virkisgøgnum er nett við rakstrarútreiðslu. Tá virkisgøgn eru ólik og virðisuppkingin tí ójøvn frá einum slag til annað, hava av praktiskum grundum verið nýttar fastar reglur fyri niðurskriving. Hesar svara tí ikki altíð til veruliga niðurgongd, tí í vissum førum hevur tílíkt virkisgagn tá tað er selt, givið vinning, ikki bert tað, sum fyrr hevur verið avskrivað, men eitt meira.

Eftir galdandi reglum skal avskriving, sum innvunnin er aftur við sølu, koma undir skattskyldu og hevur tí vanliga verið roknað við, at avskriving í vissum førum veruliga bert hevur verið ein skattakredittur, ið skal gjaldast aftur seinri.

Soleiðis er eisini í flestu førum, men undir vissum umstøðum kann skattgjaldari sleppa undan hesum skatti. Hetta hendir tá hann flytir úr Føroyum, fer út at sigla og kemur undir sjómannsskattaskipanina, sum geldur fyri donsk farmaskip ella tá maður doyr.

Í báðum teimum fyrru førunum skuldi verið gjørligt at forða fyri, at undan slappst her nevnda skatti. Her fer eina mest at verða talan um sølu av skipum ella skipapáttmálum, meðan sala av maskinum, effa túsum ikki gevur tað stóra og verður reglan helst eisini ov tung at umsita, um smærri sølur verða tiknar við, t.d. at maður selir ein bil, har kanska oakað er avskrivað. Rímuligast hevði tí helst verið at avmarka tað, sum skal koma undir skatt, tá skattgjaldari fer av landinum ella fer undir sjómannsskattaskipanina, t.d. til einar 25.000 kr.

Flytir skattgjaldari úr Føroyum, er hann ikki skattgjaldari her longur og fer hann undir sjómannsskattaskipanina so skal inntokan heima, áðrenn hann fór, ikki skattfast, men bert inntøkan av siglingini. Her verður ikki gjørligt við reglaligari skatting at nýta lands- og kommunnskattastigini. Har søluvinningurin veruliga hevur serligan lýdning, er hann væl einar 100.000 kr. ella meira. Skotið er tí upp at leggja við eitt fast gjald av vinninginum, nett til 40 %, ið fer at svara til tann skatt, sum vildi verið at tilsvara av vinningi uppá 100/150.000 kr. við roknaðum skattafrádrátti.

Hevur skattgjaldari nú bert verið burturstaddur styttri tíð og so kemur aftur fyri at seta okkurt á stovn ella fyri at fara uppí annað virki og hevur í ætlan at nýta fyrra søluvinningin til íløgu hevði verið rímuligt, at hesin fekk somu søndir, til at nýta nevnda vinning, sum aðrir, ið eru heima, har teir kunnu lata vinningin standa til árslok árið eftir at selt er. Skotið er tí upp, at verður vinningurin innanfyri somu freistir, sum annars eru fyrisettar í lógini, settur í virki her, skal avvarðandi fáa avgjaldið

afturgoldið at nýta sum forskotsavskriving. Her er lugsað um at skattgjaldari vil skifta virkisøki og tí hevur verið burtur fyri at søkja sær serkunuleika um tað, hann ætlar sær í gongd við. Hesin fær sostatt somu søndir, sum um hann hevði verið heima alla tíðina.

Tá eftiransingin við hesari lóg er løgd til líkningarráðið verður hildið rimuligt, at ráðið eisini hevur heimildina til at afturrinda avgjaldið og samsvarar hetta eisini við reglurnar um afturgjalding úr fløgugrunninum.

Flytir maður burtur aftaná at møguligur søluvinningur er taldur við í sjálvuppgávu hansara og hann kanska onki hevur goldið ella bert part, skal verða roknað um aftur soleiðis, at avgjaldið verður roknað fyri árið og verður so stórur partur av avgjaldinum sum svarar til ársportin av tí ikki goldna at rinda afturat.

25. mars legði landsstýrið fram soljóðandi uppískoytisuppskot:

Landsstýrið hevur lagt fram løgtingsmál nr. 101/73: Broytingar í avskrivingarlógini, og er hetta mál aftaná 1. viðgerð sent fíggjarnevndini.

Í uppskotinum er tíverri dottið burtur úr reglurnar um, hvussu avgjaldið verður býtt millum landskassan og kommununa.

Hetta skuldi staðið í 4. stk., meðan 4. stk. so skuldi verið 5. stk.

Landsstýrið skjýtur upp, at avgjaldið verður býtt við ⅓ til kommununa og ⅔ til landskassan og verður fíggjarnevndin biðin um í álitli sínum at tilskila sum

Broytingaruppskot

4. stk. verður orðað soleiðis:	Stk. 4 affattes således:
«4. stk. Avgjaldið verður býtt við ⅓ til kommununa og ⅔ til landskassan».	«Stk. 4. Afgiften fordeles med ⅓ til kommunen og ⅔ til landskassen.»
«4. stk. verður 5. stk.»	«Stk. 4 ændres til stk. 5.»

1. viðgerð 22. mars og málið beint í fíggjarnevndina, sum 28. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri løgtingið og var við fyrstu viðgerð beint í fíggjarnevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og tekur undir við uppskotinum.

FIGGJARNEVNDIN, 27. mars 1974.

Broyting til gr. 1 samtykt 21—0.
Gr. 1 so broytt samtykt 22—0.
Gr. 2 samt. u. atkv.
Lógaruppskotið so broytt samtykt at fara til 3. viðgerð 22—0.

3. viðgerð 3. apríl.
Lógaruppskotið sum samt. við 2. viðgerð nú samtykt 21—0.

---

102. Skattur av tingmannalønum

Á 1974, 15. mars, legði Signar Hansen, løgtingsmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg nr. 50 frá 2. juli 1963.

§ 1.

Í 4. §, 9. stk. ganga orðini «helmingurin av tí, sum hvør teirra hevur fingið útgoldið» út, og í staðin verður sett «tann parturin, ið er kostnaðarviðbót».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i lagtingslov nr. 50 af 2. juli 1963.

§ 1.

I § 4, stk. 9 udgår ordene «halvdelen af det til hvert medlem udbetalte beløb» og i stedet sættes «den del, som udgør omkostningstillæg».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Higartil hevur tann lóg verið galdandi, at løgtingsmannalønirnar einans eru skattaðar av helvtini.

(F.L. J. nr. 430-12-28).

Henda regla er óivað komin í gildi einaferð í tíðini, tá tingmannalønirnar vóru væl lægri enn nú, og tá menn roknaðu við, at tingmenn rindaðu allar útreiðslur av floksarbeiðinum og møguliga undirskot av blaðútgávu.

Í dag er tað so, at flokkarnir fáa almennan studning tit floksarbeiði og harvið til blaðútgávu, samstundis sum lønirnar eru hækkaðar.

Tað má tí haldast vera rímuligt, at tingmenn í framtíðini koma at gjalda skatt av allari tingmannalønini.

Á Føroya Løgtingi, 15. mars 1973.

Signar Hansen **Finnbogi Isaksen.**

1. viðgerð 19. mars og málið beint í liggjarnevndina, sum 6. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Tað eru tingmennirnir Signar Hansen og Finnbogi Isaksen, sum lagt hava málið fyri løgtingið, sum við fyrstu viðgerð beindi tað í liggjarnevndina.

Í viðmerkingunum til uppskotið vísa uppskotsstillararnir til at henda skipan um, at einans helmingurin av tingmannalønini er skattaskyldug, stavar frá eini tíð, har tingmannalønirnar vóru væl lægri enn nú, og at tað sostatt ikki er grund til at upprætthalda hesa skipan longur.

Liggjarnevndin, ið viðgjørt hevur málið, er av sonn áskoðan sum uppskotsstillararnir, at tað ikki er grund til at regulera tingmannalønirnar á tann hátt, at ein partur er skattafrír, men at tingarbeiði verður løgt sum annur arbeiði og skattað eins og aðrar inntøkur.

Nevndin hevur biðið líkningarráðið gjørt eina útrokning av, hvat ein broytt skattaskipan ávirkar lønarviðurskiftini hjá tingmonnum og er uppstillingin henda:

Løgtingsmenn, ið búgva uttanfyri Tórshavn.	Nýggja uppskotið kr.	Gamla skipanin kr.	Nýggja uppskotið kr.	Gamla skipanin kr.	Nýggja uppskotið kr.	Gamla skipanin kr.
Egin inntøka	10.000	10.000	30.000	30.000	50.000	50.000
Tingmannaløn	39.800	26.600	39.800	26.600	39.800	26.600
Tilsamans	49.800	36.600	69.800	56.600	89.800	76.600
Skattur ialt	15.500	10.350	24.050	18.335	33.300	27.100
Munur	5.150		5.715		6.200	
	9.500		10.300		11.200	

Løgtingsmenn, ið búgva í Tórshavn	Nýggja uppsk. kr.	Gamla skipan. kr.	Nýggja uppsk. kr.	Gamla skipan. kr.	Nýggja uppsk. kr.	Gamla skipan. kr.
Egin inntøka	10.000	10.000	30.000	30.000	50.000	50.000
Tingmannaløn	39.800	19.900	39.800	19.900	39.800	19.900
	49.800	29.900	69.800	49.900	89.800	69.900
Skattur ialt	15.500	7.900	24.050	15.550	33.300	24.100
Munur	7.600		8.500		9.200	
	13.500		15.300		17.600	

Her er roknað við løgtingsmannaløn 1/4 74 ..... kr. 39.800
hjá teimum, sum búgva í Tórshavn
og fyri teir uttanfyri Tórshavn
vistarhaldsgjaldið eftir gomlu skipanini har hert helvtin
av tí útgoldna er tikið við
Vistarhaldsgjaldið er ..... kr. 13.400

Í lógaruppskotinum er onki sagt um, hvørjar reguleringar, ið skulu verða gjørdar lønini viðvíkjandi ella viðvíkjandi vistarhaldspengunum, men í viðmerkingunum verður ført fram, at henda skipan ikki skal ávirka skattaskipanina hjá sitandi løgtingi, men verða ein skipan fyri «framtíðina». Nevndin heldur tí, at beinast er at lata landsstýrið gera uppskot til nýggja lønarskipan fyri løgtingslønir, har øll lønin verður skattað, og

leggja málið aftur fyri tingið í komandi tingsetu, tá verður tað eitt nýtt ting, sum sjálvt verður at taka avgerð um løn tingmanna.

Uppskot

Málið verður sent landsstýrinum, sum leggur tað aftur fyri tingið í komandi tingsetu.

Finnbogi Isaksen tekur undir við uppskotinum frá uppskotsstillarunum.

2. viðgerð 6. apríl.
Lógaruppskotið gr. 1 fall 9—0 og sostatt burturdottið.
Uppskotið frá nevndini samtykt 24—0.
Málið sostatt avgreitt.

---

103. Studningur til ungdómshús

Ár 1974, 15. mars, legði Signar Hansen, løgtingsmaður fram fyri tjóðveldisflokkin

Uppskot til løgtingslóg um studning til bygging av ungdómshúsum.

§ 1.

Úr landskassanum verða veitt upp til 40 % í studningi til bygging av ungdómshúsum í Føroyum, treytað av at hin parturin av byggikostnaðinum er fingin til vega á annan hátt.

(Ll. 50/74).

Uppskot til lagtingslov om tilskud til opførelse af ungdomshuse.

§ 1.

Landskassen yder op til 40 % i tilskud til opførelse af ungdomshuse på Færøerne, såfremt den øvrige byggesum er tilvejebragt på anden måde.

Landsstýrið setir gjøllari treytir fyri, nær studningurin kann veitast.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

Landsstyret sætter nærmere nærmere regler for ydelsen af tilskuddet.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Nógv verður tosað um ungdómin og ungdómsspurningar, men vit mugu ásanna, at sum heild er lítið gjørt fyri at bøta um umstøður hansara í fritíðini. Í fleiri bygdum hava ætlanir verið um at farið undir at bygt ungdómshús, men orsakað av at stuðulin hevur verið lítil og ongin frá tí almenna, eru hesar ætlanir ikki vorðnar til nakað. Hetta er stórt spell, tí í einum slíkum húsi kundi ungdómurin savnast til fundir, sjónleik, fyrilestrar og til annað gagnligt ítriv.

Í hesum uppskoti verður mælt til, at landsstýrinum verður heimilað at lata upp til 40 % av byggikostnaðinum í studningi. Hetta hevði elvt ungdóminum til at farið undir slík tiltøk og hevði komið honum og harvið øllum samfelagnum til góðar.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av tjóðveldisflokkinum lagt fyri løgtingið og varð við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Í viðmerkingunum til uppskotið verður ført fram, at í fleiri bygdum hava ætlanir verið um at farið undir at bygt ungdómshús, men orsakað av, at stuðulin hevur verið lítil og eingin frá tí almenna, eru hesar ætlanir ikki vorðnar til nakað.

Figgjarnevndin, sum viðgjørt hevur málið, vísir á,

1) at har talan er um hús í samband við ítróttarvøllir, hevur í flest øllum førum verið latin studningur við sonnu prosentum sum lógmælt er í uppskotinum. Hesi hús mugu ætlast at koma undir tað, ið nevnt verður «ungdómshús».

2) Fyri fleiri árum síðani samtykti løgtingið, at ¼ av stuttleikaskattinum skuldi verða lagdur í grunn til mentunarmál, og var her serliga hugsað um slíkt ungdómsarbeiði.

Úr hesum grunni verður játtaður studningur bæði til bygging av ungdómshúsum, men eisini til umbygging og innrætting av verandi bygningum til ungdómshús. Peningur er í grunninum, men er einans ein umsókn um stuðul úr hesum grunni í løtuni, men heimildin til at veita stuðul, hevur landsstýrið sum er. Men kann hetta uppskot hjálpa til og skunda undir at bygd verða slík hús, kann nevndin taka undir og mæla tinginum til at gera tað við og setur fram fylgjandi

T i l m æ l i :

Uppskotið verður at samtykkja.

2. viðgerð 3. apríl.
Lógaruppskotið og tað at fara til 3. viðgerð samt. 24—0.

3. viðgerð 4. apríl.
Lógaruppsoktið sum samt. við 2. viðgerð nú samt. 25—0.

---

104. Hernaðarmálið

Fyrispurningur frá E. Patursson til løgmanns

Fyrispurningurin fráboðaður og samtykt at svara 15. mars við 20—0.
Svaraður, umrøddur og avgreiddur 25. mars.

Í ólavsøkutingsetuni 1970 varð hendla samtykt gjørd:

«Føroya Løgting biður landsstýrið siga ríkisstjórnini frá, at tað samhærl løgtingsviðtøku frá 13. apríl 1940 er løgtingsins støða, at Føroyar verða hildnar uttan fyri ósemjur landanna millum og hermálsligar samgongur, og at løgtingið samhært løgtingsmáli nr. 14/1960 mótmælir at hermenn verða knýttir at Sornfellis- ella Eiðisfoðini og noktar fyri, at stríðsútgerð verður goymd á føroyskum land- ella sjóøki.

Landsstýrið verður samstundis biðið heita á ríkisstjórnina um at kanna líkindini nú at seta hesar løgtingssamtyktir í verk.

Úrslitið av hesi kanning verður lagt fyri løgtingið í vetrarlingsetuni 1970 - 71.»

Løgmaður verður biðin um at upplýsa fyri tinginum, hvat hent er í hesum máli og tá serstakliga, hvat landsstýrið hevur tikið sær fyri og hví henda samtykt ikki enn er sett í verk, tó at nú brátt eru liðin fýra ár síðan hon var gjørd.

Á Føroya løgtingi, hin 15. mars 1974

TJÓÐVELDISFLOKKURIN

Erlendur Patursson.

Skilji, at spyrjarin hevur ikki haft stundir at bíða eftir svari landsstýrisins, áðrenn málið var flutt niður á fólkating, ella eisini er hann, aftaná at spurninguriu er settur, vorðin varugur við, at spurninguriu fyrr er svaraður av mær her á tingi.

Kann endurtaka, at landsstýrið avgreiddi nevndu samtykt til ríkisstýrið stutt eftir, at málið var avgreitt úr tinginum. Svarið, sum táverandi statsministari Baunsgaard gav um, at málið vildi vera tikið við í trygdarpolitisku metingar stjórnarinnar, er eisini tinginum kunnugt, eins og tingmenn tá fingu til kunnleika sín ritgerð um danskar trygdarpolitikk, sum hann lá var.

Endaligt nýtt fyriliggur einki í málinum, men vil landsstýrið í samráðingum sínum við stjórnina framhaldandi virka fyri, at samtyktin verður sett í verk.

Tórshavn, tann 25. mars 1974.

Atli P. Dam.

---

105. Føroyskur skúli

Ár 1974, 15. mars, legði Hamus við Høgadalsá, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar.

Føroya løgting samtykkir, at skúlaskipanin verður løgd undir føroyskt lóggávu- og umsitingarvald frá 1. august 1975.

Føroya landsstýri verður álagt, í samstarvi við serkøna 5-manna millumtinganevnd, sum tingið velur í hesi tingsetu, at gera allar neyðugar fyrireikingar í sambandi við umskipanina og at gera uppskot til komandi skúlaskipan, sum løgd verður fyri komandi tingsetu í januar 1975.

Viðmerkingar:

Flokkurin mælir løgtinginum til, at nú verður avgerð tikin um at leggja alla skúlaskipanina undir føroyskt lóggávu- og umsitingarvald. Tað er ivaleyst so, at flestir tingmenn og stórur meiriluti av fólkinum er av teirri áskoðan, at fyrsta mál, ið eigur at vera yvirtikið, er skúlin.

Hetta umskifti er ikki sum at siga tað. Tað krevur kanningar og fyrireikingar, skal dygd vera í og umskiftið vera til tað betra. Tí mæla vit til, umskiftið verður sett í verk frá skúlaársbyrjan 1975. Allar tær mongu lógir, kunngerðir og reglugerðir og boðskriv á skúlamálsøkinum skulu handfarast, og bæði tað formella grundarlagið viðvíkjandi sjálvari yvirtøkuni gerast og harnest uppskot til nýtt grundarlag undir føroyska skúlanum, skúlalóg fyri barnaskúla og aðrar, og reglugerðir og fyrisetingar fyri tey ymsu skúlamálsøkini. Og so neyðugar figgjarligar fyrireikingar.

Á løgtingi er somuleiðis uppskot viðvíkjandi skúlabókagerð og útgávu, og hetta mál hevur ikki minni týdning í sambandi við føroyskan skúlaskap. Vit halda, at sjálvur skúlastruktururin eigur at broytast á radikalan hátt, soleiðis at føroyski skúlin ikki bert í formunum og í innihaldi verður broyttur, men at hansara stevna verður sum best at ala og læra børn og ungdóm at liva sítt lív í føroyska samfelagnum.

Tað er uppskot okkara, at Føroya løgting longu nú ger stevnumiðarsamtyktina, og so umsitingarvaldið við 5-mannanevndini sær til hjálpar

(F.L. J. nr. 2100-1-4).

fer til verka og skapa grundarlag fyri føroyskum skúla frá skúlaársbyrjan 1975.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í skúlanevndina, sum 4. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Málið: Føroyskur skúli er lagt á ting av Tjóðveldisflokkinum og varð við 1. viðgerð beint í skúlanevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta Haldor Hansen, Leon Joensen og Hilmar Bech, ið onki uppskot setur fram, og ein minniluta Signar Hansen og Hákun Djurhuus, ið mælir til at samtykkja uppskotið.

2. viðgerð 5. apríl.
Uppskotið fall 12 — 0.
Málið sostatt alt burturfallið.

---

106. Broytingar í skatta- og tolllógini

Ár 1974, 15. mars, legði Hans við Høgadalsá, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot
til
samtyktar

Løgtingið áleggur landsstýrinum:

1) at gera uppskot um eina skipan, sum veitir vinnulívinum bilig lán og

(F.L. J. nr. 430-12-29).

neyðugar studning, og at seta uppskot um avløku av avskrivingarlógini samstundis.

2) at koma við greinligum uppskoti um broytingar í lógini um innflutningsgjald, so at allar neyðsynjarvørur verða undantiknar innflutningsgjaldi.

3) at koma við uppskoti um broytingar í lógini um innflutningsgjald, so at sethúsabyggjarar kunnu fáa innflutningsgjaldið aftur goldið, tá byggingin er liðug.

Viðmerkingar:

Skattalógin er órættvís, og hon verður gjørd uppaftur órættvísari við avskrivingarlógini frá 1971. Hesar báðar lógir eru so fløktar, at bert fólk, sum hava granskað tær leingi og væl, hava møguleika at nýta tær til at sleppa undan skatti. Arbeiðsmaðurin, lønmóttakarnir og fiskimenn hava ikki høvi til at seta seg nóg væl inn í hesar lógir til, at teir kunnu brúka tær ella misbrúka tær til at sleppa mestsum undan at gjalda skatt.

Tað er stór ónøgd millum manna um, at tær hægru inntøkurnar fáa lítlan og ongan skatt, meðan tær lægru inntøkurnar verða meint raktar. Her er tað fyrst og fremst avskrivingarlógin, sum verður brúkt, einamest til skipabygging hjá partsreiðaríum.

Tað er greitt, at vinnulívið kann ikki klára seg uttan stuðul av einumhvørjum slag. Tað er tó samstundis greitt, at tann stuðul, sum verður veittur gjøgnum avskrivingarnar, er óleppin fyri tað almenna, tí tað hevur onki eftirlit við, hvussu stórur stuðulin er. Tað hevði verið gagnligari, at tað almenna útvegaði vinnulívinum bíligari lán og annars veitti beinleiðis studning eisini til rakstur, um hetta er neyðugt.

Prísirnir á neyðsynjarvørum, so sum mati og klæðum, hækkar fyri hvønn dag. Tað er torført hjá teimum lægru inntøkunum at fáa tað at røkka til, og tað má tí haldast at vera heilt órímuligt, at tað almenna skal leggja skatt á júst neyðsynjarvørurnar. Her verður tí mælt til, at 13 % innflutningsgjaldið á neyðsynjarvørum verður tikið av.

Tingið hevur havt sethúsaspurningin til viðgerðar í hesi selmi, men enn hevur ikki eydnast at fingið meiriluta fyri nøkrum uppskoti. Hugsandi er, at ein meiriluti av løgtinginum vildi tikið undir við, at sethúsabyggjarar, sum senja er um eru illa fyri í dag, kundu sloppið undan sertigum gjøldum til landskassan. Her verður tí skotið upp, at innflutningsgjaldið á byggitilfari til sethús skal rindast sethúsabyggjarunum aftur, tá hann hevur bygt.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum hin 4. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Tað er tjóðveldisflokkurin, sum lagt hevur málið fyri tingið. Málið var við fyrstu viðgerð beint í tiggjarnevndina.

Í uppskotinum verður mælt til at áleggja landsstýrinum at gera uppskot um skipan, sum veitir vinnulívinum bílig lán og neyðugan studning, og at allar neyðsynjarvørur verða undantiknar innflutningsgjaldi og samstundis at seta uppskot um avtøku av avskrivingarlógini. Eisini verður álagt landsstýrinum at seta fram uppskot um broytingar í lógini um innflutningsgjald, so selhúsabyggjarar kunnu fáa innflutningsgjaldið aftur-goldið, tá teir hava bygt.

Ein meirluti í nevndini (J. Fr. Øregaard, Hilmar Kass, Trygve Samuelsen, Andreas Djurhuus og Knút Wang) heldur seg ikki kunna mæla tinginum til at samtykkja uppskotið í tí líki, tað er sett fram. Í stk. 1 verður mælt til bílig lán og studning. Men skal landskassin kunna veita bílig lán og studning til útbygging av vinnulívinum, mugu hesar veitingar fyrst verða tiknar frá fólkinum við annaðhvørt innflutningsgjaldi (tolli) ella skatti. Í stk. 2 verður mælt til at avlaka innflutningsgjaldið á neyðsynjarvørum, har húsabyggililfar má roknast at koma inn undir, meðan tað í stk. 3 verður mælt til at afturrinda innflutningsgjaldið, ið selhúsabyggjarar hava goldið.

Meirlutin heldur, at tað hevði verið greiðari, um uppskotsstillararnir sjálvir settu fram uppskot, um hvat tað er teir ynskja broytt, so tingið kundi tikið støðu til broytingarnar. Um so er, at landsstýrið heldur, at broytingar eru neyðugar, og at tað ber til at avlaka gjøld, sum nú eru á innflutninginum, uttan at hetta skerjir ov nógv møguleikan fyri at lata tær veitingar, sum tilmældar eru, so hevur landsstýrið bæði rætt og møguleika til at seta fram uppskot á tingi um hetta.

Meirlutin setur onki uppskot fram í hesum máli.

Ein minniluti í nevndini (Finnbogi Isaksen og Hmus við Høgadalsá) mælir til at samtyggja uppskotið.

2. viðgerð 6. apríl.

Uppskotið fall 6- -0.

Alt málið sostatt burturfallið og avgreitt.

107. Bygging av 25 útróðrarbátum í 100 tons støddini

Ár 1974, 15. mars, legði Finnbogi Isaksen, løgtingsmaður, fyri tjóðveldisflokkin, fram

Uppskot til løgtingslóg um bygging av 25 útróðrarbátum.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp neyðug lán og at seta í verk bygging á føroyskum skipasmiðjum av 25 útróðrarbátum í 100-tons støddini.

§ 2.

Landsstýrið setir eina skipabyggjanevnd at fyrireika og geva ráð byggingini viðvíkjandi. Landsstýrið velur tveir limir utan tilmæli, ein eftir tilmæli frá Føroya Skipara- og Navigatørfelag, ein eftir tilmæli frá Føroya Reiðarafelag og ein eftir tilmæli frá útróðrarfeløgunum.

§ 3.

Útróðrarbátarnir verða seldir samtøkum og feløgum. Eftir uppskoti frá tí í 2. § settu nevnd, áseta landsstýrið og figgjarnevndin keypstreytirnar.

§ 4.

Henda lóg kemur í gildi beinanvegin.

(F. L. j. nr. 1414-8)

lagtingslov om bygning af 25 hjemmefiskerbåde.

§ 1.

Landsstyret får bemyndigelse til landskassens vegne at optage nødvendige lån og igangsætte byggeri på færøske skibsværfter 25 hjemmefiskerbåde i 100-ton størrelsen.

§ 2.

Landsstyret nedsætter et skibsbygningsudvalg til at forberede og vejlede vedrørende byggeriet. Landsstyret udnævner to medlemmer uden at indhente indstilling, en efter indstilling fra Føroya Skipara- og Navigatørfelag, en efter indstilling fra Føroya Reiðarafelag og en efter indstilling fra hjemmefiskerforeningerne.

§ 3.

Fiskerbådene sælges kooperative foretagender og selskaber. Efter forslag fra det i § 2 nedsatte udvalg, fastsætter landsstyret og finansudvalget købsbetingelserne.

§ 4.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Tey seinastu árini er komin ein hópur av útróðrarbátum til landið, mest gamlir bátar, summir teirra bygdir so tíðliga sum í 30-unum.

Føroyingar hava ringar royndir av at keypa gomul, brúkt før. Her verður tí skotið upp, at tað almenna fær útbyggingina av útróðrarflotanum í eina betri legu við at seta í verk eina serinbygging av 25 útróðrarbátum í 100-tons støddini. Hesir bátar skulu latast samtøkum og feløgum til keyps. Byggingin eigur at vera biligari, tá so nógvir bátar verða bygdir í senn og av sama slag.

Hugsanin er at nýta teir bátarnar sum fyrimynd, sum eru bygdir á Vestmanna Skipasmiðju tey seinastu árini, men annars skal ein nevnd av kønum monnum innan fiskivinnuna vera vegleiðandi undir arbeiðinum.

Vestmannabátarnir eru væl umtóktir av monnum, og teir lykjast at hava møguleikar at bera seg. Teir eru væl egnaðir til veiðu bæði undir Føroyum og Íslandi.

Íløgan pr. mann á hesum bátum verður ikki so stór sum á teimum førum, ið veiða á fjarleiðunum, t.d. trolarunum. Vísini eigur at verða havt í huga, at teir bátar, sum veiða á nærleiðum og landa veiðuna í Føroyum, skapa grundarlag fyri nógvum arbeiði á landi.

Veiðurættur okkara á fjarleiðum verður skerdur á hvørjum ári og kemur eisini at verða skerdur tey komandi árini. Tað verður neyðugt at fáa sum mest burtur úr ti fiskiríkidømi, sum finnast á nærleiðunum. Fyri at fán rættuliga gongd á hetta arbeiði má tað almenna leggja eina miðvísa útbygging til rættis, so sum mælt verður til í hesum uppskoti.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í figgjarnevndina, sum 27. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av Tjóðveldisflokkinum lagt fyri løgtingið og var við fyrstu viðgerð beint í figgjarnevndina.

Nevndin hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (J. Fr. Øregaard, Knút Wang, Hilmar Kass, Trygve Samuelsen og Andrias Djurhuus) setur einki uppskot fram.

Minnilutin (Hanus við Høgadalsá og Finnbogi Isaksen) tekur undir við uppskotinum.

FIGGJARNEVNDIN, 27. mars 1974.

2. viðgerð 1. apríl.
Gr. 1-2-3 fullu við 6—0.
Alt málið sostatt burturfallið og avgreitt.

108. Broyting í fiskarílógini frá 1893

Ár 1974, 15. mars, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í fiskarílógini frá 1893.

§ 1.

§ 1, 2. stk. í «fiskerilov for Færøerne» nr. 95 frá 14. april 1893 verður orðað soleiðis:

«Tað er ikki loyvt at seta gørn ella at kasta ella draga nót nærri enn 100 m frá ósamunna, mált frá hægstu fjørn. Frá hesi reglu kann landsstýrið eftir umsókn veita undantaksloyvi til veiðu av sild við gørnum og til at kasta ella draga nót eftir sild á leiðum, har slíkur veiðuháttur er vanligur.»

§ 2.

Henda lóg fær gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i fiskeriloven af 1893.

§ 1.

§ 1, stk. 2 i fiskerilov for Færøerne nr. 95 af 14. april 1893 formuleres således:

«Det er ikke tilladt at sætte garn eller at kaste eller trække not nærmere end 100 m fra elvemunding målt fra ebbe ved springflod. Fra denne bestemmelse kan landsstyret meddele dispensation til fangst af sild med garn og til at kaste eller trække not efter sild eller sej på steder, hvor sådanne fangstmetoder er sædvanlige.»

§ 2.

Denne lov træder straks i kraft.

Viðmerkingar:

Í løgtingssetuni 1972 samtykti løgtingið eftir uppskoti frá landsstýr-

(F.L. J. nr. 1509-1-1).

inum at broyta fiskarilógina frá 1892 m.a. soleiðis, at tað ikki skuldi vera loyvt at seta gørn nærri landi enn 30 m mált frá hægstu fjøru, við áarósa skuldi tó ikki vera loyvt at seta gøru ella nót kastast ella dragast nærri enn 100 m, reglan var 10 m. Løgtingið samtykti eisini at geva landsstýrinum heimild at gera undantak frá forboðnum, tá ið talan er um veiðu eftir sild og seiði. Vist verður til løgtingsmál nr. 66 í 1972.

Motiveringin fyri forboðnum at nýta gørn nærri enn 30 m frá landi var, at á hesum sjógvi ferðast sjósíl og laksur, tá ið tey leita upp í áirnar.

Fiskivinnunevndin, ið viðgjørdi málið, helt tó, at forboðið í vissum førum kundi koma garnaveiðu eftir síld illa fyri, tí ofta gongur síld um várið nær landi. Eisini helt nevndin, at eitt ófrávíkiligt forboð um nótakast nærhendis áarósum kundi skerja møguleikarnar hjá hesum gamla veiðihátti. Nevndin helt tí, at landsstýrið skuldi hava undantaksheimild í báðum her nevndu førum.

Reglan um undantak frá 30 m fráleikanum úr landi hevur víst seg heldur torfør at fyrisita. Skal undantaksreglan hava nakrun veruligan týdning, mugu menn, ið veiða síld við gørnum, hava standandi undantaksloyvi ella standandi undantaksloyvi vera givið fyri ávís øki, eitt nú fyri Skálafjørðin. Forboðsreglan verður tí gjøgnumgarðað, so lítið verður eftir av henni, tað verður bert tað eftir, at hon áleggur monnum eina í vanleikanum óneyðuga skyldu at søkja um undantaksloyvi og undir straffábyrgd, um teir ikki søkja.

Viðvíkjandi áarósum er reglan óbroytt.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í fiskivinnunevndina, sum 29. mars legði fram soljóðandi

Álit

Málið er framlagt av landsstýrinum og varð við 1. viðgerð 19. mars 1974 beint í fiskivinnunevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og hevur býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Tórálvur Olsen, Poul J. Olsen, Hákun Djurhuus og Ove Mikkelsen) ásannar, at reglan um generelt forboð móti garnaveiðu nærri landi enn 30 m við møguleika fyri at veita undantaksloyvi er ov torfør at umsita. Nevndin hevur fingið at vita, at tað er vársildin, sum gongur nær landi, og at tað ikki er neyðugt fyri at veiða summarsild at seta gørn nærri landi enn 30 m. Fyri at stuðla tað arbeiði, sum Føroya Silaveiðufelag hevur gjørt og ger fyri at nøta um síla- og laksastovnin, heldur meirilutin, at forboðið at nýta gøru ov nær landi, eigur at standa við tær árstíðir, har hetta ikki nervar sildaveiðuna.

Vísandi til frammanfyristandandi mælir meirilutin til í staðin fyri uppskot landsstýrisins at samtykkja hetta

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í fiskarílógini frá 1893.

§ 1.

Í «Fiskerilov for Færøerne» nr. 95 frá 14. apríl 1893 verður í § 1, stk. 2, aftanfyri orðini «Tað er ikki loyvt» skotið inn: «í tíðini 1. juni til 1. februar».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om ændring i fiskeriloven af 1893.

§ 1.

I «Fiskerilov for Færøerne» nr. 95 af 14. april 1893 indskydes i § 1, stk. 2, efter ordene «Det er ikke tilladt»: «i tiden 1. juni til 1. februar».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Ein minniluti í nevndini (Leon Joensen) mælir til at samtykkja uppskot landsstýrisins.

Broytingaruppskot frá meiriluta í nevndini fall 10—0.
Lógaruppskotið gr. 1 samt. 17—0.
Gr. 2 samt. uttan atkv.gr.
Lógaruppskotið so samtykt at fara til 3. viðgerð 18—0.

3. viðgerð 4. apríl.
Lógaruppskotið, ið var samtykt við 2. viðgerð, fall við 8—0.

109. Studningur til Fuglafjarðar, Runavíkar og Nes kommunur til uppfyllingar fyri grundøkjum við avvarðandi havnir

Ár 1974, 22. mars var av figgjarnevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Í Fuglafirði hevur trolvirkið P/f Vónin søkt Fuglafjarðar havn um øki til at byggja virkishús á 8—800 m² til støddar. Til taks er einki øki, so fyllast má út nakað innan fyri bryggjuna, men í sambandi við hana; kostnaðurin er mettur at verða 500.000 kr. Kommunan vil fegin koma umsóknini á møti og hevur tí søkt um studning. Byggiætlan er góðkend av landsverkfrøðinginum.

Í Runavíkar og Nes kommunum snýr tað seg um uppfylling til byggiøkir, so vaksast kundi um ávikavist flakavirkini hjá p/f Lyngfrost og p/f Nyki. Hesi arbeiði eru framd at kalla og vórðu góðtikin av landsverkfrøðinginum.

Nevndin skal mæla tinginum til at ganga umsóknunum á møti og loyvir sær at sela fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um studning til Fuglafjarðar, Runavíkar og Nes kommunur til uppfyllingar fyri grundøkjum við avvarðandi havnir.

§ 1.

Úr landskassanum verður veittur studningur til Fuglafjarðar, Runavíkar og Nes kommunur til regulering v.m. av grundøkjum við havniua í niðanfyri nevndu kommunum. Studningurin verður 75 % av byggipeninginum, tó í

lagtingslov om tilskud til Fuglafjarðar, Runavíkar og Nes kommuner til opfyldning for grundarealer ved vedkommende havne.

§ 1.

Af landskassen ydes tilskud til Fuglafjarðar, Runavíkar og Nes kommuner til regulering m.v. af grundarealer ved havnen i nedenfor anførte kommuner. Tilskuddet andrager 75 % af anlægsomkostningerne, dog højst 75 % af neden

(L.l. 53/74).

mesta lagi 75 % av niðanfyri tilskilaðu upphæddum. Studningarnir verða goldnir við eins stórum ársgjøldum í 5 fylgjandi fíggjarár, fyrstu ferð í fíggjarárinum 1974/75:

	kr.
1. Fuglafjarðar kommuna	500.000
2. Runavíkar kommuna	300.000
3. Nes kommuna	320.000
	1.120.000

§ 2.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

for anførte beløb. Tilskuddene udbetales i lige store årlige rater gennem 5 på hinanden følgende finansår, første gang i finansåret 1974/75:

	kr.
1. Fuglafjarðar kommune	500.000
2. Runavíkar kommune	300.000
3. Nes kommune	320.000
	1.120.000

§ 2.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

2. viðgerð 2. apríl.

Gr. 1 samtykt 22—0. Gr. 2 samt. uttan atkv.gr.

Lógaruppskotið samtykt at fara til 3. viðgerð 23—0.

5. apríl frá fíggjarnevndini framlagt soljóðandi

Broytingaruppskot

Skopunar kommuna hevur sókt um studning til regulering av øki á havnalaguum, har viðkað verður um flakavirkið. Samhært ætlanina verður virkið viðkað tætt at berginum, so um ikki verður sprongt burtur áðrenn, verður nærum onki øki uttanum. Hugsan teirra er tí nú, áðrenn arbeiðið byrjar, at fáa sprongt nakað av berginum burtur, og er tað til hetta arbeiðið, studningur verður søktur til.

Landsverkfrøðingurin hevur havt málið til úttalilsi og tilmælir, at arbeiðið verður gjørt.

Umsóknin varð av tinginum beind til viðgerðar í fíggjarnevndini, sum tekur undir við málinum og mælir tinginum til at játta Skopunar kommunu umsøkta studning, og setur fram fylgjandi

Broytingaruppskot:

Í § 1, aftaná «Nes kommuna» verður sett: «Skopunar kommuna kr. 250.000».

Samanteljingin verður rættað til kr. 1.370.000.

3. viðgerð 5. apríl.
Broytingaruppskot frá nevndini (Skopunar havn) samt. 22--0.

Lógaruppskotið so broytt samtykt 22—0.

---

110. H.F.-undirvísing í Føroyum

Ár 1974, 15. mars, legði Ásbjørn Joensen, landsstýrismaður, fram

Uppskot
til
samtyktar

Landsstýrið heilir á løgtingið um at taka undir við, at HF-undirvísing verður sett á stovn frá skúlaárinum 1974/75 og at geva landsstýrinum heimild til at samráðast við ríkismyndugleikarnar um hesa skipan.

Viðmerkingar.

Uppskotið um stovnsetan av HF-undirvísing í Føroyum er fyri ein part orsakað av einum ynski um at gera læraraútbúgvingina á Føroya Læraraskúla betri, fyri ein part orsakað av einum ynski um at geva teimum, sum hava verið úti í vinnulívinum, eitt nýtt útbúgvingartilboð, um tey ynskja sær víðari útbúgving, serliga á tí bókliga økinum.

Í hesum sambandi kann upplýsast at landsstýrinum kunnugt fáa í løtuni 25 føroyingar HF-útbúgving í Danmark.

Fyribils samráðingar hava verið við «direktoratet for gymnasieskolerne og HF-undervisningen», og úrslitið av hesum samráðingum er, at grundarlag er fyri at stovna HF-flokkar við studentaskúlan, og at møguligt er í ein vissan mun at seta í verk HF-undirvísing sum undirvísing í einstøkum lærugreinum á bygd. Í hesum sambandi verður gjørt vart við, at treytirnar fyri at seta í verk HF-undirvísing eru: 1. nóg stórt næmingatal, 2. hóskandi høli, og 3. lærarar, sum eru førir fyri at røkja undirvísingina.

(F. L. j. nr. 2104-2-2)

Meirútreiðslurnar fyri einum árgangi á studentaskúlanum verða ætlandi umleið 125.000 kr., ella í fíggjarárinum 1974/75 80.000 kr., meðan meirútreiðslurnar í 1975/76 ætlandi verða umleið 250.000 kr.

Meirútreiðslurnar til HF-undirvísing á bygd verða ætlandi umleið 145.000 kr. Tá er roknað við, at samlaða tímatalið verður 40 tímar um vikuna.

Meðan ætlanin er, at landið ber útreiðslurnar av HF-undirvísingini á studentaskúlanum, er ætlanin, at lønarútreiðslurnar til HF-undirvísing á bygd skulu býtast millum ríkis- og landskassan á sama hátt sum lærarútreiðslurnar í fólkaskúlanum, t.e. 55% til ríkiskassan og 45% til landskassan. Útreiðslurnar hjá landskassanum verða eftir hesum 65.000 kr. viðvíkjandi undirvísingini á bygd, ella í fíggjarárinum 1974/75 umleið 40.000 kr., meðan útreiðslurnar tilsamans hjá landskassanum í fíggjarárinum 1974/75 verða umleið 120.000 kr.

Tað kann í hesum sambandi upplýsast, at við tað at ongin heimild er til at stovna HF-undirvísing í fólkaskúlanum er «undirvísingsministeriet» sinnað at søkja sær neyðuga heimild at rinda útreiðslurnar hjá ríkiskassanum til HF-undirvísing á bygd í eini fíggjarnevndarsamtykt.

Viðmerkt verður, at reglurnar um HF-undirvísing í Danmark í løtuni verða endurskoðaðar, og at nýggjar reglur ætlandi verða settar í gildi 1. juli 1974. Tað er tí ikki gjørligt nú at seta fram uppskot til kongaliga fyriskipan fyri Føroyar um HF-undirvísing her.

Landsstýrið heitir tí á løgtingið um longu nú at taka undir við, at HF-undirvísing verður sett á stovn frá skúlaárinum 1974/75, soleiðis at uppskot til kongaliga fyriskipan v.m. verður lagt fyri tingið komandi ólavsøkutingsetu.

1. viðgerð 20. mars og málið beint í skúlanevndina, sum hin 4. apríl legði fram soljóðandi

Allt

Landsstýrið hevur lagt málið á ting, og við 1. viðgerð varð tað beint í skúlanevndina, sum hevur viðgjørt málið.

Nevndin mælir til, at samtykkja uppskotið frá landsstýrinum.

2. viðgerð 5. apríl.

Uppskotið samtykt 20—0.

Málið sostatt avgreitt.

111. Lán til Strandferðsluna til bygging av goymsluhúsi v.m. í Klaksvík

Á 1974, 15. mars, legði Atli Dam, løgmaður, fram

Uppskot
til

løgtingslóg um heimild til lántøku.

§ 1.

Landsstýrinum verður heimilað landskassans vegna at taka upp lán uppá kr. 750,000,- til byggjan av goymsluhølum v.m. í Klaksvík til Strandferðsluna.

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

lagtingslov om bemyndigelse til optagelse af lån.

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til på landskassens vegne at optage lån op til kr. 750,000,- til opførelse af pakhus m.v. i Klaksvík til kystfarten.

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Í samband við ferjuleguna í Klaksvík er tað neyðugt at útvega hóskandi goymslurúm til vørurnar, ið skulu umskipast, híðirúm og skrivstovuhølir hjá strandferðsluni.

Tað hevur víst seg ógjørligt at fáa hóskandi hølir til leigu og tí hevur landsstýrið gjørt av at fara undir bygging.

Kostnaðurin av hesi bygging er ætlaður til kr. 750,000,-.

1. viðgerð 19. mars og málið beint í tinggjarnevndina, sum 22. mars legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál er av landsstýrinum lagt fyri tingið og var við fyrstu viðgerð beint í tinggjarnevndina.

Landsstýrið vísir á, at tað í Klaksvík er torført at leiga høli til strandferðsluna, bæði pakkhúsrúm til vørurnar, sum umskipast skulu frá skipi til skip, men eisini til skrivstovubrúk.

(L.l. 59/74).

Hesin bygningur verður mettur til at kosta kr. 750.000, men eru hvørki teknингar ella nøkur verulig kostnaðarætlan viðløgd.

Figgjarnevndin heldur, at áðrenn endalig støða verður tikin til byggingina, mugu bæði teknингar og kostnaðarætlan verða fingin til vega, men tekur aunars undir við málinum og setur fram fylgjandi

Uppskot

I. Uppskot landsstýrisins verður at samtykkja.
II. Áðrenn endalig avgerð verður tikin um bygging, verður málið við teknингum og kostnaðarætlan lagt fyri figgjarnevndina til góðkenningar.

2. viðgerð 26. mars.
Gr. 1 í lógaruppskotinum samtykt 21—0.
Gr. 2 samt. uttan atkv.gr.
Lógaruppskotið at fara til 3. viðgerð samt 23—0.

3. viðgerð 29. mars.
Punkt 2 samtykt 26—0.
Lógaruppskotið sum samt. við 2. viðgerð nú samt. 26—0.

---

112. Fyrispurningur

frá Ovi Mikkelsen til ríkisumboðið.

Fyrispurningurin fráboðaður 19. mars. — 20. mars samtykt at fyrispurningurin skuldi svarast.
26. mars var fyrispurningurin svaraður og umrøddur.

Fyrispurningur til ríkisumboðið.

Løgtingsmál nr. 112/1973: Viðvíkjandi sunnaru sýslu, Suðuroy.

1. 1. nov. 1968 samtykti landsstýris nevniluti, at summara sýsla skuldi varðveitast sum sjálvstøðug sýsla.

1. **spurningur:** Hevur ríkisumboðið sent hetta tilmæli víðari, og hvat aftursvar kom frá Justitsministeriinum ?

2. 9. nov. 1971 sendi Justitsministeriið einsljóðandi brev til fútan, ríkisumboðið og statsministeriið, har frágreitt verður, at sýslumaðurin fyri Suðuroyar summaru sýslu skal flytast til Sands, og sýslumaðurin á Tvøroyri eisini verður seltur sum sýslumaður í summaru sýslu.

2. **spurningur:** Er hervið støða tikin um, at summara sýsla skal niðurleggjast, so at skilja at eingin sýslumaður skal verða í summaru sýslu ?
Um so er, við hvørjari motivering verður henda støða tikin ?

3. Í nevnda brævi verður m.a. skrivað: «Man (justitsministeriet) skal herefter **påny** anmode om en udtalelse om, hvorvidt stillingen som sysselmand **for** Suderø søndre syssel **bør** nedlægges».

3. **spurningur:** Er úttalilsi gjørt um hetta mál, og hvussu ljóðaði tað ? Hvør skal gera hetta tilmælið ? Ríkisumboðið ? einsamalt ella eftir tilmæli frá landsstýrinum ?

4. Umleið somu spurningar setti eg fyri løgmann harra Atla Dam tann 13. mars 1972, og svaraði hann, at landsstýrið var ikki kunnugt um innihaldið í nevnda brævi, og at landsstýrið ikki var biðið um ummæli.

4. **spurningur:** Hví var landsstýrið ikki biðið um ummæli ?
Er hetta gjørt nú ? og nær ?
Hvussu ljóðar hetta ummæli viðvíkjandi summaru sýslu.

Á Føroya løgtingi, 15. mars 1974.

Ove Mikkelsen.

Svar på forespørgsel fra lagtingsmand Ove Mikkelsen

Da Ovi Mikkelsens forespørgsel deler sig i flere spørgsmål, flere af dem med underspørgsmål, har jeg tilladt mig at gentage spørgsmålene og at besvare hvert enkelt for sig.

1. 1 november 1968 vedtog flertallet i landsstyret at søndre syssel skulle bevares som selvstændigt syssel.

1. spørgsmål: Har rigsombudet sendt denne anbefaling videre og hvilket svar er der kommet fra justitsministeriet ?

Svar: Landsstyrets udtalelse af 4. oktober 1968 blev den 13. november 1968 tilstillet politimesteren til udtalelse. Statsministeriet blev samtidig underrettet. Siden blev hele sagen med landsstyrets erklæring og politimesterens (Jørgen Larsens) udtalelse, der anbefalede nedlæggelse af sysselmandsstillingen i Våg, videresendt til justitsministeriet. Rigsombudsmanden (Mogens Wahl) anbefalede ligeledes, at stillingen blev nedlagt, idet det dog var en forudsætning for rigsombudsmandens udtalelse, at der blev oprettet afdelinger af Færøernes oppebørselskontor i Tverå og Våg, og at der blev bibeholdt et sysselkontor med en sysselfuldmægtig i Våg. Disse afdelinger er siden blevet oprettet.

2. 9. november 1971 sendte justitsministeriet enslydende breve til politimesteren, rigsombudet og stasministeriet, hvori det oplyses, at sysselmanden for Suderø søndre syssel skal overflyttes til Sand, og at sysselmanden i Tverå også skal fungere som sysselmand i søndre syssel.

2. spørgsmål: Har man hermed taget stilling til, om søndre syssel skal nedlægges, således at forslå, at ingen sysselmand skal fungere i søndre syssel ?
Hvis dette er tilfældet, med hvilken motivering har man taget denne stilling ?

Svar: Der er ikke taget endelig stilling til sagen. Justitsministeriet og politimesteren forhandler stadig.

3. I ovennævnte brev skrives bl.a.: «Man (justitsministeriet) skal herefter **påny** anmode om en udtalelse om, hvorvidt stillingen som sysselmand for Suderø søndre syssel **bør** nedlægges».

3. spørgsmål: Er der afgivet udtalelse i denne sag og hvordan lød den ? Hvem skal give denne anbefaling ? rigsombudet ? alene eller efter anbefaling fra landsstyret ?

Svar: Der er ikke afgivet formel udtalelse i sagen, men der har været ført de under svaret på spørgsmål 2 nævnte drøftelser.

Spørgsmålet om nedlæggelse af stillingen henhører under justitsministeriet. Det kan dog forventes, at ministeriet inden endelig stillingtagen udbeder sig udtalelser fra politimesteren og rigsombudsmanden. Min udtalelse vil ikke blive afgivet uden kendskab til landsstyrets stillingtagen.

4. Nogenlunde samme spørgsmål stillede jeg hr. lagmand Atli Dam den 13. marts 1972, og denne svarede, at landsstyret ikke var bekendt med indholdet i ovennævnte brev, og at landsstyret ikke var anmodet om nogen udtalelse.

4. spørgsmål: Hvorfor var landsstyret ikke anmodet om udtalelse? Er dette foretaget nu? og hvornår? hvordan lyder denne udtalelse vedrørende søndre syssel?

Svar: Landsstyret er ikke anmodet om udtalelse i sagen. Dette vil ske, når de omhandlede forhandlinger er afsluttede. Da landsstyret ikke er blevet anmodet om en formel udtalelse, ser jeg mig afskåret fra at gengive udtalelsen.

Leif Groth.

---

113. Fyrispurningur

frá Ove Mikkelsen til Eli Nolsøe, landsstýrismann.

(Viðv. upsaveiða undir Føroyum).

Fyrispurningurin fráboðaður 18. mars. Samtykt at svarast skuldi 20. mars. Fyrispurningurin svaraður og umrøddur 25. mars.

Fyrispurningur:

Í sáttmálaskipanini viðvíkjandi fiskiskapi undir Føroyum var sáttmálaloyvi eini útlendsk veiða 10 og 25% meira enn fiskað var í árinum 1968/1972 av øðrum botnfiski enn toski og hýsu, m.a. av upsa, og virð sam-

bært sáttmálan eisini givið øllum øðrum tjóðum loyvi at fiska upp til 2.000 tons árliga av hesum fiskasløgum.

Henda eyka veiðu varð motiverað við, at vit hava so lítið haldgott vísundarligt grundarlag til taks á hesum oki.

Upplýst var í tinginum, at fyri upsans viðkomandi metti vísindin, at upsastovnurin undir Føroyum toldi eina veiðu av umleið 30.000 tons árliga, uttan at stovnurin tók skaða.

Nú er fastsligið, at í fjør, 1973, varð av upsa einans veitt undir Føroyum tilsamans umleið 60.000 tons, tó herav einans 5.000 tons veidd av føroyingum.

Í ár eru enn fleiri útlendingar og royna undir Føroyum eftir upsa og til og við tjóðir sum Poland, sum ikki áður hevur roynt her nu leiðir.

Spurningurin: Tá landsstýrismaðurin metti, at 30.000 tons av upsa var tað vísindamenn hildu, at upsastovnurin toldi, og tað dupulta varð veitt í fjør, og útlit er til, at enn meira verður veitt í ár, hvat ætlar landsstýrið so at gera við hetta? Hvørji tiltøk ætlar landsstýrið at fremja fyri at bremsa fyri, at eftir leirra upplýsingum hesi stóru ovurveiði av upsa?

Ove Mikkelsen.

Svar:

Ove Mikkelsen, løgtingsmaður hevur sett mær henda fyrispurning:

«Tá landsstýrismaðurin metti, at 30.000 tons av upsa var tað vísindamenn hildu, at upsastovnurin toldi, og tað dupulta varð veitt í fjør, og útlit er til, at enn meira verður veitt í ár, hvat ætlar landsstýrið so at gera við hetta? Hvørji tiltøk ætlar landsstýrið at fremja fyri at bremsa fyri, at eftir leirra upplýsingum hesi stóru ovurveiði av upsa?»

Sum harra Ove Mikkelsen kunnugt, sigur sáttmálin frá 18. december 1973 um fiskiskapin undir Føroyum, at tey sáttmálalondini, sum bert fiska eftir øðrum fiskasløgum enn toski og hýsu, í fyriliggjandi føri er talan um upsa, mugu ikki reka fiskiskapin stórvegis øðrvísi enn í árunum 1968 til 1972. Tvolveiðan eftir upsa má ikki økjast við meira enn 10% útyvir størstu veiðuna viðkomandi land hevur fingið hesi ár.

Størsta upsaveiða undir Føroyum hjá Frakklandi og Týsklandi, sum eru tey lond, ið veiða mest av hesum fiski, hevur í einum av bestum 5 árunum verið úvikavist 28.346 tons og 7.532 tons. Verða 10% lagd afturat, so mugu hesi lond ikki veiða meira enn úvikavist 31.181 tons og 8.285 tons um árið.

Eftir fyribilstølunum fyri 1973 sær tað út til, at Frakland hetta árið hevur veitt meira enn tey 31.181 tonsini. Tað var sjálvandi loyvt í 1973,

men í 1974 má so Frakland minka um veiðuna, so hon kemur niður á loyvt mark.

Fyribilstølini fyri 1973 siga eisini, at samlaða upsaveiðan undir Føroyum er um 60.000 tons. Vísindamenn halda, at torført er at meta um, hvat upsastovnurin tolur av fiskiskapi. Kanningar fiskirannsóknarstovan hevur gjørt, teir hava merkt einar 10-15.000 seiðir, vísa, at upsin ferðast nógv, hann ferðast millum Føroyar og Noreg, Føroyar og Ísland og Føroyar og Norðsjógvin.

Vísindamenn siga ikki, at stovnurin tekur skaða um fiskað verður meira enn 30.000 tons. Ein upsa-arbeiðsnevnd undir alheims vísindastovninum ICES sigur á fundi í februar mánaða 1974, at stovnurin uttan at taka skaða tolur enn eina lítla hækking í mun til 1972-veiðuna, hon var um 46.000 tons.

Tað landsstýrið hevur gjørt er, at upsaveiðan nú er reguleret, tað var hon ikki frammanundan. Eftir áheitan frá landsstýrinum er ICES farin undir at kanna fiskastovnarnar á Føroya-økinum fyri at fylgja við í hesum fiskiskapi og í framhaldandi kanningum útvega tilfar at meta um, hvat stovnurin tolur.

Eli Nolsøe, landsstýrismaður

---

114. Fyrispurningur

frá Ove Mikkelsen til Eli Nolsøe landsstýrismann.

(Arbeiðsætlan fyri «Leivur Øssursson» og «Jens Chr. Svabo» í 1974)

Fyrispurningur fráboðaður 18. mars. — Samtykt at svarast skuldi 20. mars. — Fyrispurningurin svaraður og umræddur 25. mars.

Fyrispurningur:

Eg havi áður spurt um hetta úr tinginum, men ongi svar fingið, og loyvi eg mær tí at sela hesar spurningar:

1. Hvørjar vísundarligar ella aðrar kanningar og royndir hava «Leivur Øssursson» og «Jens Chr. Svabo» gjørt hvør sær í ár?

2. Hvørjar arbeiðsætlanir hevur landsstýrið gjørt saman við fiskirannsóknarstovuni ella øðrum fyri hesi bæði skip fyri alt árið 1974, soleiðis at skilja: Hvat er ætlanin, at skipini skulu gera ávís tíðarskeið av árinum og hví?

Ove Mikkelsen

Svar:

Ove Mikkelsen, løgtingsmaður, hevur sett mær hesar fyrispurningar:

1. Hvørjar vísundarligar ella aðrar kanningar og royndir hava Leivur Øssursson og Jens Chr. Svabo gjørt hvør sær í ár?
2. Hvørjar arbeiðsætlanir hevur landsstýrið gjørt saman við fiskirannsóknarstovuni ella øðrum fyri hesi bæði skip fyri alt árið 1974, soleiðis at skilja: Hvat er ætlanin, at skipini skulu gera ávís tíðarskeið av árinum og hví?

Eg loyvi mær at svara báðum spurningum undir einum. Fyri Jens Chr. Svabo er gjørd ein arbeiðsætlan fyri árið 1974. Henda ætlan er kunngjørd í «Tíðindi frá fiskirannsóknarstovuni 3». Ætlanin verður hjáløgd málinum. Jens Chr. Svabo hevur higartil í ár fylgt hesi arbeiðsætlan. Fyri Leiv Øssursson er ikki gjørd nøkur føst arbeiðsætlan fyri alt árið 1974. Fiskirannsóknarstovan er av tí áskoðan, at tað er ikki beint at leggja eina ætlan fyri so langa tíð, m.a. av tí at dentur eigur at vera lagdur á, at trolarin, umframt at gera royndir, eisini skal kunna veiða so nógv sum møguligt fyri at raksturin ikki skal vera so kostnaðarmikil.

Fyrstu 5 mánaðarnar í ár er ætlanin, at trolarin fyrst og fremst skal leita eftir og veiða svartkjaft.

Higartil í ár hevur Leivur:

frá 4.-15. jan.
: roynt eftir fiskaðarfiski vestan fyri Hebridurnar og í Norðsjónum,

frá 17.-18. jan.
: ligið á Skála og fingið aluminiumsskottir í forlaslina.

frá 3.-14. febr.
: leitað eftir upsa undir Føroyum,

frá 16.-23. febr.
leitað eftir svartkjafti,

frá 25.-8. mars
leitað eftir svartkjafti og gjort eina roynd at veiða brisling,

frá 9.-12. mars
arbeitt uppá frystarlið,

frá 13. mars —
byrjað veiðu av svartkjafti.

Ætlan landsstýrisins við Leivur Øssursson var, at hann skuldi gera praktiskar fiskiroyndir, at hann skuldi verða veiðumonnum og veiðuskipum okkara til hjálpar í leitingum eftir fongi og nýggjum veiðumøguleikum í hesum slóru broytingartíðum innan fiskivinnuna, nú fiskiraestur okkara trongjast ár umdan ári.

TÍÐSTALVA:

Kanning nr. 1/74
Yvirlitstrolingar undir Foroyum.
Mánadagin 7. jan. til sunnudagin 27. jan.

Kanning nr. 2/74
Leiting eftir, troling og merking av upsa.
Mánadagin 28. jan. til sunnudagin 3. mars.

Kanning nr. 3/74
Yvirlitstroling undir Føroyum
Mánadagin 4. mars til týsdagin 2. apríl.
Mikudagin 3. apríl til mikudagin 10. apríl. Beding.
Hósdagin 11. apríl til mánadagin 15. apríl. Páskir.

Kanning nr. 4/74
Roynd við C-14 frumframleiðslukanning.
Týsdagin 16. apríl til sunnudagin 28. apríl.
Mánadagin 29. apríl til sunnudagin 5. mai.
Føroya Jarðfrøðissavn hevur bátin.

Kanning nr. 5/74
Mánadagin 6. mai til sunnudagin 27. mai.
Laksamerkingar.

Kanning nr. 6/74
Royndir við flótitroli eftir fiskayngli.
Mánadagin 27. mai til leygardagin 1. juni.
Sunnudagin 2. juni til mánadagin 3. juni. Hvíttusunna.

Kanning nr. 7/74
Týsdagin 4. juni til sunnudagin 23. juni.
Yvirlitstrolingar undir Føroyum.
Mánadagin 24. juni til sunnudagin 30. juni.
Jarðfrøðissavnið.

Kanning nr. 8/74
Mánadagin 1. juli til sunnudagin 28. juli.
Royndir við flótitroli eftir fiskayngli.

Kanning nr. 9/74
Mánadagin 29. juli til sunnudagin 4. august.
Royndir við laksalúsu undir Føroyum.

Kanning nr. 10/74
Mánadagin 6. august til sunnudagin 18. august.
Royndir við flótitroli eftir fiskayngli.
Mánadagin 19. august til sunnudagin 1. september.
Sjórannsóknir.

Kanning nr. 11/74
Mánadagin 2. september til sunnudagin 9. september.
Royndir við flótitroli eftir fiskayngli.

Kanning nr. 12/74
Mánadagin 10. september til sunnudagin 29. september.
Yvirlitstroling undir Føroyum.
Mánadagin 30. september. Beding.

Kanning nr. 13/74
Týsdagin 1. oktober til sunnudagin 27. oktober.
Royndir við idnaðartroli um Skeivabanka leiðina.

Kanning nr. 14/74
Mánadagin 28. oktober til sunnudagin 17. november.
Royndartroling millum Sandoyar- og Suðuroyarbanka.

Kanning nr. 15/74
18. november til 22. desember.
Yvirlitstrolingar undir Føroyum.
23. desember til 31. desember. Jól og nýggjár.

SVABO 1974.

KANNINGAR NR. 1, 3, 7, 11 og 15.

1. Navn
   Yvirlitstrolingar undir Føroyum.

2. Tíðarskeið
   7/ 1 — 27/ 1
   4/ 3 — 2/ 4
   4/ 6 — 23/ 6
   10/ 9 — 29/ 9
   18/11 — 22/12

3. Endamál
   Framhald av kanningunum sum byrjaðu í 1973. Skulu ganga yvir 2 ár. Tá skal tilfarið gerast upp og metast, og út frá tí skal føst kanningarskrá fyri leiðunum gerast.
   Endamálið er at fáa: 1. Eina mynd av hvat er til av fiski undir Føroyum til ymsar tíðir.
   2. Vitan um longdar-, aldurs- og vektbýti í øllum stovnum.
   3. Talið av fiski í hvørjum árgangi í ymisku stovnunum.
   4. Deyðatal fyri ymisku stovnarnar.
   5. Føðiketurnar undir Føroyum.
   6. Yvirlit yvir trolbotn alla staðni á landgrunninum.

   Henda vitan skal nýtast til at svara spurningunum:

   Hvussu stór nøgd av fiski kunnu vit í mesta lagi veiða undir Føroyum.

4. Útgerð
   SVABO: Toskatrol, sum stígur høgt í vanligari tilrigging.
   Arbeiðsbord
   Vega Vekt
   Simrad EK 38 og fiskalupp (frystirúmi skal vera tókt til analysuprøvar)

FISKIRANNSÓKNARSTOVAN: (sí skjal: upparbeiðing av fongi, Svabo)

5. Arbeiðsnøgd

Umborð: 40 trolstøðir hvørja kanning, ymsastaðni.
Alt vigað og gjørt upp so at mynd av longdarbýti fæst.
Nytru- og analysusýnislutir til aldursgreiningar.
Magasýnislutir.

Í landi: Uppgerð av analysusýnislutum.
Aldursgreining.
Uppgerð av magainnihaldi.
Uppstilling og berokningar.

SVABO 1974

KANNINGAR NR. 2

1. Navn
   Leiting eftir, troling og merking av upsa
2. Tíðarskeið
   28/1 — 3/3
3. Endamál
   At kanna nøgd av og fordingar hjá tí upsa, sum kemur inn at gýta á grunnunum eystan fyri Føroyar frá seinast í januar fyrst í februar og úteftir.
   Við at merkja húgvnan upsa verður roynt at gera upp, hvussu nógvur upsi hvørvur úr Føroyum og hvussu hann ferðast.
   Tað er trupult at merkja upsa, tí hann er ofta kíkaður og illa farin, tá hann kemur á borðið. Roynt verður at merkja so stórt tal sum møguligt.
   Upsarnir verða merktir við LEA hydrostatisk merki, merkt DA3 + nr.
4. Útgerð


   SVABO:

   Toskatrol, Simrad EK 38 við viðkaðum botnbíløti
   Snellur
   2 merkidammar

   FISKIRANNSÓKNARSTOVAN:

   Merkinálir
   Merkir
   Merkijournalir

5. Arbeiðsnøgd
   Teir merktu fiskarnir verða mátaðir
   Av skalaðum fiskum verða analysusýnishutir
   Siglt verður eftir reyðu dekkalinjunum og samstundis verður loddað við Simrad ekkoloddinum.
   Har, sum ásýnilig skriving er, verður roynt við snellu ella troli, sum tað nú liggur fyri.
   I viku verður siglt norðanfyri (62°30' — 63°00'N — 06°00' — 04°00'W)
   II viku millum 62°00' — 62°45'N — 06°00' — 04°00'W
   Restina av tíðini 61°30' — 62°30'N — 06°00' — 04°00'W



SVABO 1974

KANNING NR. 4

1. Navn
   Royn við C-14 frumframleiðslukanning.

2. Tíðarskeið
   16/4 — 28/4

3. Endamál
   Tað hoyrir til grundvitanina um sjógvin at vita hvussu nógv frumframleiðslan er.
   Longu í fjør ætlaði FRS at fara undir tílíkar kanningar, men tað varð hildið at vera av tíðarkrevjandi.
   Tað vit yvirskja, er veruliga hvussu nógv frumframleiðslan skiftir gjøgnum árið.
   Í ár hava vit ikki møguleikar at gera kanningar alt árið, men teir 14 dagarnir skulu nýtast til at royna mátingarnar undir praktiskum viðurskiftum, og tær eru somuleiðis lagdar so, at tær eru beint áðrenn frumframleiðslan tekur seg upp aftur aftan á vetrarsteðgin.
   Við hesum royndum, sum eru møguleiki fyri at leggja til rættis eina kanning, sum vísir skiftið alt árið.

4. Útgerð
   SVABO. Hydrografspælið skal nýtast, 100 m av wire.

   FISKIRANNSÓKNARSTOVAN:

Pumpa	Vatnheintara
Glasfløskur	Bathythermograf
Membranfiltir	Venditermometir
Filtir	
Pipettir	
C-14 ampullir	

   Arbeiðsnøgd
   Eitt ávist tal av støðum á ymiskum dýpi verða tiknar.
   Filtrini verða tald á C-14 Agency í Keypmannahavn.

SVABO 1974

KANNINGAR NR. 5 og 9.

1. Navn
   Laksamerkingar

2. Tíðarskeið
   6/5 — 27/5
   29/7 — 4/8

3. Endamál
   Framhald av teimum merkingum, sum farið hava fram seinastu árini, til at greina ferðina hjá laksinum.
   Seinna royndin við linu verður gjørd fyri at vita um laksur er undir Føroyum aðra tíð av árinum, enn í loyvdu tíðini.

4. Útgerð
   SVABO: Laksalína, fiskiklár
   Merkidammar

   FISKIRANNSÓKNARSTOVAN:
   Merkinálir
   LEA hydrastatisk merkir
   Doyvingarevni og -kar.

5. Arbeiðsnøgd
   So nógvir laksar sum gjørligt verka merktir.
   Alt verður mátað og roðsía tikin til aldurskanningar.

SVABO 1974

KANNINGAR NR. 6, 8, 10 og 11

1. Navn
   Royndir við flótitroli eftir fiskayngli

2. Tíðarskeið
   27/5 — 1/6
   1/7 — 28/7
   6/8 — 18/8
   2/9 — 9/9

3. Endamál
   Alfir útróðrarmenn vita um summarskrivingina undir Føroyum. Ekkoloddi skrivar nógv uppi í sjónum.
   Vit vita, at skrivingin kemur av fiskayngli og planktoni.
   Við hesum kanningum verður farið undir at seta nøgdir á ymisku sløgini av fyskayngli, sum eru uppi í.
   Hetta skuldi eisini givið eina hylling á árgangsstødd.
   Hesar kanningar eru í samsvar við kanningum av sama slag, sum fara fram aðra staðni undir milfumlandaráðnum ICES. Við luftøku av íslendskum, sovjetiskum og bretskum skipum. Bretsku skipini hava serliga kannað leiðirnar undir Føroyum.
   27/5 — 1/6 verður flótitrolið og netsondarin roynd og kanningarframferðin laga til viðurskiftini við SVABO.
   Seinnu tíðarskeiðini fara kanningarnar so fram.
   Tíðirnar eru lagdar so fyri at fylgt kann vera við í gongdini summarið igjøgnum.

4. Útgerð
   SVABO: Flótitrol við netsondra Frystirúm tókt til analysusýnislutir
   Botntrol
   EK 38 Simradlodd

   FISKIRANNSÓKNARSTOVAN: (sí leiðbeining)

5. Arbeiðsnøgd
   Loddað verður eftir ásettari siglingarleið, og á úrvaldum støðum verður skrivingin kannað við troling.
   Øll veiðan skal skiljast og mátsýnislutir viðgerast umhorð.

SVABO 1974

KANNINGAR NR. 13 og 14

1. Navn
   Royndir við idnaðartroli um Skeivabankaleiðina. (13)
   Royndir við idnaðartroli um leiðina millum Sandoyar- og Suðuroyarbanka (14)

2. Tíðarskeið
   1/10 — 26/10
   27/10 — 18/11

3. Endamál
   Frá royndum hjá SVABO vita vit, at góður trolbotnur er inn av Skeivabankaleiðini.
   Gott fiskarí hevur SVABO havt í desember mánaði við idnaðartroli. Hvítingsbróðir, svartkjaftur, gulllaksur og smáhvítingur var meginparturin.
   Á sama hátt tykist at verða á leiðunum millum Sandoyar- og Suðuroyarbanka.
   Hesar kanningar skulu skatta støddina á tí øki, sum hevur góðan trolbotn og fiskiúrslit fyri somu tíð.

4. Útgerð
   SVABO: fdnaðartrol

5. Arbeiðsmøgd
   Leitað verður eftir deccalinjum eftir botni, og har sum skriving er, verður trolað.
   Eitt bóskiligt tal av sýnishutum til at fáa eina mynd av aldurs- longdarbýtinum verður tikið.

SVABO 1974

KANNING NR. 15 IKKI TÍÐARFEST

Við tí veðurlag sum er undir Føroyum ganga nógvir dagar frá, har ikki er roynandi á tí leið, sum eftir skránni eigur at verða gjørd ávist tíðarskeið
Somuleiðis darva ov ring veðurlíkindi kanningarúrslitini og gera óvissurnar ov stórar.
Við tí fyri eyga, at SVABO kann vera í effektivari drift altíð, uttan akkurát teir ringastu ódnardagarnar, verður skrá løgd fyri einari kanning, sum fara kann fram teir dagar, tá veðrið ella onnur ring líkindi tarna teimum tíðarfestu kanningunum.

1. Navn
   Yvirlit yvir fiskagongdina undir Føroyum gjøgnum árið

2. Tíðarskeið
   Tá líkindini tarna øðrum arbeiði.

3. Endamál
   Gjøgnum árið at kanna pláss har líkindi eru, t.e. mest pláss inni undir landi. Loddað verður við ekkoloddi við útvíðkaðum botnekko, og skriving verður kannað nærri við troli ella húki. Somuleiðis um fiskiligar nøgdir finnast at siga fiskiflotanum frá.

4. Útgerð
   SVABO: Ekkoloddi við víðkaðum botnekko
   Fiskireiðskap til at kanna skrivingina

5. Arbeiðsnøgd
   Leiting eftir deccelinjum, fisking
   Evt. veiða verður skild í sløg og hvørt slag vigað sær.

Í tíðini 29/4 — 5/5 og 24/6 hevur Jarðfrøðissavnið SVABO.
Í tíðini 19/8 — 31/8 hevur Bogi Hansen, Oceanografisk institut, Københavns Universitet, SVABO

---

115. Ymsar ríkislógir
(Om radiokommunikation)

Ár 1974, 19. mars, var frá lógarnevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Ríkisumboðið hevur spurt, um heimastýrið hevur nakað at viðmerkja til, at lóg nr. 574 frá 19. december 1969 «Om radiokommunikation» verður lýst at galda fyri Føroyar.

Landsstýrið hevur lagt málið fyri tingið.

«Radiokommunikation» verður í § 1, stk. 2 lýst soleiðis: «Ved radiokommunikation forstås enhver overføring, udsendelse eller modtagning af tegn, signaler, skrift, billeder, lyd eller efterretninger af enhver art ved hjælp af radiobølger.»

Sambært løgtingslóg nr. 23 frá 28. mars 1956 um útvarp er ein partur av hesum øki yvirtikin sum sermál og verður tí skotið upp, at lógarinnar § 3 verður broytt soleiðis, at orðingin í 2. punktum verður hendan: «Endvidere kan ministeren efter forhandling med ministeren for kulturelle anliggender (for Færøerne det færøske landsstyre) fastsætte bestemmelser om indretning og benyttelse af modtageranlæg for radiospredning .....»

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at mæla tinginum til at gera hesa

t i n g s a m t y k t

Lóg nr. 574 frá 19. december 1969 «Om radiokommunikation» verður lýst at galda í Føroyum, tá frammanfyri nevnda broyting í § 3 í lógini.

2. viðgerð 25. mars.
Uppskotið frá lógarnevndini samtykt við 20—0.
Málið sostatt avgreitt.

(F.L. J. nr. 1903-5-1).

---

116. Landsstýrismál

Ár 1974, 26. mars var frá landsstýrisnevndini lagt fram avrit av gerðarbók landsstýrisins í tíðarskeiðinum 10/8-1972 - 19/7-1973.

(Sí avritið í skjalagoymslu landsstýrisins).

Málið varð beint í landsstýrisnevndina, sum 6. apríl legði fram soljóðandi

Álit

Hetta mál varð fyrst lagt fyri fingið tann 26. mars 1974, so ikki hava verið stundir til at kanna tey ymisku mál, ið nevnd eru, og lær viðgerðir tey hava fingið, so sum vanligt plagar at vera, tá landsstýrismál onnur ár eru latin tinginum tíðliga í tingsetuni.

Landsstýrið hevur havt 41 fundir og viðgjørt umleið fýrahundrað mál. Sum onnur ár, so eru nógvar viðgerðir, t.d. staðfestingar av samtyktum, løgtingslógum og aðrar rutinusakir, meðan eisini týðandi avgerðir eru tiknar við, ella týðandi mál viðgjørd. Sum heild teknr nevndin undir við teim avgerðum, ið tiknar eru í tíðarskeiðinum frá 10. august 1972 til 19. juli 1973.

Tær flestu avgerðirnar eru tiknar av einum samdum landsstýri, meðan tað í øðrum málum hevur verið minniluta og meirilutastøða, t.d. er avgerðin um sølu av Suðurfisk tikin við meirilutastøðu. Veðhald er eitt orð, sum gongur aftur á nærum hvørjum fundi, og í fleiri førum hevur landsstýrið verið noytt til sum veðhaldari, at lagt pengarnar út. Men í gerðabók landsstýrisins sæst ikki í teim einstøku førum, hvønn veðhildið hevur verið fyri, og kann ti ikki meta um, har partur av skuldini er eftirgivin, hvørvítt hetta er rímuligt ella ikki.

Ein hópur av tænastumonnum landsins reisa í útlondum fyri landskassans rokning. Tað sær út sum um tænastumenn, tá teir hava lug at ferðast, leggja ferin sína í samband við okkurt, sum teir hava áhuga fyri, og fáa so av landsstýrinum játtað «tænastuferð». Hesar ferðir eru heldur ikki altíð í ferituni hjá viðkomandi, men mitt í arbeiðstíðini. Løgtingið hevur fyrr kravt, at um landskassin skal gjalda slíkar ferðir, og síðani løn til onnur fyri at gera arbeiðið fyri viðkomandi heima, má tað verða álagt, at úrslitið av slíkum ferðum og fundum verður latið tinginum, tí um ferðin ikki hevur alumenna interessu, má viðkomandi gjalda sjálvur.

(F.L. J. nr. 204-2/73)

Hóast tað at bæði fæstlønum og starvsmenn verða løntir sambært lønarlóg, so eru farnar fram nógvar lønarhækkanir, langt upp um tær í lønarlóg og lønaravtalum fastløgdu, summir við umnormering og aðrir við serlønum, so lønarlógin longu er reiðiliga útholað, hetta er eitt ólag.

Tann 7. juli 1973 hevur landsstýrið samtykt at leggja fyri tingið uppskot um endurreising av Vestmanna Skipasmiðju. Tá Skála Skipasmiðja vildi fáa sama almenna stuðul, sum hann, ið veittur varð Skála Skipasmiðju, um ánararnir yvirtóku tað.

Á fundi 11. januar 1973 varð sett nevnd at kanna orsøkina til at telefonstøðin í Klaksvík fór av vindi. Ikki sæst hetta mál at hava verið til viðgerðar seinni, so úrslit av hesum kannaingum eru nevndini ikki kunnug.

Tann 8. mars 1973 hevur landsstýrið viðgjørt spurningin um «pleyguheim». Tað fyrsta, sum skal verða bygt, verður bygt á Tvøroyri, síðani í Klaksvík og Eysturoy.

Sum kunnugt bleiv pleyguheimið í Vágum nógv dýrari enn roknað varð við, bæði at byggja og í rakstri. Nevndin heldur tað vera ivasamt, um hesin formur fyri «heim» er nóg væl umhugsaður, og um gomul og veik ikki vildu fingið eina góða røkt, um ikki var so stórliga tikið til, sum nú í Vágum. Landskassin betalir upp móti helvtini av bæði byggi- og rakstrarútreiðslum til hesi heim, so nevndin heldur, at hesin spurningur átti at fingið viðgerð á tingi, áðrenn landsstýrið tekur avgerð um byggjan av fleiri slíkum heimum, nú læknaskipanin er til viðgerðar á tingi.

Við hesum viðmerkingum mælir nevndin til, at tingið góðtekur tær avgerðir, landsstýrið hevur tikið í tíðarskeiðinum frá 10. august 1972 til 19. juli 1973.

2. viðgerð 6. apríl og uppskotið frá nevndini samtykt við 14—0.

117. Útbygging av smærri havnarløgum v.m.

Ár 1974, 29. mars, var frá havna og veganevndini lagt fram soljóðandi

Álit

í álitinum í løgtingsmáli nr. 78/1972: Vegir og lendingar setti havna- og veganevndin fram fylgjandi uppskot til samtyktar:

«Løgtingið áleggur landsstýrinum saman við landsverkfrøðinginum og løgtingsins havna- og veganevnd at gera eina fullfiggjaða 5 ára ætlan yvir smærri havnaløg, atløgubryggjur, bátahyljar o.a. og leggja málið aftur fyri løgtingið í tingsetuni 1973/74».

Hetta uppskot varð samtykt, og hava so nevndu partar í vár gjøgnumgingið innkomnu umsóknirnar um studning ella uppiskoytisstudning, og eru komnir til tað úrslit, at tær 12 byggingarnar, nevndar eru í viðmerkingunum til lógaruppskotið niðanfyri, deils eru av slíkari støddd og deils av tílíkum týdningi fyri avvarandi bygdir ella landspartar, at rímuligt er, at møgulig studningsveiting til tær verður fastløgd í eini 5 ára ætlan.

Uppskotið til løgtingslóg um hesa 5 ára ætlan kundi verið tikið við undir tí vanliga álitinum viðvíkjandi vegum og lendingum; men nevndin hevur hildið tað verið líka so rætt og — nú so stutt líð er eftir til tingið fer heim — lagaligari, at leggja tað fram sum serligt løgtingsmál.

Vísandi til tað sum frammanfyri er tilskilað og til at landsstýrið tekur undir við uppskotinum leyvir nevndin sær at seta fram soljóðandi

Uppskot
til

løgtingslóg um 5 ára ætlan fyri útbygging av smærri havnaløgum, atløgubryggjum og bátahyljum.

§ 1.

Úr landskassanum verður veittur studningur til útbygging av havnum í niðanfyri nevndu kommunum, soleiðis at studningurin

[redacted]

(Ll. 52/74).

lagtingslov om 5 års plan for udbygning af mindre havne, anlægsbroer og bådehavne.

§ 1.

Af landskassen ydes tilskud til udbygning af havnene i nedenfor anførte kommuner, således at tilskudet andrager 75% af anlægs-

verður til støddar 25% av byggipeninginum, tó í mesta lagi 75% av niðanfyri tilskilaðu upphæddum, og rindaður við eins stórum ársgjøldum í 5 fylgjandi fíggjarárum frá og við fíggjarárinum 1974/75 at rokna:

Kommuna	kr.
Viðareiðis og Hvannasunds	800.000
Elduvíkar	500.000
Sunda	850.000
Runavíkar	2.000.000
Sandavágs	1.500.000
Nólsoyar	2.850.000
Skálavíkar	1.200.000
Húsavíkar	750.000
Hvalbiar	1.600.000
Sunnbiar	2.000.000
Kaldbaks	1.300.000
Tilsamans	15.350.000

udgifterne, dog højst 75% af nedenfor angivne beløb, og udredes med lige store årsrater i 5 på hinanden følgende finansår fra og med finansåret 1974/75 at regne:

Kommune	kr.
Viðareiðis og Hvannasunds	800.000
Elduvíkar	500.000
Sunda	850.000
Runavíkar	2.000.000
Sandavágs	1.500.000
Nólsoyar	2.850.000
Skálavíkar	1.200.000
Húsavíkar	750.000
Hvalbiar	1.600.000
Sunnbiar	2.000.000
Kaldbaks	1.300.000
i alt	15.350.000

§ 2.

Eingin studningur verður goldin ella bundin til gjaldingar, fyrr enn allar treytir, landsstýrið skuldi ásett í sambandi við eina góðkenning av byggiætlanini, eru loknar.

§ 2.

Intet tilskud bliver udbetalt eller stillet som sikkerhed, førend alle betingelser, landsstyret måtte stille for en godkendelse af udbygningsplanen, er opfyldt.

§ 3.

Landsstýrinum verður heimilað at veðhalda fyri lánum, kommununar mega taka í sambandi við framjing av útbyggingunum sambært hesi løgtingslóg.

§ 3.

Landsstyret bemyndiges til at garantere for de lån, kommunerne måtte optage i forbindelse med udførelsen af anlægsarbejderne i henhold til nærværende lagtingslov.

§ 4.

Henda løgtingslóg kemur í gildi beinanvegin.

§ 4.

Denne lagtingslov træder i kraft straks.

Viðmerkingar:

Niðanfyri eru settar upp útreiðslurnar til tey ymisku arbeiðini og somuleiðis teir stuðningar, sum játtaðir eru higartil.

Har umframt eru stuttar frágreiðingar um tey ymisku arbeiðini.

Kommuna	Pláss	Kostnaðaræstlan kr.	Játtaður áður ¾ av kr.	5 ára ætlan ¾ av kr.
Viðareiðir og				
Hvannasunds	Norðdepil	2.400.000	1.600.000	800.000
Eldnvíkar	Funningsfj.	980.000	480.000	500.000
Sunda	Oyri	850.000		850.000
Runavíkar	Á Bakka	1.150.000	150.000	1.000.000
Runavíkar	Søldarfj.	1.000.000	—	1.000.000
Sandavágs	Sandavágur	3.140.000	1.640.000	1.500.000
Nólsoyar	Nólsoy	4.050.000	1.200.000	2.850.000
Skálavíkar	Skálavík	1.200.000	—	1.200.000
Húsavíkar	Skarvanes	750.000	—	750.000
Hvalbiar	Nes	1.600.000	-	1.600.000
Sumbiar	Lopra	2.000.000	-	2.000.000
Kaldbaks	Sund	1.300.000		1.300.000
	Tils.:	20.420.000	5.070.000	15.350.000

Norðdepli.

Meirkostnaðin í sambandi við viðkun av verandi arbeiði viðvíkjandi øking um havnarplássið og betran av atløguviðurskiftum við flakavirkið.

Funningsfjørður.

Gerð av 20 m atløgusíðu á 5 metra vatndýpi og umleið 2400 m² havnarøki.

Oyri

Gerð av 30 m atløgusíðu á 5 metra vatndýpi og umleið 800 m² havnarøki.

Runavík.
Gerð av 30 m atløgusíðu á 5 metra vatndýpi og víðkan av økinum við bátahavnina við umleið 1.000 m².

Søldarfjørður.
Gerð av 25 m atløgusíðu á 5 metra vatndýpi og víðkan av økinum við bátahavnina við umleið 500 m².

Sandavágur.
Víðkan av verandi bátahyli.

Nólsoy.
Gerð av bringarði úr grótkasti, 25 m atløgusíðu á 4,5 m vatndýpi og umleið 8.000 m² havnarøki.

Skálavík.
15—20 m leinging av verandi bringarði á 6 metra vatndýpi.

Húsavík (Skarvasker).
15—20 m leinging av verandi bringarði á 4—5 metra vatndýpi.

Hvalba (Nes).
Gerð av bátahyli og víðkan av verandi lendibrúgv.

Lopra.
Leinging av atløgubryggjuni við 25 m á 6—7 m vatndýpi, dýpingararbeiði og rindan av meirkostnaða í sambandi við regulering av havnarøkinum, ið er framt.

Sund.
Yvirtøku av 36 m langari oljubryggju hjá S.E.V. á 12 metra valndýpi.

Havna- og veganevnd Føroya Løgtings, 20. mars 1974.

Hilmar Bech	Jógvan Durhuus	Haldur Hansen
Signar Hansen	Hilmar Kass	Kjartan Mohr

Jógvan Olsen
formaður

2. viðgerð 2. apríl.
Atkvøðugreiðsla 5. apríl.

3. apríl framlagt soljóðandi

Broytingaruppskot
í
løgtingsmáli nr. 117/1973: Útbygging av smærri havnaløgum v.m.

Til § 1 í uppskotinum frá havna- og veganevndini verður henda broyting gjørd:

«Skálavíkar .... kr. 1.200.000»
verður broytt til:
«Skálavíkar .... kr. 2.000.000»

Til forslaget fra havna- og vegaenevndini foretages følgende ændring:

«Skálavíkar .... kr. 1.200.000»
ændres til:
«Skálavíkar .... kr. 2.000.000»

Viðmerkingar:

Í øllum teimum samráðingum, sum Skálavíkar bygdaráð hevur havt við landsstýrið, (havna- og veganevndina) og teir stovnar landsins, ið hava havnamál undir sær, hevur bygdaráðið sett fram ynski um at veilt verður Skálavíkar kommunu kr. 2000.000 til ta havnabygging, sum ætlanin er at fara undir í einum 5-ára skeiði, og hevur tað verið framhildið ferð eftir ferð av bygdaráðnum, at eina minni upphædd so sum 1,200,000 kr. fáa teir einki gjørt við. Bygdaráðið kendi seg vissaðan um, at avvarðandi myndugleikar høvdu tikið undir, at játtan teirra í 5 ára ætlaninni kom at vera 2.000.000 kr. Bygdaráðið hevur tí nú undir skattaálíkningini tikið við í sini figgjarætlan longu frá hesum ári at leggja av teirra part, sum er kr. 500.000 fatt ella 100.000 kr. um árið, og í figgjarætlan kommununnar fyri 1974/75 er eisini lagt upp fyri rentuútreiðslum við 30.000 kr.

Á løgtingi, tann 2. apríl 1974.

Demmus Hentze Hákun Djurhuus Ove Mikkelsen Kjartan Mohr

Broyting til gr. 1 fall 9--0.
Lógaruppskotið gr. 1 samtykt 24—0.
Gr. 2--3 samt. 24—0.
Gr. 4 samt. uttan atkvøðugreiðslu.
Soleiðis samtykt at fara til 3. viðgerð 24—0.

3. viðgerð 6. apríl.
Lógaruppskotið sum samtykt við 2. viðgerð nú samt. 24—0.

118. Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna

Ár 1974, 2. apríl, legði Eli Nolsøe, landsstýrismaður, fram fylgjandi

Til Føroya løgting.

Løgtingsmál nr. 118/1973: Minstaløn og annar stuðul til fiskivinnuna.

Í løgtingssetuni 1972, jbr. Løgtingsmál nr. 19: Stuðningur til manningarnar á flakatrolarum samtykti løgtingið, at uppskotið frá landsstýrinum skuldi steðga til næstu tingsetu, eins og løgtingið samtykti, at landsstýrið skuldi seta 5-mannanevnd umboðandi fiskimannafelagið, útróðrafeløgini, reiðarafelagið og landsstýrið at endurskoða lógina um minstaløn og uppiskoyti til fiskaprísin.

Nevndin hevur givið álit frá sær dagfest 26. mars 1974 og skjýtur upp:

1. Minstaløn verður eisini veitt til manningina á deksførum undir 100 br. reg. t. í heimaútróðri.
2. Feskfiskastuðningurin verður lægstur fastur til 15 oyru fyri kg.
3. Veiðustuðningur verður eisini veittur til manningina á flakaskipum.
4. Veiðustuðningurin til fiskimenn í saltfiskaveiðu verður broyttur til eina endarstuðning.
5. Veiðustuðningurin til fullsaltaðan tosk av útróðri í Grønlandi fellur burtur.
6. Broyting av veiðustuðninginum til skiparar í saltfiskaveiðu.
7. Veiðustuðningurin til fiskimenn í saltfiskaveiðu fellur burtur.

Landsstýrið leggur við hesum nevndarálitið og -uppskot fyri løgtingið. Landsstýrið hevur fyri sín part ikki tikið støðu til uppskotini.

1. viðgerð 6. apríl og málið beint til landsstýrið at leggja fram á komandi ólavsøkutingsetu.

Sí skjal 16.

(F.L. J. nr. 1517-2-1/72).

119. Vegir og lendingar

Ár 1974, 3. apríl, var frá havna- og veganevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Havna- og veganevndin hevur viðgjørt tær um 50 umsóknirnar um studning, sum innkomnar eru.

I. **Vegir.**

Á fíggjarløgtingslógini eru settar av 26 mill. kr. til vegabyggingar og umsitingina av landsvegunum v.m.

Viðvíkjandi nýtslu av hesum peningi skal nevndin loyva sær at seta fram soljóðandi

Uppskot

A. Til útbygging av og ábøtur á landsveganetini og umsiting teirra, harumframt til Brýr, bilferjulegur o.a. ..... kr. 25.475.000
Til niðanfyri nevndu arbeiði ..... kr. 525.000

kr. 26.000.000

Kommuna	Arbeiði	Stuðningur ¾ av kr.
Svínoyar		
	Ábøtur á vegin til Eiðið	20.000,—
Leirvíkar		
	Vegur til leikvallarøkið	80.000,—
Gøtu		
	Vegur til undir Støðlar	80.000,—
Kaldbaks		
	Veður niðan í Dal	40.000,—
Tórshavnar		
	Vegur í Havnadali	60.000,-

(F.L. J. nr. 1817-48).

Kirkjubøar	
Vegur norður í Fossdal	60.000,—
Hests	
Vegur gjøgnum Geilina	30.000,—
Miðvágs	
Brúgv í Vatnsoyrum	50.000,—
Sørvágs	
Dyrkingarvegur	80.000,—
Biggjar	
Vegur vestur frá Bø	60.000,—
Húsavíkar	
Brúgv um Takmýraá	10.000,—
Breiðking av vegi niðan í gerðið í Dali	20.000,—
Porkeris	
Vegur frá Gjónni Stóru	80.000,—
Vágs	
Vegur til Farnará	30.000,—
Tilsamans ¾ av kr.	700.000,—
= kr.	525.000,—

II. Adressa frá borgarum í Gøtu kommunu til tingið um at fáa landsvegin lagdan oman fyri bygdina Gøtugjógv, er beind í havna- og veganevndina.

Nevndin hevur viðgjørt málið og er samd um at rættast er at senda landsstýrinum málið og skal tí loyva sær at seta fram soljóðandi

Uppskot
til
samtyktar

Málið viðvíkjandi landsvegnum um Gøtunar verður at beina til landsstýrið.

III. **Lendingar.**

Játtanir fyri figgjarárið 1974/75, sum samtyktar eru áður, eru hesar:

Kommuna	til	Studningur ¾ av kr.
Fugloyar		
Lendingarábøtur á Kirkju og í Hattarvík		
(4. ársgjald av 4 ára játtan)		60.000,-
Svínoyar		
Lending við Svínoyareiði		
(1. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð		50.000,—
Lending við Eiðið		
(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð		60.000,—
Hvannasunds		
Lendibrúgv í Hvannasundi		
(6. ársgjald av 6 ára játtan) bygt		30.000,—
Lendibrúgv í Hvannasundi		
(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt		40.000,—
Leingjan av lendibrúgv í Norðdepli (við flakavirkið)		
(4. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð		40.000,—
Lendibrúgv við flakavirkið (Viðareiðis og Hvannasunds kommunur í felag)		
(3. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð		180.000,—
Klakksvíkar		
Bátahavn í Klakksvík		
(5. ársgjald av 10 ára játtan) bygt		100.000,—
Leinging av lendibrúgv í Árnafirði		
(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		50.000,—
Lending á Norðoyri		
(2. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt		30.000,-
Kunoyar		
Veg niðan frá lendibrúgv í Kunoy		
(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		25.000,—
Vegur til lendingina í Kunoyar bygd		
(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt		25.000,—
Lendibrúgv í Haraldssundi		
(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt		50.000,—

Húsa

Veg onnan á lendingina á Húsum
(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt 50.000,--

Oyndarfjarðar

Leingjan av lendibrúgv
(2. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt 60.000,---

Elduvíkar

Bryggja í Funningsfirði
(4. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt 80.000,---

Fuglafjarðar

Bryggju vestanfyri
(5. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 70.000,—
Bátahavn í Fuglafirði
(4. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð 60.000,---

Gøtu

Bátahylur í Norðugøtu
(3. ársgjald av 3 ára játtan) í gerð ..... 50.000,—
Uppfylling fyri byggiøki í Norðrugøtu
(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt 80.000,---
Bátahylur undir Gøtueiði
(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt 20.000,---
Bátadráttur í Syðrugøtu
(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Nes

Dýpan av bátahavn
(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 40.000,—
Ferjulegu við Toftagjógv
(Játtað fyri 1974/75) bygt 120.000,
Leinging av pieri við Toftagjógv
(2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð 150.000,

Runavíkar

Bátahavn á Glyvrum
(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 70.000,—
Bátahavn í Søldarfirði
(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 35.000,—
Útbygging av Gomlustøð í Lamba

(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	30.000,-
Veg til lendingina í Rituvík	
(3. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt	50.000,-
Útbygging av afløgubryggju á Glyvrum, inni á Bakka	
(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð	75.000,
Kráargil: Abøtur á brimskaða	
(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt	45.000,

Skála

Leinging og breiðkan av lendibrúgv í Skálabotni	
(5. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	50.000,—
Bátahyl á Skála	
(3. ársgjald av 5 ára játtan) bygt	80.000,—

Sjóar

Bátahyl innan fyri Høgan	
(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	80.000,- -
Bátahyl við Sjógv	
(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	20.000,- -
Útbygging av Heyggsstøð til bilflutnings	
(3. ársgjald av 6 ára játtan) í gerð	80.000,- -
Útbygging av Heyggsstøð	
2. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð	60.000,- -

Sunda

Lendibrúgv á Norðskála	
(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	45.000,-
Bátahyl á Oyrabakka	
(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt	50.000,- -
Havnarøki á Oyri	
(2. ársgjald av 2 ára játtan)	50.000,-

Eiðis

Lendibrúgv í Svínáum	
(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt	80.000,- -

Gjáar

(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt	30.000,—

Haldórsvíkar

Bátahylur	
(2. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt	50.000,- -

Hvalvíkar

Styrking av bryggju í Hvalvík
(5. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Hósvíkar

Leingjan av lendibrúgv í Hósvík
(4. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 100.000,—
Lendibrúgv í Hósvík
(2. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... 50.000,—

Kollafjarðar

Bátahyl innanvert Sjógv
(5. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 60.000,—

Kvívíkar

Umvæling av brimgarðinum og breiðking av bylinum í Kvívík
(3. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð ..... 50.000,—

Kaldbaks

Bátahylur við Biggjarstøð
(2. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 60.000,—

Tórshavnar uttanbiggjar

Bátahavn á Argjum
(5. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 40.000,—
Lendingarábøtur í Hoyvík
(3. ársgjald av 6 ára játtan) bygt ..... 25.000,—

Hests

Bryggju niðri á Hellu í Hesti bygt ..... 150.000,—

Sandavágv

Bátastøð v.m.
(8. ársgjald av 8 ára játtan) bygt ..... 20.000,—
Bátahavn
(5. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt ..... 120.000,—
Bátahavn í Sandavági
(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ..... 80.000,—

Miðvágs

Bryggju úti á Kletti
(3. ársgjald av 3 ára játtan) ikki bygt ..... 20.000,—

Sørvágs
Bátahavn
(5. ársgjald av 8 ára játtan) ikki bygt ..... 80.000,—

Mykines
Planering
(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt ..... 20.000,—

Skálavíkar
Bátahavn
(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... 80.000,—
(3. ársgjald av 3 ára játtan) bygt ..... 80.000,—

Húsavíkar
Lendingraábøtur í Dali
(5. ársgjald av 5 ára játtan) í gerð ..... 60.000,—
Skarvasker
(2. ársgjald av 5 ára játtan) bygt ..... 40.000,—
Lendingina í Dali
(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð 50.000,

Skúvoyar
Leingjan av atløgubryggju í Skúvoy
(4. ársgjald av 4 ára játtan) ikki bygt ..... 50.000,—

Hvalbiar
Bátahavn við Býggjargarð
(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 35.000,—
Leinging av lendibrúgv í Sandvík
(3. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt ..... 70.000,—
Bátahavn við Býggjargarð
(3. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 70.000,—
Innsiglingarviti
(2. ársgjald av 2 ára játtan) bygt ..... 40.000,—

Froðbiar
Bátahavn í Trongisvági
(5. ársgjald av 8 ára játtan) í gerð ..... 80.000,—

Fámjins
Lendingarábøtur og trygging av siglingarrenni
(4. ársgjald av 4 ára játtan) bygt ..... 40.000,—

Ábøtur á siglingarrennuna		
(3. ársgjald av 3. ára játtan) í gerð		40.000,-
Brimskaði og ábøtur á innsiglingina		
(2. ársgjald av 2 ára játtan) í gerð		25.000,--
Sumbiar		
Bryggja í Lopra		
(7. ársgjald av 10 ára játtan) bygt		250.000,--
Bátabrúgv í Oyrnavík		
(4. ársgjald av 6 ára játtan) ikki bygt		60.000,-
Dýping við bryggjuna í Lopra		
(2. ársgjald av 4 ára játtan) í gerð		50.000,-
Verju fyri kirkjugarði í Sumba		
(2. ársgjald av 2 ára játtan) ikki bygt		50.000,--
	¾ av kr.	4.645.000,--
	= kr.	3.483.750,--
Ikki nýttar gjaldkomnar játtanir pr. 31/3 1974 o.u.	kr.	3.500.000,--
Játlað verður fyri 1974/75 sambært løgtingslóg ein útbygging av smærri havnaløgum o.u.	kr.	2.400.000,--
Bundnar í studningi eru soleiðis o.u.	kr.	9.400.000,-
í grunninum eru o.u. ..... kr. 1.720.000,--		
Á fíggjarlógini fyri 1974/75 eru settar av ..... kr. 7.500.000,-	kr.	9.220.000,-
Hall o.u.	kr.	200.000,--

Viðvíkjandi nýjáttanum skal nevndin loyva sær at sela fram soljóðandi

Uppskot

Kommuna	Arbeiði	Studningur ¾ av kr.
Mikladals		
Lendingarábøtur í Mikladali		24.000,-
Veg upp um bakkan á Trøllanesi		20.000,--

Kunoyar

Lendibrúgv í Haraldssundi
¾ av 50.000 kr./árið í 1977/78 og 1978/79
Vegur niðan frá lendingini í Kunoyar bygd
¾ av 25.000 kr./árið í 2 ár frá 1975/76 at rokna

Klakksvíkar

Lendingarábøtur á Norðoyri
¾ av 45.000 kr./árið í 3 ár 45.000,

Nes

Leinging av pieri við Toftagjógv
¾ av 100.000 kr./árið í 5 ár ..... 100.000,—

Sjóar

Útbygging av Heyggsstøð
¾ av 100.000 kr./árið í 5 ár ..... 100.000,—
Bátahyl innan fyri Høgan við Sjógv
¾ av 60.000 kr./árið í 1975/76 og 1976/77

Skála

Bryggja í Skálabotni
¾ av 50.000 kr./árið í 3 ár frá 1976/77 at rokna

Sunda

Bátahylur á Oyrabakka
¾ av 50.000 kr./árið í 1976/77 og 1977/78

Eiðis

Tryggingartiltøk
¾ av 75.000 kr./árið í 3 ár 75.000,

Haldórsvíkar

Rennistrong út í Stakkin í Tjørnuvík 5.000,
Umvæling av vegi út á lendingina í Tjørnuvík ..... 25.000,- –
Bátahavn í Haldórsvík
¾ av 100.000 kr./árið í 4 ár 100.000,-

Kvívíkar

Breiðking av bátahyli
¾ av 100.000 kr./árið í 1976/77 og 1977/78

Kirkjubøar
Lendingarábøtur
¾ av 25.000 kr./árið í 2 ár 25.000,

Bíggjar
Lendingarábøtur í Gásadali 10.000,---

Mykines
Lendingarpláss fyri Helikoptara 20.000,---

Sands
Brímverja undir kirkjugarðinum 12.000,---
Nýggjur vegur til havnina
¾ av 65.000 kr./árið í 2 ár 65.000,---

Skúvoyar
Leinging av atløgubryggju v.m. í Skúvoy
¾ av 50.000 kr./árið í 3 ár frá 1975/76 at rokna

Hovs
Lendingarábøtur 25.000,---

Sumbiar
Verju av bakkanum undir bygdini
¾ av 25.000 kr./árið í 2 ár 25.000,---
Styrking av vegnum frá lendingini í Vikarbyrgi
¾ av 40.000 kr./árið í 2 ár ..... 40.000,—

Tilsamans ¾ av kr. 716.000,---
= kr. 537.000,—

2. viðgerð 5. apríl.

Rom. I samtykt 24—0.
Rom II samtykt 25—0.
Rom. III samtykt 25—0.

Málið sostatt avgreitt.

120. Val av álitismonnum og nevndum

13. august 1973 segði J. P. Henriksen tinginum skrivliga frá, at hann vegna sjúku má siga seg úr fylgjandi nevndum: Býarskipanarnevndini, Stýrinum fyri Landssjúkrahúsinum, Nevndini til útvegan av nýggjum prístalsgrundarlag, Yvirheilsunevndini og tilsýnsmanni í Tryggingarsambandinum.

17. august fóru hesi val fram; vald vóru:

Í **býarskipanarnevndina:** Kristoffer Thomassen. — Nevnd til viðgerð av nýggjum **prístalsgrundarlag:** Carl W. Weihe. — **Stýrið fyri Landssjúkrahúsið:** Jona Henriksen.

Annars var í stýri fyri **Mentingargrunnin** vald:
Jacob Hansen, Vestmanna, Dánial Thausen, Sørvági og Petur Reinert á Eiði (hesin seinast nevndi í lutakasti við Hans Hilmar Dam, Tórshavn).

Í **Norðurlanda ráðið** vóru sum umboðsmenn valdir:
Fastir limir: J. Fr. Øregaard og Demmus Heintze (Hin seinni eftir lutakast millum hann og Erlend Patursson).
Tiltaksmenn: Poul J. Olsen, Jógvan Sundstein.

Val av einum limi í stýrið fyri Tryggingarsambandið fór fram 6 desember 1973.
Formaðurin las skriv frá Framburðsflokkinum, sjálvstýrisflokkinum og fólkaflokkinum, har sagt verður frá, at hesir eru gingnir saman um val av limi til Tryggingarsambandið.
Valdur var Leif Waagstein.

Á seinni fundi sama dag las formaðurin skriv, har tingmennirnir F. Isaksen, J. Durhuus, Signar Hansen og Hans við Høgadalsá mótmæla valinum av umboðsmannunum til Tryggingarsambandið.

Val av 6 limum til búnaðarstevnuna í Norðoyum fór fram 6. desember 1973. Valdir vóru:
Óli Joensen, bóndi, Klakksvík.
Bjartur Petersen, fyrisløðunnaður, Klakksvík.

Jógvan Martin Joensen, bóndi, Klakksvík.
Líggjas Eliasen, bóndi, Mikladalur.
Páll Klettskarð, óðalsmaður, Haraldssund.
Esbern á Geilini, óðalsmaður, Svínoy.
Hesin seinast nevndi eftir lutakast við Vilhelm Dam, Klakksvík.

Ár 1974, 5. apríl var framlagt tingmál nr. 120/1973:
Val av álitismonnum og uevndum.

Valið fór fram 6. apríl, soleiðis:

1. **Løgtingsvalnevndir:**

A. **Suðurstreymoyar prestagjald:**
   a. Fastir limir: Magnus Tórsheim, keypmaður, Tórshavn, Oluf Nielsen, prentari, Tórshavn, Karl Jakobsen, stjóri, Tórshavn.
   b. Tiltaksmenn: Napoleon Hovgaard Jacobsen, bankafulltrúi, Tórshavn, Gunnar Hansen, kranførari, Tórshavn.

B. **Norðstreymoyar prestagjald:**
   a. Fastir limir: Heini Johansen, bankamaður, Vestmanna, Samuel J. Samuelsen, skipari, Haldórsvík, Tórstein Grækarisson, Kvívík.
   b. Tiltaksmenn: Jacob Joensen, jarðabrúkari, Kvívík. Øssur av Steinum, lærari, Kollafjørð.

C. **Eysturoyar sýsla:**
   a. Fastir limir: Petur Eli Mikkelsen, lærari, Gøtu. Herluf Berthelsen, lærari, Fuglafirði. Arnhold Abrahamsen, lærari, Fuglafirði.
   b. Tiltaksmenn: Petur Reinert, lækni, Eiði. Sámal P. Hansen, vrakari, Norðragøtu.

D. **Norðoya sýsla:**
   a. Fastir limir: Dánjal Nielsen, stjóri, Klakksvík. Jógvan Nielsen, byggimeistari, Klakksvík. Sámal Christiansen, skrivari, Klakksvík.
   b. Tiltaksmenn: Einar Waag, stjóri, Klakksvík. Jógvan Olsen, bedingsmeistari, Klakksvík.

E. **Vága sýsla:**
   a. Fastir limir: Sigmund Frederiksen, vrakari, Miðvágur. D. Danielsen, lærari, Sørvági. Hentzar Ellingsgaard, lærari, Sørvágur.

b. Tiltaksmenn: Napoleon Nolsøe Petersen, lærari, Sørvágur, Snorri á Steig, Sandavágur.

F. Sandoyar sýsla:

a. Fastir limir: Morfan Mikkelsen, Sandur. Thomas P. Olsen, keypmaður, Húsavík. Hans Johannesen, bóndi, Sandur.

b. Tiltaksmenn: Louis Eystberg, keypmaður, Skopun, Óli Danielsen, jarðarbrúkari, Húsavík.

G. Suðuroyar sýsla:

a. Fastir limir: Niels P. Nolsøe, lærari, Vági. Johan O. Djurhuus, skúlastjóri, Vági. H. P. Thomassen, keypmaður, Tvøroyri.

b. Tiltaksmenn: Jaspur Holm, skrivstovumaður, Tvøroyri. Levi Nielasen, lærari, Hvalba.

2. **Grannskoðara í Føroya Sparikassa:**
Dánjal J. Kjærbo, Fuglafirði.

3. **Nevndin fyri p/f Skipafelagið Føroyar:**
Tórolvur Mohr Olsen og Ove Mikkelsen, Vági (í lutakasti við Leon Joensen).

4. **Umboðsmaður á aðalfundi hjá P/f Skipafelagnum Føroyar:**
Martin Joensen, løgtingsmaður. Tiltaksmaður: Ejler Michelsen.

5. **Kirkjustjórn:**
J. Fr. Øregaard. Kjartan Mohr. Signar Hansen (í lutakasti við Johs. Olsen).

6. **Umboðsmaður á aðalfundi hjá p/f Sjóvinnubankanum:**
Ejler Michelsen. Tiltakslimur: Petur H. Simonsen.

7. **Stýri fyri Mentunargrunn Føroya Løgtings:**
Johan Poulsen. Tiltakslimur: Georg L. Samuelsen.

8. **Føroya Listasavn:**
Ottar Jacobsen, Signar Hansen. Flemming Samuelsen (í lutakasti við Steingrím Nielasen).

9. **Nevnd í p/f Grønlandsfelagnum:**
J. Fr. Øregaard, P. H. Weihe, Frederik Hansen (í lutakasti við Sig-

fried Skaale). Tiltakslimir: Poul J. Olsen, Jeon Joensen, Johan Simonsen.

10. Umboðsmaður á aðalfundi hjá p/f Flogsambandinum Føroyar:
J. Fr. Øregaard.

11. Stýrið fyri Føroya Vanlukkutrygging:
Haldor Hansen, Hans Lützen, Johan Poulsen (í hataksti við Jógvan Durhuus).
Tiltakslimir: Trygve Samuelsen, Demmus Hentze, Magnus Tórsheim.

12. Býarskipanarnevndin:
Kristoffer Thomasen (formaður), Hans Olaus Danielsen, Poul Guttesen. Valdur sum tiltaksmaður fyri formannin var Jalgrím Hilduberg.

13. Yvirheilsunevndin:
Val ístaðin fyri J. P. Henriksen: Valdur varð Rodmund Nielsen. Valdur fyri Ewald Arge varð Sigfried Skaale. (Núsitandi: Rodmund Nielsen, Aage Michelsen og Sigfried Skaale).

14. Lærugrunnur Føroya:
Napoleon Jacobsen.

121. Broyting í lógini fyri Húsalánsgrunnin

Ár 1974, 6. apríl, var frá figgjarnevndini lagt fram soljóðandi

Álit

Lánimøguleikarnir til selhúsabygging eru sera vánaligir. Í løtuni er hægsta mark fyri lánum í sparikassa móti fyrsta veðrætti hægst kr. 70.000. Lán móti 2. veðrætti er vanliga 50% av fyrsta veðrætti, og lán frá Húsalánsgrunninum móti 3. veðrætti hevur verið í mesta lagi kr. 30.000, ella tilsamans hægst kr. 135.000. Fyri selhús í Havn er henda lánihædd neyvan meira enn 50% av samlaða byggipeningínum, og á bygd hert tað meira, sum grundstykkjaprísurin er lægri.

Tað er skilligt, at um fólk framvegis skulu hugsa um at eiga egið hús, má ein betri fíuansieringsskipan fáast til vega. Tá Húsalánsgrunnurin varð settur á stovn, varð sett í lógina, at stovnspeningurin var 1 milj. kr., men at grunnurin kundi taka upp lán til útláns við góðkenning frá landsstýrinum.

Tað var skjótt greitt, at henda eina millión lítið munaði til at loysa henda týðandi tátt í samfelag okkara. Løgtingið hevur tí økt munandi um eginpening grunsins, við á figgjarlógina at hava avsett pening til grunnin, og eftir uppskoti landsstýrisins á Ólavsøku varð mælt til, at játta grunninum 2,5 milj. aftrat sum eginpening. Tingið hevur samtykt, at henda játtan verður økt við einari millión til kr. 3.500.000,-. Nevndin ásannar, at einans ella nærum einans við eginpeningi er ikki møguligt at koma lánitørvinum á møti.

Hví grunnurin í so lítlan mun hevur nýtt ta heimild honum sambært § 6 í lógini er givin, er nevndin ikki greið yvir. Um tað er stýrið grunsins, sum ikki metir tørvin vera størri enn tær 30.000 kr., sum settar eru sum hægsta mark, ella tað er landsstýrið, sum ikki hevur givið loyvi til hægri lántøku, er nevndini heldur ikki greitt. Men við tí nógv hækkaða prísi á byggitilfari, og teim hækkaðu arbeiðslønum, heldur figgjarnevndin, at útvegir megu finnast til at koma tí økta lánitørvinum á møti, og mælir til, at grunnurin fær sær munandi størri lánipening, so útláinir kunnu hækkast til minst kr. 60.000. Eisini heldur nevndin, at ikki er grund til við tí stóra eginpeningi, grunnurin hevur, umleið 18 milj. kr., at leggja í bundnan reservafond meira enn tað, sum sett er í lógina, nevniliga 2% av

(Ll. 37/74. — F.L. J. nr. 1426-5).

lánihæddini, ti í mótsetning til aðrar lánistovnar fær hesin grunnur tilførdan eginpening yvir løgtingsins fíggjarlóg, meðan aðrir lánistovnar einans fáa økt um eginpeningin við annaðhvørt nýtekningum ella av yvirskotinum.

Nevndin heldur ikki henda skipan vildi minka um trygd grunsins ella møguleikarnar at fingið lán frá øðrum peningaslovnum, tryggingarfeløgum ella við brævalánum.

Fólkaflokkurin hevur fleiri ferðir havt uppskot á tingi um rentufrítt lán til sethúsabygging, seinast í tingsetuni 1972. Hesi mál hava verið heind til viðgerðar í fíggjarnevndini, men hevur nevndin ikki hildið seg kunna tikið undir við hesum uppskotum í tí líki, tey hava verið sett fram. Men nevndin hevur verið greið yvir tørvin, uttan tó at verið samført um, at tann leið, sum har varð vist á, var tann heilt rætta. Tilfarsprísir og arbeiðsløn ir eru skjótt bakkandi, so torført er at binda eina játtan til ávíst krónutal, men tekur nevndin annars undir við uppskotinum um at koma teimum, sum hava sett sær sum mál at fáa egið hús, á møti, og Húsalánsgrunnurin upptekur lán til víðari útlán, so sum tørvurin er, og at lánini vera rentu og avdráttarfrí tey tvey fyrstu árini.

Í tingsetuni 1972 (seinastu tingsetu) samtykti løgtingið at biðja landsstýrið saman við stýrinum fyri Húsalánsgrunnin laka hetta mál til nýggja viðgerð og leggja úrslitið av hesum samráðingum aftur fyri tingið í hesi tingsetu. Tingsetan er nú skjótt at enda komin, men enn er málið ikki komið tinginum í hendi, heldur ikki er fráboðað, at nakað uppskot kemur hagani.

Men er ásannanin tann, at finansieringin av sethúsabyggingini er ein samfelagsspurigur, má hetta eisini vísa seg í viljanum til at finna gongda leið til loysn av hesum máli, og setur fíggjarnevndin fram fylgjandi

Uppskot
til

løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um húsaláusgrunn.

§ 1.

Í løgtingslóg nr. 49 frá 30. mai 1964 um húsalánsgrunn við seinni broytingum verða gjørdar hesar broytingar:

1. Í § 6, 2. stk., gangi út orðini «upp til 1 milj. kr. um árið».

lagtingslov om ændring i lagtingslov om boliglånefond.

§ 1.

I lagtingslov nr. 49 af 30. maj 1964 om boliglånefond med senere ændringer foretages følgende ændringer:

1. I § 6, stk. 2, udgår ordene «på indtil 1 mill. kr. hvert år».

2. § 10, 1. stk., verður orðað soleiðis: «Lánitíðin er longst 23 ár, harav tey 3 fyrstu árini eru avdráttarfrí».

§ 2.

Henda lóg kemur í gildi beinan vegin.

2. § 10, stk. 1, affattes således: «Lånetiden er højst 23 år, deraf er de første 3 år afdragsfri».

§ 2.

Denne lov træder i kraft straks.

2. viðgerð 6. apríl.

Greinarnar og uppskotið at fara til 3. viðgerð samt. 23—0.

3. viðgerð 6 apríl.

Lógaruppskotið sum samt. við 2. viðgerð nú samtykt 24—0.

Fyrispurningur

frá

Finnboga Isaksen til Eli Nolsøe, landsstýrismann.

Ár 1973, 72. november samtykti løgtingið við 23—0 atkvøðum, at fyrispurningur frá Finnboga Isaksen til Eli Nolsøe, landsstýrismann, skuldi verða umrøddur.

Fyrispurningurin umrøddum 30. nov.

1) Kann sparsemi í bensinnýtsluni føra við sær, at meira olja fæst ?
2) Um so er, hvat er so orsøkin til, at landsstýrið letur privatbilar koyra at kalla ótarnaðar, meðan privat húsarhald verða meint rakt ?

Viðmerkingar:

Eftir teim skamtanarreglum, sum landsstýrið hevur sett í verk fyri olju- og bensinnýtslu, verður tað privata húsarhaldið meint rakt, meðan privatbilar sleppa at koyra so at siga ótarnaðir.

Tað er at fegnast um, at tær peningariku tíðirnar hava givið fólki møguleika at keypa sær bil. Men tey flestu munnu vera á einum máli um, at tað ger minni, um nýtslan av bilunum verður nakað skerd, meðan tað ger meira, at privat húsarhald fáa ov lítið av olju.

Í øðrum londum, har fólk ofta hava meira brúk fyri bili enn her, av tí at tey hava langt til arbeiðis, hava menn sett forboð fyri allari bilkoyring sunnuadg.

Eftir galdandi reglum her heima, verða tey húsarhald rakt meinast, sum hava spart olju. Tey, sum ikki hava brúkt meira enn avgjørt neyðugt tað seinasta árið, koma at fáa minni enn neyðugt komandi ár.

Eisini er at hava í huga, at seinasti vetur var ræddiliga mildur, og at ein ringur komandi vetur kann koma mongum illa við.

Tað hevði tí verið rímuligari, um bilkoyringin minkaði, um so er at hetta kann hjálpa teimum pirvatu húsarhaldunum.

Á Føroya Løgtingi, 23. nov. 1973.

Finnbogi Isaksen.

Svar uppá fyrispurning frá Finnboga Isaksen, løgtingsmanni, settur Eli Nolsøe, landsstýrismanni, á Føroya løgtingi 27. november 1973.

Fyrispurningurin er soljóðandi:

1. Kann sparsemi í bensinnýtsluni føra við sær, at meira olja fæst ?
2. Um so er, hvat er so orsøkin til, at landsstýrið letur privatbilar koyra at kalla ótarnaðar, meðan privathúsarhald verða meint rakt ?

Tá ið oljukreppan eisini nærkaðist Føroyum, og vandi var fyri, at Føroyar eins og flestu londini í Europa máttu geva seg undir niðurskurð av brennioljunýtsluni, vendi landsstýrið sær til tey bæði oljufeløgini Esso og Shell, ið hava allo oljusøluna her um hendur.

Føroysku feløgini, sum fáa so at siga alla sína olju frá Esso og Shell í Danmark, hava fingið at vita, at tey eins og onnur viðskiftafeløg hjá hesum báðum feløgum orsakað av arabisku oljublokaduni koma undir ein niðurskurð uppá 17,5% í mun til ætlaðu ársnýtsluna í 1974. Arabisku londini hava skorið oljuveitingarnar m.a. til Danmark niður við 25%. Tá ið niðurskurðurin bóast alt ikki er størri enn 17,5% er orsøkin, at bæði Esso og Shell fáa nettiliga nógva olju frá Nigeria og Venezuela.

Feløgini gera ætlaðu brennioljunýtsluna í 1973 soleiðis upp:

gass- og dieselolja	100.270 m³
løtt fuelolja	8.190 m³
sver fuelolja	6.400 m³
turbo fuelolja	750 m³
petroleum	2.530 m³
bensin	9.720 m³
tilsamans	127.860 m³

Tær reguleringar, landsstýrið hevur sett í verk við kunngerð eru:

1. Niðurskurður av olju til uppbiting av rúnunum við 25%.

   Í fyrsta umfari er tað latið til oljufeløgini sjálvi, tó undir eftirliti av og við valuta- og prisráðnum sum klagustovni, at umsita skipanina.

   Sjálvandi er tað ikki møguligt generelt at siga, at øll skulu minka nýtsluna við 25%. Ein meting av tørvinum hjá teimum ymsu húsarhaldunum kann í summum førum føra við sær, at luar, ið spart er frammanundan so mikið, sum sparast kann, kann ikki skarvast av, meðan onnur, ið hava havt eina ovurnýtslu koma undir størri niðurskurð.

2. Avmarking av el-nýtsluni við at seta forboð fyri ravmagnsnýtslu til ymisk í fyriliggjandi støðu minni neyðug endamál, sum t.d. ljósskelti og eisini at brenna ljós uttanfyri arbeiðstíð í handlum o.t.
3. At seta forboð móti ikki vinnuligari náttarkoyring.

Umframt verða veitingar til iðnaða og til skip skerdar við 15%. Kunngerð er ikki gjørd um hesa regulering, men er avtalað við oljufeløgini, at tey minka um veitingarnar samsvarandi.

Hesir niðurskurðir hava bert verið í gildi síðani leygardagin 24. hs., so enn er ov tíðliga at siga, hvørja ávirkan tær koma at hava.

Serliga viðvíkjandi bensini er at siga, at oljufeløgini eru ymisk á máli, um tað letur seg gera, um spart verður uppá bensin, so at fáa aðra brenniolju í staðin. Eitt er givið, at oljureinsiverkini kunnu ikki úr ráolju bert útvinna aðra brenniolju enn bensin, men verkini øll royna, sum støðan er, at útvinna mest møguligt av gass- og dieselolju og tílíkari olju og minst møguligt av bensini. Landsstýrið kannar møguleikarnar fyri, um tað letur seg gera at fáa aðra brenniolju fyri bensin.

Sum støðan er nú, er ongin grund at rokna við, at oljukreppan linkar í bræði. Tað verður tí óivað neyðugt við enn fleiri tiltøkum; har verður í fyrstu syftu lagsað um at seta forboð fyri ikki vinnuligari koyrslu leygardag og sunnudag. Eisini kann tað verða talan um, at skipini hjá strandferðsluni gera færri túrar enn nú.

Roynt verður at útvega eina eykagoymslu av brenniolju, men hvussu verður við hesum, veit ongin enn.

Eli Nolsøe,
landsstýrismaður.

Fyrispurningur frá Kjartan Mohr til løgmann.

Ár 1973, 29. november, boðaði formaðurin frá fyrispurningi frá Kjartan Mohr til landsstýrið. Sama dag á seinni fundi var við 18—0 atkv. samtykt at fyrispurningurin skuldi umrøðast.

Í gerðarbók løgtingsins sæst ikki at fyrispurningurin er svaraður ella umrøddur.

Fyrispurningur frá Hilmar Bech til Jákup Lindenskov, landsstýrismann

Ár 1973, 28. november varð fyrispurningurin fráboðaður, 29. november var við 21—0 atkvøðum samtykt, at fyrispurningurin skuldi verða umrøddur.

Fyrispurningurin umrøddur og svaraður 5. desember.

Fyrispurningur til Jákup Lindenskov, landsstýrismann.

Vil landsstýrið, nú orkukreppa hevur tikið seg upp, seta í gongd kanning av møguleikunum fyri at seta í gongd ræktuligan kolagrevstur aftur í Suðuroy ?

Viðmerkingar:

Hóast tað, at Føroyar liggja langt frá europeiska meginlandinum, hevur tað ferð eftir ferð vist seg, at árinið frá hendingum úti í stóru verð eisini rakk henda vegin og soleiðis var eisini hesa ferð, nú arabaralondini, vegna Miðeysturkriggið, gjørdu av at minka um oljuflutningin til lond í Vesturheiminum og harvið eisini Føroyar.

Orsakað av hesi oljukreppu hevur landsstýrið í samráð við oljufelagini sagt frá, at húsarhald bert kunnu rokna við at fáa 75% og skip og iðnaðarvirkir 85% av ársnýtsluni higartil.

Tað er ilt at spáa um, hvussu leingi henda oljukreppa fer at vara, og um tey oljuframleiðandi londini fara at fremja enn strangari atgerðir,

sum kanska kunna skerja tilførslunna henda vegin, enn meira, so torført verður at fáa fatur á olju til upphiting, og at fiskivinnan og aðrar vinnugreinir, ið eru grundstoðulin undir okkara búskapi, koma í álvarsamar frupulleikar og harvið samfelagið alt.

Summir halda, at olja finst undir havbotninum á leiðunum við Føroyar, men enn er ikki vissa fingin fyri hesum, meðan vit harímóti vita, at stórar nøgdir av koli liggja í fjøllunum í Suðuroy, sum kann nýtast til upphiting av húsum og møguliga eisini til elframleiðslu.

Undir seinna verðaldarbardaga varð mógv kol høgt á Tvøroyri, í Hvalba og til deils Fámjin, men henda framleiðsla er alt minkað síðani og í Rangabotni (Tvøroyri) er einki høgt í seinastuni, meðan Hvalbingar hava hildið eina minni gangandi alla tíðina, við tað at menn ikki vildu sleppa hesum tiltaki.

Nevnast kann, at tá kolagrevsturin var upp á tað mesta framleiddi Tvøroyri umleið 8.000 tons og Hvalbingar 12.00 — 13.000 tons árliga, meðan framleiðslan í fjør var bert 500 tons, vegna vánaligar framleiðsluumstøður og so eisini tað, at fólk tey seinastu árini eru farin at nýta oljuna til upphiting av selbúsum við centralhita, so eftirspurningurin eftir koli hevur ikki verið so stórur.

So sum viðurskiftini við oljuni eru broytt í seinastuni við hækkandi prisum, minkandi tilførslu og óvissan um tilførsluna framyvir er orsøk til at halda, at kolið skuldi átt betri møguleikar til nýtslu í húsarhaldinum og møguleikarnir fyri at nýtt kol til orkuframleiðslu (el) áttu at verðið gjølla kannaðir.

Um oljukreppan, sum nú hevur tikið seg upp, fer at vara leingi og kanska verður enn álvarsamari, kundi kolið verið nýtt sum neyðhjálp til uppliting, meðan skipaflotin harvið kundi lutast ein størri part av leirri tilførslu, møguligt verður at fáa.

Hetta saman við tí, at kolaframleiðslan kundi givið arbeiði til fleiri hendur, hevur elvt til, at hesin spurningur verður reistur.

Á Føroya løgtingi, 28. november 1973.

Hilmar Beck.

Til fyrispurning, um landsstýrið vil seta í gongd kanning av møguleikunum fyri at seta í gongd rættuligan kolagrevstur í Suðuroy, skal eg svara:

Í viðmerkingunum til fyrispurningin verður greitt frá, hvussu kola-

grevstur er farin fram — og var hann, tá hann var upp á tað mesta — - bardagaárini — um 20.000 tons.

Broytingin er jú ikomin, tá fólk yvirhøvur fór yvir at brúka olju í staðin, sum var nógv bíligari og effektivari.

Men støðan í dag kann lættliga gerast so hættisfig, at eitt iskoyti, sum kann fáast úr kolagrevstri í Suðuroy, verður neyðugt.

Tað er sjálvandi ikki enn gjørligt at meta um, hvussuleiðis støðan fer at verða, men kemur tað at spyrjast um slutta tíð, at oljan fer at minka so munandi, at tað fer at sausa at hjá okkum, so vil landsstýrið koma við uppskoti um hvussu ein veruligur munandi kolagrevstur kann setast í verk.

. . . . . .

Í dag er støðan tann, at menn arbeiða í kolanámi í Hvalba, teir eru 5-10 mans, og verða framleidd árliga umleið 500 tons, av hesum 300 tons sekkjakol.

Hetta kol verður mest selt í Havn, á Sandi og í Kollafirði. Eftirspurningurin hevur ligið um 700 tons árliga, men Reynds Kolasøla hevur ikki kunnað framleitt meira enn nevndu 500 tons árliga.

Ein orsøkin til hetta er tann, at kolahøggarin fær ikki nóg góða ørtøku, inntøkan liggur væl niðanfyri vanliga timansløn.

Í 1972 var eftir áheitan givið loyvi til upptøku av nýggjum kolanámi, og hevur arbeiðið við at gera hetta nám klárt tikið drúgva tíð, men er lað nú komið inn at koli. Vegur er lagdur til námið og er um at vera liðugur.

Við hesum námi kann roknast við, at 20 - 30 manns fáa arbeiði, og kunnu teir væntuliga framleiða 2.000 — 3.000 tons av koli árliga.

Heraftrat kann leggjast, at tað valla verður gjørligt at fáa stórt meira av kolahøggarum í Hvalba, at arbeiða undir teimum umstøðum, sum eru nú.

Á Tvøroyri hevur eingin kolarakstur verið tey síðstu 3 árini, og har verður helst at ganga long tíð at rudda, um rakstur skal takast upp aftur.

. . . . . .

Annars er at siga, at kolainnflutningur til Føroya síðstu árini hevur ikki verið stórvegis. Tað hevur víst seg at verið torført at fingið fatur á koli, eitt nú úr Onglandi, helst stendst m.a. av arbeiðskreppum har — og royndir at fáa kol úr Pólandi hava sýnt stóra prishækking aftrat ti, at farmagjaldið er vaksið so munandi, at kolakeypari í Føroyum ivast í, um hann skal keypa. Um keypt verður, má roknast við, at prísurin verður so høgur, at prísurin kemur at liggja upp í móti 30 kr. pr. sk.

Landsstýrið tekur nú upp samráðingar við framleiðarar, teir sum fram-

leiða kol í Hvalba, teir, sum hava framleitt á Tvøroyri og við kolaseljarar. — Men verður tað so, at kolanýtslan kemur at taka seg fram aftur, verður ætlandi neyðugt at umhugsa rasjonalisering og mekanisering av rakstrinum.

Jákup Lindenskov,
landsstýrismaður

Fyrispurningur frá Hilmar Bech løgtingsmanni til landsstýrið.

Fyrispurningurin fráboðaður 22. januar og samtykt at hann skuldi umrøðast 23. jan. við 24—0.

Svaraður av løgmanni og umrøddur 25. januar.

Fyrispurningur til landsstýrið.

1. Tá landsstýrið setti bann fyri koyring sunnudagar og ikki setti í verk veruliga kortskamtan av bensini, var orsøkin su tann, at landsstýrið metti, at bannið kom at verða eitt stuttfreistað tiltak, ella er tað metan landsstýrisins, at slíkt bann kann standa við í longri tíð, um tilførslurnar verða minni enn vant ?
2. Kann landsstýrið annars geva tinginum frágreiðing um útlitið í orkuspurninginum, herundir serliga viðvíkjandi møguleikunum hjá fiskivinnuni fyri at fáa nóg mikið av olju til hampaligar prísir ?

Viðmerkingar:

Fyri stuttum setti landsstýrið forboð fyri privatkoyring sunnudagar sum eitt tiltak fyri at spara um meira bensin enn framumanundan, men hetta forboð hevur í vissum førum virkað eitt sindur órættvíst, tí tað hevur serliga rakt bygdir, ið eru nógv bundnar av ferðslu eftir landi, og hartil tarnar sunnudagsforboðið fólki, sum oftast nýta bil sunnudag í at koma saman til kirkjugongd, kristiligar fundir ella annað, so ivasamt er, um bensinsparingin ikki hevði verið meira rættvís við eini skamtan.

Annars er tað at siga, at síðani landsstýrið sendi út áheitan á fólk um at spara olju mest møguligt, eru prísirnir farnir munandi upp og merkist hetta á hvørjum heimi, eins og fiskivinnan harvið hevur fingið størri trupulleikar at dragast við, so tað hevði havt áhuga, um landsstýrið kundi givið tinginum frágreiðing, um hvussu útlitið er fyri at fáa olju í framtíðini og serliga um, hvussu menn meta prisviðurskiftini fara at verða fyri hesa fyri okkara búskap so týdningarmikla vøru.

Á Føroya løgtingi, 22. januar 1974.

Hilmar Bech.

Svar uppá fyrispurning frá Hilmar Bech, løgtingsmanni, til landsstýrið.

Fyrispurningurin er í tveimum. Fyrsta parti snýr seg um, hví landsstýrið setti í verk bann móti koyring sunnudag í staðin fyri at nýta veruliga kortskamtan av bensini, soleiðis at fólk sjálvi avgjørdu, nær tey vildu nýta ta ávísu nøgd av bensini, hvørjum teirra kundi vera luta til.

Mong lond hava igjøgnum einar 3—4 mánaðir haft eitt bann móti sunnudagskoyring í gildi, og er orsøkin til hetta sjálvsagt, at ein kortskamtan er ógvuliga trupul at umsita, í mongum førum verður órættvís og gevur møguleika fyri sínamillum sølu av bensini ella kortum, soleiðis at tað ikki verður tørvurin hjá tí einstaka, sum avger, hvørja gleði hann fær av kortinum ella bensinnøgdini, og harafturat er umsitingin av eini slíkari skamtan ógvuliga stór, trupul og dýr.

Slíkt tiltak krevur gjølliga umbugsan, tí tað sum nevnt er so ógvuliga ymiskt, sum tørvurin er hjá fólki at nýta brennievni. Eitt nú er munur á tí, sum skal til fyri at koyra av bygd til størri arbeiðspláss og at koyra stytri leið í bygd ella bý. Brúkið hjá leim einstøku sløgunum av akførum er ógvuliga ymiskt, og møguleikarnir hjá fólki til at velja almennar rutur í staðin ógvuliga ójavnir alt eftir bústaði í landinum.

Við eini kortskamtan kann ein sostatt nógv lættari enn nú koma fyri at gera órætt í býtinum av teim nøgdum, møguligt verður at fáa.

Vit hava tó í seinastuni sæð, at mong lond hava sett skamtan í verk, tí tey hava hildið, at eitt bann ímóti sunnudagskoyring, sum kom at standa við í longri tíð, eisini hevði sínar stóru trupulleikar og kom at gera ójavnar imillum nýlararnar.

Landsstýrið metti, at bannið kom at vera í gildi heilt stutta tíð, tí sum

tað ljóðaði, fór ein linni at koma í orkukreppuna. Eisini vildi landsstýrið saman við oljufeløgunum nýta tíðina til at royna at fáa til vega nakað størri nøgdir av bensini. Grundgevingin yvir fyri teimum stóru útgerðarfeløgunum var hon, at í Føroyum er ikki almenna ferðslan ella kollektiva ferðslan útbygd á sama hátt sum í øðrum londum, og skuldi tí grundir verið fyri, at Føroyar vórðu skerdar minni.

Hetta er tó ikki greitt enn, men nøgdirnar, sum eru í landinum, skuldu fyribils rokkið nakað.

Tað visir seg kortini, at framleiðslan av bensini er minkað seinnu tíðina, tí oljuvirkini leggja størra dentin á at framleiða størst møguligu nøgdina av bremsiolju, gas- og dieselolju.

Í Danmark er sagt frá, at tað ikki vera nóg stórar nøgdir, og tí skal bannið ímóti koyring sunnudag standa við inntil 1. apríl.

Hvr hava teir hugsað, at tá tað fer at várað og líður móti sumri, ber ikki til at hava hetta slagið av bann í gildi, og ætla teir, um eingin broyting verður í støðuni, tá at seta í verk eina kortskamtan, so fólk sjálvi kunnu gera av ,nær tey koyra, eins og turistar, sum tá í størri nøgd koma til landið, verða javnstillaðir við danskar íbúgvar.

Tað bann ímóti koyring um náttina, sum hevur verið í gildi eina tíð í Føroyum, hevur munað nakað. Sparingin av hesum tiltaki er mett til at vera umleið 7—10%. Hon kundi verið størri, um ikki parlur av fólkinum hevði nakað nógv av ónytfugari koyring tíðliga og seint á kvøldi áðrenn midnátt.

Tað sá út, sum sparingin at byrja við var nakað størri enn ímóti endanum upp undir ta tíðina, tá bannið ímóti sunnudagskoyring var sett í verk. Hesar báðar sunnudagar tað ikki hevur verið loyvt at koyra, meta feløgini, at munandi er spart.

Tað er tó semja millum feløgini og landsstýrið um nú at taka úr gildi bannið ímóti koyring sunnudag, soleiðis at fólk fáa høvi til í tveir mánaðir frá 3. februar til 1. apríl at sýna, at tey undir egnum eftirliti eru før fyri at spara tey neyðugu umleið 25%'ini, sum skulu til fyri at sleppast kann undan øðrum tiltøkum.

Bæði landsstýrið og útgerðarfeløgini meta, at tað er fult forsvarligt at taka bannið av hesar tveir mánaðirnar og geva fólki høvi til at sýna samfelagssinni hesa tíð.

Landsstýrið vil heita ógvuliga sterkt á brúkararnar um at lata vera við at nýta akførini til óneyðug endamál hesa tíðina.

Stuttleikakoyring av einumhvørjum slag eigur ikki at vera, og landsstýrið vil eisini heita á politivaldið um at royna at hava eitt vist eftirlit við hesum. Serliga við at tann hýruvognskoyring, ið fer fram aftaná miðnátt, bert hevur heilt neyðturvulig endamál, soleiðis at skilja, at loyvt er hýruvognum at koyra fólk, sum hava ørindi frá einum stað til annað,

meðan koyring við sama fólki í longri tíð uttan beinleiðis endamál ikki má vera. Eisini verður heitt á fólk um at plánleggja nýtsluna av akførum, soleiðis at til dømis ikki verður farið fleiri ferðir at keypa eitt hægst neyðugt í hili, at mong ørindi verða avgreidd um eina leið o.s.fr.

Tað er ætlanin, at bannið ímóti koyring um náttina skal standa við. Síðan skal verða kannað í hesar tveir mánaðirnar, um sparingin aftrat teimum 7—10%'unum, hon var, áðrenn bannið ímóti sunnudagskoyring kom í kraft, kann økjast til umleið 20—25%. Tað kann soleiðis hevda, at eisini áðrenn 1. apríl verða onnur tiltøk sett í verk, um ikki sparingin kemur uppá tað kravda.

Landsstýrið vónar, at nýtararnir vilja sýna ábyrgdarkenslu og hjálpa til at fáa spart. Meir tað vil vera til reiðar til at seta í verk eina kortskamtan frá 1. apríl ella fyrr, um ikki linni er komin í.

Hin spurningurin til landsstýrið snýr seg um at fáa gjølligari at vita, hvussu støðan veruliga er, hvat orkuni viðvíkur. Farna tíðin hevur sýnt, at nýtararnir á landi hava tikið ógvuliga væl undir við áleitanini um at spara uppí 25% av brennuolju í húsarhaldunum. Tað tykist at fara at eydnast at spara hesa nøgd. Tíverri er ein kedilig orsøk til at so væl er gingið við hesi sparing hon, at prísirnir eru farnir so munandi upp, soleiðis at fólk bert av hesi grund eru noydd at spara.

Veðrið í vetur hevur verið ógvuliga váualigt, og hevur fiskiskapurin verið tarnaður munandi av hesum. Oljunýtslan hjá skipunum hevur tí eisini hesa tíðina verið munandi minni. Men hugsandi er, at sjálvt undir vanligum líkindum er møguligt hjá skipunum at spara munandi, um menn leggja seg veruliga eftir hesum. Oljufeløgini halda, at tey neyðugu 15%'ini fara at verða spard innan fyri fiskivinnuna.

Møguleikarnir fyri at hunkra aðrastaðni eru eisini batnaðir. Tað vísir seg, at í flestum havnum er møguligt at fáa frá vanligum útgerðarfeløgum tær neyðugu nøgdir, og tann spurningurin, sum var ógreiður viðvíkjandi møguleikunum á newfoundlandsleiðunum, hann tykist eftir øllum at døma at vera greiður, soleiðis at eisini hesi skip okkara fara at fáa tað, sum teimum tørvar.

Í Íslandi er møguligt at fáa smærri nøgdir hjá skipunum, sum har royna, til heimsiglingar, so útlitið fyri at skipini als ikki verða tarnaði av nøgdarspurningnum er gott.

Hin síðan, viðvíkjandi tí prisliga er meira álvarsom.

Spurningurin um at fáa olju til hampuligar prísir í Grønlandi er ikki loystur, honum verður arbeitt víðari við, men annars er ógvuliga ringt at siga, hvar endaliga prislegan fer at vera. Mett hevur verið, at um endaligi prísurin kom at liggja millum einar 7 - 800 kr. fyri tonsið, so kundi vinna okkara verið før fyri at borið ein slíkan prís, um fiskuprísirnir

annars fara nakað upp enn, og um onnur útgerð ikki lutfallsliga dýrkar eins nógv, og oljan hevur gjørt.

Tað kunnu sjálvandi altíð vera einstøk før ella einstakir veiðuhættir, sum lava trupult við at bera ein slíkan pris, og er hetta ein spurningur, sum myndugleikarnir mugu taka støðu til, tá ið viðurskiftini annars eru komin í eina fastari legu, um tað verður ein veruleiki, at einstøk skip hava torført við at greiða skyldur sínar orsakað av oljuprísunum.

Við øllum fyrivarnum hava menn innan fyri oljuhandilin mett, at útlit er fyri, at prísirnir fara niður aftur og møguliga enda onkunstaðni millum 700 og 800 kr. fyri tonsið.

Hendа ikki hækkingar aftur á marknaðinum, skuldi prísurin í Føroyum kunna farið 11 - 13 oyru niður fyri liturin onkuntíð í mars mánaða, sum fyrsta prísfall.

Landsstýrið heitir á fíggjarnevnd og løgting um at hækka studningin til kolagrevstur til umleið 200.000 kr. hvørt av komandi tveimum fíggjarárunum; tá skuldi verið møguligt at mekaniserað kolagrevsturin so mikið at høggast kunnu eini 3000 tons árliga, utan at kostnaðurin fyri tonsið skal hækka munandi. Hetta vildi verið ein hjálp, tí enn eru mong húsarhald, sum nýta kol, og brúkið fer møguliga at hækka.

Tað hevur verið so, at við umleið 20 ára millumbili kemur spurningurin um kolagrevslur upp í tíðina.

Tær frágreiðingar, gjørdar hava verið, eru til skjals, og er landsstýrið farið undir at arbeiða viðari við spurninginum, eitt nú hvør ídeggingin í dag skal vera fyri at skapa lønandi framleiðslu av t.d. 50.000 tonsum árliga. Eisini verður kannað, um hættir til nýtslu av koli í størri eindum t.d. í centralum hitaverkum, orkustøðum ella almennum stórbygningum kann gerast so einfald, at kolið kann kappast við oljuna. Fundur um hetta hava verið við jarðfrøðissavnið fyri umleið 14 døgum síðani, eins og nú eina tíð hava verið samráðingar við Royals kolasølu í Hvalba um fyribils at fáa økt framleiðsluna nakað.

Til tess at fara undir størri framleiðslu av koli krevst tó munandi tíð til fyrireikingar, og ber tí ikki til at steðga øðrum bráðneyðugum útbyggingum av vatnorku- og dieselorkuverkum í Føroyum. Hesar byggingar koma mest verandi tørvi á møti, men framtíðar útbygging til vøksturin í orkunýtsluni, sum vit kunnu vænta, kann møguliga gerast so, at kolaogn okkara kemur til nyttu.

24. januar 1974.

Atli P. Dam.

Fyrispurningur frá Jógvan Durhuus til løgmanns.

Fyrispurningurin fráboðaður 30/11 - 1973, útsettur og 24/1 - 74, at hann skuldi svarast við 24—0.
Svaraður og umrøddur 30. januar.

Fyrispurningur til løgmann.

1) Hvat er ætlanin at gera við vegin við Leynar-klyvjar ?
2) Nær er ætlanin at byrja ?

Viðmerkingar:
Nú ið vegirnir báðumegin Leynar-klyvjar eru kommir væl ávegis og ikki er sett á við Leynar-klyvjar, hóast ferðslan er munandi vaksin, má tað haldast vera løgið, at ein tílík vanlukkukelda stendur órørd. Við lí forbergið, ið er yvir vegnum fram við Leynavatni, skal hervið verða mint á tann mikla vanda øll ferðsla er í, hvørja ferð farið verður framvið nevnda økið. Vandin stendst av grótomanlopi alt árið, glerpípum í metralongd á vetri, og haraftrat er vegurin ikki gjørdur til tey tungu flutningstól, sum í dag eru á vegnum.

Á Føroya Løgtingi, 30. nov. 1973.

Jógvan Durhuus.

Svar uppá fyrispurning frá Jógvan Durhuus, løgtingsmanni, viðvíkjandi Leynaklivum.

Tá ið vegurin undir Leynklivum enn liggur at kalla órørdur, sjálvt um vegastrekkið gjøgnum Kollafjarðardal annars alt er bygt um og breiðkað, so kemst hetta av teim serligu urmstøðunum har eru; vegurin liggur fram við Leynavatni, sum dýpist bratt niður frá vegnum til yvir 30 m, og í hinum borðinum er deils brattlendi og deils tær steyrrøttu klivarnar.
Kannингar og metingar av fíggjarligum, tekniskum, ferðsluligum, náttúruvernd arligum og jarðfrøðisligum slag máttu tí gerast, áðrenn støða kundi verða tikin til byggiháttin.
Komið varð til tað úrslit, at stórstu fyrimunirnir fingust, um vegurin varð lagdur í 600 m langa tunnil aftan fyri Klivarnar. Henda loysn ger minnsta skaða á náttúruna, tarnar ferðsluni minnst og er ikki dýrari enn onnur loysn.

Tað hevur ikki rættuliga ligið fyri at fremja hesa tunnilgerð higartil; men er ætlanin at fara undir hana, so skjótt tunnilgerðin í Eysturoynni er av t.e. einaferð næsta ár.

30. januar 1974.

Atli P. Dam.

Fyrispurningur frá Demmus Hentze til løgmann.

Fyrispurningurin fráboðaður 29. januar. Samtykt 30. jan. við 23 -0 at svarast skuldi.
Svaraður og umrøddur 4. februar.

Fyrispurningur til løgmanns.

Løgmaður verður biðin um at upplýsa, nær farið verður undir asfaltering í Sandoynni.

Viðmerkingar:

Undir 1. viðgerð av fíggjarlógini á tingi 1972 spurdi undirritaði løgmann, nær væntast kann, at farið verður undir asfaltering í Sandoynni, og var svarað tá, at ætlanin var at fáa sett upp neyðugu tól tá á sumri 1972, tí landið átti tey umboð, ið skuldi til, men einki hendi tó við hesum í tí árinum.

Í løgmannsrøðuni á ólavsøku 1972 var sagt: «Vegirnir í Sandoynni verða asfalteraðir», men sum sagt einki hendi við asfaltering í 1972 og heldur einki í 1973. Vit eru nú komin inn í 1974 og enn rokist einki fyri nøkrum tílíkum arbeiði.

Tá meginparturin av landsvegunum í binum oyggjunum nú eru asfalteraðir og kommununar hava fingið asfalt á vegirnar í bygdunum, eru fólk í Sandoynni sera ótolin eftir at fáa gongd á, tí ferðslan har er eisini blivin so nógv.

Tá ið gróttilfarið, sum er sera gott og liggur sprongt, klárt at nýta, er

bert eftir at fáa amboðini á plássið. Vónandi kann løgmaður nú geva svar og upplýsingar, sum fara at halda.

Á tingi, 28. januar 1974.

Demmus Hentze.

Svar uppá fyrispurning til løgmanns frá Demmus Hentze, løgtingsmanni.

Sum frásagt undir viðgerðini av fíggjarlógaruppskotinum fyri 74/75, verður nú sett knúsiverk upp í Sandoynni og kann farast undir asfalteran, tá vanliga asfalteringartíðin kemur fár.

Tórshavn, tann 4. februar 1974.

Atli P. Dam.

Fyrispurningur frá Ove Mikkelsen til løgmanns.

Fyrispurningurin fráboðaður 22. januar og samtykt við 23 0, tann 30. jan. at hann skuldi svarast.

Svaraður og umræddur 4. februar.

Fyrispurningur til løgmanns.

1. Hvussu ber tað til, at prísurin á gassolju í Føroyum er 93 oyru, meðan hann í Danmark er 73 oyru, 20 oyru dýrari her ?
2. Um hetta er orsakað av oljukeypi á fría marknaðinum, er so hendan oljan at rokna sum ein «eykatildeiling» útyvir teirri okkum føroyingum tilætlaðu nøgd ?

Á Føroya løgtingi, 22. januar 1974.

Ove Mikkelsen.

Svar uppá fyrispurning frá Ova Mikkelsen, løgtingsmanni, til løgmanns.

Viðvíkjandi 1.

Prísurin á gassolju í Føroyum verður í samband við hvørja heimtøku ásettur eftir góðkenning prísráðsins, so hesin prísur er roknaður út samhært tann vanliga útrokningarhátt, tó við tí fráviki, at eykamongdin, fingin varð, er umroknað í prísin, soleiðis at hann bleiv meðalprísur. Hesum hevur landsstýrið fyrr greitt frá.

Prísurin hjá Esso og Shell liggur í Danmark í løtuni fyri motorgassolju á 89 ella 90 oyrum og ikki á 73 sum spyrjarin upplýsir.

Viðvíkjandi 2.

Tann eykamongd, keypt varð, er útyvir ta føroyingum tilætlaðu mongd.

Tórshavn, tann 4. februar 1974.

Atli P. Dam.

Fyrispurningur frá Kjartan Mohr til løgmanns.

Fyrispurningurin fráboðaður 6. februar 1974. 8. februar fall uppskot um at fyrispurningurin skuldi svarast við 4—0.

Fyrispurningur frá Kjartan Mohr til løgmanns.

Fyrispurningurin fráboðaður 14. mars.
Samtykt at umrøða skal vera, 15. mars.
Fyrispurningurin svaraður og umrøddur 25. mars.

Fyrispurningur til løgmanns.

Kann løgmaður gera so væl at svara mær uppá bendan spurning:

Nær verður farið undir at gera vegin niðan á Sund.

Tað er nú nógvur tørvur á at fáa samband millum Sund og Havnina nú kaianlegg er gjørt, og S E V hevur brúk fyri vegasambandi við Havnina eins og tað hevði lætt um sambandi við Kaldbak til vegurin inn í Kaldbaksbotn og út á Sund verður projekteraður og kostnaðarætlan gjørd.
Hetta hevði eisini lætt um ferðasambandið sjóvegis við Eysturoy.

Á Føroya Løgtingi hin 14. mars 1974

Føroya Framburðsflokkur
Kjartan Mohr.

Svar uppá fyrispurning frá Kjartan Mohr, løgtingsmanni.

Roynt verður at fara undir vegagerðina niðan í Sund í ár. Projekteringin er tó ikki liðug og heldur ikki er greitt við lánipeningi til at fremja hesa vegagerð, men roknar landsstýrið við, at hetta kann vera í lagi einaferð í summar.

Tórshavn, tann 25. mars 1974.

Atli P. Dam.

Skriv og umsóknir framløgd á løgtingi, men ikki umtalað í frammanfyrinevndu skrásettu tingmálum ella fyrispurningum:

15. august: Skriv frá Landsstýrinum við skrivi dagsett 15. juli 1973 frá formannskapinum í Norrøna ráðnum, har boðað verður til 21. fundin 2. fundarrað í Stockhohmi 27. okt. 1973.


17. august. Skriv frá Landsstýrinum, sum sigur frá, at Petur F. Christiansen, landsstýrismaður, er útnevndur sum umboðsmaður til Norðurlanda ráðs fundin í Stockholmi í døgunum 25.—26. okt.

12. nov. Skriv frá Havnar arbeiðskvinnufelag við áheitan á tingið, um at skipað verður so fyri, at skatturin verður avtrektur, áðrenn lønin verður útgoldin.
Og skriv við áheitan um, at maður og kona verða skattað hvør sær, og um ikki, so at tann loyvdi frádráttur, sum í dag er 2000 kr. verður hækkaður til 5000 kr. — Beind í skattanevndina.

23. januar. Skriv frá Havnar Arbeiðsmannafelag og Tórshavnar húsaeigarafelag viðv. tingmáli nr. 40/1973: Broyting í skattalógini. — Beind í skattanevndina.
Skriv frá Havnar arbeiðsmannafelag viðv. tingm. nr. 33/1973: Lóg um arbeiðaravernd. Beint í lógarnevndina.

26. februar. Skriv frá bátaeigarum og flakavirkjum um longda trolttíð á landleiðini. Beint í fiskivinnunevndina.

RED: 10 X



Nasjonalbibliotel


Nasjonalbiblioteket


National Library of Norway

Rana Division


N-8607 Mo i Rana

Telephone: +47 75 12 11 11 Telefax: +47 75 12 12





RE



Nas

Na

Nat

Telephone: +47 75

LØGTINGS TIDINDI

1973

Løgtingstíðindi

1973

Bind B

Skjøl til
Løgtingstíðindi

TÓRSHAVN 1975

Løgtingstíðindi 1973 bind A
© Føroya Landsstýri
Lagt til rættis hevur Knút Wang
Prentað hevur Dagprent
Bundið inn hevur Helgi Justinussen.

FORMÆLI

til Bind A og Bind B

Í seinastu Løgtingstíðindum 1972, 1972 og við hesum 1973 eru gjørdar nakrar broytingar í tilrættisleggingini, við tað, at Løgtingstíðindi er býtt í tveir partar: Bind A, sum umfatar skrásett løgtingsmál og fyrispurningar, ið ikki eru skrásettir sum løgtingsmál, meðan Bind B umfatar: Skjøl til Løgtingstíðindi. Undir avvarandi løgtingsmáli er vist til viðkomandi skjal og øvugt. Hetta skuldi gjørt tað lættari at kannað avvarandi løgtingsmál.

Harafturat er undir hvørjum løgtingsmáli, har tað er møguligt, vist til Journalnummarið hjá Landsstýrisskrivstovuni (F.L. jr. nr.), so at har okkurt skjal ikki er tikið við í Løgtingstíðindi, kann verða funnið fram til við at vísa til nevnda journalnr.

Somuleiðis er har, ið hetta hevur verið tøkt, tá ið Løgtingstíðindi varð lagt til rættis til prentingar, vist til tað lógarnummar (stuttnevnt L.l), har avvarandi lóg er at finna í Kunngerðarsavninum fyri viðk. ár.

Á fíggjarlógini fyri 1975/76 er peningur settur av til eitt index til Løgtingstíðindi frá 1948 og úteftir. Hetta vil siga at gjørt verður eitt meira fullfíggjað innihaldsyvirlit, av tí at onkur lóg kann vera løgd fram sum uppskot og samtykt, uttan at hetta kann siggjast í vanliga innihaldsyvirlitinum.

Fyrsta royndin hesum viðvíkjandi er gjørd fyri Løgtingstíðindi 1973.

Her finnast tey mest týdningarmiklu uppskot undir minst tveimum høvuðsyvirskriftum, eins og eisini hvat viðvíkur Bind A er roynt at nevna tey mál, sum umtalað eru undir einum øðrum málið (viðhvørt stuttnevnt umt.).

Sum dømi kann verða nevnt, at tey mál, sum hava við fiskiskap at gera, eru nevnd undir høvuðsheitinum **Fiskiskapur**, umframt — um tey umfata sáttmálar við onnur lond — undir **Uttanríkismálum** ella undir heitinum **Ríkislógir, kunngerðir og konventiónir.**

Eitt annað dømi er, at flest øll mál sum viðvíkja skúlaskapi, eru at finna undir høvuðsheitinum **Undirvísing**, men eisini undir avvarandi høvuðsorði.

Høvuðsorðini eru sett upp í bókstavrað, meðan tey undir teim nevndu ávisingum eru settar upp í somu raðfylgju, sum tey koma fyri í Løgtingstíðindi.

Í Bind B er ikki gjørt so nógv burtur úr, tí at í teim flestu skjølunum er vist til avvaraudi Løgtingsmál, men í skjølunum, fyri at taka eitt dømi, sum uppskot til nýggja kommunulæknaskipan, er fevnt um mong onnur mál, sum ljósmøður, sjúkrasystrar, heilsu- og sjúkrahúsmál.

Í innihaldsyvirlitinum er undir heitinum SKJØL tikin við øll skjølini í nununarrøð og hvat tey umfata.

Har einki annað er tilskilað vísa síðutølini til Bind A.

Í Bind B eru skjølini 1, 2a og 2b prentað sum serprent, áðrenn Løgtingstíðindi varð lagt til rættis til prentingar, so har byrjar í hesum Løgtingstíðindi í Bind B við framhaldandi síðutal við Skjal 2 c: Fylgiskjøl til figgjarløgtingslógina.

Í sama viðfangi kann verða nevnt, at har vist er til viðmerkingar til figgjarlógina er hugsað bæði um fylgiskjølini til figgjarlógina (Skjal 2 c Bind B) og til álitið frá figgjarnevndini í Bind A, síðu 6 - 22.

Teir ymisku stovnar ella tær ymisku játtanir á figgjarlógini eru ikki greinaðar í innihaldsyvirlitinum, uttan okkurt av hesum av øðrum orsøkum er nevnt. Tað sama er galdandi fyri Løgmannsroðuna, har bara høvuðsdeildirnar eru tiknar upp í innihaldsyvirlitið.

Av tí, at hetta sum fyrr er nevnt, er fyrsta royndin til at gera eitt meira fullfiggjað yvirlit um tað, sum Løgtingstíðindi inniheldur, eru vit takksamir fyri at tey, sum mest gera brúk av Løgtingstíðindi, gera vart við seg og vísa á onkrar ábøtur, sum eiga at verða gjørdar, bæði í komandi Løgtingstíðindi og teimum yvirlitunum, sum verða gjørd fyri eldri Løgtingstíðindi.

Innihaldsyvirlitið fyri Bind A og Bind B eru tikin við í bæði bindini, so at betur yvirlit kann havast við nýtsluni av Løgtingstíðindi.

INNIHALDSYVIRLIT

fyri

Bind A og Bind B 1973

Har einki er viðmerkt frammanfyri síðutalið er talan um Bind A, meðan frammanfyri síðutalið í Bind B er viðmerkt Bind B, uttan har er talan um **Skjøl,** har øll eru í Bind B.

A.

Adoptión (sí ríkislógir).
— Broyting í adoptiónslógini ..... Lm 29 s. 121

Aliatøðir (síl) sí Fiskiskapur.

Alitismenn (sí Tingnevndir)

Almenn mál
— Broyting í lógunum um fólkapensjón, avlamisepnsjón v.m. .... Lm 60 s. 236
— Yvirtøka av sosialu umsitingini ..... Lm 80 s. 291
— Yvirtøka av umsiting av sosialmálum ..... Lm 90 s. 316
— Umt. — pleyguheim ..... s. 395
— Sosiala økið (Løgmannsrøðan) Bind B ..... s. 150

Apotek.
— Tjaldurs Apotek (løgtingsgrannskoðan) ..... s. 26
Sí løgtingsfíggjarlóg.
— Umt. (søga) Skjal 12 B Bind B ..... s. 383

Aabeiðsviðurskifti.
— Skattalætti í yvirtíðarløn ..... s. 82
— Broyting í lærlingalógini ..... Lm 23 s. 110
— Lóg um arbeiðaravernd ..... Lm 33 s. 127
— Umt. (broyting í skattalógini) ..... fh. s. 174

— Minstaløn verkamanna ..... Lm 88 s. 313
— Skriv frá Havnar arbeiðsmannafelag um arbeiðaravernd ..... s. 435

Asfaltering — sí Vegir — Havna- og vegamál.

Atløgubryggir.
— Útbygging av smærri havnarløgum ..... Lm 127 s. 396
Sí annars Havnir — Havna- og vegnamál.

Avlamin.
Sí Almenn mál, Vanlukkutrygging, Figgjarløgtingslóg og viðmerkingar til hennara.

Avlanispansjón.
Sí Almenn mál, Figgjarløgtingslóg og viðm. til hennara.

Avskrivingar, skattligar.
— Umt. ..... s. 363
Sí eisini Landsskattur og kommunuskattur.

B.

Barnaforsorg.
Sí Almenn mál, Figgjarlóg og Rikislógir.

Barnasjúkrasystrar.
— Sí Skjat 12 B: Alit viðv. kommunulæknaskipanini ..... s. 291

Bátahavnir. Sí Havna- og vegamál, Havnir.

Báuthyljar. Sí Havna- og vegamál, Havnir.

Bátar. Sí Skip, Fiskireiðskapur, Útróður.

Berghol. Sí Havna- og vegamál.

Bjarging.
— Umf. (Om tilsyn med Skibe) ..... s. 119

Bókasavn. Sí Søvn, Figgjarlóg og viðm. til hennara.

Bókføring.
— Broyting í bókføringslógini ..... Lm 27 s. 118

Brennivín. Sí Rúsdrekka.

Búnaðarskúli. Sí Undirvísing.
— Umt. ..... s. 238

Búskaparmál. Sí Figgjarmál.
— Umt. (Føroyar og EEC) ..... s. 296

Býarskipanarlógir. Sí eisini Kommunal mál.
— Broyting í býarskipanarlógini ..... Lm 96 s. 338

Bygdahavnir. Sí Havnir, Havna- og vegamál.

Bygda(r)ráð. Sí Kommunal mál.

Byggilendi. Sí Sethúsabygging.
— Umt. (Keyp av jørð) ..... fh. s. 204

Byggimál. Sí Sethúsabygging.

Býráð. Sí Kommunal mál.

D.

Dálking.

Djór.

E.

E E C. Sí EF.

E F.
— Umt. EEC fiskimarkspolitikki ..... s. 73
— E E C-málið ..... Lm 43 s. 183
— Felagsmarknaðarmálið ..... Lm. 44 s. 184
— Føroyar og EEC ..... Lm 82 s. 296

E F T A.

Eftirlønir.

Eftirskúlar. Sí **Undirvísing.**

Eggvirki.
— **Veðhald fyri láni til Eggvirki** ..... Lm 92 s. 325

Egnsudvikling. Sí **Heggingarstuðningur.**
Umt. (broyting í skattalógini) ..... s. 23
— **Umt.** ..... Lm 7 s. 41 fh.
— **Umt.** ..... s. 326 fh.

Einkjupensjón. Sí **Almenn mál, Figgjarlóg.**

Evnaveik. Sí **Almenn mál, Ríkislógir.**
— Broytingaruppskot (figgjarløgtingslóg 1974/75 ..... s. 20

9. Upplýsingarvirksemi		15.000,—	15.000,—
10. Bygdasøvn	—	55.000,—	—
	474.123,71	711.000,—	781.000,—

Viðmerkingar:

		lon + egið eftirlønargjald	eftirlønargjald 10 %	Tilsamans
	ad 1. lønir			
	Landsantikvarur	67.170,—	—	67.170,—
	Savnvørður	79.352,	6.884,—	86.236,
1)	Savnvørður	56.060,—	5.606,—	61.666,—
	Teknikarl	40.925,—	—	40.925,—
	Savnsskrivari	40.925,—	—	40.925,
	Skrivstovuhjálp hálvan dag	20.460,—	—	20.460,—
	Hjálparfólk, upplýsing hálvan dag	22.814,—	—	22.814,—
2)	Hjálparfólk, myndasavn, hálvan dag	20.000,		20.000,—
3)	Vaktarhald í framsýning	17.000,—	—	17.000,—
	Fritíðaravloysarar	18.000,—	—	18.000,—
	Fritíðargjøld	5.000,—	—	5.000,—

Meirnýtslan í roknskaparárinum 1972/73 stendst av arbeiðsorlov landsantikvarsins. Av øðrum játtanum í roknskaparárhum hevur tó verið spart so nikið, at samlaða meirnýtslan hjá stovninum hevur verið sera lítil.

1) Við yvirtøkuni av Tjóðlivsnevndini fylgdi starvið sum rannsóknarleiðari, ið verður honorerað við kr. 12.000. Føroyski etnologurin, sum rakir hetta starv, varð liðugur M.A. á nýggjárinum og lesur nú víðari fram móti doktaraprógvi í Svørlki, nuen er hugaður at koma heim til Føroya næsta ár. Savnið hevur stóran tørv á fólki til m.a. etnologiska arbeiði sitt, og verður tí sókt um, nú møguleikar eru fyri at fáa kvalificeruðan mann, at starvið sum rannsóknarleiðari verður broytt til fult starv sum savnvørður.

2) Søkt verður um hjálparfólk í hálvan dag at umsita stóra myndasavn Fornminnissavnsins. Savnið eigur negativsøvnini hjá Absalon Joensen, Breidal, Chr. Hansen og øðrum fotografum, og mangar aðrar myndir, bæði negativir og positivir, eru í sama savni. Fyri at hetta savn kann verða liðugt skrásett og skipað, so tað kann nýtast eftir endamáli sínum, og fyri at innsavnanin av myndum kann halda áfram, er neyðugt við hjálparfólki, sum kann taka sær av hesum arbeiði, og sum eisini kann átaka sær tað neyðuga kopieringsarbeiði av negativum. Roynt verður tó at hjálpast við einum fólki í hálvan dag.

3) Eftir at savnið er farið at hava framsýningarnar opnar hvønn dag um summarið — ein skipan sum bæði er neyðug og hevur givið gott úrslit — eru útreiðslurnar til vaktarhald vorðnar so stórar, at tað má metast neyðugt at fáa serstaka játtan til teirra á hesi konto.

ad 3. Húsaútreiðslur.

Orsøkin til meirnýtsluna í roknskaparárinum 1972/73 er útreiðslurnar til hita, ljós, reingerð o.t. í starvshúsnum, sum savnið flutti inn í í nov. 1972.

Umframt vanligar útreiðslur verður søkt um eykajáttan kr. 10.000 til máling av starvshúsunum uttan og til at hampa rundan um tey.

Savnið hevur nú møguleika at fáa til leigu stór og hoglig goymsluhøli, sum kunna rúma bæði vanligu goymslunum og stórlutum sum bátum o.t.. Søkt verður tí um, at játtanin til leigu verður hækkað úr kr. 5.000 til kr. 18.000.

Uppskotið verður sostatt til

Starvshús og framsýningar	20.000,-
Røkt av starvshúsum (eykajáttan)	10.000,-
Leiga av goymsluhøli	18.000,—

ad 4. Aðrar útreiðslur.
Søkt verður um, at játtanin verður hækkað við kr. 10.000, sum eru ætlaðar arbeiðinum við myndasavninum, kopieringstiltar, myndakort o.t.. Sbr. viðm. ad 1.

ad 5. Umsiting av fornminnum v.m.
Av tí eykajáttan, sum latin varð í fíggjarárinum 1972/73 til at fáa til vega yvirlit yvir varðveitingarverdar byggningar í Føroyum, er bert ein partur nýttur. Høvuðsorsøkin til hetta var, at tann arkitektur, sum savnið hevði samband við, tá saman um kom ikki hevði stundir at átaka sær arbeiðið tá, og heldur ikki vildi átaka sær tað fyrr enn ein grundleggjandi skráseting var gjørd.

Vísandi til fíggjarnevndarálitið í løgtingsmálinum um yvirtoku av gomlu hóndahúsunum í Depli, skal verða sagt frá, at Føroya Fornminnissavn fór undir ta umrøddu skráseting í 1972, og at hon væntuliga verður liðug í fíggjarárinum 1973/74. Grundað á skrásetingina fer tað at bera serkønum arkitekti til at meta um, hvørjir byggningar kunna metast varðveitingarverdir og eftir at hava kannað teir útvaldu byggningar nærri at seta fram uppskot um, hvørjir eiga at verða varðveittir. Savnið søkir tí um, at eykajáttanin til húsaskrásetingar má verða endurnýggjað í fíggjarárinum 1974/75, og er ætlanin tá at nýta játtanina til løn og útreiðslur hjá serkønum arkitekti.

ad 10. Studningur til bygdasøvn.
Tann studningur, sum samsvarandi løgtingslóg um bygdasøvn, verður latin sløkum søvnum verður í fíggjarárinum 1973/74 bókaður á konto Føroya Fornminnissavns. Tað verður tó hildið rættast, at slíkur studningur, sum einki beinleiðis hevur við Føroya Fornminnissavn at gera, tó at landsantikvarurin hevur eftirlit við nýtsluni, verður bókaður saman við øðrum studningum, sum latnir verða úr landskassanum, og verður uppskot sett fram um hetta.

Viðmerking frá landsstýrinum.
ad konto 1: lønir.

Viðvíkjandi yvirtøku av innsavningararbeiðinum hjá tjóðlívsnevndini, sum nú er tikin av, eru samráðingar millum fornminnissavnið og fróðskaparsetrið um, hvussu arbeiðið skal býtast. Talan er um, at fornminnissavnið skal hava hin materiella partin og fróðskaparsetrið hin andaliga, sonja er tó ikki enn um býtið. Av hesi orsøk er játtanin til etnologin ikki tikin við.

---

63) **ad § 15-4: Bygdasøvn.**
Smbr. skriv 4. juli 1973.

	I. 1973/74	II. 1974/75
1. Studningur til bygdasavn	50.000,-	50.000,-
2. Eftirlit, hjálp og leiðbeining	5000,-	5.000,-
3. Umvælingarstudningur til gamlar byggningar..		50.000,-

Viðmerkingar:
ad 1 og 2. Enn er ikki gjørligt at meta um, hvussu stór játtan, ið neyðug verður, og verður tí skotið upp at veita somu játtan sum í figgjarárinum 1973/74.

ad 3. Seinastu árini er ferð eftir ferð komið fyri, at søkt hevur verið um studning til umvælingar av gomlum byggningum, sum eru privat ella kommunal ogn, og í leinum førum slíkar umsóknir hava verið gingnar á møti, hevur játtanin verið bókað á konto Føroya Fornminnissavns ella beinleiðis nýtt av játtan savnsins, sum tá hevur verið minni fært fyri at røkja tær uppgávur, tað beinleiðis hevur ábyrgdina av. Tó at landsantikvarurin fær álagt eftirlit við slíkum studningi, má tað haldast einki beinleiðis at hava við Føroya Fornminnissavn at gera, og verður tað tí í samráð við Landsskrivstovuna skotið upp, at slíkur studningur — eins og studningur til bygdasøvn — verður veittur av serstakari konto. Tær treytir eiga at verða tagdar á, at landsantikvarurin hevur eftirlit við studninginum, og at studningurin verður tinglisin sum pant í viðkomandi ogn, tó soleiðis at pantið verður avskrivað yvir 10 ár.

Tað má ásannast, at skal tað vera gjørligt at varðveita gamlar bygningar, má tað almenna kunna veita stuðul til aðrar bygningar enn teir fáu, sum eru ogn hjá Føroya Fornminnissavni og bygdasøvnum. Hóast bæði privati og almenni ábugin fyri gomlum bygningum tykist støðugt vaksandi og torvurin á studningi er stórur, verður ikki skotið upp at seta av meiri pening, enn landsantikvarurin heldur seg kunna umsita. Eini stórri peninganogd hevði tað, orsakað manningartrot, ikki verið gjørligt at havt tað neyðuga eftirlitið við.

64) **ad § 15-6: Fiskirannsóknarstovna.**
Smbr. skriv 3. juli 1973.

	Roknskapur 1972/73	Játtan 1973/74	Uppskot 1974/75
1. Tænastumenn	167.337,12	106.000,- -	106.000,- -
2. Aðrar lønir	197.150,04	280.000,--	290.000,- -
3. Rakstur av skipi (J.C.Svabo)		200.000,- -	200.000,- -
4. Leiga av forum, umboð, sjálp v.m.	200.397,73	300.000,- -	300.000,-
5. Húsaútreiðslur	25.190,84	27.000,- -	27.000,--
6. Aðrar útreiðslur	9.660,45	7.000, -	8.000, --
7. Ferðaútreiðslur	10.767,56	9.000,	10.000,- -
8. + endurrinding ríkiskassans	225.053,00	464.500,--	470.500,
	355.450,74	464.500,--	470.00,- -

Viðmerking.

Sambart viðtøkurnar og síðan Fiskirannsóknarstovan varð sett á stovn hevur fiskimálaráðið goldið helmingin av útreiðslunum. Fyri fíggjarárið 1972/73 varð skotið upp at hækka konto 4, soleiðis at vit kundu gjalda allan rakstrin av Jens Chr. Svabo. Henda hækking varð játtað á føroysku fíggjarlógini, meðan fiskimálaráðið ikki játtaði.

Í fylgiskjali til fíggjarlogtingslóg 1973/74 hevur landsstýrið hesa viðmerking: Landsstýrið tekur upp samráðingar við fiskimálaráðið um at settur verður ein fiskifrøðingur aftrat, at ráðið luttekur við eini helvt av rakstrinum av m/s Svabo, og at játtanin á konto 4 verður 300.000 kr. eins og í 1972/73.

Hesar samráðingar hava okkum kunnugt ikki verið enn, og verður tí mælt til, at tær vera tiknar upp sum skjótast.

§ 15.6

Kanningarnar av fornvigastovninum eru ikki loknar enn. Vit mæla tí til, at játtaðar verða 10.000 kr. aftur í 1974/75 til framhald av hesum kanningum.

65) **ad § 15-7: Fuglakanningarstøð v.m.**

R.	J.
72/73	73/74
13.018,95	13.000,—

Til fuglakanningarstøðina í Nólsoy eru sum vant settar kr. 3.000,00 av.

Í 1971/72 til 1973/74 eru kr. 10.000 árliga játtaðar til kanningar av lomvigastovninum, kanning sum løgtingið hevur samtykt í sambandi við áheitan, at lomvigin verður friðaður til ávísa tíðir, og forboð verður sett fyri ávísan veiðuhátt, jbr. LGT. 1968, bls. 154.

Skotið verður upp, at eisini í 1974/75 verða kr. 10.000 settar av til framhald av kanningunum.

Skotið verður upp at seta 5.000 kr. av til útseting av rýpunu.

---

66) **ad § 15-8: Náttúrugripasavn.**
Smbr. skriv 12. juli 1973.

	Roknskapur 1972/73	Játtan 1973/74	Uppskot 1974/75
1. Lønarendurgjald	63.342,08	53.000,—	66.000,—
2. Aðrar lønir	60.756,45	67.800,—	72.000,—
4. Húsaútreiðslur	13.059,80	55.000,—	25.000,—
5. Skrivstovu- og starvsstovuhald	4.985,50	8.000,—	8.000,—
6. Aðrar útreiðslur	4.768,91	10.000,—	10.000,—
7. Savnarbeiði (viðv. innretting, innsavning, magasinering o.l.) fluttningur, ferðapeningur innanoyggja o.a.	10.103,25	15.000,—	15.000,—
8. Umsiting av Debessartrøð	39.115,08	20.000,—	28.000,—
	196.131,07	228.800,—	224.000,—

Viðmerkingar:

2. Konservator: løn pr. 1. apríl 73 + 10% 51.478,94
   Hjálparmaður (el. kvinna) ..... 14.400,—
   Vakt á savninum ..... 6.000,—
4. Roknskapurin 1972/73 vísir kr. 13.059,80 herafturat skal leggjast kr. 11.827,87, sum er partur Formuninnisavnsins áðrenn teir fluttu úr húsinum.

5. Sí viðmerking á uppskoti 1973/74.
6. 7. 8. Ov lítil nýtsla á konto 6 og 7 og av stór nýtsla á konto 8 kemur av at ein eykajáttan kr. 13.000,— til boringararbeiði í Tjørnuvík, Saksun (skr. savnsins 8.11.72) skuldi verið bókað á konto 6 og 7.
8. Lønin hjá uttanlýsismannin fer frá 1. apríl upp í kr. 1.920,60 um mánan, tils. kr. 23.047,56 kr. 5.000,— aftarat er hjálp og tilfar.

Viðmerking frá landsstýrinum:

ad konto 2: aðrar lønir.

Samráðingar verða millum landsstýrið og ríkisstýrið um at seta jarðfrøðing við serkunnleika í geologiskum fyribrygdum í havbotninum. Talan er um at býta útreiðslurnar. Landsstýrið vendir aftur til málið, tá ið samráðst er, lønarútreiðslan er til ikki tikin við.

---

67) ad § 15-9: Fróðskaparsetur Føroya.
Smbr. skriv 18. juni 1973.

	Nýtsla 1972/73	Játtan 1973/74	Uppskot 1974/75
1. Tænastumenn v.m.			
Deildarstjóri v/máldeild		90.000,—	95.000,—
Lærari v/máldeild		90.000,—	105.000,—
Deildarstjóri í heimspeki		90.000,—	32.500,—
Deildarstjóri í náttúruvísind við støðisútbúgvingina		90.000,—	33.500,
	199.875,71	360.000,—	266.000,—
2. Aðrar læraralønir			
Heimspeki	98.442,69	1.000,—	
Eykalærarar v/máldeild	11.349,30	6.000,—	17.000,—
Náttúrufrøðideildin	3.051,00	12.000,—	12.000,—
Fyrireikandi lestur		7.500,	7.500,
Kvøldundirvísing	27.899,24	20.000,—	26.000,—
Kvøldfyrilestrar	3.130,00	3.500,	3.500,
Serfrøðinga- og undirvísingarhjálp við støðisútbúgvingina	41.317,70	100.000,—	25.000,—
	185.189,93	149.000,—	91.000,

3. Skrivstovufólk			
Fulltrúi	25.067,65	30.000,-	58.000,-
Skrivstovuhjálp hjá fulltrúa	12.521,76	16.000,-	17.000,-
Skrivari á Føroyamálsdeild	33.678,57	39.000,-	41.000,-
Útskrivingarfólk	2.878,43	5.000,-	29.000,-
Skrivstovufólk — støðisúth.	16.926,42	35.000,-	12.500,-
	91.067,83	125.000,-	157.500,-
4. Húsaútreiðslur			
Reingerð (øll húsini)	21.163,58	20.000,-	22.000,-
Ljós og hiti (+ leiguinnt.)	343,82	2.000,-	2.000,-
Búnyttur og umvælingar	5.550,59	2.500,-	32.500,-
Umsjón	1.604,99	1.500,-	1.700,-
Húsaleiga fyri støðisúth.		24.000,-	6.000,-
	28.662,98	50.000,-	64.200,-
5. Skrivstovuhald			
Setrið við deildum	22.297,30	16.000,-	18.000,-
Ljósprent og duplikering (slovnarnir á Debesartrøð)	8.338,99	9.000,-	10.000,-
Støðisútbúgvingin	4.994,29	12.000,-	4.000,-
	35.630,58	37.000,-	32.000,-
6. Bókakeyp/undirvísingartilfar			
Føroyamálsdeildin	7.470,09		5.000,-
Støðisútbúgvingin:			
undirvísingarútgerð		)	)
— tilfar		) 35.000,-	) 15.000,-
	7.470,09	35.000,-	20.000,-

7. Aðrar útreiðslur			
Innsavning — Setrið/Tjóðlivsnevnd ..	20.863,55	5.000,)	23.000,—
Savning av andligum vísusongi		9.000,—)	
Ferðaútreiðslur — Setrið	458,—	12.000,—	15.000,—
Fyrilestrarframsýning (iroknað norðurlendskt summarskeið)	1.500,—	18.000,—	2.000,—
Húsaleiguskoyti til stjóran á heimspekideild f/eyka undirvising	13.333,32	15.000,—	4.750,—
Ymist	562,—	2.500,—	2.500,
Ferðaútreiðslur — Støðisútbúgving ..	18.092,05	12.000,—)	
Eftirlitsvitjan úr Odense		)	6.000,—
og Roskilde viðv. støðisútbúgv.		3.000,—)	
Íløgur viðv. støðisútbúgving	107.298,96		
	163.937,88	76.500,—	53.250,—
8. Húsaleiga fyri Føroyamálsdeild og starvsstovu	12.000,—	12.000,—	97.333,—
Tilsamans	723.835,—	844.500,—	781.283,—

Heildarviðmerkingar til uppskotið

Í sambandi við fyriliggjandi uppskot loyvir Fróðskaparsetrið sær at taka fyrivarni vegna hesi mál, sum í lotuni eru ógreið:

1) **Føroyamálsdeildin** hevur eftir áheitan lagt uppskot fyri setursráðið um akademiskt prógv í føroyskum, **soleiðis** at undirvísingin **kann** byrja í september 1974. Til hetta meta teir, at lað verður neyðugt við 2 fostum lærarum aftrat. Ráðið hevur enn onga avgerð tikið í málinum og í samráð við Johan Djurhuus, aðalskrivara, ongan pening sett av til hesnr lærarar í fyriliggjandi uppskoti. Eftir avtalu verður vent aftur til málið í oktober 1973.

2) **Støðisútbúgvingin.** Royndartíðin er av á summri 1974, og av tí at eingin avgerð er tikin enn um framhald, umfata øll tøl í uppskotinum hesi útbúgving viðvíkjandi (merkt. við krossi) bert uprit ársfjórðing (fastar lønir íð ein eyka mánaða til frítíðarpening). Eisini í hesum fori verður vent aftur til málið í oktober 1973, eftir at setursráðið hevur havt hóvi til at kanna og taka støðu til her framtíðarætlanir, ið deildin fer at seta fram.

3) **Evna- og bakteriufrøðiliga starvsstovan.** Sum nú er, liggur bert eitt tal greitt, tað er parturin av avdrátti og rentum, ið er áliknaður setrinum (4/25 ella kr. 85.333) komandi fíggjarár. Hvussu verður við øðrum útreiðslum, ið krevja játtan á fíggjarlógini, tá ið nýggju húsini verða tikin í nýtslu, er ógjørligt at meta um í løtuni. Eisini hesin spurningur er knýttur at framtíðarútbygging setursins eins og teir báðir omanfyri nevndu. — Tá ið ein sjálvboðin nevnd í sínarl tíð legði hetta mál fyri Fróðskaparsetrið við bøn um, at setrið vildi viðmæla tí og leggja tað fyri landsstýrið, var tað, tí at nevndin tá helt tað vera best, at starvsstovan gjørdist deild beinleiðis undir setrinum. Tað verður nú av nevndini hildið vera ivasamt, um hetta er rætti formurin, og samráðst verður um møguliga at finna annan meiri hóskandi form. Setrið vil kortini átaka sær at avgreiða málið, til ein avgerð liggur fyri Ljósprent av rakstrarætlan 1974/75 er viðlagt.

Ætlanin er í næstu framtíð at hava fund við landsstýrið um hesi 3 mál og teir spurningar, av fíggjarligum og øðrum slag, ið standa í sambandi við tey.

Viðmerkingar til tær einstøku upphæddirnar

1. Tænastumenn

Vit hava tíverri ikki fingið greint nýtsluna 1972/73. Munurin millum nýtslu og játtan 1973/74 kemst av, at í 1972/73 vóru bert deildarstjórin á máldeild fult løntur av hesi konto, lærarin á máldeild í 3 mánaðir og deildarsjórin í náttúruvísindi í 7 mánaðir. Deildarstjórin í heimspeki fekk løn av konto 15.8.2. Í ár standa allir teir nevndu á konto 15.8.1. Lønirnar til deildarstjóran og læraran á máldeild eru í uppskotinum settar, so sum gjaldstovan gevur tær upp við eftirlønargjøldum pr. 1.4.73. Viðv. hinum báðum deildarstjórunum, (sí heildarviðmerkingar 2).

2. Eykalærarar við máldeild: Uppskotið er hækkað frá 6.000 kr. til 10.000 kr. sbr. nýtsluni 1972/73. Harafturat eru 7.000 kr., ið framkoma soleiðis: Til tess at lærarar á ársskeið á Fróðskaparsetrinum kunnu fáa nakað lær somu somdir sum teir ið fara á Danmarks Lærerhøjskole, krevur skúlastjórnin undirvísing í uppalingarsálarfrøði. Satusýningin fyri hesa undirvísing, kr. 10.000 um árið fyri 3 vikutímar, hevur higartil staðið á konto 15.8.7 sum húsaleigniskoyti til deildarstjóran á heimspekideild (lagd saman við 5.000 kr. fyri leiðslu av støðlsúlbúgving). Rættast er sjálvsagt at lata talið standa undir eykalærarum, har vit nú hava sett 7.000 kr. fyri tíðarskeiðið aug. 74 til mars 75, meðan 3.000 kr. (+ 1.750 kr. fyri leiðslu, tils. 4.750 kr.) standa eftir á 15.8.7 til ta tíðina, núverandi deildarstjóri í heimspeki vantandi verður verandi í starvinum.

Náttúrufrøðideild og fyrireikandi lestur: Nýtslan er lítil, tí eingi skeið hava verið í 1972/73.

Kvøldskúlaundirvísingin er lækkað við 6.000 kr. sbr. nýtsluna 1972/73. Roknað verður við 8 - 9 skeiðum.

Serfrøðingahjálp etc.: Sí heildarviðmerkingar 2).

3. **Fulltrúastarvið** kann ikki halda fram sum hálvdagsstarv. Til tess er arbeiðið vorðið ov umfatandi. Samsvarandi hesum er full løn sett í uppskotið. **Skrivstovuhjálp** (næmingur) og **skrivari** eru hækkað sambært lønum galdandi 1.4.73.

Útskriving: Uppskotlið umfatar: Útskriving 5.000 kr., skráseting av handbókasavni okkara 5.000 kr., tímalønta teknikkarahjálp í samb. við bandinnsavning 5.000 kr. (øll ljóðbond, ið verða upptikin, mugu spælast yvir á onnur bond, skulu tey ikki forfarast, tá ið arbeitt verður við teimum, og til tess er neyðugt við serkønari hjálp) og 11.000 kr. til skrivstovuvæsning, ið Føroyamálsdeildin søkir um, tí skrivarin er ikki førur fyri longu nú at fáa alt arbeiðið ið er, frá hondini.

Skrivstovufólk á støðisútbúgving: Sí heildarviðmerkingar 2).

4. **Reingerð** er hækkað fyri prístalsvøkstur.

Búnyttur og umvælingar umfata 2.500 kr. (eins og á játtan 73/74), og har afturat 30.000 kr., vegna tess at setrið væntandi komandi ár fær til nýtslu kjallarahæddina, har Fiskifrøðarstovan nú heldur til, og tí skil noyðist at keypa innbúgv, eins og tey skápini til goymslu okkara, ið eingin játtan fekst til í ár, nú eru við.

Húsaleiga fyri støðisútbúgving: Sí heildarviðmerkingar 2).

5. **Skrivstovuhald:** Nýtslan 1972/73 er pakað misvísandi viðvíkjandi býtinum. Uppskotið 1974/75 er hækkað fyri prísvøkstur.

6. **Bókakeyp og undirvísingartilfar.**
A játtan 1973/74 hevur Føroyamálsdeildin onga játtan til bókakeyp, av tí at avrátt varð við Landsbókasavnið um at keypa bøkur um teirra konto. Upplýst verður nú, at Landsbókasavnið kann ikki átaka sær at keypa setrinum bøkur til útskriving, og tí skil verða nú settar 3.000 kr. í uppskotið til hetta + 2.000 kr. til undirvísingartilfar (Xerox-ljóspreint úr útlondum).

Viðv. **støðisútbúgvingini**, sí heildarviðmerkingar 2). Her er tó meira enn ½ av játtan í ár settar í uppskotið, orsakað av at í endanum av hesum fyrsta royndarskeiði krevst meira tilfar enn vanligt, og ætlanin er eisini av hesi konto at nýta pening í sambandi við útgávu av føroyskum lærubókatilfari, ið næmingar og lærarar við støðisútbúgvingina greiða úr hondum.

7. **Innsavning:** Uppskotið umfatar: Xerox-ljósprent av staðanavnatilfari 5.000 kr., staðanavnamerking (myndir og kort) 5.000 kr., ljóðbond 5.000 kr. og samsýning til savnarar 8.000 kr. — Staðanavnainnsavningin er nú logd undir Føroyamálsdeildina. Til framhald av henni er neyðugt at fáa Xerox-ljósprent av øllum tí føroyska staðanavnatilfarinum hjá Institut for navneforskning í Keypmannahavn, og til staðanavnamerking skulu nýtast loftmyndir og kort. Harafturat mugu sakkønir menn runt um landið fáast at hjálpa deildini fyri ávísa samsýning við staðanavnainnsavning og aðrari innsavning, har nýtt verða hópin av ljóðbondum.

Ferðaútreiðslur: Nýtslan 1972/73 er nakað misvísandi, av tí at ferðaútreiðslur hjá heimspekideildini eru konteraðar undir støðisútbúgving, ið av ymiskum orsøkum hevur nýtt minni ferðapening enn ætlað. Heimspekideild eigur 4.000 kr. burtur av setursins ferðapeningi, og eftir meting frá Føroyamálsdeild verða tær 8.000 kr., ið so eru eftir á játtan 73/74, ov lítið í framtíðini til ferðing innan- og uttanlands. Tí verður søkt um tilsamans 15.000 kr.

Fyrilestrasamsýning varð í 1973/74 hækkað vegna norðurlendskt summarskeið í føroyskum, ið líklið hevur verið mánaðarskifti mai/juni. Fyrilestrasamsýningin er ætlað til útreiðslur í sambandi við møguliga innbjóðing til útlendskan fyrilesara.

Húsaleiguískoytl etc.: Sum nevnt undir konto 15.8.2. Eykalærarar, umfatar nýtsla 72/73 og játtan 73/74 samsýning til deildarstjóran í heimspeki fyri undirvísing á ársskeiði (10.000 kr.) og leiðslu av støðisútbúgving (5.000 kr.). Uppskotið umfatar nú bert apríl ársfjórðing 1974 + fríliðarpening (samsýning 3.000 kr., leiðslu 1.750 kr.).

Ferðaútreiðslur og eftirlitsvitjan viðv. støðisútbúgving, ið eftir áheitan eru løgd saman, umfata 4.000 kr. til ferðir næminga og lærara í apríl ársfjórðingi (íroknað prishækking 1.000 kr.) og 2.000 kr. til eftirlitsvitjan í sambandi við, at royndarskeiðið endar. Sí annars heildarviðmerkingarnar 2).

8. **Húsaleiga** umfatar tær vanligu 12.000 kr. fyri **Føroyamáladeild**, men harafturat koma 85.333 kr. fyri setursins part av avdrátti og rentum fyri starvsstovubygningin, sum er í gerð; sí annars heildarviðmerkingar 3).

68) ad § 15-10: Evnafrøðisligt starvsstova.
Smbr. skriv 26. juni 1973.

24. juni í ár var fundur havdur viðvíkjandi rakstrinum av evna- og bakteriufrøðiligu starvsstovuni. Á fundi vóru:

Jóannes Rasmussen, statsgeologur,
H. D. Joensen, landslækni,
D. J. Bærentsen, landsdjóralækni,
Jákup Haraldsen, landsapotekari,
Robert Poulsen, stjóri,
Karsten Hoydal, fyristøðumaður.

Síðani metingin av byggikostnaðinum varð gjørd í mars 1972 og hagartil, at øll hovuðstilboð uppá bygging av teimum trimum deildunum: Skjalasavni, Starvsstovu og loftshædd til Fróðskaparsetrið eru fingin til vega, er byggikostnaðurin vaksin úr 2.500.000 kr. upp í 4.000.000 kr.

Upprunaliga rakstrarætlanin varð gjørd út frá einum byggikostnaði upp á 2.500.000 kr. (Sí skriv frá 9. mars 1972 frá byggjanevndini og løgtingsmál nr. 82/1971: Bygging av evnafrøðiligari og bakteriologiskari starvsstovu). Tað gjørdist tí neyðugt at broyta upprunaligu rakstrarætlanina í samsvar við hækkaða byggikostnaðin. Fundurin gjørdi onga endaliga rakstrarætlan, men bað D. J. Bærentsen, Robert Poulsen og Karsten Hoydal um at gera hetta.

Í telri rakstrarætlan, sum við hesum verður send Fróðskaparsetrinum, er býtið av byggikostnaðinum áliknað deildunum soleiðis sum upprunaliga varð gjørt:

Starvsstova	14/25
Skjalasavn	7/25
Fróðskaparset.	4/25

Útreiðslur til tól og amboð — um 200.000 kr. eftir tilboð — eru ikki roknaðar uppí byggikostnaðin. Vit loyva okkum at næla til, at setursráðið søkir búagrunnin um pening til keyp av tólum og amboðum til starvsstovuna.

Rakstrarætlan fyri Evna- og bakteriufrøðiligu starvsstovuna fyri figgjarárið 1974/75.

Avdráttur og renta av 14/25 av 4.000.000 kr:		2.240.000,—
Avdráttur (30-ára avdráttartíð)	74.667,—	
Renta (10 % p.a.)	224.000,—	298.667,—
Ætlaðar rakstrarútreiðslur		
Lønir til 5 fólk	400.000,—	
Ljós, hiti og reingerð	25.000,—	
Gløs, flot og evnafr. tilfar	25.000,—	
Ymsar útreiðslur umfram (m.a. ferðaútreiðslur)	60.000,—	510.000,—
Árligar útreiðslur		808.667,—
Inntøkur		
Fyri kanningararbeiði	300.000,—	
Figgjarætlan Fiskiídnaðarstovunnar	167.000,—	467.000,—
Hall tilsamans		341.667,—

69) **ad § 15-12-1: Barnablað.**
Smbr. skriv 27. juni 1973.

....., fari eg við bestum at søkja um studning á komandi løgtingsfiggjarlóg til Barnablaðið kr. 5.000,00. Hetta er meira enn vit plaga at fáa, men ætlanin er at nýta peningin til betur myndatilfar í blaðnum. Tá tó sigast skal sum er, hevur verið spart nógv uppá myndatilfarið, og er hetta gjørt fyri at blaðið ikki skal geva undirskot.

Vit vóna, at umsóknin verður játtað.

Viðmerking frá landsstýrinum.

Skotið verður upp at hækka játtanina við 3.000 kr. til 5.000 kr., soleiðis at Barnablaðið fær 4.000 kr.

70) ad § 15-12-2: Tónleikur og saugur.

Sum landsstýrinum kunnugt verða gjørdar nmandi iløgur í skúlabygging og tá ofta í serhølir í samband við hesa. Millum hesi mongu serhølir eru rútn til sang og mnsikk, bygd á serligan háti, og eru tey ofta væl útgjørt við mnsikktólnm av ymiskum slagi.

Óneyðugt er at gera vart við, at hesi høli, sum kosta mnnandi í iløgum, ikki vera nýtt meira enn sjálva skúlatíðina, t.v.s. millum kl. 8 og 5.

Um so skuldi verið, at tørvur er fyri slíkum hølum í kommmnni aftaná hesa klokkutíð, hvat nógv bendir á, so er rætt at gera nýtslu av teimum.

Tørvurin á fritíðarvirksemi verður alt meira átroðkandi. Um tað nú eisini eydnast at fáa fritíðarlógina viðtikna av løgtinginum, tá hendan vónandi verður framløgd í hesi tingsetuni, so skuldi fíggjarliga grundarlagið verið undir slíkum fritíðararbeiði. Mær tykir tí, at landsstýrið her eigur at leggja fyri, ella í førum taka undir við ávistari leið.

Sjónleikurin er vorðin stuðlaður á seinastu fíggjarløgtingslóg í vissan mun, og eigur hetta nú eisini at vera gjørt viðvíkjandi sangi og tónleiki, soleiðis at studningsveitanin verður samskipað við kommunalan studning.

Tí verður skotið upp soleiðis:

Á fíggjarløgtingslógini fyri 1974/75 vera avsettar kr. 100.000. Hesin peningur verður at nýta á tann hátt, at hetta er partur av ilegging til musik- ella sangvenjara í kommununum.

Kommunan, sum umhugsar at velta ungdómi ella eldri hendan møguleika fyri uppaling, verður at gjalda 50 % av tí, sum sang- ella mnsikpædagogisk ekspertisa kostar. Landið rindar so tey 40 % úr nevnda grunni, meðan luttakararnir rinda 10 %.

Tann samlaða upphæddin fyri ein serkønan á økinum verður mett til 70.000 kr. um árið, og verður hetta at býta soleiðis:

Landskassin	28.000,—
Kommnnukassin	35.000,—
Luttakararnir	7.000,—
tilsamans	70.000,—

Tá luttakaratalið má roknast til minimum 40 ella meira fyri hvønn serkonan, so verður upphæddin hjá hesum einstaka í mesta lagi 145 kr. pr. mnnnig, ein upphædd, sum má roknast rímilig.

Við kunngerð verður regla gjørd fyri nýtsluni av hesi peningaupphædd.

71) **ad § 15-12-3: Sjónleikur.**

Skotið verður upp at játta 60.000 kr. í samsýning til konsulent v.m.

---

72) **ad § 15-12-4-2: Til útgávu av bókum v.m.** **kr. 65.000,- **

Smbr. skriv dagf. 27. juni 1973.

Vegna Bókadeild Føroya Lærarafelags fari eg á komandi tiggjarløgtingstóg at sokja um studning til barnabókaútgávu, kr. 65.000,—

Orsøkin til at vit í ár hækka umsóknina so munandi, er tann, at vit hava liggjandi ikki minni enn 30 handrit, og vit vita um fleiri umsetingar, sum eru í gerð.

Eisini fari eg at nevna, at seinasta ár gávu vit fleiri dýrar bøkur út, so at vit fingu rakstrarhall. Hesar bøkur binda væl av peningi rættiliga leingi.

Tíverri ber mær í løtuni ikki til at senda grannskoðaðan rokniskap hjálagdan, men hann verður framlagdur á aðalfundi felagsins 3. juli, og skal eg so sum fyrr nevnt senda avrit inn.

Av tí at tørvurin á barnalesnaði á móðurmálinum er so ovurstórur, vóni eg, at tað ber til at ganga umsókn okkara á møti.

---

73) **ad § 15-12-5: Føroya Listasavn v.m.**

Skotið verður upp at hækka játhuninа til listaskálan við 10.000 kr. við tí endamáli, at myndirnar kunnu vísast í framsýning eisini aðrastaðni í Føroyum.

Studningurin býtir seg soleiðis:

Føroya Listastavn	30.000,--
Listaskálin	35.000,—

---

74) **ad § 15-12-8: Landsstýrinum at ráða yvir.**

R.	J.
72/73	73/74
119.974,- -	60.000, -

---

75) **að § 15-12-9: Doyvan av radioóljóði.**

Rakstrarhallið á hesi konto hevur í fíggjarárinum 72/73 verið kr. 66.468,05. Meginparturin av hesi peningaupphæld er farin til lønar- og ferðaútreiðslur (til 1 mann).

Á fíggjarlóg 73/74 eru avsettar kr. 58.200,- á hesi somu konto.

Telefonverkið er av teirri metan, at stovnurin sum hevur doyvan av radioóljóði um hendi ikki í dag er so teknísk útbúgvin, at hann er førur fyri at loysa nóg væl tær uppgávur, ið settar verða honum. Neyðugt er at fáa til vega nútímans arbeiðsamboð og harfil eitt hóskandi akfar (vøruvogn).
Sum greitt var landsstýrinum frá á fundi 16/5 í ár, er stovnsetan av fjarsýni her á landi treytað av, at spurningurin um radioóljóð verður loystur eins og at lóggávan á hesum øki verður førd ajour.
Sostatt skal telefonverkið loyva sær at seta fram uppskot um, at seltar verða av kr. 120.000,— í fíggjarløgtingslóg 74/75 til doyvan av radioóljóði.

---

76) **að § 15-12-10: Lánigrunnurin til bókaútgávu.**

Í fíggjarárinum 1972/73 og 1973/74 eru játtaðar 100.000 kr. hvørt árið í samsýning til rithovmadar.

Torført hevur verið at finnið fram til eftir hvørjum reglum satusýningin skal býtast, eisini er tað ein spurningur, um tað ikki hevði stuðlað rithovundar fult so væl um møguleikar vóru fyri lagaligum lánum til bókaútgávu.

Skotið verður upp, at játtanin fer í lánigrunn.

---

77) **að § 15-12-19: Skúlabókaútgáva.**

a) **Sbrt. skriv dagf. 29/6 1973 frá Føroya Skúlabókagrunni.**

Yvirlit yvir væntandi útreiðslur hjá Føroya Skúlabókagrunni 1974/75.

1. Renta av kassakreditti í Sjóvinnubankanum	3.000,-
2. Renta av kassakreditti í Føroya Sparikassa	14.000,-
3. Til avdrátt av kassakreditti	150.000,-
Tilsamman	167.000,-

Yvirlit yvir útgávu av bókum hjá Føroya Skúlabókagrunni 1972/73 og 1973/74.

I Útkomnar bøkur 1972/73:

1. Landalæra (Sovjet, Asia og Australia)
2. Kennir tú orðið (5-8) við svarlista
3. Farao og fólk hansara
4. Kristni til 4. ská.
5. Piltarnir
6. Lesibók við avmarkaðum orðatilfari (2. útg.)
7. Ævintýr úr ymsum londum (1. 5. hefti)
8. Smáir skúlaleikir

II Bøkur, ið eru í umbúna 1973/74:

1. Landalæra (Amerika og Afrika)
2. Søga okkara II
3. Lesibók til 6. ská.
4. Referatstílar og myndastílar
5. Lætt lesing (1.—6. hefti)
6. Ljóðstavilisti
7. Sjálvlestur (1.—5. hefti)
8. Eg skrivi
9. Skúlahagtøl
10. Kristni til 5. ská.
11. Lesibók til 3. veal
12. Frá urskóg til regnskóg
13. Hovuðrokning fyri tey smáu
14. Kristnikunnleiki fyri tey smáu
15. Føroyingasøga á enskum
16. Veraldarsøga
17. Hin fyrsta lesingin (1.—6. hefti)
18. Søgur fyri smábørn (1.—4. hefti)

---

b) Sbrt. skriv frá Bókamiðsøluni dagf. 30. juni 1973.

Fyrst takka vit fyri tað beinasemi og ta vielvild, Føroya Landsstýri hevur vist RMS hesi árini.

Tíverst loyva vit okkum at heita á Landsstýrið aftur í ár at veita BMS stuðul, sum vit seta upp niðanfyri:

Løn	40.000,—
Leiga	27.600,—
Trygging	3.000,—
Telefon, porto og skrivstovuhald	9.000,—
Koyring	2.000,
Avskriving	1.500,—
Hillar	7.500,—
Annað	4.000,—
	94.600,—

Viðmerkingar:
Frá 1. august í ár fáa vit eitt høli aftarat til bókagoymsluna. Leigan fyri hetta hølið er 800,— kr. um mánaðin.

Annars verður vist til viðmerkingarnar í brævinum til Føroya Landsstýri, skrivað 28. juni í 1972.

Viðmerking frá landsstýrinum.

Eftir upprunaligu ætlanini fyri bókamiðsøluna skuldi landið lata studning, so hon kundi byrja, studningurin skuldi lækka á hvørjum ári og eftir fáum árum fulla burtur, raksturin skuldi bera seg við egnum inntøkum.

Studnlngsárini skuldi nú verið farin.

Í hesi umsókn er ikki roknað við inntøkum.

Mælt verður til, at játtanin til bókaútgávu og til miðsøluna er óbroytt frá 1973/74.

---

78) **ad § 15-12-12; Sjónleikarhús, í grunn.**

Í grunninum pr. 11/7 1973	407.109,96

---

79) **ad § 15-12-13: Landsbóka- og landsskjalasavn.**

Í grunninum pr. 11/ 1973	**1.703.828,11**

Skotið verður upp, at játtanin verður hækkað úr 350.000 kr. í 500.000 kr.

---

80) **ad § 15-12-14: Sjónvarpsgrunnurin.**

Í grunninum pr. 11/7 1973	**519.071,10**

---

81) **ad § 16-1: Vrakarastovnurin.**

	R. 72/73	J. 73/74
1. Lønir	488.808,55	466.000,- -
2. Ferðaútreiðslur	100.880,80	95.000,--
3. Endurgjald	0	+ 3.000,--
	589.689,35	557.400,--

Lønir til vrakieftirlitsmenn við nógaklandi viðbótum	497.939,- -
fritíðaravloysurar ca.	30.000,--
Dýrtíðarviðbót pr. 1. okt. 1973	32.000,--
	559.939,- -

---

82) **ad § 16-2: Nautiskt royndarkamar.**

Smbr. skriv dagf. 30. juni 1973.

..... at útreiðslurnar fyri Nautiskt Royndarkamar, nakað sum seinastu ár kunna setast til:

Reiðskaps- og húsaútreiðslur	2.400,
Skrivstovuútreiðslur	1.100,
Ymiskt viðlíkahald av kumpasskamari	1.500,
umframt samsýning til fyristoðumannin	5.000,
	10.000, -
Hevfrá ganga prógvgjald	1.000,
	9.000,–

83) ad § 16-3: Sjómansheim.

Smbr. skriv dagfest 30. juni 1973.

..... Til komandi figgjarløgtingslóg 1974/75 loyva vit okkum at biðja um hesar studningar, teir somu sum vóru á seinastu figgjarlóg.

1. til raksturin av sjómansheiminum i Reykjavik og arbeiðið í Grimsby **kr. 10.500,00.**
2. til vantandi rakstrarhall á sjómannaheiminum «Lívd» i Føroyingahavnini **kr. 30.000,00.**
3. til sjómannaheimið í Reykjavík, keyp av byggilendi og flytan ella byggjan av nýggjum **kr. 10.000,00.**

ad 1. roknskapur 1972 er innsendur, hallið var kr. 11.546,18, og arbeiðið umfatar eisini Lerwick og Malaig.

ad 2. roknskapur er innsendur, við halli kr. 26.718,74 (1972), tað eru bert útlit fyri enn større halli í ár, tó enn ilt at meta um, alt velst um fiskiskapin har, men neyðugt er at vit eru á sjómannaheiminum og har eru 8 fólk í ár.

ad 3. her stendur í botni — einki grundoki er keypt — ein nevnd av føroyingum búsitandi í Reykjavík var sett í 1972, sum støðugt roynir at finna eina góða loysn.

---

84) ad § 16-4: Vaktar- og bjargingarskip.

Sbrt. skriv dagf. 6. juli 1973.

Rakstrarroknskapur 1972/73
fyri «Jens Chr. Svabo»

Inntøkur:	
Frá Tryggingarsambandinum fast fyri sleip v.m.	100.000,—
Frá Fiskirannsóknarstovuni v.m.	145.630,—
Søla av fiski	68.053,73
	313.683,73

Útreiðslur:		
Hýrur	.....	397.554,45
Kostarhald	.....	37.393,87
Brenni og smyrjiolja	.....	48.910,70
Umvælingar	.....	219.236,86
Útreiðslur, fiskiroyndir v.m.	.....	111.711,60
Tryggingar	.....	20.919,92
Havnagjøld v.m.	.....	990,42
Ymsar útreiðslur	.....	24.725,03
		861.442,85
Samlaðar útreiðslur	.....	861.442,85
Samlaðar inntøkur	.....	313.683,73
Hall	.....	547.759,12

Viðmerking:

Roknskapurin er ikki avsluttaður av grannskoðarnum. Fasta árliga gjaldið frá Tryggingarsambandinum uppá 100.000 kr. er sum áður bókað her. Spurningur er um hetta skuldi verið bókað tilgóðar fyri strandferaskipini, um so er verður hallið her 100.000 kr. størri.

Roknskapur 1972/73
fyri rakstur av vaktarskipinum
«Drangur»

Hýra	.....	92.711,28
Kostarhald	.....	14.440,07
Olja	.....	16.404,37
Umvælingar, viðlikahald	.....	3.310,70
Læigu	.....	60.000,00
Havnagjøld	.....	758,50
Ymsar útreiðslur	.....	6.878,65
Samlaðar útreiðslur	.....	194.503,57

Viðmerkingar:

Umframt útreiðslur her, er goldið beinleiðis úr landskassanum, postur í landskassaroknskapinum, aðrar útreiðslur fyri Drang.

Og undir vaktarhaldi eru 82.000,— til útreiðslur við leigu av Dagstjørnuni og til inntøku fyri Strandfaraskip landsins.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Undantaksloyvini á landleiðini og eftirlitið uttanfyri fiskimark seta storri krøv til eftirlitsskip.

Skotið verður upp at hækka játtanina við 225.000 kr.

---

85) ad § 16-5: Landsstýrinum at ráða yvir.

	R. 72/73	J. 73/74
Vanlig nýtsla	87.516,68	110.000,—
Leiga av Disko	558.201,—	
	645.717,68	

Í 1973/74 eru játtaðar grunninum «Sluppin» í studningi 33.000 kr. at rinda aftur lán úr bankum og sparikassa, uppr. 135.000 kr. Skotið verður upp aftur at játta sama studning.

Eisini verður skotið upp at játta 30.000 kr. til bjargingarfeløg at keypa ymsa útgerð fyri eins og í 1973/74.

Kontoin verður at nýta soleiðis:

Til sluppgrunnin	33.000,—
bjargingarfeløg	30.000,—
samsýning at fáa landingarúrslit vm. frá Hirtshals	7.200,—
samsýning fyri veðurtíðindi úr Mykinesi	6.000,—
limaskapur í ICNAF-nevnd	15.000,—
ymist	18.800,—
	110.000,—

86) **að § 16-6: Minstalon og annar stuðul til fiskivinnuna.**

Sbrt. skriv dagf. 2. juli 1973.

Sbrl. háttvirda landsstýrisins dagf. 18/6-1973, seta vit niðanfyri útreiðslurnar 1972/73.

Lønarviðbót		2.887.414,29
Prísískoyti heinua	1.881.580,87	
Prísískoyti útlandið	174.034,51	2.055.615,38
Landingarstudn. nýnslruði skip, feskfiskur		1.212.179,71
Útróðrastudningur		4.411.604,53
Eigarastudningur til skip og bátar		1.513.244,21
Iðnaðarstudningur		1.130.685,08
Jákupskeljastudningur		61.300,14
Frítíðarlon		212.243,56
Rentur		75.113,53
Fyriseti		449.792,65
		14.009.196,08

Viðmerking frá landsstýrinum:

Studningurin til iðnaðarfisk og til jákupsskel er burturdottin. Um játtaðar verða 14 milj. kr. er lagt upp fyri til príshækkingar í minstulønini. Hesin spurningur liggur annars í nevnd.

---

87) **að § 16-7: Studningur til grunnin til endurnýgging av fiskiskipaflotanum.**

Ogn grunsins pr. 1f. juli 1973 aftaná avskrivingar		
uppá studningslán		52.176.207,83
útlentar eru		31.348.828,15
		20.827.379,68

av hesum standa á bók um 10,7 mill. kr.

Byggiætlan 1974/75.			
Vestmanna Skiapsmiðja	1	3,0 milj. kr.	1,20 milj. kr.
Tórshavnar Skipasmiðja	2	6,0 milj. kr.	0,85 milj. kr.
Skála Skipasmiðja	1½	13,5 milj. kr.	5,10 milj. kr.
Smærri skip	4	1,7 milj. kr.	0,70 milj. kr.
Bygging í Noreg	8	28,4 milj. kr.	5,68 milj. kr.
Bygging í Danmark	3	7,4 milj. kr.	1,54 milj. kr.
Tekn. innleggingar			1,00 milj. kr.
Bátar			0,40 milj. kr.
	19½	60,0 milj. kr.	16,47 milj. kr.

frestandi part av 1973/74 verður mett til 10-12 milj. kr.

---

88) ad § 16-8: Grindir.

R.	J.
72/73	73/74
2.212,94	8.000,—

---

89) ad § 16-9: Prísúsetingarnevndin fyri salt- og ráfisk.

R.	J.
72/73	73/74
51.748,58	80.000,—

Skotið verður upp at játta sama pening sum í 1973/74, valutaótryggleikin førir nógvar fundir við sær.

---

90) **ad § 16-10: Laksaaling.**

Sbrt. skriv frá Fisktrannsóknarstovuni dagf. 3. juli 1973.

Av teimum 65.000 kr., ið játtaðar eru í hesum fíggjarári, eru 15.000 ætlaðar Fiskirannsóknarstovuni at ráða yvir.

Um tað framvegis skal vera loyvt føroyskum bátum at veiða laks norðanfyri Føroyar, fer tað ivaleyst at verða neyðugt at seta laksaavkom út, ikki einans sum nýgýtl sum sílaveiðufelagið tekur sær av, men eisini at ala upp smolt til útseting. Sum ein byrjan hava vit 3.000 maðkapirrur av laksi gangandi á alistøðini í Skálabotni. Ætlanin er at vaksa munandi um talið komandi vár og eisini at gera royndir at ala laks í sjónum. Mælt verður til at seta 30.000 kr. av til hetta arbeiði.

---

91) **ad § 16-11: Fiskiroyndir (herundir Leivur Øssursson).**

Sbrt. skriv frá fiskirannsóknarstovuni dagf. 3. juli 1973.

Tað er ilt at siga, hvat driftin av Leivi Øssurson kemur at kosta. Endalig uppgerð yvir royndirnar eftir svartkjafti er ikki gjørd, men verður hon send landsstýrinum saman við frágreiðing um royndir. Mælt verður fyribils til at sama upphædd verður sett á fíggjarlógina fyri 1974/75.

---

92) **ad § 16-12: Havrannsóknarskip, í grunn.**

Í grunninum eru pr. 11. juli 1973	513.755,56

---

93) **ad § 17-1-1: Landsdjóralæknin, løn, ferðapeningur v.m.**

Sbrt. skriv dagf. 2. juli 1973.

Rokniskapur 1972/73	Játtan 1973/74	Uppskot 1974/75
118.643,52	143.000,-	288.400,-

Uppskotið er soleiðis sundurliðað eftir bestu metan:

1. lønir	262.400,-
2. ferðaútreiðslur	22.000,-
3. húsaleiga	3.000,--
4. telefon, lýsingar, skrivstovuútlit	2.000,--
5. rannsóknir, royndir	1.000,--
	290.400,--

Viðmerkingar:

ad. 1. 1 uppskotinum er roknað við mettum pristali 844 1/7-74. Eftir ætlanini verður starvsslovan á Debessartrøð liðug um ársskifti 1973/74. Mælt verður til, at ein djóralækni við serútbúgving verður settur undir landsdjóralæknanum sum deildarleiðari á deildini fyri reinføri og bakteriufrøði. Høvuðsyrki hansara verður at taka sær av heilsumálum fyri hitt almenna, men annars eisini at verða tøkur hjá hesum stovni til annað djóralæknavirki. Lønin til slikan serfrøðing velst um tænastutíð og kvalifikatiónir. Í uppskotinum er mett kr. 130.000.

ad 2. Ferðaútreiðslurnar, ið fyri seinasta ár vórðu kr. 7.885,05, vóru væl minni enn væntað. Hóast hetta verður biðið um kr. 22.000,00, tí ógjørligt er at meta hesar útreiðstur neyvt. Upp í metanina er tikin kostnaður av møguligum skeiði í endurúthúgving, sum kann gerast neyðug, og kostnaður av luftøku í norðurlendskari djóralæknaráðstevnu, sum verður í Islandi á sumri 1974.

Sbrt. skriv frá landsdjóralæknanum dagf. 2. juli 1973.

Frágreiðing um setan av 1 djóralækna aftrat.

Vísandi til skriv hiðan frá 8. mai 1973 til Foroya Landsstýri, har borið varð upp á mál, ta áneyðir verða fyri at seta ein djóralækna við serútbúgving aftrat, sum serliga skal taka sær av reinførls- og bakteriufrøðisligu deildini á starvsstovuni á Debessartrøð, men sum samstundis eisini verður tøkur hjá hesum stovni til annað fjølbroytt djóralæknavirki, skal eg her siga frá, at eg við farloyvi frá landsstýrinum havi verið 4 dagar í Danmark fyri at kanna møguleikarnar fyri setan av duguligum djóralækna í slíkt starv.

Eg havi samráðst við stadsdyrelæge P. Oxhøj, Horsens Levnedsmiddellaboratorium, sum áður hevur verið ráðspurdur viðv. starvsstovuni á Debessartrøð, og við djóralæknafelagið.

Tað verður hildið at vera rímiligt, tá ið alment heilsueftirlit verður sett á stovn samsvarandi løgtingslóg nr. 41 frá 22. juni 1972 um løggilding av virkjum og fiskiførum til framleiðslu av mati, og reglugerð sambært hesa lóg verður fýst, og tá nýggju heilsusamtyktirnar verða settar í gildi, at virksemi av hesum fyri ein part verða løgd undir landsdjóralæknan.

Tær vísindagreinir, ið her verða talan um, eru rættiliga viðfevnandi, sum ger tað neyðugt við serútbúgving. Skotið verður tí upp, at settur verður ein deildarleiðari undir landsdjóralæknanum, og í starvið verður settur ein djóralækni, sum hevur fingið serútbúgving í reinføri og bakteriufrøði (hygiejne og bakteriologi), men sum eisini hevur likist við annað djóralæknaarbeiði, so at hann kann verða tøkur hjá stovninum á øðrum øki.

Deildarleiðarin fær høvuðsyrki sílt á starvsstovuni at standa fyri reinføris- og bakteriufrøðiligu deildini har. Hann verður løntur úr landskassanum og stendur bert landsdjóralæknanum og havið landsstýrinum til svars í yrki sínum. Hetta er neyðugt fyri álitið úteftir á teim veterinæru heilsuváttanum, sum skulu gevast hiðan við útflutningsvørum. Reglugerðin fyri landsdjóralæknan verður at broyta samsvarandi hesum.

Viðvikjandi løn til tílíkan deildardjóralækna verður skotið upp, at gingið verður eftir sáttmála millum Den danske Dyrlægeforening og Kommunernes Landsforening ella statin. Sambært sáttmálan fær djóralæknin við tænastutíð 15 ár ella fleiri kr. 95.708,00 um árið. Hav aftrat skal leggjast kvalifikatiónsviðbót kr. 29.978,00 ella tilsamans um kr. 125.000. Við stytri tænastutíð er lønin minni.

Fyri slíkt virki, sum stovnurin fer at gera fyri kommunur og privatar fyritokur, eigur at verða tikin hóskandi samsýning at gjalda beinleiðis í landskassan eftir líknandi reglum, sum í Danmark eru galdandi sambært nýggju lógina um miljøbeskyttelse. Har er reglan tann, at virkini bera ein part av ti, sum hitt almenna letur fyri eftirlitið.

Í uppskoti hiðan til fíggjarløgtingslóg 1974/75 verður biðið um játtan til deildardjóralækna.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Spurningurin, sum ikki enn er greiddur, er, um deildardjóralæknin verður at bóka her ella undir evnafrøðisligu og bakteriologiskari starvsstovuni; tað valdast, hvussu sjálvstøðugan status starvsstovan fær.

Í fyrsta umfari verður lønin bókað undir landsdjóralæknanum.

---

94) ad § 17-1-2: Seyðaráðgevarin.

Smbr. skriv dagfest 3. juli 1973.

Uppskot til fíggjarløgtingslóg 1974/75.

Á fíggjarlóginl 1973/74 er játtanin:

Seyðaráðgevarin	12.000,--
Seyðaaling	15.000,
Annað	3.000,
	30.000,-

Uppskot til 1974/75:

Seyðaráðgevarin	30.000,—
Seyðaaling	22.000,--
Annað	4.000,
	56.000,--

Tað sum mest troðkar á í arbeiðinum fyri at bøta um seyðaroktina er at fáa menn at fóðra seyðin um várið. At vísa á, hvussu seyðurin verður fóðraður aðrastaðni, t.d. í Islandi og Noregi er ikki nóg mikið, men her er neyðugt at gera eitt miðvíst arbeiði, tí seyður klárar seg ikki, uttan at verða fóðraður, í hvussu er í mars og apríl. Hetta saman við miðvísum arbeiði fyri at bøta um seyðaslagið er tað fyrsta eg ætli at fáa gongd á.

Poul J. Debes, bóndi á Oyri lætur hagan til hesi endamál. Stik og pelar eru keypt og arbeiðslð við at stika er í gongd. Avstikað verður eitt stórt stykki av undirhaganum, sum verður býtt soleiðis sundur, at hvørt fylgi — ella eitt vist seyðatal — umleið 40 seyðir, verða fyri seg í brundtíðini og fingnir verða bestu brundseyðir til hesi fylgini. Tær 15.000 kr. sum játtaðar eru til seyðaaling, røkka ikki til at taka allan seyðin við í ár, (hagin ber um 250 áseyðir) men ætlanin er at stika næsta ár.

Fyri at gera tað møguligt at vaska ullnu seyði havi eg avtalað við P/f Marinplast í Kaldbak um at gera vaskibrunnar úr glasfiburarmeraðum plasti, teir meta prisin til 100- -1200 kr, og hesar brunnarnar skuldi borið væl til at flutt, eisini til óbøgligar hagapartar, tí teir viga lítið.

Vóni at landsstýrið og figgjarnevndin fylgja teimum í uppskotinum áseltu tolum, so tær fyrisetlu ætlanirnar kunnu verða fylgdar.

Viðmerking frá landsstýrinum:

Skotlið verður upp at játta 43.000 kr. at býta soleiðis:

Løn		18.000,—
Annað		3.000,- -
Seyðaroyndir o.l.	15.000,- -	
lønir o.t.	7.000,--	22.000,- -
		43.000,- -

Lonarhækkingin er motiverað við, at ráðgevarin ferðast nógv m.a. at leggja monnum lag á í fóðring av seyði.

Av tilfarsútreiðslunum eru 5.000 kr. ætlaðar jarðaráðunn í rentu og avdrátti av láni til seyðahús.

95) **ad § 17-2: Matrikulstovan.**
Sbrt. skriv dagf. 13. juli 1973.

	Roknskap. 1972/73	Játtan 1973/74	Uppskot 1974/75
1. lønir	1.036.292,—	1.139.000,—	1.322.178,-
2. ferða- og dagpeningur	89.691,--	80.000,	100.000,
3. húsaútreiðslur	95.988,—	90.000,--	100.000,
4. bónafólk	39.637,--	35.000,--	50.000,
5. amboð	41.598,	60.000,--	60.000,--
6. tilfar til skr.-teknist.	17.376,--		
tilfar til uppmáling	23.214,—	200.000,--	200.000,--
luftfotogr., kortkonst. o.a.	190.705,--		
7. porto, telf., lýsingar o.t.	14.582,	15.000,-	15.000,
8. aðrar útreiðslur	12.402,--	10.000,	65.000,--
9. + inntøkur	660.896,—	600.000,—	750.000,--
	900.589,—	1.029.000,--	1.162.178,-

Viðmerkingar:
Av roknskapinum 1972/73 frangongur at nýttar eru kr. 900 tús., ið liggur eitt sindur undir játtanini hetta árið, sjálvt um lønar- og prístalsvaksturin hevur verið stórur. Javnvágin stendst av størri inntøkum enn ætlað, og er munurin **kr. 110 túsund.**

Í uppskotinum er roknað við hesi manningini:

Tænastumenn

stjóri	33. lønarrammu
2 landmálarar	20. og 31. lønarrammu
2 hjálparlandmálarar	20. lønarrammu

Sáttmálalønt fólk
1 landmálari løntur eftir sáttmála fyri «statsansatte landinspektører».
1 landmálari (ikki settur) ætlað løntur eftir sama sáttmála.
1 landmálari løntur eftir reglum galdandi fyri tænastumenn landsins.
7 hjálparlandmálarar lontir eftir sáttmála millum landsstýrið og teknikarafelagið.

3 teknarar 1 teknimæmingur	lønt eftir sama sáttmálanum.
1 skrivstovufulltrúi	5. lønarflokkur starvsm.
2 skrivstovufólk	3. lønarflokkur starvsm
1 skrivstovufólk	1. lønarflokkur starvsm.
1 fotokopiering v.m.	1. lønarflokkur starvsm.

Í tænastumannalógini er normerað eitt starv sum hjálparlandmálari í 9.—10. lønarrammu, sum ikki er sett, við tað at henda lønin liggur væl undir sáttmálalønini.

Tann stóra útbyggingin sum fer fram á landi, krevur, í sambandi við lóggávuna um tinglýsing og matrikulering, eina effektiva umsiting av matrikklinum, nýskráseting og kortlegging til planleggingararbeiði.

Til hetta krevst kvalificerað fólk, og tá ein málilekniikkari væntandi fer úr starvi í hesum árinum, verður í uppskotinum roknað við at seta ein landlinspektør afturat. Hetta er eisini neyðugt fyri at røkja planleggingararbeiði fyri kommununar, ið yvirhøvur eiki fólk hava til lesa uppgávuna.

Lønir pristalið 1/4-1973.

Tænastumenn				
stjóri	1	94.916,50		
landmálari	1	89.902,75		
	2	85.155,-		
hjálparlandmálari	1	63.185,50		
	2	63.185,50		396.345,25
Sáttmálalønt fólk				
landmálari	3	100.505,30	íroknað eftirlønargjald	
	4	65.000,00	—	—
	5	65.000,00	—	—
hjátparmálari	3	50.269,58		
	4	50.715,33		
	5	48.445,71		
	6	46.986,71		
	7	46.548,96		
	8	42.901,27		
	9	42.828,32		
teknikari	1	50.348,39		
	2	46.185,66		
	3	33.383,21		
teknineemingur	1	20.864,52	verður sendur sum teknari í fíggjarárinum	
skrivstovufulltrúi	1	56.480,00		
skrivstovufólk	1	46.798,00		
	2	40.676,67		
	3	38.988,84		
fotoarb. v.m.	4	32.905,52		925.831,99
				1.322.177,24

Ad 2 og 4
Tá nú stórur partur av landinum er matrikuleraður, og stórar marknasetingar væntandi fara fram í samhandi við innangarðsútskiftingarnar, fara hesar útreiðslurnar væntandi at vaksa.

Meginparturin av hesum peningi kemur kortini inn aftur sum inntoka álíknað eigindóminum.

Ad 6
Her eru nýttar **kr. 30 tús.** meiri enn játtað, ið stendst av stórum kortleggingararbeiði til landsvegagerð o.a. eftir rokning.

Ad 8
Undir innangarðsútskiftingini hevur útskiftingarnevndin heimild at flyta ella rudda burtur úthús, neyst o.a., og eru í seinasta roknskaparári nýttar **kr. 30 tús.**, áliknað Svínoy og Húsavik.

Í serligum føri kann nevndin ásela at eisini onnur hús verða flutt t.d. um jørðin, ið hoyrir garðinum til, verður løgd soleiðis, at hon ikki kann rokjast í sambandi við gomlu bygningarnar. Í tílikum føri krevst serlig játtan, sum her er mett til **kr. 50 tús.**

Ad 9
Tá inntøkan er mett til **kr. 750 tús.** er roknað við regulering av gjøldum í sambandi við umsitingina, sum nú geva umk. **kr. 150 tús.**, ið ikki svara til beinleiðis útreiðslurnar. Inntøkurnar kunnu helst økjast enn meiri í mun til útreiðslurnar um møguleiki verður at seta kvalificerað fólk, ið kann gera planleggingararbeiði fyri kommununar eftir rokning.

96) ad § 17-8: Royndarstøðin í Hoyvík.

Smbr. skriv dagfest 2. juli 1973.

Eiti á útreiðsluni

	R. 1972/73	J. 1973/74	U. 1974/75
1. Lønir	238.642,31	254.000,--	290.000,—
2. Bygningar, viðlíkahald	16.947,61	30.000,—	30.000,—
Leysafæ	18.359,96	15.000,-	20.000,-
4. Innistøða	5.719,75	6.000,—	6.000,--
5. Fóður	15.647,10	16.000,-	20.000,-
6. Sáð	554,84	2.000,-	2.000,—
Alt hetta mugu vit vita og kanna undir strongum reglum og eftirliti, og hann, sum reglurnar brýtur, hevur - um ikki sítt lív — so uttan grið sítt loyvi forbrotið.

At læra at kenna sítt egna øki eins væl og sjálvan seg er meginsetningur. Við honum greiddum ber eisini til at taka rættastu støðuna í sjómarksspurninginum.

Íðnaðarútbyggingin.

«Maugur er páskafríggjari, sum ikki var jólafríggjari», men í spurninginum um íðnaðarútbygging sær nú út sum allir menn kappast um at vera við til at tryggja einum vaksandi íðnaði hampuligt kor her á landi.

At íðnaðarútbyggingin skal taka dik á seg í sjeytiárunum slóð okkum leingi greitt, og at hon, áðrenn triðingsskeið er runnið, longu hevur lingið føtur undir seg, kann bert frøa, og má sigast at vera meir enn vónast kundi í 1970.

Møguleikarnir fyri fíggjing eru høttir ígjøgnum ymsa lóggávu og við størri ílegging frá tí almenna, samstundis eru framd ymisk filtøk til at stimbra eini betri fatan av ídnaði, hetta hevur vaksið um hugin at fara undir ymsa framleiðslu. Ikki bert innan fiskaídnaðin henda støðugt iløgur í nýggj virki, meðan eldri verða nútíðmansgjørd, men eisini annan ídnað leggja menn seg eftir at fáa í lag.

Støðið undir hesum er ikki bert fíggjan, men eisini útbúgving til leiðslu og arbeiði innan ídnað og hartil ikki minst at eiga ta fullkonu kanningar- og metingarorkuna, sum skal viðgera tey projektir, menn hava áhuga fyri,

Tey útbúgvingarfiltøk, sum higartil hava verið gjørd — skeiðvirksemi og onnur skúling — hava tikið seg væl upp, men neyðugt er framvegis at vera á varðhaldi, so besta grundútbúgvingin kann gevast.

Havi fyrr sagt, at hóast íløguspurningurin innan ídnað er tungur at loysa, so letur hann seg loysa, og enn eru valla skilagóð projektir deyð í egginum vegna tørvandi fíggjan.

Hin spurningurin um at fáa til vega so væl grundaðar ætlanir, at teim er lív lagað, er enn truplari at loysa, tí hann loysist ikki við peningi einum. Her skal vitan, áhaldni og dugnaskapur til, ikki bert til at duga at leggja monnum lag á, og rætta teim hond í kanningini, men eisini til at duga at loysa úr lagdi nógv av tí, sum í kvinnum og monnum bylgist, men sum tey ikki rættuliga duga at slætta gøtuna fyri sjálvi. Hugmyndagávur — fantasi — mugu eisini leggjast afturat vitan og dugnaskapi, skal nakað av tí nógva, sum uttan iva kann framleiðst her á landi, verunliga skapast.

Av íløgumøguleikum skulu nevnast:

1) Lán frá ídnaðargrunninum
2) Lán og stuðul frá danska egnsútviklingsgrunninum
3) Lán og stuðul frá menningargrunninum
4) Smærri ídnaðarlán við landskassaveðhaldi
5) Landsstýrisins studningur til ídnaðarfremjandi endamál
6) Bankafíggjan, og hartil arbeiðir
7) landsstýrið í løtuni fyri at fáa til vega eina grundfíggjan (1. ella 2. prioritetsfíggjan) sum skal virka saman við ella framman fyri hinar nevndu **fíggjanarhættir** - serliga ídnaðargrunnt og egnsútviklingsgrunni — annaðhvørt úr einum sjálvstøðugum grunni ella løgd saman við onkrum av verandi stovnum.

Tað er skilligt, at við hesum mongu íløgumøguleikum er tørvur á samskipan, soleiðis at teir ymsu grunnar í summum førum virka saman innan sama øki og í øðrum luta uppgávurnar sínamillum.

Eisini á planleggingar- og kanningarøkinum er brúk fyri samskipan, tí

sum er, virkar iðnaðarfelagsstovnurin sum privatur ráðgevari, goldin fyri mesta partin av landinum, meðan landið sjálvt og iðnaðargrunnurin froyta annan serkunnleika umframt hendan privata.

Uttan eina miðsavnan av bæði ráðgevara- og kanningarsíðuni so væl sum figgjarsíðuni, er vandi fyri, at tey, sum skulu gera nýtslu av hesum, fløkjast í teim ymsu møguleikum.

Sjálvsagt er eisini ein uppgáva hjá tí almenna og teim ymsu stovnunum at gera vart við teir møguleikar, sum finnast, og í heila takið at royna at leita fram tey øki — og skapa áhuga fyri teim — har møguligt er í Føroyum at fara undir skapandi virksemi. Tað eru menn í fleiri førum komnir eftir, at samvinna við útlendskar fyritøkur er ein gongd leið - ja í summum førum ein neyðug leið, skal framleiðslan eiga nóg stóran og góðan marknað og nóg góðar søluleiðir.

Ein uppgávan hjá teim, sum byggja skip uttanlands, er at seta sum treyt, at alt tilhoyr, sum gerast kann í Føroyum, eigur at verða gjørt her. Landsstýrið hevur sagt útlendskum skipasmiðjum frá hesi treyt, men byggiharrarnir mugu gera vart við, hvat av føroyskari framleiðslu møguligt er at fáa.

Tað er tungt at bróta upp úr nýggjum, sum talan er um innan iðnað, og bakkastini verða mong.

Sum gjølla umrøtt í fjør, høvdu vit slík innan ta vinnu, so nógvar vónir eru knýttar at, skipasmiðjuvinnuni.

Hon var nærum komin heilt undir bonkin, og hevur verið neyðugt við stórum almennum íløgum, skal hon bjargast, og enn er nakað eftir á mál.

Skála Skipasmiðja lat seinasta nýbyggning sín í juni í ár og hevur tveir sáttmálar um at gera lidnar iðnaðartrolarar, og hon stendur nú fyri fyrsta dagin at fáa sáttmála um 1 ella 2 nótaskip, so her fykist at lýsa í.

Stýfri er komið ávegis í Vestmanna, sum lat seinasta útróðrarbátin í december 1972, har hevur felagið enn ikki funnið sær køna leiðslu, og har eru útbyggingaruppskotini enn ikki liðug.

Landsstýrið hevur latið upp í hendurnar á serkønum at koma við uppskoti um neyðuga útbygging, og verður hetta væntandi liðugt heilt skjótt, eftir verður so at tryggja virkinum nakrar sáttmálar. Uppskot landsstýrisins undir viðgerðini av skipasmiðjukeppuni um at skipa ein sáttmálastovn kemur her aftur upp í tíðina, og vil landsstýrið nú heita á tingið um at taka støðu til hendan stovn, soleiðis sum samtyktin í vetur segði frá.

Soleiðis sum prisbólgnanin á veraldarmarknaðinum heldur fram, er meira enn fyrr neyðugt at verja seg við at royna at gera framleiðslu her á landi bíligari. Vit vita, at byggitilfar og serliga viður dýrkar munandi, tí skuldu tær hugsanir, sum eru frammi viðvikjandi framleiðslu av isoleraðum elementum úr betong liðug til uppsetingar í samband við ætlanina

um at fáa sett upp cementvirki, sum tekur cement heim í bulklast til pakkingar her, haft størsta áhuga.

Eisini ætlanin um at framleiða ueyðuga pakkitilfarið til alla føroyska framleiðslu herheima má elva til, at ein kýlir seg at fáa uppgávuna loysta.

Annars liggja fyri nógvar meira og minni realistiskar ætlanir, sum sýna, at áhugin er stórur. At nevna tær her verður ov drúgført, men vit mugu orka at viðgera tær allar, tí sum eg fyrr havi nevnt, fyri hvørja ferð vit kanna og viðgera tiggju ætlanir, er kunska ein, sum førast kann út í lívið til stimbran og menningar av føroyskum húskapi.

Ein spurningur, sum í seinastuni hevur volt uakað av frupulleikum innan summi iðnaðarvirki, eru markini millum teir ymsu fakligu felagsskapir. Hesin spurningur er loystur aðrastaðni, har nýtsla í størri mun av maskinorku náttúrliga hevur ført við sær, at menn, sum ikki eru fult útbúnir handverkarar, men heldur ikki gera vanligt arbeiðsmannaarbeiði eins og taka sær av einum serligum øki innan framleiðsluna.

Hóast ein skuldi hildið, at arbeiðara- og handverkarafelog okkara eins væl og arbeiðsgevarar okkara, sum øll hava sonn áhugamál at verja, lættliga skuldu kunna drigið eina línu her, sær út sum sundurlyndi fær loyvi til at leggja eina køvandi hond á nakrar iðnaðarroyndir.

Tað er demokratiski rættur arbeiðara- og arbeiðsgevarafelagunna at fogast um hesar spurningar og finna loysn, men gera tey ikki tað, so vil samfelagið ikki tola ella finna seg í, at tann útbygging, sum vit øll vilja er neyðug, fyri at eitt vaksandi tal av føroyskum kvinnum og monnum skal kunna støðast her, verður darvið.

Tá má samfelagið medvirka til einu loysu ella skera ígjøgnum, so samfelagsáhugamálini verða vard.

Landbúnaður

Innan landbúnaðin henda ymisk framslig og nýskapanir, hóast sigast kann, at stórur partur av dyrkaðu jørð okkara ikki kemur til fulla nýtslu. Hetta leggur hvør tann til merkis, sum sær teir mongu óslignu teigar, og tær mongu traðir, ið nú verða nýttar til seyðatraðir einar. Her á landi verður tí ikki framleitt tað, sum ein vælskipað rationaliserað vinnu seruliga kundi framleitt.

At tíðin er runnin frá smábrúkum sum framleiðandi táttur er eyðgreitt, tó hevur tað í mongum føri stóran hugmennandi og sálarrøkjandi týdning, at menn í fríløtum kunnu takast við eitt sindur av búnaðurskapi; men skal búnaðarframleiðslan framvegis vera ein grundstoðul í búskapi okkara, má skipast so fyri, at telr, sum veruliga skulu hava sína ársvinnu innan

henda hátt, fáa møguleika at reka brúk av hóskandi stødd ella fáa tikið sær um reiggj og í størri mun enn fyrr nýta fyrimunirnar av felagsrakstri og eini líkinda organisatión.

Ilesin aldargamli vinnuvegur og lívsháttur er tó her, sum aðrastaðni, so bundin av siðvenju — tradition — og hugsan um, at hvør skal greiða sítt, sæta sær og skipa sínum, at ógvuliga spakuliga verður tikið við neyðugum broytingum í tíðini, soleiðis at har handakraftin ikki røkkur longur at loysa uppgávurnar, og mekaniseringin av hvørjum brúki sær gerst ov kostnaðarmikil, má skilagóð samvinna um maskinorku, viðari viðgerð av framleiðsluni, innkeyp og sølu koma í staðin.

Frá almennari síðu verður staðlað munandi. Landbúnaðargreinin á fíggjarlógaruppskotinum komandi er 2¼ mill. kr. umfram 1¼ mill. kr. til útskifting og matrikulering ella 3¾ mill. kr. samanlagt.

Tað eru teir vanligu studningarnir til mjólkaframleiðslu, íløgur, seyðaroyndir o.a. sum vaksnir eru.

Ifjør tók løgtingið ikki undir við tilmæli landsstýrisins um at seta penning av til keyp av uttanbýggjajørð — har slík kann fáast uttan serliga prískapping við einstaklingar — hetta ynski fer landsstýrið at seta fram einaferð enn, og vónandi verður undirtøkan betur.

Royndirnar í vakstrarhúsunum, í fjør varð bygt, hava heppnast óføra væl, tær sýna, at í Føroyum ber væl til at framleiða ymiskt grønmeti — tomatir, agurkir o.a. — sum til góðsku er betri enn tað, innflutt verður, og sum er kappingarført í prísi. Hesar royndir fara at halda fram við øðrum urtum og blómusløgum, og ivast teir, sum standa fyri, ikki í, at á hesum øki ber til at fáa eina eftir føroyskum viðurskiftum munandi framleiðslu ástovnsetta.

Takið verður at fáa menn at taka eftir, gera teir tað, skuldi samfelagið spart hóp av peningi, sum nú fer út av landinum, og nógvar familjur átt vælløntu ársvinnu.

Mjólkaframleiðslan og eggjaframleiðslan er seinnu árini vaksin munandi, men serliga hvat eggjaframleiðsluni viðvíkur er torført at vera kappingarførir, vinningur sølumanna er størri við sølu av útlendskari vøru, og darvar hetta nakað; hetta kundi vit kanska bøtt um við at ansa eftir, at vinningurin procentliga skal vera hin sami.

Hvat framleiðsluni viðvíkur annars, er á hesum økinum soleiðis, at tølini koma nakað seint fram. Tjóðarroknskapurin fyri 1971, sum lagdur er hjá sum skjal, er nýggjasta taltilfar, og hann sýnir, at av bruttofaktorinntøkuni uppá 674 mill. kr. eigur landbumaðurin 16,7 mill. kr. ella umleið 2,5 %. Hann telur nakað tað sama sum fluttningur, skipaferðsla, telefon- og postverk og ravmagnsverk.

Annars eru føroyskir búnaðarmenn fyrstu ferð í nýggjari tíð nú fyri ti, at fáa hampuligar prísir fyri partar av framleiðsluni, ti veraldarprísirnir

hækka, og útflutningsstudningurin manga staðni minkar; hetta gongur út yvir føroyska brúkaran, sum gjalda skal m.a. teir hækkandi fóðurprisir.

I tølunum fyri 1972 og 1973 kemur hetta hóast alt at sýna seg sum vøkstur innan búnaðarøkið. Ávirkanin á prisirnar er sum fyrr nevnt avmarkað, men møguliga kunnu vit umhugsa at framleiða meira av fóðri herheima.

Skal meira av føroyskari vøru seljast, nú umstøðurnar batna, má góðskan eisini vera í lagi. Til at tryggja brúkarunum hetta setur hitt almenna á stovn føðivørueftirlit í samband við biologisku starvsstovuna. Í hetta arbeiðið verður næsta fíggjarár settur djóralækni afturat.

Annars er, sum nevnt bleiv seinasta ár, framvegis landsstýrisins politikkur at royna at varðveita hvørt búplass og at gera umstøðurnar har so liviligar sum gjørligt bæði hvat kommunikatión og arbeiðsumstøðum viðvíkur. Í hesum sambandi eru umstøður landbúnaðarins av størsta týdningi.

Sosiala økið

Tá lagt verður til brots fyri at tryggja samfelagsborgarunum toluliga jøvn viðurskifti ella í hvussu er eitt minsta mark av lívd, stinga seg ofta trupulleikar upp, og tað kemur fram, at alt gerst ikki í einum. Verkið má oftast — og náttúrigt fremjast í stigum.

Heilsustovnar landsins, hvørt vit hugsa um sjúkhús ella aðrar, hava verið fyri stórum broytingum og útbyggingum gjøgnum árini, og væl er rokkið framá. Men støðugt er neyðugt at byggja, skulu vit kunna møta teim krøvum, sett verða til hesar stovnar. Hesi vaksa ávirkað av umstøðunum uttanífrá og so hvørt, orka okkara økist, og eingin sleppur at sknka sær undan.

Ein av broytingunum er tørvurin á at veita nóg góða serhjálp, at fáa sett læknar og onnur, neyðug eru, skulu heilsustovnarnir røkja uppgávu sína til lítar.

Tað hevur verið — og er støðugt — alt annað enn lætt at fáa hendur á teim læknum okkum tørva. Á landssjúkrahúsinum hevur verið toluligt, men aftur í september verður eingin eygnalækni í Føroyum. Í Suðuroynni og í Norðoyggjum hevur verið trupult at fáa læknar at støðast, og á ymsum øðrum økjum hevur skortað serlæknahjálp.

Men landsstýrið leggur stóran dent á at fáa loyst hesar spurningar, t.d. verður nú roynt at leggja ortopedisku viðgerðina í fasta legu.

Sum fráboðað í løgtingsrøðuni í fjør, hevur landsstýrið avgjørt at farast skal undir bygging afturat sjúkrahúsunum á Tvøroyri og í Klaksvík, so hesi kunnu veita eldri og brekaðum nóg góða pleyguviðgerð. Byggingin á Tvøroyri er mett at kunna byrja 1. november og tann í Klaksvík einaferð næsta ár.

Pleyguheimið í Eysturoynni er sjyttri ávegis komið, men ætlan landsstýrisins er ikki, at hvør av hesum byggingum skulu bíða eftir aðrari, soleiðis at hygt verður so hvørt peningur kemur í pleyguheimsgrunnin. Landsstýrið arbeiðir fyri at fáa til vega neyðuga liggjan, so byggingarnar kunnu fara í gongd, so hvørt praktisku fyrireikingarnar eru loknar.

Umsorganin fyri teim evnaveiku hevur verið sera nógv umtalað serliga aftaná byggistøðgin á stashospitalinum. Eftir drúgvar samráðingar við ríkismyndugleikarnar er nú avgjørt, at byggingin skal takast upp aftur so skjótt sum til ber, og fáa vit tá møguleikar fyri at viðgera herheima enn fleiri enn tey 31 evnaveiku, sum nú eru heimkomin. Mál landsstýrisins, at øll umsorgan av ands- og sálarveikum skal vera í Føroyum er soleiðis komið nærri.

Specialskúlin er projekteraður so langt ávegis, at landsstýrið á ólavsøku kann leggja projektið fyri tingið til góðkenningar, í hesum sambandi verður ein týðandi tørvur loystur, tí umstøðurnar, sum nú eru at undirvísa undir, eru vánaligar.

Batin, sum fingin er í forsorgini av evnaveikum við deildini á statssjúkrahúsinum og specialskúlabyggingini, fær enn meira virði, tá nú verkstaður er í býnum, sum kann taka bæði tey á stovnum og tey, sum búgva heima, til arbeiðis.

Enn er bústaðarspurningurin hjá parti av hesum fólki eftir at loysa. At fáa bygt eitt sonevnt «avlastningsheim» má umhugsast.

Sjálvt um umsitingin av forsorgini er skipað undir Storstrømsøkinum, her eru samráðingar tiknar upp við myndugleikarnar um at fáa skipað Føroyar sum eitt serstakt øki.

Í vár samtykti tingið hækkan av teim sosialu pensiónunum við 15 % frá 1. oktober 1972, og í heila takið hevur áherðsla verið løgd á, at hava pensiónirnar nøkudunda í sonn hædd sum niðri, men svarandi til føroysk viðurskifti.

Hvussu væl ein roynir at leggja til rættis á hesum øki, verður ongantið so, at ikki atfinningar kunnu gerast, ofta eru tær grundaðar á liggjarumstøður, men meir enn so eisini á umsitingarorsøkir.

Síðar sosialu lógirnar seinast vóru til viðgerðar í tinginum, hevur landsstýrið samráðst við statin um at skipa umsitingina av sosialmálum í ein føroyskan stovn, ístaðin fyri, at hon nú liggur fyri mesta partin hjá ríkisumboðnum og lutvist hjá landsstýri og kommunalum myndugleikum.

Tað er greitt at fara undir hesa umskipan, um vit sjálvir taka støðu til at gera tað. Mær tykir tað rimiligt, at tað eru vit sjálvir, sum umsita hesi mál, sjálvandi við tí fyri eyga, at ein samskipan fæst í lag, sum kann geva fólki betri og lættari atstøður at søkja sær hjálp og kunnleika.

Tað er stór misskiljing, tá talað verður um, at ein slík yvirflyting ber í sær yvirtøku av kostnaðinum uv sosialu veitingunum. Sjálv umsitingin

kostar bert ein brotspart — 600 – 700,000 kr. — av allari sosialforsorgini, sum nú liggur um 68 mill. kr., og hvat er náttúrligari enn at hesar umsitingarútreiðslur verða bornar í felag við sama procentbýti sum sosialu útreiðslurnar annars.

Spurningurin um arbeiðsloysistrygd hava vit enn ikki loyst. Tíbetur er í løtuni nærum allastaðni í landinum vøl av arbeiði, og er hetta ikki minst teim risastóru almennu íløgunum fyri at takka, men at fað í løtuni liggur tolduliga fyri, sleppur okkum ikki undan at hugsa um arbeiðsloysisspurningin. Hjá okkum, har fólkið vinnur partvís uppi á landi og partvís innan sjóvinnu, er hesin spurningur serliga trupul at loysa.

Rúsdrekkalóggávan

Av sosialari náttúru eru mangir av vansunum, sum standast av rúsdrekka.

Uppskot til nýggja lóg er samtykt og skal til fólkaatkvøðu.

Ætlan landsstýrisins var at fáa skipað hesi viðurskifti í fastari legu og miðaði uppskotið ímóti hesum.

Tingið broytti uppskotið nakað, m.a. var serliga greinin um felagsvirksemi strokin. Hetta gjørdi — eftir meling landsstýrisins - - lógina nakað veikari, men fatan mín er ikki, at søla av rúsandi løgi nú verður loyvd í feløgum.

Tvørturímóti verður - - um lógin fær meiriluta fyri sær — bert loyvt einkarsøluni at selja slíkan løg. Tí er framvegis hugsan mín, at í lógaruppskotinum liggur ein munandi bati, og liggja møguleikar fyri at hava eftirlit við umfarinum av rúsdrekka.

Støðan, sum valdar í dag, heldur í hvussu er ikki í longdini.

Tað er ætlan landsstýrisins áðrenn atkvøðuna at leggja til kunnleika veljarunum uppskotið til ta reglugerð, sum skal galda, um lógin verður samtykt.

Samferðslan

Teir «tápuligu» gomlu menn, eg tosaði um í fjor í sambandi við fittu søgu Mao's um at flyta fjøll, arbeiða í dag innan ein veruligan ídnað.

Samferðslubútbyggingin, hæði hval bygging av vegum, lendingum og havnum, telekommunikatión og strandfarnsigling viðvíkur, er í dag rættuliga mekaniserað, og krevur hon væl av kønum fólki, ló í tali valla fleiri enn áður, hóast stórarbeiðini, ið framd verða ísenn, eru margfaldaði.

Landsstýrið og løgtingið hava nýtt høvið, tær lampuliga góðu innlogurnar hava givið, til at vaksa munandi um játtanirnir til samferðslumál, eins

og lániheimildirnar eru øktar óvanliga nógv, og landið hevur tí sett ígongd og veitt sær anuboð til at fáa frá hondini so stóra arbeiðsnøgd, sum fáur hevði droymt um fyri bert trimum árum síðani.

Í hvørjari oyggj og hvørjari sýslu verða framdar meginútbyggingar, tær flestu vóru havdar á máli í fjor. Umframt koma nú tey bæði stórarbeiðini, sum sagt var at landsstýrið vildi økja settningin við, nevniliga tunnel og brúgvasambandið Streymnes - Skálabotn og sambandið um Hvannasund. Figgjarspurningarnir eru so langt greiddir, at byrjast kann uppá bæði hesi arbeiði seint í summar ella tíðliga í heyst, men hetta setir sjálvandi hørð krøv til maskinorku og arbeiðsleiðslukapacitet landsins, sum hevði rættuliga strangan fyrisettning frammanundan.

Uppskot um uppiskoytishavnaætlan er lagt fyri tingið, tað er vón landsstýrisins, at hetta kann samtykkjast í august, tí mong arbeiði steðga eftir hesi avgerð.

Ætlan landsstýrisins er — saman við tingsins havna- og veganevnd — í komandi tingsetu at gera uppskot til eina fimm ára ætlan fyri bygdahavnir, sum ikki eru við í sjálvari havnaætlanini. Harvið kann hendla útbygging fáast í fasta legu.

Skal ikki troytta við at taka fram stórt tal av byggingum, bert nevna, at útlit er til at finna hampuliga loysn á spurninginum viðvíkjandi havnaarbeiðinum í Skopun, sum er av eini serligari og torførari náttúru.

Automatiseringin av telefonsambandinum gongur væl framá, og eru fleiri meginøki samanbundin. Seinnu helvt av hesum ári koma nøkur afturat og fleiri næsta ár. Tann ætlan, sum framløgd var fyri tveimum árum síðani, sýnist stórt sæð at halda.

Strandferðslan arbeiðir í dag meira enn fyrr, og ruturnar eru munandi tættari, men mong av førum hennara eru longu gomul. Vøksturin í bilflutninginum ger, at skipini eldast skjótari og má tí umhugsast at fáa til vega meira tíðarhóskandi skip til nakrar av rutunum, millum annað til suðuroyarsiglingina, sum er hin drúgvasta leiðin, og hon sum krevur mest av ferðafólkunum.

Innan tey trý meginøkini landsverkfrøðingsstovuin, telefonverkið og strandferðsluna hevur landsstýrið í løtuni serfrøðingar í arbeiði, sum kanna, um rationalisering av umsiting, arbeiðsgongd og tólum kann lætta okkum nakað um, tað sama er galdandi sjálva landsumsitingina og deildir hennara.

Hetta kanningararbeiðið er neyðugt eisini tí, at vit ikki leingi afturat sleppa undan at lata stórar partar av arbeiðinum innan hesar stovnar dataviðgera elektroniskt.

Í sambond við viðgerðina av landsstýrismálum í vár gav eg tinginum

rættuliga gjølliga frágreiðing í flogvallarspurningunum, skal tí hesuferð bert endurtaka tað, sum frásagt er í útvarpi og bløðum, at stjórnin hevur givið avgerandi lyfti um, at arbeiðið í flogvallarnevndini skal vera liðugt í hesum ári. Endalig støða til meginflogvøllin í Føroyum kann so takast, áðrenn henda tingseta er liðug.

Útvarpshús og fjarsýni

Byggjan av húsi til Útvarpið hevur leingi verið umhugsað, og tá hetta ikki er komið í lag, so er orsøkin at byggiøkisspurningurin enn ikki er greiddur.

Hvat fjarsýninum viðvíkur, so er hetta arbeiði í gongd samsvarað samtykt Løgtingsins í seinastu tingseta.

Skúla- og mentaøkið

Skúlaskapurin fær hølum viðvikjandi framvegis betri umstøður; í summar skuldu 4 nýggir skúlar verið greiðir at taka í nýtslu, tað er í Hvalba, í Gøtu, á Oyrabakka og í Klaksvík, harumframt standa enn fleiri í gerð.

Lógin um fólkaskúlaskipanina er framvegis til umhugsunar og m.a. við umskipan av læraraútbúgvinginí fyri eygað verður arbeitt álvarsliga við spurningunum um HF-útbúgving.

Henda útbúgving skal byrja á summri 1974 og verður løgd so tilrættis, at øll, sum evni og hug hava, kunnu luttaka. Landsstýrið metir tað hava týdning, at hesin undirvisingarháttur fær tilknýti til teir størstu bygdaskúlarnar og miðar ímóti, at so verður.

Vinnulívsútbúgvingin má, skal hon sita í myndini í okkara samfelag, skipast uttakað øðrvísi enn aðrastaðni. Tekniskir skúlar til hesa útbúgving eru undir bygging.

Undirvisingarøkið, sum er knýtt at sjóvinnuni, hevur eisini verið fyri broytingum. Kokkaskeiðini hava verið væl vitjað eins og skeiðini í fiskaviðgerð. Hesi hava verið skipað sum ferðsluskeið, ið hava vitjað runt oyggjarnar. Henda útbúgving má, skulu vit liva av fiskaviðgerð, fjøltáttast enn meir. Ein samvirkan millum hesa útbúgving og hana, givin kann verða á sjómannaháskúlanum er lugsandi, eins væl og lugsandi er, at háskúlaútbúgvingin aftur hevur samband við nautisku lærnuna, sum eisini stendur fyri broytingum.

Maskinskúlin hevur í løtuni trupulleikar av læru- og plásstørvi. Landsstýrið vil her framvegis medvirka til at loysa tørvin, hóast skipanin í løtuni er, at skúlin er burturav statsdrivin.

Húsarhaldsútbúgving á centralum húsarhaldsskúla tykist ikki vera uppi í tíðini, og arbeiðir landsstýrið tí við at skipa skeið, sum skal ferðast runt oyggjarnar. Slík kunnu rekast í samarbeiði við kommununar, sum mangastaðni hava hóskandi høli til slika undirvising.

Landsbóka- og skjalasavnið varð í síni tíð projekterað, men er tann ætlanin slept, nú skjalasavnið eftir køna manna metan kann húsast fram í næstu øld í kjallarahæddini í bakteriologisku starvsstovuni.

Nýtt skitsuprojekt fyri bókasavnsbygging er gjørt, tað er minnst eitt uppruna**l**iga, men skuldi loyst uppgávuna, eisini tá lugsað er um, at landsbókasavnið kemur at virka í tættari samvinnu við Fróðskaparsetur Føroya.

Hetta setur hevur sínar trupulleikar vegna høllstrot og læraratørv, men tað liggur landsstýrinum nógv á hjarta, at tann útbúgving, her er komin í lag, kann halda fram, so partur av lesandi ungdómi okkara kann støðast longri heima.

Kommunulógin hevði tað fyri eyga, at talið av kommunum skuldi minka við samanlegging í størri eindir, og onkunstaðni er álugi fyri samanlegging.

Sambært lógina fara samanleggingarnar fram sjálvkravdar, meu birtast kann uppundir við at framvegis verður arbeitt við spurninginum.

Dispositiónsplanir fyri størri øki kunnu gerast í sambaud við býarskipanarsamtyktirnar, sum gjørdar vóru í 1954, og vildu slíkir hjálpt kommununum at fingið byggilendi til vega. Sum er dregur hvør kommuna sína línu í hesum máli.

Undir henda tátt hoyrir eisini spurningurin um liggjan av byggilendi og húsabygging í síni heild.

Húsalánsgrunnurin mennist alsamt, og skuldi við teim iløgum, hann nú fær, kunna loyst størri part av uppgávuni, men tað er framvegis fatan landsstýrisins, at loysnin her ikki liggur í, at tey biligu lánini ikki skulu takast fyrr enn dýr lán standa frammanfyri.

Fritíðarspurningurin tekur seg herheima upp eins og aðrastaðni.

Við teim alsløðum nú eru at koma til arbeiðis, eisini tá ein býr á bygd, skuldi ungdómur betri kunna støðast har. Men skal so vera, mugu vit framvegis virka fyri, at fríløturnar kunnu nýtast á ríkandi og menningarligan hátt.

Hallir til ítrótt, mentunarligt og annað fritíðarvirksemi er ein av lættunum í hesi virkan, og verða nú betri møguleikar at fáa reist slíkar. Kundu vit so lagt tað mentunarliga virksemi - - sum t.d. sjónleiks- og musikvirksemi — sum ferðast skal í fyrsta legu, vildi tað havt alstóran

týdning og kundi hirt undir, at farið bleiv undir slíkt arbeiði kring landið. Annars arbeiðir landsstýrið við nýggjari fritíðarlóg.

Lønar- og prístagið — skattingin

Á arbeiðsmarknaðinum eru vit stórt sæð sloppin undan lemjandi verkfólksósemjum; flestu ivamál og lønarmál eru løyst í samráðingum. Útlit er eisini fyri, at hetta stendur við í 1974.

Allir stættir á landi hava — hóast dýrtíðina — fingið munandi reallønarbatan, og hýruløtini fyri 1971 og 1972 sýna, at fiskimenn innan alla vinnu hava havt eitt verunligt framlop hesi ár sammett við árini frammanundan. Eitnasta undantakið lýkist verða manningarnar á flakatrolarunum, sum vegna vánaligan fiskiskap hava havt afturgongd, men viðmerkiltini hjá teim eru til viðgerðar í samband við viðgerðina av allari ískoytisskipanini.

Skattingin er ætlað nakað av teim inntøkumójavnum, í samfelagnum eru, men her gongur ikki altíð eftir vild, ov mong eru, sum sleppa ov lættliga undan, og tyngir hetta byrðuna hjá øðrum.

Landsstýrið hevur framvegis eina teknikarnevnd at arbeiða við hesum málum, og skuldi hon einaferð í vetur kunna givið tilmæli um broytingar og ajourføringar.

Hvat munimum á donskum, hálvdonskum og føroyskum lønum viðvíkur, so eru samráðingar við stjórnina loknar við, at nevnd skal setast, sum skal gera uppskot um skipan av felagsstovni, sum verður samráðingarstovnur fyri alla almenna lønarseting. Ójavni á hesum øki skuldi so um tá ár ikki kunna komið fyri.

Príseftirlitið virkar alsamt, men sum fleiri ferðir nevnt, tá tað eru lækkandi veraldarprísir, sum ávirka okkara prísir, er tað hert viðmingunum hjá handilsmonnum, eftirlitið fær arbeitt við.

Landsstýrið hevur nú fingið økt manningina á hagdeildini og givið henni betri umstøður hølum viðvíkjandi. Henda deild skuldi nú verumliga fingið røkt hagfrøðisligt virksemi, og vit vita, at eitt av fyrstu arbeiðunum, sum verða liðugt viðgjørd, er nýggja prístalsgrundarlagið.

Í hesi tingsetu kann hetta mál avgreiðast.

Samráðingar við donsku stjórnina

Mong, mong mál av felags áhuga fyri donsku stjórnina og landsstýrið hava verið viðgjørd í teim samráðingum, fram eru farnar.

Og tey eru — sum rímiligt er — støðugt á lofti í ti viðskifti, vit hava sambært stjórnarskipanina.

Umframt tey frammanfyri nevndu úrslitini av samráðingum við stjórnina viðvíkjandi statshospitalsbygging, umsiting av sosialmálum og lønarstovni, skulu nevnast nøkur fá mál, sum heilt ella lutvist eru loyst:

Vit høvdu rætt til at taka úr tjóðarbankanum likviditetslán upp í 20 mill. kr., bert tey vóru niðurskrivað einaferð árliga, soleiðis at slætt borð var.

Semja er um broyting, so honda hvørt fellur burtur. Eftir standa tekniskar samráðingar við føroyskar peningastovnar og ein minni lógarbroyting.

Føroysk frímerki skulu nú fáast á ein ella annan hátt.

Váttað er tað, vit vistu frammanundan, at staturin á ongan hátt leggur seg út í lántøku okkara uttanlands. Tvørturímóti vil hann teknisk stuðla okkum, tá vit hava tørv fyri at treða fram á lánimarknaði. (Eitt lán uppá 11 mill. kr. er tikið í Sweitz til telefonautomatisering).

Stjórnin vil stuðla at fáa loyst flogmálið á ein hátt, allir partar kunnu taka undir við, og sum kemur okkum uppí flúgving.

Spurningurin um føroyskan meiriluta í leggingargrunnsins stýri skal viðgerast í samband við endurskoðanina av lógini áðrenn 1975/76.

Støða okkara til EF-spurningin er tikin til eftirtektar, og stjórnin vil av øllum alvi stuðla okkara áhugamál eins og tey hjá hinum fiskivinnutjóðunum í Norðuratlantshavi.

Veiðurættindi burtur og heima — Samráðingar.

Føroyska umsitingin og føroyska landsstýrið hava av málsøkjum, sum viðgerast skulu, stórt sæð tey somu, sum stjórnin í einumhvørjum landi hevur, og hóast nøkur av umsitingarøkjum okkara liggja hjá ríkisstovnum, koma málini fyri stóran part eisini til viðgerðar hjá føroysku myndugleikunum.

Hvat ið møguligt er at viðgera hongur fyri stóran part í, hvussu væl mannað liðið er.

Rembingar seinnu árini innan øll tey øki, sum hava livsáhuga fyri okkum, saman við yvirskipaðum sjálvir at luttaka, so langt vit rekka á øllum hesum økjum, mugu — sjálvt um politikkarar, sum óivað ikki eru so halfir, sum teir hinka til, ikki tykjast skilja tað — bera í sær, at umboð fyri landsstýrið eru burturi mangar ferðir árliga í neyðugum embætisørindum.

Skal gera úrdrátt úr nøkrum av teim samráðingum verið hava síðan seinastu ólavsøku.

Við grønlendska landsráðið var í august 1972 gjørdar endaligur sáttmáli um fiskirættindini fram til 1978, tá EF limaskapur Grønlands noyðir okkum at finna aðra skipan enn verandi sáttmála. Samráðingarnar vóru annars førdar út frá javnrættindarstøðuni sum ríkisborgarar, og vóru vit samdir um, at hetta var til fyrimuns fyri báðar parlar.

Í august og september fingu vit fyribilssáttmála við íslendingar um framíhjárættindi innan fyri 50 fjórðingamark teirra. Hesi rættindi hava

í løtuni ógvuliga stóran týdning, men sáttmálin kann ikki takast sum hin endaligi, tí nútímansveiðuhættir sleppa ikki framat. Verður sáttmálin ikki bøttur munandi, er útflyting fiskimarksins í Íslandi stórt bakkast fyri føroyskt vinnulív.

Trúgvi fult og heilt, at línuskip kunnu hava hesar leiðir sum grundstøði, men sleppa størri og smærri trolarar ikki framat, kann tað kosta okkum dýrt.

Sum dømi kann nevnast, at best útgjørdu og dýrastu skip okkara møguliga kundu fingið túr seinasta heyst í Íslandi, men sluppu ikki inn.

Landsstýrið roynir aftur í ár at veita teim loyvi at veiða til feskfisk ella saltfisk, men loyvi kundi ikki gevast.

Hesi skip eru nú so illa fyri, at tey møguliga verða seld til Íslands. Hetta er sárt, samstundis sum vit vita, at enn større og betri útgjørdir bretskir og týskir trolarar framvegis veiða.

Føroyskur trolaramaður nýtti nú um degini orðini, sum Geímur mælti um Kjartan Ólavsson á sinni:

«Heitstórir eru íslendingar,
teir vilja os inni hrenna».

Segði honum, at ikki batar at seta ilt ímillum tjóðirnar báðar, sum í striðnum at finna ta loysn, teimum hvør sær hóskar, mugu ratta hvør aðrari hond. Vit skilja fullvæl trupulleikar íslendinga idag, og skilja at talan er um at verja eina meginreglu (um frystiskip).

Tó rokna vit við, at undantøk kunnu gerast, og at sáttmálin — sum frálíður — kann bøtast, serliga fyri føroyingar, sum hava so avgerandi torv, sum eingin annar, og sum tó meir enn aðrir hava stuðlað íslendingar í striði teirra. Sáttmálin við føroyingar varð fingin í lag, tá íslendingar mest høvdu brúk fyri viðurkenning av nýggja sjómarkinum.

So væl vit skilja íslendingar í striði teirra, rokna vit við, at teir skilja, at okkara áhugamál sum fjarfiskitjóð eru onnur enn teirra, skilja, at loysnir smíðaðar Íslandi ikki eru nýtiligar í Føroyum.

Samráðingar fóru seinasta summar og heyst fram við danir um býtið av laksakvotuni í Grønlandi og um landingarviðurskiftini í Hirtshals. Hartil hava á fleiri fundum verið viðgjørdir spurningar í sambond við ICNAF- og NEAFC-fundirnar og tær avmarkingar har verða gjørdar.

Á NEAFC-fundinum í London bleiv sildaveiðubannið óhroytt. Hetta týddi í verunleikanum, at vit í stongdu tiðini í 1974 kunnu veiða 11.000 tons, meðan vit í 1973 bert veiddu 8.000 tons.

ICNAF-fundurin gav okkum samanlagt nóg stóra kvotu fyri toskaveiðu á New Foundlandsleiðunum, men vegna vánaliga hagtøl er ivi um, hvørt býtið millum tey ymsu økini er loð besta, tó halda vit, at møguleik-

arnir hjá føroyskum skipum eru góðir á øllum teim vanligu leiðunum har.

Í Grønlandi verður avmarkað næsta ár, men lutur okkara er størri enn veiðan seinasta ár, men munandi minni enn árini frammanundan, hvussu her ber til at halda hús, um tolutigur fiskiskapur verður, verður áhugavert at royna.

Danmark hevur í felagsmarknaðarmálinum dyggiliga skorðað á at fáa broytt fiskimarks- og fiskirættindapolitikk EF's.

Fyrireikingunum til hetta útspæl eiga vit stóran part í, og halda vit lí, tað er skilagott. Høvuðsinnihaldið er, at øki, sum hava serligan tørv, mugu hava framíhjárættindi hjá sær sjálvum, men skulu eisini sínamillum geva hvørjum øðrum rættindi.

Neyðugar avmarkingar mugu so berast av londum, sum ikki hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu.

Tær mest krevjandi samráðingarnar eru tær, sum byrjaðu í Edinburgh seinast í apríl 1973, og sum nú halda fram millum Bretland, Týskland, Frakland, Noreg, Póland og Belgia øðrumegin og Føroyar-Danmark hinumegin.

Frá føroyskari síðu verður miðað ímóti eini fyribilsloysn, sum

1) gevur okkum munandi størri part av ti, sum veiðast kann við Føroyar, enn vit veiða nú,
2) avmarkar fremmanda trolveiðu í føroyaøkinum ógvuliga nógv,
3) gevur línuskipum okkara betri arbeiðsvilkor og størri plúss at arbeiða á,
4) friðar tey øki, serligan týdning hava fyri okkum, tann partin av árinum, hetta er virðismiklasta og
5) forðar fyri at fremmand veiða kann økjast, uttan so at uttanfyristandandi lond, sum ikki fyrr hava veitt undir Føroyum, bróta seg inn í sáttmálan.

Til tess at røkka hesum hevur verið arbeitt við mongum uppskotum, og eru mangar loysnir samanteggjaðar.

Nevnast kann, at loysnin kann koma at vera – um nøkur fæst — at kvotaskipan verður innførd bæði fyri samlaða veiðu og fyri fiskasløg hvørt sær. Øki verða opnað og slongd ávisar tíðir styttri og longri út frá verandi grundlinjum. Skipastøddir verða avmarkaðar og loyvini fyri ymsar veiðuhættir ymisk.

Undir øllum má liggja viðurkenning av føroyskum frammíhjárætti.

Skal ikki dylja, at tað er komið stutt áleiðis við hesum samráðingum, og at striltíð hevur gingið. Útlitið er tí ikki hitt besta. Men í hesum talvi — sum í øðrum – eru mangir leikir og heppnast ikki nú, mugu aðrir roynast, og teir eru enn — tá eitt hugsar seg væl um – nakrir.

Ein teirra, tó ikki tann ið fyrst liggur fyri, eitur útflyting fiskimarksins.

Tá sagt verður, at hesin ikki liggur frenstur, er tað lí, eg framvegis haldi, at lann loysu, vil hava brúk fyri, er hon, sum gevur okkum tey veiðurættindi okkum tørva, men samstundis gevur minsta møguleikan at gera mótliltøk vend fmóti okkum. Og endaliga hon, sum verður hon sett í verk t.d. í Hetlandi tó gevur okkum møguleika fyri framvegis at veiða har munandi part av tí, vit nú veiða.

Havi fyrr sagt, at tá allir møguleikar eru royndir við samráðingum, er hin lættasti og mest fantasileysi eftir, nevniliga einvist at samtykkja útflyting fiskimarksins.

Tað er framvegis meting landsstýrisins, at eitt lítið land sum Føroyar eru best vardar av alheimsreglum, og tær mugu verða so háttaðar, at strandalondini ciga avgerandi fyrimun á egnum landgrunni, samstundis sum lond, ið hert liva av fiskiskapi, kunnu varðveita fjarfiskiskap sín mong — mong ár enn.

Stríðið stendur tí ikki um útflyting ella ikki útflyting, men um at nýta tíðina, sum verður at ganga, áðrenn havrættarstevnan møguliga fær skipað nýggj rættarviðurskifti á havinum, á ein slíkan hátt, at hesi sjónarmið um serligan tørv sleppa framat, at menn og lond hava hoyrt tey so ofta og so manga staðni, at pláss verður fyri teim í rætlarskipanini.

Mangur sigur, at úrslitið hóast alt verður útflyting yvir ein kamb. Og satt er, at nógv talar í løtuni fyri, at so verður.

Men gerst hetta loysnin, so hava Føroyar tapt, tapt og mist alt tað, sum ikki er møguligt at vinna aftur á okkara egnu leiðum, og tað eru stórar nøgdir, um tað vit vinna, kann fáa nóg so stórt virði.

Skorða vit einvist á fyri í løtuni at fremja hin lættasta leikin, hvat verður so av hinum spurninginum, sum eftir eru, at fáa aðrar at góðtaka eitt víðari mark, at fáa vart eitt víðari mark.

Kunnu vit vera so inkonsekventir í hesum máli, at vit sum rættir føroyingar gera eina samtykt og síðan lata upp í hendurnar á donum at seta í verk?

Teir gomlu søgdu:

> «Stórt mót í ongari makt
> kemur mongum í forakt».

Hugsi hetta verður sagt um okkum, velja vit ídag at leypa um tað langa, drúgva og ótakksama samráðingararbeiði. Ja, haldi sjálvur, tað kann sigast av rætlum, um vit troða hin lætta vegin, sum er ein tingsamtykt og síðan seta seg at bíða eftir alheimsloysnum.

Hví eru Føroyar í eini serstøðu? Hví hóskar loysnin við einvísari útflyting ikki Føroyum so væl sum ein meira fjøltáttað loysn?

Føroyar eru í hesum máli í strið við seg sjálvar, her er ikki hugsað um, at politisku flokkarnir eru ósamdir um leiðirnar at ganga, men um, at áhugamálini hjá fjarfiskivinnuni og heimavinnuni eru heilt ymisk.

Flyta vit einvist út — uttan at royna aðra loysn — má øðrum londum standa greitt, at vit meta hetta vera einastu og røttu leiðina at ganga. Tey kunnu tá við betri samvitsku steingja viðkaðu veiðuøki síni fyri fjarfiskiflota okkara.

Vit hava tá slept møguleikanum fyri at virka fyri teirri differentieraðu — margfaldu — loysnini og hava tá burturssæð frá einum møguligum samarbeiði við norðanlond og Grønland nærum bert føroyaleiðirnar sum berandi støði undir øllum føroyskum búskapi.

Vit hava tá:

1) Bundið okkum til eitt avmarkað veiðuøki, sum valla gevur pláss til tey fiskiskip, koma skulu í staðin fyri fjarfiskiskipini.
2) Økt vandan fyri at fiskivinnan fær afturstig, tí hon gerst eintáttað viðvíkjandi veiðuhættum (allir hættir hóska ikki eins væl til hetta veiðuøki).
3) Bundið okkum til eina veiðumøgd, sum vit í løtuni meta liggur millum 100.000 og 120.000 tons av vanligum fiskasløgum.
4) Bundið expansiónsmøguleikarnar til hægri prisir, lægri effektivitet og líttið roynda veiðu sum svartkjafta- og langasporlsveiðu.
5) Tvroðkað flota okkara inn á eitt øki, sum er ógvuliga merkt av streymi, skiftandi veðurlíkindum og broytingum í fiskastovninum.

Hetta grundarlag er eftir landsstýrisins meting viðbrekið. Vel nýtist ikki at ganga so illa at knívskorið verður fyri fjarfiskiskap, men útflytingar yvirhøvur fara so undir øllum umstøðum at geva okkum ómetaligar trupulleikar.

Samráðingar taka sum nevnt ongan møguleika fyri at flyta út burtur, men kunnu kanska geva fyribilsloysn, meðan útflyting valla gevur nakra loysn beint nú og seinni valla meir enn ta loysn, sum fær alheimsviðurkenning. Vit hava illa ráð at bíða eftir henni, og vildi tí fyribilsloysnin dugna okkum ímeðan.

Felagsmarknaðurin varð í sínum tíð, tá farast skuldi undir samráðingar, nærum myndaður sum eitt forneskt fyribrigdi, ein skuldi vara seg fyri at koma í samband við, tí komu vit ikki at fáa boðið ónnumisbrykkin og drukku, vórðu vit uttan skil lokkaðir inn í hellið.

Vit lugsaðu tá við honum, nevngivið hevur hesa vøku:

«siggja vil eg tað ljóta frøll,
sum eitt vil øllum ráða»

og er tað meting mín, at júst tí vit fingu ta sjón, bar til at geva svarið, givið er viðvíkjandi limaskapstilboðnum. Samráðingarnar selfu okkum eisini betri førar fyri at siga frá, hvat okkum — og londum í okkara støðu — ikki líka, og hvørji broytingarkrøv lívsmál okkara treyta.

Latum okkum tí standa sum ein maður um tann leik nú skal fremjast um rættindini á Føroya grunnum. Latum okkum rannsaka og grauska veikleikarnar hinumegin borðið. Tá eru vit eisini betri bryujaðir at søkja aðru ferð, skal so verða.

Vit politikkarar hava fingið ta ábyrgd við avgerðum okkara at ávirka gongdina í samfelagnum, at broyta ella varðveita, at lætta um dagliga strevið ella leggja neyðugar byrðar á.

Í ynskinum um, at andstøða og stjórnarflokkar nógu hava hegni til at taka hepnar samfelagsavgerðir, fara vit til arbeiðis í nýggjari tingsetu.

Viðvíkjandi eykajáttanum í samband við 10 ára havnaætlanina 1969/78

LANDSVERKFRØÐINGURIN

3800 Tórshavn, 10. apríl 1973.
MH/NA

Viðvíkjandi eykajáttanum í sambandi við 10 ára havnaætlanina 1969/78.

Tær havnabyggingar undir 10 ára havnaætlanini 1969/78, sum farnar eru í gerð higartil ella framdar, eru í hesum 12 kommunum:

Klakksvíkar, Leirvíkar, Gøtu, Runavíkar, Skála, Eiðis, Haldórsvíkar, Kollafjarðar, Vestmanna, Skopunnar, Sands og Froðbiar.

Tær kommunur, sum enn ikki eru farnar undir nakra bygging, eru hesar 8:

Fuglafjarðar, Nes, Sjóar, Miðvágs og Sandavágs, Sørvágs, Hvalbiar, Porkeris og Vágs.

Niðanfyri verður fyri hvørja kommunu sær í stuttum greitt frá støðuni:

Klakksvíkar kommuna:

Undir 10 ára ætlanini eru játtaðar 50% av 6.0 mill. kr. Undir bygging er í løtuni havnargerð á Varpinum, sum er mett at kosta 4.5 mill. kr.

Henda bygging umfatar deils ein o.u. 60 m langan pier við ferjulegu á norðursíðuni og vanligari atløgusíðu hinumegin og deils o.u. 80 m langa atløgusíðu á 3,5 m dýpi á meðalvatni fram við landinum; millum høvuðsvegin og hesar byggingar er so fylt upp øki fyri veg, parkerings- og byggiplássi. Bygt verður áfast við havnarlagið á Stongunum.

Hesar byggingar eru roknaðar til strandferðaskipini og rúmka soleiðis um fyri aðrari nýtslu av Stongarpierinum.

Eftir av játtanini verða soleiðis o.u. 1.5 mill. kr.

Leingi hevur verið í umbúna at økja um flakavirkið á Kósini; men ein fyritreyt er, at bryggjan har verður longd og byggiøki planerað aftanfyri.

Ætlanin hjá kommununi er tí at fara undir hesa bygging so skjótt sum gjørligt. Kostnaðurin var seinasta vár mettur at verða 4.7 mill. kr., so við prís- og lønarhækkingum o.øðr. verður kostnaðurin ikki undir tær 5.5 mill. kr., sum er grundarlagið fyri uppískoytisjáttanini.

Fuglafjarðar kommuna:

Fuglafjarðar kommunu verð játtað 50% av 2 mill. kr. Fyri hendan pening er ikki bygt enn; hetta kemst deils av, at aðrar byggingar hjá kommununi hava verið fyri og deils av at hesin peningurin, sum frá er liðið, er minkaður so mikið, at hann er verðin ov lítil til, at farið kann verða undir bygging, sum munar nakað.

Sum kunnugt er økt um sildamjølsverksmiðjuna, og nú verður farið undir stórt ísvirki, so tann parturin av bryggjalongdini, fiski- og farmaskip í sambandi við hesa verksmiðju fitlan part av árinum støðugt nýta, er vaksin munandi; neyðugt er tí, at hampuliga long bryggjusíða verður gjørd afturat, so hin parturin av skipaferðsluni --- tey skip sum hava samband við flakavirkini, tey sum skulu umvælast, gerast út, flyta farm til og frá bygdini og onnur — ikki verða heilt við sviðið soðið.

Uppískoytisjáttanin má tí í minsta lagi vera 1.5 mill. kr.

Leirvíkar kommuna:

Byggingin, sum fer fram, er mett at kosta 9.0 mill. kr., tá ið hon er liðug; játtanin var 50% av 6.5 mill. kr.

Ein orsøkin til henda stóra meirkostnað er, at játtanin vísti seg at vera ov lítil samanborið við lægsta boð og onnur, at grótið, sum sprongt varð upp úr havnini, vísti seg at verða so smátt, at neyðugt var at flyta stórar nøgdir av gróti aðrastaðni frá fyri at fáa nóg mikið av stórum steinum til útsíðu á havnarplássinum og til bygging av bringarðinum frá Kráartanga.

Gøtu kommuna:

Fyri játtanina undir 10 áraætlanini -- 50% av 2.0 mill. kr. — er eldri pierurin, sum saman við tí nýggjara vinkulpierinum ger havnina í Norðrugøtu, longdur og endin bendur inná, so deils er økt um atløguplássið og deils eru skaptir fleiri møguleikar fyri, at skip kunnu liggja í lívd í vánaveðri.

Kommunan hevur leingi havt í hyggju at byggja bringarð einar 100 m uttanfyri havnarlagið, sum er, deils sum lívd fyri hesum havnarlagi og deils sum verju fyri havnaroki, ið samstundis verður at fylla upp millum nevndu brimverju og havnarlagið. Eisini er lorvur á dýping í havnarhylinum. Skal fremjast arbeiði, sum kann verða til nakra hjálp, má verða játtað 50% av 2,0 mill. kr. í minsta lagi.

Runavíkar kommuna:

Fyri játtanina, sum var 50% av 6.5 mill. kr., verður bygd leinging av høvuðspierinum, so havnin nú er vard fyri vestan- og hagattum. Kostnaðurin er mettur at vera o.u. 7,5 mill. kr.

Havnin treingir til meiri byggiøki og til atløguplóss við fiskavirkið, og verður tí mælt til at játta í hesum umfari 2.0 mill. kr.

Nes kommuna:

Hevur játtan stóra 50% av 1.4 mill. kr.

Av tí at peningavirðið er so nógv minkað, síðan studningurin varð veittur, er neyðugt at hækka hann við 1 mill. kr., um tað sama skal fáast burturúr.

Skála kommuna:

Skála kommuna hevur bygt fyri sína játtan 50% av 2 mill. kr. og fer neyvan undir større havnabygging í bræði. Nú skipasmiðjan hevur fingið útgerðarpier og tvinnir aðrir eru til onnur endamál, skuldi tað heldur ikki verið neyðugt.

Sjóar kommuna:

Sjóar kommuna hevur ikki bygt fyri sína játtan — 50% av 1.0 mill. kr. — og okkum kunnugt er ikki ætlanin fyrilbils at fara undir bygging við Hulkin, so grundir tykjast ikki at vera fyri eykajáttan.

Eiðis kommuna:

Bygt er fyri játtaninni, sum er 50% av 2.0 mill. kr.

Brimgarðurin er longdur við 50 m, og havnarplássið er økt og regulerað fyri at gera tað møguligt at økja um flakavirkið.

Kostnaðurin er 2.8 mill. kr., og er orsøkin til største partin av meirkostnaðinum, at ikki varð roknað við at gera nakað við havnarplássið, tá ið støddin av studningínum varð ásettur.

Tað er líkt til, at endin á brimgarðinum tekur so nógv brim á seg, at rættast er at tryggja hann betur við grótkasti. Mælt verður tí til at játta 50% av 1.0 mill. kr. afturat.

Haldórsvíkar kommuna:

Byggir nú fyri sína játtan — 50% av 1.0 mill. kr. — havnarøki til at seta flakavirkishús á og stutta atløgubryggju.

At veita eykajáttan nú er helst ógrundað; men vísir tað seg, at ein víðari útbygging er fyri neyðini nakað skjótt, kann studningur til eina tílíka ivaleyst verða veittur av lendingakontoini.

Kollafjarðar kommuna:

Hevur brúkt nakað av síni játtan — 50% av 2.0 mill. kr. — til at gera

øki inn av bryggjuni til nýtiligt havnarpláss og hevur í kvittan deils við uppfylling at økja um havnarplássið og deils at leingja bryggjuna nakað. Hetta krevur eykajáttan uppá ikki minni enn 1.0 mill. kr.

Vestmanna kommuna:

Til bygging, sum fer fram – betongbryggja fram við Heygnesi í staðin fyri ta gomlu jarnpela- og timburbryggjuna — rokkur játtaði studningurin — 50% av 2.0 mill. kr. — ikki; eini 50% av 300.000 kr. resta í.

Tað, sum serliga troðkar á í Vestmanna, er havnarnki til at byggja og arbeiða á, og er tí skotlið upp at játta tilsamans 50% av 2.5 mill. kr., so fyllast kann upp fram við landi vestur frá Heygnesi og gerast nakað av atløguplássi við.

Miðvágs og Sandavágs havn:

Enn er einki bygt fyri játtanina – 50% av 3.0 mill. kr. – men tað er fyri neyðini at havnin verður betri vard skjótast gjørligt, so mælt verður til at játta 50% av 2.5 mill. kr.

Sørvágs kommuna:

Hevur ikki bygt fyri sína játtan — 50% av 1.5 mill. kr. — men mælt verður til at játta aftrat 50% av 1.0 mill. kr., fyri at tann ætlaða byggingin kann verða framd.

Skopnnar kommuna:

Játtanin er 50% av 3.5 mill. kr., og bygt er fyri stivar 4.0 mill. kr.

Annars er at siga, at aftaná at rúmkað og dýpt er inni í havnini og innsiglingin flutt nakað út, fyri at størri før enn teir smáu dekksbátarnir, havnin var ætlað til, kunnu nýta hana, er vorðin nógvur resonansur í havnarhylinum, at okkurt má gerast fyri at bøta um viðurskiftini, og vísa ker royndir, at gjørdar eru, at líkt er til, at bæði verjugarðurin á Skorinum og brimgarðurin norðuri á Bergi mugu leingjast. Mælt verður tí til, at játtað verður 50% av 4.5 mill. kr.

Sands kommuna:

Bygging er í gerð fyri játtanina – 50% av 3.75 mill. kr. – men kostnaðurin verður góður 6.0 mill. kr. Ætlanin, sum lá til grund fyri upprunaligu játtanini var leinging av pierinum; men tá til stykkis kom, bevði fiskivinnan verið fyri tílíkari broyting — útróður og flakaskering vindu meir og meir uppá seg – at bygdaráðið helt rættast verða í fyrstu syftu at skapa best møgulig líkindi fyri hesi vinnu, og var tí farið undir at byggja havn, sum kundi vera tilhald hjá dekksførum upp til eini 80 tons.

Roynt var at byggja fyri kostnað svarandi til játtanina; men skjótt var mommum greitt, at hetta fór at vera ov lítil havn.

Sannandi, at skulu heimasandsmenn hava líkindi at taka lut í útróðrinum í slíkan mun, at tað kann roknast vinningur, er ein slík havn, sum tann, ið er í gerð, neyðug, verður mælt til at játta 50% av 2.3 mill. kr. afturat.

Hvalbiar kommuna:

Einki er bygt fyri játtanina — 50% av 1.0 mill. kr. — men verður mætt til at játta afturat 50% av 0.85 mill. kr.

Froðbiar kommuna:

«Stk. 2. Enhver vælger er pligtig at påtage sig hvervet som tilforordnet vælger for valgbestyrelsen og valgstyrerne. Valg af tilforordnede vælgere foretages af kommunalbestyrelsen.»

§ 33.

Stk. 1. Valgstyrerne og medhjælperne udtager derefter stemmesedlerne af stemmekasserne og blander dem. En stemmeseddel er ugyldig, 1) når det ikke med sikkerhed fremgår, hvilket af partierne eller hvilken kandidat udenfor partierne vælgeren har villet give sin stemme, 2) når beskaffenheden af stemmesedlen giver grund til at antage, at stemmesedlen ikke er en af de tilforordnede udleveret og på valgstedet afkrydset stemmeseddel, 3) når der på stemmesedlen findes skrevet, tegnet eller på anden måde anbragt noget, hvorved det findes forsætligt tilkendegivet, hvem den stemmende er, eller der overhovedet ved en behandling udover den af stemmeafgivningen følgende findes forsætligt af vælgeren at være givet stemmesedlen et særpræg.

Stk. 2. Valgstyrerne og medhjælperne optæller, hvor mange

20. § 33 affattes således:
«§ 33. Stemmeoptællingen foretages af valgstyrerne og de tilforordnede vælgere. Forinden stemmeoptællingen påbegyndes, udtages stemmesedlerne af stemmekasserne, hvorefter de blandes og fordeles mellem det formodne antal optællingshold af valgstyrere og tilforordnede vælgere, der ordner dem således, at stemmesedler for samme parti eller for samme kandidat uden for partierne samler i bunker for sig, og derefter optæller, hvor mange stemmer der ved afstemningen er afgivet for hvert af de på stemmesedlerne opførte partier og for hver kandidat uden for partierne. En stemmeseddel er afgivet for det parti, inden for hvis felt vælgeren har sat kryds. Hvor der er tvivl om en stemmesedels gyldighed eller om, på

stemmer der ved afstemningen er afgivet for hvert af de på stemmesedlerne opførte partier og for hver kandidat uden for partierne. En stemmeseddel er afgivet for det parti, i hvis felt på stemmesedlen de kandidater er opført, ved hvis navn eller ved hvis partibetegnelse vælgeren har sat kryds. Optællingen sker, efterhånden som stemmesedlerne fremtages, derved, at en af valgstyrerne oplæser, for hvilket parti eller for hvilken kandidat udenfor partierne stemmesedlen er afgivet, medens samtidig to valgstyrere eller medhjælpere optegner, hvor mange stemmer der er tilfaldet hvert parti eller hver kandidat udenfor partierne. De oplæste stemmesedler henlægges i bunker for sig. Hvor der i noget tilfælde er tvivl om stemmesedlens gyldighed eller om, på hvilket parti der er stemt, oplæses stemmesedlen ikke, men lægges foreløbig til side. Når virksomheden med stemmesedlernes optælling fordeles mellem forskellige af de tilforordnede vælgere, opgør valgstyrerne det samlede tal efter de særskilte optællinger.

Stk. 3. Når oplæsningen er endt, undersøger lederen, om de to valgstyreres eller medhjælperes optegnelser stemmer overens, og om det antal stemmer, der ifølge disse er faldet på hvert enkelt parti eller på hver kandidat udenfor partierne, svarer til antallet af de henlagte stemmesedler. Er optællingen således fundet rigtig, underskriver valgstyrerne eller medhjælperne de af dem førte lister, og disse tilligemed de tvivlsomme stemmesedler afgives til lederen.

Stk. 4. Valgstyrerne afgør derpå, om de tvivlsomme stemmesedler, på hvilket parti der er stemt, medregnes stemmesedlen ikke i optællingen, men lægges foreløbig til side. Formanden for valgstyrerne deltager ikke personlig i denne del af optællingen, men påser, at den foregår under betryggende former.

Stk. 2. Når de enkelte optællingshold har tilendebragt optællingen af de stemmesedler, der er fordelt til holdet, afgives optællingsresultatet tilligemed de som tvivlsomme henlagte stemmesedler til formanden for valgstyrerne.

Stk. 3. Valgstyrerne afgør derpå, om de tvivlsomme stemmesedler skal anses for gyldige eller ej.

En stemmeseddel er ugyldig,

1) når det ikke med sikkerhed fremgår, hvilket af partierne eller hvilken kandidat uden for partierne vælgeren har villet give sin stemme,
2) når beskaffenheden af stemmesedlen giver grund til at antage, at stemmesedlen ikke er en af de tilforordnede udleveret og på valgstedet afkrydset stemmeseddel,
3) når der på stemmesedlen findes skrevet, tegnet eller på anden måde anbragt noget, hvorved det findes forsætligt tilkendegivet, hvem den stemmende er, eller der overhovedet ved en behandling ud over den af afstemningen følgende findes forsætligt af vælgeren at være givet stemmesedlen et særpræg.

ler skal anses for gyldige eller ej, og anfører, forsåvidt nogen af disse kasseres, grunden hertil i forhandlingsbogen. Antallet af de af valgstyrerne godkendte tvivlsomme stemmesedler lægges til de ved den ovenomtalte optælling fremkomne tal.

§ 39.

Stk. 1. Vælgere, som på grund af ophold udenfor den kommune, hvor de er opført på valglisten, eller som på grund af tjeneste på et fyr vil være forhindret i at indfinde sig på valgstedet indenfor de for afstemningen fastsatte tidsfrister, kan ved folketingsvalg indsende deres stemmeseddel efter de i §§ 40 - 49 indeholdte regler.

Stk. 2. Vælgere, som har bopæl på afsides beliggende øer, der ikke udgør et selvstændigt valgdistrikt, kan afgive stemme ved indsendelse af stemmeseddel, såfremt de kun med uforholdsmæssig vanskelighed kan nå frem til afstemningsstedet.

Stk. 3. Berettigede til at afgive stemme ved indsendelse af stemmeseddel er endvidere vælgere, der på grund af sygdom er forhindret i at indfinde sig på valgstedet, hvadenten de er indlagt på færøsk hospital, sanatorium el. lign., eller de er under lægebehandling i hjemmet.

§ 40.

Stk. 1. Søfolk og personer ansat ved fyrvæsenet kan stemme på vedkommende skib eller på vedkommende fyr, jfr. § 42, når de

Såfremt en stemmeseddel kasseres, anføres grunden hertil i forhandlingsbogen.

Stk. 4. Valgstyrerne opgør derefter resultatet af afstemningen ved sammenlægning af de enkelte optællingsholds resultater og ved til disse at lægge de af valgstyrerne godkendte tvivlsomme stemmesedler».

21. § 39 affattes således:

«§ 39. Vælgere, der ikke eller kun med uforholdsmæssig vanskelighed vil kunne indfinde sig på afstemningsstedet inden for de for afstemningen fastsatte tidsfrister, kan ved folketingsvalg afgive stemme ved indsendelse af stemmeseddel efter de i §§ 40 - 48 indeholdte regler».

22. § 40 affattes således:

«§ 40. Vælgere, der opholder sig på Færøerne kan afgive stemme på et folkeregister, herunder også folkeregister i den kommune, hvor vælgeren er opført på valglisten.

Stk. 2. Vælgere, der er indlagt på færøsk sygehus eller anden helbredelses- og plejeinstitution eller er under lægebehandling i hjemmet, kan afgive stemme på sygehuset eller institutionen, eller over for vedkommende læge eller en af landfogeden (politimesteren) eller vedkommende sysselmand dertil udpeget troværdig person.

Stk. 3. Vælgere, der er indsat i arresthuset i Thorshavn,

opfylder den i § 39, stk. 1, omhandlede betingelse for sådan stemmeafgivning.

Stk. 2. Andre vælgere, som er omfattet af bestemmelserne i § 39, stk. 1, og som opholder sig i udlandet, kan stemme på et dansk konsulat eller gesandtskab i udlandet, jfr. § 42, eller hos en af indenrigsministeren bemyndiget.

Stk. 3. Øvrige vælgere, som er omfattet af bestemmelserne i § 39, stk. 1, kan stemme på et folkeregister på Færøerne eller i det øvrige Danmark, jfr. § 42. Stemmeafgivningen kan ske også i den kommune, hvor vælgeren er opført på valglisten.

Stk. 4. For de vælgere, der i henhold til stk. 1 eller stk. 3 afgiver stemme på Færøerne, finder afstemningen sted de 3 sidste søgnedage før valgets afholdelse. Søfolk eller fiskere, som på afstemningsdagen vil opholde sig udenfor den pågældende kommune, kan dog afgive stemme på folkeregistret, hos landfogeden (politimesteren) eller hos vedkommende sysselmand eller mønstringsbestyrer indtil 8 uger før valgets afholdelse. For de vælgeres vedkommende, der afgiver stemme udenfor Færøerne, må stemmesedlen tidligst være afgivet 3 måneder før valgets afholdelse.

Stk. 5. De i § 39, stk. 2, omhandlede vælgere afgiver stemme hos en af vedkommende kommunalbestyrelse udpeget valgberettiget person. Kommunalbestyrelsen kan udpege 2 sådanne personer for hver afsides beliggende ø. Stemmeafgivningen kan tidligst finde sted 3 uger før valgets afholdelse.

Stk. 6. De i § 39, stk. 3, omhandlede vælgere kan afgive stemme hos landfogeden (politimesteren).

Stk. 4. Vælgere, der har bopæl på afsides beliggende øer, der ikke udgør et selvstændigt afstemningsområde, kan afgive stemme hos en af vedkommende kommunalbestyrelse udpeget valgberettiget person. Kommunalbestyrelsen kan udpege to sådanne personer for hver afsides beliggende ø.

Stk. 5. Vælgere, der opholder sig i den øvrige del af riget, kan afgive stemme på et af de derværende steder for brevstemmeafgivning.

Stk. 6. Vælgere, der opholder sig i udlandet, kan afgive stemme på en dansk diplomatisk eller konsulær repræsentation i udlandet eller hos en af indenrigsministeren bemyndiget.

Stk. 7. Søfolk og personer ansat ved fyrvæsenet kan endvidere afgive stemme på vedkommende skib eller på vedkommende fyr.

Stk. 8. For de vælgere, der i henhold til stk. 1, 2, 3, 4, 6 og 7 afgiver stemme på Færøerne, kan stemmeafgivningen finde sted de sidste 3 uger før valgets afholdelse, dog senest næstsidste søgnedag før valgdagen. Søfolk eller fiskere kan dog afgive stemme indtil 8 uger før valgets afholdelse, og stemmeafgivningen for disse vælgere kan endvidere ske hos landfogeden (politimesteren) eller hos vedkommende sysselmand eller mønstringsbestyrer. For de vælgere, der afgiver stemme i den øvrige del af ri-

handlede syge afgiver stemme på vedkommende hospital, sanatorium el. lign. eller overfor vedkommende læge, statstjenestemand eller af sysselmanden dertil udpeget troværdig person. Stemmeafgivningen kan tidligst finde sted en uge før valgets afholdelse.

Stk. 2. Det i § 41, stk. 1, omhandlede følgebrev udfyldes straks, efter at stemmesedlen er indlagt i konvolutten. Følgebrevet skal indeholde:

1. en erklæring om, at vælgeren selv frivilligt og uden overværelse af andre har udfyldt stemmesedlen, lagt den i konvolutten og tilklæbet denne. Forsåvidt stemmeafgivningen sker i den kommune, hvor vælgeren er opført på valglisten, skal vælgeren medmindre han afgiver stemme efter de for vælgere på afsides beliggende øer eller for syge og hospitalspatienter gældende regler eller er tjenstgørende på et fyr - - tillige afgive en erklæring på tro og love om, at han på valgdagen opholder sig udenfor kommunen. Vælgerens underskrift på følgebrevet skal finde sted i overværelse af vedkommende folkeregisterfører eller dennes stedfortræder, henholdsvis vedkommende konsulatsembedsmand, føreren af vedkommende skib eller dennes stedfortræder, landfogeden (politimesteren) eller vedkommende sysselmand eller mønstringsbestyrer eller en tjeget, eller i udlandet, kan stemmeafgivningen tidligst ske 3 måneder før valgdagen».

23. § 42, stk. 2, nr. 1, affattes således:

1. en erklæring om, at vælgeren selv frivilligt og uden overværelse af andre har udfyldt stemmesedlen, lagt den i konvolutten og tilklæbet denne. Vælgeren skal tillige afgive en erklæring på tro og love om, at han på valgdagen ikke eller kun med uforholdsmæssig vanskelighed vil kunne indfinde sig på afstemningsstedet inden for de for afstemningen fastsatte tidsfrister. Vælgerens underskrift på følgebrevet skal finde sted i overværelse af vedkommende folkeregisterfører eller dennes stedfortræder, henholdsvis vedkommende konsulatsembedsmand, føreren af vedkommende skib eller dennes stedfortræder, landfogeden (politimesteren) eller vedkommende sysselmand eller mønstringsbestyrer eller en tjenestemand ved fyrvæsenet eller en af indenrigsministeren eller af kommunalbestyrelsen, jfr. § 40, stk. 4, dertil bemyndiget. For så vidt angår patienter på sygehuse eller andre helbredelses- og plejeinstitutioner skal den pågældende vælgers

nestemand ved fyrvæsenet eller en af indenrigsministeren eller af kommunalbestyrelsen, jfr. § 40, stk. 5, dertil bemyndiget. Forsåvidt angår patienter på sygehuse eller sanatorier, skal den pågældende vælgers underskrift være afgivet i overværelse af en ved vedkommende sygehus eller sanatorium ansat læge og for andre syge personers vedkommende af en læge, en statstjenestemand eller en af sysselmanden dertil udpeget troværdig person. Følgebrevet skal angive datoen for underskriften og vælgerens fulde navn, stilligt og bopæl i den kommune, hvori han er opført på valglisten.

§ 45.

Stk. 7. Inden afstemningens påbegyndelse åbnes de modtagne omslag af valgstyrerne, der for hvert enkelt af omslagene undersøger, om den person, fra hvem det hidrører, er opført på valglisten, og i bekræftende fald straks sætter et kryds ved vælgerens navn på valglisten samtidig med, at hans navn og valglistenummer opføres på stemmelisten, jfr. § 30.

underskrift være afgivet i overværelse af en ved sygehuset eller institutionen ansat inspektør eller læge og for andre syge personers vedkommende af en læge eller en af landfogeden (politimesteren) eller vedkommende sysselmand dertil udpeget troværdig person. Følgebrevet skal angive datoen for underskriften og vælgerens fulde navn, stilling og bopæl i den kommune, hvori han er opført på valglisten.»

24. § 45, stk. 1, affattes således:
«§ 45. Inden afstemningens påbegyndelse, om formiddagen aftenen før valgdagen, åbnes de modtagne omslag af valgbestyrelsen (valgstyrerne), der for hver enkelt af omslagene undersøger, om den person, fra hvem det hidrører, er opført på valglisten, og i bekræftende fald straks sætter et kryds ved vælgerens navn på valglisten samtidig med, at hans navn og valglistenummer opføres på stemmelisten, jfr. § 30».

25. Foran § 50 indsættes:
«§ 49 a. Folkeafstemninger i henhold til § 20, stk. 2, § 29, stk. 2 § 88 i Danmarks Riges Grundlov afholdes på Færøerne. Det samme gælder afstemninger i henhold til grundlovens § 42, såfremt den på-

gældende lov skal gælde for Færøerne eller ved anordning kunne sættes i kraft i denne del af riget.

Stk. 2. Folkeafstemninger på Færøerne finder sted på samme dag som i de øvrige dele af riget».

26. I § 52 indsættes efter stk. 1:
«Stk. 2. Såfremt der på samme dag afholdes folkeafstemning om 2 eller flere lovforslag eller love fastsætter indenrigsministeren de bestemmelser, der er nødvendige som følge af afstemningernes samtidige afholdelse.»

27. I § 56 indsættes efter stk. 1:
«Stk. 2. En stemmeseddel er ugyldig,
1) når det ikke med sikkerhed fremgår, for hvilket resultat vælgeren har villet stemme,
2) når beskaffenheden af stemmesedlen giver grund til at antage, at den ikke er en af de tilforordnede udleveret og på valgstedet afkrydset stemmeseddel,
3) når der på stemmesedlen findes skrevet, tegnet eller på anden måde anbragt noget, hvorved det findes forsætligt tilkendegivet, hvem den stemmende er, eller der overhovedet ved en behandling ud over den af afstemningen følgende findes forsætligt af vælgeren at være givet stemmesedlen et særpræg. Understregning eller overstreg-

ning af den stemmesedlen påtrykte tekst i forbindelse med et kryds på stemmesedlen anses ikke som særpræg.»

§ 59.

Forsømmer nogen udførelsen af forretninger, som denne lov medfører, ikendes han, forsåvidt han ikke efter lovgivningens bestemmelser har gjort sig skyldig til en større straf, en bøde fra 20 kr.

Stk. 2. Overtrædelse af nogen af disse bestemmelser straffes med fængsel eller hæfte ikke under 4 uger.

28. § 59 affattes således:
«§ 59. Den, der forsømmer udførelsen af forretninger, som påhviler ham efter denne lov, straffes med bøde, medmindre strengere straf er forskyldt efter den øvrige lovgivning».

29. § 61, stk. 2, affattes således:
«Stk. 2. Overtrædelse af bestemmelserne i stk. 1 straffes med bøde eller hæfte.

30. I § 61, stk. 3, udgår «fra 100 kr.», og sidste pkt. ophæves.

31. I § 62 udgår stk. 2, og i stk. 3, der bliver stk. 2, indsættes i 1. pkt. efter «tilforordnede»: «jfr. § 26, stk. 4».

32. I § 62, stk. 4, der bliver stk. 3, udgår «og 3».

§ 2.

Loven træder i kraft den 00. ..... 197 .

Bygging av nýggjum landsbókasavni

(Viðv. løgtingsmáli nr. 59/1973)

FØROYA LANDSBÓKASAVN
J. C. Svabosgøta 14 - Box 61
3800 Tórshavn

28. september 1973.

Føroya Landsstýri her.

Bygging av nýggjum Landsbókasavni.

Mælt verður til, at farið verður undir at detailprojektera og byggja nýtt Landsbókasavn skjótast gjørligt við hjálagda skitsuuppskoti (skjal B) sum grundarlagi.

Savnið er komið í la trongstøðu, at tað vegna pláss- og manningartrot gerst minni og minni fært fyri at lúka tey krøv, sum ásett eru við løgtingslóg, samstundis sum náttúrligu krøvini til effektiva bókasavnsskipan frá skúla- og vitskapsmonnum, frá tí almenna og privatum eru støðugt vaksandi. Tað at savnið ikki fult kann koma hesum krøvum á møti, noyðir fyrr ella seinni teir einstøku stovnarnar til sjálvar og hvønn sær at útvega sær kostbar handbókasøvn. So stórur partur av savnsins bókum er niðurpakkaður og burturbeindur ymsastaðni og so illa atkomuligur, at tað í mongum førum er lættari — men ikki bíligari - - at læna bøkurnar frá útlendskum bókasøvnum.

Uppskotið, sum her fyriliggur, er gjørt í samráð við Chr. Elj Lamhauge, verkfrøðing, og roynt hevur verið at fingið byggingina so avmarkaða og ódýra sum gjørligt.

Sum prísvøksturin er í løtuni vinnst einki við at stoðga við málinum. Byggiøki er løkt (á Müllerstrøð) og í byggigrunni eru uml. 1,8 mió. kr. — nóg mikið til fyrstu byggistigini.

Verður farið undir byggingina í 1974, so er Landsbókasavnið í øllum førum komið inn í nýggju húsini og rættiliga komið í gongd aftur væl fyri 150 ára stovningardagin í 1978.

Landsbókasavnið (Færøe Amts offentlige Bibliothek) varð sett á stovn sum sjálveigandi stovnur 5. nov. 1828. Longu í 1830 átti savnið egin hús (í Ærling Jalsgøtu), sum vóru í nýtslu í 100 ár, t 1920-áruuum varð tó ein partur av savninum (útlánið) flutt í gomlu fútahúsini úti á Reyni.

Tá bókasavnið varð 100 ára gamalt, varð farið undir at byggja núverandi bókahavnshúsini á Debesartrøð og flutt varð í tey í 1931.

Bókastovnurin var tá knappliga 15.000 bd. — í dag er tann 5 ferðir hetta. Hetta var stórt framstig, umenn bókasavnið ikki fekk tann sjálvsagda týðning, sum tilsvarandi bókasøvn høvdu tá aðra staðni. Mest tí at peningur og manning skortaðu.

Eitt tað fyrsta, Løgtingið yvirtók sum føroyskt sermál við heimastýrislógini, var bókasavnsmálið. Løgtingslóg nr. 31 frá 2. mai 1952 um Landsbókasavn v.m. broytir navnið frá Amtsbókasavni til Landsbókasavn og leggur savnið beinleiðis undir Føroya Landsstýri. Endamál savnsins varð og er framvegis:

a) at savna allar føroyskar bóknmenlir og so mikið sum gjørligt av bókum um Føroyar,
b) sum meginbókasavn við nýtiligum, føgrum og øðrum menningandi bóknmentum at fremja útbreiðslu av kunnskapum og upplýsing í landinum,
c) at fáa til vega eitt savn av vitskapligum bókmentum.

Økta peningajáttanin saman við fleiri virðismikhum bókagávum og øktari manning gjørdu, at savnið hevði eina uppgongutíð í 1950árunum. Men stignr kom í, sum arbeiðsumstøðurnar trongdust. Ein umbygging av útláninum og útflyting av bókagoymslum í onnur høli muntu als ikki. Samtíðis knípti við at fáa útbúgvið starvsfólk til at arbeiða undir so ringum umstøðum.

Fleiri royndir vórðu gjørdar hesi áriui til at fáa bygt nýtt bókasavn; men loysn fekst eingin, og viðurskiftini versnaðu í hvørjum.

Longu í 1940 hevði táverandi bókavørðurin, M. A. Jacobsen, gjørt vart við, at húsini vóru ov lítil.

Við løgtingslóg nr. 34 frá 9. mai 1954 varð heimilað Landsstýrinum at keypa Müllerstrøð (matr. nr. 1025 a) beint sunnan fyri Debesartrøð til søvn landsins. í viðmerkingunum verður sagt, at tað sum nærmast lá fyri at byggja, vóru nýggj bókasavnshús. t 1965 (løgtingsmál nr. 64, 1965) samtykti Løgtingið at heimila Landsstýrinum at detailprojektera og leggja málið fyri aftur tingið. Tá málið kom fyri aftur í 1966, fall tað, tí ivi var um, hvørt tað var fíggjarliga forsvarligt at fara undir byggingina júst tá.

Síðani hevur gingið stútt aftur á hondina við Landsbókasavninum, og spjaðingin av bókum og funktiónum tess helt fram. Vitskapliga savnið

varð skilt frá, Føroya Skúlasavn varð útihýst og fólkabókasavnsarbeiðið í Havn varð latið yvir til Havnar kommunu frá 1. apríl 1969.

Hesi tiltøk vóru sjálvsagt Landsbókasavninum til lítlan bata. Húsini eru soleiðis vorðið, at plássvinningurin varð lítil, og við tí skerda bókastovninum varð savnið enn minni fært fyri at røkja tær skyldur, sum tí er álagt eftir lógini.

Hiðani hevur verið gjørt vart við hetta fleiri ferðir, og møguleikin fyri at fáa bygt uppí hevur verið kannaður; men fakmenn halda ikki tað vera brúkiliga loysn, tí húsini eru ikki egnað til uppíbygging, og tað verður dýrari enn við nýggjum húsum úr blíigari byggitilfari enn løgdum gróti.

Tann parturin, ið minst er nervaður av plássviðurskiftunum í lotuni, er lesistovan. Meinast er plásstrotið fyri Føroyadeild okkara, sum ikki longur hevur pláss fyri handritapøkkunum, sersavnunum hjá Mariu Mikkelsen, føroysku bókunum, skrásettum og óskrásettum, bløðnm og smáprenti. Savnið fær heldur ikki keypt nóg mikið av eykaeintøkum av teimum føroysku bókunum.

Fyri føroyska gransking, av hvørjum slagi hon enn er, er tað til almiktan ampa, at serliga handritasavnið er so óatkomuligt.

Í núverandi húsunum er bruttogólvviddin uml. 180 m² + uml. 50 m² goymslurúm í kjallaranum (hædd 170 og 180 cm). Meginparturin av savnsins uml. 75.000 bókum er burturbeindur og havdur í 3 øðrum leigaðum hølum (tils. uml. 260 m²) ymsastaðni í Havn fyri eitt leiguvirði upp á stívliga 30.000 kr. árliga.

Í juli 1971 hevði Sámal Petersen, landsstýrismaður, fund saman við nøkrum av stovnsleiðarunum á Debesartrøð um bókasavnsmálið, og varð landsbókavørðurin tá biðin um at gera eina tørvsætlan. Ein bráðfeingis tørvsætlan varð gjørd, men arkitekturin, ið biðin varð at gera skitsuppskotið, bar seg seinni undan. Nýggj tørvsætlan varð gjørd og gjølla viðgjørd í einari sjálvvaldari nevnd: Johan Djurhuus, skrivstovustjóri, Sverri Egholm, landsbókavørður, H. D. Joensen, landslækni og Jóannes Rasmussen, jarðfrøðingur, sum samtykti, at biðja Chr. Eli Lamhauge, verkfrøðing, gera skitsuppskot eftir hesi tørvsætlan (skjal A) í samráð við landsbókavørðin. Eftir fleiri fundir, har ymsar sparandi broytingar vórðu gjørdar, vórðu endaligu skitsuteikningarnar (skjal B) lidnar á summri 1973.

Dentur hevur verið lagdur á, at gera hesa bygging so avmarkaða og so hílíga sum gjørligt, fyri at søgan frá 1966 skal ikki endurtaka seg. Bygg-

ingin varð tá í prinsippinum samtykt av Løgtinginum, men eftir at kostbara detailprojekteringin varð gjørd og málið aftur varð lagt fyri Løgtingið, fall tað, tí tað varð ikki hildið fíggjarliga forsvarligt at fara undir byggingina júst tá. Hetta her skitsuppskotið er fyri tað fyrsta ein triðing minni í gólvvídd og ætlað úr bíligari byggitilfari. Tær 5 mió. kr., sum Landsbókasavnið varð ætlað at kosta í 1964, svara til ein byggikostnað í dag upp á tað dupulta. Møguleikarnir fyri at fíggja byggingina mugu eisini haldast at vera betri í dag. Í byggigrunninum eru uml. 1,2 mió. kr. umfram 0,5 mió. kr., ið latnar eru Telefonverkinum sum brævalán úr grunninum. Árliga játtanin í grunnin upp á 350.000 kr. verður at hækka.

Uppí í byggi- og førsætlanini er bert Landsbókasavnið sjálvt og deildir tess, her undir vísindadeildin, ið nú virkar sum sjálvstøðugur partur av savninum. Roknað verður við, at savnið sum meginsavn fyri alt landið framvegis fer at taka sær av bókakeypi og skráseting fyri hini savnini og at hjálpa teimum og einstaklingum á bygdunum serliga við bókaláni. Skip og bókasavnsleysar bygdir mugu framvegis hava høvi til at fæna bókakassar hiðani. Landsbókasavnið má haraftrat veita tilfar og hjálp til bókliga gransking, fyrst og fremst føroyskum bókmentum viðvíkjandi og annars viðvíkjandi øllum føroyskum viðurskiftum.

Uppí í byggiuppskotinum í 1965 vóru umframt Landsbókasavn 1) fólkabókasavn við barnabókasavni og 2) Landsskjalasavn. Av tí at uppskotið um at byggja tá fall, varð fólkabókasavnsarbeiðið sum longu nevnt skilt frá og yvirtikið av Havnar kommunu í 1969 (Býarbókasavnið). Landsskjalasavninum er nú útvegað høli í nýggju evna- og bakteriufroðiligu starvsstovuni.

Føroya Skúlasavn, sum í mong ár hevði innivist á Landsbókasavninum, hevur framvegis stórar plásstrupulleikar at dragast við. Hetta savn, ið fer at hava serliga stóran týdning í komandi skúlabókasavnsskipan, er ikki líkið við í hesa ætlan, men kann verða tað, um ætlanin verður gjørd tilsvarandi rúmari. Ein tílík samanlegging hevði verið náttúrlig, við fíggjarligum og arbeiðsligum fyrimunum fyri bæði søvnini og brúkarar teirra. Í skrivi dagsett 6. sept. 1973 (skjal F) mælir stýrið fyri Føroya Skúlasavn til eina tílíka loysn, men einki verður upplýst ítøkiligt um plásstørv o.tíl.

Í skrivi dagsett 23. juli 1973 (skjal E) greiðir Fróðskaparsetur Føroya frá krøvum setursins til nýtt Landsbókasavn, serliga vísindadeild savnsins.

Sum nevnt eigur at verða bygt á Müllerstroð (matrikul nr. 1025a), sbr. viðløgdu støðumynd (Skjal B). Landið ognaði sær økið í 1964 til «sovn landsins», fyrst og fremst til nýtt Landsbókasavn. Upprunaliga viddin var 7.883 m². Síðani er ein ál skarvað burturav til breiðkan av J. C. Svabosgøtu.

Ætlandi er tað Havnar kommuna, ið eigur at bera kostnaðin av at fáa hampað um og lagað aftur í bendið frá nevndu vegabreiðkan. Bakkin er nú

so høgur og hallið so stórt, at ráðiligast er at útbyggja og væla inn gamla bókasavnsvegin, sum frammanundan er rættuliga vánaligur, og harvið fáa ein góðan felagsatkomuveg til stovnarnar á Debesartrøð. Hesin vegur liggur tgjøgnum friðað, plantað øki, og má vegagerðin tí skala plantingina minst møguligt. Gjøgnumkoyring eigur ikki at verða, men portur á ímóti J. C. Svabosgøtu.

Norðan og vestan fyri ætlaðu bóksavnshúsini fáast støðupláss til 26 bilar, ið má haldast at vera ivaleyst. Skal tað vera, kunnu eini 8 pláss fáast afturat suunanfyri uttan stórvegis eykakostnað.

Húsini eru ætlað at vera í 2 hæddum, 750 m² hvor. Upprunaliga var hugsað um bert at hava uml. 400 m² kjallarahædd til goymsluríim og restina í einari hædd. Hetta hevði havt vissar arbeiðsligar fyrimunir, men verið eitt sindur dýrari og hava vit tí valt at útnytta alla kjallarahæddina til sekundér arbeiðshøli og goymslur.

Samlaða gólvviddin verður 1500 m² brutto, eftir at skarvað hevur verið burturav upprunaliga uppskotinum (t.d. fyrilestrarhøli og bókbindaraverkstaður). Tá tørvsætlanin er 266 m² minni enn uppskotið, komst hetta av, at talan er um ávikavist netto og brutto brúksvidd. Sí annars viðmerkingarnar til tørvsætlanina.

Uppskotið, sum her liggur fyri, er sostatt tað avgjørt minsta, talan kann vera um, skal nakar hátt vera í. Tí er eisini hugsað um at tryggja sær útbyggingarmøguleikar suðureftir fyrst og fremst.

Sbrt. skriv dagfest 22. juni 1973 (skjal C) frá Lunhauge & Waagstein verður kostnaðurin, tá bygt verður úr betongi við timburklædningi, eftir verandi prislegu mettur til 4 mió. kr., harav 0,5 mió. kr. til útgrevstur og jørðregulering, umbygging og asfaltering av atkomuvegnum, ið sum nevnt kemur øllum stovnum her úti til góðar. Haraftrat kemur keyp av tí mest neyðturviliga innbúgvinum fyri uml. 250.000 kr.

Møguleikin við elementbygging hevur verið nevndur. Clr. Eli Lunhauge hevur verið spurdur til ráðs um hetta, og sigur hann í skrivi dags. 24. sept. 1973 (skjal D), at tað er ilt at siga, um fyrimunir kunnu vera við at brúka elementir, men mælir tó til - - og her eru vit samdir -- at alt arbeiðið upp á Landsbókasavnið, eisini atkomuvegir og uttanumøki, verður hoðið út undir einum eftir viðløgdu skitsum og tørvsætlan sum grundarlagi, og at biðið verður um alternativt boð upp á bygging úr elementum.

Eg havi haft samband við danska byggifelagið CONTA og norska felagið BLOCK WATNE HUS, sum bæði hava áhuga fyri málinum. CONTA hevur gjørt eina skitsu (skjal G) uttan yvirslag. Á fundi 18. sept. segði umboð felagsins, at teir kundu byggja tílík hús fyri 2.790.000 kr. eftir 250 arbeiðsdøgum. Tá var ikki íroknað spreinging, tilførsluleiðingar, atkomuvegur og innbúgv, men fundamentering, sanitet, ljós og varmi, og húsini annars liðug at flyta inn í, klædd innan og uttan.

Danski serfrøðingurin í bókasavnsbygging, Sven Plovgaard, inspektørur í Bibliotekstilsynet, upplýsir í telefonsamrøðu, at fyrimunirnir við elementum (sløgini eru mong) eru ikki tað stórir her sum í Danmark, har veðurlagið og lendið eru øðrvísi, har elementvirkini, sum eru at kalla á staðnum, hava servant fólk til at arbeiða undir kunnigum viðurskiftum.

Hann er fúsur at vera okkum til hjálpar við greinligum upplýsingum um hetta og onnur mál, um vit ynskja tað.

Samantikið.

Mælt verður til, at farið verður undir at detailprojektera og byggja nýtt Landsbókasavn skjótast gjørligt við hjálagda skitsuprojekti (skjal B) sum grundarlagi. Alt arbeiðið verður boðið út undir einum eftir nevndu skitsu og biðið verður um fullfíggjað alternativt tilboð upp á bygging úr elementum.

f. FØROYA LANDSBÓKASAVN
Sverri Egholm

A. 10. november 1972.

TØRVSÆTLAN
í sambandi við uppskotið um bygging av nýggjum Landskókasavni

	hillametrar	gólvvídd í m²
1. **Útlánshøli** (20.000 - 25.000 bd.)	835	370
2. **Avgreiðsla**		18
3. **Lesistova** (3.000 - 4.000 bd.)	150)	100
tíðarrits- og avisframløga	50)	
4. **Føroyadeild**		
avlestur partur við handritssavni v.m.	600	36
bøkur til láns, event. í útlánshølinum	50	36
5. **Goymslur**		
føroysk eykadeild (10.000 bd.)	450	36
nærgoymsla (4.000 bd. tíðarrit v.m.)	140	36
megingoymsla (45.000 - 50.000 bd.)	1500	216
6. **Fundar- og framsýningarhøli**		
event. sum partur av útlánshøli el. lesistovu		48
7. **Rannsóknarklivar 4 × 6 m² hvør**		24
8. **Avgreiðslurúm**		
skyldueintøk og bókabýti	30	18
bókakassar til skip, skúlar v.m. (4.000 bd.)..	100	18
pakki- og goymslurúm		24
9. **Skrásetingarrúm** (4 fólk)		
eisini skráseting og avgreiðsla av fólkabóka-søvnunum á bygd, pláss til kartotek og prent-lutir	100	50
10. **Skrivstovur og onnur arbeiðshøli**		
a. skrivarastova		18
b. landsbókavørður		18
c. vísindabókavørður		18
d. útláns- og lesistovnbókavørður (2 fólk)..		18

11. **Umvælingar- og bókbindaraverkstaður**		30
12. **Kopierings- og myrkakamar** (event. saman við 11)		12
13. **Manningarrúm**		
køkur og uppihaldsrúm		8
14 læsilig klædnarúm, 30×50 cm hvørt		16
2 vatnhús við hondvaski		8
14. **Forstova** v. klædnarúmi til vitjandi		30
2 vatnhús v. hondvaski		8
15. **Fýrrúm**		10
16. **Tøkt rúm** til reingerðsamboð v.m.		10
Tilsamans	4005	1234

VIÐMERKINGAR TIL TØRVSÆTLAN

Ætlanin umfatar bert Landsbókasavnið sjálvt og deildir tess. Talan kann verða um, at Føroya Skúlasavn skal uppí, men tað er ikki tikið við í hesi tørvsætlan.

Byggilendi. Bygt verður á Müllerstrøð (matr. nr. 1025a) og møguliga inn á Debesartrøð fyri norðan fram við Svabosgøtu. Framsíðan eigur at venda eystureftir. Húsini eiga vera í einari hædd við kjallara undir (goymslur v.m.). Hesum goymslurúmum nýtast lítið dagsljós og hæddin millum loft og gólv kann vera umk. 220 cm.

Einleikamál. Sbrt. «Folkebiblioteksbygningen» 1967 eigur at verða roknað við 3-metranálinum (modul) innanveggja. millum berandi partarnar í húsunum kann so hóskandi vera 6 m.

Innrættingin eigur at vera soleiðis, at rúmini liggja sum høgligast upp at hvørjum øðrum og so, at møguleiki gerst fyri at byggja uppí suður- og/ella vesturefter. — Umframt **høvuðsdyr** eigur at vera **onnur inngongd** til starvsfólkið og til avskipan og móttøku av bókapøkkum og -køssum.

Frá høvuðsdyrunum verður ein **forstova** ella -høll. **Klædnarúm** og we til tey vitjandi kunnu vera nærindis forhøllini ella í kjallaranum.

Beint inn frá forhøllini eigur **avgreiðslan** at vera við útlánsdiski og arbeiðsplássi til 2 fólk. Hiðani skal kunna siggjast inn í **útlánið, lesistovu** og forhøll. Beinleiðis atgongd hiðani átti at verið út í klædnarúmið í forhøllini. Tey vitjandi hava skyldu at seta frá sær taskur o.tl. her. Umframt vanlig arbeiðstól má eisini verða roknað við ymsari tekniskari útgerð sum telefon, telex, **hústelefon**, band- og plátuspælarar, ið eigur at verða passað í avgreiðslunni. Í útláninum eigur at vera møguleiki fyri avlurting við høvuðstelefonum.

Øll gongd til og frá lesistovu og útláni skal liggja fram við avgreiðsluplássinum, ið kann vera partur av útlánshølinum, møguliga skilt frá við partvísum glasveggi, so at óljóð frá avgreiðsluni ikki ógógvar ovmikið.

Útlánið má hava pláss til uml. 25.000 bind, t.v.s. 835 hillametrar (styll lm). Roknað verður við reólfakum við 5 hillum, hvor hillin 90 cm long. 27 cm fmillum hillarnar. Hæddin á reólunum: 185 cm. Gólvviddin ætlað til uml. 370 m². Umframt ljós frá minst einari síðu, eigur helst at vera møguleiki fyri ervaljósi í útláninum og annars har tað er gjørligt. Ongar reólir verða fram við vindeygasíðuni. **Innhúgv:** eini tvey borð og minst 4 stólar til tey vitjandi. Eitt arbeiðspláss til bókavørð.

Lesistovan eigur at vera tætt upp at avgreiðslu og útlánsloli, helst eisini nærindis Føroyadeildini. Pláss má vera fyri 3.000 - 4.000 handbókum. 120 bd. pr. reólfak = 4,5 lm, tvs. 112 - 150 lm tilsamans. Umframt eigur at vera pláss til uml. 200 tíðarrit í vanligum skráhillum. Hetta krevur 10 reólmetrar ella uml. 50 lm aftrat. Føroysku avisirnar helst eins og higartil í møppum á serligum framløguborði. Aðrar avísir (einar 20) í avishaldara — uml. 1 reólmetur ella 5 lm. — Til lesi- og arbeiðspláss minst 6 tveymansborð uml. 70×180 cm. Arbeiðshorðini á lesistovuni setast framvið og vinkulrætt á ljósveggin, so at dagslýsið fellur inn á lesiplássini vinstrumegin. — Arbeiðs- og borðpláss skal vera til ein bókavørð. Borðstøddin 78×155 cm. Bókavørðurin má hava pláss í reólunum aftan fyri seg til at seta frá sær bøkur og annað arbeiðstilfar. Plásstørvurin hjá bókavørðinum á lesistovuni verður mettur til 3 - 5 m².

Hóskilig breidd á lesistovuni er 6 metrar. Verður hon breiðari, má ljósið koma inn frá meira enn einum veggi ella úr ervi.

Reólirnar sum í útláninum. Reólbreiddin: 22 cm., dupultreól: 44 cm. Fríplássið ímillum reólirnar (úr miðju í miðju á reól) 300 cm.

Føroyadeildin, sum er í fleiri pørtum, eigur at liggja nærindis lesistovu og útláni, ið hvussu er ávikavist tann parturin, sum ikki er til útláns og tann, sum kann lænast. Handrit, smáprent, myndir, kort, avísir, mikro-

filmar og bøkur, sum bert finnast í einum eintaki - - meginstovnurin í Føroyadeildini — verða ikki útlænt, men kunnu latast til nýtslu á lesistovuni. — Ikki ber til at geva upp nakað hm-tal, tí tilfarið er so ymist og verður goymt á ymsan hátt. **Avissavnið** eigur helst at verða gjørt soleiðis, at árgangirnir fáa ligið.

Í sonn hædd sum útlán og lesistova verður **nærgoymsla** til tíðarritsárgangir, eldri árbokur og sjáldan nýttar handbøkur v.m. Reólir við 7 hillum sum á goymsluni kunnu verða nýttar. Tørvurin er á umk. 150 hm. Kann eisini vera minni, um nakað av tilfarinum fær verið á skrivstovuhillunum. Her skal eisini verða pláss til leypandi árgangir av tíðarritinum og avísum. — **Hølið nýtist ikki** vera atkomuligt hjá vitjandi. Gongin fram við skrásetingar- og skrivstovurúmum kann bóskandi brúkast til hetta endamál. Hendan goug má vera 230 - 300 cm breið.

Megingoymslan fær verið í kjallaranum ella longst burtur frá avgreiðslumi. Hon má rúma 45.000 - 50.000 bókum ella útvíðast til honda tørv. Stórur partur av vísindadeildini (doktararitgerðir, periodica v.m.) verður her og annars tær bøkur, sum nú eru á goymslu í Dr. Ingridar Barnagarði, í Grønulíð, í bókasavnskjallaranum og aðra staðni. Roknað verður við 1230 - 1350 hm, 7-hilla-reólir. Allar reólir koma kortini ikki í nýtslu straks. — Gongd eftir miðjuni (til bókavogn) 2 m breið. Annars 150 cm ímillum fríttstandandi reólirnar frá miðju til miðju ella stívliga 100 cm veruligt fríplass ímillum reólirnar.

Føroyska eykadeildin t.e. ívítøk av føroyskum bókum, serliga barnabókum o.ø. sum vanliga verða skjótt útseldar. Hesi eintøk eru ætlað fólkabókasøvnunum til endurnýggingar, so hvørt gomul eintøk slítast. Goymslan kann vera saman við høvuðsgoymsluni.

Fundar- og framsýningarhøli. Her verður ikki roknað við stórum plássi, umk. 48 m², bert til smærri fundir og fyrilestrar, til framsýningar av bókum, myndum o.ø. Hølið skal helst liggja væl fyri við hurð inn frá forhøllini og við skjótiveggi til lesistovu ella útlán, so at rúmið á lættliga kann gerast nakað størri. Stólarnir skulu vera lættir og sterkir, kunnu setast saman og stúvast burtur. Rúmið skal vera útgjørt til smalfilmsframførslu o.til. Ljóðviðurskiftini mugu vera í lagi.

Rannsóknarklivarnir (4) eru ætlaðir fólki, ið situr við bókligum arbeiði, ið ikki verður liðugt eftir einum degi ella tveimum. Her má vera skápspláss og skuffur, so at viðkomandi kann læsa tilfar sítt niður og so at eisini onnur kunnu nýta hølið tær løturnar, tað er tøkt. - Minst ein av

klivunum eigur at vera útgjørdur við lurtitólum ella við møguleikum fyri uppseting av slíkum tólum.

Skrivstovur og **skrásetingarrúm.** Hetta seinna eigur at vera serliga rúmligt, tí her verða fleiri kortsøvn (kartotek), her verður eftirlitið við avgreiðsluni av bókum til og frá bókbindara, plasting og smávegis umvæling. Her ella í hóskandi høli verða bókavalsfundirnir fyrireikaðir, framløga av bókum til gjøgnumsýn og varðveitsla av avísbókaummælum. Bygdabókasøvnini verða avgreidd hiðani.

Pakki- og avgreiðslurúm mugu liggja soleiðis, at høgligt er at koma til og frá við tungum køkkum og køssum uttan at fara igjøgnum ov mong onnur rúm.

Té-køkur (lítil) kann vera onkustaðni avsiðis, t.d. í kjallaranum. Klæðiskáp og wc til starvsfólkið eigur tó ikki at vera tætt við køkin. Eitt lægiligt klæðiskáp 30×50 cm til hvørt starvsfólkið. Roknast kann við 14 slíkum skápum í fullari hædd. — Mælt verður til at hava tvinni wc eftir kynsbýtinum. Tað sama er galdandi fyri wc teirra vitjandi.

Umvælingar- og bókbindaraverkstaður. Sum bókbindaraviðurskiftini eru — og útlit er ikki fyri stórvegis broyting — verða allar bókasøvnsbøkur okkara innbundnar í Danmark í løtuni. Ringt er eisini at fáa annað bókbindarnarbeiði (sum gylling) gjørt í Føroyum. Neyðugt verður tí, at fólk við kunnleika í bókbinding og konservering verður sett við savnið, so at hetta arbeiði kann verða gjørt í landinum.

Kopierings- og myrkakamar kann eins og bókbindaraverkstaðurin vera í kjallarahæddini. Umframt kopieringstól verða her eisini sett kort-prentimaskinan og onnur tílík tól. — Hølið kann hóskandi vera í sambandi við bókbindaraverkstaðin.

Ventilatiónsviðurskiftini mugu vera í lagi serliga í kjallarahølunum. Tøkt rúm má vera til reingerðsgreiðir, t.d. í ella nærindis fýrrúminum.

Sverri Egholm,
landsbókavørðurin.

C.

LAMHAUGE & WAAGSTEIN
Projekterings- og byggifelag

GCL/HR Tórshavn, tann 22. juni 1973

Føroya Landsbókasavn
við Sverri Egholm
3800 Tórshavn

Viðv. ætlaðari nýbygging

Við hesum senda vit fram síðsta skilsuppskot okkara, dagf. 21. í hesum.

Hetta uppskotið liggur í høvuðsheitum nær upp at fyrru uppskotunum. Tó er tann broyting gjørd at gólvviddin er minni, vegna miðurskurð í nýtsluøkinum; og at kjallarin allur verður nýttur sum brúksrúm.

Hildið verður at støddin á ongan hátt kann skerjast meira.

Uppkoyringin «atkomuvegurin» verður nær um hin sami sum til verandi savnið, við neyðugari breiðking og regulering, bæði síðuvegis og í hædd.

Frásetingarøkið til bilar, er økt ella kann verða økt, um ynski er um hetta, so sum sýnt er á støðuplaninum.

Byggingin verður úr betong.

Kostnaðurin er, eftir verandi prísstigu, mettur til alt kr. 4 mill.

Her uppi í er jørðarbeiðið, jørðregulering, asfaltering av økinum og umbygging og asfaltering av atkomuvegum. Kostnaðurin tyrfhesi samanbeiðið er mettur til kr. 0,5 mill.

Lamhauge & Waagstein
C. Lamhauge

+ 2 tekn. í 3 eintøkum
nr. 1 b Støðumynd
nr. 3 planir-facadir-skurður.

F.L.j. nr. 323-3-11/73

D1

LAMHAUGE & WAAGSTEIN
Projekterings- og byggifelag

GEL/HR Tórshavn, tann 24. sept. 1973

Føroya Landsbókasavn
við Sverra Egholm, bókavørður
3800 Tórshavn

Vísandi til skitsu frá 21. juni og skriv við kostnaðarætlan frá 22. juni um bygging av Landsbókasavni hava vit hetta at leggja aftrat um møguligá elementbygging, ið savnið munniliga hevur hiðið um.

Fleiri tekniskir spurningar eru at greiða við líkari elementbygging, sum ger tað torført at siga, hvørjir fyrimunirnir møguliga kunnu vera, t.d. er ilt at siga, hvussu stórur partur av byggingini kann vera úr liðugtgjørdum elementum og hvønn týðning hesir ymsu spurningar sum jarðarmunur, bygningsformur, ætlaða býarplansskipanin v.m. fáa fyri byggikostnaðin.

Við tí prisvøkstri, vit hava í løtuni, má rokna við, at bygging sum hendan, her er talan um, dýrkar við o.u. 300.000,- kr. árliga. Fyri at spara tíð og pening mæla vit tí til, at arbeiðið verður projekterað skjótast gjørligt út frá góðkendum skitsum, soleiðis at alt verður boðið út undir einum. Her undir eisini atkomuvegir og uttanumøki.

Sum áskoyti til treytirnar verður biðið um alternativt boð fyri einari møguligari elementbygging, út frá sama progrittinum, sum givnu fyritreytirnar siga frá. Hetta er vanligt mannagongd í okkara grannalondum, ið hava elementvirki í nánd.

Við heilsan

Lamhauge & Waagstein

C. Lamhauge

F.Lj. nr. 323-14-1

E.

Fróðskaparsetur Føroya
3800 Tórshavn

Í skrivi frá Fróðskaparsetri Føroya til Føroya landsstýri frá 27. mars 1972 viðvíkjandi evna- og bakteriologiskari starvsstovu verður leysliga nomið við spurningin um bókasavnsviðurskifti okkara, og í skrivi landsstýrisins frá 25. aug. 1972 verður setrið biðið um at umhugsa málið og senda landsstýrinum tilmæli.

Málið hevur síðani verið gjølla umhugsað í einari arbeiðisnevnd (Sv. Egholm, landsbókavørður; H. D. Joensen, landslækni; Johan Djurhuus, skrivstovustjóri; Jóannes Rasmussen, setursráðsformaður), og hevur serliga dentur verið lagdur á áhugamál setursins bókasavnstænastu viðvíkjandi í sambandi við spurningin um bygging av høskandi landsbókasavni.

Virksemi og virkisøki setursins eru nógv vaksin tey farnu árini, bæði í ransóknararbeiði og í undirvísing er tørvurin á bólkum og bókasavnstænastu alsamt vaksandi. Tær deildir á landsbókasavninum, sum hava serligan áhuga hjá setrinum eru Vísindadeildin og Føroyadeildin, og tær bøkur, vit hava fingið og fáa við bókabýti Fróðskaparfelagsins, eru lætnar vísindadeildini. Umráðandi er tí fyri okkum at hesar deildir fáa plássviðurskifti, so allar bøkur eru høgliga atkomandi, og vit ikki sum nú í summum førum mugu læna bøkur uttanlanda ella keypa bøkur, sum til eru frammanundan, men ikki atkomandi vegna plásstrot.

Krøvini, sum sett verða landsbókasavninum bókatænastu viðvíkjandi, eru í dag nógv størri enn landsbókasavnið er ført fyri at lúka undir teimum korum og plássviðurskiftum, tað nú arbeiðir undir. Hetta hevur tí seinastu árini ført til eina neyðloysn, har hvør einstakur stovnur og hvør einstøk deild undir setrinum hava roynt at vera sjálvhjálpin við at útvega sær tað ueyðturviligasta bókatilfar, partvís úr goymslum landsbókasavnsins, partvís við láni frá privatum og partvís við keypi eftir førimunum. Tílík loysn er svikalig og vil sum frá líður vera til óhótaligan skaða fyri bókasavnsviðurskifti okkara. Bøkurnar verða spjaddar út og umfarnar av bókasavnsókønum fólki, lítil og eingin bókasamskipan er millum stovnarnar, so eingin veit, hvat til er av bókum, so dupult keyp ofta kemur fyri.

Hvat hesum spurningi viðvíkur, eru tí allir sandir um, at landsbókasavnið eigur at taka sær av bókasavnstænastu setursins, soleiðis at alt bókakeyp gongur gjøgnum landsbókasavnið, at øll samskipan og øll skráseting fer fram á landsbókasavninum, haðani bøkurnar verða lærdar stovnunum.

Hetta gerst ikki undir teimum plássviðurskiftum, sum eru í dag.

Roynt hevur tí verið í samráð við Chr. Eli Lamhauge, verkfrøðing at

E.

Fróðskaparsetur Føroya
3800 Tórshavn

Í skrivi frá Fróðskaparsetri Føroya til Føroya landsstýri frá 27. mars 1972 viðvíkjandi evna- og bakteriologiskari starvsstovu verður leysliga nomið við spurningin um bókasavnsviðurskifti okkara, og í skrivi landsstýrisins frá 25. aug. 1972 verður setrið biðið um at umhugsa málið og senda landsstýrinum tilmæli.

Málið hevur síðani verið gjølla umhugsað í einari arbeiðisnevnd (Sv. Egholm, landsbókavørður; H. D. Joensen, landsíæknir; Johan Djurhuus, skrivstovustjóri; Jóannes Rasmussen, setursráðsformaður), og hevur serliga dentur verið lagdur á áhugamál setursins bókasavnstænastu viðvíkjandi í sambandi við spurningin um bygging av høskandi landsbókasavni.

Virksemi og virkisøki setursins eru nógv vaksin tey farnu árini, bæði í rannsóknararbeiði og í undirvísing er tørvurin á bólkum og bókasavnstænastu alsamt vaksandi. Tær deildir á landsbókasavninum, sum hava serligan áhuga hjá setrinum eru Vísindadeildin og Føroyadeildin, og tær bøkur, vit hava fingið og fáa við bókabýti Fróðskaparfelagsins, eru lætnar vísindadeildini. Umráðandi er tí fyri okkum at hesar deildir fáa plássviðurskifti, so allar bøkur eru høgliga atkomandi, og vit ikki sum nú í summum førum mugu læna bøkur uttanlanda ella keypa bøkur, sum til eru frammanundan, men ikki atkomandi vegna plásstrot.

Krøvini, sum sett verða landsbókasavninum bókatænastu viðvíkjandi, eru í dag nógv størri enn landsbókasavnið er ført fyri at lúka undir teimum korum og plássviðurskiftum, tað nú arbeiðir undir. Hetta hevur tí seinastu árini ført til eina neyðloysn, har hvør einstakur stovnur og hvør einstøk deild undir setrinum hava roynt at vera sjálvhjálpin við at útvega sær tað neyðturviligasta bókatilfar, partvís úr goymslum landsbókasavnsins, partvís við láni frá privatum og partvís við keypi eftir førimuni. Tílík loysn er svikalig og vil sum frá líður vera til óbótaligan skaða fyri bókasavnsviðurskifti okkara. Bøkurnar verða spjaddar út og umfarnar av bókasavnsókønum fólki, lítil og eingin bókasamskipan er millum stovnarnar, so eingin veit, hvat til er av bókum, so dupult keyp ofta kemur fyri.

Hvat hesum spurningi viðvíkur, eru tí allir samdir um, at landsbókasavnið elgur at taka sær av bókasavnstænastu setursins, soleiðis at alt bókakeyp gongur gjøgnum landsbókasavnið, at øll samskipan og øll skráseting fer fram á landsbókasavninum, haðani bøkurnar verða lærtar stovnunum.

Hetta gerst ikki undir teimum plássviðurskiftum, sum eru í dag.

Roynt hevur tí verið í samráð við Chr. Eli Lamhauge, verkfrøðing at


finna fram til eitt byggiuppskot, sum við lægst møguligum byggikostnaði lýkur tey mest møguligu krøv, sum sett verða landsbókasavninum í dag.

Tað uppskot, sum nú verður lagt fram av landsbókasavninum, lýkur best krøv og fær málið tí okkara bestu viðmæli.


Tórshavn, tann 27. juli 1973


Jóannes Rasmussen.






KÄLLARPLAN






MÓTIL NORD




MÓTI AUSTRI




TVÆRSKURÐUR

BYGT ÓKI .
KJALLARARÚMMÁL 756 M³
STOFNFLÖTUR 756 M²
ÚTSÝNISFLÖTUR 1596 M².


FØROYA LANDSBÓKASAVN NÝBYGGING PLANIR - FACADIR - SKUREIR SKITSUUPPSKOT	mát 1:200 tekn. nr. 5 málr. nr. [illegible] dagf. 20-6-[illegible] teknað [illegible] ark. nr. Aðal/72
Lamhauge og Waagsteln projekterings- og byggifelag	



HÁTT [illegible]



STOVUHALDD


16 BILAR
K 20,00
ST. K 20,50
LANDSBOKASAVN
K 18,00
10 BILAR
J.C. SVAROS GATA

B II

Nýggj kommunulæknaskipan

(Skriv í samband við løgtingsmál 66/1973)

Viðv. øðrum fylgiskjølum verður vist til F.L. J nr. 913-7-15.

Til Føroya Landsstýri.

Læknafelag Føroya hevur í fyrsta umfari hesar viðmerkingar at gera til álitið viðvíkjandi kommunulæknaskipanini sum nevndin ið Landsstýrið setti hevur latið úr hondum.

Samstundis loyva vit okkum at siga okkara hugsan um tær ætlaðu broytingar í jarðamøðraskipanini.

Flestu limir læknafelagsins vóru væl nøgdir við at slík nevnd varð niðursett, tí vit sum arbeitt hava undir hesi skipan hava longi verið greiðir yvir at henni hevur tørvað ábøtur.

Nakrar principiellar broytingar í skipanini hava vit ikki hildið vera neyðugar og fyriliggur heldur ikki uppskot um hetta í álitinum, í hvussu so er ikki hvat viðvíkur kommunulæknaskipanini.

Hetta álitið umfatar viðurskiftini í einum stórum parti av teirri sokallaðu primeru sunnheitstænastuni.

Í teirri primeru sunnheitstænastuni arbeiða læknar, sjúkrasystrar, heimasjúkrasystrar, heilsusystrar, ljósmøðrar og tannlæknar.

Uppgávan hjá fólki í hesu sunnheitstænastu er skipað í triggjar bólkar:

1. at viðgera sjúkur
2. heilsuvernd (profylaksa)
3. at skapa kontakt til m.a. sjúkrahús, serlæknar og allan tann sosiala sektorin.

At fáa hetta system at virka sum eina eind til bata fyri sjúklingin má eftir meting læknafelagsins vera aðalmálið.

Fyriliggjandi uppskot tykist ikki miðja mótí hesum heldur skapar tað spjaðing við at seta einsamallar læknar ymsastaðni í Føroyum, har teir lítið og ongki samstarv fáa við hinar limirnar í heilsuverkinum og mestsum onga kontakt við sínar egnu starvsbrøðir.

Av tí at skipanin av heilsuverkunum í Føroyum og Danmørk er meinlík loyva vit okkum at vísa til hjálagda álit frá 1971 viðvíkjandi «den primære lægetjeneste». Hetta álitið viðger gjølla samstarvið lækuanna millum, og millum læknarnar og restina av heilsuverkinum.

Í brævinum til landsstýrið varð sagt at vit ikki vóru sandlir við nevndina um hvussu nógvir læknar skuldu setast afturat.

Vit halda tað ikki vera beint longu nú at sela talið til 23 læknar, uttan so at hetta er eitt rammutal.

Nevndin hevur sum grundarlag fyri metingini um talið av læknum nýtt eitt tal frá WHO. (s. 11 n.)

Hetta talið tykist ikki siga nakað um talið av praktiserandi læknum, men er eitt tal sum vísir fólk/lækna ratio í londum kring heimin, altso tað samlaða talið av læknum í landinum bæði innanfyri og uttanfyri sjúkrahúsini sett upp ímóti fólkatalinum.

Hetta talið er í løtuni niðanfyri 1000 í Føroyum eftirsum tað eru umleið 45 arbeiðandi læknar í Føroyum í dag.

Hetta WHO talið sigur sostatt onki um hvussu nógvir kommunulæknar ið eiga at vera í mun til fólkatalið. Okkum kunnugt hevur WHO ongi tøl fyri fólk/kommunulækna, men vit kunnu nevna at í Danmark verður hildið at talið eigur at vera umleið 2400 fólk pr. kommunulækna.

Læknafelagið heldur at talið í Føroyum eigur at vera millum 2000 og 2400. Tað eru tó øki har talið av geografiskum orsøkum eigur at fara niðurum 2000. Hesi øki eru: Suðuroy, Sandoy og Vágoy, tí har eru teir størstu trupulleikarnir við vaktarskifti læknanna millum.

Hvar læknarnir skulu sita hevur læknafelagið sína hugsan um.

1. Læknafelagið heldur tað vera rimiligt, sum eisini nevnt í álitinum, at tað vera tveir læknar í sunnara helvt av Suðuroynni og tveir í norðaru helvt. Somuleiðis tveir í Vágoynni, men bert ein í Sandoynni.
2. Í Vestmanna eigur framvegis bert at vera ein lækni men samstarvið við vágalæknarnar eigur at økjast munandi.
3. Í álitinum verður skotið upp at seta ein lækna í Kollafirði. Hesum eru vit avgjørt ímóti.

   Harafturímóti eiga vit at kanna møguleikarnar fyri einari læknamiðstøð um brúgvaleiðina umfatandi Kollafjørð ng bygdirnar í núverandi Eiðis læknadømi og so har seta ein lækna afturat.
4. Viðvíkjandi Eysturoynni so eru í Nes-Runavíkar læknadømi 2700 fólk og er hetta ov nógv. Á Skála og í Fuglafirði er talið av fólki ikki ov stórt, í hesum læknadømum er vaktarskifti millum læknarnar.

   Vit halda at tað er møguleiki fyri læknamiðstøð umfatandi hesi læknadømi, og tann spurningurin eigur at kannast gjøllari áðrenn settur verður ein lækni afturat í Runavíkar dømi sum skotið upp í álitinum (s. 16). Tað kemur at tarna útviklinginum um lækni verður settur í Runavík afturat. Vit halda at ein eyka lækni eigur at verða knýttur at einari læknamiðstøð á Skipanesi.

   Núsitandi læknar eru allir fyri at gera miðstøð.

5. Í Norðoya Læknadømi eigur ongin kommunulækni at setast afturat, so leingi sum sjúkrahúslæknarnir hava praksis. Um so er at hesir gevast við sjúkakassapraksir eigur ein kommunulækni at setast afturat.
6. Í Havn eigur 1 kommunulækni at verða settur afturat.

Sum lað sæst av hesum so eru læknar avgjørt fyri at arbeiða saman, minst tveir og tveir á læknamiðstøðum ella heilsumiðstøðum.

Hetta hevur sum nevnt stórar fyrimunir bæði fyri sjúklingarnar og læknarnar.

Tað er ynskjandi at kommunulæknin er partur av einari integreraðari heilsuskipan og har lað er møguligt eiga vit at arbeiða undir sama taki sum hinir limirnir í heilsuverkinum. Serliga týðandi er at heimasjúkrasystrarnar virka út frá læknamiðstøðunum.

Læknafelagið loyvir sær eisini at gera stuttar viðmerkingar til uppskotið um nýggja ljósmøðraskipan.

Tað tykist sum um nýggja skipanin vil føra við sær at barnakonurnar í framtíðini koma at verða færri ferðir kannaðar hjá ljósmóður enn í løtuni. Um so verður metir læknafelagið hettar vera eitt afturstig í mun til galdandi skipan. Eftir okkara tykki er tað ein stórur fyrimunur at bæði lækni og ljósmóðir hyggja at somu barnakonu hvør fyri seg. Vit halda tað ikki vera beint at fleiri profylaktiskar barnakonukanningar enn nú verða gjørdar av lækna, heldur hinvegin.

Læknafelagið metir tí at tað er ógvuliga umráðandi at nýggja skipanin kemur at geva barnakonunum líka so lætta atgongd til ljósmøðrakanningar sum núgaldandi skipan og tekur undir við uppskotinum um at ein nevnd verður sett at skipa fyri hesum.

Álitsins uppskot viðvíkjandi broyting í reglunum um figgjan av kommunulæknahúsum og viðtalubølum tekur læknafelagið undir við.

Vegna Føroya Læknafelag
Signar Dam, formaður.

Føroya Ljósmøðrafelag
v/ Ingibjørg Rasmussen
Eiði

Tórshavn, tann 5/3 1974

Føroya Landsstýri
3800 Tórshavn

Føroya Ljósmøðrafelag hevur fingið sendandi eintak av tí áliti viðv. kommunulæknaskipan o.ø.m. í Føroyum, sum nevnd, sett av Føroya Landsstýri tann 3. juli 1972, hevur greitt úr hondum.

Sum frambongur av arbeiðssetningunum fyri hesa nevnd, so eru ljósmøðraviðurskiftini ikki millum tær uppgávur, ið lagt varð nevndini at umhugsa og koma við uppskoti til nýskipan fyri.

Nevndin hevur tó — sum tað verður sagt frá — sjálvboðið tikið hesu viðurskifti upp, og verða undir IV. bólki á blaðsíðunum 65—86 viðurskiftini hjá føroysku ljósmammuni viðgjørd.

Lat tað verða sagt beinanvegin, at Føroya Ljósmøðrafelag er ikki konsulterað í hesum sambandi, og eigur tað tí heldur ikki part í hesum arbeiði.

Til tað sum verður ført fram í álitinum um viðurskifti ljósmøðranna kann ymiskt verða at viðmerkja.

Vit ætla okkum ikki á hesum sinni at geva okkum í kast við greinliga at kommentera alt tað, sum nevndin førir fram í áliti sínum — helst halda vit náttúrliga hoyrir heima í einum nevndararbeiði, har ljósmøðurnar gjøgnum sín felagsskap eru umboðaðar, bert vilja vit draga fram nøkur sjónarmið, sum vit halda eiga at verða tikin fram, um ikki álitið skal fáa ov nógva slagsíðu tann skeiva vegin.

Tað kann vera ymiskt av tí sum fram verður ført nýskipanini til fyrimunar, sum vit kunnu taka undir við.

Soleiðis vil tað eisini hjá ljósmøðrunum vera kærkomið at fáa arbeiðsdag sín bundnan at ávistum klokkutimum.

Sum heild tikið halda vit tó, at nýskipanin er ov nógv knýtt til og umhugsin við teimum plássum í landinum, ið liggja í námind av okkara sjúkrahúsum so sum tilfellí er fyri ein part av Norðuroyggjunum, ein part av Suðuroynni og summasta partin av Suðurstreym; men sum vit vita lað so finst eisini ein verð uttanfyri Verona.

Vit vita, at kommunulæknarnir eru ikki alt ov glaðir fyri at vera bundnir av barnakonum, ið eru komnar í føðing, tað vil siga góðan mánað, áðrenn føðast skal, og er tað kanska einki at siga til, tí hetta eru heldur ikki sjúklingar í vanligum týdningi.

Tendensurin er og vil tí vera, at barnakonurnar, har ongin ljósmamma

er á staðnum, í góðari tíð verða bidnar um at leita sær til sjúkrahúsið, har tær so verða at ganga yrkisleysar í fleiri vikur.

Her er tað okkara avgjørda metan, at barnakonan hevur best av at vera virksom og ferðast í tí heimligu miljønum longst møguligt. Hetta avleiðir hennara tankar frá tí fyristandandi og ger hana fysisk og psykisk sterka.

Oftani er tað eisini tvørligt hjá mammuni at vera so leingi heimanifrá hinum børnum sínum, ið, sum vitaligt er, eru í einum aldri, har neyðugt fer við støðugari eftirsavn.

Úrslitið verður ofta, at mamman tekur minsta barnið við sær, og verður hon soleiðis sjálv onnur at leggja seg inn á fremmand, nakað hon sjálvsagt heldur ikki er all ov glað fyri.

Við at gjøgnumganga tað taltilfar, sum álitið byggir sínar økonomisku berokningar á, so halda vit okkum duga at síggja, at hvat tí figgjarligu síðuni viðvíkur, so verður ikki talan um nakra sparan sæð út frá einum samfelagsligum heildarsjónarmiði heldur hinvegin. Soleiðis vilja vit seta eitt stórt spurnaðarlekin við, at tað vil føra við sær ein bíliggeran, at lata læknan yvirtaka ein part av teimum funktiónum, sum ljósmøðurnar nú hava, og at byggja og reka hóskandi íbúðir til barnakonurnar á teimum plássum har sjúkrahúsini liggja verður heldur ikki nakar smápengi.

At rokna við færri ljósmøðrum eftir nýskipanini er heldur ikki realistiskt, tí so vítt felagið dugir at meta, so kemur skitseraða nýskipanin at krevja sama tal av ljósmøðrum, sum vit hava ídag, nevniliga fimtan, og eru tá barnakonurnar tiknar sum heild verri fyri hvat persónligum umhyggni viðvikur enn eftir galdandi skipan. Eisini er tað órealistiskt at rokna við minni enn kr. 60.000,- um árið pr. ljósmamnu, og gevur aleina hetta eina tvífaldan av roknistykkinum á s. 81 í álitinum.

Hvørvitt ein skipan nú kostar nakrar túsund krónur meira ella minni er tó eftir okkara áskoðan ikki avgerandi, tí her er talan um eina samfelagsliga servicefunktión, ið eigur at vera skipað á best møguligan háttur.

Samantikið halda vit tó, at nýskipanin er ov lítið umhyggin við tí menniskjaliga momentinum og tí eitt ivasamt framstig fyri barnakonurnar í mun til galdandi skipan.

Okkum kunnugt so er hetta eisini beint hvørturímóti teimum tonkum, ið annars valda í dag, nevniliga tað at gera meira burtur úr tí einstaka.

At skipanin hóskar belur til «systemið» enn galdandi skipan, duga vit tó væl at síggja.

Niðurløga okkara er, at felagið til eina og hvørja tíð vil medvirka positivt til at finna fram til eina skipan á hesum økjum, ið tænir tí einstaka

og samfelagnum best, bert halda vit ikki at fyriliggjandi álitlið er nóg umhyggið í sini viðgerð av málinum.

Vit fara at enda við at gera vart við, at tað eru upplýsingar í álitinum, ið eru beinleiðis skeivir soleiðis upplýsningurin á s. 70 um at starvið í Funningi varð niðurlagt, tí eingin umsøkjari lekst.

Við hávirðing

Føroya Ljósmøðrafelag
Ingibjørg Rasmussen
formaður.

Av brævi okkara er viðlagt 50 eintøk.

ÁLIT

viðv.

Kommunulæknaskipanini o. ø. m. í Føroyum

Greitt úr hondum hevur nevndin, sum landsstýrið setti hin 3. juli 1972.

I. bólkur

Arbeiði nevndarinnar.

Í skrivi dagfest hin 3. juli 1972, F.L. j. nr. 912-7-15, segði landsstýrið frá, at tað hevði sett nevnd til at kanna og seta fram uppskot til eina nýggja kommunulæknaskipan.

Skilað varð til, at uppgáva nevndarinnar var: «at hugsa um eina umskipan av læknadømunum, at koma við eini útgreinan av, hvussu leiðis ein samskipan best kann gerast millum læknadømini, at umhugsa bústaðar-, viðtaluviðurskifti og í hesum sambandi eisini at koma við uppskoti um eina samvirkan millum kommunulæknar, sjúkrahúsini og eisini heilsusystrarnar. -- Alt samantikið, at seta fram uppskot um eina læknaskipan, ið hóskar til nútíðar og framtíðar krøv!»

Nevndir av landsstýrinum í nevndina vórðu hesi fólk:

1. H. D. Joensen, landslækni, dr. med.,
2. fyri landsstýrið, J. Djurhuus, skrivstovustjóri,
3. fyri ríkisumboðið, A. J. Arnskov, skrivstovustjóri,
4. John Poulsen, kommunuformaður, Vatnsoyrar,
5. Gurli Restorff, sjúkrasystur, Tórshavn,
6. Sverri Midjord, sjúkrakassaformaður, Tvøroyri,
7. Sigvald Kristiansen, lækni, Skáli,
8. B. Klinte, fulltrúi, skrivari hjá nevndini (síðani hann fór Jørgen Varder, fulltrúi).

Landslæknin kallaði limirnar saman, og nevndin valdi á fyrsta fundi landslæknan til formann, og hevur hon hildið 5 fundir, hin fyrsta hin 15. august 1972, hin seinasta hin 9. november 1973.

Setningin, sum landsstýrið hevur sett nevndini, hevur hon roynt at útinna, men hevur hildið, at umframt eina nýskipan av kommunulæknaviðurskiftunum og eina ný- og samskipan av heimasjúkra-, skúla- og smábarnaheilsusystrunum átti hon eisini at taka upp á seg uppskot til nýskipan av deildarljósmóðurviðurskiftunum í Føroyum.

Nevndin var í fyrstuni eisini samd um, at hon — hóast landsstýrið ikki hevði sett henni henda setning — skuldi royna at koma við einum uppskoti um nýskipan av sjúkrakassaviðurskiftunum, so tey meira komu at verða ein sjúkratrygging heinleiðis undir landinum, so limagjøld til sjúkrakassarnar duttu burtur, og útreiðslurnar vóru bornar saman við øðrum almennum útreiðslum av landsskattinum (og møguligari lutvísari afturrindan frá ríkinum). Men hóast ein meiriluti av nevndini framvegis heldur hetta vera beinastu mannagongdina, hevur hon havt seg undan at koma við uppskoti til hetta nú. Atvoldirnar eru fleiri. Í fyrsta lagi vildi nevndin sum skjótast sleppa fólki undan óttanum fyri nýggjum sáttmálaloysi sjúkrakassa og lækna millum. Formansskapurin í Meginfelag Sjúkrakassa Føroya hevur upp á fyrispurning sagt landslæknanum frá, at har eru eingi trætumál partanna millum, sum fyrsta árið ella kanska árini kunnu koma at bera nýtt sáttmálaloysi við sær. Í øðrum lagi metir nevndin tað vera skeivt samstundis við teimum trimum viðgjørdu størru málunum at fløkja viðgerðina við nýggjum tryggingar- og gjaldsreglum. Og hetta ikki minst, tí at tað er royndur lutur, at yrkisfeløgini — ið hvussu er hitt sterka, danska læknameginfelagið (Den alm. danske lægeforening) — eigur vald til at tarna ella beinleiðis forða fyri eini skipan, sum teir eru ímóti (steingja størvini, sýta fyri lýsing av nýggjum størvum). Seinast má verða lagt aftrat, at fyrireikingarnar til slíkt sjúkratryggingarmál verða eitt stórt arbeiði, og annaðhvørt má heilt nýggj nevnd setast við hesum setningi, ella má núsitandi nevndin økjast við limum, sum umboða allar teir partar, sum ein sjúkratrygging fevnir um, og tá serliga vandar fyrisitingar- og umboðsmenn frá sjúkrakassunum, sum kenna allar trupulleikarnar og duga at meta út í ætlir um øll komandi krøv.

Í mong ár hevur verið heilt nyttuleyst at koma við uppskoti um nakra broyting um núgaldandi læknaskipan, av tí at læknar fingust ikki, tí at so stórt læknamanglandskot var alla staðni. Vend er komin í nú — so stór vend, at meginfelag danska lækna í løtuni fæst við at seta á stovn trygging fyri arbeiðsleysar læknar. Løtan er tí nú komin til at royna at seta í gildi eina skilagóða læknaskipan her í Føroyum. Og av tí at hæði sjúkrasystrar, heilsusystrar og ljósmøður sum fyritreyt hava eina hampuliga læknaskipan, hevur landslæknin eisini mett tað nyttuleyst at koma við uppskotum um tær áðrenn skil var fingið á læknaviðurskiftini. Kortini eigur her at verða lagt aftrat, at hitt almenna má verða varið við ikki at bjóða læknunum vámalig kor, tí nevnda læknatrygging miðar sjálvandi eisini ímóti, at stættin skal ikki komandi ár koma fyri at verða undirgoldin.

Hóast sjúkrahúsverkið í Føroyum nú er um at vera liðugt — eisini tá ið hugsað verður um sinnissjúk og ófullfør — er einki yvir at dylja, at nógvum øðrum pørtum av føroyska heilsuverkinum (eitt nú sjúkrahús-

lógin, har sum kunnugt serlig nevnd situr og arbeiðir við uppskoti um nýggja sjúkrahúslóggávu, apotekini — har viðurskiftini onguntíð, síðan landið við løgtingslóg frá 28. mars 1949 tók yvir hendi stovn, er farin fram nøkur rættulig endurskoðan av lógarreglunum, tíðarhóskandi til føroysk viðurskifti —, serlæknaspurningurin, tannlæknaviðurskiftini o.s.fr.) tørvar viðgerð, áðrenn ov langt um líður. Men nevndin hevur ikki vilja fløkt setning sín við hesum vandamálum, áðrenn støðið - kommunulæknaskipanin, sum, tá ið saman um kemur, øll sjúklingaviðgerð byggir á, og sjúkrasystra- og ljósmóðurviðurskiftini — er greitt. Álitið nemur tí bara, har tað er neyðugt, við viðurskiftini á sjúkrahúsunum.

Tó skal verða nevnt sjálvt landslæknaembætið, sum nógvir kommunulæknar halda í tí dagliga átti at havt meira samstarv við teir enn eftir galdandi donskum reglum, av tí at øll læknaskipanin her í Føroyum í roynd vikur nógv frá tí donsku, har at siga øll sjúklingaviðgerð uttan fyri sjúkralús byggir á privat praksis. A. J. Arnskov, skrivstovustjóri á ríkisumboðnum, hevur á nevndarfundi lagt fram stutt álit, har hann greiðir frá sjónarmiðum sínum í so máta framtíðini viðvíkjandi. Hetta álit er ikki við sum fylgiskjal í hesum nevndaráliti, tí at nevndin metir hesar spurningar krevja sera gjølliga viðgerð. Í hesum sambandi skal verða nevnd, at í Danmørk er komin í gildi «lov nr. 381 af 13. juni 1973 om embedslægeinstitutioner m.v.», og er henda lóg við skrivi frá ríkisumboðnum, dagf. hin 6. september 1973 (j. nr. R.F. 31-10-55/73) send landsstýrinum til ummælis við teirri viðmerking, «at det af loven omhandlede område er omfattet af kommissariet for det af landsstyret nedsatte «Nevndin viðvíkjandi kommunulæknaskipanini v.m. í Føroyum».»

Nevndin hevur ikki hildið seg til at viðgera hetta mál, og lændslæknin mælir frá, at hon fer undir tað nú. Heldur skjýtur hann upp, at stoðgað verður eini 1-2 ár, til royndir eru gjørdar í Danmørk við hesi lóg, og at hann tá — kanska á eini embætisferð til Danmarkar — vitjar teir av hesum stovnum, har umstøðurnar mest líkjast okkara, og at hann so — kanska í eini nevnd — greiðir frá royndunum og leggur fram eitt uppskot hóskandi til føroysk viðurskifti.

Eisini skal verða nevnt, at ríkisumboðið í skrivi, dagf. hin 6. september 1973, hevur gjørt nevndini kunnugt, at tað fyri landsstýrið sama dag hevur lagt til ummælis «lov nr. 409 af 13. juni 1973 om sundhedsplejerskeordninger» (R.F. j. nr. 30-10-58/1973) og «lov nr. 408 af 13. juni 1973 om hjemmesygeplejersker» (R.F. j. nr. 40-61-73) við teirri viðmerking, at ríkisumboðnum tykjast hesir spurningar at verða viðgjørdir í hesum nevndaráliti.

Nevndin hevur roynt at loysa setning sín sæddan við føroyskum eygum, at laga seg eftir føroyskum fyritreytum og viðurskiftum og ikki ganga vanabundnar leiðir, men tó kortini í øllum førum at miða seg eftir tí, sum

vist seg hevur gjørligt á teimum ymisku økjunum í grannalondum okkara.

Hon hevur ikki viljað sett fram uppskot um heilt staðbundin viðurskifti, t.d. lækuaviðtalur og viðtaluhøli úti á smábygdum og -oyggjum, tí at tílíkir spurningar helst og beinast eiga at verða greiddir í tingingum við tey einstøku bygdaráðini.

At enda skal vart verða gjørt við, at nevndin í áliti sínum skjýtur upp nakrar smærri avgreiðslunevndir og mælir til, at tær verða settar, so skjótt sum til ber, so málini ikki koma í drag. Hesar nevndir kunnu eisini fáa í uppdrag at ansa eftir, at tey heilsuverndarligu eftirlitini umskarast ikki so nógv, sum tey gera eftir galdandi donskum reglum, og tí gera alla skipanina ov dýra (t.d. kanningar av børnum í vøggustovum, barnagørðum ella forskúlum hjá einum lækna — og um somu tíð hjá øðrum lækna sama kanning av sama barni, og hitt almenna skal gjalda fyri báðar).

Tórshavn, 12. november 1973.

A. J. Arnskov formaður **Johan Djurhuus** **H. D. Joensen** **Sigvald Kristiansen**

Sverri Midjord **John Poulsen** **Gurli Restorff**

Jørgen Varder

II. bólkur

1. KOMMUNULÆKNASKIPANIN, sum hon er í løtuni

Hvussu kommunulæknaskipanin í Føroyum er komin í og hevur tikið seg fram, skal hetta álit ikki verða longt við, men víst skal verða til TRAP DANMARK, 5. udg., Færøerne, Kbhvn. 1968, bls. 136-138 (fylgiskjal 1).

Tá ið í eitt vist tal av fólki í Klaksvík og á Tvøroyri — ið enn hava yvirlæknarnar á sjúkrahúsunum har til sjúkrakassalækna — eru Trá, byggir øll sjúkraviðgerð — uttan fyri sjúkrahús og serlæknar — á **kommunulæknarnar.**

Teir verða settir av ríkisumboðnum eftir almennari lýsing í læknatíðarriti, aftan á at kommununar í læknadømunum og landslækniu hava havt umsóknina til umnælis. Teir verða løntir av tí almenna við einari fastari løn (h. 1. apr. 1973 o.l. 38.000 kr. um árið), og ber víkið helvtina, landið og kommununar hvør sín fjórðing av føstu lønini. Teir eru ikki eftirløntir av tí almenna, men tryggja seg sjálvar í eftirlønarkassanum hjá «Den almindelige danske Lægeforening», sum teir allir eru limir í, og sum «Lægekredsforeningen for Færøerne (Kredsforening 16)», sum her verður nevnt Læknafelag Føroya, er ein bólkur av, t.e. eitt reint danskt yrkisfelag. Limagjald o.a. verður eftir postkravi goldið beinleiðis til Danmarkar og umboðsmenn sendir til fundar og tingingar í Danmark.

Kommunulæknin hevur ókeypis hús og viðtaluhøli frá kommununum, eitt vist brennievnsgjald (sum í løtuni kortini lítið skil tykist at vera í, og sum í mest lagi man vera 600 kr.), og øll stoð uttan fyri Havnina ókeypis amboð og tól, eisini frá kommununum. Flutningsútreiðslurnar til starvið (higartil eru læknarnir at siga altíð komnir uttanífrá) og eftir ávísum áramáli eisini úr Føroyum verða í løtuni endurgoldnar læknunum sbr. rokning, tó ikki upp um ímiligt mark.

Fyri starv teirra er í gildi «Kommunelægeinstruks for Færøerne» frá 12. juli 1962 (fylgiskjal 2), og teirra og kommununa millum eigur í hvørjum føri at verða gjørdur sáttmáli, «Standardkontrakt for kommunelæger på Færøerne», upprunaliga eisini gjørdur í 1962 (fylgiskjal 3). Eftir hesum sáttmála hava kommunulæknarnir rætt til summarfrí í 1 mánaða, og seinru árini hevur tað almenna altíð goldið fasta mánaðarløn (1 mun til føstu løn læknans) til tann, ið rókir starvið fyri hann, eins og ferðatreiðslurnar til lækna uttanífrá verða goldnar. Tó

røkir av og á grannalæknin starvið í fritíðini, men verður slíkt eykastarv oftast illa dámt av grannalæknunum, ið allir, sum er, altíð hava ivaleyst at gera í egna læknadømi teirra.

Við hesum rættindum røkja allir kommunulæknar vanligt læknastarv við viðtalum og hjúkravitjanum, og gjøldunum viðvíkjandi er í løtuni galdandi sáttmáli frá 8. august 1970 («Overenskomst mellem Meginfelag Sjúkrakassa Føroya og Læknafelag Føroya (t.e. Kredsforening nr. 16)) (fylgiskjal 4), har gjøldini eru tey somu sum í Danmark eftir «Den danske landsoverenskomst» + 20%. Hesin frádráttur er ætlaður at viga upp ímóti frammanfyri nevndu fyrimunum, sum læknar í Danmark ikki hava (hvørki fasta løn, hús, viðtaluhøli, brenniendurgjald ella amboð).

Allir kommunulæknar røkja umframt tær heilsuverndarligu kanningarnar av barnakonum, pinku- og smábørnum eftir somu reglum sum í Danmark og fyri heilt somu gjøld sum í Danmark. Uttan fyri Havnina eru flestu kommunulæknar eisini skúlalæknar fyri sama gjald fyri hvørt kannað barn (ella beinari fólk) sum í Danmark.

Aftrat tí, sum her er nevnt, koma so inntøkur frá fólki heilt uttan fyri sjúkrakassarnar, tann parturin av rokningini, sum sjúkrakassin ikki letur aftur av rokningum til B-limir, viðgerð av kynsjúkum og fyri kanningar og váttanir av ymiskum slag, sum eykagjald verður latið fyri (koyrikort, váttanir viðvíkjandi avlamisrentu, vanlukkutilburðum, kanningar og váttanir til løgregluna, váttanir, tá ið fólk skal selast í ymisk størv, og fyri koppingar uttan fyri galdandi lóggávu, har tað almenna einki letur, kanningar av skipsmonnum til Grønlands og aðrar skipsmannakanningar, viðgerð av føroyskum og fremmandum fiskimonnum o.t.). Einstakir kunnu aftrat hava okkurt eykastarv (vøggustovu, barnagarð, hvíldar- ella og/ella røktingarheim, undirvising o.t.). Men hesi allarseinast nevndu eykastørv hava ongan týdning, tá ið metast skal um eina heildarskipan fyri alt landið, eins og tað er at siga ógjørligt hjá nevndini at bera fram áltandi føl um, hvussu nógv ið hesar inntøkur muna í teimum ymisku læknadømunum. Tó má sjálvandi longu nú gerast vart við, at hesar inntøkur kunnu falla ógvuliga ymiskt ymsastaðni í læknadømunum.

Aftan á ta stórbroyting í lønarviðurskiftum kommunulækna, ið landsstýrið legði fyri løgtingið í setuni 1960 (Lgt.hls.49), og sum varð samtykt og stendur í áðurnevnda sáttmála, § 3 (fylgiskjal 3), har árslønin upp á 6.000 kr. lagar seg eftir prístalinum «efter reglerne for statens honorarer», tí nýggja sjúkrakassasáttmálanum frá 1970 og eykainntøkunum frá barnakonu-, pinku- og smábarnakanningunum, munnu kommunulæknarnir yvirhøvur vera samdir um, at teir lønarliga hava góð, ja stak góð kor. Tað, sum at siga allir kommunulæknar — eins og

allir yngri læknar nú á døgum — fram um alt annað ynskja eftir, er ein meira reglulig arbeiðstíð og ein føst vaktarskipan, sum veitir teimum eins og øðrum samfelagsborgarum meira regluliga frítíð til hvíld, húslív, likindi til at fáast við onnur áhugamál og til at lesa, so at teir vera førir fyri at fylgja við í ollum ti uýggja, sum kemur á arbeiðsøki teirra. Teir allarflestu halda, at inntøkurnar eru so góðar, at tær tola væl at verða javnaðar út á fleiri læknar, bara meginreglan um fasta løn, hús, viðtaluhøli og amboð verður varðveitt.

Læknadømini í Føroyum eru í dag, sum 1. talva sýnir. Her eru 15 kommunulæknar (síðani 1961 eru 16 størv játtað, men annað starvið í Vági aldri sett), sum — tá ið í mesta lagi 1000 sjúkrakassalimir, sum læknarnir á sjúkrahúsunum í Klaksvík og á Tvøroyri røkja umframt sjúkrahúsarbeiði — røkja alla sjúkraviðgerð uttan fyri sjúkrahúsini. Samsvarandi «Frágreiðing og yvirlit 1972» frá Meginfelag Sjúkrakassa Føroya vóru 31.12.1972 sjúkrakassalimirnir í Føroyum tilsamans 26.274, og Landsfólkayvirlitið setir fólkatalið sama dag at vera 39.162, t.e. 1,5 fólk upp á hvønn lim. Í meðal hevur ti hvør kommunulækni í løtuni (39.162 ÷ 1.500): 15 = 2.510 fólk at røkja. Men sum tað sæst av 1. talvu, eru tølini sera ymisk í teimum ymisku læknadømunum, minsta talið hevur Sandoyarlækni við 1645 fólkum og stærsta talið kommunulæknarnir í Havn við 3120 fólkum upp á hvønn lækna. Læknarnir í Runavíkar, Vága og Suðuroyar syðra læknadømi hava út við 2600 fólk hvør, kommunulæknarnir í Klaksvík út við 2400 fólk hvør, læknarnir í Fuglafirði, á Skála, í Vestmanna og kommunulæknin á Tvøroyri 2100-2300 fólk og Eiðislækni út við 2000, men her er at hava í huga, at dømini eru ómetaliga ymisk at røkja. Læknarnir, einamest í Havn, Runavík og í Vágum, sita høgliga fyri og hava stutt at fara, meðan einamest læknarnir á Eiði, í Klaksvík og suðuri í Vági hava vitt um at fara, viðhvørt sjúkraferðir, ið taka kunnu heilan og hálvan dag.

Seinnu árini hevur eydnast læknunum at fáa í lag eina tolulíga vaktarskipan, eisini uttan fyri Havnina, í samstarvi við grannalæknarnar (og á Tvøroyri og í Klaksvík við sjúkrahúslæknarnar), tá ið øll støvv eru manuað. Hetta hevur eydnast umframt í Klaksvík og á Tvøroyri eisini í Runavík, í Fuglafirði og á Skála, og fyri ein part í Sandoynni í samstarvi við Havnarlæknar, men ikki á Eiði, í Vestmanna, í Vágunu og suðuri í Vági. Har eru arbeiðsbyrðurnar ti eisini av hesi orsøk alt ov tungar.

Ikki kann tað metast ov høgt, at ein dugandi lækni fæst at støðast í einum kommunulæknastarvi. Hann lærir so við og við alt fólkið, sjúkur og brek teirra og øll viðurskifti í læknadøminum (her er ikki minst at hugsa um almenn heilsuviðurskifti og heilsumeyndarspurningar) at kenna og tekur kanska við góðu útbúgving sini upp á seg ymisk almenn

áhugamál, sum eingin annar er at røkja ella vil røkja. Fleiri læknar í smærri økjum høvdu givið teimum nógv betri tíð og umstøður, eisini til heilsuverndarligt arbeiði, sum liggur nógvaslaðni meira og minni á láni, og har nógv kundi verið gjørt til bata viða hvar í landinum (sbr. nýggju heilsusamtyktirnar).

Tað gerst ikki upp í tølum tað, sum í mangar mátar hevur ligið á láni og er farið fyri skeyti, og tað, ið tað hevur kostað tí almenna (serliga sjúkrakøssum) í útreiðslum, at skiftandi lækuar eru komnir og eru farnir eftir stuttari tíð og fyri lað, sum teir peningaliga hava vunnið eitt skifti her á landi, hava keypt sær ein læknapraksis ella sett seg niður aðrastaðni.

Við øllum hesum í huga og til at útvega kommununlæknunum trygg og sømilig arbeiðskor og hóskandi inntøkur (samanborið við tey lond, teir annars við úthúgving síni kundu leitað til), so teir fáast at støðast, hevur nevndin roynt at finna fram til eina nýggja skipan av kommunulæknadømunum, so hvør lækni fær eitt hóskandi tal av fólki at røkja. Hetta talið av fólki upp á hvønn lækna heldur nevndin fyri viðurskiftini í Føroyum, tá ið bugsað verður um búseting og samferðslulíkindi, eigur at liggja um 1300-1800. Tá eru samstundis havd í huga uppskotini um nýggja ljósmóðurskipan (sí seinri í hesum nevndarálitinum), ið tekur deildarljósmøðurnar av og tí í so máta leggur størri skyldu og ábyrgd á kommunulæknarnar, og eisini um eina heimasjúkrasystraskipan og eina nýggja smábarna- og skúlaheilsusystraskipan, sum fara at krevja eitt støðugt og vælviljandi samstarv frá kommunulæknunum, men sum óivað fer at lætta um hjá teimum í dagliga arbeiðinum. Heilsusystraskipanin hevur sjálvandi til endamál fyrst og fremst eitt betri eftirlit við heilsustandinum hjá børnunum, og heimasjúkrasystraskipanin er ætlað at veita sjúklingum heima við hús eina røkt, sum flestu stað her á landi heilt hevur ligið á lápi, ella sum — har ið hon hevur verið — hevur verið sera ófullfiggjað.

Nevnt kann verða, at talið 1300-1800 eftir okkara viðurskiftum samsvarar hampuliga væl við tey fyrimyndartøl, sum alheimsstovnurin WHO hevur sett fram, hóast tey eru vel lægri. Her í Føroyum eru vit bundnir av uyggjalendinum og samferðslulíkindunum og kunnu tí ikki altíð beinleiðis taka eftir tølum og uppskotum uttanífrá.

Nevndin setir (einmælt) fram hetta

2. UPPSKOT um

tal á kommunulæknum, hvussu stórt til ummáls hvørt kommunulæknadømi eigur at vera, bústað, viðtaluhøli, amboð og hús teirra.

Til uppskot nevndarinnar, sum sæst á 2. talvu og á hjálagda korti, skulu verða gjørdar hesar viðmerkingar:

Norðoya læknadømi: Í Norðoyggjum við u.l. 5500 íbúgvum eru í løtuni 2 javnbjóðis yvirlæknar á sjúkrahúsinum í Klaksvík, sum hava skyldu (men ikki rætt) til sjúkrakassapraksis fyri 250 sjúkrakassalimum hvør úr Klaksvík (tilsamans 750 fólkum). Báðir hava teir hús og viðtaluhøli í húsunum, har teir búgva.

Umframt eru 2 kommunulæknar. Annar hevur hús, hin býr fyribils í starvsfólkahúsunum á sjúkrahúsinum, men báðir hava teir viðtalustovu í hølum, sum kommunan leigar til teirra. Nýggj kommunulæknahús eru í gerð.

Í klaksvík eru u.l. 4500 fólk, úti á bygd tilsamans u.l. 1000 fólk. Fólkatalið í Norðoyggjum er ov stórt og bygdirnar (útoyggjarnar) ov spjaddar, til at 2 kommunulæknar kunnu røkja alt økið til fulnar (hevði verið millum 2600 og 2700 fólk til hvønn, og u.l. 1000 av teimum búgva í tilsamans 14 bygdum, sunnar ógvuliga ringar at koma til). Annar yvirlæknin, sum er serlækni í ortopædi, vil ógvuliga fegin sleppa frá vanligum sjúkrakassapraksis, hin yvirlæknin er nú farin um 60 ár og fer so statt frá um 6-9 ár. Ætlanin er í Klaksvík at byggja ellis- og røktingardeild í sambandi við sjúkrahúsið, eina núlíðarhóskandi deild til fysioterapi umframt aðrar smærri broytingar. Hesi tiltøk saman við fastari vitjan av serlæknum frá Landssjúkrahúsinum fara at gera tað gjørligt har norðuri nógv betri enn higartil at viðgera sjúklingarnar, og ætlanin er, at har norðuri skal viðgerast íð hvussu er ein partur av ortopædisku sjúklingunum í Føroyum.

Mælt verður til, at miðað verður eftir, so skjótt sum tað tiggjarliga er gjørligt, at seta **1 kommunulækna aftrat í Klaksvík,** so alt vanligt praksisarbeiði (uttan í læknaloysi, og tá ið sjúka leikar á) verður loyst frá sjúkrahúsinum. Hvør av teimum 3 kommunulæknunum hevði tá fingið meira enn 1800 sjúklingar. Nýggj kommunulæknahús mugu tá verða bygd. Nevndin skal ikki leggja seg útí, men heldur tað vera umhugsan vert, um teir 3 kommunulæknarnir eiga at kasta saman um eina læknamiðstøð og býta arbeiði og inntøkur sínámillum, ella teir vilja arbeiða hvør sær. Reglurnar mugu gerast samhært sáttmálanum við kommunurnar um viðtalur úti á bygdunum.

Á sjúkrahúsinum eigur longu nú at verða settur 1 hjálparlækni, og

hiu yngri yvirlæknin við serlæknagóðkenning eigur at sleppa undan vanligum sjúkrakassapraksis, men í staðin fyri — um hann vil - fáa umstøður til serlæknapraksis í ortopædi. Í øllum førum má fáast í lag læknanna millum ein hóskandi frítíðar- og vaktarskipan.

Viðvíkjandi **Eysturoynni** er at siga, at í **gamla Eiðis læknadømi** eru u.l. 2000 fólk, og er hetta ikki hara í **slørra lagi**, men er ógvuliga vítt um **at fara**, av tí at í løtuni allar bygdir í Norðstreymoy frá og norðan fyri Hósvík-Saksun og í Norðureysturoy frá og norðan fyri Oyri-Funning, tilsamans 13 bygdir hoyra uppí. Brúgvin um Streym fer sjálvandi at lætta nakað um hetta, men ikki til fullnar, tá ið hugsað verður um bygdatalið, men brúgvin fer - saman við bergholinum frá Norðskála-landinum yvir í Funningsfjørð - at skapa útvegir fyri eini vaktarskipan, ið kundi verið samskipað bæði við læknar á Streymoyarlandinum og sunnanfyri á Eysturoynni. Nevndin hevur hugsað um eina læknamiðstøð um brúgvaleiðina, har 2 læknar kunnu arbeitt saman, men ivast í, at hetta fyri fyrst ið hvussu er er besti vegurin at ganga. Helst man tað vera betri at gera

nýtt kommunulæknastarv í Kollafirði og lata henda nýggja kommunulækna hava undir sær bygdirnar **Kollafjørð, Hósvík, Hvalvík, Saksun, Langasand, Haldórsvík og Tjørnuvík** tilsamans u.l. 1350 fólk. Til henda lækna mugu byggjast nýggj hús og viðtaluhøli, reglur mugu gerast sambært sáttmálanum við kommunurnar um viðtalur á bygd og ein fast vaktarskipan við Vestmanna- og Eiðislækna (og kanska við Havnarlæknar, tá ið á stendur).

Eftir verða tá til **læknan á Eiði** bygdirnar **Oyri, Norðskáli, Svínáir, Ljósá, Eiði, Gjógv og Funningur** við ikki meira enn 1123 fólkum. Nevndin skjýtur tí upp, at bygdirnar Funningsbotnur og Elduvík verða lagdar aftrat, og verða tá í læknadømunum u.l. 1250 fólk. Hesar seinast nevndu bygdir hoyrdu upprunaliga upp í gamla Eiðis læknadømi. Av Eiði verður í framtíðini ikki stórt longri at koyra til hesar bygdir (gjøgnum bergholið) enn av Skála. Á Eiði eru hampuliga góð hús og viðtaluhøli, men reglur mugu gerast sambært sáttmálanum við kommunurnar um viðtalur úti á bygdunum.

Venda vit aftur til Eysturoynna er í løtuni **Skála læknadømi** við bygdunum Selatrað, Morskranes, Strondum, Skála, Skátabotni, Funningsbotni, Elduvík og Gøtunum við tilsamans u.l. 2300 fólkum. Læknin býr á Skála í góðum, nýggjum húsum við viðtaluhøli í. **Í Runavíkar (Nes) læknadømi** eru bygdirnar Æðuvík, Rituvík, Lamba, Nes, Toftir, Runavík (Glyvrar), Søldarfjørður við tilsamans u.l. 2600 fólkum, og býr læknin, sum er, í húsum, sum nýliga eru umbygd og umvæld. Eftir er **Fuglafjarðar læknadømi** við bygdunum Leirvík, Fuglafirði, Hellunum og Oyndarfirði (markið millum Skála og Fuglafjarðar læknadømi er

ikki heilt skilligt orsakað av læknavanunum frá eldri tíð), har tilsamans eru u.o. 2200 fólk. Læknin býr í hampiliga góðum húsum við viðtalubøli í Fuglafirði. Seinru árini hava hesir triggir læknarnir tikið seg saman um vaktarskifti, men eru teir allir á einum máli um, at arbeiðið er tungt, og mæla til 1 lækna aftrat. Sjálvir hava teir hugsað um at gjørt eina læknamiðstøð fyri allar læknarnar onkustaðni um Gøtuleiðina, men nevndin vil halda, at nóg nógv nytta fæst ikki burtur úr slíkum húsum, ti nógv hin tyngri endin í fólkatalinum liggur á sjálvum Skálafjørðinum, har eisini fólkavøksturin í framtíðini ætlast at fara at vera lamn størsti. Haraftrat verður tað ov langt hjá sjúkum og eldri fólki at leita upp eina tilika læknamiðstøð.

Nevndin heldur ti, at ein hóskandi sundurbýting til 4 læknar eigur at fara fram á henda hátt: **Nýtt Fuglafjarðar læknadømi** við bygdunum Leirvik og Fuglafirði (ikki Hellunum) við tilsamans út við 2000 fólk um. Læknin eigur at búgva í Fuglafirði, **har hóskandi** læknahús og viðtalustova eru. Reglur mugu gerast sambært sáttmálanum við Leirvíkar kommunu um viðtalu har í bygdini.

Nýtt Skála læknadømi við bygdunum frá Selatrað til Skálabotn, men harumframt Oyndarfirði og Hellunum, tilsamans u.l. 1760 fólk. Læknin eigur framvegis at búgva á Skála, har nýggj og góð hús eru, men sambært sáttmálanum mugu reglur gerast um fastar viðtalur í hinum bygdunum.

Nýtt Runavíkar læknadømi, har ið tær bygdirnar, ið eftir eru í Gøtu, Runavíkar og Nes kommmunun við tilsamans u.l. 3450 fólkum skulu røkjast av 2 læknum. Ymisk uppskot kunnu her umhugsast, men nevndin metir bestu loysnina vera, at hesir báðir læknar, eins og skotið verður upp fyri Vágoynna, arbeiða saman í eini læknamiðstøð í Runavík til 2 læknar. Tílík læknamiðstøð kundi kanska verið gjørd í teimum núverandi læknahúsunum og annar bústaður verið útvegaður læknunum. Umframt eiga hesir læknar ávísar dagar at hava viðtalur í Gøtu og á Toftum, men nærri reglur um hetta mugu gerast sambært sáttmálanum við kommununar. Reglurnar kunnu sera væl gerast soleiðis, at 1 lækni altíð verður at hitta á miðstøðini, meðan hin er úti í aðrari bygd. Um teir kasta inntøkurnar saman í eitt bólk og býta tær sínámillum ella peningaliga vilja arbeiða hvør sær, má standa læknunum frítt í at velja. Hvar hesir læknarnir eiga at búgva, skal nevndin ikki leggja seg úti, men har kann einki vera til hindurs fyri, at annar teirra býr annaðhvørt í Gøtu ella á Toftum og hin í Runavík.

Læknarnir í Fuglafirði, á Skála og í Runavík mugu gera sínámillum vaktarskipan, har ivaleyst eisini eigur at verða hugsað um læknan norðuri á Eiði, tá ið bergholið er liðugt, so tað kann lætta um vaktarbýtið við læknan í Kollafirði og í Vestmanna.

Verður nýtt Kollafjarðar læknadømi verður eftir til
Vestmanna læknadømi við bygdunum Vestmanna, Váli, Kvívík, Sýkki, Leynum og Skælingi u.l. 1600 ibúgvar. Í Vestmanna eru góð hús við viðtaluhøli. Reglur mugu gerast sambært sáttmálanum um viðtalur úti á bygd, og Vestmannalæknin má sum nevnt hava vaktarskifti ið hvussu er við læknan í Kollafirði. Roynt kann verða, um hann av og á kann hava vaktarskifti við læknarnar í Vágum, men slík skipan hevur ongantíð roynst serliga væl, og tað er eisini dýrt við báti ella ferju yvir um Vestmannasund, so hetta fer valla at bera til uttan í undantaksføri.

Í **Suðurstreymoyar læknadømi** eru viðurskiftini og umstøðurnar sjálvandi øðrvísi, orsakað av at Landssjúkrahúsið við nógvum læknum liggur har. Men eingin av hesum læknum tekur lut í vanligum sjúkrakassapraksis, tó hava stummir av yvirlæknunum privata serlæknapraksis, ætlað sjúklingum úr øllum Føroyum. Eisini er í Havn 1 serlækni í fysimrgi, men hann hevur eisini bara serlæknapraksis. Vanligt læknaarbeiði við viðtalum og vitjanum liggur tí á teimum 4 kommunulæknunum (har tann elsti seinru tíðina privat hevur fingið sær ein «hjálparlækna» ella annanensis). Teir 4 kommunulæknarnir hava allir hús, men bara tann eini býr í kommunulæknahúsum við viðtalustovu í, hinir 3 hava viðtalustovur (2 av teimum í sama húsi), sum kommunan hevur leigað, men búgva teir í egnum húsum og fáa frá kommununi u.l. 9.000 kr. í samsýning til rentur og avdrátt av húsunum, sum teir sjálvir hava bygt ella keypt. Íbúgvaratalið í tí øki, sum kommunulæknarnir í Havn røkja, og sum sjálvandi í allar mátar er nógv tað høgligasta dømi í Føroyum, er tilsamans u.l. 12.600 -- í sjálvari Havnini og Havnar uttanbýggja kommunu u.l. 12.000, restin í bygdunum og oyggjunum, sum taldar verða upp í Suðurstreym. Nevndin vil halda, at í Havn eigur 1 kommunulækni uttan ov mikið stríð at kunna røkja u.l. 2000 fólk, kanska heldur meira, og vil mæla til, at har verða settir, so skjótt sum liggjarvánirnar eru til tess, 2 kommunulæknar aftrat, so talið á kommunulæknum tilsamans verður 6 í Havnini. Nevndin er samd um, at har ikki verður gjørd ein stór læknamiðstøð, har læknarnir starvast saman. Landssjúkrahúsið við øllum hjálparumboðum er so nær í nánd, at lítið stríð er at senda sjúklingar hagar til gjøfligari kanningar. Eisini er skaðastova á Landssjúkrahúsinum. Harafturímóti er gott skil í, at teir 6 læknarnir starvast saman, t.d. tveir og tveir. Reglur mugu gerast sambært sáttmátanum við kommunurnar um viðtalur (fastar) úti á bygd. Tað vaktarskifti, sum verður gjørt millum hesar 6 læknar, má hava Sandslækuan uppií, so hesin læknin kann fáa hóskandi frítíð. Koma tveir læknar aftrat í Havnini, verða umframt viðtaluhølini spurningar um hús til hesar læknar at loysa. Hetta kann annaðhvørt verða gjørt við, at kommunan veitir teimum hús, ella at

teir sjálvir byggja og fáa somu rættindi sum teir 3 læknarnir, ið frammanundan her í Havn hava fingið sær hús sjálvir.

Sandoyar læknadømi kann sjálvandi ikki bera meira enn tann eina læknan, har eru bert 1650 fólk. Teir lættar, sum kona skulu, noyðast tí

sum roynt hevur verið nú í fleiri ár — at fáast í lag við at samskipa vaktarhaldið og aðra fritíð við kommununlæknarnar í Havn. Sjúkrakassin (ella tann sjúkratrygging, sum kemur í staðin fyri sjúkrakassarnar) má ikki leggja tílíkari skipan trupulleikar í vegin. Reglur mugu gerast samtykt sáttmálanum við kommunurnar um fastar viðtalur úti á bygd (serliga í Skúvoy). Læknahúsini á Sandi við viðtalahøli eru ikki góð, og tá ið einaferð verður farið undir nýggj hús, verður nælt til, at hús og viðtalahøli verða løgd hvørt sær.

Vága læknadømi. Sum kunnugt hava seinru árini frá Vágafólki fleiri ferðir verið sendar áheitanir til landsstýrið um at fáa tveir kommunulæknar í Vágum. Fólkatalið har (uppfroknað Mykines, har tað tó er í stórari afturgongd) er u.l. 2600, t.e. í minna lagi til tveir, men alt ov nógv til 1 lækna. Skal arbeiðið har vesturi røkjast á nútíðar hátt, og lagalig fritíð og arbeiðskor tryggjast, verður neyðugt at seta tveir kommunulæknar í Vágum. Læknahúsini í Miðvági eru gomul, og kommununurnar hava í út við 30 ár ferð eftir ferð nýtt nógvan pening til umvælingar og bøtingar, uttan at læknarnir hava verið nøgdir við úrslitið. Nevndin skjýtur upp, at í Miðvági verður gjørd ein læknamiðstøð uttan læknaíbúðir, har tveir læknar kunnu arbeiða saman (kannað eigur at verða, um slík støð kann verða gjørd í gomlu læknahúsunum og rúm, sum toypa av, verða nýtt til annað kommunalt endamál). Umframt í Miðvági eiga læknarnir at hava viðtalur í Sørvági og kanska í Sandavági. Í Sørvági er hampuliga góð viðtalustova, sum hevur verið í nýtslu nú í nógv ár. Hvar ið læknarnir skulu hava fastan bústað, hevur eftir nevndarinnar meting minni at týða, men helst var hóskandi, at annar búði í Miðvági, hin í Sørvági. Teimum eigur at standa í boði annaðhvørt sjálvir at byggja hús (imóti hóskandi árligum endurgjaldi eins og í Havn) ella at fáa hús frá kommununum at búgva í. Teimum má eisini standa frítt í boði at reka arbeiðið í felag og býta vinningin sínámillum ella starvast peningaliga hvør sær.

Í **Suðuroy** hava læknaviðurskiftini allar dagar verið vánalig her verður ikki hugsað um dugnaskap læknanna, men um riuga skipan, og allar royndir, sum gjørdar eru til at bøta um hesi viðurskifti eru misheppnaðar ella heilt steðgaðar av móttvild, viðhvørt beinleiðis andstøðu frá læknunum sjálvum, tørvandi samarbeiðsvilja og vánaligum sam-

arbeiði lækna millum og — so tykist ið hvussu er nevndini skortandi vilja hjá kommununum til at loysa fyrst og fremst húsa- og viðtalu-spurningarnar.

Í gamla **Vágs læknadømi** (her telja vit uppí Hovi, har fólkið er farið bæði norður- og suðureftir) er 1 lækni við u.l. 2570 fólkum. Húsa- og viðtaluviðurskiftini eru stak ring - - ivaleyst nógv tey ringastu í øllum Føroyum og hava verið ein høvuðsatvold til, at læknar so illa hava fingist til Vágs ella til at støðast har. Hetta man vera tann spurningurin í allari nýskipanini, sum krevur loysn fyrst.

Á **Tvøroyri,** sum er miðdepilin í Suðuroyar norðara læknadømi við u.l. 2900 fólkum, hava viðurskiftini leingi verið fløkt. Í løtuni eru á Tvøroyri 1 yvirlækni á sjúkrahúsinum við skyldu, men ikki rætti til at røkja 250 sjúkrakassalimir á Tvøroyri, 1 sjúkrahúslækni við somu skyldu (tilsamans verður hetta 750 fólk) og 1 kommunulækni til restina av fólkinum í norðara lækuadøminum. Seinastu tíðina er alt læknaarbeiði til mikið tarn og nógvan ampa fyri sjúkrahúsið farið fram har, eins og kommunulæknin hevur búð á sjúkrahúsinum, av tí at einki kommunulækuahús er. Ongar viðtalustovur eru í bygdini, eingi kommunulæknahús, men sjúkrahúsið eigur góð hús til yvirlækna og sjúkrahúslækna. Í umbúnað er at byggja læknamiðstøð, har 3 læknar kunnu starvast (eftir núgaldandi skipan bæði yvirlæknin, sjúkrahúslæknin og kommunulæknin), so praksisarbeiðið ikki skal gera sjúkrahúsinum ónáðir. Nevndini kunnugt er einki tiltak gjørt til nýggj kommunulæknahús.

Nevndin skjýtur upp, at í

Suðuroyar norðara læknadømi verða settir 2 kommunulæknar hvørturay, sum røkja skulu alt praksisarbeiðið í norðaru helvt av oynni. Teir koma at fáa u.l. 1450 fólk hvør. Teir eiga at arbeiða á læknamiðsstøðini á Tvøroyri, men teimum má standa í boði, um teir peningatiga vilja arbeiða í felag og býta vinningin ella peningaliga reka praksis hvør sær. Reglur mugu gerast sambært sátlmálanum við kommunurnar um fastar viðtalur úti á bygd, eins og vaktarskipan má verða gjørt, ið hvussu er av og á samskipað við læknarnar í syðru helvt av oynni.

Hóast tað kanska liggur uttan fyri málsøki nevndarinnar, vil hon við teimum royndum, sum nú eru gjørdar í nógv ár, í huga, mæla til, at á Suðuroyar sjúkrahúsi verður bara 1 yvirlækni, og at hann aftrat sær fær ein hjálparlækna. Hesir báðir læknar hava undir sær sjúkrahúsið (og komandi ellis- og røktingardeildina) hvørturay, men taka ikki lut í vanligum praksisarbeiði, heldur ikki í vaktarskiftinum (uttan í læknaloysi og, tá ið sjúka leikur á). Yvirlæknin kann, um hann er serlækni, hava serlæknapraksis, um hann vil og fær loyvi til tess frá sjúkrahússtýrinum, men alt vanligt praksisarbeiði eigur at liggja á kom-

munulæknunum, eisini vaktarskifti, men teimum eigur at verða loyvt (við hóskandi fastari vakt aftanfyri), um teir semjast um tað, at gera samskipan fyri alla oynna viðvíkjandi náttarvakt og aðrari frítíð.
Suðuroyar sunnara læknadømi. Í Vági eigur at verða gjørd ein læknamiðstøð við 2 kommunulæknum, sum tá fáa u.l. 1285 fólk í part. Hetta er ikki nakað stórt tal, men tað gerst ikki øðrvísi, og eisini fyri teir mugu gerast reglur sambært sáttmálanum við kommunurnar um viðtalur úti á bygdunum. Báðir eiga teir at búgva í Vági. Vaktarskipan verður sum í norðaru helvt av oynni, og er tað gjørligt, verða báðar helvtir samskipaðar.

3. UPPSKOT um
hús, viðtaluhøli lækna og amboð

Í viðmerkingunum til nýskipanina eru eisini havdar á lofti hesar umstøður í hvørjum læknadømi sær, men skulu tær her verða gjøllari viðgjørdar.

A. Sethúsini

Allar royndir, sum læknar, ið sitið hava nøkur ár, hava gjørt, benda á tað borð, at eftirynskjandi er, at læknin ikki býr og starvast í sonn húsum. Í fyrsta lagi er hetta sæð úr einum læknasjónarmiði - ein stórur fyrimunur hjá læknanum, tí hann verður tá ikki so illa órógvaður av smáørindum, tá ið hann hevur frí (men má sjálvandi altíð vera at hitta ella kunna boðsendast, tá ið hann hevur vakt). Men í øðrum lagi er hetta ein fyrimunur hjá tí almenna, ti lyndið hjá læknum, sum ætla sær at vera í somu bygd með alla ella eitt langt áraskeið, tykist vera sjálvir at vitja eiga hús síni. At byggja sær eini hús við viðtaluhølum í er ov dýrt, tey verða ring at sleppa av við til næsta mann í starvinum, og skuldi læknin fallið frá ella doyð, hevði einkjan sitið illa eftir við stórum tapi. Verður meginreglan um, at kommunurnar í læknadømunum skulu útvega kommunulæknahús, uppihildin — og hetta mælir nevndin til framvegis verður rein kommunal uppgáva — eru tveir vegir at ganga:

1) annaðhvørt leiga ella byggja kommunurnar kommunulæknum hús,
2) ella veitir teimum læknum, sum sjálvir vilja byggja, ein árligan studning (eins og gjørt hevur verið í Havn).

Er grundstykkið tøkt, metir nevndin (eftir samráðing við lánistovnar) eini hóskandi sethús í dag at kosta u.l. 200.000 kr. Sparikassalán skal rindast aftur eftir 20 árum, lán frá hinum lánistovnunum eftir 15 árum. Fyrsta árið verða tí útreiðslurnar til avdrátt og rentur u.l. 3.000 kr. um mánaðin ella 36.000 kr. um árið. Nevndin vil halda, at tuka

kommununnar fyrru loysnina (kommununar byggja sjálvar hús), er einki læknadømi, har hetta verður kommununum ov tung byrða í dag. (Men tað kundi helst verið kommununum til stóra hjálp, bóðu tær um tað, at landsstýrið hjálpti teimum at fáa lánini í lag og kanska, um neyðugt, veðhelt fyri lánunum. Slíkt veðhald verður kortini ikki mett at vera neyðugt). Eru fleiri kommunulæknar í somu bygd, verður **mælt frá, at teir búgva í somu húsum.** Eru kommunulæknar, sum ynskja seinru loysnina (at teir sjálvir byggja hús, tykist skipanin í Havn nevndini vera skilagóð mannagongd, sum báðir partar standa seg við. Studningurin er í løtuni upp á u.l. 9.000 kr. árliga. Men nevndin skal ikki beinleiðis leggja seg út í hetta reint kommunala spurning.

Vart verður gjørt við, at tænastumenn, hava teir hús frá ti almenna, gjalda hóskandi húsaleigu, men nú á døgum ikki taka lut í umsitingini, hvørki innan ella uttan.

Tørvurin á sethúsum aftrat verður eftir uýggju kommunulæknaskipanini sum víst á 3. talvu. Útreiðslur til grundstykki eru ikki taldar uppí, tí væl er lugsandi, at summar kommunur longu eiga hóskandi lendi.

Mest átroðkandi er — sum longu nevnt frammanfyri — sethúsaspurningurin **suðuri í Vági.** Spurningurin um nýggj sethús til 2 læknar eigur at verða avgreiddur onganlíð ov skjótt, og ber hetta fyrsta árið við sær eina útreiðslu til kommununar í Suðuroyar syðra læknadømi uppá 72.000 kr., um so er, at ikki annar ella báðir Læknar sjálvir vilja útvega sær hús, tí tá verða útreiðslurnar bara ávikavist u.l. 45.000 kr. ella u.l. 18.000 kr. um árið.

Um sethúsaspurningin **á Tvøroyri** er tað sama at siga, eisini **í Vágum, í Havn og í Runavík.**

í Kollafirði eru eingi læknahús. Útreiðslurnar hjá kommununum verða tí har fyrsta árið annaðhvørt u.l. 36.000 kr. (kommunan eigur húsini) ella u.l. 9.000 kr. (læknin eigur sjálvur húsini, sum kortini er rættiliga óhugsandi í so nýggjum og litlum læknadømi).

í Klaksvík er tað sama at siga um 3. sethúsini.

Eingi nýggj hús eru fyribils neyðug **á Sandi** (men tey núverandi eru sum áður nevnt vánalig), **í Vestmanna, á Eiði, á Skála** og **í Fuglafirði.**

B. Læknamiðstøðir og/ella viðtaluhøli

Nevndin metir tað vera av týdningi, at landsumsitingin (men ikki ríkið, tí at slík skipan er heilt frembmand **í Danmark**) er uppi í ráðleggingunum og gjaldinum av hesum húsum. Ikki bara til at lætta um hjá kommununum, men fyrst og fremst til at forða fyri, at peningurin verður bundin í oyðslusom uppskot. Ølt uppskot um og tekningar til

tílik áttu ti (eins og aðrar studningsumsóknir) at verið løgd fyri landsstýrið, sum fekk sær ummæli frá landslæknanum (og kanska frá læknafelagnum), áðrenn studningur varð veittur. Hvussu stórur tílikur studningur eigur at vera, er politisk metan, men skjýtur nevndin upp, at landið letur helvtina.

Hjáløgd er tekning til eina læknamiðstøð lil 2 læknar og meting av byggikostnaðinum, gjørt av Carlo Odgård arkitekti, Ålborg (lylgiskjøl 5). Men nevndin mælir tó til sum eina nógv ódýrari loysu at royna at nýta tey læknahús, sum eru runt á bygdunum, har tað er gjørligt, við at byggja tey um, so tey ikki vera hústaðir, men arbeiðsstaðir hjá 2-3 læknum.

Tørvin á tílíkum húsum metir nevndin solciðis (sbr. 3. talvu):

Suðuri í Vági eigur beinanvegin at verða gjørd læknamiðstøð, har 2 læknar kunnu starvast. Nevndin heldur, at núverandi læknahús aftan á umvæling og broytingar nøkur ár fram í tíðina munnu vera nýtandi til lítla læknamiðstøð. Ilt er at meta um kostnaðin, men við skili verða 50.000 kr. mettar at røkka langt. Fáa kommununrnar har somu láustreytir frá lánistovnunum sum til sethúsbyggingina (og góð tíkindi til tess tykjast vera), verða rentur og avdráttur u.l. 9.000 kr. fyrsta árið (t.e. 4.500 kr. til kommununrnar og sama upphædd til landið).

Á Tvøroyri er miðstøð við arbeiðshølum til 3 læknar í umbúnað. Hvussu útreiðslurnar skulu rindast, er nevndini ókunnugt (men higartil hevur verið ætlað, at kommununrnar og Suðuroyar sjúkrahús saman skulu bera útreiðslurnar).

í Vágum verður skotið upp, at gomlu læknahúsini verða fyribils nýtt til læknamiðstøð, og útreiðslurnar verða mettar at vera tær somu sum **suðuri í Vági.**

Sama er at siga um viðurskiftini í **Runavík.**

Viðvíkjandi **Norðoya læknadømi** heldur nevndin, at í so stórari bygd sum Klaksvík má bera til hjá **kommununum** fyribils í nøkur ár at leiga viðtaluhøli til 3. kommunulæknan, men teir báðir læknarnir, sum starvast har norðuri í Løtuni, siga seg ógvuliga misnøgdar við tey viðtaluhøli, sum eru leigað teimum. Tí eigur at verða miðað eftir, áðrenn ov langt fráliður, at byggja eina læknamiðstøð í bygdini til 3 læknar. Prísurin í dag uttan innbúgv liggur upp á u.l. 2.800 kr./m² (meting gjørd av Carlo Odgård arkitekti).

í Kollafirði mugu nýggj viðtaluhús byggjast til **1** lækna. Ætlandi kann hetta gerast fyri u.l. 150.000 kr., og 1. árið verða tá ætlandi útreiðslurnar u.l. 27.000 kr. at býta javnt millum kommununrnar og landið.

Eftir er **Suðurstreymoyar læknadømi.** Nevndin mælir (sum áður nevnt) frá, at bygd verður í Havn stór miðstøð til allar læknar (uppskot

hava eisini verið um í slíkari miðstøð at savna tannlæknavirki o.a.). Slík hús verða sera dýr í rakstri, og at byggja dýrar læknamiðstøðir nú í dag tykist ikki nevndini vera væl umhugsað, tí eingin veit í løtuni, hvussu sjóvarfallið viðvíkjandi læknaarbeiði uttan fyri sjúkrahús fer at vera aðrastaðni í Norðurlondum og tí eisini her hjá okkum, skuldu sjúkratrygging og læknatænasta farið ta leið í sambandi við sjúkrahús at gera ambulatoriir. Men hetta er m.a. ein læknapolitiskur spurningur, sum nevndin ikki í hesum viðfangi skal viðgera nærri. — Nevndini er kunnugt, at Álvur av Kák lækni hugsar um at byggja hús sjálvur við sonnu studningstreytum sum hinir kommunulæknarnir í Havn hava. Eink er læknaliga til bindurs fyri, at hann varðveitir viðtalubøli síni í læknahúsunum í Jóannes Paturssonargøtu 22, og at restin av húsunum verða útgjørd til viðtalu hjá 2 læknum aftrat. Mælt verður tí til, at henda loysn verður roynd. Tað, ið av loypir av húsunum, kann nýtast til onnur kommunal endamál, t.d. heilsusystrarnar og heimasjúkrasystrarnar í Havn. Umvælingar og umbyggingar av hesum húsum fara valla upp um 100.000 kr. Útreiðslurnar fyrsta árið verða tá 9.000 kr. í part til kommunur og landið. Mælt verður til, at hinir 3 kommunulæknarnir fyribils starvast, har teir eru í løtuni í hølum, sum kommunan hevur leigað.

Eftir hesum uppskoti verða útreiðslurnar til landið til viðtalubøli lækna — kemur alt í senn — í minsta lagi 36.000 kr. fyrsta árið, men tá eru ikki uppiroyknaðar útreiðslurnar til læknamiðstøðina á Tvøroyri og møguligur leigustudningur til Klaksvíkar.

Viðtalubøli á bygdunum, har læknar ikki búgva, heldur nevndin, sum ligartil má loysast kommunalt í hvørjum einstøkum føri, og ilt er at meta um hesar útreiðslur, áðrenn tingingar hava verið millum kommunur og læknafelag sambært sáttmálanum.

C. Læknaamboðini

Sum áður nevnt hava allir kommunulæknar í Føroyum uttan fyri Havnina meira og minni ókeypis tól og amboð. Hetta hevur, tað nevndin dugir at siggja onga heimild í galdandi reglum og sáttmála, men er gjørt til tess lættari at fáa læknar í størvini tey mongu ár, ið læknar at siga ikki fingust. Landslæknin metir hetta vera eina vánaliga skipan fyri kommununar, tí tað er eyðvitað, at amboðini verða ikki so væl umsitin og handfarin, sum tá ið læknin eigur tey sjálvur. Fleiri dømi eru eisini um, at amboð og tól eru horvin við frammandum læknum, tá ið teir eru farnir úr starvinum eftir eitt stutt skifti.

Nevndin skjýtur upp, at hesin spurningur verður býttur í tvey:

føst og/ella stór amboð, har tað almenna her útreiðslurnar, býttar í helvt millum landið og kommunurnar, og
leys amboð, sum læknin sjálvur eigur at keypa og umsita.

Upp í **føst amboð** verða fyrst at telja neyðugt innbúgv, t.e. borð og stólar í bíðirúminum, skrivaraborð, stólar og hillar í viðtaluhølum, skáp til at goyma amboð í, vekt, glasborð til amboð, kanningarlegur, rustspann við fótajarni og sterilisator (ella lítil autoklava). Har kann heinleiðis verða gjørd ein skrá yvir innbúgv og amboð, ið eiga at vera. Útreiðslurnar til ein lækna kunnu til hetta metast at vera u.l. 23.520 kr., t.e. 11.760 kr. til kommunurnar og sama upphædd til landið.

Øll onnur amboð og tól eigur — skjýtur nevndin upp - - læknin sjálvur at útvega sær og halda, og verður hetta eisini gjørt við tí í huga, at ungir og óroyndir læknar viðhvørt hava mælt kommununum til at keypa amboð og tól, sum mugu sigast at hava verið heilt óneyðug. Útreiðslurnar til leys amboð eru í dag u.l. 17.280 kr. (sbr. fylgiskjal 6). Mint verður í hesum sambandi á, at skattavaldið loyvir læknum frádrátt av øllum amboðum, keypt og liðugt nýtt í árinum, umfram 10% í avskriving um árið av virðinum á varandi amboðum. Haraftrat er loyvt at draga frá útreiðslur til apotekaravørur og umvav, til Statens Seruminstitut fyri koppingarevni o.t., skrivstovuhald, lýsingar, telefon, telegramm, øll læknatíðarrit og helvtina av læknahandhókum, reingerð av viðtaluhølum, hálv gentuløn (upp í 1200 kr.), ljós við 25% og brenni við 40% av allari nýtsín (í læknahésunum, tað seinra við í mesta lagi 1800 kr.) 20% í avskriving av bili og allar útreiðslur til bensin og olju, skatt, tryggiug og umsiting av bilinum, umframt limagjøld til yrkisfeløg.

Nevndin mælir til, at læknarnir í Havn, ið hava nógv tær bestu inntøkurnar, framvegis halda sjálvir allar útreiðslurnar til amboð.

Útreiðslurnar til amboð í viðtaluhølum á bygdum, har læknin ikki býr, verða mettar at vera so smáar, at tað framvegis má verða ein rein kommunal uppgáva. Meginparturin av tí leysa, hann skal nýta á bygd, kann læknin hava við sær hvørja ferð.

Til 3. talvu verða annars tær viðmerkingar at gera, tá ið tølini verða samanborin, at suðuri í Vági, í Vágum og í Runavík eru longu amboð til ein lækna, í Klaksvík til 2 læknar, og eru hesi amboð sjálvandi framvegis nýtandi - - ið hvussu er fyri ein part.

INNTØKUR
kommunulækna og útreiðslurnar hjá tí almenna í løtuni og eftir nýskipanini

Aðrenn støða kann takast til nýskipanina, eru sjálvandi tveir átroðkandi spurningar:
4) Tola **núverandi** inntøkurnar at verða javnaðar út á fleiri læknar, og
5) hvussu stórar verða útreiðslur tess almenna (hjá ríki, landi og kommununum)?

4. **Inntøkurnar**

Við tí heilsuverki, sum í dag er, verður valla nakar sjúklingur beinleiðis vanrøktur, og øll hava — um ikki góðar, so kortini - hampuligar umstøður til at leita upp lækna ella at fáa hann til sín, fá ið tey vegna sjúku ella í øðrum ørindum skulu hitta lækna. Heldur ikki kann tað sigast, at teir heilsuverndarligu setningarnir, ið settir eru læknunum, kunnu røkjast stórt betri, hóast summir hava ringar stundir til tess. Men kortini vísir tað seg altið, at koma fleiri læknar í einum landaøki, vaksa útreiðslurnar, serliga hjá sjúkrakøssum (sjúkratrygging) nakað. Hetta stavar sjálvandi frá tí, at tað verður høgligari at koma í samband við lækna, og at læknarnir fáa betri stundir til hvønn einstakan sjúkling og ikki eru so kvikir at vísa hann frá sær til sjúkrahús ella serlækna fyri brek, sum væl kundu verið viðgjørd, ella til kanningar, sum væl kundu verið gjørdar í viðtaluhølunum á hygd.

Tá ið nevndin nýtir inntøkurnar hjá læknunum í 1972 við 15 kommunulæknum sum grundarlag til at meta um framtíðarinntøkurnar hjá 23 kommunulæknum eftir nýskipanini, má verða havdur í huga hesin ókendi inntøkuvøksturin, sum eingin við vissu kann meta um, hvussu kønur ið hann annars er í hesum spurningum.

Inntøkurnar tilsamans (NB: Hin fasta lønin **ikki** uppíroknað!) hjá øllum 15 kommunulæknunum í 1972 eru at siggja á 4. talvu. Vart verður gjørt við, at inntøkur eru, sum nevndin ikki heldur seg til at meta um við vissu, tí at hon bvørki hevur vent sær til skattavaldið og heldur ikki til privatar stovnar, eitt nú reiðaravirki, viðvíkjandi læknagjøldum fyri kanningar og/ella viðgerð av føroyskum fiskimonnum, heldur ikki til konsulatini viðvíkjandi gjøldum fyri útlendskar sjómenn. Inntøkurnar frá hesum størvum falla sera ymiskliga. Til fyri einum 20 árum síðani vóru tær munandi eykainntøkur, serliga hjá Klaksvíkar- og Vestmannalæknunum, men eru nú — so við og við, sum útlendski fiskiskapurin undir Føroyum er minkaður, og havnarlagið í Havn er batnað so nógv -- ivaleyst í stóran mun falnar meira í lut Havnarlæknum. Hesar inntøkur eru tí als ikki taldar upp í 4. talvu.

Viðvíkjandi «váttanum av ymiskum slag» er annars at siga, at avvarðandi skrivstovur ikki uttan nógv stríð, sum nevndin ikki hevur hildið seg hava heimild til at leggja á tær, kunnu gera fult skil á, hvussu nógvur peningur er farin til serlæknar, og hvussu nógvur til kommunulæknar. Tær ymisku skrivstovurnar hava nett útreiðslur teirra, umframt tær útreiðslur til váttanir, sum fólk sjálvi hava goldið, áðrenn tey lótu váttaninar inn til skrivstovurnar, leysliga — summar ógvuliga leysliga, men hava roynt at seta tær í lægra enn í hægra lagi — at vera:

Fyri kanningar til koyrikort u.l. 45.000 kr. (í 1972 vórðu útflýggjað 2195 kort, men ikki øll krevja nýggja læknaváttan, men upphæddin til kommunulæknar er lágt mett), kanningar av bilstjórum og øðrum, ið vóru bildin at kenna til (útreiðslur til landslæknan eru frádrignar) og aðrar kanningar fyri løgregluna 33.000 kr., váttanir til umsókuir eftir lógini um avlamishjálp av ymiskum slag (sí «Rigsombudsmanden på Færøerne: Årsberetning 1972», 81-87. bls.) og fólkaeftirløn 31.300 kr. (lágt sett), váttanir í vanlukkumálum (mett av tryggingarstjóranum sjálvum) u.l. 20.000 kr., aðrar heilsuváttanir (t.d. tá ið fólk skulu setast í starv ella fara inn á onkran skúla) u.l. 10.000 kr. (mett av landslæknanum, sum kortini hara fær ein part av øllum hesum váttanum til ummælis frá myndugleikunum, so talið er ivaleyst í lægra lagi), koppingar av børnum og vaksnum uttan fyri guldandi lóggávu, goldið í hondina, u.l. 40.000 kr. (leysliga mett av landslæknanum eftir teimum fráboðanum, læknar senda honum við árslok, men av røttum er heilt ógjørligt at meta um hetta tal). Av áður nevndu orsøkum (teimum ikki uppitaldu inntøkunum frá føroyskum og útlendskum skipsmonnum og ávissum í metingini váttanum viðvíkjandi) er talið 180.000 kr. á 4. talvu ætlandi einar 40-50.000 kr. ov lágt. Nevndin sær seg ikki føra fyri at koma tí nærri — men ger eina ferð enn vart við, at hesar óvissu inntøkur falla ógvuliga ymiskt, kunnu í summum kommunulæknadømum, eitt nú á Sandi og á Eiði, vera mestsum ongar, og t.d. í Havn og í Klaksvík rættiliga fittar.

Hvussu stórur tann parturin frá B-sjúkrakassarokningunum er, sum sjúkrakassarnir ikki hava tal fyri í «Frágreiðing og yvirlit 1972» frá Meginfelag Sjúkrakassa Føroya, er ikki gjørligt hjá nevndini at meta um, men hevur hon sett talið fyri allar kommunulæknar tilsamans til 120.000 kr., sum valla er ov høgt.

Øll hini tølini eru úr almennum roknskapum og tí heilt álitandi.

4. talva sýnir so statt, at við nevndu fyrivarnum vóru í 1972 útreiðslurnar til (ella inntøkurnar hjá teimum) allar 15 kommunulæknarnar,

ið nú eru í Føroyum, tilsamans 3.435.575 kr., tá ið hin fasta lønin ikki er tald uppí.

Eftir av fyrra meginspurningi er nú at meta um, um henda upphædd tolir at verða javnað út á tað kommunulæknatal, sum nýskipanin ber við sær, tilsamans 23. Roknað er við, at teir fáa somu føstu løn sum konumunulæknarnir higartil (umframt teir vanligu fyrimunir við húsum, viðtalubølum o.s.fr., sum greitt er frá aðrastaðni í áðitinum). Tílík meting er væl gjørlig eftir fólkatalinum í teimum ymisku komandi læknadømunum, men kortini vil nevndin gera vart við, at sundurbýtingin av fólkinum eftir aldri er heldur ymisk í teimum ymisku landspørtunum, og serliga eina ferð enn minna á, at summar inntøkur vilja falla ógvuliga ymiskt frá læknadømi til læknadømi. Urslitið kann tí bara metast sum leiðbeinandi meðaltøl, ið siggjast á 5. talvu.

Í Suðurstreymoyar læknadømi koma kommunulæknarnir helst ongantíð at røkja skúlalæknaarbeiði. Sum er, røkir landslæknin hetta sum eykastarv, men um hann letur tað frá sær, ella tá ið hann fer frá vegna aldur ella doyr, verður besta loysnin helst tann, at **serlækni í barnasjúkum** fær hetta arbeiði saman við eftirliti av øllum skúlalæknum (tó undir yvireftirliti landslæknans sambært galdandi lóg), aftrat privatpraksis í barnasjúkum og onkrum tilknýti til tey føroysku sjúkrahúsini (sum — enn ið hvussu er eitt áraskeið fram í tíðina — valla einsamøll kunnu bera ein serlækna burturav í barnasjúkum).

Hugsa vit okkum, at læknagjøldini komandi árini verða á leið tey somu sum í løtuni, annaðhvørt núgaldandi sjúkrakassaskipan verður uppihildin, ella ein almenn sjúkratrygging kemur í staðin, so sæst skilliga á 5. talvu, at meðalinntøkan hjá einum kommunulækna, samanborin við meðalinntøkuna hjá øðrum samfelagsborgarum við tolaliga samsvarandi útbúgving, er góð. Og samanborin við meðalinntøkuna hjá praktiserandi læknum í Danmark, sum læknar okkara at siga allir koma frá og fara til, eru teir mismøgdir við viðurskifti okkara, man hon ikki vera lakari, tá ið havdir verða í huga teir framúrhjáfyrimunir, sum føroyskir kommunulæknar hava (við sethúsum, viðtalubølum og amboðum) og við teirri frítíð, sum kemur at standa teimum í boði eftir nýskipanini.

Enntá í smæstu kommunulæknadømunum fer brutto-inntøkan í reiðum peningi at liggja um 150.000 kr. og í Havnini væl omanfyri 200.000 kr. (tí ein munandi partur av teimum inntøkum, sum nevndin annaðhvørt ikki hevur fingið skil á, ella ikki hevur torað at falt uppí, fellur ivaleyst í lut Havnarlækna). At inntøkurnar verða ymiskar heldur nevndin ikki saka, og kann valla vera øðrvísi, utlan so at lítil almenna

veitir læknunum í smæstu læknadømunum eykaviðbøtur. Nevndin heldur seg ikki kunna mæla til slíkt.

5. **Útreiðslurnar hjá tí almenna**

Við útreiðslum hjá tí almenna verður her hugsað um útreiðslurnar hjá kommununum, landi og riki til fastar lønir, sethús, viðtaluhøli og amboð, men **ikki** um studning til sjúkrakassar (ella sjúkratrygging) og heldur ikki um útreiðslur til viðgerð av keynssjúkum og eftirlit við barnakonum, smá- og skúlahørnum, sum allar sjálvandi at siga vera tær somu, annaðhvørt nýskipanin verður sett í gildi ella ikki.

Havt má verða í huga kortini, at longu meðan hetta verður skrivað, eru tær føstu lønirnar hjá kommunulæknum broyttar upp í 40.926,60 kr. árliga og øll almenn gjøld samsvarandi, men lætt er sjálvandi at leggja út fyri hetta, tá ið figgjarlógir skulu gerast.

Útreiðslurnar til **føstu lønina** og vøksturin í hesum útreiðslum — verður øll nýskipanin sett í gildi í senn — siggjast á 5. og serliga 6. talvu. Tilsamans verður tað eitt numandi meirútreiðsla upp á 304.000 kr., har 152.000 kr. eru vøksturin hjá ríkinum og 76.000 kr. í part hjá landi og kommunum.

Meta vit um allar útreiðslurnar hjá tí almenna, sum kommunulæknanýskipanin, **tá ið hon er komin í fult gildi**, fer at bera við sær, við at taka uppí sethús, viðtaluhøli og amboð, siggjast allar hesar útreiðslur á 7. talvu (ið fyri hvørt læknadømi sær má verða borin saman við 5. talvu). Munurin á núverandi og komandi almennu útreiðslunum er so stuttur stórur, 992.680 kr., har tær 622.640 kr. falla á kommunurnar, 217.840 kr. á landi og 152.000 kr. á rikið. Hesir seinast nevndu útreiðslumunir falla **hjá landinum** við einum vøkstri upp á 76.000 kr. til fastar lønir (23 í staðin fyri 15 kommunulæknar) og restin, 141.840 kr. til at hjálpa kommununum við at útvega viðtaluhøli ella læknamiðstøðir og til amboð. Og hjá ríkinum er vøksturin 152.000 kr. einans orsakaður av helvtarparti ríkisins í føstu lønunum.

Vert er at nevna í hesum sambandi, at tá ið nýskipanin er komin í fult gildi, skuldi verið heilt óneyðugt við útreiðslunum hvørt ár til kommunulæknavikarar og ferðir teirra - - útreiðslur til hetta vóru t.d. í 1972 í vikarløn 18.337 kr. + í ferðaútreiðslum 8.200 kr., tilsamans **26.537 kr.** Tær koma í framtíðini at detta burtur, av tí at nýskipanin má gera av (í sáttmála og veghugerð), at grannalæknar í fritíð, og tá ið sjúkur leika á (tó ikki ov long tíðarskeið), mugu átaka sær arbeiðið.

Kortini metir nevndin eina slíka útreiðslubækkan at vera ov stóra hjá tí almenna at taka eftir einum ári og skjýtur ti upp hesa inannagongd:
1) **Longu í komandi figgjarári** 1974/75 verða settir

4 kommunulæknar aftrat:
1 kommunulækni aftrat **suðuri í Vági** (tá tils. 2),
1 kommunulækni aftrat á **Tvøroyri** (tá tils. 2),
1 **kommunulækni** aftrat **í Vágum** (tá tils. 2) og
1 kommunulækni aftrat **í Havn** (tá tilsamans 5).

Av 3. og 6. talvu sæst, at tá verður neyðugt at seta av hesar játtanir aftrat teimum, sum nú eru hjá kommunum, landi og ríki:

	Kommunur	Land	Ríki	Tilsamans
Fastar lønir	38.000	38.000	76.000	152.000
Sethús (ella húsastuðningur)	252.000	0	0	252.000
Viðtalubøli	13.500	13.500	0	27.000
Amboð	58.800	58.800	0	117.600
Tilsamans	362.300	110.300	76.000	548.600

Tá er roknað við 2 nýggjum sethúsum hæði suðuri í Vági, á Tvøroyri, vesturi í Vágum og í Havn (ella við húsastuðningi), umbygging av gomlu læknabúsunum til lítla læknamiðstøð suðuri í Vági og í Miðvági, nýggjari læknamiðstøð á Tvøroyri (sum nevndin ikki enn veit, hvør skal gjalda), og í Havn eru útreiðslurnar til viðtalubøli vegna óvissu settar til 9000 kr. Eisini er at nevna, at fyribils eru útreiðslur til fast og stór amboð eisini taldar við í Havn.

Skal hugsingur verða um at fáa hetta í lag, mugu tingingar verða tiknar upp við avvarðandi kommunur ongantíð av skjótt, og nðrar neyðugar fyrireikingar verða gjørdar. Hesar tingingar koma valla í lag uttan av landsstýrisins og ríkisumboðsins ávum.

2) **í fíggjarárinum** 1975/76 verða settir:
1 nýggjur kommunulækni **í Kollafirði,**
1 **kommunulækni** aftrat **í Runavík** (tá tilsamans 2) og
1 kommunulækni aftrat **í Klaksvík** (tá tils. 3).

3) **í fíggjarárinum** 1976/77 verður settur:
1 kommunulækni aftrat **í Havn** (tá tilsamans 6).

Á sama hátt sum fyri 1) ber til av 3. og 6. talvu at meta um tær ymisku útreiðslurnar í 1975/76 og 1976/77, men heldur nevndin tað ikki loysa seg enn bæði orsakað av prisvøkstrinum (í øllum talvum er sum nevnt roknað við lønum og tílíkum í 1972, so leggjast má nakað við

løunum og tílíkum í 1972, so leggjast má nakað útfyri), og tí best er fyrst at siggja, hvørja lagnu uppskotið um eina nýskipan fær, og tá ikki minst hvønn áhuga kommmunurnar fara at vísa tí, og hvørjar royndir verða av tingingunum partanna millum.

Nevndin skal bara til allarseinast leggja aftrat, at hon ikki metir útreiðsluvøksturin at vera at órógvast um, tá ið hugsað verður um ta í allar mátar nógv betri læknarøkt, sum bygdirnar fara at fáa (eisini saman við uppskotinum um heimasjúkrasystra- og heilsusystraskipan), og tey góðu líkindi, sum verða tli altíð at hava øll kommmunulæknastørv sett við læknum, sum ikki eru komandi og farandi, men sum koma at liva seg inn í samfelagið – og helst fara at dugna tí, eisini á øðrum økjum enn tí heilsuliga.

7. Úrtak

viðvíkjandi kommunulæknanýskipanini

Nevndin hevur í álitinum frammanfyri givið eitt yvirlit yvir kommunulæknaviðurskiftini í Føroyum, sum tey eru í dag við 15 kommunulæknum (1. talva), og yvir lønir og aðrar umstøður í sambandi við galdandi skipan (4. talva, sbr. eisini 6. talvu).

Skotin verður upp ein nýskipan, har hitt almenna eftir fáum árum setir 8 kommunulæknar aftrat, so talið verður 23 (nýskipanin sæst á 2. og 3. talvu og á ljálagda korti, har sundurbýtingin er teknað inn). Verða sama føstu lønir uppihildnar (sjálvandi má leggjast útfyri fyri prísvøksturin), tola hinar læknainntøkurnar, sum tilsamans fyri allar Føroyar verða nakað tað sama sum í dag, væl at verða javnaðar út á 23 læknar (5. talva), um so er, at teir fyrimunir viðvíkjandi setlúsum, viðtaluølum og amboðum, sum í løtuni eru meira og minni sáttmálabundnir, framvegis --- tó við smábroytingum --- verða uppihildnir (sí 3. talvu).

Útreiðslurnar, sum av nýskipanini koma at standast, eru at siggja á 5. 6., 3. og serliga 7. talvu.

Nevndin mælir tí til, at nýskipanin ikki verður sett í gildi í einum, men yvir 3 tey komandi fíggjarárini, og verða útreiðslurnar hjá tí almenna --- komnunum, landi og ríki – sum gjølla er frágreitt á 40. bls. í álitinum.

Mest umráðandi er at byrja suðuri í Vági, á Tvøroyri, vesturi í Vágum og í Havn.

Dentur verður lagdur á, at skal nýskipanin fáast í lag, mugu tingingar við kommmunurnar takast upp beinanvegin.

III. bólkur

HEIMASJÚKRASYSTRAR, BARNA- OG SKÚLAHEILSUSYSTRAR

1. Sjúkrasystrasøgan í Føroyum er eitt evni, ið tíverri ógvuliga lítið er fest um á blað farnu árini, men vist verður til tað sindrið, sum stendur um hana í fylgiskjali 1, 141. - 142. bls. Heldur ikki hava verið til skjals álítandi almennar fráboðanir um viðurskiftini í dag, men — við fáum undantøkum — hava tey verið illa fyriskipað og mest at siga eftir tilvild. Har onkur sjúkrasystur hevur búð, hevur í summum støðum verið roynt at nýta hana sum best, tá ið tørvur var. Men nógva staðni var og er eingin rættulig og tíðarhóskandi skipan, og «lønar»-viðurskiftini ofta heilt tilvildarlig.

Nøkur lóg um heimasjúkrasystrar er ikki í gildi her í Føroyum, og tað uppskotið, sum landslæknin hin 31. juli 1961 (j. nr. 35-2-1961, R.F. 1959, j. nr. 425[14]) sendi ríkisumboðnum (fylgiskjal 7) hevur nevndini kunnugt, tá ið einstakir fundir í apríl 1967 eru frá, ongantíð verið til viðgerðar. Tó er tað í 1971 — sum eitt roynd til av nýggjum at fáa gongd aftur á málið — av landslæknanum framlýjá lagt fyri formansskapin í «Dansk Sygeplejeråd, Føroyadeildin», sum í skrivi dagf. hin 4. december 1971 spurdi seg fyri hjá nevndini í danska meginfelagnum, men svaraði henda nevndin aftur í skrivi dagf. hin 6. januar 1972: «For så vidt angår Deres forespørgsel med hensyn til Dansk Sygeplejeråds syn på landslægens forslag om at ansætte ikke-uddannet personale til at varetage visse opgaver, der naturligt henhører under hjemmesygeplejerskers arbejdsområde, må Dansk Sygeplejeråd tage afstand fra en sådan ordning. Da problemet imidlertid indeholder lovgivningsmæssige aspekter, har vi tilladt os at videresende Deres brev i kopi til Sundhedsstyrelsen med anmodning om en udtalelse til det i Deres brev skitserede forslag». Hetta gjørdi felagið sama dag, og í skrivi dagf. hin 8. juni 1972 (SS. j. nr. 1620-1-72) legði Sundhedsstyrelsen málið fyri landslæknan, sum síðani í skrivi (dagf. 12. juli 1972, j. nr. 35-5-72) og á fundi í Sundhedsstyrelsen hin 21. august 1972 greiddi frá, hví ein serskipan var skotin upp fyri Føroyar, og at støða «Dansk Sygeplejeråd»s var orsakað av misskiljingum og ókunnleika til føroysk viðurskifti (serliga sjálvandi á avbygdum og í útoyggjum). Landsstýrið greiddi frá, at landsstýrið beint tá hevði sett nevnd, ið gera skuldi álit um alla heilsuverndina og alla sjúkraviðgerð uttan fyri sjúkrahús og serlæknar, eisini sjúkrasystrar og ljósmøðrar. Sagt varð m.a. frá, at ætlanin var at gera eina samskipan av heimasjúkrarøkt og heilsusystrum, og at ætlanin als ikki var at nýta ognur fólk enn rættuliga útbúnar sjúkrasystrar uttan í teimum fáu undantaksførum, har viðurskiftini

gjørdi tað heilt ógjørligt at fáa sjúkrasystrahjálp. Heilsustjórnin svaraði aftan á hendan fund Dansk Sygeplejeråd aftur, at steðgast mátti við málinum, til nevndin, ið sett var av landsstýrinum, hevði gjørt álit sítt. Sostatt kom ti ongantið nakað burtur úr uppskoti landslæknans frá 1961.

2. Støðan í dag

Á 8. talvu síggjast viðurskiftini í øllum Føroyum heimasjúkrasystra umframt skúla- og smábarnaheilsusystra viðvíkjandi, býtt sundur í tvey núverandi kommunulæknadømi, bústøðum og lønarviðurskiftum. Viðurskiftini hava verið (og eru fyri ein stóran part enn) sera fløkt og ring at greiða. Upplýsingar eru fingnir til vegar við spurnarbløðum frá nevndini til allar kommunur (har ikki allar hava svarað), vælvildarhjálp frá Meginfelag Sjúkrakassa Føroya (í skrivi dagf. 26. september 1973) og frá yvirlíti, sum ríkisumboðið hevur gjørt yvir lønirnar hjá skúlasjúkra- og pinkubarnasjúkrasystrum (hesar seinastu eru sum kunnugt enn bara í Havn), roknað eftir lønarútreiðslum frá 1. apríl 1973. Landslæknin hevur umframt sjálvur tosað við allar heimasjúkrasystrar um viðurskifti teirra og í ivamálum við kommunur og sjúkrakassar úti um landið. Men kortini kann okkurt vera komið skeivt fyri — tó valla nakað sum broytir ta leiðbeining --- bæði í arbeiðs- og lønarviðurskiftum — sum 8. talva sýnir. Til grundar liggja lønarviðurskiftini hjá heimasjúkrasystrunum í 1972, tó við broytingum (nýggjum størvum), sum gjørdar eru í 1973, eisini.

Heimasjúkrasystraskipan er í løtuni í hesum kommununum, sum allar sjálvar siga seg vera nøgdar við skipanina: Svínoyar, Viðareiðis og Hvannasunds, Klaksvíkar, Vestmanna, Kollafjarðar, Havnar, øllum kommununum á Sandoynni, Sørvágs, Froðbiar, Vágs og Sumbiar. Yvirhøvur er tað allastaðni so, at heimasjúkrasystrarnar fara bara til fólk eftir læknaboðum.

«Heimasjúkrasystrar» hava verið í einstøkum øðrum bygdum (t.d. Miðvági og Sandavági, har skipanin varð avtikin ávikavist 1971 og 1972), men annars hjálpast bygdir sjálvandi serliga avbyggdir og útoyggjar — við ti, at læknin hevur okkurt álitisfólk (sjúkrasystur, um onkur er gift hagar, skiparalærdan mann ella okkurt skilafólk, sum læknin sjálvur hevur uppvant at geva t.d. innsprøtingar og medicin), sum hjálpir, tá ið á stendur. Tá ið nevnt verður um innsprøtingar o.t. í 8. talvu, sipar tað til slík fólk. Fleiri av hesum fólkum hava undir sær líttla medicingoymslu at lata úr eftir læknaboðum (tá ið bráðneyðugt er at veita medicin, og tá serliga í stórkava og illveðri). Heimasjúkrasysturin í Sørvági hevur sagt landslæknanum frá, at arbeiði hennara er nógv minkað og eisini lættførari, nú ellis- og røktingarheim er komið

vesturi í Vágum, og er hetta kanska ein atvoldin í, at Miðvág-Sandavág hava tikið av ta heimasjúkrasystraskipan, har var, og tørvurin kann tí ivaleyst koma at verða minkandi, sum ellis- og røktingardeildir koma í á Tvøroyri, í Klaksvík og í Eysturoynni. Og verður einaferð størri deild bygd í Havn, er hugsandi, at tørvurin fer at minka í bygdunum í Streymoynni og Sandoynni við.

Í løtuni eru sostatt í Føroyum 12 rættuligar heimasjúkrasystrar, tó við ógvuliga ymiskari arbeiðsbyrði, bæði tað ið fólkatali og landaøki viðvíkir.

Á Tvøroyri setir hitt gamla Froðbiar søknar sjúkrarøktarfelag (sum hevur starvast øll árini síðani í 1920unum, og í Havn sjúkrakassin heimasjúkrasystrina, men annars er tað altíð kommununa (ella, tá ið fleiri eru um eina heimasjúkrasystur, kommunurnar), ið seta hana og gjalda hennni lønina. Í Klaksvíkar, Viðareiðis, Hvannasunds, Svínoyar, Kollafjarðar, Froðbiar søknar, Vágs og Sumbiar kommunum gjalda kommunurnar og sjúkrakassarnir hvør sína helvt av lønini. Í Vestmanna letur kommununa bara umb. ⅓, í Havn kommununa (enn) bert ¹/₂₂, meðan kommunurnar í Sandoynni sjálvar bera allar útreiðslurnar. Tilsamans fyri allar Føroyar siggjast útreiðslurnar til heimasjúkrarøkt at kosta kommununum 117.745 kr. og sjúkrakøssunum 191.071 kr., men tá er upp í hetta seinasta tal eisini talt alt tað nøkra leysa (sum nevnt er í teiginum «viðmerkingar» í 8. talvu) umframt ivaleyst eisini heimasjúkrasystrarøkt av fólkum, stødd í øðrum bygdum enn heimbygdini. Upp í hesi tøl er helst eisini tald tann samsýning, sum — ógvuliga ymisk í teimum ymisku kommununum — verður latin heimasjúkrasystrunum. Hugsað verður her um stuðul til flutning við súklu, bili ella báti, telefon og arbeiðsbúnað, sí 9. talvu.

Til 8. talvu er annars at viðmerkja um teigarnar um **skúlaheilsusystrar** — har tilsamans eru 10 við hesum heiti (+ 1 í Suðuroyar syðra kommunulæknadømi, sum ikki hevur sjúkrasystraútbúgving) — at hetta er sjálvstøðugt og einasta starv hjá skúlaheilsusystrini: í Norðoyggjum (Klaksvík), í Fuglafirði (røkir eisini skúlarnar í Skála kommunulæknadømi), í Runavík, á Fáði, í Vestmanna, í Havn (har eitt er fullan dag og tvær hálvan dag hvør) og í Vágum. Á Sandi er skúlaheilsusystirin eisini heimasjúkrasystur (og umframt hetta hjálpir hon læknanum í viðtalutíðini hansara), á Tvøroyri eisini bæði skúlaheilsusystur og heimasjúkrasystur, men suðuri í Vági fer læknaskrivarin (ið sum nevnt ikki er sjúkrasystur) við læknanum út í skúlarnar (samanber lønarviðurskifti hansara á 10. talvu, ið sýnir øll lønarviðurskifti skúlaheilsusystra, roknað út í ænir).

Lønarútreiðslurnar til skúlaheilsusystrar siggjast í 8. og 10. talvu at vera 197.872 kr., sum kommunurnar gjalda. Landið letur einki til hesa

heilsuverndarskipan (uttan til kanningarnar av 219 børnum, sum ganga á Føroya Studentaskúla), men **ríkið afturrindar kommununum** 56.082 **kr.** av hesum útreiðslum (umframt 2,786 kr. til tey nevndu børnini í Hoydølum), soleiðis at tær rættuligu **útreiðslurnar hjá kommununum** verða 197.872 + 56.082 = **141.790 kr.**

Einasta stað í Føroyum, har pinku- (smá-) barnaheilsusystrar eru eru, er í Havn. Lønarútreiðslurnar eru í løtuni (sbr. 8. talva) 100.100 kr., sum kommunan riudar, men ríkið afturrindar kommununi helvtina sambært galdandi lóg. Um hesar pinkubarnaheilsusystrar í Havn er annars at siga, at tær báðar hava egnan bil, og at tingast verður um bilstudning, ið helst verður at gjalda eftir koyrdum kilometratali, upphæddin ikki ásett enn. — Annars hava tær arbeiðshøli við telefon á sosialu deild býráðsins.

(Alt annað er í fult mát eftir galdandi donskum sáttmálum).

Í hesum sambandi skal verða nevnt tann hjálp, sum kommunulækuar í løtuni nýta í viðtalutímum teirra. Viðurskiftini eru lýst á 11. talvu. Skilliga sæst, hvussu ymiska hjálp læknar meta vera neyðuga. Í Havn eru allir kommunulæknar samdir um, at uttan hjálp var heilt ógjørligt at røkja viðtalurnar við teimum nógvu sjúklingunum (1 meðal 3.120 fólk, sbr. 1. talvu), men ymiskt er, hvussu nógva hjálp teir nýta. Eisini úti á bygdunum verður tørvurin metur ymiskt (sbr. t.d. Klaksvíkar læknar við í meðal 2.390 fólkum hvør, ið at siga onga hjálp nýta, og Sandslæknan við bara 1.645 fólkum og fastari sjúkrasystrahjálp hvønn dag). At hjálpin er ein stórur lætti er sjálvsagt.

Upprunaliga var tað so, at **tað almenna einki rindaði til hjálparfólk læknans,** og 11. talva sýnir skilliga, at so er enn allastaðni – tó við tveimum undantøkum, á Sandoyuni og suðuri í Vági. Sum kunnugt hevur Sandoyggin í mong, mong ár — ja, leilt hædni ið kommunulækni á fyrstan tíð kom í oynna í 1903 – long tíðarskeið ongan kommunulækna fingið. Eingin var á at heita uttan kommunulæknarnir í Havn, sum tá bara var ein, men har talið síðan 1948 so líðandi er vaksið upp í 4 (har lam eini í seinastuni hevur haft ein hjálparlækna aftrat sær). Bæði hjá Sandoyingum og hjá Havnarlæknum var støðan mangan ótolandi. Ógvuliga ofta tá illa fyri hjá læknunum at fara ta longu ferðina suður mitt í øðrum arbeiði, og meira enn so hendi tað seg, tá ið hann var komin, at ferðin — mett við læknaeygum – var at siga óneyðug, og tað, ið kravdist, væl kundi verið avrikað av eini sjúkrasystur helst aftan á samráðing við lækna í telefonini, hóast tey avvarðandi sjálv einsamøll og óhjálpin mettu standin vera ringan. Og hin vegin máttu

sjúklingarnir sjálvandi hava onkran á at heita, tá ið eingin lækni var í oynni. Tí gingu fyri fáum árum síðani allar kommunur í Sandoynni saman um sjálvar at seta og løna einari sjúkrasystur, og tað er henda skipan, ið varð løgd saman við alt skúlalæknaarbeiði í oynni og við hjálp frá somu sjúkrasystur í læknaviðtaluni, tá ið lækni aftur fekst. Hetta tiltak hevur har í oynni roynst stórt væl, og saman við fastari vaktarskipan, sum varð fingin í lag við kommunulæknarnar í Havn, hevur hetta alt gjørt tað, at læknaloysi ikki hevur verið aftur síðani. Nevndini tykist — sum uppaftur tikið seinni í álitinum — at góðar og sera væl umhugsaðar grundir mugu verða frambornar, áðrenn henda skipan verður avtikin. Tí í løtuni er kommunulæknin í Sandoynni tann læknin í landinum, sum situr ringast fyri og er mest einsamallur í starvi sínum.

Suðuri í Vági er atvoldin í, at kommunan rindar fyri hjálp í viðtalu, fyri ein part ein heilt annar. Læknadømið var av læknum mett at liggja illa fyri, húsa- og viðtaluviðurskiftini stórt vánalig, og av onkrari grund var starvið har suðuri komið í so ringt orð lækna millum, at lækni fekst ikki at støðast, so eisini har vóru long tíðarskeið, at eingin kommunulækni fekst, og alt arbeiðið lá á læknunum (viðhvørl á einum einsamallum manni) á Tvøroyri, sum fraumanundan høvdu ivaleyst um hendur. Seinnu árini hevur so eydnast at fáa útlendingar, sum sita við serloyvi frá heilsustjórnini, og sum av røttum ikki eru annað uttan neyðhjálp, ókønir sum teir eru bæði við fólk, viðurskifti og lóggávu — hvussu góðir læknar ið teir annars kunnu vera. Til at hjálpa hesum læknum og sjúklingum — ikki bara málsliga — var tað, at kommunan samtykti at rinda læknanum hjálp, og er henda skipan, nakað broytt, enn í gildi. Ivaleyst man tað vera óttin fyri aftur at koma at liggja í læknaloysi, ið heldur skipanini uppi. Tí annars átti hon har sum aðrastaðni í Føroyum (uttan í Sandoynni) at verið heilt óneyðug, serliga um kommunulæknaskipanin verður sett í gildi.

Vanda vit aftur til 8. talvu, er um útreiðslurnar at siga, at lønn heimasjúkrasystrarøkt og skúla- og smáharnaheilsusystraskipan, sum í løtuni er, tilsamans kostar 607.088 kr., har kommununrnar sjálvar (tá ið ríkisstuðningurin til skúlaheilsusystrarnar er frádrigin) bera tær 309.735 kr., landið einki (ein lítil upphædd til Føroya Studentaskúla er ikki tald uppí), sjúkrakassarnir 143.303 kr. (við tað at ríkið afturrindar 25% av teimum 191.071 kr. til heimasjúkrasystrar) og ríkið 154.050 kr. (47.768 kr. til heimasjúkrasystrahjálpina), 56.082 kr. til skúlaheilsusystrarnar og 50.200 kr. til tær báðar pinkubarnaheilsusystrarnar, sum nú í seinastuni eru settar í Havn.

Til at bøta um viðurskiftini, sum tey nú eru, leggur nevndin fram hetta

3. Uppskot um samskipaða heimasjúkrasystra-, smábarna- og skúlaheilsusystraskipan í Føroyum.

Til grundar eru lagdar tær royndir, sum gjørdar eru aðrastaðni viðvíkjandi tí tali av sjúklingum og børnum, sum hesar sjúkrasystrar kunnu koma úti yvir at røkja og ansa eftir, tá ið hugsað verður um læknatalið, bygdaløgini og samferðslulíkindini her hjá okkum. Tað ber ikki til bara at taka eftir tí, aðrir gera, men ikki slepst undan, skulu hesi mál loysast við skili og við minst møguligum kostnaði, at samskipa yrkini, har ikki nóg nógv arbeiði er fyri eina kvinnu, við bara einari yrkisgrein í avmarkaðum landsparti. Hvussu høgligt ið vegasambandið er, hevur tí haft alstóran týdning í metingum nevndarinnar.

Ein meginregla hevur tað verið at binda hesar sjúkra- og/ella heilsusystrar til eitt ella tvey kommunulæknadømi.

Vart verður gjørt við beinanvegin, at heill ógjørligt verður at tryggja útoyggjum og avbygdum (uttan vegasamband) líkindi til at fáa heimasjúkrasystur aðrastaðni til sín dag og dagliga. Hetta kann ikki gerast á annan hátt enn nevnt í upprunaliga uppskoti landslæknans frá 1961 (fylgiskjal 7).

Talið á heimasjúkra- og heilsusystrum, arbeiðsøki og bústaðir teirra.

Uppskotið hesum viðvíkjandi sæst á 12. talvu, vinstrumegin. Tá ið nevnd verða børn, er hugsað um aldursbólkin 0—15 ár. Heilt tryggar frágreiðingar um talið beint í løtuni á pinkubørnum (t.e. 0- 1 ár) og børnum yvirhøvur undir skúlaaldur eru ikki til taks, men talið á skúlabørnum er heilt álítandi.

Norðoyggjar

Til grundar er lagt eitt fólkatal upp á uml. 5.500 (umf. 1.500 í Klaksvík). Skúlabarnatalið er umf. 1.020, børn undir skúlaaldur umf. 780, t.e. barnatalið umf. 1.800. Til hella krevjast

2 heimasjúkrusystrar,
1 skúlaheilsusystur og
1 pinkubarnaheilsusystur,

allar við fullari arbeiðstíð og allar búgvandi fast í Klaksvík.

Eysturoy

umleið 8.100 fólk, av teimum eru stívliga 2.800 børn, skúlabarnatalið uml. 1.670, børn undir skúlaaldur 1.130. Til hetta krevjast

3 heimasjúkrasystrar burturav,
3 heilsusystrar, sum røkja bæði skúla- og pinkubørn.

Skotið verður upp, at ein úr hvørjum bólkinum (t.e. 1 heimasjúkrasystur og 1 skúla- og pinkubarnaheilsusystur) býr í bygdunum Eiði, Runavík og Fuglafirði.

Streymoy (og Nólsoy, Hestur og Koltur)

Umleið 15.550 fólk (í Havn og um Havnarleiðina uml. 12.500), børn tilsamans uml. 4.650, uml. 2.930 skúlaborn, tey 1.720 undir skúlaaldur. Til hetta krevjast í **Havn** (og Havnar uttanbýggja, Kirkjubø, Velbastað, Kaldbak, Nólsoy, Hest og Koltur), har barnatalið er uml. 3.870, uml. 2.380 skúlaborn, tey 1.490 undir skúlaaldur.

4 heimasjúkrasystrar burturav,
2 skúlaheilsusystrar burturav,
2 smábarnaheilsusystrar burturav,

allar við fastum bústað í Havn.

Til hinar partarnar av Streymoynni, har barnatalið er uml. 775, uml. 550 skúlaborn og 225 undir skúlaaldur krevjast

2 heimasjúkrasystrar,
1 heilsusystur, sum rekur bæði skúla- og pinkuborn.

Onnur heimasjúkrasysturin eigur at búgva í Vestmanna, hin í Kollafirði. Minni ger, hvar ið heilsusysturin býr, men høgligast hjá henni hevði verið at búið annaðhvørt í Vestmanna, Kvívík ella Kollafirði (tá ið hugsað verður um koyringina til dagliga arbeiðið, tí tyngri endin í barnatalinum liggur har).

Sandoy (og Skúvoy)

Uml. 1.650 fólk, av teimum eru út við 500 born uml. 320 skúlaborn, 180 undir skúlaaldur. Til hetta krevjast

1 sjúkrasystur, sum rekur oll 3 slørv.

og sum — fyri koyringina — helst eigur at búgva heima á Sandi, men nevndin heldur, at hetta mugu kommununurnar sjálvar gera av, av tí at í løtuni er góð sjúkrasystur, sum býr í Skálavík. Ivingasamt kann vera, um henda sama sjúkrasystur fær stundir til at hjálpa læknanum í viðtaluni. Men ber hetta ikki til, so eigur — sum frammanfyri er frágreitt — ein annur hjálp at verða fingin honum, og kunnu útreiðslurnar til slíka hjálp 5 dagar um vikuna uml. 3 tímar setast til uml. 1.200 kr. um mánaðan.

Vágarnar (Mykines)

Uml. 2.600 fólk, av teimum eru út við 800 børn, uml. 490 skúlabørn, 310 børn undir skúlaaldur. Til hetta krevjast

1 heilsusystur, sum rekur bæði skúla- og smábarnaarbeiðið,
½ heimasjúkrasystur fyri alla oynna.

Orsakað av tí góða vegasambandinum hevur tað helst minni at týða, hvar ið tær búgva, men lagaligast hevði verið í Miðvági.

Suðuroy

Uml. 5.500 fólk, av teimum uml. 1.600 børn, uml. 950 skúlabørn, 650 undir skúlaaldur. Til hetta krevjast

1 smábarnaheilsusystur fyri alla oynyna.
2 sjúkrasystrar, sum eru bæði heimasjúkrasystrar og skúlaheilsusystrar.

Onnur av teimum seinast nevndu eigur at búgva á Tvøroyri, hin í Vági. Smábarnaheilsusysturin eigur at búgva í Vági, tí har er víðast um at fara út á bygd í syðru helvt av oynni, og verður hon tí meira miðskeiðis har.

Nevndin leggur nógvan dent á, at skal henda skipan eydnast, og full nytta fáast burtur úr henni, má vera eitt **leiðandi sjúkrasystur** (men hon kann kanska setast seinast!), búsitandi í Havn, sum lítið annað hevur um hendi enn dagliga at ansa eftir og samskipa arbeiðinum, og sum ikki minni týðandi setning hevur at samskipa heimasjúkrarøktina og heilsusystrarbeiðið við **heimahjálpina,** sum byrjaði virki sítt her í Føroyum hin 18. oktober 1973, og sum eisini hevur ein samskipandi **leiðara,** búsitandi í Havn. Ein tílík kviuna eigur ikki hert at hava góða yrkisliga útbúgving, men hon **má út í æsir kenna føroysk viðurskifti, serliga øll bygdaløg.** Í uppskotinum er á 12. talvu einki viðmerkt

um avloysara undir sjúku og í frítíð, men nú hetta kunna loysast staðbundið við, at tær sjálvar samskipa arbeiðið, tá ið so er.

4. Útbúgving og reglugerðir fyri heinasjúkra- og heilsusystrar eftir nýskipanini

Higartil hava krøvini til sjúkrasystrar, sum røkja vildu heilsusystrastørv (bæði pinku- og skúlabørnum viðvíkjandi) verið tey, at tær skuldu hava serliga serútbúgving, og umframt uml. eitt ára eykaútbúgving á serligum læristovni knýttum til háskúlan í Århus (Danmarks Sygeplejerskehøjskole ved Århus universitet, linien for uddannelsen til sundhedsplejerske). Seinastu 2 árini hevur ein deild av hesum skúla eisini ligið í Keypmannahavn. Men avmarkingin av teimum, sum slupput inn til hesa læru, og sum hava haft høvi til at fáa sær hesa útbúgving, hevur ført við sær, at talið á tílíkum kvinnum ongantíð er verðið nóg stórt til, at størvini allastaðni hava verið sett við sjúkrasystrum við nevndu útbúgving. Og er tað t.d. ein atvoldin í, at partar av Danmørk enn ikki hava pinkubarnaheilsusystrar.

Her í Føroyum (Havn) eru nú sum kunnugt 2 smábarnaheilsusystrar við fullari Århus-útbúgving í starvi, og nevndin veit um 3 aftrat við tílíkari útbúgving, ið hava tilknýti til Føroyar. Men bert ein teirra (donsk kona gift til Gøtu) er í Føroyum (uttan starv), hinar báðar hava fast starv í Danmørk og ætla sær ikki heim aftur. Eingin skúlaheilsusystur í Føroyum hevur nevndu eykaútbúgving (og lældur ikki størsti parturin av teimum donsku skúlaheilsusystrunum, sum í Danmark nú í mong ár hava sitið í tílíkum størvum).

Skal tann nýskipan, sum nevndin skjýtur upp í 12. talvu, steðga eftir, at nóg nógvar ungar, føroyskar sjúkrasystrar eru sloppnar inn at læra á donskum lærustovnum, verður tað seinna dagin, at skipanin er komin í gildi. Og aftrat teirri avmarkaðu upptøkuni av hesum nemingum koma teir nógvu vansar og trupulleikar, sum nýgift konufólk við manni og smábørnum verða fyri, skulu tær flyta úr Føroyum í minsta lagi í eitt ár. Nevndin metir hesa útbúgving - tá ið saman um kemur -- ikki at vera eðlvísi, enn at hon kann verða veitt úflærdum sjúkrasystrum her í Føroyum á nýggja sjúkrasystraskúlanum í sambandi við teir nógvu serlæknar, sum nú eru á landssjúkrahúsinum, og teimum fult úthúnu heilsusystrunum, sum eru í Havn. Hjá hesum báðum heilsusystrunum í Havn og hjá teirri enn ósettu heilsusystrini, sum er í Gøtu, og sum fegin vil hava arbeiði her í Føroyum, hevði borið til at latið ungar sjúkrasystrar lært starvið burturav í praksis. Eisini kundu smærri skeið við gestafyrilestrum verið hildin á landssjúkrahúsinum fyri hesum ungu kvinnum.

Skal henda meting nevndarinnar verða góðtikin av donskum mynd-

ugleikum, verður sjálvandi neyðugt (sbr. tað, sum frammanfyri er sagt um uppskot landslæknans frá 1961), at hon fær fullan stuðul frá landsstýri og ríkisumboði. Mælt verður til, at serlig nevnd sum skjótast verður sett til at gera uppskot til og skipa fyri hesi útbúgving, og at henda nevnd eisini fær tann setuning at avmarka, hvørja útbúgving tey fólk úti á avbygdum og í útoyggjum skulu fáa, har hin vanliga heimasjúkrasystrarøktin í roynd ikki fer at vera til nakað gagns, tá ið ástøddur, (sbr. tað, sum sagt er um hesar smábygdir aðrastaðni í álitinum).

Gerast mugu serligar **reglugerðir** og **leiðbeiningar** bæði fyri smábarna- og skúlaheilsusystraarbeiði og fyri heimasjúkrasystrarnar, og tá serliga fyri samstarvið millum hesar sjúkrasystrar og kommunu- og sjúkrahúslæknar. Hetta seinasta er harðliga neyðsynt, tí í løtuni er alt tílíkt samstarv heilt tilvildarligt. Nevnt kann verða, at í Danmørk, har nýskipanir hesum viðvíkjandi skulu koma í gildi 1. apríl 1974, smb. lógirnar frá 13. juni 1973, eru tey enn nøkk leið komin við hesum reglugerðum (fyrispurningur frá landslæknanum til heilsustjórnina, meðan hetta verður skrivað). Tær verða her í Føroyum ikki torførar at gera, bara tey, sum setningin fáa, frammanundan vita, hvørjari skipan miðað verður ímóti, og hvussu skjótt ætlanin er at seta skipanina í verk. Í nevndini mugu vera fólk, sum av egnum royndum kenna trupulleikarnar og arbeiðslíkindini her á landi í teimum ymisku starvsgreinunum (sjúkrahús- og kommunulæknar, sjúkra- og heilsusystrar).

5. **Lønarútreiðslurnar,**
sum í løtuni høvdu staðist av nevndu samskipan heimasjúkrasystra-, smábarna- og skúlaheilsusystraskipan her í Føroyum, eru at siggja á **12. talvu,** høgrumegin (har einki kortini er talt uppí um avloysing í summarfrítíðini, og tá ið sjúka leikar á). Sum áður nevnt eru allar starvandi sjúkrasystrar í Føroyum limir í tí danska yrkisfelagnum «Dansk Sygeplejeråd», og er «Føroyadeildin» bara eins og føroysku læknarnir — ein vanligur bólkur í hesum meginfelagi. Nevndin hevur tí sum støði nýtt miðaltøl frá núgaldandi donsku sáttmálunum viðvíkjandi lønarstigastigum («skalatrin», sí fylgiskjal 8).

At byrja við at seta ein løntan leiðara heldur nevndin vera at smíða nøglina áðrenn bátin. Mælt verður til at steðga við leiðarastarvinum, til skipanin er vorðin so víðfevnandi, at arbeiði í roynd er til tílíkt fólk (sbr. við tað, sum sagt er um tað umrøddandi við tílíkum starvi frammanfyri). Men verður leiðarin taldur uppi, høvdu hesi **27,5 starvsfólk kostað tilsamans 1.358.000 kr.** Tá eru **ikki** taldar uppí útreiðslurnar lil flutning (bil).

Nevndin skjýtur upp, at hesar útreiðslur samsvaraudi teirri megin-

reglu, sum komin er í gildi í Danmørk, (og á heilt sama hátt sum útreiðslurnar til kommunulæknalønirnar) verða býttar við ¼ til kommunurnar, ¼ til landið og ½ til ríkið, ávikavist 339.500 kr., 339.500 kr. og 679.000 kr.

Eftir hesum uppskoti fáa sjúkrakassurnir (ella ein komandi sjúkratrygging) ongar útreiðslur av hesum í framtíðini.

Størvini eiga at verða sett av ríkisumboðnum, aftaná at umsóknirnar hava verið sendar landslæknanum og kommununum til ummælis.

Meta vit um kostnaðarmuniu á nýskipanini og teimum útreiðslum, sum í løtuni standast av teimum sera ófullfiggjaðu viðurskiftunum á hesum øki, verður hann hesin:

	kommunar	landið	ríkið (allar studningsur	sjúkrakassar + ríkisstudn.	tilsamans
Eftir nýskipanini ..	339.500	339.500	679.000	0	1.358.000
Sum er	309.735	0	154.050	143.303	607.088
Munur	29.765	339.500	524.950	+143.303	750.912

Meirútreiðslurnar verða sostatt stórar, mest hjá ríkinum. Tí at meira enn 1/3 (heilt beint 38%) av eykaútreiðslunum, sum kommunur og land tilsamans koma at bera (143.303 kr. av 369.265 kr.) sleppa fólk undan at latar í gjaldi til sjúkrakassarnar. Hjá kommununum fer hetta ló ongan mun at gera — tvørturímóti fer nýskipanin fyri lítið og hett at veita fólki eitt javnt eftirlit av øllum børnum og eina nútíðarlróskandi heimasjúkrarokt, sum stórir partar av landinum (sbr. 8. talvu) - mett í fólkatali 38% - - als ikki hava í dag. Og hon fer munandi at bøta um ta - - tá ið samanb um kemur eftir nevndarinnar tykki heldur ófullfiggjaðu - - økt, sum nú er, hvar hon er.

Kortfoi heldur nevndin, at byrðurnar hjá landi og ríki verða ov stórar at lyfta í einum (eisini tá ið hugsað verður um kommunulæknanýskipanina og útbúgvingina av teimum komandi heilsusystrunum, sum ikki kann fara fram fyri allar í senn). Miðað kundi verið eftir, at småskeið fyri heilsusystrar byrjaðu á landssjúkrahúsinum t.d. umb. 1. apríl 1974 fyri tær, sum byrja skulu (hin útfærda kvinnan í Gotu undantikin) í august ella september 1974, um nýskipanin verður samtykt. Hetta má tann undirnevnd, sum skotin er upp beint frammanfyri, gera av skjótast tilber. Skúlaráðið fyri sjúkrasystraskúla Føroya má sjálvandi verða spurt, um tílík læra ber til at taka upp á skúlanum, men

formaðurin í skúlaráðnum, sum er landslæknin, vil ið hvussu er geva viðmæli til slikt uppskot.

Nevndin skjýtur ti upp, at nýskipanin verður framd eins og kommunulæknaskipanin eftir 3 figgjarárum, og hevur í hesum uppskoti sínum lagt serligan dent á, at útreiðsluvøksturin fyrst og fremst hjá kommununum skal ikki vaksa ov brádliga bæði á kommunulækna- og sjúkrasystraøkinum í senn. Tó hevur sjálvandi verið neyðugt, skal samskipanin fáa virkað, at sela nóg nógv starvsfólk í grannadømunum, sum arbeiða skulu saman.

Við hesum viðmerkingum verður vísl til 13. talvu, sum í einum sýnir hin tilætlaða vøksturin í talinum á kommunulæknum frá 1974/75 til 1976/77 samanborið við uppskoti nevndarinnar um setan av heimasjúkra- og heilsusystrum í sama tíðarskeiði í øllum teimum læknadømunum, sum koma við nýskipanina. Á somu 13. talvu er eisini settur kostnaðurin, ið kemur at standast av nýskipanini, sjúkra- og heilsusystrum viðvíkjandi (hesar útreiðslur eru tiknar beinleiðis frá 12. talvu). Vart verður gjørt við, at orsakað av støðugari lønarhækking kunnu tølini sjálvandi bert verða nýtt sum ein grov leiðbeining.

Einsamøll siga hesi tøl einki um tær komandi **eykaútreiðslurnar,** sum fara at standast av nýggju sjúkra- og heilsusystrasamskipanini, heldur ikki hvussu hesar útreiðslur koma at falla á kommunur, land og ríki. Men ein hylling á hesum vøkstri, og hvussu hann fer at býta seg sundur á teir ymisku almennu styrkveitararnar, fæst við at bera saman 13. talvu við 14. talvu (sum er gjørd burtur úr 8. talvu). Tá ber til at rokna út vøksturin úr fyri ár. Hann verður hesin:

Í figgjar-árinum	avvarðandi kommunur	sjúkrakassar	land	ríki	tilsamans
1974/75	+ 47.026	+ 34.888	+ 121.250	+208,883	+312.271
1975/76	+ 4.790	+ 40.717	+ 68.500	+113.638	+146.217
1976/77	+ 22.057	+ 67.698	+149.750	+202,429	+262,424
Tilsamans	+ 29.765	+143,303	+339.500	+524,950	+750.912

Av hesum tølum sæst, hvussu útreiðslurnar á hesum oki í 1974/75 vaksa hjá kommununum Eysturoynni (har í løtuni eingin heimasjúkra-systraskipan er yvirhoyrd) eins og í Norðuroyggjum, meðan útreiðsl-

urnar hjá sjúkrakossunum minka munandi (og hetta er tann partur, sum limirnir sjálvir annars høvdu goldið, tí at ríkisstuðningurin er frádrigin). Í 1975/76 verður bara ein lítil vokstur hjá kommununum tilsamans í Norðstreymoy og í Vágum, men ein ógvuliga munandi minking hjá Sandoyar kommunu. Og hjá øllum fara sjúkrakassaútreiðslurnar at minka. Í 1976/77 verður nýskipanin ein beinleiðis vinningur hjá kommununum í Suðuroy og í Suðurstreymoy, og ein sera týðningarmikil niðurgongd í sjúkrakassaútreiðslunum til hetta endamál. — Hjá landinum, sum higartil einki hevur latið, fara sjálvandi útreiðslurnar at vaksa ár um ár, til tær í 1976/77 tilsamans eru komnar upp á 339.500 kr., og á sama hátt siggjast útreiðslurnar hjá ríkinum at vaksa, til tær í 1976/77 verða 524.956 kr. meira enn í løtuni. Eisini sæst skilliga, at tað, ið sjúkrakassarnir spara, vigar upp ímóti øllum meirútreiðslum hjá kommununum umframt 1/3 av meirútreiðslum landskassans.

Nevndin heldur tí ikki, at hetta verða tungar meirútreiðslur at leggja á fólk, tá ið hugsað verður um allar teir fyrimunir, sum ný- og samskipanin ber við sær.

ÚRTAK
viðvíkjandi heimasjúkra-, smábarna- og skúlaheilsusystraskipanini.

Nevndin hevur í álitinum framman fyri givið eitt yvirlit yvir heimasjúkra-, skúla- og pinkubarnaheilsusystraviðurskiftini í Føroyum, sum tey eru í dag við 12 heimasjúkrasystrum, 10 (+1) skúlaheilsusystrum og 2 pinkubarnaheilsusystrum og yvir lønir og aðrar umstøður í sambandi við tey heilt tilvildarligu viðurskifti, sum eru (8. talva). Skotið verður upp eina nýskipan, har hitt almenna eftir fáum árum setir so nógvar sjúkrasystrar aftrat, at talið verður tilsamans 27,5—11,5 heimasjúkrasystrar, 3 skúlaheilsusystrar, 4 smábarnaheilsusystrar og 8 samskipað størv umframt 1 leiðara (nýskipanin sæst á 12. talvu vinstrumegin).

Útreiðslurnar, sum av ný- og samskipanini koma at standast, eru at siggja á 12. talvu høgrumegin og á 60. blaðsíðu, sjálvandi má leggjast út fyri prisvøksturin.

Nevndin mælir tí til, at ný- og samskipanin ikki — heldur ikki av útbúgvingarligum atvoldum og vegna útreiðslunum frá kommunulæknanýskipanini — verður sett í gildi í einum, men yvir 3 tey komandi fíggjarárini, og verða útreiðslurnar hjá tí almenna — kommununm, landi og ríki, sum skotið verður upp koma at bera ávikavist ¼, ¼ og ½ av útreiðslunum — — sum gjølla frágreitt á 61.-63. bls. í álitinum.

Sjúkrakassarnir (ella ein komandi sjúkratrygging) fán tá ongar útreiðslur at bera.

Dentur verður lagdur á, at skal hetta uppskot ikki fáa somu lagnu sum uppskotið frá 1961, mugu landsstýrið og ríkisumboðið standu aftan fyri tey serligu føroysku tilmælini, serliga útbúgvingini viðvíkjandi, og tingingar mugu takast upp beinanvegin við avvarðandi kommunur og Sjúkrasystraskúla Føroya.

IV. bólkur

LJÓSMØÐURNAR

1. Hvussu viðurskiftini hjá barnakonum og hjálpin til teirra hevur verið, er sera væl lýst frá fyrstu tíðum, embætislæknar fóru at skriva heilsulagslýsingar úr Føroyum (alt hetta tilfar fyri allar Føroyar er nú til skjals í skjalasavni landslæknans). Her skal bara verða víst til fylgiskjal 1, 140. bls. Eitt, ið ger, at so góðar lýsingar eru, eru tær gerðabøkur (jordemoderprotokoller), sum ljósmøðurnar hava ført frá fyrsta degi, tær vórðu settar her í Foroyum, og sum tær við hvørt árslok hava sent embætislæknunum, síðani 1953 landslæknanum. Hesar gerðabøkur geva líkindi til at finna fram til barnakonu, og hvussu henni gekst at eiga o.s.fr. í hvørjum einstøkum føri leilt aftur til 1878. Og tað, tær siga frá, hevur ikki bert heilsusøguligan týdning, men fleiri ferðir á hvørjum ári koma fyrispurningar til landslæknans bæði frá einstaklingum og stovnum, sum á ongan annan hátt kunnu verða svaraðir uttan við at leita í gomlu gerðabókunum. Tá ið hetta verður nevnt her, er tað, ti at ætlanin er í næstum at taka av hesar gerðabøkur í Danmark. Landslæknin vil inniliga mæla frá, at hetta verður gjørt í Føroyum.

2. **Galdandi reglur viðv. ljósmøðrum.**

Lógarreglurnar, sum verdar eru at nevna her, fyri la ljósmóðurskipan, sum er í løtuni, og tær kanningar og ta hjálp, sum foroyskum barnakonum standa í boði, eru hesar:

1) «Anordning af 28. august 1953 vedrørende lov om udøvelse af jordemodergerning» við seinni kommum rundskrivum,

2) «anordning af 25. oktober 1962 om distriktsjordemødre på Færøerne»,

3) løgtingslóg nr. 25 frá 7. september 1954 um býti av Foroya parti av løn jarðamøðra,

4) «anordning af 27. april 1960 angående ændring af anordning nr. 247 af 28. august 1953, hvorved lov nr. 89 af 31. marts 1953 om distriktsjordemødre sættes i kraft på Færøerne»,
«indenrigsministeriets bekendtgørelse for Færøerne om svangerskabshygiejne af 27. april 1960» og
rundskriv frá innanríkisnámaráðnum frá sama degi, og

5) løgtingslóg nr. 32 frá 27. mai 1968 um endurgjald til barnakonur

fyri ferðaútreiðslur til kanning hjá lækna ella jarðamóður (í gildi frá 1. apríl 1968).

Viðmerkingar til 1) hava ongan týdning fyri nevndina, av tí at tær bara snúgva seg um nærfrøðilig viðurskifti (hvussu ein ljósmóður yvirhøvur skal bera seg at í arbeiði sínum, og hvat ið henni er loyvt at taka upp á seg). Men í 2) er øll rættarstøða deildarljósmøðra at finna, t.e. lønarviðurskifti (§ 4) og húsastudningur (§ 5, í løtuni 700 kr. um árið, fri amboð og tól umframt alt annað, ið nýtt verður til hana, ið eigur, og, har til ber, frí telefon (§ 6, og í § 7 stendur — hin í hesum føri týdningarmikla —reglan: «For fødselshjælp og anden under jordemoderpraksis hørende virksomhed tilkommer der distriktsjordemoderen betaling efter de for praktiserende jordemødre gældende regler» og fyri fluttning til og frá henni, ið eigur. Í mong ár hevur tað verið siður, at allar ljósmøður (t.e. eisini deildarljósmøður) frá henni, ið áttu hevur, taka 1% av inntøkuni (oftast sjálvandi frá manninum). Ikki er heilt greitt hjá nevndini, um tað er av allari ella bara av skattskyldugu inntøkuni, at hetta gjald verður tikið, men í allarflestu førum nam tað vera av tí skattskyldugu (upplýsing til landslæknans frá deildarljósmóður frá Ester Kruse, Tórshavn, sum til fyri stuttum hevur verið formaður í føroyska ljósmóðurfelagnum í mong ár), og tílíka upphædd nýtir nevndin í metingunum, sum koma eftirsíðan.

Hvussu hetta 1% er íkomið her í Føroyum, er tað ikki eydnast nevndini at fáa uppspurt. Men í tí seinast komna danska «betænkning angående jordemodervæsenet», 144 bls., kap. III, stendur: «I nogle kredsforeningers vedtægter er det fastsat, at betalingen for ydelse af fødselshjælp fastsættes til 1 pct. af den betalingspligtiges skattepligtige indkomst.» — Í hesum sambandi kann beinanvegin verða nevnt uttan at nevndin á nakran hátt vil eggja tí almenna til at nýta hesa avbyrgdu støðu føroyskra ljósmøðra móti teimum, men tvørturímóti at føroyska ljósmóðurfelagið er heilt sjálvstøðugt felag og ikki — eins og læknar og sjúkrasystrar — bara ein vanligur bólkur (kredsforening) í donskum meginfelagi. Eftir nevndarinnar tykki eigur hendan støða teirra í metingunum, sum gjørdar verða, heldur at verða teimum at gagni enn til ógagns.

Smb. § 8 hava føroysku deildarljósmøðurnar vanligan eftirlønarrætt (eftir 3. stk. hava tær, verða tær ikki settar í starv, áðrenn tær eru 40 ár, ongan eftirlønarrætt, uttan so at serskipan er gjørd í hvørjum einstakum føri, samstundis við setaníni). Eftir somu grein kunnu tær fara frá við bíðingarløn «efter et af indenrigsministeriet efter forhandling med finansministeriet og hjemmestyret udarbejdet regulativ».

Heldur ein deildarljósmóður seg vera órættaða - eisini lønarliga kann hon sbr. §11 leggja málið fyri Innanríkisráðharran.

Eftir § 12 verður helvtin av lønarútreiðslunum til deildarljósmøðurnar, sum landskassin allar ber í fyrstu syftu, afturrindað landinum av ríkinum. Hin helvtin verður við heimild í § 13, smb. «løgtingslóg nr. 25 um býti av Føroya parti av løn jarðamøðra», (sum frammanfyri er nevnt sum 3)), § 1, býtt í helvt millum landskassans og avvarðandi kommunur (er so statt sama skipan sum við kommunulæknunum, at ríkið ber helvtina, land og kommunur hvør sín fjórðing. § 2 í sonn løgtingslóg er um frí hús ella húsaviðbót (sum áður nevnt í løtuni 700 kr. um árið), og sigur annars, at kommununrnar skulu bera telefongjøldini. —

Smb. § 12, stk. 2, «kan der af statskassen ydes delvis refusion af hjemmestyrets udgifter til særlige foranstaltninger til tilvejebringelse af fødselshjælp for områder med ringe fødselsantal, der på grund af deres geografiske beliggenhed ikke har kunnet henføres under den almindelige distriktsinddeling». Vart verður gjørt við her, at nevndini er ókunnugt, um henda regla nakrantíð er nýtt, men um so er, snýr tað seg bert um heilt fáar túsund krónur.

Henda fyriskipan kom í gildi í staðin fyri «anordning af 28. august 1953».

Smb. tær undir

4) í gildi settu reglur datt burtur **skyldan** hjá føroysku deildarljósmøðrunum til uttan samsýning at kanna barnakonur, men ásett varð fast gjald fyri hvørja av teimum 7 kanningunum hjá ljósmøðrunum, sum nú komu at standa øllum føroyskum barnakonum í boði (umframt tær 3 kanningarnar hjá lækna).

Vart verður gjørt við, at í «indenrigsministeriets bekendtgørelse af 27. april 1960 for Færøerne om svangerskabshygiejne» stendur beinleiðis í § 1, **1.** stk., at «hvor forholdene taler derfor, **kan også sidstnævnte undersøgelser (t.e. ljósmóðurkanningarnar av barnakonum) efter indenrigsministerens nærmere bestemmelse foretages af en læge,**» tí hetta kann fáa alvriklan týdning, tá ið metast skal um kanningarnar av barnakonum eftir eini nýskipan, har einans verða ljósmøður á teimum 3 **sjúkrahúsunum.**

Í sonn kunngerð § 1. 2. stk., verður boðin **ókeypis fluttningur** av barnakonuni (tó onguntíð fyri minni enn 2 km) til lækna ella ljósmóður, ella um neyðugt at fáa tey til sín til tu sera umráðandi kanningina, tá ið konan hevur verið við barn í 37-38 vikur. Treytin er tó, at barnakonan nýtir vanligan ferðabil ella -bát, tá ið tað er gjørt. Hesar útreiðslur leggur landskassin út, men ríkið afturrindar tær fult. Í Dan-

mark verða ikki aðrar fluttningsútreiðslur aftrgoldnar barnakonum enn tann nevnda, men í Føroyum samtykti løgtingið í 1968

5), sum í § 1 sigur, at «eftir reglum, sum landsstýrið fyriseur, **verður goldið úr landskassanum allar ferðaútreiðslur** til kanman hjá **lækna** ella jarðamóðir fyri kvinnu við barn, sum **búgva í bygdum, har ikki lækni ella jarðamóðir er».**

Í Danmark er komin í gildi nýggj lóg øllum hesum viðvíkjandi: «Lov nr. 282 af 7. juni 1972 om svangerskabshygiejne og fødselshjælp», og varð henda lóg av landsstýrinum send landslæknanum til ummælis, men svaraði hann í skrivi, dagfest 7. februar 1973 (j. nr. 81-1-72), landsstýrinum aftur, at hann ikki kundi mæla til, at nýggju donsku lógin varð sett í gildi fyri Føroyar, men at ádagt varð hesi núsitandi nevnd at koma við uppskoti um eina nýskipan fyri Føroyar.

Samstundis er nevndini kunnugt, at føroyska ljósmóðurfelagið sjálvt arbeiðir við lønar- og trivnaðarspurningum ljósmøðra eins og við húsa- og viðtalutumsløðunum (rúm til barnakonukanningar), ið summastaðni eru ógvuliga vánaligar. Hin 2. februar 1973 varð sett serlig nevnd við limum frá landsstýri, ríkisumboði og ljósmøðrafelagnum til at viðgera hesar spurningar, men um tann nevndin hevur hildið fund og er komin nakað áleiðis, er okkum ókunnugt, men ivaleyst hugsar hon bert um broytingar, serliga lønarliga, av núverandi skipan - - ikki um nakra nýskipan.

3. **Viðurskiftini í løtuni.**

Ljósmóðurskipanin í Føroyum er í dag sovorðin, at bara ein lítil partur av ljósmøðrunum hevur fullan arbeiðsdag, nógvar ljósmøður hava lítið og einki at gera. Og varð ikki kunningin av barnakonum komin í lag — heilt eftir donskum uynstri, og fyri hetta arbeiði fáa ljósmøðurnar eykagjald eftir donskum gjaldsreglum - - ber til at siga, at summar teirra høvdu als einki ella bara heilt lítið arbeiði haft hóast fulla løn. Eisini hevur tað í mong, mong ár verið ómetaliga ringt at fingið størvini úti á bygd sett. Til dømis hevur eingin ljósmóður fingist til Funnings deild, síðani táverandi deildarljósmóður har í 1956 flutti til Havnar, giftist og síðani hevur starvast í Havn sum privatpraktiserandi (starvið í Funningi nú niðurlagt, tí eingin umsøkjari fekst). Onnur størv eru bara sett, tí at maðurin hevur fingið fast starv í bygdini, til dømis Eiðis og Viðareiðis ljósmóðurdømi (har neyðugt var eins og í Fuglafirði ljósmøðurdømi at loyva bústaðin skiftan til ávikavist Norðdepli og Lorvík, skuldi nøkur ljósmóður fáast). Uppaftur aðrastaðni er tað hellt vist, at ljósmóður hevði ikki verið í dag, var hon

ikki gift hagar fyri mongum árum síðani. Á Tvøroyri hevur eingin ljósmóður fingist síðani 1969. Talið á privat praktiserandi ljósmøðrum á bygd, sum í mong ár vóru 2, er nú einki, og av privat praktiserandi eru eftir bara 2 (í Havn), har onnur hevur boðað frá, at hon fer at leggja frá sær. 2 ungar giftar ljósmøður eru í Føroyum, men hvørgin arbeiðir. Ikki er at bjóða til, hvørki við peningaligum viðbótum ella øðrum lættum at fáa ljósmøður út í tey flestu bygdastørvini. Eingin man vita hetta betur enn núsitandi landslæknin, sum í 24 ár í hvørjum einstøkum føri hevur roynt at leita upp aftur tey ungu, føroysku konufólkini, sum hava fingið ljósmóðurútbúgving, men sum hvørva í útheiminum og tað minni enn so altíð, tí tær verða giftar burturi.

Meginatvoldin í hesum er tann, at seinnu árini hava flestar komur · · sum allar ljósmøður málbera seg — «vilja sloppið inn á sjúkrahús at eiga». Hetta er ein sinnalagsbroyting, sum heilsuliga er at gleðast um, av tí at barnsburðirnir tá sjálvandi á allan hátt vera tryggari bæði fyri mammu og barn. Tær grundir, sum av onkrum hava verið førdar fram ímóti hesum (t.d. vandin fyri sjúkrahússmittu og minni bróstgeving) hava í hesum sambandi ongan týdning og eru illa umhugsaðar samanborið við tann vanda, ið kann standast av, at eingin uttan ljósmóðurin og kanska ein einsamallur lækni á bygd eru hjá.

Tíl at vísa hesa stórbroyting skal bara verða nevnt, at í 1878, tá ið fyrsta ljósmóðurlógin kom, vórðu settar 25 ljósmøður, og allar konur áttu heima. Uml. 1950 áttu bara út við 1/3 av øllum barnakonum á sjúkrahúsi, í 1967 79%, men í 1972 91% av øllum barnakonum (738 av 808 konum).

Taka vit árið 1972, var talið á barnakonum í teimum ymisku deildunum og á konum úr hesum deildum, sum áttu heima og á sjúkrahúsi, tað, ið sæst á 15. talvu. Aðrenn farið verður undir talvuna, má verða viðmerkt, at mørkini deildanna millum eru ikki longur so skillig sum fyrr orsakað av teimum nógv batnandi samferðsluliðkindunum. Summastaðni leita konurnar allar vegir, sum best hon til, har tær sleppa. Úr hesi talvu og viðmerkingunum til hennara sigggjast nú heilt skilliga ymisk fyribrigdi, sum eru av stórum týdningi viðvíkjandi framtíðarætlanini (eisini og serliga ein meling kostnaðinum viðvíkjandi):

Bara 9% av øllum barnakonum í Føroyum eiga heima og við bara 5 barnakonum úr øllum hinum Føroyum sum undantokum (1 av Eiði, 1 úr Klaksvík, 2 av Sandi og 1 í allari Suðuroynni, sum av onkrari serligari grund hava verið heima við hús), eru allar hesar barnakonur at finna í Eysturoynni (31 av 113 barnakonum í Runavíkar ljósmóðurdeild og 24 av 78 í Fuglafjarðar ljósmóðurdeild, í báðum deildum umt. 27-30% av konunum ella undir 1/3), nakrar fáar í Vágoynni (10 av 52 t.e. uml. 20%). Allar aðra staðni í landinum leita allar barnakonur

til sjúkrahús at eiga, eitt lyndi ið sum áðrr nevnt lækmaliga hava er at gleðast um, tá ið hugsað verður um trygdina bæði hjá mammu og barni. Hví hetta er í Eysturoy (og í Vágum), kann hava fleiri atvoldir: Gamalur siður er at eiga heima í Eysturoynni og í Vágum, kanska tí at einki sjúkrahús er í oynni, yvirhøvur í flestum førum eru kanska í Eysturoy og í Vágum hampuliga góð húsaviðurskifti og høgligt at fáa til sín lækna og ljósmóður, men allarhelst er mesta atvoldin tann, at ljósmøðurnar í Runavík og í Fuglafirði (Lorvík) heldur vilja hava konurnar at verða heima. Ivaleyst er tað eitki at siga til hetta, sum lønarviðurskiftini eru í løtuni, har allar deildarljósmøðurnar umframt fasta løn (sæst á 16. og 17. talvu) eisini taka fyri hvønn barnsburð, tær hava undir hond. Tí hava tær helst lítlan hug til at lata eina konu frá sær, tá ið hon skal eiga, uttan at tað er øllum greitt framman undan, at tað er neyðugt orsakað av onkrum sjúldigum hjá mammu ella fostri. Men umframt hesar inntøkur hava sum nevnt allar deildarljósmøður nú líkindi til eina týðandi inntøku av barnakonukanningunum (18. talva).

Sum tað skilliga sæst av 15. talvu, er talið á barnakonum í flest øllum deildum nógv, nógv størri enn talið á konum, sum ljósmóðurin hevur sitið hjá, tá ið tær áttu (hetta er so í øllum deildum uttan í Havnardeildunum og Viðareiðis deild, í Suðuroy er talið sjálvandi at siga tað sama). Spurningurin er nú, um allar hesar barnakonur, ið leita inn á sjúkrahús at eiga, og tí framman undan í flestum førum hava vent sær til eina ljósmóður í sjúkrahúsbygdini, meðan tær eru við barn, eisini ganga til kanningar hjá hesi uttandeildar ljósmóður, ella ganga hjá ljósmóðurini í ti deild, har tær búgva. So frægt sum tað ber til at fáa hetta upplýst, er tað bert í heilt fáum førum, at barnakona av bygd leitar til javnar kanningar í Havn ella í Klaksvík. Hetta fæst prógv fyri, bera vit saman tølini fyri inntøkur av barnakonukanningum, sum sæst á 18. talvu, við tu inntøku, sum hvør deildarljósmóður kundi vunnið sær av konunum í egnu deild síni, um hesar konur allar í fullan mun leitaðu til henuara. Í 1972 hevði ein deildarljósmóður fyri hvørja barnakonu, møtti hon til allar kanningar, kunna haft eina inntøku upp á 110-120 kr. Vit siggja, at til dømis deildarljósmóðurin í Runavík kundi haft vunnið sær uml. 13.000 kr. (113×115 kr.), men at hon bara hevur fingið 6.209,93 kr., og deildarljósmóðurin í Fuglafirði (Lorvík) kundi haft vunnið sær 9.000 kr. (78×115 kr.), men bara hevur fingið 5.106,59 kr.

Sjálvandi er at hava í huga, at eyðvitað fara ikki allar konur til allar kanningar, og sum vera man fara konur ofta onkra kanning til tu

deildarljósmóður, sum á sjúkrahúsi skal vera hjá henni, tá ið hon eigur, men taka vit ljósmøðurnar í Havn, so kundu tær tilsamans, høvdu allar konur, tær sótu hjá, eisini gingið til kanningar hjá teimum vunnið út við 60.000 kr. (516×115 kr.), men hava bara fingið útgoldið út við 40.000 kr., men hetta er tó væl meira enn tað, ið tær einans kundu vunnið av barnakonum í Havn og um Havnarleiðina (263×115 kr. = 30.245 kr.).

Hetta bendir tann vegin — sum eisini ljósmøðurnar í Havn siga seg at møta javnan — at barnakonurnar úr hesum báðum nevndu økjum ikki sjáldan ongantíð ella bert heilt fáar ferðir hava verið hjá egnu ljósmóður sínari til kanningar. Atvoldin er tann, at barnakonan, sum konur aðrastaðni í Føroyum fyri trygdar- og aðrar sakir vil sleppa inn á sjúkrahús, men hetta heldur ljósmóðurin ikki verða neyðugt, tí eingi sjúkligt tykist vera ella er at finna. Barnakonan fer tá — so hon skal ikki vera bundin at eiga heima ella tí hon vil ikki særa ljósmóðurina ella gera hana firtna — ongantíð aftur til kanningar, men vendir sær beinleiðis til ljósmóður í Havn, tá ið líður at teirri tíð, hon skal eiga. Men í hesum førum hevur hon alla hesa longu tíð ikki verið undir ljósmóðurhond (tó allarhelst hjá lækna) og komur tá á landssjúkrahúsið meira og minni ókannað. Av hesum kann standast (og hevur staðist) skaði bæði hjá mammu og barni, eru tær fyri óhappinum. Skuldi hendan mannagongd fært við sær, at konan fer ikki til lækna fyrrenn til allarseinast, má eisini verða nevndur vandin (umframt rhesus-vandin) fyri viðføddum syflisi, ið heilt kann óyðileggja eitt fostur. Henda sjúka hevur vundið upp á seg alla aðra staðni í heiminum, og hin nú stóri smittuvandin úr Grønlandi má verða havdur í huga. Syflis hevur fyrr verið avbera sjáldsom sjúka í Føroyum, men í 1972 vóru 3 tilburðir og í 1973 hava longu nú (í oktober) verið 3.

Aðrar deildir eru, har barnakonurnar koma at siga fult kannaðar av bygd til ljósmóður í Havn og eiga á landssjúkrahúsinum, og hildið verður, at meginatvoldin í hesum er, at ljósmøðurnar ikki hjálvar eggja teimum til at eiga heima. Tað sama er at siga um Norðoyggjar og Suðuroy.

Tá ið saman um komur er tað so — smb. 15. talvu — at á Eiði, á Sandi, í Vestmanna, í Vágum, í Norðdepli og á Syðradali (K) er eingi ella lítið og eingi at gera, tað ið føðing viðvíkur, og er bert ella kundi verið eitt sindur at gjørt, tá ið barnakonukanningarnar verða taldar uppí. Í Runavík og Fuglafirði eru enn eitt vist tal av føðingum (hóast tað er ikki stórt), men har eru ikki fáar barnakonukanningar og kundu verið nógv fleiri. Ilitt gamla, rættuliga ljósmóðurarbeiði, at sita hjá konuni og hjálpa henni, tá ið hon eigur, fer nú á døgum at siga bert fram á teimum 3 sjúkrahúsunum.

Og eftirynskjandi er, at allar konur í Føroyum eiga har. At siga allar konur vilja hetta sjálvar, og læknaliga og heilsuliga eru bara grundir fyri og sum frammanfyri nevnt ongar ímóti. Sjúkrahjsini eru, tað ið seingjartalið viðvikur, øll før fyri at taka ímóti hesum konum og eiga eisini altið at vera tað lækualiga. Verður heilsulagið í Føroyum útbygt sum skotið upp av nevndini við fleiri kommunulæknum og heimasjúkrasystrum um alt landið, dugir nevndin ikki at skilja, at kommunulæknar og heimasjúkrasystrar (saman við teimum 3 sjúkrahúsunum) ikki væl betri kunnu gera barnakonukanningarnar enn tað, ið ljósmøðurnar kunnu. Prógvgrundir móti tílikari skipan kunnu einans stava frá vanabundnari hugsan og/ella yrkisfelagspolitikki.

4. **Útreiðslurnar** til ljósmóðurskipanina, sum hon í dag, sæst fyri 1972 fyri ein part av 18. talvu (sum kortini má verða samanborin við 17. talvu, ið sýnir lønarlagið hin 1. apríl 1973).

Tilsamans er í føstum lønum goldið 295.049,98 kr. (men høvdu 2 ljósmøður verið alt árið í Klaksvík, og starvið á Tvøroyri verið sett, hevði talið vaksið við uml. 33.300 kr. til uml. 328.350 kr.), fyri barnakonukanningar tilsamans 78.637,29 kr., tilsamans 373.687,27 kr. (vóru Klaksvík og Tvøroyri við so uml. 407.000 kr.). — Men hetta er ikki alt talið. Kommunurnar lata umframt telefongjald (talið er nevndini ókunnugt, men hevur ikki nógv at týða í hesum sambandi), eisini húsastudning, og verður hann mettur tilsamans at vera 700 kr. × 14 = 9.800 kr. Men umframt løn og fyri barnakonukanningar hava allar ljósmøður (bæði deildar- og privatpraktiserandi sum nevnt undir lógarreglunum) rætt til at taka frá barnakonunum sjálvum, tá ið tær hava átt, eitt vist gjald, sum — óvist við hvørjum rætti — er sett til uml. 1% av – ið hvussu er skattskyldugu — inntøkuni. Johs. Thomsen, skattastjóri, sum man vera kønastur í tílíkum metingum her á landi, hevur gjørt landslæknanum tann boðna at meta um hesi viðurskifti. Hjá uml. 9.000 skattagjaldarum í 1972 – mest ung og yngri fólk, har kvinnurnar eru á barnaburði liggur skattskylduga inntøkan millum 12.000 og 34.000 kr., í meðal 22.200 kr. (tá er samskatting ikki tald uppí). Hetta samsvarar við eini fullari inntøku upp á uml. 31.-35.000 kr. Fyri 808 barnakonur er tí líkt til, at ljósmøðurnar í øllum Føroyum í 1972 hava fingið goldið í hondina ið hvussu er uml. 222×808 = 179.376 kr. (Hægsta lugsandi talið, enn ljósmøður, ið taka av fullari inntøku, verður 345×808 = 278.760 kr. Men hetta tal man vera heilt óhugsandi, og nýtir nevndin tí í komandi metingum sínum lægra talið). Frá sjúkrakøssunum fáa so barnakonurnar (eru tær limir) aftur goldið móti at vísa kvittan frá ljósmóðurini 125 kr. Í 1972 hava sjúkrakassarnir goldið tilsamans 88.750 kr. Men tað veruliga gjaldi, sum barnakon-

an sjálv hevur latið ljósmóðurini, er ilt at fáa upplýst. Áðurnevndi formaður í føroyska ljósmóðurfelagnum í mong ár hevur sagt landslæknanum frá, at hevur ljósmóðurin onga kvittan at vísa fram í teimum førum, har ein kona einki vil gjalda, sýtir sjúkrakassin fyri at gjalda ljósmóðurini beinleiðis (ær 125 kr. — men metir hon hetta tapið ongantíð at vera meira enn uml. 3% av øllum konum, kanska minni.

Aftrat omanfyri nevndu tølum mugu so leggjast útreiðslurnar, sum standast av áðurnevndu løgtingslóg frá 1968. Landsstýrið sigur hesar útreiðslur í 1971/72 (fíggjarlógin § 12, 14) til ferðaútreiðslur hjá barnakonum, t. e. til barnakonukanningar á bygd, har hvørki er lækni ella ljósmóður, at hava verið 11.375,50 kr. (fyri fíggjarárið 1973/74 eru settar 15.000 kr. á fíggjarlógina). Til konur úr avbygdum og útoyggjum, sum nakað frammanundan fóru inn í sjúkrahúsbygd at eiga, eru í 1971/72 latnar 1.705 kr. (á fíggjarlógini 1973/74 eru settar 3.000 kr.). Inntøkur ljósmøðra í 1972 (vóru øll støv sett alt árið) høvdu tí verið uml. 596.163 kr., og allar útreiðslur samfelagsins (sjálvandi ikki uppíroknað kostnaðurin at liggja á sjúkrahúsi og tað, ið hitt almenna letur í útreiðslum til læknakanningarnar av barnakonum) eru, sum tað sæst av uppgerðini niðanfyri 614.948 kr. Til amboð, tól o.s.fr., ið koma at verða væl færri eftir nýskipanini, eru latin nøkur fá túsund. Váttaðar av landslæknanum vórðu í 1972 smb. «anordning af 25. oktober 1962 om distriktsjordemødre på Færøerne» § 6 rokuingar upp á tilsamans 5.704,55 kr. og higartil (oktober) fyri 1973 út við 4.000 kr., men ávikavist uml. 4.500 kr. og 3.000 kr. eru farnar til tær ljósmøður, ið hava konurnar at eiga heima við hús. Einki er hesi ár farið til ljósmóðurtasku við amboðum í.

Lønir	328.350,—	
Barnakonukanningar	78.637,- -	
Húsaviðbót	9.800,—	
Goldið í hondina (uppíroknað afturgoldið frá sjúkrakassum í mesta lagi 100.000 kr.)	179.376,—	596.163,—
Ferðaútreiðslur til barnakonukanningar —	11.375,—	
Konur úr avbygdum	1.705,—	13.080,- -
Til amboð, tól, sóltreinskandi evni o.t.		5.705,—
Tilsamans		614.948,—

Tað er hetta tal, 615.000 kr., ið — ljósmøðrunum viðvíkjandi — má verða borið saman við útreiðslurnar av eini nýskipan.

Núgaldandi ljósmóðurskipan tykist nevndini at vera heilt burturoldað, óvirkin og upp á seg dýr (sum tað sæst av uppskotinum til nýskipanina) í mun til tað lítla gagn í tær allarflestu ljósmøðurnar gera. Skipanin eigur at verða avtikin, so skjótt sum til ber.

5. **Nýskipan av ljósmóðurviðurskiftunum í Føroyum.**

Staðin fyri núgaldandi skipan eiga ljósmøðurnar, sum tað almenna setir, at verða settar við og arbeiða á teimum 3 sjúkrahúsunum og fáa fasta løn og eftirløn, hóskandi vaktar- og fritíðarskipan (men skyldu til í neyðsend at fara út á bygd, skuldi tað onkra sjáldna ferð verið neyðugt), umframt skyldu til á sjúkrahúsunum at hava fasta, ókeypis viðtalu fyri barnakonur. Og metir tann nevndin, ið seinast í hesum uppskoti verður mælt til at seta, tað neyðugt, eiga tær eisini at hava skyldu til ókeypis fasta viðtalu í størstu bygdunum. Nevndin heldur, at á landssjúkrahúsinum eiga at vera 1 yvirljósmóður og 4 fastar ljósmøður, á Norðoya sjúkrahúsi og á Suðuroyar sjúkrahúsi ávikavist 3 og 3, tilsamans 10 ljósmøður settar av tí almenna móti í løtuni 14 deildarljósmóðurstørvum, har seinnu árini ljósmøður bara hevur fingist til tey 13 hóast sera nógvar og ymsar royndir.

Nevnt varð frammanfyri, at tað átti ikki at koma føroysku ljósmøðrunum til ógagns, at tær stóðu einsamallar og ikki hjingu uppi í donskum meginfelagi, tvørturimóti. Fyri starvsfelagar teirra í Danmark er nú komin í gildi sáttmáli frá 5. april 1972 («overenskomst for jordremødre», góðtikin av «Amtsrådsforeningen i Danmark, Københavns hospitalsværen og Den almindelige danske jordemoderforening»), sí lønarviðurskiftunum viðvíkjandi fylgiskjal 9. Í hesum sáttmála stendur eisini um onkra javningarviðbót av ymiskum slagi og dýrtíðarviðbót sum hjá tænastumonnum (men tað er ikki øðrvísi enn fyri deildarljósmøður, frían yrkisbúnað, frídaga- og fritíðarreglur (t.e. fast vaktarhald), meðal arbeiðstíð upp á 41¾ tímar og um eykagjald fyri yvirtíð, kvøld- og náttararbeiði (sum kortini kann verða afturrindað sum frídagur) o.s.fr. Tær hava ongan rætt til íbúð, heldur ikki til kostarhald á sjúkrahúsunum. Teimum kann verða álagt — uttan eykagjald — skylda til ókeypis í arbeiðstíð at halda viðtalu fyri barnakonum og eisini — í arbeiðstíð — at halda viðtalu úti á bygd (flutningsútreiðslur mugu tá sjálvandi verða teimum afturgoldnar, ella tær nýta bil hjá sjúkrahúsunum). Eisini er gjørligt at seta ljósmøður við lutvísari arbeiðstíð ella tímalønt ar ljósmøður, men nevndin metir hetta fara at verða dýrari loysn. Tó, hetta má sjálvandi sjúkrahúsfyrisitingin

gera av. Lagt skal verða aftrat, tá ið hugsað verður um sjúkrasystranæmingar og tað, sum nevnt er í tí partinum av hesum nevndaráliti, ið snýr seg um sjúkra- og heilsusystrar — at hesum ljósmøðrum eisiui (smb. sáttmálan § 12) kann verða áløgd skylda ókeypis í arbeiðstíð at læra frá sær.

Útreiðslurnar av teirri nýskipan, sum nevndin skjýtur upp, kunnu metast soleiðis (smb. fylgiskjal 8):

	Lønir:
Á landssjúkrahúsinum:	
1 yvirljósmóður	u.l. 54.000 kr.
4 ljósmøður á 45.000 kr.	u.l. 180.000 kr.
	u.l. 234.000 kr.
Norðoya sjúkrahús:	
3 ljósmøður	u.l. 135.000 kr.
Suðuroyar sjúkrahús:	
2 ljósmøður	u.l. 90.000 kr.
Tilsamans	u.l. 459.000 kr.

Landslæknin hevur loyvt sær at spyrja formansskapin í «Den alm. danske jordemoderforening» og fingið tað svar, at tílík skipan hevði verðið góðtikin í Danmørk.

Útreiðslurnar hjá føroysku sjúkrahúsunum í aðrar mátar verða ikki størri enn í dag, har jú at siga allar konur longu eiga, og sjúkrahúsini lata alt, ið ljósmøðurnar nýta. Kostuaðurin av barnakomukanningum á sjúkrahúsunum sæst ikki aftur í tí frammanundan stóra rakstrinum (sbr. tær frammanfyri nevndu av landslæknanum váttaðu útreiðslurnar til hetta endamál upp á 5.705 kr. í 1972).

Ein í allar mátar betri nýskipan, bæði fyri ljósmøðurnar og fyri barnakonurnar, kemur so statt at kosta uml. 460.000 kr. mótvegis teimum 615.000 kr., sum viðurskiftini í dag kosta samfelagnum. Og tá er ikki at gloyma, at hvørki barnakonan ella sjúkrakassarnir (ella ein komandi sjúkratrygging) fáa nakað at gjalda fyri sjálvan barnsburðin.

Sjálvandi hevur tað almenna skyldu mótvegis teimum ljósmøðrum, sum nú sita í føstinn starvi. Tær eru:

Aldur ljósmøðra

1.	Runavík	30 ár
2.	Fuglafjørður	33 ár
3.	Klaksvík II	39 ár
4.	Eiði	40 ár
5.	Viðareiði	44 ár
6.	Tórshavn II	53 ár
7.	Miðvági	54 ár
8.	Tórshavn I	56 ár
9.	Sandi	60 ár
10.	Syðradalur (K)	63 ár
11.	Klaksvík I	63 ár
12.	Vági	64 ár
13.	Vestmanna	67 ár

Men tað liggur so væl fyri, at øllum uttan teimum kunnu verða bjóðað fast starv við sjúkrahúsini. Hesar báðar verða helst deildarljósmóðurin í Vágum (nr. 7) og á Sandi (nr. 9), sum valla leggja í at flyta, og sum eru ávikavist 54 og 60 ár. Deildarljósmóðurin í Vestmanna (nr. 13) kann fara frá við eftirløn vegna aldur.

Fyrisitingin má sjálvandi gera av, um deildarljósmøðurnar á Sandi og í Miðvági skulu fara frá við biðingar- ella eftirløn, ella onkursvegna verða drignar upp í heilsuliga arbeiði á staðnum (t.d. sum hjálp hjá læknunum). Men hóast tær vórðu sitandi við fullari løn (tilsamans út við 53.000 kr., smb. 17. talvu), so sæst, at nýskipanin við teimum uppiroknað kortini hevði kostað samfelagnum 102.000 kr. minni enn ljósmóðurviðurskiftini í dag.

Í hesum sambandi eigur at verða nevnt, at í Føroyum er bara eftir 1 privat praktiserandi ljósmóður (í Havn, 50 ár).

At enda skjýtur nevndin upp, at útreiðslurnar til nýggju ljósmóðurskipanina verða bornar av føroysku sjúkrahúsunum, sum ríkið vanliga afturrindar uml. 50% av øllum rakstri.

Í Danmørk kom hin 7. juni 1972 «lov nr. 282 om svangerskabshygiejne og fødselshjælp», sum kom í gildi hin 1. apríl 1973, og sum samstundis tekur av gomlu lógirnar um deildarljósmøður og um kanning av barnakonum.

Sambært hesa lóg er meginreglan tann, at øll barnakonuhjálp er ókeypis fyri konurnar sjálvar, allar konur kunna — vilja tær — eiga á sjúkrahúsi ella øðrum almennum stovni, og ljósmøðurnar fáa einki

eyka longur fyri kanningarnar av barnakonum (tað fáa aftarhóti læknarnir framvegis), men hetta arbeiði er roknað upp í tað virkisøki, ið tær fáa løn fyri. Skilligt er tí, at uppskot nevndarinnar fyri Føroyar liggur heilt á sama bógvi sum lógin í Danmark — men samstundis má verða sagt, at ikki er gjørligt uttan broytingar at seta donsku skipanina í gildi her. Neyðugt er at laga seg eftir viðurskiftunum, umstøðunum og fyritreytunum her á landi.

Verður tikið við tí uppskoti, sum mælt verður til í hesum nevndaráliti, skjýtur heuda uevndin upp, at ein lítil nevnd verður sett heimanvegin, har ið hvussu er yvirlæknin fyri deildina í navfrøði og kvinnusjúkum við landssjúkrahúsið og fyristøðukvinnan har umframt umboð fyri ljósmøður og kommunulæknar sita, og at henda nevnd fær tann setning skjótast gjørligt at gera uppskot til reglur øllum hesum spurningum viðvíkjandi (reglugerðir og fyriskipanir viðvíkjandi kanningum av barnakonum, bæði á sjúkrahúsum og á bygd, umframt samarbeiðið við kommunulæknar, heimasjúkra- og heilsusystrar og setan og lønarlagi hjá ljósmøðrunum eftir nýskipanini).

6. ÚRTAK
viðvíkjandi ljósmøðrunum.

Nevndin hevur í álitinum frammanfyri givið eitt yvirlit yvir núgaldandi reglur viðvíkjandi ljósmøðrunum og rættarstøðu teirra. Tá ið fyrsta lógin um ljósmøður kom í 1878, vórðu Føroyar býttar sundur í 25 ljósmóðurdeildir. Í 1920 komu við uýggjari lóg 28 deildir, men við lógini frá 1953 bert 18 deildir (og vóru tá umframt 6 privat praktiserandi ljósmøður, t.e. tilsamans 24). Men so líðandi er hetta tal, orsakað av at ljósmøður so illa fingust at seta seg niður úti á bygd, og barnakonur meira og meira leitaðu inn á sjúkrahúsini at eiga undir í allar máta tryggum korum, minkað niður í núverandi talið 14 deildarljósmøður (har tað eina starvið í fleiri ár hevur verið ósett) og 2 (um stutta tíð bara ein) privatum ljósmøðrum (smb. 15. talvu).

Í 1972 áttu bara 9% av øllum barnakonum heima, og vist verður, at tær allarflestu av hesum koma úr 2 deildum í Eysturoynni, har ljósmøðurnar audøva ímóti, at tær eiga á sjúkrahúsi. Vist verður, at henda mótstøða kann verða til skaða fyri mammu og barn.

Lønarútreiðslur og onnur inntøkulíkindi ljósmøðra eru at síggja á 16., 17. og 18. talvu. Tilsamans mugu ljósmøðurnar (13 deildar- og 2 privatar ljósmøður) í Føroyum í 1972 ætlast at hava vunnið í reiðum peningi 596.163 kr., hóast tær hava ógvuliga lítið at gera fyri hesar

inntøkur. Útreiðslurnar, ið av núverandi viðurskiftum hava staðist, hava tilsamans verið uml. 615.000 kr. (smb. 79. bls.).

Skotin verður tí upp ein nýskipan, har bara fastar ljósmøður verða á teimum 3 sjúkrahúsunum (5 á landssjúkrahúsinum, 3 á Norðoya sjúkrahúsi og 2 á Suðuroyar sjúkrahúsi), og sagt verður frá, hvussu kanningarnar av barnakonum tá samstundis kunnu fara fram á sjúkrahúsum og úti á bygd. Eftir hesi skipan verða útreiðslurnar hjá teimum 3 sjúkrahúsunum tilsamans uml. **460.000 kr.** (smb. 81 bls.), har ríkið ætlast at afturrinda helvtina. Allar barnakonukanningar verða framvegis ókeypis, og hitt almenna fær einki eyka at gjalda til ljósmøðurnar fyri hesar kanningar, og barnakonurnar (heldur ikki sjúkrakassarnir ella ein komandi sjúkratrygging) fáa nakað — sum tær nú gera — at gjalda ljósmøðrunum fyri sjálvan barnsburðin.

Orsakað av at nýskipanin fyri allar partar verður so nógv ódýrari enn nuverandi viðurskifti, verður mælt til, at nýskipanin verður sett í gildi longu frá 1. apríl 1974.

Dentur verður lagdur á, at sett verður beinanvegin ein minni nevnd, ið so skjótt sum til ber skal gera tær reglur, ið galda skulu fyri nýskipanina, og at tingingar beinanvegin verða tiknar upp við sjúkrahúsfyrisitingina.

Hóast tað í hesum sambandi kann tykjast lítilsvert at nevna, leggur landslæknin nógvan dent á, at ljósmøðurgerðarbøkurnar verða varðveittar og ikki avtiknar her í Føroyum (eins og ætlanin er at gera í Danmørk), helst í nakað broyttum og umbøttum skapi, ið betur hóskar til føroysk viðurskifti. Tí hesar gerðarbøkur eru, ikki bara læknaliga, men eisini á so mangan annan hátt her hjá okkum eitt keldutilfar, sum einaus hann, ið fingist hevur við tað nú í meira enn eina fjórðungsøld, rættuliga man duga at meta um.

V. bólkur

Stuttur samandráttur.

Nevndin hevur í frammanfyri standandi áliti (víst verður til úrtøkini á 41., 63. og 84. bls.) skotið upp eina ný- og samskipan av kommunulæknunum, heimasjúkra-, smábarna- og skúlaheilsusystrunum í Føroyum, so her verða ávikavist 23, 27,5 og 10 av hesum starvsfólkum, tá ið skipanin er komin í fult gildi.

Skotið verður upp, at ljósmóðurviðurskiftini verða greidd longu í fíggjarárinum 1974/75, men at hinir báðir bólkarnir verða greiddir eftir 3 fíggjarárum, byrjandi í 1974/75, og ný- og samskipanin sett í fult gildi teimum viðvíkjandi í 1976/77.

Á 19. talvu eru at siggja bæði útreiðslurnar komandi trý fíggjarárini og útreiðslurnar tilsamans, tá ið skipanin er liðug, um so er, at skipanin verður sett í gildi frá 1. apríl 1974. Eisini sæst av 19. talvu, hvussu meirútreiðslurnar verða, býttar millum kommunur, lund og ríki, og tað, ið spart verður í summum førum — serliga hjá sjúkrakøssunum (ella eini komandi sjúkratrygging). Av talvuni sæst, at meirútreiðslurnar tilsamans verða u.l. 1,6 miljónir krónur. Nevndin hevur tí skotið upp, at skipanin verður fram trý tey komandi fíggjarárini. Í fíggjarárinum 1974/75 verða meirútreiðslurnar tilsamans, samanbornar við standandi skipan, 736.000 kr. í 1975/76 verða 484.000 kr. aftrat (tilsamans 1,22 miljónir). Í fíggjarárinum 1976/77, tá ið skipanin er sett í fult gildi, 369.000 kr. aftrat (tilsamans 1.589.000 kr.).

Nevndin skilar til eins og dentur er lagdur á fleiri staðni í álitinum (50., 58., 84. og 86. bls.) — at sera umráðandi er, at smærri nevndir, so skjótt sum til ber, verða settar, so at tær kunnu gera uppskot um fyriskipanir, reglugerðir o.a.m. ný- og samskipanini viðvíkjandi, eins og fyrisitingin heinan vegin má taka upp tingingar, serliga við tær kommunur, har broytingar fyrst skulu koma.

Eisini má fyrisitingin gera skrá yvir, hvørjar lógir, fyriskipanir, reglugerðir, rundskriv o.a.m. skulu takast av, og hvørjar ið skulu koma í staðin fyri.

KOMMUNULÆKNASKIPANIN í LØTUNI 1. talva
(Fólkatalið samsvarar uppgerð frá landsfólkayvirlitinum 31.12. 1971)

Læknadømi / Kommunur	Fólkatal (og tal/komm. lækn.)	Tal á komm. lækrum	Bústaður og viðmerkingar
Norðoya			Klaksvík; umframt eru 2 yvirlæknar við avmarkaðum sjúkrakassalimatali úr Klaksvík*)
allar	5.873 (2.390)	2	
Fuglafjarðar			Fuglafjørður
Oyndarfjarðar, Fuglafjarðar, Leirvíkar	2.202	1	
Skála			Skáli
Elduvíkar, Gøtu, Skála, Sjóvar	2.277	1	
Runavíkar			Sallangarði
Runavíkar, Nes	2.596	1	
Eiðis			Eiði
Sunda, Eiðis, Gjáar, Funnings, Haldórsvíkar, Saksunar, Hvalvíkar, Hósvíkar	1.934	1	
Vestmanna			Vestmanna
Kollafjarðar, Kvívíkar, Vestmanna	2.154	1	
Havnar			Tórshavn
Kaldbaks, Havnar uttanbiggja, Kirkjubøar, Hests, Nólsoyar, Havnar	12.483 (3.120)	4	
Sandoyar			hejma á Sandi
allar + Skúvoyar	1.645	1	
Vága			Miðvágur
allar + Mykines	2.583	1	
Suðuroyar norðara			Tvøroyri; umframt eru 2 læknar á sjúkrahúsinum við avmarkaðum sjúkrakassalimatali á Tvøroyri**)
Hvalbiar, Froðbiar, Fámjins	2.908 (2.160)	1	
Suðuroyar sunnara			Vágur
Hovs, Porkeris, Vágs, Sumbiar	2.576	1	
Tilsamans	38.731	15	Umfrant eru teir nevndu 4 læknarnir á sjúkrahúsunum

*) Skyldu til at røkja upp í 500 sjúkrakassalimir (tá ið børnini verða talid uppí, verður talið større, 1 limur samsvarar við 1,5 fólk) tilsamans í Klaksvík (í løtuni hevur annar u.l. 350 limir, hin u.l. 60).

**) Skyldu til at røkja (og sum røkja) hvor 250 sjúkrakassalimir á Tvøroyri.

UPPSKOTIÐ TIL NYGGJA KOMMUNULÆKNASKIPAN **2. talva**
(Fólkatalið í bygdunum ætlað eftir uppgerð frá landsfólkayvirlitinum 31.12.1972)

Læknadømi / Bygdir (ikki kommunur)	Fólkatal (og tal/komm. lækn.)	Tal á komm. lækn. tá ið fullsett er	Bústaður
Norðoya			allir í Klaksvík
allar	5.500		
	(1.830)	3	
Fuglafjarðar			Fuglafjørður
Leirvík, Fuglafjørður	2.000	1	
Skáta			Skáli
Selatrað, Morskranes, Strendur, Skála, Skálabotnur, Oyndarfjørður, Hellurnar	1.760	1	
Runavíkar			Runavík
Æðuvík, Rituvík, Lamba, Nes, Toftir, Runavík, Glyvrar, Søldarfjørður, Skipanes, Gøturnar	3.450 (1.725)	2	
Eiðis			Eiði
Oyri, Norðskáli, Svínáir, Ljósá, Eiði, Gjógv, Funningur, Funningsbotnur, Elduvík	1.250	1	
Kollafjarðar			Kollafjørður
Tjørnuvík, Haldórsvík, Langasandur, Streymnes, Hvalvík, Saksun, Hósvík, Kollafjørður,	1.350	1	
Vestmanna			Vestmanna
Vestmanna, Válur, Kvívík, Stykkið, Leynar, Skuvlingur	1.600	1	
Suðurstreymoyar			Tórshavn
Kaldbak, Kaldbaksbotnur, Sund, Mjørkadalur, Argir, Hoydalar, Hoyvík, Hvítanes, Norðadalur, Syðradalur, Ternuryggur, Kirkjubøur, Velbastaður, Hestur, Koltur, Borðan, Nólsoy, Havnin	12.600 (2.100	6	
Sandoyar			Sandur
allar + Skúvoy	1.650	1	
Vága			Miðvágur
allar + Mykines	2.600 (1.300)	2	
Suðuoyar norðara			Tvøroyri
Sandvík, Hvalba, Nes, Froðba, Tvøroyri, Trongisvágur, Líðin, Øravík, Fámjin	2.900 (1.450)	2	
Suðuroyar sunnara			Vágur
Hovi, Porkerl, Vágur, Lopra, Akrar, Víkarbyrgi, Akraberg, Sumba	2.570 (1.285)	2	
Tilsamans	39.200	23	

sethúsum, viðtaluhølum og amboðum aftrat tí, sum er, eftir nýggju kommunulæknaskipanini — og kostnaðurin av hesum.

	Sethús			Viðtaluhøli ella læknamiðstøð				Fast innbúgv og stór ella føst amboð		
			Útreiðslur					Útreiðslur (at gjalda straks)		
		Kostnaður	1. árið til		Kostnaður	Útreiðslur 1. árið til			Hjá	Hjá
Læknadømi	Tal	Tils.	kommunur	Tal	Tils.	kommun.	land	Tils.	kommunum	landi
Suðuroyar sunnara	2	400.000	72.000 el. studn.	1 miðstøð til 2 lækn.	50.000	4.500	4.500	23.520	11.760	11.760
Suðuroyar norðara	2	400.000	72.000 el. studn.	(1 miðst. 1. 2 lækn.)	?	?	?	47.040	23.520	23.520
Sandoyar	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Vága	2	400.000	72.000 el. studn.	1 miðst. t. 2 lækn.	50.000	4.500	4.500	23.520	11.760	11.760
Suður-streymoyar	2	400.000	72.000 el. studn.	1 miðst. t. 3 lækn.	100.000	9.000	9.000	(47.040*)	23.520	23.520)
Kolla-fjarðar	1	200.000	36.000 el. studn.	1 við-taluhøli	150.000	13.500	13.500	23.520	11.760	11.760
Vestmanna	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Eiðis	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Skála	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Runavíkar	2	400.000	72.000 el. studn.	1 miðst. 1. 2 lækn.	50.000	4.500	4.500	23.520	11.760	11.760
Fuglafjarðar	0	0	0	0	0	0	0	0	0	0
Norðoya	1**)	200.000	36.000	Fyribils leig. høli	?	?	?	23.520	11.760	11.760
Tilsamans	12	2.400.000	432.000 el. studn.	4 miðst. 1 viðt.høli	400.000 ***)	36.000 ***)	36.000 ***)	211.680	105.840	105.840

*) Útreiðslur til føst og stór amboð eru fyribils taldar uppí hjá Havnarlæknum, hóast uppskotið miðar eftir, at hesar útreiðslur eiga teir sjálvir at bera.

**) Umframt sethúsini, sum eru í gerð.

***) Nevndini er ókunnugt, hvussu ætlanin er, at læknamiðstoðin á Tvøroyri skal gjaldast. Heldur ikki ber væl til at meta um húsaleiguna í Klaksvík til 3. kommunulæknan. Her má tí leggjast nakað útfyri.

4. talva

INNTØKURNAR
hjá øllum kommunulæknum tilsamans í 1972,
av vanligum praksis, skúlabarna-, smábarna- og barnakonukanningum umframt av koppingum og av váttanum.

Goldið av sjúkrakøssum	2.561.706, –	
Goldið av sjúklingum umfram, B-limum (ætlað)	120.000,—	
Viðgerð av kynssjúkum	16.000,	
Váttanir av ymiskum slag	180.000,—	2.877.700,—
Inntøkur av skúlalæknavirki (Eiðis og Runavíkar læknir arbeiddu ikki í skúlunum hetta ár, men eru taldir uppí við tilsamans 17.000 kr.)		87.420,
Koppingar av børnum eftir galdandi lóg (ikki fyri pokur, sum landslækniu ger) og av barnakonu- og barnakanningum)		470.455,—
Tilsamans		**3.435.575,—**

INNTØKURNAR

5. talva

hjá teimum ymisku kommunulæknunum,
sum tær væntandi fara at vera eftir teirri nýskipan, sum upp verður skotin

Læknadømi og tal á læknum í hvørjum		Føst løn	Skúlalæknaløn	Koppingar, smábarna- og barnakonukanningar	Sjúkrakassa- og aðrar praksisinntøkur	Inntøkur tilsamans	Meðal innsøka hjá hvørjum kommunulækna í læknadømunum
Norðoya	3	114.000	18.040	66.000	403.700	601.740	200.580
Fuglafjarðar	1	38.000	6.560	24.000	146.800	215.360	215.360
Skála	1	38.000	5.773	21.120	129.184	194.077	194.077
Runavíkar	2	76.000	11.316	41.400	253.230	381.946	190.973
Eiðis	1	38.000	4.100	15.000	91.750	148.850	148.850
Kollafjarðar	1	38.000	4.428	16.200	99.090	157.718	157.718
Vestmanna	1	38.000	5.248	19.200	117.440	179.888	179.888
Suðurstreymoyar	6	228.000	*)	151.200	924.840	1.304.040	217.340
Sandoyar	1	38.000	5.412	19.800	121.110	184.322	184.322
Vága	2	76.000	8.528	31.200	190.840	306.568	153.284
Suðuroyar norð.	2	76.000	9.512	34.800	212.860	333.172	166.586
Suðuroyar syðra	2	76.000	8.430	30.840	188.638	303.908	151.954
Tilsamans	23	874.000	87.347	470.760	2.879.482	4.311.589	187.460**)

*) Kommunulæknarnir í Havn fara helst ongantíð at fáast við skúlalæknaarbeiði (sí viðmerkingar til nýskipanina).
**) Í meðal fyri allar Føroyar, ella fyri hvørji 1740 fólk.

ÚTREIÐSLUR 6. talva

til fasta løn til kommununlæknar eftir nýskipanini
og munurin millum hesar útreiðslur og tær eftir galdandi skipan

Bústaður	Talið á komm. læknum	Kommunan	Landið	Ríkið	Tilsamans
Vágur	2	19.000	19.000	38.000	76.000
Tvøroyri	2	19.000	19.000	38.000	76.000
Sandoy	1	9.500	9.500	19.000	38.000
Havnin	6	57.000	57.000	114.000	228.000
Vágarnar	2	19.000	19.000	38.000	76.000
Vestmanna	1	9.500	9.500	19.000	38.000
Kollafjørður	1	9.500	9.500	19.000	38.000
Eiði	1	9.500	9.500	19.000	38.000
Skált	1	9.500	9.500	19.000	38.000
Runavík	2	19.000	19.000	38.000	76.000
Fuglafjørður	1	9.500	9.500	19.000	38.000
Klaksvík	3	28.500	28.500	57.000	114.000
Tilsamans	23	218.500	218.500	437.000	874.000
í løtuni	15	142.500	142.500	285.000	570.000
Munur	8	76.000	76.000	152.000	304.000

7. talva

ALLAR ÚTREIÐSLUR HJÁ TI ALMENNA til

fastar lønir, sethús, viðtaluhøli og amboð lað fyrsta árið, varð nýskipanin sett í gildi øll í senn

Útreiðslur til	Kommunur	Landið	Ríkið	Tils.
Fastar lønir	218.500	218.500	437.000	874.000
Sethús	432.000 el. studn	0	0	432.000 el. studn.
Viðtaluhøli	36.000	36.000	0	72.000
Fast inubúgv og stór ella føst amboð	105.840	105.840	0	211.680
Tilsamans	792.340	360.340	437.000	1.589.680
Útreiðslur í løtuni til somu endamál*)	169.500	142.500	285.000	597.000
Munur	622.840	217.840	152.000	992.680

*) Nevndini er ókunnugt, hvørjar láni- ella aðrar skyldur kommununrnar hava av lækasethúsum og viðtaluhølum í løtuni. Her er tí einki talt uppí uttan n.l. 27.000 kr., sum Havnar kommuna letur teimum 3 av 4 núverandi kommunulæknum í Havn í húsastudningi til egna hús toirra.

Heldur ikki eru í hesi talvu tald uppí gjøld og flutningsútreiðslur til kommunulæknavikarar.

Núverandi viðurskifti heimasjúkra-, smábarna- og skúlaheilsusystra víkjandi **8. talva**

Læknadømi	Heimasjúkrasystrar			Skúlaheilsusystrar 1. apríl 1973			Smábarnaheilsusystrar		Viðmerkingar — serliga frá kommununum sjálvum.
	Tal og bygd	Lønarútreiðslur Kommunur	Sjúkrakassar	Tal	Lønarútreiðslur Kommunur	Afturgoldið av riki	Tal	Lønarútreiðslur Kommunur Ríkið	NB: Lønarútr. sjúkrakassa 197.872 + 56.082,16 = 141.789,92 kr.
	max. zero fuel weight	basic weight	total fuel	max. payload	max. T.O. weight	max. landing weight	alt. 1000 ft	landing speed kt	cruising speed kt	consumption t/hr	max. fuel nm	payload	max. payload nm	req.	T.O. run (G-R) m	landing m	fuel required for trip t	trip fuel t	block fuel t	max. fuel for start t	max. trip payload t	start-weight t	fuel	max. trip payload
Convette 3	30	27,2	15,2	8,3	46,0	43,7	35	123	274	2,5	2450	3,6	1535	SR 422 A	1830	1510	35,6	3,6	40,1	7,3	5,3	42,3	4,2	8,3
Avro 748 - 6 2	32	21	6,1	5,7	39,1	38,1	20	97	232	0,7	1420	30,6	700	BCAR	1310	1470			19,1	2,8	4,4	39,1	2,1	5,7
Brequet 941	46	12,3	6,7	4,0	24,5	20,5	10	78	230	0,8	1610	3,0	970	AIR 801	970	1260	20,0	2,3	22,4	4,0	3,2	22,5	2,8	7,0
Fokker F 27 S 100	42	19,2	4,1	4,6	37,1	37,0	20	98	233	0,6	1140	3,1	580	JCAR-Perf C	1250	1430								
HP Herald 203	56	19,7	7,5	5,1	39,1	37,5	20	95	230	0,6	1580	3,9	950	BCAR	1650	1790	37,6	3,6	42,5	5,2	4,8	42,5	3,8	5,1
Nord 262	29	9,2	3,6	3,6	19,8	19,0	1	87	200	0,6	1170	2,2	395	SR 422 B	950	970								
Peter 810	24	5,4	2,5	4,3	12,1	11,5	23	99	220	0,2	2050	0,8	1060	SR 422 B	1130	1170			9,5	1,4	2,1	9,2	0,8	2,3
Viscount 700 D	63	34	11,1	6,2	29,0	28,0	23	115	272	1,1	1760	4,2	1500	BCAR	1660	1820	20,0	2,4	23,4	4,8	5,2	25,2	2,8	5,3
Convair 440	39	15,0	5,2	5,8	34,3	33,8	20	101	229	1,55	1650	2,5	240	CAR 4b	1515	1540			21,0	3,8	4,1	22,3	1,8	5,7
Hapin 2.0	14	4,3	1,1	1,5	6,7	6,0	6	64	159	0,14	1505	1,4	371	BCAR	770	830			6,1	1,1	0,7	6,1	0,8	1,2
Caribou	21	8,8	3,3	3,9	12,1	12,9	7	74	157	2,26	1111	2,3	321	CAR 4 b	1020	940								
DC-3	12	8,3	2,3	3,1	12,7	12,0	6	90	164	0,22	1539	1,8	495	CAR 4 b	1140	965			9,2	1,8	1,9	9,2	1,1	2,6
DC-4	36	17,6	9,8	9,1	33,1	29,5	10	96	197	0,61	3580	5,2	1860	CAR 4 b	1550	970					3,1			5,2
DC-6 B	101	36,6	15,2	11,3	68,5	60,0	21	118	224	1,35	4115	6,4	2810	CAR 4 b	1940	950	40,1	4,6	44,8	5,1	6,8	44,4	2,7	6,9
Twin Pioneer	9	4,6	2,3	1,8	6,8	6,6	4	70	121	0,5	630	1,7	220	BCAR	610	390								

Distance Paramaribo - Curaçao = 500 NM.

- = log gedan data sheet
- ** flight manual
- met 640 m

Bijlag 2
Range & field performance

SJÓMANNSSKÚLALÓGGÁVAN

Álit frá nevndini til kannan av sjómannslæruni

Við løgtingslóg nr. 23. frá 12. mai 1970 fekk landsstýrið heimild at seta 5-mannanevnd til kanman av lóggávuni viðvíkjandi sjómansskúlalæruni, serstakliga teimi nautisku prógvtøkunum.

Nevndin, ið landsstýrið setti til at kanna hetta mál, var hendan: D. J. Joensen, táverandi sjómansskúlastjóri, formaður, Fischer Heinesen, sjómansskúlastjóri, Poul Petersen, fulltrúi, John Kjærbæk, yvirtollari og Jens Peter Arge, stjóri.

Henda nevndin er seinni broytt eitt sindur, við tað at Poul Petersen, fulltrúi, í 1972 segði seg úr nevndini vegna aldur og 24. august 1972 valdi landsstýrið Poul Johannes Johansen, sjómansskúlastjóra, sum nevndarlim í hansara stað.

Síðani mars 1973 hevur J. Hilduberg, fulltrúi á landsskrivstovuni verið skrivari hjá nevndini.

Formaðurin fór beinanvegin undir at kanna ta galdandi føroysku lóggávuna um útbúgving av sjófólki.

Av tílíkari føroyskari lóggávu er lítið til. Veruliga er tað bert løgtingslóg nr. 8 frá 19. mars 1958 við seinni broytingum um sjómansskúla og sjómanslæru.

Kuýtt at hesari lóg eru:

1. reglugerð nr. 5 frá 22. januar 1957 um prógvtøku á Føroya sjómansskúla,
2. kunngerð nr. 46 frá 11. september 1958 um læru og prógvtøku til heimaskipararoynd, og
3. reglugerð nr. 65 frá 18. september 1968 við seinni broyting um læru og prógvtøku til skiparaprógv.

Aðrar løgtingslógir, ið hava samband við sjómansútbúgvingina eru løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1966 um manning av skipum og sjómansløgtingslóg nr. 57 frá 3. november 1967.

Viðmerkjast kann at útbúgvingin av maskinmeistarum og radioekspedientum ikki er føroyskt sermál og fer útbúgvingin av hesum fólki tí fram eftir galdandi ríkislóggávu.

Nevndin hevur umframt danskt lóggávutilfar fingið sær til vega reiði-

liga stórt tilfar um galdandi lóggávu um sjómansútbúgving í Noregi, Bretlandi, Íslandi og Týsklandi.

Um hetta tilfar er at siga at tað er ógvuliga rúgvismikið. Nevndin heldur at føroysku prógvtøkurnar eiga at liggja á hædd við tilsvarandi prógvtøkur í øðrum londum. Tað hevur í mong ár verið eitt sterkt ynski og felags stremban í øllum teimum skandinaviska londunum um at prógv tikið í einum av hesum londum skal geva sama virkisrætt í hinum londunum. Serreglur eru sostatt bert neyðugar í teimum førum har tað er eyðsæð, at umstøðurnar hjá okkum ikki eru líkar teimum í øðrum londum.

Sum er kunnu hesi nautisku prógv takast í Føroyum:

1. dugnaskapsbræv í sigling,
2. heimaskiparaprógv,
3. skiparaprógv (fiskiskiparaprógv),
4. stýrimannsprógv,
5. skipsføraraprógv.

Ein kanning av tilgongdini av skiparanæmingum visir at síðani galdandi lóg kom í gildi í 1954 og til várið 1973 hava bert 19 næmingar tikið heimaskiparaprógv á Føroya Sjómannsskúla og uppaftur færri á Klaksvíkar Sjómannsskúla.

Hetta kemst óivað av tí at eitt heimaskiparaprógv gevur ov lítil rættindir, við tað at ein heimaskipari bert kann føra skip í heimasigling, t.v.s. ikki longur enn 100 fjórðingar úr landi úr Føroyum.

Hetta ger, at ein heimaskipari ikki kann føra fiskiskip í Norðsjónum og heldur ikki føra fiskiskip til fiskiskap undir Íslandi. Fyri at kunna føra skip á hesum leiðum, hevur tað higartil verið neyðugt at hava skiparaprógvtøku. Skeiðið til heimaskiparar er ætlað at taka umleið 10 vikur ella 2½ mánað og skeiðið til skiparar varir umleið 11 mánaðir.

Av tí at so lítil álugi hevur víst seg at hava verið fyri heimaskiparaprógvtøkuni, heldur nevndin at heimaskiparaprógvtøkan eigur at vera strikað og í staðin eigur at verða gjørd onnur prógvtøka, ið nevnast kann skiparaprógv av 2. stigi. Ætlanin er, at hetta skeiðið skal vara umleið 5½ mánað og ætlanin er, at teir ið fáa hetta prógv kunnu føra skip innanfyri ávís øki, t.d. í Norðsjónum og við Ísland, men ikki við Grønland og Newfoundland. Teir ið so hava hug til tess, kunnu so antin við tað sama ella seinni lesa umleið 5½ mánað aftrat og so fara til prógvtøku fyri at fáa skiparaprógv á 1. stigi.

Nevndin skjýtur upp í uppskoti sínum til nýggja løgtingslóg um sjómansútbúgving at hesi nautisku prógv skulu kunna takast í Føroyum:

1. dugnaskapsbræv í sigling,
2. skiparaprógv av 2. stigi,
3. skiparaprógv av 1. stigi,
4. stýrimansprógv,
5. skipsføraraprógv.

Viðvíkjandi teimum rættindum ið hesi prógv ætlast at geva verður vist til uppskot nevndarinnar um broyting í manningarlógini.

Haraftrat eiga sjómansskúlarnir at undirvísa og føra næmingar fram til prógv sum radioekspedientar og skipskokkar. Eftir uppskotinum fær landsstýrið heimild at fyriseta reglur um útbúgving av dekksmanning og eftirútbúgving av yvirmonnum.

Tað má ætlast at vera neyðugt at allir ið ætla sær til sjós, fyrst nugu á eitt skeið á sjómansskúla. Higartil hevur verið vanligt at tá ein drongur er farin til sjós fyrstu ferð, so hava teir eldru tikið sær av honum og lært hann sjómansarbeiði. Hetta er sum tað skal vera og er í lagi, tá ið manningin er stór nokk, men á skipum har tað er lítil manning gongur hetta ikki so væl, tí her má helst onki svíkja.

Útbúgving av dekksmonnum er byrjað, og hava tvey skeið verið á Klaksvíkar Sjómansskúla. Hesi skeið hava tó ikki vist seg at hava stóran áluga millum teir ungu, og eigur ti at verða umhugsað at gera onkrar broytingar viðvíkjandi hesum skeiði.

Viðvíkjandi undirvísing av skipskokkum er tað gleðiliga hent at gongd er komin á her, og skjýtur nevndin upp at landsstýrið fær heimild at áseta reglur um undirvísing av skipskokkum. Um neyðugt eigur landsstýrið eisini at syrgja fyri at slík skeið verða haldin ikki einans í Klaksvík, men eisini á øðrum plássum har landsstýrið heldur at tørvur er á.

Tíðirnar broytast. Eisini á tí maritima økinum henda stórar broytingar og er tað tí neyðugt, at teir, ið hava tikið prógv fáa høvi til at halda sín kunnleika við líka. Hetta kann gerast um teir fáa høvi til at koma á cykaskeið og skjýtur nevndin tí upp at landsstýrið fær heimild at fyriseta reglur um eftirútbúgving av yvirmonnum.

Nevndin hevur umframt uppskot til løgtingslóg um sjómansútbúgving og broyting í manningarlógini eisini gjørt uppskot til:

1. Kunngerð um upptøku á sjómansskúla,
2. kunngerð um lærugreinir og lærukrøv til nautisk prógv, og
3. kunngerð um nautiskar próvtøkur.

Fyri at læran altíð skal vera so tíðarhóskandi sum gjørligt, hevur nevndin í uppskotinum til løgtingslóg um sjómansútbúgving skotið upp, at ein føst nevnd verður sett, ið skal hava ábyrgdina av, at tað ið lært verður á sjómansskúlunum altíð so vítt gjørligt er tíðarhóskandi.

Nevndin kundi hugsa sær, at henda nevnd hevði limir umboðandi Skiparafelag, Sjómansskúlar, Reiðarafelag, Fiskimannafelag og prógdómarar.

Tórshavn, tann 21. februar 1974.

John Kjærbæk **Poul J. Joensen** **Fischer Heinesen**

Jens P. Arge **D. J. Joensen**

UPPSKOT
til

Løgtingslóg um sjómansútbúgving

§ 1.

Landsstýrið verður heimilað at halda skúlar, venjingarskip og skeið til fremjing av teimum í § 4 nevndu útbúgvingum.

2. stk. Útbúgvingin kann eisini fara fram á øðrum skúlum, venjingarskipum og skeiðum, ið góðkend eru av landsstýrinum. Til raksturin av hesum kann studningur veitast úr landskassanum.

§ 2.

Landsstýrið setur gjøllari reglur um rakstur og eftirlit við teimum í § 1 nevndu skúlum, venjingarskipum og skeiðum.

§ 3.

Landsstýrið setir nevnd við 5 limum at viðgera og koma við uppskotum um møguligar ábøtur og broytingar av sjómansútbúgvingini.

Lagtingslov om søfartsuddannelse

§ 1.

Landsstyret bemyndiges til at drive skoler, øvelsesskibe og kurser til gennemførelse af de i § 4 nævnte uddannelser.

Stk. 2. Uddannelsen kan endvidere ske på andre skoler, øvelsesskibe og kurser, der er godkendt af landsstyret. Til driften heraf kan der ydes tilskud af landskassen.

§ 2.

Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser om driften og tilsynet med de i § 1 nævnte skoler, øvelsesskibe og kurser.

§ 3.

Landsstyret nedsætter et udvalg med 5 medlemmer til at behandle og fremkomme med forslag til mulige forbedringer eller ændringer af somandsuddannelsen.

§ 4.

Á sjómansskúlunum kann fyrireiking fara fram til hesi prógv:

1. Skiparaprógv á 2. stigi.
2. Skiparaprógv á 1. stigi.
3. Stýrimannaprógv.
4. Skipsføraraprógv.
5. Radioekspedientprógv.
6. Skipskokkaprógv.

§ 5.

Navigatørar skulu fáa undirvísing í fylgjandi lærugreinum:

arbeiðsleiðsla, eldsløkking, føroyskt, danskt, enskt, ravmagns, læra, elektroteknik, landalæra og veðurlæra, farmaviðgerð, maskinlæra, natúrlæra, siglingarlæra, skipsteknikk og sjómansskap, rokning og matematik, heilsulæra, sjórætt, sjóreglur, signalering, fiskiskaps- og fiskalívslæru. Um framgongdin ger tað neyðugt kann landsstýrið áseta, at undirvísingin eisini skal fevna um aðrar lærugreinir, ella at onkrar fella burtur.

2. stk. Næmingar, ið fyrireika seg til stýrimannsprógvtøku, eiga helst at fáa ein part av undirvísingini umborð á venjingarskipi undir leiðslu av einum av lærarum skúlans.

§ 6.

Prógvtøkurnar fara vanliga fram á sjómansskúlunum. Hildnar vera bæði skrivligar og munnligar royndir. Prógvdómarin og hjálparmenn hansara leiða prógvtøkurnar og útvega uppgávurnar. Munnligu royndirnar eru almennar.

§ 4.

På sømandsskolerne kan forberedes til følgende eksaminer:

1. Skippereksamen af 2. grad.
2. Skippereksamen af 1. grad.
3. Styrmandseksamen.
4. Skibsførereksamen.
5. Radiokspedienteertifikat.
6. Skibskokkebevis.

§ 5.

Der skal gives navigatører undervisning i følgende fag:

arbejdsledelse, brandbekæmpelse, færøsk, dansk, engelsk, elektricitetslære, elektroteknik, geografi og vejrlære, lasthehandling, maskinlære, naturlære, navigation, skibsteknik og sømandskab, regning og matematik, sundhedslære, søret, søvejsregler, signalering, fiskeri- og fiskeribiologilære. Såfremt udviklingen nødvendiggør det, kan landsstyret bestemme, at undervisningen også skal omfatte andre fag, eller at nogle bortfalder.

Stk. 2. For elever, der forbereder sig til styrmandseksamen, skal så vidt muligt en del af undervisningen foregå på et øvelsesskib under ledelse af en af skolens lærere.

§ 6.

Eksaminerne afholdes som hovedregel på sømandsskolerne. Der afholdes såvel skriftlig som mundtlig eksamen. Eksamenslederen og hans medhjælpere leder eksaminerne og fremskaffer opgaverne. De mundtlige eksaminer er offentlige.

2. stk. Prógdómarin verður settur av landsstýrinum. Hann kann við landsstýrisins góðkenning fáa sær bjálparmenn sum tørvur er á.

3. stk. Prógdómari ella aðrir, ið hoyra ella eru við til at gera prógtøkuuppgávur, mugu ikki undirvísa við ella vera limir í stýri fyri skúla ella skeið, sum fyrireika til prógtøkurnar. Lærari ella skúlastjóri má ikki vera prógdómari fyri prógtakarar, ið hava fingið undirvísing á tí skúla, har lærarin ella stjórin eru settir.

§ 7.

Skiparaprógtøka á 2. stigi og stýrimannaprógtøka kann bert takast av næmingum, sum eru innstillaðir av viðkomandi skúla ella lærara, ið hevur fyrireika teir. Prógtakararnir skulu eisini lúka krøvini til sigling og útbúgving, sum landsstýrið fyrisetir.

2. stk. Skiparaprógtøka á 1. stigi og skipsføraraprógtøka kann bert takast av persónum, ið hava staðið ávikavist skiparaprógtøku á 2. stigi og stýrimannaprógtøku.

3. stk. Landsstýrið kann gera undantøk frá treytunum í 1. og 2. stk.

§ 8.

Tann, sum hevur staðið stýrimannaprógtøku verður mettur at hava staðið skiparaprógtøkur á 1. og 2. stigi.

Stk. 2. Eksamenslederen ansættes af landsstyret. Han kan med landsstyrets godkendelse antage det nødvendige antal medhjælpere.

Stk. 3. Eksamensleder eller andre der eksaminerer eller medvirker ved udarbejdelse af eksamensopgaver, må ikke undervise ved eller deltage i bestyrelsen af skoler eller kurser, der forbereder eksaminerne. En lærer eller forstander må ikke være censor for eksaminander, der har fået undervisning ved den skole, hvor læreren eller forstanderen er ansat.

§ 7.

Skippereksamen af 2. grad og styrmandseksamen kan kun aflægges af elever, der er indstillet af vedkommende skole eller lærer, der har forberedt dem. De pågældende skal endvidere opfylde de betingelser med hensyn til sejlads og uddannelse, som fastsættes af landsstyret.

Stk. 2. Skippereksamen af 1. grad og skibsførereksamen kan kun aflægges af personer, der har bestået henholdsvis skippereksamen af 2. grad og styrmandseksamen.

Stk. 3. Landsstyret kan give undtagelser fra de i stk. 1 og 2 nævnte betingelser.

§ 8.

Den som har bestået styrmandseksamen, anses at have bestået skippereksamener af 1. og 2. grad.

§ 9.

Landsstýrið fyriseter reglur um:

1. treytir fyri upptøku sum næmingur á sjómannsskúlum,
2. hvussu undirvísingin skal fara fram, lærukrøv og hvørjar lærugreinir undirvísast skal í til tær einstøku prógtøkurnar, og
3. prógtøkuhald, herundir høvið til at taka nýggja roynd í ávísum lærugreinum, karaktergeving og døming.

§ 10.

Til radioekspedientprógv verður lært og fer prógtøka fram eftir galdandi ríkislóggávu.

§ 11.

Útbúgving av skipskokkum fer fram á skeiðum. Útbúgvingin endar við eini roynd.

2. stk. Landsstýrið fyriseter nærri reglur um undirvísing og prógtøku hjá skipskokkum.

§ 12.

Landsstýrið kann fyriseta reglur um útbúgving av deksmanning og eftirútbúgving av sjófólki.

§ 13.

Sjómannsskúlarnir eiga at hava næmingarnar tryggjaðar móti óhappi undir sigling við venjingarskipi og á eldsløkkingarskeiði.

§ 14.

Henda lóg kemur í gildi 1. august 1974. Samstundis fer úr gildi løgtingslóg nr. 8 frá 19. mars 1954 um sjómannsskúla og sjómanslæru,

§ 9.

Landsstyret fastsætter regler om:

1. betingelser for at blive optaget som elev på sømandsskoler,
2. undervisningens tilrettelæggelse, pensumkrav og hvilke fag der skal undervises i som forberedelse til de enkelte eksaminer, og
3. eksaminernes afholdelse, herunder ny prøve i visse fag, karaktergivning og censur.

§ 10.

Til radioekspedienteksamen undervises og eksamineres efter gældende rigslovgivning.

§ 11.

Uddannelse af skibskokke foregår på kursus. Uddannelsen slutter med en prøve.

Stk. 2. Landsstyret fastsætter nærmere bestemmelser om undervisning og eksamination af skibskokke.

§ 12.

Landsstyret kan fastsætte regler om uddannelse af dæksmandskab og efteruddannelse af søfarende.

§ 13.

Sømandsskolerne bør forsikre eleverne mod ulykker under sejlads med øvelsesskib og under brandkursus.

§ 14.

Denne lov træder i kraft 1. august 1974. Samtidig ophæves lagtingslov nr. 8 af 19. marts 1954 om søfartsskole og navigationsunder-

sium broytt við løgtingslóg nr. 20 frá 28. mars 1956, løgtingslóg nr. 15 frá 25. apríl 1960, løgtingslóg nr. 66 frá 6. september 1963 og løgtingslóg nr. 36 frá 28. mai 1965.

visning, som ændret ved lagtingslov nr. 20 af 28. marts 1956, lagtingslov nr. 15 af 25. april 1960, lagtingslov nr. 66 af 6. september 1963 og lagtingslov nr. 36 af 28. maj 1965.

Uppskot til

løgtingslóg um broytingar í løgtingslóg um manning av skipum.

§ 1

Í løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1966 um manning av skipum verða gjørdar hesar broytingar:

1) § 4, A, verður orðað soleiðis:

lagtingslov om ændringer i lagtingslov om skibets behandling.

§ 1

I lagtingslov nr. 51 af 25. juli 1966 om skibes bemanding foretages følgende ændringer:

1) § 4, A, affattes således:

Fiskifør — Fiskefartøjer

Tons Tons	Heimasigling Kystfart	Atlantshavið n.f. 35° n.br. Atlanterhavet n.f. 35° n.br.		Óskerd sigling Uindskrænket fart.
		Eystan fyri 30° v.l. Øst for 30° v.l.	Vestan fyri 30° v.l. Vest for 30° v.l.	
20-50	Skipari við dugnaskapsprógvi fyltur 20 ár. Skipper med duelighedsbevis, fyldt 20 år.	Skipari á 2. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 2. stigi. Skipper af 2. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.	Skipari á 1. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 2. stigi. Skipper af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.	Skipari á 1. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 1. stigi. Skipper af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 1. grad.
50 og yvir, men ikki yvir 150 50 og derover, men ikke over 150	Skipari á 2. stigi. Skipper af 2. grad.			
150 og yvir, men ikkl yvir 500 150 og derover, men ikke over 500	Skipari á 2. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 2. stigi. Skipper af 2. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.			
Yvir 500 Over 500	Skipari á 1. stigi. 2 bestimenn við skiparaprógvi á 2. stigi. Skipper af 2. grad. 2 bedstemænd med skippereksamen af 2. grad.			Skipari á 1. stigi. Bestimaður við skiparaprógvi á 1. stigi. Skipper af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.

2) § 4, B, verður orðað soleiðis:

2) § 4, B, affattes således:

Farmaskip
Fragtskibe

Tons Tons	Heimasigling Kystfart	Norðhavssigling Nordhavssejlads	Óskerd sigling Uindskrænket fart
20 og yvir, men ikki yvir 150 20 og derover, men ikke over 150	Skipari á 2. stigi. Bestimaður við dugnaskapsprógvi. Skipper af 2. grad. Bedstemand med dueligheds-bevis.	Skipari á 1. stigi. Bestimaður við skipararoynd á 1. stigi. Skipper af 1. grad. Bedstemand med skippereksamen af 1. grad.	Skipsførari á 2. stigi. Stýrimaður á 2. stigi. Bestimaður við skipararoynd á 1. stigi. Skibsfører af 2. grad. Styrmand af 2. grad. Bedstemand med skippereksamen af 1. grad.
Yvir 150 men ikki yvir 500 Over 150 men ikke over 500	Skipari á 2. stigi. Bestimaður við skipararoynd á 2. stigi. Skipper af 2. grad. Bedstemand med skippereksamen af 2. grad.		
Yvir 500 men ikki yvir 1400. Over 500 men ikke over 1400.	Skipsførari á 2. stigi. Stýrimaður á 2 stigi. Skipari á 1. stigi. Skibsfører af 2. grad. Styrmand af 2. grad. Skipper af 1. grad.	Skipsførari á 2. stigi. 2 stýrmenn á 2. stigi. Skibsfører af 2. grad. 2 styrmænd af 2. grad.	Skipsførari á 1. stigi. Stýrimaður á 1. stigi. Stýrimaður á 2. stigi. Skibsfører af 1. grad. Styrmand af 1. grad. Styrmand af 2. grad.
Yvir 1400 Over 1400.	Skipsførari á 1. stigi. Skibsfører af 1. grad.	Stýrimaður á 1. stigi. Styrmand af 1. grad.	2 stýrimenn á 2. stigi. 2 styrmænd af 2. grad

3) § 4, C, verður orðað soleiðis:
Á ferðamannaskipunum verður manningin ásett av landsstýrinum aftaná ummæli frá skipasýninum og viðkomandi yrkisfelag».

3) § 4, C, affattes således:
»For passagerskibe fastsættes bemandingen af landsstyret, efter at udtalelse er indhentet fra skibstilsynet og vedkommende fagforening».

4) § 11 verður orðað soleiðis:
«At fáa vinnubræv sum skipari á 2. stigi krevst:
a. at maður aftaná at hava fylt 15 ár hevur gjørt dekstænastu á førum í 24 mánaðir av hesum í minsta lagi 12 mán-

4) § 11 affattes således:
«Til erhvervelse af bevis som skipper af 2. grad kræves:
a. af vedkommende efter det fyldte 15. år har gjort dækstjeneste i fartøjer i 24 måneder, hvoraf mindst 12

aðir á skipum yvir 20 tons;
b. at hann hevur staðið skipararoynd á 2. stigi;
c. at hann hevur heimarætt;
d. at hann hevur fylt 20 ár;
e. at hann hevur staðið sýnsroynd, fyriskipað av landsstýrinum.»

5) § 12 verður orðað soleiðis:
«At fáa vinnubræv sum skipari á 1. stigi krevst:
a. at maður eftir at hava fylt 15 ár hevur gjørt dekstænastu í 24 mánaðir, av hesum 12 mánaðir á skipum yvir 20 tons uttanfyri heimasiglingi;
b. at hann hevur staðið skipararoynd á 1. stigi;
c. at hann hevur heimarætt;
d. at hann hevur fylt 20 ár;
e. at hann hevur staðið sýnsroynd fyriskipað av landsstýrinum.»

6) §§ 13 og 14 ganga út.

7) Í § 15 verður «47 mánaðir» broytt til «36 mánaðir».

§ 2.

Sjóvinnubræv, fingin áðrenn henda lóg fær gildi, heimilað innihavaranum sama rætt sum higartil.

2. stk. Sjóvinnubræv sum skipari, fingin eftir løgtingslóg nr. 51 frá 25. juli 1966 um manning av skipum verða hildin at svara til

måneder i skibe over 20 tons;
b. at han har bestået skippereksamen af 2. grad;
c. at han har indfødsret;
d. at han er fyldt 20 år;
e. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.»

5) § 12 affattes således:
«Til erhvervelse af bevis som skipper af 1. grad kræves:
a. at vedkommende efter det fyldte 15. år har gjort dækstjeneste i 24 måneder, heraf 12 måneder i skibe over 20 tons udenfor kystfart;
b. at han har bestået skippereksamen af 1. grad;
c. at han har indfødsret;
d. at han er fyldt 20 år;
e. at han har bestået en af landsstyret fastsat synsprøve.»

6) §§ 13 og 14 udgår.

7) I § 15 ændres «47 måneder» til «36 måneder».

§ 2.

De forinden ikrafttrædelsen af nærværende lov erhvervede søfartsbeviser hjemler deres indehavere samme ret som hidtil.

Stk. 2. De i henhold til lagtingslov nr. 51 af 25. juli 1966 om skibes bemanding erhvervede søfartsbeviser som skipper anses at

vinnubrøv sum skipari á 1. stigi eftir hesi lóg.

3. stk. Royndir sum skipari eftir lógini frá 1954 við seinni broytingum um sjómannaskúla og sjómannslæru verða javnmettar við royndir sum skipararoynd á 1. stigi.

§ 3.

Henda lóg fær gildi frá 1. januar 1975.

svare til de i nærværende lov omhandlede næringsbevis som skipper af 1. grad.

Stk. 3. Eksaminer som skipper efter loven fra 1954 med senere ændringer om sømandsskole og sømandslære ligestilles med skipper-eksamen af 1. grad.

§ 3.

Denne lov træder i kraft 1. januar 1975.

Kunngerð
um
treytir fyri upptøku á sjómansskúla

Við heimild í § ..... í løgtingslóg nr. .... frá ..... um sjómansútbúgving hevur landsstýrið fyriskett:

§ 1.

Fyri at sleppa inn á ein góðkendan sjómansskúla til fyrireiking til skiparaprógv krevst, at viðkomandi lúkar krøv til praktiska útbúgving (siglingstíð v.m.), sum galdandi eru fyri at fáa sjóvinnubræv, ið svarar til viðkomandi prógv.

§ 2.

Fyri at sleppa inn á sjómansskúla til fyrireiking til stýrimannaprógv krevst, at viðkomandi lúkar treytirnar antin undir a) ella undir b),

a) Hava gjøgnumført eitt skeið fyri deksnæmingar á einum góðkendum sjómansskúla ella umborð á einum góðkendum skúlaskipi og hava gjørt dekstænastu ella tænastu sum stýrimannslærlingur á skipum yvir 20 tons ella størri í 24 mánaðar, harav 6 mánaðar á skipum uttan fyri heimasigling. Tann praktiska lærau umborð skal vera framd eftir einari av landsstýrinum góðkendari skipan, ella soleiðis, at viðkomandi áðrenn upptøku á sjómansskúla hevur lokið eitt serstakt framhaldsskeið á góðkendum sjómansskúla,

b) hava gjørt dekstænastu ella tænastu sum stýrimannsnæmingur á skipum yvir 20 tons ella størri í 36 mánaðir, harav 18 mánaðar á skipum uttan fyri heimasigling, og harav hægst 9 mánaða tænasta sum deksdrongur kann viðroknast.

2. stk. Skúlatíðin á einum sjómansháskúla kann viðroknast við upp til 5 mánaðar í ti eftir 1. stk. kravdu siglingstíð.

§ 3.

Landsstýrið kann í serstøkum førum loyva, at næmingar verða upptiknir á sjómansskúlar, uttan at teir lúka treytirnar eftir §§ 1 og 2.

§ 4.

Næmingar sum ferð eftir ferð gera ónáðir í skúlanum ella ikki fylgja undirvísingini, kunnu koyrast úr skúlanum.

§ 5.

Henda kunngerð kemur í gildi .....

Kunngerð
um
lærugerinir og lærukrøv til nautisk prógv.

Við heimild í § í løgtiugslóg ur. frá um sjómansútbúgving hevur landsstýrið fyrisett:

A.
Skiparapróvtøka á 2. stigi.

Hesin kunnleiki krevst í teim tilskilaðu lærugreinum til skiparapróvtøku á 2. stigi.

1. **Føroyskt:** Skriva eina fyrisøgn um vanligt evni við hampuligari skrift og uttan stórvegis villur.

2. **Danskt:** Sama sum føroyskt.

3. **Enskt:** Hampuligur lestur á enskum og umseting til føroyskt úr lesistykkjum, lisin á læruskeiðinum. Duga at skilja tekst og leiðbeining, ið stendur á enskum sjókortum, vitalistum og sjóvarfalskortum. Kenna ensku nøvnini á vanligum fiskasløgum, fiskireiðskapi og skipaútgerð.

4. **Siglingarlæra:**
   a) Yvirlit og kunnleiki til boganet á jørðini. Knøttstøða við breidd og longd. Kumpass, kumpasslinjur, misvísing, devitatión, avdrift og streym. Sjókort og teir upplýsingar, sjókort og siglingarleiðbeiningar geva. Staðfesta pláss við ýti, bering og fráleika. Seta kós og finna komustað. Devitatión við bering av ýti. Konsol, decca, loran, radiobering, ekkolodd, radar, bestikk og sekstant.
   b) Hylling á himmalkúluni og boganet hennara. Rokna breiddarstig við hágongu av sólini. Skipsdagbók. Flóð- og fjørutalvur og sjóvarfall.

5. **Rokning:** Vanlig rokning í teim fýra roknihættunum við teimum tølum, bortum, decimalbrotum og procentrokning.

6. **Sjómansskapur:** Bjargingarútgerð og -tiltøk. Eitt sindur um stabilitet. Morsitekn.

7. **Sjóreglur:** Altjóða sjóreglur. Neyðsignal. Serstakar reglur fyri sigling á vissum innansyndis og innanríkis farleiðum í ymsum londum. Loðssignal. Raketbjargingarstøðir á landi.

8. **Motorlæra og eldsløkking:** Kunnleiki til motorar, ið mest verða nýttir í fiskiførum og smærri førum. Reglur fyri handfaring av teimum. Tey mest nýttu brennievni. Verndartiltøk móti eldvanda. Eldsløkkingarmátar og amboð.

9. **Sjórættur:** Sjófrágreiðing, skipasýn, skipsskjøl, sjómanslóg, skipaskráseting, hýring og mynstring.

10. **Heilsulæra:** Mannakroppurin. Medisinkistan. At nýta læknabók. Reinføri og chilsuviðurskifti umborð. Vanlukkutryggingar og sjúkur við serstakum denti á veitan av fyrstu hjálp. Læknaráð yvir radio. Sárviðgerð og tilbindingar. Karantenulóggáva.

11. **Fiskiskapslæra og fiskalívslæra:** Kunngerð til útgerð og reiðskap, ið fiskiskip nýta. Arbeiðsháttur og -leiðsla, tá fiskireiðskapur, t.d. trol, garn, lína, ringnót o.a. verður nýtt. Kunnleiki til biologi, lívs- og vakstrartreytir, nøring og ferðing hjá teim mest veiddu fiskasløgum. Veiðuhagtøl. Vandar, ið hótta fiskastovnar. Veiðuskamtan. Kunnleiki (og praktisk læruskeið) til fiskaviðgerð.

12. **Veður- og havlæra:** Evnistilfar í luftini. Luft- og sjóvarhiti, hitanegi og hitaviðurskifti yvir land og hav. Háttrýst og lágtrýst. Uppruni vindanna. Skýggj og avfall. Praktisk veðurtænasta, veðurkort. Teir mest týðandi havstreymar, gongd og ávirkan.

B.

Skiparaprógvtøka á 1. stigi.

Umframt prógvtøku sum skipari á 2. stigi krevst til skipararoynd á 1. stigi hesin kunnleiki í teimum tilskilaðu lærugreinum.

1. **Føroyskt:** Skriva eina fyrisøgn um vanligt egni við hampuligari skrift, uttan stórvegis villur.

2. **Danskt:** Sama sum fyri føroyskt.

3. **Enskt:** Skrivlig umseting frá enskum til føroyskt og frá føroyskum til enskt av lættari teksti. Upplestur og umseting av teksti, ið fyrr er lisin, við ikki ov tungum evni innan sjómansyrki. Næmingurin fær á enskum settar lættari spurningar, ið svarast skulu á enskum. Til ta skrivligu umsetingina er nýtsla av orðabók loyvd.

4. **Siglingarlæra:** Útyvir tað til skipara á 2. stigi:
Himnalikam, sólstøða og stjørnur. Tann geocentriska himnakúlan og hoganet hennara, ækvator- og horisontboganet. Herundir kunnleiki til hesar koordinatar: norður- og suðurleiki (declinatión), vesturleiki (SHA — sidereal hour angle), tímavinkul (LHA — local hour angle), hædd (altitude) og bering (azimut) himnalikamna. Duga at nýta álmanakkar, azimuttabellir og í minsta lagi eitt H. O. tabellverk til at útrokna staðarlinjur við hædd av himnakroppi. Tíð, tíðarmeting, klokkutíðir. Duga at rokna breiddarstig við hágongu (kulmination) av sól og stjørnu. At staðfesta knøttstøðu við hjálp av astronomiskum observatiónum av sól og stjørnu. Til útrokning av hesum staðarlinjum verður nýttur hæddarmátin (einhæddarcirklar). At tekna devitatión í strikumynd (devitatiónskurva) og skriva devitatiónstalvu.

5. **Matematikk og rokning:**
   a) Aritmetik: Vanlig rokning í teim fýra vanligu roknihættum við heilum tølum, brotum, decimalbrotum og procentrokning. Lutfalsrokning og potens. Brúk av logratitmetabellum. Likningar av 1. stigi við einum ókendum.
   b) Geometri: Serliga útrokning av rættlyrntum tríkantum eftir trigonometriskari tabell. Einfaldar konstruktiónir. Útrokning av vídd á rættlyrntum tríkantum, cirklum og rektanglum.

6. **Fysikk og ravmagnslæra:** Samanseting og upploysing av kreftum. Kraftávirkan á ymisk amboð. Rokninppgávur í einfaldum maskinum, serliga talju, hallfynning og skrúvu. Einfaldar uppgávur við grundarlag mest í Ohms lóg at finna elektriska streymstyrki, spenning og mótstøðu.

7. **Sjómansskapur:** Styrki av togverki og ketu. Greiðir til inn- og útskipan av farmi. Tonnasja (rúmdar- og vektmál) fyri skip. Kjalardýpi undir vatni. Kjalarhall afturyvir. Flottryggleiki. Trygdartiltøk at hava við farmi av ymiskum slagi. Bjargingarútgerð og -tiltøk.

8. **Signallering:** Signallering við ljósi, ljóði ella flaggi eftir einfaldari signaltalvu. Nýtsla av ti internationalu signalbókini.

9. **Motorlæra og eldstløkking:** Meira nágreiniligt tað í A 7 umtalaða. Einfaldan kunnleika til ravmagnsveiting og ravmagnsútgerð á skipi. Næmingur skal gerast kunnugur við handfaring og røkt av dieselmotori, ið stendur í skipi ella er uppsettur í høli á landi, trygdartiltøk móti spreingi- og eldsvanda í motorførum, herundir vandi, ið stendst av breki í útgerð av brennievnitangum. Ljósveitan og luftreinskan (ventilatión) av motorrúmi. Vanda av útblástri frá motori og nýtslu av súrevni til at seta motorar í gongd við. Viðlíkahald av motori.

10. **Sjórættur:** Meira nágreiniligt tað í A 8 umtalaða.
Certeparti og konossement. Skipsrokniskapur.

C.
Til stýrimannaprógvtøku krevst:

1. **Føroyskt:** Fyrisøgn við fakligum innihaldi og har serligur dentur verður lagdur á tænastufrágreiðingar. Aftursøgn. Stílur yvir evni, sum prógvtakarin má ætlast at vera kunnigur við. Upplestur. Týdningarmestu reglurnar í málæruni.

2. **Danskt:** Sama sum fyri føroyskt.

3. **Enskt:** Skrivlig umseting frá enskum til føroyskt og frá føroyskum til enskt av einum løttum teksti (nýtslu av orðabók er loyvd). Upplestur og umseting frá enskum til føroyskt av fyrr lisnum tilfari og av einum ikki fyrr lisnum løttum stykki við fakligum innihaldi. Týdningarmestu reglurnar í málæruni. Settir verða nakrir lættir spurningar á enskum, sum svarast skulu á enskum.

4. **Rokinng og matematikk:**
   a) **Aritmetikk og rokning:** Vanlig rokning við teimum fýra roknirættunum við heilum tølum, bókstavamerkingum, brot og decimalbrot. Málieindir. Lutfalsrokning. Einfaldar funktiónir. Renturokning. Potens og rót. Logaritmu.r Nýtsla av roknistokki. Likningar av 1. sligi. Eksponentiellar likningar. Grundreglurnar í rokuskaparførslu.
   b) **Plangeometri:** Linjur og vinklar. Cirklar. Polygonir Kongruens

og einsskapilsi. Rætthyrntur trikantur. Viddin á polygonum og cirklum. Viddarrokning eftir Simpson's formli. Rætthyrntað koordinatsystemið og nýtsla tess til geografiska framførslu av funktiónum. Geometrisk støð. Einfaldar geometriskar konstruktiónir.

e) **Trigonometri:** Trigonometrisku støddirnar og nýtsla teirra til loysn av plánum trýkantum. Trýkantstabellir.

d) **Rúmdargeometri:** Støðan hjá heimi linjuni móti plánum. Tvcyplansvinklar. Prisman. Pyramidan, cylindarin, keylan, kúlan og tær linjur, sum koma fram á yvirflatuni á hesum við sløttum tvørskurði. Sferiskir vinklar. Sferiskir trýkantar og nýtsla av trigonometriskum formlum til loysn av hesum. Rúmdin í omanfyri nevndu myndum. Rúmdarrokning við Simpson's formli.

5. **Náttúrulæra, herundir elektroteknikk:** Kunnleiki til vanligu fysisku og kemisku eginleikarnar hjá evnunum. Líkavekt og røring í føstum evnum, vætum og luftevnum. Tyngdarmegin. Samanseting og sundurliðing av kreftum. Einfald tól. Vektfylla. Barometur. Høvuðsreglur í hitalæruni. Einfaldar reglur um ljóð- og ljóslæru og magnetismu. Einfald el-læra. Elektroteknikk. Javn- og veksilstreym. Motorar. Dynamoir og generatorar. Einsrættarar. Elektriskar røringar. Elektronrør. Málilættir og -tól.

6. **Siglingarlæra:** Skap og støddd jarðarinnar. Boganet jarðarinnar. Kumpasslinjur. Magnetkumpassir. Peilarar. Misvísningur. Devitatión og devitatiónskanningar. Ferð og teinur. Avdrift. Streymur logg og lodd. Bestikkrokning. Sekstanturin. Sjókort. At seta út og mála upp í sjókorti. Farvatnsavmerking. Staðfesting við terrestriskum staðarlinjum og við loddskoti. Vandavinklar. At seta kós. Himnalikam í høvuðsheitum. Sólarskipanir, máni og planetirnar. Tær fyri sigling týdningarmestu fastastjørnur. Boganetið á himnakúluni og hennara dagliga gongd. Egingongdin hjá himnalikamunum. Tíð og klokkutíð. Kulminatiónstíð. Upp- og niðurgangstíð. Kvartalsskifti. Myrkingar.Sjóurið. Staðfesting og devitatiónsfesting við astronomiskum observatiónum. Stórcirkulsigling. Flóð og fjøra. Skipsdagbókin. Nýtsla og røking av siglingartólum. Nýtsla av farvatnsfrágreiðingum o.tl. Tænastuskyldur stýrimansins hvat navigering og røking av vaktini viðvíkur.

7. **Skipsteknikk:** Frágreiðing um bygging av skipum. Tonnasja. Kjalardýpi og stabilitetur. Lastalinjumerkir. Viðlikahald av skipum, herundir uppháling og dokkseting. Ávirkan av róðri og høvuðsmaskinu.

Grundreglur um manøvrering. Bjargingarútgerð og nýtsla hennara. Upp- og innskipingaramboð. Grunnstoytur, samanstoytur og sjóskaði. Raketbjargingartólið og onnur linuvarpingartól. Nýtsla av flytiligum neyðsendarum.

8. **Lastviðgerð:** Innskipan og stúgving. Bulk- og aðrir einsháttaðir førningar. Stykkjagóðsførningar. Taugaførningar. Solvent- og aðrir vandamiklir førningar. Lastaætlanir. Stúgvingarrúmd.
9. **Eldsløkking:** Orsøk til eld. Tryggingarreglur. Eldsløkking og eldsløkkingartól. Tiltøk undir eldbrandi.

10. **Sjóreglur og signalering:** Sjóreglur og neyðsignalir. Alheims signalskipanin, herundir morsing við ljósi og ljóði. Signal í samband við flúgvibjargingartænastuna.

11. **Sjórættur:** Sjómanslógin. Manningarlógin. Mynstring og hýring. Sjóskaði og bjargingarløn. Sjófrágreiðing. Certipartí og konossement. Skipsskjøl. Skipaeftirlit. Valrættur.

12. **Maskinlæra:** Teir mest nýttu skipshøvuðsmotorar, ketlar og tilhoyr. Teir mest nýttu skips- og bátamotorar og røking teirra. Hestakreftir. Hjálpimaskinur v.m., serstakliga róðurmaskinur, spøl og tær mest nýttu pumpur. Brenni og brenniný tsla. Rørskipanir. Fjareftirlit v.m.

13. **Heilsulæra:** Mannakroppurin. Medisinkistan. Nýtsla av læknabók. Reinføri og heilsuviðurskifti umborð. Vanlukkuhendingar og sjúka. Læknaráð yvir radio. Bandagur og tilbindingar. Fyriskipanir undir uppihaldi á heilsuskaðiligum støðum og grundreglurnar í karantenulóggávuni.

14. **Veðurlæra:** Praktisk veðurtænasta, herundir nýtsla av veðurkorti og «pilot-charts».

15. **Arbeiðsleiðsla:** Tær týdningarmestu reglurnar um arbeiðsleiðslu verða gjøgnumgingnar, men prógvroynd fer ikki fram.

D.

Til skipsførararoynd krevst:

1. **Føroyskt:** Skriving av einari fagastufrágreiðing. Lítin stílur um evni, sum prógvtakarin má haldast at vera kunnigur við.

2. **Danskt:** Sama sum fyri føroyskt.

3. **Enskt:** Skrivlig umseting frá enskum til føroyskt og frá føroyskum til enskt (nýtsla av orðabók loyvd). Upplestur og umseting frá enskum til føroyskt av áður lisnum tilfari, herundir skjølum viðvíkjandi sjóvinnuni, farvatnsfrágreiðingar ella tílíkt og eitt ikki áður lisið stykki. Samtaluroyndir.

4. **Siglingarlæra:** Víðkaður kunnleiki til devititiónslæruna og til siglingartól.

5. **Skipsteknikk:** Tilfarslæra og styrkirokning. Víðkaðan kunnleika til stýrimannaprógv viðvíkjandi sjódyggleika hjá skipi, herundir kjølardýpi undir vatni, fribord og stabilitetur. Roknimyndir (deplacementskala), formingarskrá og tílíkar útrokningar um javnvág fyri skipið, sum til dagligt kann nýtast undir inn- og uppskipan. Skipstekningar. Klassifikatión. Alment eftirlit við skipum og tess sjódyggleika og í hesum sambandi skyldur skipsførarans.

6. **Landalæra og veðurlæra:** Landsløg og áir, ið siglast kann eftir, londini, mark teirra og teir týdningarmestu býirnir. Týdningarmestu inn- og útflutningsvørur landanna. Heimshøviri og farvøtn av týdningi fyri skipaferðslunа.

   Týdningarmestu meteorologisku og hydrografisku tólini. Hitabýtið yvir jarðarknøttinum. Vætan í luftini. Skýggj og avfall. Elektrisitet í luftini. Lufttrýst. Vindar og manøvrering í hvirluvindi. Teir mest týðandi havstreymar. Tær týdningarmestu siglingarleiðirnar.

7. **Sjórættur og handilslæra:** Sjólóggáva í hovuðsleitum, herundir nýtsla av lógarsavni. Viðurskifti skipsførarans til skipasýnið, loðsverkið og tollverkið. Vanlukkutrygging. Vekslar og tjekkar.

Kunngerð
um
nautiskar próvtøkur.

Við heimild í § .... í løgtingslóg nr. .... frá ..... hevur landsstýrið fyrisett:

§ 1.

Tilmelding til próvtøku verða sendar landsstýrinum (próvtøkuleiðaranum) í seinasta lagi 4 vikur áðrenn próvtakan byrjar.

2. stk. Tilmelding fer fram á oyðublaði, sum fáast á skúlunum.

3. stk. Tilmelding til eina av teimum nautisku próvtøkunum forútsetur, at viðkomandi hevur tikið lut í teimum serstøku skeiðunum, ið landsstýrið hevur fyrisett.

4. stk. Fyri at verða tilmeldaður til skiparapróvtøku av 2. stigi og stýrimannapróvtøku skal viðkomandi eisini lúka treytirnar, sum ásettar eru fyri at sleppa á sjómansskúla.

5. stk. Landsstýrið ansar eftir at ásettu treytirnar eru loknar. Landsstýrið kann í serstøkum førum gera undantak frá treytunum í stk. 1-4.

§ 2.

Próvtakarin skal møta ásetta dag og tíð í próvtøkuholminum og hava við sær skrivi- og teknimboð, kort og talvur (uttan áskriftir). Møtir próvtakari ikki rættstundis, rínur hann uttan loyvi frá ávístum plássi, ella vísir hann óhóskandi framferð, kann umboð fyri próvtøkuleiðsluna vísa hann burtur.

2. stk. Til skrivliga próvtøku kunnu bert nýtast lærubøkur ella hjálpartól, sum próvtøkunevndin loyvir. Upplýsing um hvørji hjálpartól neyðug og loyvd eru til skrivliga próvtøku skal boðast seinast 14 dagar áðrenn próvtøkan byrjar.

3. stk. Próvtakarar, sum halda okkurt vera ótýðuligt á útflýggjaðu uppgávunum kunnu heita á próvtøkueftirlitið um neyðugar upplýsingar.

4. stk. Meðan skrivlig próvtøka fer fram mugu modellir, tekningar ella onnur undirvísingaramboð, sum próvtøkunevndin heldur kunna nýtast til loysn av uppgávum, ikki liggja frammi í holunum.

§ 3.

Skrivligu uppgávurnar eru felags fyri allar próvtakarar, ið samstundis eru til somu próvtøku í somu lærugrein, og uppgávurnar skulu hava árit um ta tíð, ið nýtast kann og tey loyvdu hjálparamboðini, smbr. § 2, stk. 2.

2. stk. Próvtøkuleiðslan útflýggjar pappír til nýtslu við loysn av uppgávunum. Bert tílíkt pappír má nýtast. Próvtakarin útfyllir teir á pappírinum prentaðu teigar (próvtøkunummar, navn v.m.). Reinskrivaðu upp-

gávurnar verða handaðar eftirlitinum og metingin verður gjørd við reinskriftini sum grundarlag.

§ 4.

Spurningarnir til munnligu prógtøkuna verða skrivaðir á seðlar í so stórum tali, at hvør prógtakari minst hevur 3 at velja ímillum, hvør prógtakari tekur sínar spurningar.

2. st k. Prógdómarin ansar eftir at yvirhoyringin fer fram á regluligan og tryggan hátt, og avger, nær yvirhoyringin í hvørjum einstøkum spurningi kann enda.

§ 5.

Tann lærari, ið hevur fyrireika prógtakaran í viðkomandi lærugrein, eigur helst at yvirhoyra hann.

2. st k. Metingin verður gjørd av honum sum yvirhoyrir, saman við einum ella tveimum prógdómarum.

§ 6

Um ein prógtakari opinlýst roynir at søkja ella veita hjálp, skal hann beinanvegin vísast burtur frá prógtøkuni.

2. st k. Kann prógtakari vegna sjúku ikki møta til prógtøku ella má gevast, kann prógdómarin geva honum loyvi at halda fram við prógtøkuni, soleiðis at møguligar tiknar royndir eru galdandi.

§ 7.

Til karaktergeving verður nýttur 13-stigin eftir somu reglum sum galdandi eru á hægri útbúgvingarstovnum.

2. st k. Fyri hvørja døming verður givin ein karakterur, sum svarar til meðaltalið av teimum karakterum sum lærari og prógdómari hava givið. Svarar meðaltalið mitt ímillum tveir karakterir í stiganum, verður hækkað til næsta hægra tal í røðini, um so er at meira enn ein prógdómari hevur verið við; annars verður hækkað til næsta hægri tal í røðini, um prógdómarin hevur givið tann hægra karakterin, meðan tað næsta lægra talið í røðini verður prógtøkukarakterurin, um prógdómarin hevur givið tann lægra karakterin. Karakterurin 0 kann tó bert gevast, um lærari og prógdómari eru samdir.

Á royndarprógvinum verða allir karakterir niðurtaldir, og verður undir hesi niðurteljing settur meðalkarakterurin við tveimum decimalum.

2. st k. Fyri at standa roynd sum skipari á 2. og 1. stigi krevst í minsta lagi:

Meðalkarakterurin	6,00
í skr. siglingarlæru, meðalkarakterin	5,00
í siglingarlæru	5,00
í radar	5,00
í sjóreglum	5,00
í sjómansskapi (skiparar av 1. stigi) meðalkarakter	5,00

3. stk. Fyri at standa royndina sum stýrimaður ella skipsførari krevst, at meðalkarakterurin fyri hvørja lærugrein og fyri skrivliga siglingarlæru og radarnýtslu ikki er undir 5.

§ 9.

Undir prógtøkuni verða førdir karakterlistar. Karakterlistarnir skulu fyri hvørja lærugrein sær innihalda tann ella teir karakterir, sum prógtakarin fær sum úrslit av teimum einstøku serkarakterunum. Karakterlistarnir verða undirskrivaðir av teimum, ið hava luttikið í dømingini. Avrit av karakterlistunum verður sligið upp beinanvegin aftaná at dømingin í hvørjari einstakari lærugrein er lokin á einum stað, sum prógtakararnir hava atgongd til.

§ 10.

Til skiparaprógv á 2. stigi verða givnar hesar skrivligu uppgávur.
Føroyskt: 1 fyrisøgn.
Siglingarlæra: 2 uppgávur á 3 tímar.
Rokning: 1 uppgáva á 3 tímar.

2. stk. Til prógtøkuna verða givnir tilsamans 17 karakterir.
Føroyskt: 1 kar.
Danskt: 1 kar.
Enskt: 1 kar.
Siglingarlæra: 6 kar. (2 fyri skr. uppgávur, 1 í fiskileiting, 1 í radar, 1 í nautiskum tólum og 1 í munnligari siglingarlæru.)
Sjómansskapur: 1 kar.
Sjóreglur: 1 kar.
Motorlæra og eldsløkking: 1 kar.
Sjórættur: 1 kar.
Heilsulæa: 1 kar.
Fiskiskaps- og fiskalívslæra: 1 kar.
Veður- og havlæra: 1 kar.
Rokning: 1 kar.

§ 11.

Til skiparaprógv av 1. stigi verða givnar hesar skrivligu uppgávur:
Føroyskt: 1 fyrisøgn.
Danskt: 1 fyrisøgn.
Enskt: 1 uppgáva, 3 tímar.
Siglingarlæra: 2 uppgávur á 3 timar.
Matematikk og rokning: 2 uppgávur : 3 tímar.
Fysikk og ravmagnslæra: 1 uppgáva, 3 tímar.
Sjómansskapur: 1 uppgáva, 3 tímar.
Sjórættur og rokniskapsføring: 1 uppgáva, 3 tímar.

2. stk. Til prógvtøkuna verða givnir tilsamans 17 karakterir.
Føroyskt« 1 kar.
Danskt: 1 kar.
Enskt: 2 kar. harav 1 fyri ta skrivligu uppgávuna.
Siglingarlæra: 4 kar. (2 fyri skrivl. uppg., 1 fyri tólkunleika og 1 fyri munnliga roynd).
Matematikk og rokning: 2 kar.
Fysikk og ravmagnslæra: 1 kar.
Sjómansskapur: 2 kar., harav 1 fyri ta skrivligu uppgávuna.
Signalering: 1 kar.
Motorlæra og eldsløkking: 1 kar.
Sjórættur: 2 kar., harav 1 fyri ta skrivligu uppgávuna.

§ 12.

Til stýrimansprógv verða givnar hesar skrivligu uppgávur:
Føroyskt: 1 fyrisøgn og 1 stílur, 4 tímar.
Danskt: 1 fyrisøgn og 1 stílur, 4 tímar.
Enskt: Umseting frá enskum til føroyskt og frá føroyskum til enskt av einum løttum teksti, 3 tímar.
Rokning og matematikk: 2 uppgávur, 6 tímar.
Fysikk og kemi: 1 uppgáva, 3 tímar.
Siglingarlæra: 2 uppgávur, 8 tímar.
Skipsteknikk: 1 uppgáva, 3 tímar.
Sjóreglur: 1 uppgáva, 3 tímar.

2. stk. Til prógvtøkuna verða givnir tilsamans 26 karakterir:
Føroyskt: 3 kar., harav 1 fyri fyrisøgnina og 1 fyri stílin.
Danskt: 3 kar., harav 1 fyri fyrisøgnina og 1 fyri stílin.
Enskt: 2 kar., harav 1 fyri skrivligu uppgávuna.
Rokning og matematikk: 2 kar.
Fysikk og kemi: 2 kar., harav 1 fyri skrivligu uppgávuna.

Siglingarlæra: 5 kar., harav 2 fyri skrivligar uppgávur og 2 fyri nýtslu av nautiskum tólum, harav ein fyri radarnýtslu.
Skipsteknikk: 2 kar., harav 1 fyri skrivligu uppgávuna.
Sjóreglur: 2 kar., harav 1 fyri skrivligu uppgávuna.
Signalering: 1 kar.
Sjórættur: 1 kar.
Maskinlæru: 1 kar.
Heilsulæru: 1 kar.
Røkiskapur: 1 kar.

§ 13.

Til skipsføraraprógv verða givnar hesar skrivligu uppgávur:
Føroyskt: 1 tænastufrágreiðing, 4 tímar.
Danskt: 1 tænastufrágreiðing, 4 tímar.
Enskt: Umseting frá enskum til føroyskt og frá føroyskum til enskt, 4 tímar.
Siglingarlæra: 2 uppgávur, 8 tímar (1 av uppgávunum skal viðvíkja radarteori og røking og nýtslu av radar).
Skipsteknikk: 1 uppgáva, 4 tímar.
Landalæra og veðurlæra: 1 uppgáva, 3 tímar.
Sjórættur og handilslæra: 1 uppgáva, 3 tímar.

2. stk. Til prógvtøkuna verða givnir 19 karakterir:
Føroyskt: 1 karakter.
Danskt: 1 karakter.
Enskt: 2 karakterir, harav 1 fyri skrivligu uppgávuna.
Siglingarlæra: 5 karakterir, harav 2 fyri skrivligar uppgávur, 1 fyri radarteori og røking og nýtslu av radar, og 1 fyri nýtslu og kunnleika til hini nautisku amboðini.
Skipsteknikk: 2 karakterir, harav 1 fyri skrivligu uppgávuna.
Lastviðgerð: 1 karakter.
Heilsulæra: 1 karakter.
Landalæra og veðurlæra: 2 karakterir, harav 1 fyri skrivligu uppgávuna.
Sjórættur og handilslæra: 2 karakterir, harav 1 fyri skrivligu uppgávuna.
Shipping: 1 karakter.
Røkiskapur: 1 karakter.

§ 14.

